# *IV. Álit og aðrar niðurstøður hjá umboðsmanninum í málum avgreidd í 2005*

## *23. Vinnulívs- og Fiskivinnumál v.m.*

### 23.1. Handfaring av umsókn um fiskiloyvi til bát í bólki 5b.

Umboðsmaðurin hevur viðgjørt eina klagu um viðgerðartíðina hjá Fiskimálaráðnum í tveimum umførum av einari umsókn um fiskiloyvi í bólki 5b. Fyrra umsóknin, sum snúði seg um fiskiloyvi fyri tíðarskeiðið 1. mars – 1. sept. 2004, var ikki avgreidd fyrr enn 20. juli 2004. Hesa viðgerðartíðina helt umboðsmaðurin als ikki vera nøktandi, og gav tí Fiskimálaráðnum eina átalu fyri hetta, eins og hann mælti ráðnum til at umhugsa, hvussu umsóknirnar kundu avgreiðast skjótari. Seinna umsóknin, sum fevndi um tíðarskeiðið 1. sept. 2004-1. mars 2005, var ráðnum í hendi 2. sept. 2004, men ikki fyrr enn 17. jan. 2005 var eitt fyribilsloyvi útskriva eigaranum, tí at ráðið var farið at ivast í heimildum sínum at veita fiskiloyvi til bátin. Umboðsmaðurin gav eisini Fiskimálaráðnum átalu fyri hesa viðgerðartíðina. Av tí at ráðið framvegis ikki hevði tikið støðu til spurningin, um klagarin hevði rætt til fiskiloyvi, gjørdi umboðsmaðurin ikki meira við tann spurningin. (J. nr. 200400083)

### Klagan

Við skrivi, dagfest 10. nov. 2004, hava A og B sent umboðsmanninum soljóðandi klagu:

„Klaga viðvíkjandi umsókn um fiskiloyvi 5B til bát undir 15 Brt.
Undirritaðu fara við hesum at kæra handfaringina í Fiskimálaráðnum av umsókn um fiskiloyvi í bólki 5B til bát okkara B1.

Báturin, fyrrverandi navn B2, bleiv av okkum keyptur frá C í desember 2003, og bleiv avtalað, at fiskiloyvið báturin hevði skuldi fylgja bátinum. Umsókn um at flyta fiskiloyvið til nýggja eigaran A bleiv sent Fiskimála-

ráðnum tann 15. decembur 2003, og avgreitt tann 16. januar 2004. Sí hjálagda avrit (1) av umsókn og fiskiloyvinum.

Tíðliga í mars 2004 ringdu vit til Fiskimálaráðið, og bóðu um at fáa dagført fiskiloyvið fyri tíðarskeiðið 1. mars-1. septembur 2004. Svarið frá Fiskimálaráðnum var, at málið skuldi finnast fram og avgreiðast. Tá ið málið ikki bleiv avgreitt ringdu vit av og á inn til Fiskimálaráðið, og bóðu um at fáa hetta mál avgreitt. Í telefonsamrøðu tann 20. apríl 2004 bað Fiskimálaráðið um at fáa eina skrivliga umsókn, henda umsókn bleiv send sama dag. Sí hjálagda avrit (2). Og so gekk tíðin onki hoyrdist aftur frá Fiskimálaráðnum. Vit fóru aftur at ringja og spyrja um at fáa dagført omanfyri nevnda fiskiloyvi. Ikki fyrr enn tann 20. juli 2004 bleiv umsóknin gingin á møti. Sí avrit (3) av hjálagda fiskiloyvinum. Tá vóru 4 mánaðir og 20 dagar farnir av 6 mánaða tíðarskeiðnum loyvið er galdandi fyri, og harvið meginparturin av fiskidøgunum í nevnda tíðarskeiði. Fiskimálaráðið gav ongantíð nakra frágreiðing um, hví tað tók so langa tíð at avgreiða málið.

Seinast í august mánað sendu vit so Fiskimálaráðnum umsókn um dagføring av fiskiloyvinum fyri tíðarskeiðið 1. september 2004 – 1. mars 2005. Hóast vit fleiri ferðir síðani hava ringt til Fiskimálaráðið, og spurt eftir málinum, og harumframt hava sent tvær skrivligar áminningar, sí hjáløgdu skriv (4.1 og 4.2), hava vit dags dato enn onki svar fingið uppá umsókn okkara.

Til dagin í dag eru sostatt gingnir 2 mánaðir og 10 dagar av nevnda tíðarskeiði – dagar sum kundu verður brúktir til fiskiskap, men sum ístaðin eru brúktir uppá at ganga og bíða eftir neyðuga fiskiloyvinum.

Teir 8 mánaðarnir og 10 dagarnir, sum í skrivandi løtu eru gingnir síðani 1. mars, hava vit bert kunna brúkt bátin til fiskiskap í 1 mánað og 10 dagar – og hetta uttan at vit hava fingið nakra veruliga grundgeving frá Fiskimálaráðnum.

Eftir okkara tykki er talan um eina – mótvegis borgaranum – fullkomuliga fyrilitaleysa fyristing, sum undir ongum umstøðum kann góðtakast, og verður tí henda klaga latin tygum, við vón um at málið verður kannað."

## Málsgongd

Sambært skjølunum hevur gongdin í málinum verið hendan:

- Báturin B3, …, ið er ein 28 fót glastrevjabátur, verður av eigaranum, P/F D, tilmeldaður bátayvirlitinum 3. aug. og skrásettur 11. aug. 1989. Í tilmeldingarskjalinum verður upplýst, at báturin verður nýttur til alivinnu.
- C keypir bátin, sum 15. aug. 2001 verður skrásettur í bátayvirlitinum undir navninum: B2, …
- Eigarin søkir 29. aug. 2002 um fiskiloyvi 5b til bátin fyri tíðarskeiðið 1. sept. 2002 – 28. febr. 2003. Umsóknin verður móttikin í Fiskimálaráðnum 2. sept. 2002 og avgreidd sama dagin.
- Eigarin søkir aftur 14. febr. 2003 um fiskiloyvi fyri tíðarskeiðið 1. mars-31. aug. 2003. Umsóknin verður móttikin í Fiskimálaráðnum 18. febr. og avgreidd 28. febr. 2003.
- Eigarin søkir aftur 11. aug. 2003 um fiskiloyvi fyri tíðarskeiðið 1. sept. 2003 – 29. febr. 2004. Umsóknin verður móttikin í Fiskimálaráðnum 15. aug. og avgreidd 21. aug. 2003.
- 10. des. 2003 verður báturin aftur tilmeldaður bátayvirlitinum við nýggjum navni og eigara. Báturin eitur nú B1, og eigarin er A. Báturin er skrásettur 12. des. 2003.
- Við skrivi, dagfest 15. des. 2003, sendi A Fiskivinnustovuni umsókn um at flyta fiskiloyvi í sítt navn. Umsóknin, ið er móttikin í Fiskimálaráðnum 17. des. 2003 og avgreidd 16. jan. 2004, er soljóðandi:

„Viðvíkjandi eigaraskifti av fiskiloyvi

Undirritaða hevur yvirtikið bát og fiskiloyvið frá C.

Vinarliga flyt fiskiloyvið til nýggja eigaran sambært upplýsingunum í hjálagda skjalinum „Tilmelding til Bátayvirlitið"

Við skrivi, dagfest 20. apríl 2004, søkti A um at fáa endurnýggja fiskiloyvi. Umsóknin, ið er móttikin í Fiskimálaráðnum 26. apríl og avgreidd 20. juli 2004, er soljóðandi:

**„Viðvíkjandi fiskiloyvi**

Vinarliga skriva inn nýtt tíðarskeið á fiskiloyvið hjá

**m/s B1…"**

Við skrivi, dagfest 31. aug. 2004, søkti A aftur um at fáa endurnýggja fiskiloyvi. Umsóknin, ið er móttikin í Fiskimálaráðnum 2. sept. 2004, er soljóðandi:

> „Viðvíkjandi fiskiloyvi
> Vinarliga skriva inn nýtt tíðarskeið á fiskilovvið hjá m/s B1…
> Vónandi verður hetta avgreitt stundisliga"

20. okt. 2004 móttók Fiskimálaráðið skriv, dagfest 14. okt. 2004, frá A og B, ið er soljóðandi:

> **„Viðvíkjandi fiskiloyvinum hjá m/s B1…:**
> Aftaná skrivliga umsókn og óteljandi telefonsamtalur bleiv fiskiloyvið fyri fyrra hálvár 2004 hjá omanfyri nevnda báti dagført tann 20. juli 2004. Fýra mánaðir og 20 dagar vóru tá gingnir av tíðarskeiðnum. Fiskimálaráðið gav onga frágreiðing ella grundgeving fyri hví so lang tíð skuldi ganga áðrenn omanfyri nevnda mál varð avgreitt, hóast umsókn bleiv send Fiskimálaráðnum.
>
> Nú eru vit aftur í einum nýggjum tíðarskeiði, sum byrjaði 1. september 2004. Skrivlig umsókn er send Fiskimálaráðnum tann 31. august 2004 um dagføring av fiskiloyvinum. Sambært telefonsamtalum skuldi málið finnast, og leggjast fram fyri rætta viðkomandi, men framvegis er einki hent í málinum. Eftir tveimum telefonsamtalum tann 6. oktobur hendi nakað. Ein í nevndist E tók um endan og upplýsti at omanfyri nevnda fiskiloyvið var møguliga úskrivað í heimildarloysi í ár 2001 (báturin varð keyptur í decembur 2003), og at Fiskimálaráðið er farið í sjálvsrannsakan við at senda málið til advokatar, og nú skulu vit bíða til úrslitið kemur frá teimum. Vit hava biðið um eina skriftliga frágreiðing frá Fiskimálaráðnum um hvussu tingini hanga saman, men hon er ikki komin enn. Vit vita tí framvegis ikki, hvat tað er, ið gongur fyri seg, og kenna okkum at vera í einari rættliga hjálparsleysari støðu. Báturin liggur svínabundin, og kann ikki nýtast til tað, ið hann var keyptur til (vit missa dagliga arbeiðsinntøku!). Handfaringin av hesum máli er als ikki nøktandi – serliga orsaka av manglandi kunnan! Av tí orsøk verður heitt á Fiskimálaráðið um at svara fylgjandi spurningum:
>
> 1. Hvat er grundgevingin fyri, at upplýsningar hesum málið viðvíkjandi ikki eru kunnaðar rætta viðkomandi (hví hava vit einki svar fingið?).

2. Hvør er grundgevingin fyri ikki at dagføra omanfyri nevnda fiskiloyvið?
3. Hví skal eigarin av m/s B1 líða undir hvat Fiskimálaráðið møguliga hevur gjørt skeivt í ár 2001 (báturin bleiv av okkum keyptur í 2003 treytað av at fiskiloyvið fylgdi við!)?
4. Hevur Fiskimálaráðið eitt legalt grundarlag við at takað arbeiðstól úr hondunum á fólki – uttan grundgivna fráboðan?
5. Hví verður fiskiloyvið ikki dagført ímeðan advokatarnir kanna málið? Og hvussu leingi kann málið væntast at draga út?
6. Hvør skal hefta fyri mista arbeiðsinntøku og fyri tann umsitingarfeilin, sum Fiskivinnuráðið møguliga hevur gjørt við at útskriva loyvið í heimildarloysið?

Vónandi fæst greiðu á støðuni sum skjótast, og vænta vit svar uppá omanfyri nevndu spurningar í nærmastu framtíð."

4. nov. 2004 móttók Fiskimálaráðið soljóðandi skriv frá A og B, dagfest 1. nov. 2004:

**„Viðvíkjandi fiskiloyvinum hjá m/s B1…:**
Tá ið Fiskimálaráðið ikki hevur svarað teimum seks spurningunum í brævinum frá tann 14. oktobur, um handfaringina av omanfyri nevnda fiskiloyvi, ganga vit nú út frá, at her er okkurt sum fullkomuliga er farið av sporinum.

Nú eru gingnir átta mánaðir síðani hetta myrkaspæl byrjaði, og vit halda tað verða óluksáliga langt úti, at ein almennur stovnur ikki vil svara hvat í teir havast við, viðvíkjandi fiskiloyvinum hjá omanfyri nevnda báti.

Fæst ikki skrivligt svar uppá teir seks spurningarnar í brævinum frá 14. oktobur, sum er hjálagt, innan mánadagin tann 8. novembur fara vit at heita á Løgtingsins Umboðsmann, um at koma við einari niðurstøðu."

E, deildarstjóri í Fiskimálaráðnum hevur gjørt soljóðandi upprit um málið, dagfest 8. nov. 2004:

**„B1 … Skrásettur sum alibátur í 1989. Kann hann fáa fiskiloyvi?**
Her talan um ein kokteil av ymiskum bátum og eigarum. Sentrali persónurin í málinum er C, men tað eru A og B, … sum hava reist málið. Tey hava keypt ein bát frá C, sum nú vísir seg upprunaliga at verða tilmeldaður sum alibátur í 1989. At C hevur átt ein annan bát við sama navni, sum er seldur einum øðrum persóni, ger málið upp aftur fløktari.

**Málsgongd**

- Báturin B3 verður skrásettur sum nýggjur alibátur 3. august 1989.
- C keypir bátin 15. august 2001 og gevur honum navni B2. C søkir um fiskiloyvi 16. august 2001, sum verður játtað honum í februar 2002. Hann fekk fiskiloyvi skriva fleiri skeið aftaná.
- Tann 12. desember 2003 meldar A, … bátin til bátayvirlitið á … og søkir síðani nakrar dagar seinni Fiskivinnustovuna um fiskiloyvi.
- Umsóknin um fiskiloyvi verður gingin á møti – eisini fyri tíðarskeiðið mars-september 2004. Søkt verður aftur 31. august 2004, men nú verður komið fram á, at talan er um ein bát, sum upprunaliga er tilmeldaður sum alibátur.
- Tulkingin hjá Fiskivinnustovuni av ásetingini um 1. januar 1995 regluna og hugtakinum alibátar ger, at tað ikki verður mett at vera grundarlag fyri at skriva bátinum fiskiloyvi. Hetta verður tó ikki skrivliga fráboðað A. Sjálvur havi eg tosa við B og greitt honum frá málinum. Hann tóktist ovfarin. Síðani hevur hann sent Fiskivinnustovuni skriv við ymiskum spurningum málinum viðvíkjandi. Hann hevur ikki fingið svar.
- Áðrenn C keypti B3, hevði hann átt ein annan bát, sum eisini kallaðist B2. Hesin báturin kallaðist áðrenn m/b B4, men tá C keypti hann í mars 2001, gav hann honum eisini navnið B2. Henda bátin keypti F frá C í august 2001.
- B helt, at alibáturin, sum C keypti í august í staðin fyri tann fyrra B2, hevði fingið fiskiloyvi hjá hesum bátinum.

**Ummæli**

Spurningurin í øllum hesum er, um tað er í tráð við lógina um vinnuligan fiskiskap at skriva einum báti fiskiloyvi, sum av fyrstan tíð er skrásettur sum alibátur (1989), verður keyptur til fiskarí í 2001 og fær fiskiloyvi eftirfylgjandi tíðarskeið. Báturin verður aftur handlaður í desember 2003. Í september 2004 verður funnið fram til, at her er talan um ein alibát.

Kann Fiskivinnustovan við lógini í hondini siga við núverandi eigaran, at her er talan um ein alibát, sum av røttum ikki átti at fingið fiskiloyvi, tey árini han hevur fingið tey útskrivað, og at tað tí ikki ber til framhaldandi at skriva honum fiskiloyvi?

**Áheitan**

Løgfrøðingarnir verða vinarliga bidnir at viðgera málið og koma við tilmæli um avgerð.“

G, løgfrøðingur í Fiskimálaráðnum hevur síðani gjørt soljóðandi upprit, dagfest 26. nov. 2004:

**Upprit um fiskiloyvi til bátar undir 15 tons**

Fiskivinnustovan hevur í uppritum, dagfest 22. september og 8. november 2004, biðið um løgfrøðiliga ráðgeving í sambandi við avgreiðslu av fiskiloyvum til bátar undir 15 tons.

Málið hevur verið viðgjørt av løgfrøðingunum og aðalstjóranum á innanhýsis fundi tann 22. og 26. november 2004.

Fiskivinnustovan biður um løgfrøðiliga ráðgeving um fylgjandi viðurskifti:

1. Um útróðrarbátar undir 15 tons við fiskiloyvi, ið eru skrásettir 1. januar 1995 ella seinni, hava rætt til at fáa útskrivað fiskiloyvi.
2. Um ali- og frítíðarbátar undir 15 tons hava rætt til at fáa útskrivað fiskiloyvi.

**Ad. 1:**

Føroya Rættur hevur í dómi frá 27. januar 2004 (mál nr.: …) tikið støðu til eitt mál um fiskiloyvi til fiskifar, ið er skrásett eftir 1. januar 1995, og sum hevur fingið útskrivað fiskiloyvi í tíðarskeiðnum 23. mai 1995 og fram til lógarbroytingina í mars 2002.

Í dóminum verður víst til § 31, stk. 2 í løgtingslóg nr. 38 frá 26. mars 2002 um broyting í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap, ið ásetir, at bert fiskifør í bólki 5, ið eru skrásett í Føroyum fyri 1. januar 1995 kunnu fáa fiskiloyvi.

Rætturin vísir í hesum sambandi til fylgjandi lógarviðmerkingar í uppskotinum til lógarbroyting:

„Ad. 18) Skotið verður upp, at bátar undir 15 tons, sum vóru í flotanum fyri 1. januar 1995 og hava verið tað síðani, kunnu fáa fiskiloyvi.

Um tað mundið loyvisskipanin varð sett í verk í fyrru helvt av 1990-árunum, vóru nógvir føroyskir bátar, sum av ymiskum ávum ikki vóru í vinnu og tískil ikki søktu um ella fingu veiðiloyvi og fiskiloyvi útskrivað.

Uppskotið ber í sær, at heimild verður at skriva hesum bátum fiski-

loyvi. Bátar, sum eftir 1. januar 1995 eru farnir úr flotanum fyri nýggjar ella innfluttar bátar, kunnu tá ikki fáa fiskiloyvi".

Føroya Rættur vísir í hesum sambandi á fylgjandi viðurskifti:

„Både bemærkningernes ordlyd, samt henvisningen til § 29, stk. 1 indicerer, at den registrering der er påkrævet, er den registrering der giver mulig hed for at indtræde i fiskeriflåden.

…

Af bemærkningerne fremgår det endvidere, at det har været lovgiverens mening at afskære både under 15 tons, som er kommet til flåden efter 1. januar 1995, mulighed for at få fisketilladelse.

…

Da lovændringen i 2002 ikke har haft til formål at stramme betingelserne, men blot at lette administrationen for bådene i gruppe 5, således at der ikke skulle søges og tildeles fangsttilladelse, giver lovændringen i sig selv ikke grundlag for at afbryde en hidtil automatisk tildelt fiskeritilladelse. Da det imidlertid kan lægges til grund, at tildelingen har været uretmæssig, at tildelingerne har været tidsbegrænsede, at tildeling i hvert fald efter loven har krævet ansøgning og at det overordnede formål med loven har været ikke at øge fisketrykket, findes nægtelsen af fortsat at udstede uretmæssige fiskeritilladelser, på trods af sagsøgerens gode tro, berettiget."

Niðurstøðan hjá Føroya Rætti er sostatt, at bátar, ið eru skrásettir 1. januar 1995 ella seinni og sum hava fingið útskrivað fiskiloyvi eftir tað, <u>ikki</u> hava rætt til fiskiloyvi.

Í løgtingslóg nr. 80 frá 8. mai 2003 um broyting í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap, varð orðingin í § 31, stk. 2 broytt til:

„Stk. 2. Heimilað verður landsstýrismanninum í kunngerð at áseta nærri reglur fyri umsiting av fiskiloyvum í bólki 5, sbr. § 5, stk. 4, 2. punktum."

Í almennu lógarviðmerkingunum til lógarbroytingina verður m.a. víst á fylgjandi orsøkir til hesa lógarbroyting:

„Harumframt verður skotið upp at broyta § 31, stk. 2 í lógini soleiðis, at heimilað verður landsstýrismanninum í kunngerð at áseta nærri reglur fyri umsiting av fiskiloyvum í bólki 5. Ásetingin, sum varð gjørd í 2002, leggur ikki talið av veiðiloyvum fast, og hevur ásetingin tvey kriteriir, tvs. tvær dagfestingar, sum hevur við sær, at nakrir bátaeigarar ikki kunnu fáa útskrivað fiskiloyvi. Til tess at gera

skipanina smidligari verður tí skotið upp, at landsstýrismaðurin fær heimild til í kunngerð at áseta nærri reglur."

Í serligu lógarviðmerkingunum til hesa lógarbroyting verður víst á fylgjandi:

> „Skotið verður upp, at heimilað verður landsstýrismanninum at áseta í kunngerð nærri ásetingar fyri, hvussu talið av fiskiloyvum í bólki 5 verður stillað. Ætlanin er ikki at víkja nevnivert frá tí siðvenju sum er, men meiri at leggja upp fyri, at skipanin kann gerast smidligari enn nú."

Landsstýrismaðurin hevur enn ikki ásett nakrar reglur í kunngerð fyri umsiting av fiskiloyvum í bólki 5, og tískil er rættarstøðan fyri umsiting av fiskiloyvunum í bólki 5 ikki broytt í mun til rættarstøðuna fyri lógarbroytingina.

Løgtingsins Umboðsmaður vísir í áliti, dagfest 2. apríl 2004, á fylgjandi viðurskifti viðvíkjandi umsitingini av fiskiloyvum til útróðrarbátar undir 15 tons:

> „Tað er ikki nøktandi, at tað í § 31, stk. 2 í lógini verður sagt, at nærri reglur fyri umsitingina av loyvunum kunnu ásetast í kunngerð, men at hetta framvegis ikki er gjørt. Eg haldi ikki, at tað í løtuni ber til, hvørki í lógini ella kunngerð at lesa, hvørjar treytirnar fyri fiskiloyvum til smábátarnar eru. Eg fari tí vísandi til § 12 í Umboðsmanslógini at mæla Løgtinginum og landsstýrismanninum til at fáa greiðar reglur ásettar í lóg ella kunngerð á hesum økinum."

Tað er tískil av alstórum týdningi, at nærri reglur verða ásettar í lóg ella kunngerð, viðvíkjandi umsitingini av fiskiloyvunum í bólki 5.

Í áliti frá Løgtingsins Umboðsmanni, dagfest 11. februar 2004, er Umboðsmaðurin komin til somu niðurstøðu sum Føroya Rættur, viðvíkjandi spurninginum um bátar skrásettir 1. januar 1995 ella seinni hava rætt til fiskiloyvi. Umboðsmaðurin vísir í sínari niðurstøðu á m.a. fylgjandi viðurskifti:

> „Eg haldi ikki, at tað í viðmerkingunum til § 31, stk. 2 ella eftir tí, sum annars er upplýst í málinum, er grundarlag fyri at halda, at treytin um, at báturin skuldi vera skrásettur í Føroyum áðrenn 1. januar 1995 og framvegis skuldi vera skrásettur, ikki skuldi takast bókstaviliga. Lógin sigur púra greitt, at tað vóru bátar, sum vóru skrásettir pr. 1. januar 1995, og sum framvegis vóru skrásettir, sum kundu fáa fiskiloyvi. Eg dugi als ikki at síggja, at nøkur andsøgn er millum lógartekstin og hendan partin av viðmerkingunum. Bátar sum ikki hava verið skrásettir áðrenn 1. januar 1995, kundu ikki fáa fiskiloyvi við heimild í § 31, stk. 2.

…

Í klaguni verður ført fram, at sjálvt um tulkingin hjá Fiskimálaráðnum er tann rætta, so átti H kortini at havt fingið fiskiloyvi, tí at hann bæði í 1999 og 2000-2001 hevði fingið útskrivað fiskiloyvi, og at hann tí hevði „en berettiget forventning“ um at fáa útskrivað nýtt fiskiloyvi.

Hertil er at siga, at hóast báturin B5 …, hevur fingið loyvi til at reka húkaveiðu í tveimum avmarkaðum tíðarskeiðum í ávikavist 1999 og 2000-2001, gevur hetta ikki í sjálvum sær H grundarlag fyri at ganga út frá, at hann eisini fór at fáa fiskiloyvi aftaná lógarbroytingina frá 26. mars 2002.“

Niðurstøða:

Vísandi til dómin í Føroya Rætti frá 27. januar 2004, og niðurstøðuni hjá Løgtingsins Umboðsmanni í álitinum frá 11. februar 2004, má tað leggjast til grund, at Fiskivinnustovan hevur heimild til at nokta at skriva út fiskiloyvi til bátar, ið eru skrásettir 1. januar 1995 ella seinni, hóast hesir hava fingið útskrivað fiskiloyvi fram til lógarbroytingina í mars 2002.

Mælt verður harumframt til, eins og Umboðsmaðurin vísir á, at greiðar reglur verða ásettar í lóg ella kunngerð fyri umsitingina av fiskiloyvum til útróðrarbátar undir 15 tons.

**Ad. 2:**

Spurningurin frá Fiskivinnustovuni um ivamálini í sambandi við fiskiloyvi til ali- og frítíðarbátar hevur verið viðgjørdur.

Alment kann sigast, at ali- og frítíðarbátar skrásettir 1. januar 1995 ella seinni, ikki hava rætt til fiskiloyvi, víst verður í hesum sambandi til dómin í Føroya Rætti frá 27. januar 2004, og niðurstøðuni hjá Løgtingsins Umboðsmanni í álitinum frá 11. februar 2004.

Fyri ali- og frítíðarbátar skrásettir fyri 1. januar 1995, er støðan løgfrøðiliga ógreið.

Mett verður tó, at Fiskivinnustovan fyribils kann útskriva teimum ali- og frítíðarbátum, ið longu hava fingið útskrivað fiskiloyvi, eitt fyribils tíðaravmarkað fiskiloyvi, inntil støða er tikin til hvussu rættarstøðan hjá hesum bátum verður, eftir at kunngerð ella lógarbroyting er sett í verk, ið greitt ásetir um ali- og frítíðarbátar skrásettir fyri 1. januar 1995 hava rætt til fiskiloyvi.

Í hesum sambandi skal undirstrikast, at Fiskivinnustovan í hesum fyri-

bils fiskiloyvum greitt eigur at tilskila, at talan bert er um eitt fyribils fiskiloyvi, ið ikki er at meta sum eitt endaligt fiskiloyvi, og at Fiskivinnustovan tilskilar sær rættin til ikki at útskriva hesum bátum fiskiloyvi seinni, um endalig støða verður tikin til í kunngerð ella lógarbroyting, at hesir bátar ikki hava rætt til fiskiloyvi.

Í málinum um bátin B1, ið Fiskivinnustovan vísir til í uppriti frá 8. november 2004, verður mælt til, at Fiskivinnustovan beinanvegin tekur stig til at svara teimum spurningum skrivliga, ið settir eru Fiskivinnustovuni frá bátaeigaranum, og samstundis verður mælt til, at Fiskivinnustovan útskrivar bátinum eitt fyribils tíðaravmarkað fiskiloyvi, sambært omanfyristandandi."

Hetta fyribils fiskiloyvið, sum kortini ikki verður útskrivað fyrr enn 17. jan. 2005, er soljóðandi:

**„FYRIBILS FISKILOYVI**
**BÓLKUR 5B**
**Aðrir útróðrarbátar undir 15 Brt.**

Samsvarandi § 5, stk. 4, 3. punktum í løgtingslóg nr. 28 frá 10. mars 1994 um vinnuligan fiskiskap við seinni broytingum, veitir Fiskimálaráðið við hesum

m/s **B1** ...

loyvi at reka **húkaveiðu** á føroysku landleiðunum.

*Fiskiloyvið verður latið fyribils samsvarandi § 5, stk. 4, 3. punktum í løgtingslóg nr. 28 frá 10. mars 1994 um vinnuligan fiskiskap við seinni broytingum.*

*Reglurnar um umsiting av fiskiloyvum eru undir endurskoðan. Fiskimálaráðið kann ikki veita trygd fyri, at fiskifarinum verður latið fiskiloyvi aftaná endurskoðanina.*

Hetta loyvið, ið er samsvarandi treytunum í lógini og kunngerðum ásettar við heimild í hesi lóg, er galdandi í tíðarskeiðnum:

**17.01.2005-28.02.2005**

treytað av:

1. at í tíðarskeiðinum **01.09.2004 – 28.02.2005** verður fiskað innanfyri eitt felags fiskidagatal, sum fyri bólk **5B** er **4290** dagar
2. at skiparin / formaðurin hvørja viku sendir yvirlit yvir brúktar fiskidagar (vikuseðil) til Fiskiveiðieftirlitið, Postsmoga 347, 110 Tórshavn

3. at báturin heldur galdandi reglur um ikki at blaka veiði fyri borð, um veiðihátt og minstamát á fiskasløgum, og at flokkað veiðina eftir slag og nøgd
4. at bert er loyvt at avreiða veiðina um eina góðkenda innvigingarskipan í Føroyum, og í útlandinum um eina innvigingarskipan, sum Fiskiveiðieftirlitið hevur góðkent
5. at fiskiskapur skal steðga, tá ið fiskidagarnir hjá bólkinum eru nýttir

Í beinleiðis veiðu við línu verður ein fiskidagur roknaður frá tí farið verður og fyri hvørjar 24 tímar. Í beinleiðis veiðu við snellu er ein fiskidagur eitt samdøgur, roknað frá midnátt til midnátt. Talið av fiskidøgum, ið eitt fiskifar hevur nýtt ein túr, verður roknað frá tí at farið verður úr havn til komið er aftur í havn. Tað ber einans til at rokna við heilum fiskidøgum.

Virking av veiðu umborð á fiskiførum undir føroyskum flaggi á føroysku landleiðunum er bert loyvd eftir góðkenning frá Fiskimálaráðnum.

Fiskiveiðieftirlitið hevur eftirlit við landing og veiðinøgdum og kann seta eygleiðarar umborð sambært eygleiðaraskipanini.

Skiparin / formaðurin hevur ábyrgdina av, at treytirnar í hesum fiskiloyvi verða gjølliga fylgdar.

Brot á treytirnar verður revsað samsvarandi lógini um vinnuligan fiskiskap."

## Partshoyring

Umboðsmaðurin gjørdi av at kanna hetta málið nærri, og við skrivi, dagfest 15. nov. 2004, bað hann Fiskimálaráðið um eina frágreiðing um málið.

Við skrivi, dagfest 17. des. 2004, hevur Fiskimálaráðið latið umboðsmanninum soljóðandi frágreiðing:

**„Viðvíkjandi kæru til Løgtingsins Umboðsmann um fiskiloyvi til m/s B1**

Løgtingsins Umboðsmaður hevur í skrivi, dagfest 15. november 2004, heitt á Fiskimálaráðið um at fáa eina frágreiðing um viðgerðina av málinum um fiskiloyvi til m/s B1, umframt avrit av skjølum viðvíkjandi hesum málinum.

Fiskimálaráðið hevur hesar viðmerkingar til málið:

Fiskivinnustovan hevur í høvuðsheitum lýst málsgongdina í hesum máli, í hjálagda uppriti, dagfest 8. november 2004.

Í kæruni frá A og B, …, verður víst á, at tey tíðliga í mars mánað bóðu um at fáa dagført fiskiloyvið fyri tíðarskeiðið 1. mars-1. september 2004, men at umsóknin ikki varð gingin á møti fyrr enn 20. juli sama ár, hóast tey høvdu rykt fleiri ferðir eftir svari.

Kæran vísir eisini til, at B og A seinast í august mánað 2004 sendu inn umsókn um dagføring av fiskiloyvinum fyri tíðarskeiðið 1. september-1. mars 2005, men at tey enn einki svar hava fingið hesum viðvíkjandi, hóast tey hava rykt fleiri ferðir eftir svari.

Fiskimálaráðið tekur sjónarmiðini hjá B og A til eftirtektar, og ásannar, at málsviðgerðin í hesum máli ikki hevur verið nøktandi.

Fiskimálaráðið arbeiðir við at fáa hesi viðurskifti í rættlag, soleiðis at tryggjað verður, at málsviðgerðin heldur seg til galdandi fyrisitingarlóg og aðrar siðvenjur á økinum.

Samstundis verður boðað frá, at Fiskivinnustovan hevur tikið avgerð um beinanvegin at útskriva bátinum m/s B1, eitt fyribils tíðaravmarkað fiskiloyvi.

Grundgevingin hjá Fiskivinnustovuni fyri kortini ikki at ganga umsóknini um fiskiloyvi fult á møti er, at báturin m/s B1 upprunaliga er tilmeldaður bátayvirlitið sum alibátur. Henda skrásetingin ger rættarstøðuna hjá bátinum óvissa, vegna at lóggávan á økinum er ógreið um hesir bátar hava rætt til fiskiloyvi.

Fiskimálaráðið arbeiðir í løtuni við at gera nýggjar reglur fyri fiskiloyvini í bólki 5, og boðar Fiskivinnustovan tí umsøkjarunum frá, at málið um fiskiloyvi til m/s B1 verður viðgjørt av nýggjum, tá ið nýggju reglurnar fyriliggja.

./.Hjálagt er avrit av skjølum í málinum um m/s B1.“

Við skrivi, dagfest 21. des. 2004, vórðu hesar viðmerkingarnar og umrødda upprit send klagarunum til ummælis.

Við skrivi, dagfest 16. jan. 2005, hava klagararnir sent umboðsmanninum hesar viðmerkingar:

„Viðmerkingar til skriv dagfest 17. des. og upprit dagfest tann 8. nov. frá Fiskimálaráðnum

Undirritaðu ynskja hervið at gera viðmerkingar til málið viðvíkjandi fiskiloyvinum hjá m/s B1, og serliga til upprit um málið, dagfest 8. november.

Nevnda upprit er fløkt og ørkymlandi, og í nøkrum førum beinleiðis misvísandi. Fyri tað fyrsta er yvirskriftin á uppritinum misvísandi, tí B1 hevur ongantíð verið skrásettur sum alibátur. Sambært C hevur báturin heldur ikki verið skrásettur sum alibátur í tí tíðarskeiðinum, hann átti bátin, t.v.s. august 2001 – desember 2003.

Fyri tað næsta hevur A ongantíð søkt um at fáa fiskiloyvi, men bara um at fáa dagført ta fiskiloyvið, sum fylgdi við bátinum, tá ið hann bleiv keyptur í desember 2003. Tað er rætt, at 12. desember 2003 meldar A seg sum nýggjan eigara av bátinum til bátayvirlitið á …, sum tá fær navnið B1. Tað er ikki rætt at A søkir um fiskiloyvi frá Fiskivinnustovuni. A søkti um at fáa flutt fiskiloyvið hjá m/s B2 til nýggja eigaran sambært hjáløgdum upplýsingum, harímillum fiskiloyvið hjá m/s B2.

Fyri tað triðja skrivar Fiskimálaráðið, at umsókn um fiskiloyvi varð gingin á møti – eisini fyri tíðarskeiðið mars-septembur 2004. Hetta er ikki rætt. Aftaná tógvi stríð varð fiskiloyvið dagført 20. juli – tá vóru bert fáar vikur eftir av galdandi tíðarskeiði. Í hesum sambandi kann nevnast, at undirritaðu undrast á, at Fiskivinnustovan í uppritinum skrivar, at ikki fyrr enn tá ið søkt verður eftir nýggjari dagføring hin 31. august 2004 verður *„…komið fram á, at talan er um ein bát, sum upprunaliga er tilmeldaður sum alibátur“*. Um tað ikki verður komið fram á hetta fyrr enn september 2004, hvat var so orsøkin til manglandi dagføringina av fiskiloyvinum í tíðarskeiðinum mars-september 2004?

Fyri tað fjórða skrivar Fiskivinnustovan í uppritinum, at teirra tulking av ásetingini um *„1. januar 1995 regluna og hugtakinum alibátar“* ger, at tað ikki verður mett at vera grundarlag fyri fiskiloyvi. Skrivað verður somuleiðis, at E telefoniskt hevur greitt B frá málinum. Sum nevnt í skrivið okkara til Fiskimálaráðið, dagfest 14. oktobur 2004, hevur E einki annað greitt frá enn at fiski-loyvið „møguliga“ varð útskrivað í heimildarloysið. Eingin frágreiðing fylgdi við. Sagt var bara, at málið var latið løgfrøðingum. Víðari skrivar Fiskivinnustovan, at B *„tóktist ovfarin“*. Ja, sjálvandi var B bilsin, tí áðrenn 6. oktobur hevði hann einki frætt um, at Fiskimálaráðið var farið í sjálvrannsakan og møguliga fór at taka fiskiloyvi frá m/s B1.

Síðstu fimm reglurnar í lýsingini av „málsgongdini“ sýnast at vera fullkomiliga óviðkomandi. At C hevur átt annan bát við sama navni skuldi ikki havt nakran týdning fyri hetta málið.

Endaligt í uppritinum setir Fiskivinnustovan spurningin, um tað er í tráð við lógina um vinnuligan fiskiskap at skriva einum báti fiskiloyvi, sum av fyrstan tíð er skrásettur sum alibátur. Vit meta, at hesin spurningurin átti at verið bæði settur og svaraður longu í 2001, tá ið fiskiloyvið á fyrsta sinni varð givið C, táverandi eigara av bátinum.

Tá ið C fekk munnliga játtan frá Fiskivinnustovuni um fiskiloyvi til fyrrverandi alibát B3, keypti C bátin í 2001. Báturin fekk navnið B2 og bleiv umbygdur til fiskibát. Fiskivinnustovan helt orð, og útskrivaði **øll árini** fiskiloyvi til m/s B2. Nú vit í góðari trúgv hava keypt bátin, spyr Fiskivinnustovan, um hon við lógini í hondini kann siga **við okkum**, at talan er um ein alibát, sum ikki átti at fingið fiskiloyvi. Kann hetta vera rætt?

Aðalskrivstovan í Fiskimálaráðnum sigur í skrivinum, dagfest 17. desember, at Fiskimálaráðið í løtuni arbeiðir við at gera nýggjar reglur fyri fiskiloyvini í bólki fimm, og at fiskiloyvi til m/s B1 verður viðgjørt av nýggjum, tá ið nýggju reglurnar fyriliggja. Kann Fiskimálaráðið uttan víðari smíða nýggjar reglur, og viðgera eitt 3-4 ára gamalt fiskiloyvi við hesum nýggju reglum?

Í sama skrivi verður annars upplýst fyri Umboðsmanninum, at Fiskivinnustovan hevur tikið avgerð um beinanvegin at útskriva bátinum m/s B1 eitt fyribils tíðaravmarkað fiskiloyvi. Hóast ein mánaður er farin síðani nevnda skriv var skrivað, hava vit enn onki hoyrt frá Fiskimálaráðnum, og eru nú 4 mánaðir og 16 dagar farnir av hesum tíðarskeiðinum, uttan at vit hava fingið svar uppá umsókn okkara frá august 2004, um dagføring av fiskiloyvinum. Óskilið heldur fram.

Fiskimálaráðið hevur eftir okkara tykki handfarið málið ómetaliga óprofessionelt. Málsviðgerðin hevur verið sein og bæði fyrilita- og skilaleys.

At Fiskimálaráðið sjálvt møguliga hevur gjørt ein feil í 2001 mótvegis undanfarna eigara, er okkum óviðkomandi, og eiga vit ikki at bøta fyri tað. Hvat við búskaparligu avleiðingunum hjá undirritaðu? Hvør skal svíða fyri at báturin missur virði, um fiskiloyvið verður tikið, og hvør skal svíða fyri mista inntøku? Er hetta ikki at spæla við tilveruni hjá okkum? Hvar er rættartrygdin í hesum máli?“

Við skrivi, dagfest 20. jan. 2005, vórðu hesar viðmerkingarnar sendar Fiskimálaráðnum til ummælis.

Við skrivi, dagfest 8. febr. 2005, hevur Fiskimálaráðið sent umboðsmanninum hesar viðmerkingarnar:

**Viðvíkjandi kæru frá A og B til Løgtingsins Umboðsmann**
Løgtingsins Umboðsmaður hevur í skrivi, dagfest 20. januar 2005, vent sær til Fiskimálaráðið í sambandi við kærumálið um m/b B1. Hjálagt skrivinum frá Umboðsmanninum er skriv frá kærarunum, ið verður sent Fiskimálaráðnum til ummælis.

Fiskimálaráðið hevur fylgjandi viðmerkingar til hetta skriv:

Fyrst skal verða sagt frá, at Fiskivinnustovan av misgávum ikki beinanvegin útskrivaði bátinum m/b B1 eitt fyribils tíðaravmarkað fiskiloyvi, ið annars varð fráboðað í skrivinum frá Fiskimálaráðnum, dagfest 17. desember 2005. Fiskivinnustovan hevur nú boðað frá at fiskiloyvið er útskrivað bátinum og sent eigaranum.

Fiskivinnustovan hevur annars fylgjandi viðmerkingar til skrivið frá A og B:

Málið snýr seg um báturin m/b B1 kann fáa fiskiloyvi. Fiskivinnustovan hevur sett spurnartekin við hetta, tí hesin báturin upprunaliga hevur verið skrásettur sum alibátur.

A og B føra fram, at m/b B1 ikki hevur verið skrásettur sum alibátur, og at báturin heldur ikki var tað, tá C átti bátin undir navninum B2. Tað er rætt, at báturin við hesum eigarum og nøvnum ikki var skrásettur sum alibátur, men kjarnin í málinum er, at báturin undir einum øðrum navni og einum øðrum eigara – nevniliga m/b B3 hjá P/F D – var skrásettur sum alibátur í 1989. Hesa gongd vátta A og B í einum øðrum broti í teirra brævi.

Sostatt er talan um ein upprunaligan alibát.

Fiskivinnustovan hevur ikki lagt dent á, um A hevur søkt um at fáa fiskiloyvi ella biðið um at fáa fiskiloyvið dagført. Tað eru ikki orðingarnar, sum eru avgerandi í hesum føri. Avgerandi er, at báturin m/b B1 – fyrrverandi m/b B2 og B3 – verður skrásettur við nýggjum eigara og hesin vendir sær til Fiskimálaráðið um at fáa fiskiloyvi útskrivað í sínum navni. Tað skal fiskiloyvi verða sambært § 5, stk. 4 í lógini um vinnuligan fiskiskap.

Í viðmerkingunum siga A og B tilvísingina í uppritinum frá Fiskivinnustovuni, dagfest 8. november 2004, til ein annan bát hjá C, at vera fullkomuliga óviðkomandi. Fiskivinnustovan hevur í uppritinum sagt frá, hví hesin báturin verður tikin við – nevniliga tí B hevði ført fram, at tá C hevði keypt B3, flutti hann fiskiloyvi av sínum báti m/b B2 (fyrrverandi m/b B4) á m/b B3. Um so var, var talan um ein bát, hvørs fiskiloyvi kom av einum upprunaliga skrásettum fiskibáti – ikki alibáti."

Við skrivi, dagfest 21. febr. 2005, vórðu hesar viðmerkingar sendar klagarunum til ummælis.

Við skrivi, dagfest 1. mars 2005, hava klagararnir sent umboðsmanninum soljóðandi viðmerkingar:

**„Viðmerkingar til skriv dagfest tann 8. februar frá Fiskimálaráðnum**
Undirritaðu ynskja hervið at gera viðmerkingar til omanfyri nevnda skriv frá Fiskimálaráðnum.

Vit hava 17/01-2005 móttikið eitt *fyribils tíðaravmarkað fiskiloyvi.* Sí hjálagda avrit við viðmerkingum. Hvørjar heimildir hevur Fiskimálaráðið at broyta verandi fiskiloyvi til eitt fyribils fiskiloyvi? Skal hetta skiljast soleiðis at Fiskimálaráðið handlar eftir nýggjum reglum.

Hetta fyribils fiskiloyvið sum longu nú manglar dagføring, er ikki tað vit sóknast eftir. Vit sóknast eftir at fáa tað fiskiloyvi, sum fylgdi við bátinum, tá ið hann varð keyptur í desember 2003.

Fiskivinnustovan ger sær stóran ómak at staðfesta at m/s B1 upprunaliga er ein alibátur. Í okkara skrivi frá 16. januar, sum Fiskivinnnstovan ger viðmerkingar til kemur klokkuklárt fram at báturin upprunaliga er ein alibátur. Tað var hann eisini tá ið Fiskivinnustovan útskrivaði bátinum fiskiloyvi í 2001.

Eg B fari hervið at biðja meg undan, at Fiskivinnustovan leggur mær orð í munnin. Eg havi ongantíð ført fram, at C flutti fiskiloyvi av øðrum báti yvir á m/b B3. (núverandi B1)

At C hevur átt aðrar bátar er okkum ókent, og fullkomiliga óviðkomandi.

Samanumtikið kenna vit okkum ógvuliga hjálparleys nú Fiskimálaráðið útskrivar okkum eitt fyribils fiskiloyvi. Sambært fyrrverandi eigara útskrivaði Fiskivinnustovan í 2001 m/s B2 eitt vanligt 5B fiskiloyvi. Sambært Fiskivinnustovuni er hetta loyvi møguliga útskriva í heimildarloysi.

Feilurin sum Fiskimálaráðið møguliga gjørdi í 2001 skal nú fyrilitarleyst turkast av uppá okkum, og hetta kann undir ongum umstøðum góðtakast.“

Við skrivi, dagfest 7. mars 2005, vórðu hesar viðmerkingarnar sendar Fiskimálaráðnum til ummælis.

Við teldubrævi, dagfest 9. mars 2005, hevur Fiskimálaráðið boðað umboðsmanninum frá, at ráðið ikki hevði fleiri viðmerkingar til hetta málið.

## *Niðurstøða*

*Klagararnir hava ført fram, at viðgerðartíðin í hesum málinum als ikki er nøktandi.*

*Í fyrru atløgu bóðu klagararnir tíðliga í mars munnliga um at fáa fiskiloyvi dagført fyri tíðarskeiðið 1. mars – 1. sept. 2004. Sambært klagarunum eru tey 20. apríl biðin um at lata skrivliga umsókn inn, og er hetta gjørt.*

*Hóast einki beinleiðis lógarkrav er um, at ein slík umsókn skal vera skrivlig, haldi eg ikki grundarlag vera fyri at finnast at Fiskimálaráðnum fyri at biðja um eina skrivliga umsókn. Hinvegin átti hetta at verið gjørt beinanvegin, tá klagarin vendi sær til ráðið fyrst í mars mánaði.*

*Frá tí, at skrivliga umsóknin er móttikin í Fiskimálaráðnum 26. apríl, ganga slakir 3 mánaðir, áðrenn hetta málið verður avgreitt. Hetta hendir, hóast klagararnir sambært notati frá ráðnum hava rykt eftir málinum. Hendan viðgerðartíðin er als ikki nøktandi, og hetta hevur Fiskimálaráðið eisini viðgingið í ummæli sínum, dagfest 17. des. 2004.*

*Eingin ivi kann vera um, at hendan skipanin við fiskiloyvum til smábátarnar er tung at umsita, tí talið av umsóknum er ovurhonds stórt, og flestu umsóknirnar koma helst um tað mundi, tá nýggja tíðarskeiðið byrjar. Umsøkjarin kann tí ikki rokna við, at ein slík umsókn verður avgreidd beinanvegin, men sum skipanin er skrúvað saman, ber tað heldur ikki til, at tíðarskeiðið, sum loyvið fevnir um, er hálvrunnið, áðrenn málini eru avgreidd. Í hesum sambandi skal havast í huga, at tá undanfarni eigarin í trimum umførum søkti um at fáa endurnýggja fiskiloyvið í 2002 og 2003, tók viðgerðin bert fáar dagar. Umframt at geva Fiskimálaráðnum eina átalu fyri seinføru viðgerðina av hesari umsókníni frá klagarunum, fari eg at mæla ráðnum til at umhugsa,*

*hvussu hendan skipanin kann gerast smidligari at umsita, soleiðis at ov long tíð ikki gongur, áðrenn umsóknirnar verða avgreiddar.*

*Tann 2. sept. 2004 móttók Fiskimálaráðið aftur umsókn frá klagarunum um at fáa dagført fiskiloyvið fyri tíðarskeiðið 1. sept. 2004 – 1. mars 2005. Hóast klagararnir rykkja eftir málinum fleiri ferðir, bæði munnliga og skrivliga, hendir einki meira. Ráðið hevur í oktober mánaði upplýst klagarunum, at ráðið er farið at ivast í heimildunum fyri at útskriva hesum bátinum fiskiloyvi, og at hetta má kannast nærri, áðrenn avgerð kann takast. Í skrivi til mín, dagfest 17. des. 2004, sigur ráðið seg hava tikið avgerð um beinanvegin at útskriva eitt fyribils loyvi til bátin.*

*Eg havi sum so ongar viðmerkingar til, at ráðið fer at ivast í heimildunum, men so haldi eg, at ráðið átti at tikið hesa fyribilsavgerð skjótari enn gjørt er. Tað ger í hesum sambandi ikki støðuna betri, at hetta loyvið av misgáum ikki verður útskrivað fyrr enn 17. jan. 2005, tvs. tá bert 6 vikur eru eftir av tí hálva fiskiárinum, sum loyvið fevnir um. Eg fari tí eisini at geva Fiskimálaráðnum eina átalu fyri viðgerðartíðina í hesum førinum.*

*Sambært Fiskimálaráðnum er tað ivasamt, hvørt eigarin hevur rætt til fiskiloyvi til hendan bátin. Fiskimálaráðið tykist sambært uppritinum, dagfest 26. nov. 2004, at vilja bíða við at taka støðu til hendan spurningin, til nýggjar reglur eru ásettar í lóg ella kunngerð. Hesum sjónarmiði eri eg ikki samdur við ráðnum í, tí umsóknin frá klagarunum skal viðgerast eftir galdandi reglum.*

*Av tí, at Fiskimálaráðið framvegis ikki hevur tikið støðu til, um klagararnir hava rætt til fiskiloyvi, fari eg ikki í løtuni at gera meira við hendan spurningin.*

*Burtursæð frá givnu átalunum og áheitanini á Fiskimálaráðið fari eg ikki at gera meira við hetta málið.*

# *28. Starvsfólka- og arbeiðsmarknaðarmál v.m.*

## 28.1. Munnlig ávaring til sjúkrarøktarfrøðing.

Umboðsmaðurin hevur viðgjørt eina klagu um, at ein sjúkrarøktarfrøðingur á Landssjúkrahúsinum hevur fingið eina munnliga ávaring fyri at hava verið ávirkaður / luktað av rúsdrekka í arbeiðstíðini. Eftir at hava fingið fráboðan frá nøkrum starvsfeløgum hjá viðkomandi, bað deildarleiðarin í tveimum umførum sjúkrarøktarfrøðingin fara til húsar. Hesin fór, men møtti ikki aftur til arbeiðis dagin eftir. Hetta førdi til, at sjúkrarøktarfrøðingurin varð boðsendur á fund við starvsfólkaleiðaran, og ein munnlig ávaring varð givin honum fyri at hava verið ávirkaður / luktað av rúsdrekka í arbeiðstíðini, umframt at sjúkrarøktarfrøðingurin uttan fráboðan ikki møtti til arbeiðis dagin eftir hendingina. Ávaringin varð kærd til Almanna- og heilsumálaráðið, sum staðfesti avgerðina.

Umboðsmaðurin kom til ta niðurstøðu, at ein munnlig ávaring er at meta sum ein avgerð, ið er fevnd av reglunum í fyrisitingarlógini um m.a. partshoyring, og at hesar treytirnar vóru loknar.

Klagarin hevði ført fram, at yrkisfelagið eisini átti at verið partshoyrt, áðrenn avgerðin varð tikin. Hesum sjónarmiði var umboðsmaðurin ikki samdur í, tí yrkisfelagið er ikki at meta sum partur í málinum, og skuldi tí einans verið partshoyrt, um so var, at sjúkrarøktarfrøðingurin hevði boðað Landssjúkrahúsinum frá, at felagið umboðaði hann.

Sambært skjølunum í málinum sá tað út til, at avgerðin hjá deildarleiðaranum um at senda sjúkrarøktarfrøðingin heim einans bygdi á tað, sum starvsfelagarnir høvdu ført fram. Umboðsmaðurin helt tað ikki vera nøktandi, at deildarleiðarin ikki konfronteraði sjúkrarøktarfrøðingin við spurninginum fyrr enn stívliga 2 tímar aftaná, at hann varð kunnaður um støðuna. Hann helt tað eisini vera átaluvert, at deildarleiðarin valdi at tosa við sjúkrarøktarfrøðingin um málið í køkinum, har eitt annað starvsfólk var til staðar. Hetta hevði Almanna- og heilsumálaráðið eisini víst á í niðurstøðu sínari, men av tí, at sjúkrarøktarstjórin seinni hevði biðið sjúkrarøktarfrøðingin um umbering fyri hetta, gjørdi umboðsmaðurin ikki meira við hendan spurningin. Umboðsmaðurin vísti á, at deildarleiðarin beinanvegin átti at havt rópt sjúkrarøktarfrøðingin til

síðis og tikið ein so mikið drúgva samrøðu við hann, at deildarleiðarin sjálvur kundi gjørt sær eina greiða mynd av støðuni. Umboðsmaðurin helt tann partin av ávaringini, sum snúði seg um, at sjúkrarøktarfrøðingurin uttan fráboðan ikki var møttur til arbeiðis, vera í lagi. Havandi handfaringina av rúsdrekkaspurninginum í huga, helt hann tað hinvegin vera ivasamt, um grundarlag var fyri at staðfesta, at sjúkrarøktarfrøðingurin hevði verið ávirkaður hendan dagin. Hann mælti tí Almanna- og heilsumálaráðnum til at umhugsa enn einaferð, um hesin parturin av ávaringini átti at standa við ella ikki. (J.nr. 200400078 – Álitið er ikki tikið við í ársfrágreiðingina.)

## 28.2. Starvssetan á Føroya Læraraskúla og vantandi skjalainnlit.

A, sum hevur útbúgving sum klæðisformgevi frá Designskolen Kolding, søkti eitt starv sum handarbeiðs- og evnislærari á Føroya Læraraskúla. Setanarnevndin á Føroya Læraraskúla mælti Mentamálaráðnum til at seta A í starvið, av tí at A hevði júst teir førleikar, ið skúlanum tørvaði. Mentamálaráðið avgjørdi tó at seta A í fyribils starv. Ráðið grundgav hetta við, at Danska Kulturministeriet hevði boðað Mentamálaráðnum frá, at útbúgvingin hjá A var ein framhaldsútbúgving, men ikki ein útbúgving frá hægri góðkendum lærustovni. Kulturministeriet segði tó, at tað ikki var møguligt at taka eina hægri útbúgving innan handarbeið og evning í Danmark, enn ta útbúgvingina, ið A hevði.

Umboðsmaðurin kom til ta niðurstøðu, at tað hvørki í lóggávuni á økinum, sáttmála ella siðvenju var grundarlag fyri treytaleyst at krevja, at ein lærari á Føroya Læraraskúla skuldi lúka útbúgving á hægri góðkendum lærustovni, fyri at kunna verða settur í fast starv. Hetta serliga, tá ið ein slík útbúgving innan handarbeiði og evning ikki fanst í Danmark. Umboðsmaðurin metti, at avgerðin hjá Mentamálaráðnum, bygdi á ósaklig og óviðkomandi atlit, og hann gav tí Mentamálaráðnum eina álvarsliga átalu hesum viðvíkjandi og bað samstundis ráðið um at taka málið upp til nýggja viðgerð viðv. spurninginum um setan í fast starv.

Umframt hetta gav umboðsmaðurin eisini Mentamálaráðnum eina átalu fyri drúgva viðgerðartíð av umbøn um skjalainnlit. (J. nr. 200400038)

## Klagan

Við skrivi, dagfest 1. juni 2004, hevur A sent umboðsmanninum soljóðandi klagu:

**„Viðvíkjandi starvi, sum eg, A, Tórshavn, havi søkt á Føroya Læraraskúla.**

Eg vil hervið loyva mær at senda Løgtingsins Umboðsmanni kæru um handfaringina hjá Mentamálaráðnum viðvíkjandi lýsing av leysum størvum á Føroya Læraraskúla og viðgerðina, sum ráðið hevur fyriskipað í sambandi við starvsumsóknir, sum eg havi sent ráðnum.

**Gongdin í málinum**

Fyri at greiða frá gongdini í málinum, so vórðu størv lýst leys á Føroya Læraraskúla í mai 2002 (Skjal 1.0)

Talan var m.a. um eitt fast heiltíðarstarv í evning og handarbeiði, og í lýsingini verður m.a. upplýst um førleikakrøv, at tey ið sett verða í størvini eiga sum høvuðsregla at hava útbúgving samsvarandi cand.mag ella cand.ped. frá hægri góðkendum lærustovni, **„ella aðra útbúgving, sum hóskar til uppgávurnar“.**

Eg sendi umsókn til Føroya Læraraskúla 09.05.02 (skjal 1.1) viðmerkjast skal, at Mentamálaráðið hevur setanarmyndugleikan, tá talan er um slík størv.

Miðjan mai mánaða 2002 frættist, at Magistarafelagið hevði kravt, at størvini skuldu lýsast av nýggjum, og í endanum av mai mánaða vórðu størvini lýst leys í bløðunum enn einaferð (skjal 2.0).

Førleikakrøvini verða í seinnu lýsingini upplýst at vera **„útbúgving frá hægri góðkendum lærustovni“.**

Eg sendi Mentamálaráðnum nýggja umsókn tann 01.06.02 (skjal 2.1).

Hóast upplýst er í báðum lýsingum, at starvið í evning og handarbeiði er fast starv fulla tíð, so skrivar Mentamálaráðið 19.07.02 (skjal 3.0) til mín og boðar frá, at avgjørt er at seta meg í starvið, men upplýst verður, at talan er um eina fyribils tíðaravmarkaða starvssetan.

Sum skjølini vísa, so var einki tíðaravmarkað starv lýst leyst.

Eg skrivaði 22.07.02 (skjal 4.0) Mentamálaráðnum bræv, har eg gjørdi vart við, at starvið var lýst sum fast starv, og at tað tí var ørkymlandi, at fráboðanin frá mentamálaráðnum var, at tey bert kundu bjóða mær fyribilsstarv, hóast eg metti meg lúka tey førleikakrøv, sum upplýst vórðu í starvslýsingunum.

Mentamálaráðið skrivar mær bræv tann 24.07.02 (skjal 5.0), har ráðið boðar frá, at tey ikki kunnu góðtaka útbúgvingina hjá mær sum útbúgving frá hægri góðkendum lærustovni, ið er treyt fyri at eg kann verða sett í fast starv á Føroya Læraraskúla. *Sum sæst í brævinum biða tey meg boða frá í seinasta lagi 26.07.02 um eg tók av starvinum ella ikki.*

Illa bar til hjá mær at fáa samband við Mentamálaráðið í tíðini frá 22.07. til 02.08.02, tí ráðið hevði lýst, at skrivstovan var stongd vegna summarfrí hetta tíðarskeið (skjal 6.0).

Kortini royndi eg at fáa samband við deildarleiðaran á Mentamálaráðnum og hetta eydnaðist, og fundur varð avtalaður tann 31.07.02. (skjal 7.0).

Eg skrivaði 31.07.02 (skjal 8.0) Mentamálaráðnum bræv, har eg segði at eg tók av starvinum, men boðaði samstundis frá at eg hvørki kundi skilja ella vildi góðtaka, at Mentamálaráðið ikki vildi góðkenna mína útbúgving sum nøktandi útbúgving í sambandi við fasta starvssetan.

Tann 25.08.02 (skjal 9.0) skrivaði eg aftur Mentamálaráðnum bræv, har eg vísti til skriv frá Danska Mentamálaráðnum (skjal 9.1), har greitt verður frá útbúgvingini, eg havi nomið mær.

Tá einki svar kom frá Mentamálaráðnum skrivaði eg aftur bræv til ráðið 02.10.02 (skjal 10.0) har eg minti á hetta mál, og gjørdi vart við at eg vónaði at tey á ráðnum skiltu, at tað bar illa til at liva í óvissu um tað starv eg hevði søkt, tí eg hevði fingið farloyvi úr tí starvi eg hevði, tá eg avgjørdi at søkja fast starv á Føroya Læraraskúla.

Mentamálaráðið svaraði aftur 08.10.02 (skjal 11.0) har tey vístu á, at Designerskúlin í Kolding er ein framhaldsútbúgving, men ikki ein hægri lærustovnur.

Skrivið frá Danska Mentamálaráðnum varð viðlagt sum skjal (11.1).

Tá eg ikki vildi góðtaka niðurstøðurnar hjá Mentamálaráðnum vendi eg mær í november 2002 til I, sakførara, sum tann 06.11.02 skrivaði Mentamálaráðnum bræv (skjal 12.0).

Í skrivinum varð gjørt vart við, at sambært lýsingunum so er talan um „fast starv fulla tíð", og eisini varð gjørt vart við at eingin ivi var um, at eg lúki tey førleikakrøv, sum upplýst vórðu í lýsingini.

Tann 15.11.02 skriva Mentamálaráðið sakføraranum bræv, (skjal 13.0) sum varð móttikið á skrivstovuni hjá I tann 22.11.02.

I minti Mentamálaráðið á hetta málið við skrivi dagfest 26.11.02 (skjal 14.0).

Mentamálaráðið skrivaði síðani sakføraranum bræv 29.11.02 (skjal 15.0), har ráðið boðaði frá, at avgjørt var at fasthalda avgerðina.

Við skrivi 03.12.02 (skjal 16.0) heitti sakførarin á Mentamálaráðið um nærri at útgreina, hvørja útbúgving sipað varð til í lýsingini, og frá hvørjum stovni hendan hægri útbúgvingin skuldi verða tikin, tá talan var um lærugreinarnar evning og handarbeiði.

Mentamálaráðið svaraði við skrivi dagfest 09.12.02 (skjal 17.0) har víst varð á, og eg loyvi mær at endurtaka *„í fyrsta lagi vegur sagt, at tað ikki er ein ávís útbúgving, tikin á ávísan hátt, á ávísum lærustovni, lýst verður eftir"*.

Víðari verður sagt, at *„í dag eru nógvir møguleikar at samanseta eina út-*

*búgving, ið kann geva møguleika at virka sum lektor / adjunktur á Lærara-skúlanum".*

Eg metti ikki, at grundgevingarnar hjá Mentamálaráðnum vóru nøktandi, og heldur ikki at nakað løgfrøðiligt grundarlag var fyri hesum grundgevingum, og tí skrivaði sakførarin Landsstýriskvinnuni bræv dagfeat 22.12.02 (skjal 18.0), har tikið varð saman um gongdina í málinum, og har sum gjørt vórðu galdandi tey sjónarmið sum sakførarin mína vegna førdi fram í sambandi við málsviðgerðina.

Sakførarin minti landsstýriskvinnuna á fyrra skrivið tann 13.01.03 (skjal 19.0) og aftur við skrivi dagfest 24.01.03 (skjal 20.0).

Mentamálaráðið svaraði sakføraranum við skrivi dagfest 22.01.03 (skjal 21.0), men framvegis vísti Mentamálaráðið ikki á ítøkilig útbúgvingarkrøv, sum sett vóru í sambandi við setan á fast starv í nevndu lærugreinum á Føroya læraraskúla.

Mentamálaráðið skrivaði aftur sakføraranum bræv 30.01.03 (skjal 22.0).

Nýggjur landsstýrismaður tók við mentamálum í februar 2003, og tí skrivaði sakførarin til nýggja landsstýrismannin tann 22.03.03 (skjal 23.0), har millum annað varð víst á:

- at Mentamálaráðið hevði brotið formligu reglurnar, sum galdandi eru fyri viðgerð av slíkum málum
- at viðgerðin og avgerðin ikki bygdu á eina rætta tulking av galdandi lóggávu
- at hetta bar brá av, at talan var um eina avgerð, sum ikki bygdi á eina sakliga grundgeving

Víst varð í skrivinum á, at tá Mentamálaráðið í skrivi sínum dagfest 22.01.03 gjørdi galdandi, at lógin kravdi akademiska útbúgving, so var hetta skeivt bæði frá einari málsligari tulking av lógini og eisini einari endamálstulking.

Eisini varð víst á, at tað var skeivt, tá Mentamálaráðið gjørdi galdandi, at siðvenja seinnu árini hevur verið at krevja akademiska útbúgving.

Í sambandi við málsviðgerðina fingu vit til vega frágreiðing frá nevndini sum hevði viðgjørt setunarviðurskiftini á Føroya Læraraskúla (skjal 23.1) og har verður beinleiðis víst á, at verandi lóg ikki krevur akademiskan førleika.

Í eini roynd at fáa loyst málið skrivaði eg 07.04.03 beinleiðis til J, landsstýrismann (skjal 24.0), har eg mælti til at fáa fund í lag í eini roynd at fáa loyst hetta mál.

Tann 14.04.03 boðaði Mentamálaráðið frá, (skjal 25.0) at sakførarin skuldi frætta aftur, so skjótt sum landsstýrismaðurin hevði haft møguleika at seta seg inn í málið.

Her kann viðmerkjast at 5 mánaðir gingu, uttan at nakað svar kom frá ráðnum.

Hetta gjørdi sakførarin vart við í skrivi dagfest 17.09.03 (skjal 26.0).

Í september frætti sakførarin tó frá Mentamálaráðnum og fundur varð avtalaður á skrivstovuni hjá I 24.09.03, kl. 10.00 (skjal 26.1)

Mentamálaráðið boðaði tó við stuttum skotbráði frá, at fundurin ikki kundi verða hildin sum avtalað, og í staðin varð fundurin hildin 10.10.03.

Umboðini fyri Mentamálaráðið vístu á fundinum á, at tey vóru sinnaði at royna at finna eina semjuloysn, soleiðis at eg kundi fáa váttan um at fáa fast starv, um eg tók ávísa eftirútbúgving.

Sakførarin mælti til, at nýggjur fundur varð hildin mikudagin 19.11.03 (skjal 28.0), men Mentamálaráðið boðaði við skrivi dagfest 17.11.03 frá, at tey ikki kundu halda fundin nevnda dag, og tey komu við uppskoti um nýggjan fundardag (skjal 29.0).

Trupult var at finna fundardag, har báðir partar kundu møta, og tí varð teldusamskifti partanna millum 17.11.03 (skjal 30.0).

Fundur varð partanna millum 01.12.03, har partarnir meira ítøkiliga tosaðu um møguleikarnar fyri at finna eina semjuloysn, og avtalað varð, at sakførarin skuldi frætta aftur frá Mentamálaráðnum áðrenn Jól, við ítøkiligum uppskoti til, hvussu møgulig semja kundi verið orðað.

Einki fréttist aftur frá Mentamálaráðnum, og tí skrivaði sakførarin 15.01.04 (skjal 31.0)

Mentamálaráðnum áminningarskriv.

Áminningarskriv varð aftur sent 30.01.04 (skjal 32.0) og í hesum skrivi varð boðað frá, at um Mentamálaráðið ikki svaraði innan 10 dagar, so var ætlanin at senda kæruskriv til Umboðsmannin.

11.02.04 sendir sakførarin umbøn um skjalainnlit til Mentamálaráðið. (Skjal 33.0).

Ikki fyrr enn 17.02.04 (skjal 34.0) kom aftur teldupostur frá Mentamálaráðnum at tey arbeiddu við at avgreiða málið.

Sum teldusamskiftið vísir (skjølini 35.0-35.3), gekk aftur drúgv tíð uttan nakað ítøkiligt uppskot, og farið varð undir at fyrireika kæruskriv, men tá kom gongd á.

23.03.04 kom uppskot til hvussu málið kundi „loysast“. (skjal 36.0)

*Viðmerkjast kann, at hetta uppskotið frá Mentamálaráðnum bert tekur støðu í teirra krøvum og vísa tey á nakrar akademiskar útbúgvingar sum tey kunnu góðkenna. Útbúgvingarnar hava einki fagligt tilknýti til tað lýsta starvið, og á ongan hátt ganga tey mínum viðmerkingum á møti. Innihaldið í uppskotinum gongur út uppá, at eg skal útbúgva meg víðari fyri egnu rokning. Tað einasta sum tilsøgnin frá Mentamálaráðnum gevur, er eitt lyfti um at eg ikki missi starvið, so leingi sum eg eri farin undir víðari útbúgving innan settu tíðarfreistina. Har er eingin stuðul ella niðurseting av arbeiðstíð. Roynt varð at gera vart við hetta yvirfyri Mentamálaráðnum, men har var einki at gera.*

*Sakførarin metti, at ikki komst víðari við Mentamálaráðnum við samráðingum, og tí varð avgjørt at taka av tilboðnum, fyri at tryggja, at eg ikki kundi verða søgd úr starvi til summarferiuna.*

Svarað varð aftur 14.04.04 (Skjal 37.0), har sakførarin hevur nøkur uppskot til rættigar.

Eftir nakað av telduskriving aftur og fram (skjal 38.0) kom so endaligt undirskrivað uppskot frá Mentamálaráðnum dagfest 22.04.04 (skjal 39.0)

Hesum varð svarað aftur tann 29.04.04 (skjal 40.0), har nakrar viðmerkingar aftrat verða gjørdar, og hevur sakførarin mína vegna tá váttað, at eg gangi undir tær treytir, sum settar verða, tó at eg ikki haldi krøvini samsvara lýsingini, og heldur ikki galdandi krøv til starvssetanina.

Um teldupost verður svarað játtandi frá Mentamálaráðnum.( skjal 41.0)

14.05.04 sendi sakførarin aftur áminning (skjal 42.0) til Mentamálaráðið um skjalainnlit, og setanarbræv.

Eg havi síðani sent umsókn um upptøku til Roskilde Universitetscenter, at lesa Master i Voksenuddannelse.

Grundgevingarnar fyri hesari kæru.

Eg vil hervið, sum frammanfyri nevnt, heita á Umboðsmannin um at taka hetta mál upp, og grundgevingin fyri hetta er:

at Mentamálaráðið ikki hevur brúkt somu førleikakrøv í sambandi við avgerðina um starvssetan, sum tey førleikakrøv, sum upplýst vórðu í lýsingini,

at Mentamálaráðið krevur førleikakrøv, sum tey ikki kunnu útgreina nærri,

at Mentamálaráðið ikki hevur víst á sakligar grundgevingar fyri ikki at seta meg í fast starv,

at Mentamálaráðið hevur víst til lógartulking, sum hvørki hevur grundarlag í einari málsligari tulking ella endamálstulking,

at Mentamálaráðið hevur víst til siðvenju, sum seinni vísti seg ikki at vera til,

at Mentamálaráðið í meira enn 5 mánaðir ikki svarar skrivi frá sakførara mínum,

at teirra uppskot til loysn á málinum bert staðfestir teirra krøv um akademiska útbúgving,

at Mentamálaráðið frá eg fekk starvið 1. august 2002 til nú, næstan 2 ár seinni, ikki hava givið mær nakað setanarbræv, og ikki hava sett meg í lønarflokk, so eg í 22 mánaðir havi fingið løn á conto, hóast royndir eru gjørdar bæði frá Læraraskúlanum, og gjøgnum sakførara, at fáa hetta í rætt lag.

at Mentamálaráðið hóast áheitan er send teimum um skjalainnlit 11.02.04 og fleiri áminningar eru sendar, framvegis ikki hava givið mær tað.

Heitt verður á Umboðsmannin um at krevja skjalainnlit hjá Mentamálaráðnum, soleiðis at staðfestast kann hvat er farið fram á Mentamálaráðnum, og í hvønn mun Magistarafelagið ella onnur feløg hava lagt seg út í málsviðgerðina í ráðnum."

## Málsgongd

Tann 4. mai 2002 vórðu nøkur lærarastørv á Føroya Læraraskúla lýst leys at søkja. Talan var um tímalærarastørv í støddfrøði, føroyskum, týskum, enskum og drama. Harumframt vórðu 3 føst størv heila tíð lýst leys í evning og handarbeiði, smíð og sálarfrøði og serlestri. Viðvíkjandi evning og handarbeiði stendur í lýsingini:

„Hetta er fast starv fulla tíð. Uppgávuøkið er evning og handarbeiði á grundlærugreinunum og linjugreinunum á læraraútbúgvingini, og í virknisgreinunum á pedagogútbúgvingini. Endaliga ásetingin av undirvísingini verður ásett í samstarvi við læraran, sum er í føstum starvi á økinum."

Í lýsingini stendur annars:

„Tey, ið sett verða í størvini, eiga sum høvuðsreglu at hava útbúgving samsvarandi cand.mag. ella cand.ped. frá hægri góðkendum lærustovni, ella aðra útbúgving, sum hóskar til uppgávurnar.

Viðkomandi skulu vera fús at samskipa útbúgvingarvirksemið í teirra lærugrein ella lærugreinum við aðrar lærugreinar, m.a. í sambandi við evnisarbeiði og verkevni, og hava skyldu at luttaka í arbeiðsbólkum, útbúgvingunum at frama, og sum heild í øllum tiltøkum, sum sett verða í verk at menna útbúgvingarnar.

Eisini fáa tey, ið sett verða, møguleika at undirvísa á teimum eftirútbúgvingum, sum Læraraskúlin setur í verk.

Størvini verða sett sambært sáttmála millum Mentamálastýrið og Magistarafelag Føroya.

Umsóknirnar skulu vera Føroya Læraraskúla í hendi innan 31. mai 2002.

Setanin er galdandi frá 1. august 2002."

Tann 7. mai 2002 sendi Magistarafelag Føroya soljóðandi teldupost til Mentamálastýrið:

„Vit hava havt nevndarfund í Magistarafelagnum í dag m.a. um starvslýsingina á Føroya Læraraskúla, og har eru viðurskifti vit ikki kunnu góðtaka. Eg skjóti upp, at vit taka tann avtalaða fundin um málið í morgin kl. 15.00 (mikudagur 8. mai kl. 15.00). Vit kunnu ikki fyrr, tí at fleiri eru so upptikin av øðrum fundarvirksemi.

Orsaka av aðalfundi í Magistarafelagnum, hevur verið nýskipan av nevndini, so við á fundinum í morgin verða frá okkara síðu: B, formaður, C, skrivari og D, nevndarlimur.

Vónadi letur tú meg frætta skjótast tilber fyrrapartin, so eg kann boða hinum báðum frá um tað er í lagi."

Tann 8. mai 2002 varð fundur hildin ímillum Mentamálastýrið og Magistarafelag Føroya. Soljóðandi fundarfrásøgn varð skrivað frá fundinum:

„Evni til umrøðu:

1. Lýsing eftir lærarum til Føroya Læraraskúla

2. Ymiskt

Ad. 1: Magistarafelag Føroya góðtekur ikki lýsingina í verandi líki, tí at hon lýkur ikki krøvini sambært sáttmálanum hjá felagnum. Hesi viðurskifti eiga at verða fingin í rættlag.

Lýsingin verður býtt í tvey, ein lýsing til tey føstu størvini og ein til tímalærarastørvini.

Neyðugt er at áseta, at krøvini til umsøkjararnar eru, at teir hava útbúgving frá góðkendum hægri lærustovni.

Tilskilað eigur at vera, hvønn umsøkjararnir skulu venda sær til, um teir ynskja at fáa nærri upplýsingar um størvini.

Øll tímalærarastørvini eiga at vera lýst leys uttan tað hjá E, har eigur ein skipan at vera funnin.

Avrátt var at nýggj lýsing verður send bløðunum, har umrøddu viðurskifti verða fingin í rættlag.

…"

Við skrivi, dagfest 9. mai 2002, sendi A soljóðandi umsókn til Føroya Læraraskúla:

„Í lýsing í blaðnum 4. maj søkja tit eftir lærara til evning og handarbeiði. Eg vil við hesum søkja starvið.

Hetta seinasta árið havi eg, sum tit vita, virkað sum tímalærari á Læraraskúlanum. Hetta hevur mær dámt ógvuliga væl, og tað er spennandi at vera við í einum undirvísingararbeiði, har samstarv og nýhugsan liggur so frammalaga. Eisini hevur tað verið ein áhugaverd avbjóðing alla tíðina at skula hava tann námsfrøðisliga partin í huga.

Eg eri útbúgvin textildesignari / listahandverkari, og tók avgangsroynd frá Kunsthandverkaraskúlanum í Kolding í 1986.

Hetta er ein 4 ára útbúgving, ið fevnir um tekning, kompositión, tilfars- og litlæru, umframt fakligu útbúgvingina í vevnaði, stoffprent, silkimáling. Eftir lidna útbúgving fekk eg stipendium í 6 mánaðir til serútbúgving innanfyri vevnað. Eg vil gera vart við útbúgvingin hevur avmarkaða atgongd, og er SU-gevandi.

Aftaná lokna útbúgving gekk eg 1 ár á Vejle sy- og tilskærerskole, fyri eisini at læra hendan partin.

Av pedagogiskari útbúgving havi eg tikið AVGskeið, 180 tíma Vaksinpedagogisk Grundkursus.

Síðani eg var liðug við útbúgvingina havi eg undirvíst, fyrst eitt skifti á EFG skúla í Kolding í textilfag, og síðani á kvøldskúla her í Havn, har eg m.a. havi undirvíst í skaftavevnaði, silkimáling, croquis-tekning, patchwork og applikatión. Eisini havi eg undirvíst á háskúlanum í m.a, tekning og pappírslist.

Tey seinnu árini havi eg eisini fingist við klíggjavev, spinning og tøving.

Síðani summarið 1995 havi eg starvast á Blindastovninum sum vevilærari.

Um meg sjálva kann eg siga, at eg eri 45 ára gomul, gift og havi 3 børn. Eg havi drúgvar royndir í at leggja til rættis undirvísing til ymiskar bólkar, bæði børn og ung, og vaksin við og uttan sjón.

Hjáløgd eru prógv fyri listahandverkaraútbúgvingina og AVGskeið, og ummæli frá stjóranum á Blindastovninum og kvøldskúlaleiðaranum. Um tit vilja síggja onnur prógv eru tey eisini tøk.

Eg vóni at kunna halda fram sum lærari í evning / handarbeiði á læraraskúlanum."

Tann 21. mai 2002 sendi Magistarafelag Føroya soljóðandi skriv til Mentamálastýrið:

**„Viðvíkjandi starvslýsing á Føroya Læraraskúla dagfest 21.05.02**
Í høvuðsheitum kann nevndin í Magistarafelag Føroya samtykkja í, at nevnda lýsing er í samsvari við sáttmálan hjá Magistarafelag Føroya. Nevndin fer tó at vísa á nøkur formlig viðurskifti, ið eiga at fáast í rættlag, áðrenn lýsingin verður almenn. Hetta eru viðurskifti, ið bæði hava við setanarpolitikk landsins at gera og viðurskifti annars innan sáttmálaøki okkara.

Bæði føstu størvini og tímalærarastørvini eiga at verða sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Magistarafelag Føroya frá 11. september 2001.

Umsóknarfreistin má leingjast, tí eftir ásetingunum í setanarpolitikki landsins, skal hon vera minst 14. dagar.

Vísandi til sáttmálaøki Magistarafelagsins, fer nevndin at vísa á, at somu krøv eiga at verða sett til útbúgving bæði til føst størv og tímalærarastørv. Tískil eigur orðingin um útbúgvingarkrøv í lýsingini eftir tímalærarum at verða tann sama sum í lýsingini um føst størv: *Tey, ið sett verða í størvini, eiga at hava útbúgving frá hægri góðkendum lærustovni og størvini verða sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Magistarafelag Føroya.* Víst skal verða á, at sáttmálin hjá Magistarafelag Føroya fevnir um lærarastørv á Føroya Læraraskúla.

Magistarafelagið vísir forstáilsi fyri, at tað ikki í øllum førum ber til at fáa fult skikkaðar lærarar til tímalærarastørvini, og er sinnað at taka slíkar starvssetanir upp í hvørjum einstøkum føri. Men sum prinsipp kann felagið ikki góðtaka annað enn, at í lýsingini standa tey neyðugu førleikakrøvini, og at setanin verður framd sambært sáttmálan hjá felagnum. Nevndin væntar, at um so er, at fólk, ið ikki lúka tey sáttmálaásettu før-

leikakrøvini, verða sett at undirvísa, tí skikkaðir umsøkjarar ikki eru tøkir, verða tey kunnað um, at hetta er fyribils setan. Nevndin vil við hesum tryggja sær, ikki framyvir at skula koma í ta støðu, at skula noyðast at góðkenna, at fólk uttan neyðugu førleikarnar verða sett í fast starv, tí tey í eitt stundum drúgt tíðarskeið hava sitið í fyribils starvi.

Annars er nevndin eisini sinnað at samráðast um kombinatiónsstørv við aðrar skúlar, har skikkaðir umsøkjarar til tímalærarastørvini kanska arbeiða.

Um so er, at ikki kvalifiseraðir umsøkjarar eru til størvini, so ber eisini til at lýsa størvini uttanlanda.

Nevndin fer at venda aftur til spurningin um sjálvar setanirnar, tá ið hon aftur er fullmannað, væntandi einaferð í viku 22.

Annars fer nevndin at vísa til *2. kapitul § 2. Setan*, í sáttmálanum millum Fíggjarmálastýrið og Magistarafelag Føroya frá 11. september 2001, um neyðugt verður við fleiri starvssetanum á Føroya Læraraskúla. Brotið er hetta:

2. KAPITUL

§ 2. Setan

Kapitlið er um starvsfólk, sum er sett í starv í 3 mánaðir ella longur. Starvið er fast starv ella tíðaravmarkað.

stk. 2. Leys størv, sum sett skulu verða eftir hesum sáttmála, skulu verða lýst leys alment. Tilskilað skal verða, hvat starvið fatar um, hvør útbúgving krevst og hvør lønin er.“

Tann 29. mai 2002 vórðu føstu lærarastørvini lýst leys av nýggjum í bløðunum. Í endurlýsingini stendur m.a.:

„…

**Evning og handarbeiði:** Hetta er fast starv fulla tíð. Uppgávuøkið er evning og handarbeiði á, grundlærugreinunum og linjugreinunum á læraraútbúgvingini, og í virknisgreinunum á pedagogútbúgvingini. Endaliga ásetingin av undirvísingini verður ásett í samstarvi við læraran, sum er í føstum starvi á økinum.

…

Tey, ið sett verða í størvini, eiga at hava útbúgving frá hægri góðkendum lærustovni. Viðkomandi skulu vera fús at samskipa útbúgvingarvirksemið í teirra lærugrein ella lærugreinum við aðrar lærugreinar, m.a. í sambandi við evnisarbeiði og verkevni, og hava skyldu at luttaka í

arbeiðsbólkum, útbúgvingunum at frama, og sum heild í øllum tiltøkum, sum sett verða í verk at menna útbúgvingarnar.

Eisini fáa tey, ið sett verða, møguleika at undirvísa á teimum útbúgvingum, sum Læraraskúlin setur í verk.

Størvini verða sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Magistarafelag Føroya.

Umsóknirnar skulu stílast til Mentamálastýrið, men verða at senda til,

Føroya Læraraskúla, Frælsið 20, 100 Tórshavn og skulu vera skúlanum í hendi í seinasta lagi 12. juni 2002.

…"

Við skrivi, dagfest 1. juni 2002, sendi A soljóðandi umsókn til Mentamálastýrið:

„Í lýsing í blaðnum 29.05 søkja tit eftir lærara til evning og handarbeiði á Læraraskúlanum.

Eg vil við hesum søkja starvið.

Hetta seinasta árið havi eg virkað sum tímalærari á Læraraskúlanum, innan evning og handarbeiði. Hetta hevur mær dámt væl. Tað er spennandi at vera við í einum undirvísingararbeiði, har samstarv og nýhugsan liggur so frammalaga. Eisini hevur tað verið ein áhugaverd avbjóðing alla tíðina at skula hava tann námsfrøðisliga partin í huga.

Eg eri útbúgvin textildesignari / listahandverkari, og tók avgangsroynd frá listhandverkaraskúlanum í Kolding í 1986.

Hetta er ein hægri víðarigangandi útbúgving beinleiðis undir danska mentamálastýrinum. Hjálagda yvirlit vísir, at skúlin, sum í dag eitur Designskolen Kolding, er flokkaður saman við arkitektskúlum, musikkonservatorium o.s.v.

Eg vil gera vart við at útbúgvingin er tann hægsta sum fæst innan sniðgeving av textilum í Danmark. Útbúgvingin fevnir um tekning, komposition, tilfars- og litlæru, umframt fakligu útbúgvingina í vevnaði, stoffprenti og øðrum textilum.

Eftir lidna útbúgving fekk eg stipendium í 6 mánaðir til at gera speciale innanfyri vevnað, har eg sama ár fekk Kunsthandverkaraprísin.

Av pedagogiskari útbúgving havi eg tikið AVGskeið, 180 tíma Vaksinpedagogisk Grundkursus. Eg havi drúgvar royndir í at leggja til rættis undirvísing til ymiskar bólkar, bæði børn og ung, og vaksin við ymiskum fyritreytum.

Er ynski um hetta, eri eg sinnað at gera meira við tað námsfrøðiliga grundarlagið, í tann mun tað kann sameinast við undirvísingina.

Síðani eg var liðugt útbúgvin, havi eg undirvíst, fyrst eitt skifti á EFG skúla í Kolding í textilfag, og síðani á kvøldskúla her í Havn, har eg m.a. havi undirvíst í skaftavevnaði, silkimáling, croquis-tekning, patchwork og applikatión. Eisini havi eg undirvíst á háskúlanum í m.a. tekning og pappírslist.

Síðani summarið 1995 havi eg starvast á Blindastovninum sum vevilærari.

Tey seinnu árini havi eg eisini fingist við serføroysku tekstiløkini: klíggjavev, spinning og tøving.

Hjáløgd skjøl: mappa við CV, prógvum og ummælum, og mappa við upplýsingum um útbúgving og skúla.

Eg vóni at kunna halda fram sum lærari í evning/handarbeiði á læraraskúlanum."

Hjálagt umsóknini vóru m.a. niðanfyri standandi upplýsingar um útbúgvingina og Designskúlan í Kolding:

„OM KULTURMINISTERIETS OMRÅDER 2001
Uddannelser
INTRODUKTION
Kulturministeriet har ansvaret for videregående kunstneriske uddannelser i Danmark og for uddannelserne ved Danmarks Biblioteksskole.

De kunstneriske uddannelser er alle videregående uddannelser og varer som hovedregel fra fire til seks år. Uddannelserne foregår ved statslige eller selvejende uddannelsesinstitutioner inden for områderne arkitektur, design, billedkunst, konservering, musik, film, teater og dans.

Målet for uddannelserne er at uddanne professionelle udøvende og skabende kunstnere, kunstformidlere mv. på et højt niveau.

I modsætning til de fleste andre videregående uddannelser skal man på hovedparten af de kunstneriske uddannelser bestå en optagelsesprøve for at komme ind. Der har hidtil været langt flere ansøgere, end der årligt optages, og der har i de senere år været en stigende interesse blandt unge uddannelsessøgende for at kaste sig over en uddannelse, der baner vejen for en karriere som f.eks. skuespiller, musiker eller filminstruktør.

I oktober 2001 var der i alt ca. 6.170 aktive studerende på Kulturministeriets uddannelser. De største uddannelsesinstitutioner er arki-

tektskolerne, Biblioteksskolen samt designskolerne, som tilsammen tegner sig for 2/3 af alle studerende. De seks musikkonservatorier tegner sig for knap 1/4, mens de øvrige studerende fordeler sig på de forskellige uddannelser inden for film, teater, billedkunst, kunsthåndværk mv.

LOVGIVNING

De statslige kunstneriske uddannelsesinstitutioner er underlagt Lov nr. 289 af 27. april 1994 om videregående kunstneriske uddannelsesinstitutioner under Kulturministeriet. Loven blev ændret ved Lov nr. 142 af 17. marts 1999, især som følge af, at designskolerne i 1998 blev flyttet fra Undervisningsministeriet til Kulturministeriet. Lovbekendtgørelse nr. 889/2000

Biblioteksuddannelserne reguleres af Lov nr. 17 af 14. januar 1998 om Danmarks Biblioteksskole.

Lovene regulerer uddannelsesinstitutionernes overordnede struktur, formål, økonomi mv.

Nærmere bestemmelser om uddannelsesinstitutionerne, f.eks. omkring ledelsesforhold og de uddannelser, institutionen skal tilbyde, vil typisk være fastsat i bekendtgørelser om de enkelte skoler.

DESIGNSKOLEN KOLDING

Designskolen Kolding er en selvejende institution, som finansieres af midler fra Kulturministeriet. Skolen tilbyder videregående uddannelse inden for design, kunsthåndværk og beslægtede fag. Designuddannelsen varer fem år.

SKOLEN

For Designskolen Kolding gælder „Bekendtgørelse om uddannelse inden for design", nr. 424 af 16. juni 1989. Uddannelsen hører under Kulturministeriet.

Uddannelsens formål er at give de studerende kvalifikationer på et videregående niveau inden for kunsthåndværk- og designområdet. Herunder er formålet at give de studerende de nødvendige tekniske, æstetiske, etiske og analytiske forudsætninger for at kunne løse opgaver på et kunstnerisk, videnskabeligt og humanistisk grundlag.

Uddannelsens formål er desuden, som videregående uddannelsesinstitution, at fremme udvikling og forskning inden for kunsthåndværk og design.

Uddannelsen består af en 1. del, en 2. del og en 3. del og varer fra 3 1/2-5 år.

Uddannelsen er delt i to hovedområder Visuel Kommunikation herunder Grafisk Design og Illustration samt Interaktive Medier, Produktdesign herunder Industrielt Design, Keramik og Glas, Tekstil og Mode.

De studerende skal vælge et studieforløb med hovedvægt på ét af disse fagområder, med mulighed for at kombinere med fagdiscipliner fra andre fagområder.

Uddannelsens tværfaglige undervisning består af grunduddannelsen, den fælles teoretiske undervisning, samt tværfaglige studieprojekter gennem studieforløbet.

1.del

Varighed 1 år.

Grunduddannelsen er fælles for alle og skal give de studerende basale færdigheder og viden om designfagene. Der undervises i form- og farvelære, tegning, filosofi, idéhistorie, kunst- og designhistorie, designproces og arbejdsmetode bla. projekt-beskrivelse og præsentation.

1. del afsluttes med en oprykkende vurdering og endeligt valg af fagområde.

2.del

Varighed 2 år.

Uddannelsen fortsætter inden for Visuel Kommunikation eller inden for Produktdesign på det valgte fagområde.

På 2. del videreudvikler den studerende sit kunstneriske talent, de håndværksmæssige færdigheder, evnen til idé- og konceptudvikling samt fornemmelsen for form og æstetik.

2. del slutter med en oprykkende vurdering, hvorefter de studerende kan fortsætte på 3. del eller forlade skolen med et bevis på at have gennemført 1. og 2. del.

3. del

Varighed op til 2 år.

På 3. del specialiserer de studerende sig, så de får det bedst mulige afsæt for en professionel karriere. De gennemfører projekter i samarbejde med virksomheder eller andre designere. Der er kurser og workshops, der vedrører virksomheds- og produktionsforhold.

Praktik- eller studieophold på anden skole kan indgå i studiet i begyndelsen af 3. del.

På uddannelsens sidste år skal de studerende løse to omfattende designprojekter.

Et, der indstiller dem til afgang og selve afgangsprojektet. Afgangsprojektet bedømmes af eksterne censorer.

De studerende modtager et afgangsbevis og projekterne præsenteres på en udstilling og ved et modeshow."

Tann 25. juni 2002 gjørdi setanarnevndin á Føroya Læraraskúla, soljóðandi innstilling til Mentamálaráðið:

**„Viðvíkjandi umsóknum til føstu størvini á Føroya Læraraskúla.**
Setanarnevndin á Føroya Læraraskúla, sum er rektarin, O og P, ger hervið sambært krøvini í § 16 í Ll. nr 69 frá 28.5.1980 um læraraútbúgving hesa tilráðing.

Søkt varð eftir trimum føstum lærarum.

Til starvið í smíð komu inn tvær umsóknir. Umsøkjararnir eru…

Til starvið í evning og handarbeiði eru fimm umsóknir.

Umsøkjararnir eru … A og…

**A** hevur mestu útbúgvingina, tá ið vit síggja lærugreinarnar evning og handarbeiði í síni heild. Hon er útbúgvin textildesignari / listahandverkari, hon hevur útbúgving í vaksnamannapedagogikk, og harumframt hevur hon ymisk skeið. Hon hevur ymiskar undirvísingarroyndir og hevur seinsta árið undirvíst á Føroya Læraraskúla.

…

A var til setanarsamrøðu mánadagin 24. juni kl. 9.00 og…

Mælt verður til, at annaðhvørt A ella … verður sett í starvið. Mentamálaráðið má taka støðu til vavið í útbúgvingini hjá A, sum eftir okkara meting samsvarar við tørvin hjá Læraraskúlanum."

Tann 10. juli 2002 sendi Mentamálaráðið Føroya Læraraskúla soljóðandi skriv:

**„Viðvíkjandi innstilling til føst størv á Føroya Læraskúla**
Við atliti at tilráðing frá setanarnevndini á Føroya Læraraskúla verður heitt á nevndina at taka uppaftur innstillingina til starvið í evning og handarbeiði. Innstillingin skal greitt vísa, í hvørji røð umsøkjararnir verða innstillaðir til starvið, samstundis sum grundgivið verður fyri innstillingini.

Innstillingin eigur at vera Mentamálaráðnum í hendi í seinast lagi 16. juli 2002.“

Tann 11. juli 2002 sendi setanarnevndin á Føroya Læraraskúla soljóðandi skriv til Mentamálaráðið:

**„Viðvíkjandi skrivi tykkara frá 10.07.02. um innstilling til fast starv á Føroya Læraraskúla**

Sum framhald av skrivi okkara frá 25.06.02 viðvíkjandi umsóknum til føstu størvini á Føroya Læraraskúla kann leggjast afturat, at niðurstøðan, bæði útfrá fyrrnevnda skrivi og eftir at setanarnevndin (O og P) hevur umrøtt støðuna á nýggjum fundi, er, at A verður innstillað sum nr. 1 og … sum nr. 2.

Grundgevingin fyri at innstilla A sum nr. 1 er, at hon er liðug við hægri útbúgving, og at útbúgving hennara fevnir um tættir innan bæði handarbeiði og tilevning. Og tað er júst henda tørv Føroya Læraraskúli hevur.“

Tann 17. juli 2002 varð soljóðandi innanhýsis tilmælið skrivað í Mentamálaráðnum:

**„Tilmæli til setan av størvum á Føroya Læraraskúla**

Søkt var eftir trimum lærarum í fast starv í hesum lærugreinum: Evning og handarbeiði, smíð og sálarfrøði og serlestri.

5 umsóknir vóru til starvið í evning og handarbeiði, 2 umsóknir til starvið í smíð og eingin umsókn til starvið í sálarfrøði og serlestri. Hetta starv er sostatt lýst leyst av nýggjum.

Lýsing av umsøkjarunum til hvørt starvið.

**Evning og handarbeiði**

1. A

Útbúgving

| | |
|---|---|
| 1976-78: | Lisið enskt á Århus Universiteti |
| 1982-86: | Textil-formgevi á Kolding Listahandverkaraskúla |
| 1986: | Sergrein í veving, har hon fekk kunsthandverkaraprísin |
| 1983: | AVG-skeið, 180 tímar |
| 1988-89: | Seyming og tilskering á Vejle seymi- og tilskeriskúla |
| 1992: | Cert Of Proficiency á Fróðskaparsetri Føroya Arbeiðsroyndir |
| 1987: | Undirvíst á Kolding Tekniske Skole |
| 1989: | Undirvíst í Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúla í lærugrein- |

unum: fríður vevnaður, skaftaveving, silkimáling, patchwork og applikatión og croquis tekning

1991-93: Undirvíst á Føroya Fólkaháskúla

1995-: Vevilærari á Føroya Blindastovni

2001-02: Undirvíst í evning og handarbeiði á Føroya Læraraskúla
Hevur eisini havt framsýningar í Danmark og í Føroyum.

…

Setanarbólkurin á Føroya Læraraskúla hevur við støði í útbúgving, arbeiðsroydum og setanarsamrøðum gjørt hesa innstilling til setan í størvini:

**Evning og handarbeiði:**

Setanarbólkurin mælir til, at A verður sett í starvið. Grundgevingin fyri, at innstilla A sum nr. 1, er, at hon er liðug við hægri útbúgving, og at útbúgving hennara fevnir um tættir innan bæði handarbeiði og tilevning. Og tað er júst henda tørv, Føroya Læraraskúli hevur.

Hon hevur mestu útbúgvingina, tá ið vit síggja evning og handarbveið í síni heild. Hon er útbúgvin textildesignari/listahandverkari, hon hevur útbúgving í vaksnamannapedagogik, og harumframt hevur hon ymisk skeið. Hon hevur ymiskar undirvísingarroyndir og hevur seinasta árið undirvíst á Føroya Læraraskúla.

…

**Tilmæli frá mentamáladeildini**

Mentamáladeildin hevur eftirkannað umsóknirnar og tilmælið hjá setanarbólkinum. Deildin tekur undir við, at A verður sett í starv sum lærari í evning og handarbeiði og …, bæði fyribilssett skúlaárið 2002/03.

Mentamáladeildin tekur ikki undir við, at tey verða sett í føst størv, tí at hvørki teirra hevur sambært teimum upplýsingum mentamáladeildin hevur til skjals, lokið endaliga útbúgving frá hægri góðkendum lærustovni.

A hevur tikið útbúgving sum tekstilformgevi. A skrivar í umsókn síni soleiðis: „Hetta er ein hægri víðarigangandi útbúgving beinleiðis undir danska mentamálastýrinum. Hjálagda yvirlit vísir, at skúlin, sum í dag eitur Designskolen Kolding, er flokkaður saman við arkitektskúlum musikkonservatorium o.s.v.“

Setanarbólkurin sigur somuleiðis, at hon er liðug við hægri útbúgving.

Mentamáladeildin hevur saman við løgfrøðingi eftirkannað hesi viðurskifti. Á heimasíðu skúlans, sum seinast er dagførd 19. juni 2002, verður rektarin, M, endurgivin soleiðis í brotinum: På vej mod universitets-

status: „Vi forventer at den udviklingsproces, vi nu har indledt, vil føre til at Designskolen Kolding i 2008 kan anerkendes som forskningsbaseret universitetsuddannelse.“ Við støði í hesum upplýsingum kann mentamáladeildin ikki góðkenna, at útbúgving hennara sum textilformgevi er ein hægri útbúgving.

…

**Mentamáladeildin mælir sostatt til:**

A verður fyribilssett í starvið sum lærari í evning og handarbeiði á Føroya Læraraskúla skúlaárið 2002 / 03. Hevur hon fingið til vega skjalprógv fyri, at hon hevur útbúgving frá hægri góðkendum lærustovni í seinasta lagi 1. mai 2003, verður hon sett í fast starv, annars verður starvið lýst leyst av nýggjum til setanar frá 1. august 2003.“

Tann 18. juli 2002 sendi Mentamálaráðið soljóðandi skriv til Magistarafelagið:

**„Viðvíkjandi setan av lærarum í føst størv á Føroya Læraraskúla**

Trý føst størv vóru lýst leys til setanar á Føroya Læraraskúla í mai í ár. Størvini vóru: Evning og handarbeiði, smíð og sálarfrøði og serlestur.

5 umsóknir vóru til starvið í evning og handarbeiði, 2 umsóknir til starvið í smíð, men eingin umsókn til starvið í sálarfrøði og serlestri. Hetta starv var tískil lýst leyst av nýggjum, og tá var ein umsøkjari til starvið.

Sum avrátt á fundi við Magistarafelagið, var ásett í lýsingini, at tey, ið sett verða í størvini skulu hava útbúgving frá hægri góðkendum lærustovni. Eingin av nevndu umsøkjarum hevur henda førleika í fullum líki, tó eru onkrir umsøkjarar komnir væl áleiðis í kandidatútbúgvingini.

Mentamálaráðið hevur tí gjørt av, at størvini verða sett sum fyribilssett tíðaravmarkað størv skúlaárið 2002 / 03. Hava tey, ið sett eru, ikki lokið útbúgving frá hægri lærustovni innan 1. mai 2003, verða størvini lýst leyst av nýggjum til setanar 1. august 2003.“

Tann 19. juli 2002 sendi Mentamálaráðið klagaranum soljóðandi skriv:

„Vísandi til umsókn tygara um starv sum lærari í evning og handarbeiði á Føroya Læraraskúla verður við hesum sagt frá, at Mentamálaráðið í dag hevur avgjørt at seta tygum í starvið.

Viðmerkjast skal, at starvið verður fyribilssett tíðaravmarkað skúlaárið 2002 / 03. Um skjalprógv verða fingin til vega fyri, at tygum hava

útbúgving frá hægri góðkendum lærustovni áðrenn 1. mai 2003 verða tygum sett í fast starv, annars verður starvið lýst leyst av nýggjum til setanar frá 1. august 2003.

Setanarbræv sum sáttmálasett verður sent tygum seinni.“

Tann 22. juli 2002 sendi A Mentamálaráðnum soljóðandi skriv:

„Eg havi í dag fingið bræv frá tykkum við tilboð um fyribils starv á læraraskúlanum. Tilboðið er milt sagt ørkymlandi, tí eg havi nú í meira enn ein mánað fingið at vita at tað ikki er nakað galið við mínari útbúgving. Men av einihvørjari orsøk er hetta ikki galdandi longur.

Upprunaliga varð starvið lýst leyst í byrjanini av mei mánaði, og uttan frágreiðing til umsøkjararnar var starvið lýst leyst aftur móti endan av mei. Tit hava haft ríkiliga tíð til at viðgerða umsøknirnar og alíkavæl kunnu tit ikki geva fólki boð áðrenn tit sjálvi eru farin í summarfrí, soleiðis at tað ikki er møguligt at fáa greiðu á hvat orsøkin er til hesa kúvending.

Starvið varð lýst sum fast starv, og áðrenn eg kann taka støðu til tilboðið um tíðaravmarkað starv, má eg biða tykkum greiða nærri frá, hvat tað er sum restar í fyri at eg kann setast í fasta starvið, ið var lýst leyst, og hví tit ikki góðkenna Designskolen Kolding sum hægri læristovn.

Sum eg segði í umsøkn míni, er hetta mær vitandi hægsta útbúgvingin, sum er at fáa á økinum í Danska ríkinum, og eg vil tí spyrja tykkum hvørjar útbúgvingar frá hvørjum útbúgvingarstovnum tit kundu gókent?

Tá tað í løtuni verður arbeitt við at leggja kreativu fagini í fólkaskúlanum saman til eitt undir heitinum Handverk og List, mátti tað verið upplagt at sett ein útbúnan listahandverkara við drúgvum royndum í starvið.

Um so er at eg við at tikið eitthvørt eyka skeið afturat kundi verið góðkend, so vil eg biða tykkum siga mær frá tí, soleiðis at vit kundi fingið fastar karmar fyri at hetta kundi fingist í rætt lag.

Eg veit at tit eru í summarfrí í løtuni, men vil biða tykkum um at seta tykkum í samband við meg skjótast gjørligt, so vit kunnu fáa avtalað ein fund har eg vónandi kann fáa svarað spurningunum.“

Tann 24. juli 2002 sendi Mentamálaráðið soljóðandi skriv til A:

„Viðvíkjandi starvi í evning og handarbeiði á Føroya Læraraskúla

Við atliti at skrivi tygara, dagfest 22. juli 2002, verður sagt frá, at Mentamálaráðið setur lærarar í føst størv á Føroya Læraraskúla og eftir-

kannar í hesum sambandi allar umsóknir og innstillingar til størvini. Ráðið hevur m.a. leitað eftir upplýsingum um útbúgving tygara á heimasíðuni hjá Designskolen Kolding, sum tygum vísa á sum hjáløgd skjøl í umsókn tygara.

Á heimasíðuni, sum seinast er dagførd 19. juni 2002, verður rektarin M endurgivin soleiðis í brotinum, På vej mod universitetsstatus: „Vi forventer, at den udviklingsproces, vi nu har indledt, vil føre til, at Designskolen Kolding i 2008 kan anerkendes som forskningsbaseret universitetsuddannelse."

Við støði í hesum upplýsingum kann Mentamálaráðið ikki góðkenna útbúgving tygara sum útbúgving frá hægri góðkendum lærustovni, ið er treyt fyri, at tygum kunnu vera sett í fast starv á Føroya Læraraskúla. Hetta er upplýst tygum í telefonsamrøðu. Tygum eru eisini kunnað um, bæði hví størvini vóru endurlýst, og hví setanin tók drúga tíð.

Mentamálaráðið gevur tygum møguleika at verða sett í fast starv í skúlaárinum, um skjalprógv verða fingin til vega fyri, at útbúgving tygara kann verða góðkend sum útbúgving frá hægri góðkendum lærustovni.

Heitt verður á tygum um í seinasta lagi fríggjadagin 26. juli 2002 kl. 12.00 at boða Mentamálaráðnum frá, um tygum taka við tíðaravmarkaða starvinum.

– Hjálagt er avrit av upplýsingum á heimasíðuni hjá Designskolen Kolding."

Tann 31. juli 2002 sendi A soljóðandi skriv til Mentamálaráðið:

„Viðvíkjandi starvssetan á Føroya Læraraskúla.

Vísandi til bræv tykkara dagf. 24. juli, skal eg boða frá at eg taki av starvinum.

At tit samstundis boða frá at tit ikki vilja góðkenna mína útbúgving sum útbúgving frá hægri góðkendum lærustovni, kann eg hvørki skilja ella góðtaka. Í teimum prátunum vit hava haft, havi eg skilt at tit krevja útbúgving frá einum lærdum háskúla, hetta er tó ikki tað tit hava skrivað í lýsingini tá starvið varð lýst leyst, og kann eg tí ikki góðtaka at hetta kravið verður sett nú.

Skúlin Kolding Designskole er ein „vidergående uddannelse på vej mod universitetsstatus" og er hann beinleiðis undir Danska Mentamálastýrinum, har hann m.a. er flokkaður saman við musikkonservatorium og arkitektskúlum.

Skúlin hevur í ár 2000 byrjað skipaða gransking. Eg fekk sjálv játtað eitt semester til at granska Jaquard- og dupultvevnað, tá eg var liðug í 1986. Møgulekin at fáa eyka tíð til at fara djúpari inn í eitthvørt evni, var longu tá til staðar.

Tað kann ikki vera nakar ivi um at skúlin er ein hægri góðkendur lærustovnur.

Eg heiti tí á tykkum um at viðurkenna hetta, og broyta setanina til fast starv.

Eg skilji væl at tað kann verða trupult at avgreiða hetta í feriutíðini, og sum avtalað í dag vænti eg at frætta frá tykkum innan 15. september 2002."

Tann 25. august 2002 sendi A teldupost til Mentamálaráðið við upplýsing um sína útbúgving frá „Designskolen Kolding". Skrivið var soljóðandi:

„Hjálagt er avrit av einum skrivi frá Danska Mentamálaráðnum, viðvíkjandi útbúgvingini frá Designskolen Kolding.

Sum tit síggja er tað dagfest 23. juni 1999, og fekk eg tað frá skúlanum við fylgiskrivi dagfest 14.08.02.

Vónandi kann hetta vera til hjálp við avkláring av mínari starvssetan."

Hjálagt skrivinum varð m.a. niðanfyristandandi kunning frá Kulturministeriet um útbúgvingina frá Designskolen Kolding:

„Letter of confirmation

This is to confirm that Designskolen Kolding is an establishment under the Danish Ministry of Culture providing study programmes within the field of design in accordance with Act of Establishments of Higher Education in the Fine Arts under the Danish Ministry of Culture, Act No. 289 of April 27,1994, as amended by Act No. 142 of March 17, 1999.

Designskolen Kolding educates designers within the following areas: Institute for Product (fashion, textiles, industrial design and ceramics and glass) and Institute for Visual Communication (illustration, graphic design and interactive multimedia).

The education is divided into three levels and lasts up till five years. The first level consists of one year at the Interdisciplinary Basic Course with basic studies in form and theory. The second level is two years of study within the chosen programme with technical and artistic studies.

This three-year programme is equivalent to a Bachelor's Degree in England and the US.

Students may choose to continue in an additional programme of one half to two years (level 3) resulting in a Designer's Certificate. The programme which comprises specialized studies and a final project covers up to four semesters and aims at giving students the opportunity to carry out independent projects of a high standard. The final project is assessed by three external examiners and two members of staff. A two-year programme is equivalent to a Master's Degree in England and the US."

Tann 16. september 2002 sendi L, deildarstjóri, Mentamálaráðið, soljóðandi skriv til Kulturministeriet:

**„Forespørgsel vedrørende Kolding Designskole**

Idet jeg henviser til venlig telefonsamtale med fuldmægtig R den 15. august 2002 og til e-mail fra samme, skal jeg på det færøske kulturministeriums vegne anmode det danske kulturministerium om en udtalelse, hvorvidt Kolding Designskole er en højere uddannelsesinstitution.

Vi har, som omtalt i den nævnte telefonsamtale, gennemgået Kulturministeriets hjemmeside med oversigten over uddannelsesinstitutioner, der henhører under jeres resort. Selv om oversigten er for så vidt klar nok, så vil vi gerne have en officiel tilkendegivelse fra det danske kulturministeriums side i spørgsmålet om Kolding Designskoles status.

Sagen har principiel betydning for os, eftersom vi overenskomstmæssigt er bundet til kun at fastansætte lærere på Færøernes lærerseminarium, der har eksamen fra en højere uddannelsesinstitution.

Det ville glæde os, om vi kunne modtage jeres svar hurtigst muligt."

Kulturministeriet v/Q svaraði fyrispurninginum við skrivi, dagfest 25. september 2002 soleiðis:

„Forespørgsel vedrørende Designskolen Kolding.

Som svar på brev af den 16. september skal jeg her på vegne af det danske Kulturministerium bekræfte, at Designskolen Kolding er en videregående, men ikke en højere uddannelsesinstitution.

Alle uddannelsesinstitutioner under Kulturministeriet er videregående, men ikke alle er højere uddannelsesinstitutioner. For at en uddannelsesinstitution kan blive en højere uddannelsesinstitution kræves det bl.a., at der foretages en uvildig evaluering af den forskning, som finder

sted på institutionen. Det er et krav, at højere uddannelsesinstitutioner har forskningsbaseret undervisning.

Designskolen Kolding tager fem år. Der er ingen uddannelse på et højere niveau indenfor design-området i Danmark.

På Kulturministeriets hjemmeside findes en oversigt over ministeriets uddannelsesinstitutioner med angivelse af, hvilke der er højere uddannelsesinstitutioner samt angivelse af uddannelsernes varighed.“

Tann 2. oktober 2002 sendi A soljóðandi skriv til Mentamálaráðið:

„Vísandi til tykkara máltal nr. …, loyvi eg mær at minna á hetta mál.

Sum kunnugt varð á fundi okkara tann 31.07.2002 avtalað, at Mentamálaráðið skuldi kanna málið viðvíkjandi fastari starvssetan og boða mær frá aftur áðrenn 15.09.2002.

Eg havi enn einki frætt, og tí loyvi eg mær at heita á tykkum um vinaliga at senda mær fráboðan um hvørja niðurstøðu tit eru komin til.

Vónandi skilja tit, at illa ber til hjá mær at liva í óvissuni, tí sum kunnugt havi eg fingið farloyvi úr fasta starvi mínum, og eg kann illa siga hetta starv frá mær um eg ikki havi fingið vissu fyri, at eg fái fasta starvið, sum tit lýstu leyst og sum eg søkti.

Eg havi ongar ætlanir um at gera meira hóvasták enn neyðugt burtur úr málinum, men hinvegin má eg halda meg til starvslýsingina sum eg søkti eftir.

Vónandi frætti eg aftur áðrenn 8 dagar.“

Tann 8. oktober 2002 sendi Mentamálaráðið soljóðandi skriv til A:

„…Mentamálaráðið hevur sent danska mentamálaráðnum fyrispurning um Kolding Designskúla.

Í svarskrivi sínum sigur danska mentamálaráðið m.a., at Designskúlin í Kolding er ein framhaldsútbúgving, men ikki ein hægri lærustovnur. Við støði í hesum upplýsingum má Mentamálaráðið fasthalda avgerðina um, at tygum verða fyribilssett tíðaravmarkað skúlaárið 2002/03.

Henda avgerð kann kærast til landsstýrismannin.

./. Hjálagt avrit av svarinum danska mentamálaráðnum.“

Tann 6. november 2002 sendi I, adv., vegna A, soljóðandi skriv til Mentamálaráðið:

„…A hevur vent sær til skrivstovu okkara í sambandi við starvsviðurskifti síni.

Eg havi í hesum sambandi fingið avrit av øllum skjølum í málinum, m.a. starvslýsing tykkara, har nevnt er, at starvið í evning og handarbeiði er **„fast starv fulla tíð“.**

Í lýsingini verður ikki komið nærri inn á møgulig førleikakrøv.

A søkti nevnda starv, og sum tykkum kunnugt lýkur hon tey førleikakrøv, sum náttúrliga eiga at verða sett til slíkt starv, tí hon hevur nomið sær hægstu útbúgving, sum møguleiki er at fáa í Danmark tá talan er um evning og handarbeiði.

Kortini vildi Mentamálaráðið í fyrstu atløgu bert seta A í fyribilsstarv, og avtalað varð á fundi 31. juli 2002, at Mentamálaráðið skuldi kanna málið og geva boð aftur áðrenn 15. sept. 2002, men enn er eingin loysn fingin á málinum.

Løgfrøðiliga er støðan tann, at starvið er lýst leyst sum **„fast starv fulla tíð“** og A hevur sostatt søkt fast starv fulla tíð.

Fyrisitingarliga meti eg tí íkki, at almennur myndugleiki hevur rætt at nokta at seta umsøkjara í starvið soleiðis sum hetta er lýst í starvslýsingini.

Serliga greið er støðan, tá Mentamálaráðið ikki hevur sett nøkur førleikakrøv í lýsingingini, og at ráðið heldur ikki hevur kunna víst á, at ein náttúrlig fyritreyt fyri starvssetanini var, at umsøkjarin skuldi lúka onnur førleikakrøv enn tey sum A lýkur.

A hevur ikki havt ætlanir um at fáa nakað stríð burtur úr málinum, men hon kann sjálvsagt ikki góðtaka, at hon ikki fær starvið sum lýst varð leyst og sum hon søkti.

Eg fari tí við hesum at heita á Mentamálaráðið um vinaliga at taka upp aftur hetta mál, soleiðis at A verður sett í fast starv.

Um tit ynskja tað, kunnu vit taka fund har vit nærri tosa um málið og tey viðurskifti, sum nevnt omanfyri.

Eg vóni at frætta aftur áðrenn 8 dagar.“

Tann 15. november 2002 sendi Mentamálaráðið soljóðandi skriv til I:

„…Mentamálaráðið hevur móttikið skriv tygara, dagfest 06.11.2002, viðvíkjandi starvsviðurskiftunum hjá A.

Við hesum skal verða boðað frá, at málið verður viðgjørt so skjótt sum til ber. Tó kunnu vit tíverri ikki gera hetta innanfyri 8 dagar.

Tygum frætta so skjótt sum málið er liðugt viðgjørt.“

Tann 26. november 2002 sendi I soljóðandi skriv til Mentamálaráðið:

„…Vísandi til skriv tykkara dagfest 15.11.02, sum sent var mær 22.11.02, loyvi eg mær enn einaferð at spyrja nær avgerð kann væntast í málinum.

Fyri A hevur tað sera stóran týdning at fáa hetta mál loyst beinanvegin, og tá nú so lang tíð er farin, vóni eg at frætta aftur beinanvegin.“

Tann 29. november 2002 sendi Mentamálaráðið soljóðandi skriv til I:

„…Við hesum verður boðað frá, at Mentamálaráðið, eftir áheitan frá tygum, enn einaferð hevur viðgjørt spurningin um starvssetanina hjá A á Føroya Læraraskúla.

Avgjørt er at fasthalda avgerðina. Í lýsingini frá 29. mai 2002 varð kravt, at tann, sum settur varð, skuldi hava útbúgving frá hægri góðkendum lærustovni. Og hesa treyt lýkur A ikki. Sí hjálagda avrit av lýsingini.

A søkir í skrivið, dagfest 1. juni 2002, um fast starv sum lærari í evning og handarbeiði á Læraraskúlanum. Hetta vísandi til lýsingina. Tann 19. juli svarar Mentamálaráðið umsóknini. Boðað verður frá, at A kann fáa starvið, men at tað einans kann verða fyribils til hon hevur skjalprógvað, at hon hevur útbúgving frá hægri góðkendum lærustovni.

Svarið skal skiljast sum eitt tilboð til A um at verða sett í fyribilsstarv eitt ár, tí hon ikki kann fáa fast starv, eftirsum hon ikki lýkur førleikakrøvini. Sum tað framgongur av skrivi frá A til Mentamálaráðið, dagfest 22. juli 2002, hevur hon eisini skilt svarið soleiðis.

Tygum siga, at komið verður ikki nærri inn á møgulig førleikakrøv í lýsingini. Víst verður til lýsingina, har søkt verður eftir trimum lærarum, einum í evning / handarbeiði, einum í smíð og einum í serlestri / sálarfrøði. Fyri øll størvini er kravið sambært lýsingina útbúgving frá hægri góðkendum lærustovni.

Meiri verður ikki gjørt við málið.“

Tann 3. desember 2002 sendi I, vegna A, soljóðandi skriv til Mentamálaráðið:

„…Eg skal við hesum vátta móttøkuna av skrivi tygara dagfest 29.11.02.

Í skrivinum siga tygum millum annað, at sambært lýsingini so varð tað kravt, at tann sum settur varð skuldi hava útbúgving **„frá hægri góðkendum lærustovni“**.

Eg fari at heita á tygum um vinaliga, skjótast tilber at senda mær skrivliga frágreiðing um, hvørja hægri útbúgving sipað verður til í lýsing tykkara, og frá hvørjum stovni hendan hægri útbúgvingin skal vera tikin.

Umráðandi er, at hendan frágreiðing tykkara út í æsir vísir, hvørjar fyritreytir tit hava lagt í sambandi við nevndu orðing av lýsingini.

Av tí at talan er um einfaldan spurning, vænti eg at frætta aftur áðrenn 8 dagar.“

Tann 9. desember 2002 sendi Mentamálaráðið soljóðandi skriv til I:

„…Í skrivi, dagfest 03-12.2002, biðja tygum um at fáa at vita, hvørja hægri útbúgving sipað verður til í lýsingini og frá hvørjum stovni henda hægri útbúgvingin skal vera tikin.

Í fyrsta lagið skal verða sagt, at tað ikki er ein ávís útbúgving, tikin á ávísan hátt, á ávísum lærustovni, lýst verður eftir.

Tað eru í dag so nógvir møguleikar at samanseta eina útbúgving, ið kann geva møguleika at virka sum lektor / adjunktur á læraraskúlanum. Herundir eisini eina útbúgving og fakligan førleika, har evning/handarbeiðið er ein partur. Somuleiðis eru tað nógvir hægri lærustovnar at velja ímillum (vanlig universitet, pedagogisk universitet).

Ein leið er – fyri at relatera til ítøkiliga málið – at byggja námsfrøðiliga útbúgving frá lærdum háskúla omaná eitt fak á bachelor støði, sum tilsamans gevur eina útbúgving á kandidats- ella masterstøði. Vegurin kundi veri at fingi verandi útbúgving góðkenda sum bachelor-útbúgving fyri síðan at taka námsfrøðiligan yvirbygna, so fakini bæði tilsamans geva útbúgving á master- ella kandidatstøði.

Við atliti at omanfyri standandi skal verða mint á, at Føroya Læraraskúli er ein námsfrøðiligur lærustovnur, ið, umframt fakligan førleika, eisini skal geva teimum lesandi námsfrøðiligan og didaktiskan førleika. Tey lesandi skulu sostatt ikki bert búgvast út til fak, eitt nú evning og handarbeiði, men eisini til kunnleika um fyritreytir fyri læring, didaktik, miðlan av fakinum o.s.fr.

Víst verður annars til hægru lærustovnarnar. Flestu teirra hava heimasíður, ið greina út innihald, møguleikar, fyritreytir v.m. fyri tær ymsu útbúgvingarnar.“

Tann 22. desember 2002 sendi I, adv., vegna A, soljóðandi skriv til K, landsstýriskvinnu í mentamálum:

„…Eg loyvi mær við hesum at heita á tygum um at taka upp hetta mál.

Í skjølunum, sum ráðið hevur síggja tygum gongdina í málinum, men eg kann stutt taka samanum soleiðis:

A fær starv sum tímalærari á Læraraskúlanum í 2001.

Hin 29.05.2002 verður lýst eftir lærarum, m.a. í lærugreinunum evning og handarbeiði á Læraraskúlanum,

Í lýsingini verður boðað frá, at talan er um „*fast starv fulla tíð*",

Í lýsingini verður boðað frá, at „*tey, ið sett verða í størvini eiga sum høvuðsreglu, at hava útbúgving samsvarandi cand. mag ella cand. ped. frá hægri lærustovni, ella aðra útbúgving, sum hóskar til uppgávurnar*",

A søkir nevnda starv 09.05.2002,

Starvið verður lýst av nýggjum í seinnu helvt av mai 2002,

Í hesari lýsingini stendur m.a. „*hetta er fast starvfulla tíð*" og alment um øll tey lýstu størvini „*Tey, ið sett verða í størvini, eiga at hava útbúgving frá hægri góðkendum lærustovni*",

Hin 19.07.2002 fær A skrivliga fráboðan um, at „*Mentamálaráðið í dag hevur avgjørt at seta tygum í starvið*". Lagt verður afturat, at henni stendur í boði gerast fyribilssett tíðaravmarkað skúlaárið 2002/2003,

Hin 22.07.2002 svarar A m.a., at starvið er lýst sum fast starv, og spurt verður hvør grundin er til, at Mentamálaráðið ikki tykist hava góðkent útbúgving hennara.

Hin 24.07.2002 sendir Mentamálaráðið A bræv, har m.a. verður sagt, at Mentamálaráðið ikki kann góðkenna útbúgvingina hjá A sum útbúgving frá hægri góðkendum lærustovni, ið er „*treyt fyri at tygum kunnu vera sett í fast starv á Føroya Læraraskúla.*". Eisini verður boðað A frá, at hon skal geva boð áðrenn 26. juli 2002 kl. 12.00 um hon tekur við tíðaravmarkaða starvinum.

A fær í lag fund við Mentamálaráðið hin 31.07.2002, og á fundinum verður avtalað, at ráðið skal kanna málið og geva boð aftur áðrenn 15.09.2002,

Sama dag, t.v.s. 31.07.2002 sendir A bræv til Mentamálaráðið, har boðað verður frá, at hon tekur av tilboðnum um tíðaravmarkað starv, men hon vísir samstundis á, at hon ikki kann góðtaka, at ráðið ikki metir at hon lýkur fakligu krøvini til at verða sett í fast starv, og at hon væntar at frætta aftur áðrenn 15.09.2002,

Hin 25.08.2002 sendir A bræv til Mentamálaráðið, har viðlagt er avrit av skjali frá Dansk Kulturministerium, um fakliga støðið hjá Designerskolen Kolding,

Hin 16.09.2002 roynir A at fáa samband við N, men fær at vita, at N er burturstødd,

Hin 02.10.2002 sendir A bræv til Mentamálaráðið og minnir á hetta mál,

Hin 08.10.2002 sendir Mentaraálaráðið bræv til A, har boðað verður frá, at ráðið heldur fast við avgerð sína,

Hin 06.11.2002 sendir undirritaði bræv til Mentamálaráðið, har m.a. víst verður á, at í starvslýsingini stóð at talan var um „*fast starv fulla tíð*“ og at ráðið ikki hevur heimild at nokta umsøkjara at verða sett í starvið, sum lýst varð leyst.

Hin 15.11.2002 svarar Mentamálaráðið, at tey ikki kunnu gera viðmerkingar áðrenn 8 dagar,

Hin 26.11.2002 sendir undirritaði Mentamálaráðnum áminningar-skriv,

Hin 29.11.2002 sendir Mentamálaráðið undirritaða bræv, har ráðið heldur fast við støðutakan sína,

Hin 03.12.2002 sendir undirritaði Mentamálaráðnum bræv, har eg heiti á ráðið um at greiða frá hvørja hægri útbúgving ítøkjuliga verður sipað til í starvslýsingini,

Hin 09.12.2002 sendir Mentamálaráðið undirritaða bræv, og har verður í veruleikanum viðurkent, at ráðið ikki hevur sipað til nakra ítøkjuliga útbúgving, tá starvslýsingin varð orðað.

Tað sum vit kunnu staðfesta er:

at lærari í ár er settur í fast starv í fakinum psykologi og pedagogikk, uttan at hesin persónur hevur lokið endaliga útbúgving frá hægri lærustovni (hvat ein so skal leggja í hetta hugtak),

at verandi lærari í fakinum evning og handarbeiði á Føroya Læraraskúla ikki lúkar tey útbúgvingarkrøv, sum Mentamálaráðið nevnir í skrivi sínum dagfest 09.12.2002,

at á vári 2002 varð lýst eftir lærara til „*fast starv fulla tíð*“ í fakinum evning og handarbeiði,

at A søkti hetta starv,

at A ikki fekk hetta starv,

at Mentamálaráðið hevur ásannað, at ráðið í sambandi við orðing av starvslýsingini ikki hevur sipað til nøkur ítøkjulig útbúgvingarkrøv,

at Mentamálaráðið ikki hevur víst á møguleika fyri, í danska ríkinum, at nema sær eina hægri útbúgving innan økið evning og handarbeiði, enn tann útbúgvingin, sum A hevur nomið sær,

at A ikki fyrr enn við skrivi ráðsins dagfest 09.12.2002 fær fráboðan um, at ráðið tosar um kombinatión av ymiskum útbúgvingum.

Greitt er tí, at Mentamálaráðið ikki hevur víst á nakra sakliga grund til, ikki at seta A í ta starv, sum varð lýst leyst og sum hon søkti, nevniliga fast starv fulla tíð.

Tá vit samanbera hetta við, at Mentamálaráðið í ár hevur sett lærara í fast starv í fakinum psykologi og pedagogik, uttan at hesin persónur hevur tikið endaligt prógv og at tann lærari, sum røkir fast starv á Lærara-skúlanum í fakinum evning og handarbeiði, ikki hevur nomið sær hægri útbúgving enn tann útbúgving A hevur, so er greitt, at talan er um grovan missmun, sum almennur myndugleiki ikki hevur loyvi at fremja mótvegis borgarum landsins.

Eg havi mælt A til at heita á Umboðsmann Løgtingsins um at kanna hetta mál, og tí fari eg at heita á tygum um skjótast tilber at taka upp hetta mál og taka eina endaliga avgerð.

Um tygum tørva aðrar upplýsingar eru tygum vælkomin at venda tygum til undirritaða."

Tann 13. januar 2003 sendi I, adv., soljóðandi skriv til K, landsstýriskvinnu í mentamálum:

„...Eg loyvi mær við hesum at minna á skriv mítt dagfest 20.12.02.

Eg vóni at frætta aftur í hesari vikuni."

Tann 22. januar 2003 sendi Mentamálaráðið soljóðandi skriv til I:

„...Við skrivi, dagfest 20.12.2002, heita tygum á landsstýrismannin um at taka upp omanfyri nevnda mál.

Til tygara staðfestingar skal viðmerkjast:

- at lærarin í sálar- og námsfrøði, sum tygum siga, er settur í fast starv uttan at lúka treytirnar, er fyribilssettur skúlaárið 2002/03,
- at lærarar ikki síðan 1997 eru settir í fast starv á Føroya Lærarskúla, uttan so at teir hava lokið setanartreytirnar viðvíkjandi útbúgving frá hægri góðkendum lærustovni (universiteti). Hetta, tá sæð verður burtur frá einum heilt serligum undantaki,
- at A fekk tilboð um tíðaravmarkað starv eins og 2 onnur, sum ikki luku útbúgvingartreytirnar,
- at tað eru fleiri møguleikar at lúka útbúgvingartreytirnar fyri at kunna undirvísa í evning og handarbeiði, t.d. finnst eitt ótal av fakkombinatiónsmøguleikum á vanligum eins væl og á námsfrøðiligum universitetum,

- at A er tekstilformgevi (designari) frá einum skúla, ið ikki hevur status sum hægri lærustovnur (universitet),
- at í lóg um læraraútbúgving (§ 16) verður tikið sum givið, at undirvísarar skúlans eru adjunktar/lektorar, har fortreytin fyri heitinum er, at viðkomandi hevur kandidats-, magistara- e.l, prógv frá universiteti.

Tygum siga tað vera greitt, at talan er um grovan missmun, sum Mentamálaráðið fremur við ikki at seta A í starv. Hetta gera tygum við støði í uppáhaldinum um at lærari í ár er settur, sum ikki lýkur útbúgvingarkrøvini, og vísandi til, at annar lærari í evning og handarbeiði, ið ikki lýkur útbúgvingarkrøvini, er í føstum starvi á Læraraskúlanum.

Mett verður, at Mentamálaráðið hevur viðgjørt hetta mál sakliga. Sum víst er á omanfyri, eru viðurskiftini ikki, sum tygum hava fatað tey: viðkomandi lærari í sálar- og námsfrøði er ikki settur í fast starv og Mentamálaráðið hevur seinnu árini fasthildið, at kravið til lærarar, ið settir verða í fast starv á Læraraskúlanum, er útbúgving frá hægri lærustovni. Einans eitt undantak er gjørt frá hesi siðvenju síðan 1997.

Við støði í hesum verður boðað frá, at avgerðin um, at A ikki kann verða sett í fast starv, verður fasthildin."

Tann 24. januar 2003 sendi I, adv., vegna A, soljóðandi skriv til K, landsstýriskvinnu:

„...Í framhaldi av skrivum mínum dagfest ávíkavist 20.12.02 og 13.01.03, skal eg við hesum boða frá, at klientur mín ikki vil bíða longur.

Fyri 10 døgum síðani fingu vit boð yvir telefonina um, at svar skuldi koma í farnu viku.

Eg skal staðiliga gera vart við, at eg havi skilt, at fleiri av teimum sum starvsett eru á Føroya Læraraskúla og Føroya Studentaskúla ikki lúka somu útbúgvingar- og førleikakrøv, sum mentamálaráðið hevur sett í sambandi við umsóknina hjá A, og tí verður heitt á tygum, um skrivliga at boða frá um hetta er rætt.

Serliga fari eg at heita á tygum um at greiða nærri frá, um tað er rætt, at stórur partur av lærarunum á Føroya Læraraskúla ikki hava akademiska útbúgving og eisini verður heitt á tygum, um at boða frá, um tað er rætt, at lærari í ár er settur í fast starv í fakinum psykologi og pedagogik, uttan at hesin persónur hevur lokið endaliga útbúgving frá hægri lærustovni. Eg skilji, at talan er um starv á Føroya Studentaskúla.

Eg skal endurtaka, at tað tykiskt sum at so nógv ivamál er í hesari málsviðgerð, at eg havi mælt klienti mínum at heita á Løgtingsins Um-

boðsmann, um at kanna hetta mál út í æsir um ikki eg áðrenn mikudagin í komandi viku havi fingið svar frá tygum.

Eg vóni, at tygum skilja, at klientur mín tekur hetta mál í sera stórum álvara og hóast hon hevði vónað, at onki stríð skuldi standast burturúr málinum, so kann hon ikki góðtaka, at Mentamálaráðið setur henni krøv sum ikki tykjast at vera sett øðrum umsøkjarum til líknandi størv."

Tann 30. januar 2003 sendi Mentamálaráðið soljóðandi skriv til I:

„…Vísandi til skriv tygara, dagfest 24.01.2003, verður víst til svarskriv, dagfest 22.01.2003.

Viðvíkjandi spurningi tygara, um tað er rætt, at partur av lærarunum á Føroya Læraraskúla ikki hava akademiska útbúgving, so er tað rætt. Nakrir tímalærarar og lærarar í fyribils starvi hava ikki akademiska útbúgving, eins og tað fyri árum síðan vórðu settir lærarar, ið ikki luku treytirnar. Men sum víst á í fyrra svarskrivinum hevur siðvenjan seinnu árini verið at kravt akademiskan førleika sum treyt fyri setan í fast starv á skúlanum."

Tann 22. mars 2003 sendi I, adv., vegna A, soljóðandi skriv til J, landsstýrismann:

„…A hevur heitt á undirritaða, um at venda mær til tygara í sambandi við umsókn hennara um fast starv sum lærari á Føroya Læraraskúla.

Í skrivum dagfest ávíkavist 22.01.03 og 30.01.03, hevur ráðið boða frá:

*„at í grein 16 í lógini um læraraútbúgving verður tikið sum givið, at undirvísarar skúlans eru adjunktar/lektarar, har fortreytin fyri heitinum er, at viðkomandi hevur kandidats-magistarar-ella prógv frá universiteti*"

Í seinna skrivinum verður víst á, at:

*„siðvenja seinnu árini hevur verið at kravt akademiskan førleika, sum treyt fyri setan í fast starv á skúlanum*"

Eg havi kannað hetta mál, og fyri mær er ongin ivi um, at Mentamálaráðið bæði hevur brotið formligu reglurnar, sum galdandi eru fyri viðgerð av slíkum málum, eins og greitt er, at viðgerðin og avgerðin ikki byggir á eina rætta tulking av galdandi lóggávu.

Hetta ber greitt brá av, at talan er um eina avgerð sum ikki byggir á eina sakliga grundgeving.

Eg sendi hjálagt til tygara kunnleika, avrit av frágreiðing frá nevndini sum hevur viðgjørt setunarviðurskiftini á Føroya Læraraskúla.

Viðvíkjandi sjálvari lógini verður beinleiðis sagt, at verandi lóg krevur ikki akademiskan førleika.

Tað er rættuliga álvarsligt at Mentamálaráðið við skrivi sínum dagfest 22.01.03 hevur gjørt galdandi, at lógin krevur akademiska útbúgving, tí bæði út frá einari málsligari tulking av lógargreinini og einari endamálstulking er greitt, at lógin ikki setur slík krøv. Hetta hevur nevndin eisini staðfest í frágreiðing sínari.

Longu av hesari orsøk er fyri mær ongin ivi um, at avgerðin um at nokta A fast starv er ógildug.

Hetta er tó bert ein partur av teimum umstøðum í sambandi við málsviðgerðina, sum greitt benda á, at talan er um ein ógilduga avgerð.

Fyri at taka samanum tey viðurskifti, sum antin í sjálvum sær ella saman gera, at talan er um eina ógilduga avgerð, kann eg vísa á hesi viðurskifti:

at starvið er lýst leyst sum fast starv og tí hevur umsøkjari sum lúkar fakligu útbúgvingarkrøvini, sum setast kunnu til slíka starvsetan, krav uppá at verða settur í starv,

at staðfest er; at onki lógarkrav er um akademiska útbúgving í sambandi við setan í fast starv sum lærari á Føroya Lærarskúla,

at teir lærarar sum í dag undirvísa í handaligu/listarligu lærugreinum á Føroya Læraraskúla, hava ikki akademiska útbúgving,

at A hevur nomið sær hægstu útbúgving, sum fáast kann í Danmark, innan fyri ta undirvísingar øki hon søkti,

at Mentamálaráðið, hóast áheitan okkara, ikki hevur kunna víst á, hvørja útbúgving í danska ríkinum A skal hava lokið, fyri at lúka fakligu krøvini fyri at fáa fast starv á Føroya Læraraskúla,

at í lýsingini var onki krav um akademiska útbúgving,

at lýsingin seinni varð broytt, soleiðis at ráðið setir treytir, sum ikki hava nakra heimild í galdandi lóggávu,

at í londunum rundan um okkum er heldur onki krav um akademiska útbúgving í sambandi við fasta starvsetan, innan fyri tey undirvísingarøki, sum her er talan um.

Eg loyvi mær eisini at vísa á, at tá alment starv verður lýst leyst, so er ongin ivi um, at setunarmyndugleikin hevur skyldu til at viðgerða umsóknirnar eftir orðingini av sjálvari lýsingini, og tá onki krav varð sett í lýsingini um akademiska útbúgving, so hevur setanarmyndugleikin ikki seinni rætt til, at seta hetta sum krav fyri fastari starvsetan.

Serliga greitt er hetta, tá klientur mín hevur víst á, at verandi undirvísarar á skúlanum ikki hava nomið sær akademiska útbúgving, og at klientur mín hevur nomið sær hægstu útbúgving sum møguleiki er fyri at nemað sær í Danmark, tá talan er um ta undirvísingarøki, sum her er talan um.

Eisini skal eg gera vart við, at tað er sera óheppið, at almennur myndugleiki ger galdandi, at siðvenjan seinnu árini hevur verið at krevja akademiska útbúgving, tá tað er ein grundleggjandi regla í øllum fyrisitingarrætti, at fyrisitingin skal fylgja lógini, og tí er eingin heimild at gera sínar egnu siðvenjur.

Viðvíkjandi formligu reglunum, so hevur Umboðsmaðurin hjá danska Fólkatinginum staðfest, at tað er brot á hoyringaskylduna hjá almennum myndugleika, um myndugleikin tekur avgerð um ongan av umsøkjarunum at seta í starv, uttan at hoyringskriv fyrst er sent viðkomandi umsøkjarum.

Eg vóni at tygum skilja, at klientur mín ikki kann góðtaka, at fast starv verður lýst leyst, uttan at kravt verður at umsøkjarar skulu hava akademiska útbúgving, men at setanarmyndugleikin aftaná boðar frá, at talan ikki verður um fasta starvsetan, og at fyritreytin fyri slíkari fastari starvsetan nú er, at umsøkjarin skal hava akademiska útbúgving.

Eg havi greitt klienti mínum frá, at eg ikki ivist í, at hon hevur møguleika at fáa dómstólarnar og / ella Umboðsmannin Løgtingsins, at staðfesta, at talan er um eina ógilduga avgerð, tí talan er bæði um brot á grundleggjandi formligar fyrisitingarreglur og um eina avgerð, sum bæði er ósaklig og sum er í beinleiðis stríð við galdandi lóggávu.

Sum tygum kunnugt, so er tað rættuliga álvarsligt fyri ein fyrisitingarmyndugleika, tá staðfest verður. at umsitingin av galdandi málsøki ikki er farið fram sambært galdandi lóggávu.

Í einari seinastu roynd at fáa loyst hetta mál uttan uppílegging av øðrum mynduleikum, loyvi eg mær at heita á tygum, um vinaliga persónliga taka upp hetta mál.

Eg vóni at frætta aftur áðrenn 14 dagar.

Samstundis loyvi eg mær at spyrja um møguleiki er at fáa í lag fund við tygum, har klientur mín nærri kann greiða frá málinum.“

Frágreiðingin, ið verður nevnd í skrivinum hjá I, adv., er soljóðandi:

**„Frá innanhýsis nevndini á F. L. (…, S, P), sum hevur viðgjørt setanarviðurskifti á skúlanum**

Innihald:

*Støðan í Føroyum í løtuni*
*Støðan í grannalondunum*
*Tilmæli frá F.L.*

**Støðan í Føroyum í løtuni:**

Lógin:

Vit hava eina læraraskúlalóg (LI. nr. 67 frá 20.05.1996), har sagt verður soleiðis um setanartreytir:

*§ 16. Sum treyt fyri setan í fast starv sum læraraskúlaadjunktur, – lektorur ella -rektari er, at viðkomandi, umframt at hava tann neyðuga kunnleikan og námsfrøðiligu útbúgvingina, skal hava staðið eina roynd í námsfrøði og undirvísingarfimi.*

Landsstýrismaðurin ásetur nærri reglur um hesa roynd.

Verandi lóg krevur altso ikki akademiskan førleika, men „tann neyðuga (okkara undirstriking) kunnleikan og námsfrøðiligu útbúgvingina… Her verður ikki kravd kandidatútbúgving, men neyðuga kunnleikan, uttan at hetta verður greinað nærri.

Kravið til pedagogisku fortreytirnar er at tann setti skal „hava staðið eina roynd í námsfrøði og undirvísingarfimi“. Man talan her vera um, at umsøkjarin skal hava t.d, læraraprógv ella longri undirvísingar-royndir umframt pedagogikum?

Almennur setanarpolitikkur:

Tað finst ein almennur setanarpolitikkur, har nærri fyriskrivaðar reglur eru fyri hvussu størv skulu lýsast og onnur „praktisk“ viðurskifti í sambandi við starvssetanir. Um fortreytirnar hjá umsøkjaranum, sum settur verður í starv, stendur:

*„Endamálið er at tryggja, at stovnurin setir tann umsøkjaran, sum, úr einum heildarsjónarmiði, er best egnaður til starvið. Setanarpolitikkurin skal eisini tryggja, at umsøkjarar, sum ikki fáa eitt starv teir hava søkt, kortini kunnu verða vísir í, at viðgerðin er farin fram á rættan og rættvísan hátt.“*

Eftir hesum at døma leggur tann almenni setanarpolitikkurin upp til, at stovnarnir út frá einum heildarsjónarmiði skulu seta fólk í starv, uttan at hetta verður nærri greinað. Ein neyvari útgreining verður helst løgd í sáttmálarnar við tey ymisku fakfelagsøkini. Tí er neyðugt at hyggja at

sáttmálanum millum Magistarafelagið, sum hevur flestu starvsfólkini á Føroya Læraraskúla sum lim, og Fíggjarmálaráðið.
Sáttmálin millum Magistarafelagið og Figgiarmálaráðið:
Fyrst tvey brot úr sáttmálanum:
**§1. Øki**
*Sáttmálin er fyri undirvísingar- og granskingarstørv, har tað er ein fyritreyt fyri setan, at tann setti hevur akademiska útbúgving, fyri fyrisitingarlig størv, har tað er ein fyritreyt, at tann setti hevur magistara útbúgving og fyri lærarar í føstum starvi á Føroya Læraraskúla.*
**§ 2. Setan**
*Kapitlið er um starvsfólk, sum er sett í starv í 3 mánaðir ella longur. Starvið er fast starv ella tíðaravmarkað.*

*Stk. 2. Leys størv, sum sett skulu verða eftir hesum sáttmála, skulu verða lýst leys alment. Tilskilað skal verða, hvat starvið fatar um, hvør útbúgving krevst og hvør lønin er.*

Í verandi sáttmála (sum fevnir um tey flestu, ikki øll, starvsfólk á Læraraskúlanum) verður nevnt eksplicit, at hann fevnir um fólk við akademiskari útbúgving og magistara útbúgving og fyri lærarar í føstum starvi á Føroya Læraraskúla. Sáttmálin fevnir altso um okkum sum nakað serstakt. Kanska skal hetta skiljast so, at lærarar á Føroya Læraraskúla eru fevndir av sáttmálanum, hóast teir ikki hava akademiska útbúgving?!

Í sambandi við starvssetan krevur §2 í sáttmálanum, at *„tilskilað skal verða, hvat starvið fatar um,* hvør útbúgving krevst *(okkara undirstriking) og hvør lønin er*“

Hetta, at tilskilað skal verða hvør útbúgving krevst til lýsta starvið, kann tulkast sum ein undantaksregla til generella kravið um akademiska útbúgving sum verður sett fram í §1.

– –

Soleiðis er støðan í Føroyum, men hvussu sær út í grannalondunum?
**Støðan í grannalondunum:**
**Rundspørge / Danmark**
Sammenfatning af svarene fra 5 danske læreruddannelsesinstitutioner – geografisk velfordelt.

Rektorer og administratorer svarede på en række spørgsmål formuleret i vedlagte brev.

Idet der i brevet blev bedt om oplysninger om praksis, hvor det formelle grundlag ikke holder, vil der ikke blive citeret direkte fra svarene.

I Danmark findes ingen centralt stillede krav til kompetence ved ansættelse; men i alle svar tilstræbes **både** akademisk **og** pædagogisk kompetence på så højt niveau som muligt. Et af argumenterne for dette er, at læreruddannelsesstedernes godkendelse blandt andet baseres på en samlet vurdering af lærerkorpsets kompetence.

I praksis ansættes ofte folk med ikke-akademisk kompetence. Dette gælder især i følgende to tilfælde:

1) indenfor de kreative / håndværks - orienterede fagområder, hvor akademiske grader ikke nødvendigvis signalere den højeste kompetence.
2) Ved uddannelsessteder i yderområderne, hvor det øjensynligt ikke er attraktivt for unge akademikere at bosætte sig.

Kompetenceniveauet evalueres og garanteres ved en cental lektorbedømmelse efter 3-4 års ansættelse som adjunkt.

Ved de fleste seminarier følges standardprocedurer ved ansættelsen svarende nogenlunde til Landsstyrets ansættelsespolitik; men dog er det i sidste ende rektor, der indstiller til ansættelse.

Disse procedurer afviges af og til. F.eks. ved ansættelser under tidspres og ved ansættelse af timelærere.

En del af ansættelsespolitikken er, at der anvendes veldefinerede stillingsbeskrivelser i opslaget. (min kommentar : Dette er måske et punkt, der er mindre hensigtsmæssig hos os, hvor faggrupperne består af en brøkdel af en stilling og altså ikke udgøres af flere folk, som ved de større institutioner i Danmark og andre steder. Faren er at stillingsopslagene må skræddersys til den aktuelte ansøger. Som nævnt i vores anbefaling er det mere hensigtsmæssigt med brede buketter af områder i stillingsopslaget.)

**Rundspørge / Sverige**

Vi henvendte os til en stor, central institution : Gøteborg Universitet, og til en institution i yderområdet: Mitthøgskolan.

Begge institutioner er universiteter og har dermed som deres krav til kompetence ved ansættelsen et krav om PhD-niveau („disputerade lektorer“), hvilket ikke er svært at få ansøgere på for Gøteborg Universitet; men derimod er meget svært for Mitthøgskolan og særligt i de „bløde“ fagområder.

Ved Gøteborg Universitet opereres der eksplicit med den ovenfor omtalte opdeling i sædvanlig akademisk kompetence og „kunstnerisk/-skabende“ kompetence.

Se „Førordning om ændring i høgskoleførordningen (1993:100)“, hvor der i 4.de kapitel § 7 skrives om doktor-kompetence til at“ …anstælles

som lektor inom annat en konstnærlig verksamhet…"; og i § 8 tilsvarende om krav til ansættelse som lektor indenfor kunstnerisk virksomhed.

**Noreg**

Tað, sum her er greitt frá er frá einum norskum Høgskole sum eisini útbúgvur lærarar til fólkaskúlan.

Spurningarnir vóru:

er tað eitt krav fyri at verða settur í starv at viðkomandi hevur eina akademiska (universitets) útbúgving ella

er kravið at eitt ávíst prosenttal av lærarastabinum hevur akademiska útbúgving og í so fall hvussu stórur er hesin prosentpartur

a: hvørji formell krøv verða sett einum lærara fyri at hann kann verða settur í fast starv sum undirvísari við almenlæraraútbúgvingina og

b: hvørji krøv verða sett fyri at ein kann fáa starv sum tímalærari

c. hvussu sær hetta út í praksis og hvørjar kvalifikatiónir verða hildnar mest relevantar.

– – –

Tað sær ikki út til at verða eitt krav frá almennari síðu, at tann sum verður settur sum lærari við almenlærararaútbúgvingina skal hava akademiska útbúgving. Skal nakað alment sigast um setanina av lærarum til læraraútbúgving so má tað verða, at lærarin <u>skal kunna sítt fak til lítar</u>, men gongdin er tann at skúlin helst við hava lærarar við einum høvuðsfaki og doktaragradi. Sitat: „da dette gir mest tilskudd fra departementet til høgskolen" sitat enda. Her er sostatt talan um ein fíggjarligan spurning.

Tá lærari skal setast leggja tey álitisvaldu, (sum eg skilji eru tey, sum eru við til at innstilla) stóran dent á royndarfyrilestrar ella at eygleiða eina undirvísingarstøðu og tá skulu umboð fyri tey álitisvaldu verða til staðar.

Á hesum skúlanum hevur tey seinastu árini praksis verið at sett bæði háskúlalektorar við høvuðsfaki frá lærdum háskúla ella frá læraraútbúgvingini (tónleik, ítrótt og evning) ella <u>*vanligar háskúlalærarar*</u> um ikki hevur verið gjørligt at fáa fakliga kvalifiseraðar lærarar.

Hildið verður at stórur dentur verður lagdur á akademiskar gradir, meðan minni virðismett verður undirvísingarførleiki tá lærari verður settur í fast starv. At tað ikki altíð er doktorgradurin, sum avger um tú ert ein góður undirvísari á læraraútbúgvingini sigur hetta sitatið nakað um: Sitat „vi har hatt noen feilansettelse ut fra søkere med doktorgrader som har kostet os dyrt" sitat enda.

Tímalærarar skulu hava pedagogiska útbúgving afturat tí neyðugu

fakkompetansuni. Um neyðugt verður sæð burtur frá pedagogisku útbúgvingini.

Lagt verður afturat at; sitat „efter min mening tillægges relevant praksis fra grundskolen alt for liten vekt“ sitat enda.

Tilmæli frá Føroya Læraraskúla

Vit hava kannað setanarviðurskiftini á útbúgvingarstovnum í øðrum Norðanlondum, har tey útbúgva lærarar/pedagogar.

Í Danmark, Noregi og Svøríki finnast eingi formel krøv um ávísar førleikar, t.v.s. at tað ikki finnast lógir, kunngerðir o.t. sum neyvt fyriskriva hvørji prógv krevjast, at tú kanst setast í starv á skúlum, ið kunnu sammetast við okkara. Tó finst ein yvirordnað regla sum sigur, at fólk ið verða sett í starv á einum útbúgvingarstovni, skulu hava hægri útbúgving enn hana útbúgingarstovnurin býður út.

Í praksis merkir hetta, at tað vanliga verður kravt av umsøkjara til slík størv, at hann hevur akademiska útbúgving. Hetta krav er eingin trupulleiki, har nóg mikið av umsøkjarum við ynsktu/kravdu (legg merki til, at hesir kravdu førleikar ikki stava frá formellum lógarkrøvum, men heldur siðvenju) førleikunum søkja størvini, tað vil í høvuðsheitunum siga í miðstaðarøkjunum. Men tað er vanligt í útjaðaraøkjunum, at tey ikki fáa umsøkjarar við teimum kravdu / ynsktu førleikunum (hvat adademiskari útbúgving viðvíkur). Tí er vanligt, at fólk í útjaðaraøkjum verða sett í fast starv út frá eini førleika-heildarmeting, hóast tey ikki hava akademiska útbúgving. T.v.s. at man hevur eina yvirordnaða reglu við krøvum í sambandi við starvssetanir, men samstundis verða undantøk gjørd av „tvungnum umstøðum“, simpulthen tí eingin við teimum „røttu“ førleikunum søkir størvini.

Nevndin metir, at okkara støða er at sammeta við útjaðara-støðuna í grannalondunum. Vit fáa ikki altíð umsøkjarar við akademiskari útbúgving til størvini her á skúlanum.

Tí er neyðugt, at vit – har umsøkjarar ikki hava „rætta“ førleikan t.v.s. akademiska útbúgving – nýta somu undantaksreglur sum tey gera í útjaðarøkjum í grannalondunum, t.v.s. at vit seta fólk í starv út frá eini heildarmeting av førleikum teirra í mun til starvið, tey skulu røkja. Halda vit stívrent fast í krøvini um akademiskan førleika, kunnu vit risikerað, at tey leysu størvini ikki verða sett. Tí tað verður trupult at fáa fólk at søkja størv, sum verða lýst leys ár um ár, uttan at tey hava nakra trygd fyri framtíðina.

Av tí at vit eru einasti útbúgvingarstovnur av sínum slagi í Føroyum, er viðhvørt neyðugt at seta fólk í starv við „breiðari" førleikum, um vit sum stovnur skulu megna at bjóða ta neyðuga fjølbroytni í útbúgvingunum sum ynskiligt er. Tí er neyðugt, at skúlin fær undantaksmøguleika at søkja eftir fólki við breiðari starvslýsingum til tess at vinna sær fleiri kombinatiónsmøguleikar í útbúgvingartilboðnum til tey lesandi.

Til tess at „tryggja" fakligan og pedagogiskan førleika mæla vit til, at tann, ið settur verður í starv á F. L., – í seinasta lagi 4 ár aftaná (royndar) starvssetanina – skal hava staðið „lektorbedøming", til tess, at starvssetanin skal gerast endalig.

Í nevndini, sum skal „lektorbedøma" tann (royndar-)starvssetta, skulu sita hesi umboð:

1 limur frá Fróðskaparseturi Føroya

1 royndur lærari frá miðnámsskúlunum

1 umboð av seminarium, ella útbúgvingarstovni har tey útbúgva lærarar, úr einum av Grannalondunum."

Tann 7. apríl 2003 sendi A soljóðandi skriv til J, landsstýrismann í lógarmálum og mentamálum. Skrivið er ikki skrásett í málinum hjá Mentamálaráðnum.

„Góði J,

Sum tú nokk hevur sæð, havi eg biðið um ein fund við teg, gjøgnum I sakførara.

Orsøkin er tann, at eg eri í starvi á læraraskúlanum, har eg síðsta vár søkti eitt fast starv, sum var lýst leyst. Men tá avtornaði fekk eg einans bjóðað starvið fyri eitt ár.

Umstøðurnar eru soleiðis, at eg eri í farloyvi frá Blindastovninum, har eg havi fast starv. Mær dámar stak væl at vera á læraraskúlanum, men at fara úr einum føstum starvi, og halda fram undir teimum treytum, at søkjast má hvørt ár um starv, har nær sum helst onkur annar kann vera tikin framum, tað fái eg ikki gjørt Hetta haldi eg vera stórt spell, og boðaði tí beinanvegin frá, at eg gjarna vildi hava starvið, men ikki góðtók tíðaravmarkingina.

Trupulleikin sýnist at vera, at „onkur" hevur avgjørt, at øll sum verða sett í fast starv á læraraskúlanum skulu hava akademiska útbúgving, óansæð hvat fakøki tey fáast við. Sum tað eisini stendur í uppritinum frá Læraraskúlanum, ið varð hjálagt seinasta brævi okkara, ber hetta ikki til. Fyri tað fyrsta er eingin lógarheimild fyri tí, fyri tað næsta ber ikki til at

seta hetta krav innan handaligu / listarligu lærugreinarnar, av tí at tær hægstu útbúgvingarnar á økinum ikki eru akademiskar.

Eg vildi fegin haft møguleika fyri at tosa við teg um, hvat kann gerast fyri at loysa hesa støðuna. Ikki bara er tað keðiligt hjá mær, men ein annar lærari er í somu støðu nú, og innan 4 ár fara tvey onnur frá innan hetta økið, og um henda mannagongd verður staðfest, kemur tað at ganga út yvir fakliga støðið á øllum tí handaliga / listarliga partinum av lærara- og pedagogútbúgvingunum.

Tíðin er nú komin, til at lýsa størv leys aftur á læraraskúlanum, uppskot til lýsing er longu farin frá Læraraskúlanum niðan í Mentamálaráðið. Gongur tað sum vit vænta, verður lýsingin broytt til at øll tey føstu størvini skulu krevja akademiska útbúgving.

Um tú kundi sett tíð av til eitt prát um hesa tvørligu støðu, kundi vit kanska funnið eina loysn sum var bæði til gagn fyri meg og skúlan. Hetta er sjálvandi einans galdandi um tú annars er samdur í sjónarmiðunum, men hetta hevur skund, tí um lýsingin fyrst fer í bløðini er verri at koma afturumaftur.

Vónandi ber tað til at fáa ein fund í lag í vikuni…"

Tann 14. apríl 2003 skrivaði J, landsstýrismaður, soljóðandi hondskrivaða notat á skriv frá I, adv., dagfest 22. mars 2003:

„Hetta má svarast, og eina frágreiðing má eg hava".

Tann 14. apríl 2003 sendi Mentamálaráðið soljóðandi skriv til I:

„…Við hesum skal verða sagt frá, at Mentamálaráðið hevur móttikið skriv tygara, dagfest 22.03.2003, har tygum biðja um, at landsstýrismaðurin persónliga tekur málið til viðgerðar og at fáa fund við landsstýrismannin.

Tygum kunnu tó ikki vænta at frætta so skjótt, sum tygum vænta – áðrenn 14 dagar – men fáa svar, so skjótt sum landsstýrismaðurin hevur havt møguleika at seta seg inn í málið."

Tann 25. maj 2003 skrivaði Mentamálaráðið soljóðandi innanhýsis notat í málið:

**„Viðmerkingar**

Eftir áheitan frá H, løgfrøðingi, hesar viðmerkingar til <u>punktini á síðu 2</u> í skrivi, dagfest 22.03.2003, frá I, adv., vegna A:

Ákærurnar um „brot á formligar reglur", „ósakliga viðgerð", at „avgerðin er ógildug" o.s.fr. mugu løgfrøðingarnir, sum annars hava verið inni í málsgongdini, meta um.

Ad. 1) umsøkjarin – A – lýkur ikki fakligu útbúgvingarkrøvini, tí varð hon ikki sett í fasta starvið, men fekk tilboðið fyribilssetan í eitt ár (ongin umsøkjari leyk førleikakrøvini). Søkt verður eftir lærara í handarbeiði og evning við útbúgving frá hægri lærustovni. A er tekstilformgevi frá Kolding Designskole, ið ikki er hægri lærustovnur. Og hevur eitt 180 tímar grundskeið í „voksenpædagogik". (ein cand.pæd. frá lærarahaskúla / námsfrøðiligum universiteti í handarbeiði/evning er eitt dømi um ein, ið lýkur krøvini)

Ad. 2) At onki lógarkrav er um akademiska útbúgving er ein spurningur um tulking. Undirliggjandi má tó vera, at ein lærari á einum lærustovni / skúla hevur útbúgving á hægri støði enn teir næmingar, ið „klaktir" verða. Lógarkrav er um „neyðugan kunnleika og námsfrøðiliga útbúgving" umframt at viðkomandi „skal hava staðið eina roynd í námsfrøði og undirvísingarfimi" sí § 16 í lærarautbúgvingarlógini.

Ad. 3) Tað er rætt, at hinir lærararnir í fakunum ikki hava akademiska útbúgving. Tann eini er fyribils settur í fjør eins og A og er í gongd við víðariútbúgving, hin varð settur í 1997.

Ad. 4) Útbúgvingin hjá A er ikki ein pædagogisk/faklig útbúgving, rættað ímóti undirvísing á lærarasúla í fakunum handarbeiði og evning. Hon tekstildesignari.

Ad. 5) Ein cand.pæd. í kreativum fakum, sí omanfyri, er ein møguleiki. (ein føroyingur er á veg sum cand.pæd í handarbeiði). Ein fakligur pedagogiskur yvirbygningur á master støði, sum finnst í Dk, er ein annar møguleiki. Har ber eisini til hjá designarar søkja.

Ad. 6) Í lýsingini varð kravt, at viðkomandi skuldi hava „útbúgving frá hægri lærustovni", v.ø.o. universiteti, lærarahaskúla e.l.

Ad. 7) Tað er rætt, at lýsingin – í samráð við Magistarafelagið, sum hevur Lærarasúlan sum sáttmálaøki – varð broytt. Í seinnu lýsingini varð „ella aðra hóskandi útbúgving" strikað. A hevur søkt starv eftir broyttu lýsingini.

Ad. 8) Í DK vóru í 1996 uml. 75% av lærarunum við seminariini akademikarar sbrt eina kanning hjá Dansk Magisterforening. Sbrt. meting frá undirvísingarmálaráðnum er parturin størri í dag, partvís tí nógvir yngri lærarar við universitetsbakgrund eru settir síðan og partvís tí allir lærarar nú skulu ígjøgnum lektordøming. Sbrt. EVA-rapportina:

Efter- og videreuddannelse af undervisere på mellemlange og videregående uddannelser 2003, er prosentparturin í dag 81% við lærara-útbúgvingarnar."

Tann 24. juni 2003 skrivaði løgfrøðingur á Mentamálaráðnum soljóðandi innanhýsis notat í málið:

**„Viðmerkingar til málið um setan av A**

§ 16 í læraraskúlalógini ásetur soljóðandi um førleikakrøvini í sambandi vi fasta setan á læraraskúlanum:

> Sum treyt fyri setan í fast starv sum læraraskúlaadjunktur, – lektorur ella -rektari er, at viðkomandi, umframt at hava tann neyðuga kunnleikan og námsfrøðiligu útbúgvingina, skal hava staðið eina roynd í námsfrøði og undirvísingarfimi. Landsstýrismaðurin ásetur nærri reglur um hesa roynd.

Krøvini eru sostatt neyðugur førleiki og námsfrøðilig útbúgving. Tað er ikki ásett í lógini, at akademiskur førleiki er neyðugur. Hvørjar námsfrøðiligar útbúgvingar talan kann vera um, er heldur ikki ásett í lógini. Tað er sostatt møguleikar fyri at tulka lógina.

Í lýsingini (tí seinnu, sum A hevur søkt eftir) eru førleikakrøvini ásett soljóðandi: „umsøkjari **eigur** at hava útbúgving frá hægri góðkendum lærustovni". Orðið „eigur" gevur møguleika fyri undantøkum. Um setanarmyndugleikin ongan undantaksmøguleika ætlaði at geva til útbúgvingarkrøvini átti at staði: „umsøkjari **skal** hava útbúgving frá hægri góðkendum lærustovni."

Samanumtikið er tað eftir mínari meting ivasamt, um vit við læraraskúlalógini og starvslýsingini sum grundarlagi kunnu halda fast við, at formliga kravið til fasta setan er útbúgving frá hægri góðkendum lærustovni. Arbeiðsgevarin hevur rætt til at seta ávís førleikakrøv til starvsfólk í sambandi við setan, men hesi krøv eiga sum høvuðsregla at vera í samsvar við møguligar lógarásetingar og starvslýsingina. Í hesum máli eru møguleikar fyri at tulka bæði lógina og lýsingina, og tá setanarmyndugleikin, sum í hesum málinum, tulkar krøvini, soleiðis at tey frá umsøkjarans sjónarmiði kunnu metast sum herd í mun til lýsingina og lógina, er greitt at myndugleikin kann fáa trupulleikar í einum møguligum sakarmáli ella í eini kæru til umboðsmannin.

Spurningurin, um Mentamálaráðið skal halda fast við sína tulking ella finna eina aðra loysn á málinum, er ikki ein løgfrøðiligur spurningur. Tað er heldur ein spurningur um at gera eina meting av fyrimunum og avleið-

ingum í setanarpolitikki ráðsins í sambandi við støðutakanina. Málsviðgerðin hevur í síni viðgerð sera skilagott víst aftur og greinað út flestu uppáhaldini frá I, advokati, sí innanhýsis skriv dagfest 25. maj 2003, men ikki slepst undan vandanum fyri einum sakarmáli ella klagu til umboðsmannin. Eftir mínari meting kann tað vera ivasamt, hvussu úrslitið verður av málinum tá. Veikleikar í sambandi við ógreiðu orðingarnar í lógini og starvslýsingini kunnu geva Mentamálaráðnum trupulleikar.“

Tann 1. juli 2003 var innanhýsis fundur hildin í Mentamálaráðnum, har málið varð umrøtt. Soljóðandi notat varð, tann 3. juli 2003, skrivað frá fundinum:

„Landsstýrismaðurin varð 1. juli kunnaður um málið av undirritaða og H. Landsstýrismaðurin og løgfrøðingurin skuldu hvør sær umhugsa málið og lsm møguliga seta seg í samband við A, sum hevði sent honum persónligt bræv. H skuldi umhugsa at kontakta advokatin I.“

Tann 17. september 2003 sendi I, adv., soljóðandi telefax til Mentamálaráðið:

„…Við skrivi dagfest 14.04.03 boðaðu tit frá, at landsstýrismaðurin skuldi taka upp hetta mál, og at vit skuldu frætta aftur.

Nú eru meira enn 5 mánaðir farnir uttan at undirritaði ella A hava frætt nakað.

Vónandi skilja tit í Mentamálaráðnum, at hetta er ein ótolandi støða, og eg loyvi mær tí enn einaferð at minna á hetta mál.

Klientur mín hevur verið sera tolin, men eg havi mælt henni til at taka onnur stig, um ikki vit hava frætt aftur frá Mentamálaráðnum innan 10 dagar.

Vónandi fáa vit loyst hetta mál í semju.“

Tann 18. september 2003 sendi I soljóðandi teldupost til A:

„…Mentamálaráðið hevur biðið um fund mikudagin 24.09.03 kl. 10.00.

Teir koma 2 mans oman á skrivstovu mína.

Vónandi kannst tú koma við á fundin.

Sig mær frá um tú kannst møta.“

Tann 24. september 2003 sendir Mentamálaráðið soljóðandi skriv til Magistarafelag Føroya:

„…Mentamálaráðið vil við hesum biðja um fund skjótast gjørligt við Magistarafelag Føroya.

Málið snýr seg um setanar- og lønarviðurskifti hjá lærarum, sum ikki hava akademiskan førleika, men kortini undirvísa á Føroya Læraraskúla.

Vinarliga vendið tygum til undirritaðu ella til L, deildarstjóra, at avtala eina tíð fyri fundin."

Tann 27. september 2003 sendi Magistarafelag Føroya soljóðandi skriv til Mentamálaráðið:

„Vísandi til bræv tykkara, dagfest 24. september 2003, viðvíkjandi setanarviðurskiftum á Føroya Læraraskúla, skal felagið siga frá, at tað fegið kemur á ein slíkan fund.

Samstundis fer felagið at heita á Mentamálaráðið um, á sama fundi, at taka til viðgerðar bræv felagsins til Mentamálaráðið dagfest 20. september 2003, viðvíkjandi lønarviðurskiftunum á Føroya Læraraskúla, somuleiðis vil felagið fegið tosa um okkurt einstakt flokkingarmál.

Felagið vendir sær til Mentamálaráðið skjótast tilber og avtalar eina tíð fyri fundin."

Fundur varð hildin ímillum Mentamálaráðið og Magistarafelag Føroya tann 3. oktober 2003 og hevur Mentamálaráðið gjørt hesa fundarfrásøgn :

**„Fundarskrá:**

1. Mál viðv. fyribilssettum lærarum
2. Hvønn týdning hava arbeiðs- og undirvísingarroyndir fyri starvsaldurin og í mun til formligu útbúgvingarkrøvini
3. Ymiskt

Ad 1. Í sambandi við at MMR ætlar at dagføra lærara- og pedagogútbúgvingina, soleiðis at útbúnir lærarir og pedagogar fáa bachelor status, ynskir MMR at tosa við felagið um mál viðv. fyribilssettum lærarum, ið ikki hava neyðugu akademisku førleikarnar. MMR ætlar at hækka (ella staðfesta) at førleikakravið, til at vera lærari á pedagog- ella læraraútbúgvingunum skal vera akademisk útbúgivng.

Á fundinum var eisini tosað við felagið (ætlanin er at tosa við skúlan eftirfylgjandi) um møguleikan fyri, at gera avtalu við teir fyribilssettu lærarar á Læraraskúlanum, fyri at geva teimum møguleikan at fáa

neyðugu akademisku førleikarnar upp á pláss. Talan er um niðanfyri standandi lærarar:

…

A,

bæði sett í tíðaravmarkað starv pr. 1. august 2002, fáa tilboð um at verða sett í føst størv, um tey innan ávísar av Mentamálaráðnum ásettar freistir:

1) eru sloppin inn til víðarilestur á universiteti og
2) hava tikið víðari námsfrøðiliga/fakliga útbúgving á master- ella kandidatstøði, ið frammanundan er góðkend av Mentamálaráðnum…

Magistarafelagið vildi ikki blanda seg uppí, hvussu lærararnir komu upp á akademiskt støði, so um avtala var gjørd við lærarar settar í tíðaravmarkað starv, so vildi felagið ikki mótmæla hesum. Felagið ynskti tó ikki at fáa nakra avtalu til góðkenningar, tí hetta kann seta felagið í tvístøðu.

Ad 2. Í sambandi við at MMR hevur fleiri lærarar á Læraraskúlanum at flokka, ynskir at fáa greiða á, hvønn týdning tað hevur fyri starvsaldurin (flokkingarstig) um viðkomandi hevur útbúgving sum BA/BS ella cand.phil, og síðani verður cand.mag. Og hvussu telja arbeiðs- og/ella undirvísingarroyndir frá hægri skúlum, herundir læraraskúla, studentaskúla o.t. og arbeiðs-/undirvísingarroyndir í fólkaskúlanum og á dag/-døgnstovnaøkinum, viga sínámillum og í mun til formligu útbúgvingarkrøvini í sambandi við lærarasetanir.

Felagið boðaði frá, at tann avtala, ið er gjørd fyri lærarar at fáa løn sum cand. phil., eisini verður galdandi fyri aðrar bólkar. T.d. verður … flokkaður á 6. stig, og … á 10-11 stig.

Ad 3. **Ársnormur** (sí eisini mál…)

Felagið hevur sett MMR fyrispuring um, hvussu lærararalønirnar verða ásettar og eftir hvørjum frymli tær verða roknaðar út. Eingin sáttmáli er gjørdur fyri pedagogar.

Ársnormurin er ymiskur fyri at undirvísa ávikavist lærara- og pedagoglesandi.

Magistarafelagið ynskir meira gjøgnumskygni yvir, hvussu og eftir hvørjum lønin verður útgoldin, t.e. hvat fáa teir løn fyri. Sí skjal 1, ið er teldupostur viðv. útrokning av ársnormi.

Partarnir samdir um, at Mentamálaráðið og Læraraskúlin (S og O t.d.) í felag avklára og gera uppskot um arbeiðstíð, lønarásetan vm. til arbeiðsbólkin, ið settur er sambært protokollat til sáttmálan millum Fíggjarmálaráðið og Magistarafelag Føroya (sí skjal 2, ið er óformel fundar-

frásøgn). Mett verður, at hetta mál í fyrstu atløgu er ein spurningur, sum Mentamálaráðið og skúlin eiga at hava áhuga í at greiða og hava eina meining um.

**Lýsing av størvum**

Bæði MMR og felagið vóru samd um, at staðfest verður í lýsingum eftir lærarum, at førleikakrøvini til undirvísarar á Føroya Læraraskúla eru universitetsútbúgving í viðkomandi lærugrein og / ella námsfrøði og at pedagogikum er minsta námsfrøðiútbúgvingarliga fyritreyt fyri setan í fast starv.

Tímalærarastørvini fyri skúlaárið 2004/05 verða lýst leys, har almennu førleikakrøvini verða gjørd obligatorisk í sambandi við møguliga fasta setan og sum fyrimunur við setan sum tímalærari. Tað er alt ov seint at lýsa í mai/juni, sum oftani verður gjørt.

**Førleikamenning**

Farið verður undir førleikameting og -menning av undirvísarunum á Føroya Læraraskúla. Hetta við at fara undir lektaradøming (ella sum lógin orðar tað „roynd í námsfrøði og undirvísingarfimi".“

Tann 6. november 2003 sendi I, adv., soljóðandi telefax til Mentamálaráðið:

„…Vísandi til fundin á skrivstovu okkara, har avtalað varð, at vit skuldu hava fund aftur um miðjan november mánaða, vil eg mæla til, at fundurin verður hildin á skrivstovu mínari **mikudagin 19.11.03, kl. 15.00**. Um hesin fundardagur ikki passar tykkum, vildi eg mælt til, at fundurin verður mikudagin í vikuni frammanundan.

Við vón um at frætta aftur.“

Tann 17. november 2003 sendi Mentamálaráðið soljóðandi skriv til I, adv.:

„Viðv. málsnr. …: starvsviðurskiftini hjá A.

Víst verður til fund á Advokatskrivstovuni 10. oktober 2003, har nýggjur fundur var avtalaður um miðan november, og bræv tygara, dagfest 6. november 2003, har mælt verður til, at fundur verður millum partarnar 19.11.03.

Eins og tygum hava frætt frá F, skrivara á Mentamáladeildini, hevur, orsakað av sjúku á deildini, ikki verið møguligt at áseta fundin, og 19. november verður undirritaða burturstødd uttanlanda í arbeiðsørind-

um. Skotið verður upp eina av fylgjandi døgum til fund á skrivstovu tygara:

**Týsdagin 25.11.03, kl. 11.00**
**Hósdagin 27.11.03, kl. 13.00**
**Týsdagin 02.12.03, kl. 13.00**

Mentamálaráðið hevur kannað útbúgvingarmøguleikar á masterstøði, og er uppskot til viðkomandi masterútbúgvingar viðheftar.

Mentamálaráðið hevur eisini kannað møguleikar á Designskúlanum í Kolding og í Keypmannahavn, men hesar útbúgvingar tykjast at vera á diplom- og ikki masterstøði.

Mentamálaráðið hevur eisini kannað, hvørt A vildi havt beinleiðis atgongd til masterútbúgvingar á donskum universitetum, ella um neyðugt vildi verið við millumliggjandi diplomútbúgving, og her er svar komið frá Danmarks Pædagogiske Universitet, at A vildi havt beinleiðis atgongd til masterútbúgvingarnar.

Vónandi er eitt av omanfyri standandi fundaruppskotum hóskandi, men annars eru eisini aðrir møguleikar."

Hjálagt skrivinum vóru m.a. hesir upplýsingar um útbúgving á Roskilde Universitetscenter:

„Master i Voksenuddannelse

(MVO)

Uddannelsen

Masteruddannelsen i voksenuddannelse er en 2-årig uddannelse på deltid.

**Målgruppe**

Uddannelsen retter sig mod undervisere, uddannelsesplanlæggere, personaleledere og vejledere, der arbejder med voksnes uddannelse, læring og kompetenceudvikling.

**Indhold**

Masteruddannelsen er opdelt i to moduler. Hvert modul varer et år og modul I studeres før modul II.

Modul I:

Voksnes hverdagsliv og livshistorie, socialisation og læreprocesser (30 ECTS). Der lægges vægt på at læring og udvikling foregår i andre sammenhænge end formel uddannelse.

Modul II:

Samfund, organisation og uddannelse (30 ECTS). Der lægges vægt på

uddannelsernes og læringssammenhængenes samfundsmæssige funktion og historie og på uddannelsesplanlægning.

Der er projekteksamen efter hvert modul. Projektrapport og projekteksamen efter modul II udgør masteruddannelsens afgangsprojekt.

Masteruddannelsen er en uddannelse på videnskabeligt niveau, derfor lægges der også vægt på, at deltagerne opnår generelle metodiske og analytiske kvalifikationer.

**Undervisningen**

Uddannelsen er projektorganiseret, og der er i projektarbejdet mulighed for – inden for studieordningens rammer – at „tone" indholdet af uddannelsen i retning af de problemstillinger, som gruppens medlemmer arbejder med i deres daglige arbejde.

Undervisningen foregår på 5-6 internatseminarer i løbet af studieåret (fra lørdag morgen til søndag eftermiddag på RUC) og i projektgrupperne.

Undervisningen på seminarerne foregår som en blanding af forelæsninger, workshops, gruppearbejde og i storgrupper/delehold (ca. 20 studerende, én lærer) hvor der arbejdes med tekstbearbejdning og med projektdesign og -metoder.

Projektarbejdet foregår mellem internatseminarerne og hver projektgruppe har tilknyttet en fast vejleder blandt holdets faste lærere. Projektvejledningen foregår først og fremmest som ansigt-til-ansigt-vejledning, men også via nettet. Det forventes derfor, at de studerende har netadgang.

**Adgangskrav**

Minimum to års relevant erhvervserfaring efter adgangsgivende eksamen samt

- en relevant bachelorgrad, eller
- en mellemlang videregående uddannelse på

professionsbachelorniveau inden for det pædagogiske, det sociale og det sundhedsfaglige område, eller

en pædagogisk diplomuddannelse.

**Vejledende deltagergebyr**

Pr. semester: 5.000 kr. Uddannelsen i alt: 20.000 kr.

**Ansøgningsfrist**

30. maj 2003

**Studiestart**

September 2003."

Tann 15. januar 2004 sendi I, adv., vegna A, eitt skriv til Mentamálaráðið, har hann vísti til fundin á skrivstovu hansara 1. desember 2003 og fregnaðist eftir svari frá ráðnum.

Tann 30. januar 2004 sendi I, adv., vegna A, soljóðandi skriv til Mentamálaráðið:

„…Eg loyvi mær við hesum at minna á skriv mítt dagfest 15.01.04.

Sum kunnugt varð á fundi okkara 01.12.03 avtalað, at tit áðrenn jól skuldu koma við einum ítøkiligum uppskoti viðvíkjandi óloystu starvssetanini hjá A, men enn er eingin fráboðan komin frá tykkum.

Eg vóni, at tit skilja, at A er sera ótolin, tí einki veruligt tykist at henda í málinum nú, hóast A hevði vónað, at Mentamálaráðið var sinnað at royna at fáa eina skjóta loysn á málinum.

Rættarstøðan hjá A er rættiliga greið, og tí ber ikki til hjá henni at bíða longur, um Mentamálaráðið ikki veruliga vísir vilja at fáa eina loysn á málinum.

Eg kann tí upplýsa, at eg eri biðin um at fyrireika kæruskriv til Umboðsmannin, um ikki ein endalig loysn er funnin áðrenn 10 dagar.

Eg vóni, at tit skilja, at A ikki sær annan møguleika, nú eingi boð koma aftur frá Mentamálaráðnum, men hinvegin so harmar tað A, um ein semjuloysn ikki fæst, tí á fundum okkara tyktust báðir partar vera sinnaðir at gera eina veruliga roynd at finna slíka loysn.

Við vón um at frætta aftur.“

Tann 11. februar 2004 sendi I, adv., soljóðandi innskrivaða bræv til Mentamálaráðið:

„…Sambært fyrisitingarlógini loyvi eg mær at heita á Mentamálaráðið um at veita A, sum parti í málinum, fult skjalainnlit í frammanfyri nevnda mál og annars øll onnur skjøl, sum hava við starvsumsókn hennara at gera og annars skjøl, sum á ein ella annan hátt eru tengd at nevndu málum.

Eg vænti, at nevnda skjalatilfar verður sent undirritaða innan 10 daga freistin í fyrisitingarlógini er farin.“

Tann 17. februar 2004 sendi Mentamálaráðið soljóðandi teldupost til I, adv.:

„…Ja, vit í Mentamálaráðnum skilja væl at A nú ótolnast, og biðið verður um umbering fyri longu avgreiðslutíðina. Málið er tó ikki gloymt, og tað

er als ikki av illvilja at tað er blivið so drúgvt við einari endaligari loysn, men er kanska mest orsaka av politisku støðuni. Seinasta bræv títt, dagfest 30.01.2004, er av misgávum komið í eitt annað mál, og er fyrst nú komið fram aftur. Tí hesin fyribils teldupostur um, hvussu støðan er.

Svar er fingið frá Stuðulsstovninum um, at Stuðulsstovnurin ongan møguleika hevur fyri at veita fíggjarligan stuðul. Stuðulsstovnurin vísir til heimasíðu hjá Statens Voksenuddannelsesstøtte, ið møguliga hevur onkra stuðulsveiting: www.svu.dk

H hevur havt samband við Fíggjarmálaráðið viðv. mannagongd og møguligum treytum í sambandi við eitt tílíkt mál, og eingin trupulleiki skuldi nú verið hesum viðvíkjandi.

Málið skal nú formelt viðgerast í Mentamálaráðnum, og miða vit ímóti, at málið er endaliga avgreitt í hesum mánaðanum."

Tann 18. februar 2004 sendi Mentamálaráðið soljóðandi teldupost til I, adv.:

„Her er enn eitt bræv sum júst er komið undan kavi, dagfest 11. februar 2004, um skjalainnlit (skrivarin á deildini hevur verið sjúk alla síðstu viku og eitt sindur afturat). Eg skal avgreiða málið so skjøtt sum gjørligt, og gera hvat eg kann at yvirhalda 10 daga freistina."

Tann 19. februar 2004 sendi Mentamálaráðið soljóðandi skriv til I:

**„Viðvíkjandi umsókn, dagfest 11. februar 2004, um skjalainnlit**

Hjálagt er listi yvir skjøl í málinum (postlisti ella skjalalisti). Í triðu kolonnu í listanum síggjast bókstavarnir „I" fyri inngangandi postur, „U" fyri útgangandi postur, og bókstavarnir „N" og „X", ið eru innanhýsis arbeiðsskjøl, sum vanliga ikki eru umfevnd av almennum innliti.

Av tí at nógv tey mestu skjølini eru skjøl, ið eru til ella frá A ella I (t.e. skjøl, ið tygum longu hava), verður heitt á tygum um, at kanna skjalalistan og síðani geva Mentamálaráðnum boð um, hvørji skjøl tygum ynskja innlit í.

Mannagongdin viðvíkjandi gjaldi er, at rokning verður send áljóðandi kr. 20,- fyri fyrstu síðuna og kr. 1,- fyri tær fylgjandi síðurnar."

Tann 26. febr. 2004 sendi I, adv. Mentamálaráðnum soljóðandi skriv:

„...Í framhaldi av skrivi mínum dagfest 11.02.2004 skal eg boða frá, at A ynskir innlit í øll skjøl, men sjálvsagt er ikki neyðugt at senda okkum skjøl, sum vit sjálv hava sent ráðnum."

Tann 12. mars 2004 sendi I, adv., teldupost til Mentamálaráðið. Viðheft teldupostinum var bræv um skjalainnlit, dagfest 11. mars 2004. Skrivið um skjalainnlit var soljóðandi:

„…Vísandi til brævaskifti okkara skal eg boða frá, at A sum partur í málinum krevur avrit av hesum skjølum:

– Øllum skjølum, uttan brøvini frá A og undirritaða, sum liggja í málinum viðvíkjandi umsóknini og kæruni frá A,
– Øllum skjølum, sum hava við lýsingar av starvinum at gera, herundir samskifti við feløg, stovnar og skúlan.

Eg kann viðmerkja, at sum eg havi skilt á Løgmansskrivstovuni, so skal ein partur í málinum ikki gjalda fyri avrit av skjølum, tí kunngerðin um gjøld bert snýr seg um innlit sambært lógini um innlit í fyrisitingina, og ikki um fyrisitingarlógina, sum galdandi er fyri tann, sum er partur í málinum.

Um Mentamálaráðið krevur gjald fyri nevndu skjøl, so verða tit biðin um at greiða frá heimildini at krevja slík gjøld, tá talan er um skjalainnlit sambært fyrisitingarlógini.“

Mentamálaráðið sendi tann 23. mars 2004 soljóðandi skriv til I:

„…22. januar 2003 boðaði táverandi landsstýrismaður frá, at avgerðin um, at A ikki kundi verða sett í fast starv, varð fasthildin.

Í brævi dagfest 22. mars 2003 heita tygum aftur á landsstýrismannin, tá J, um, at landsstýrismaðurin persónliga tekur málið upp, og at fundur verður fingin í lag við landsstýrismannin til tess at greiða nærri frá málinum.

Málið var síðan tikið uppaftur, og fekk fyrisitingin boð um at seta seg í sambandi við tygum, sum advokat hjá A. Fyrisitingin hevur síðan tá arbeitt við málinum og havt fundir og samskifti um teldupost og telefon við tygum og klient tygara fyri at vita um tað ber til at finna eina møguliga loysn.

Mentamálaráðið hevur tí gjørt av, at koma við niðanfyri standandi uppskoti til loysn:

- A verður sett í tíðaravmarkað starv á Føroya Læraraskúla frá 1. august 2004 til 1. august 2006 treytað av, at hon kann vísa á, at hon er komin inn á hægri útbúgvingarstovn til akademiska útbúgving, ið er góðkend av Mentamálaráðnum.
- A verður síðani sett í starv á Føroya Læraraskúla frá 1. august 2006 treytað av, at hon hevur lokið akademisku útbúgvingina, ið var góð-

kend av Mentamálaráðnum. Mentamálaráðið hevur annars ikki nakrar fíggjarligar ella formligar skyldur í sambandi við útbúgvingina hjá henni.

Mentamálaráðið heldur fast við, at fráboðanin í skrivi ráðsins, dagfest 22. januar 2003, framvegis er galdandi, men vil í sambandi við at málið er tikið uppaftur vita, um útlit eru fyri, at partarnir møguliga kunnu finna fram til eina loysn.

Omanfyri nevnda tilsøgn um uppskot til loysn stendur við til 15. apríl 2004. Hevur Mentamálaráðið ikki frætt aftur innan nevnda dag ella loysn ikki er funnin í málinum, stendur fráboðanin frá 22. januar 2003 við.

Uppskotið til loysn er uttan prejudice, og er treytað av at Fíggjarmálaráðið, Føroya Læraraskúli og Magistarafelagið ikki hava viðmerkingar til loysnina."

Tann 19. apríl 2004 sendi I, adv., vegna A, soljóðandi skriv til Mentamálaráðið:

„...Eg havi móttikið bræv tykkara dagfest 23.03.2004.

Eg havi tosað við A og hon heldur sum kunnugt fast við, at ráðið ikki hevði løgfrøðiligt grundarlag fyri at nokta henni ta fasta starv, sum lýst varð og sum hon søkti.

Hinvegin so vil A medvirka til at fáa eina loysn, men hetta skal ikki á nakran hátt hava præjudisu fyri rættarstøðu hennara.

Tvey viðurskifti eru, sum skriv tykkara ikki í nóg stóran mun tekur hædd fyri og tey eru:

– hvørjar ítøkjuligar útbúgvingar talan kann vera um og
– tíðin sum útbúgvingarnar taka.

Vit avtalaðu sum kunnugt at Mentamálaráðið skuldi venda sær til undirritaða áðrenn jól, men nú vit ikki fræ ttu aftur fyrr enn í mars 2004, so er ikki vist at A kann byrja nakra víðari útbúgving í ár, tí umsóknarfreistirnar eru farnar tá talan er um útbúgvingar á Københavns Universitet.

Eg havi gjørt útkast til orðing, sum hevur atlit til frammanfyri nevndu viðurskifti, og eg vil mæla til, at tit skjótast tilber melda aftur, um ráðið kann góðtaka eina tílíka orðing í sambandi við formliga tilsøgn til A um starvssetan.

Uppskotið til orðing er soljóðandi:

– *A verður sett í tíðaravmarkað starv á Føroya Læraraskúla frá 1. august*

*2004 til 1. august 2007, treytað av at hon kann vísa á, at hon hevur søkt um at koma inn á eina av hesum útbúgvingum:*

- *Professionsuddannelse og Professionsudvikling á Københavns Universitet,*
- *Master i Voksenuddannelse ella Master i Professionsudvikling á Danmarks Pædagogiske Universitet,*
- *Master i Voksenuddannelse á Roskilde Universitetscenter ella*
- *Eina samanbærliga hægri útbúgving, sum Mentamálaráðið kann góðtaka.*

*A verður síðani sett í fast starv á Føroya Læraraskúla frá 1. august 2007 treytað av, at hon tá hevur lokið eina av frammanfyri nevndu útbúgvingum.*

*Um A tann 1. august 2007 ikki hevur staðið prógv í einum av frammanfyri nevndu útbúgvingum, men skrivliga prógvar, at hon framvegis er undir einari av nevndu útbúgvingum og at hon væntandi fær prógv áðrenn 1. august 2008, so heldur tíðaravmarkaða starvssetanin fram og A verður sett í fast starv á Føroya Læraraskúla frá 1. august 2008 treytað av, at hon tá hevur lokið eina av nevndu útbúgvingum.*

Eg kann viðmerkja, at Diplomútbúgvingin gevur eins og Master-útbúgvingin 60 ECTS stig, og tí undrast A framvegis á at ráðið ikki tykist vilja góðtaka Diplomútbúgvingina, serliga tá tað er staðfest, at galdandi lóggávu ikki krevur akademiska útbúgving.

Við vón at frætta aftur."

Tann 22. apríl 2004 sendi Mentamálaráðið soljóðandi skriv til I, att. …, adv.:

„…Víst verður til bræv tygara, dagfest 14. apríl 2004, har tygum hava gjørt útkast til orðing í sambandi við starvsviðurskiftini hjá A á Føroya Læraraskúla. Í hesum útkasti er tíðarfreistin til at A kann gera seg lidna við hægri útbúgving longd til 1. august 2008. Hetta eru tvey ár longri enn Mentamálaráðið í brævi, dagfest 23. mars 2004, hevur bjóðað A.

Á fundi 24. mars 2004 millum tygum og H, løgfrøðing, vísti H á, at Mentamálaráðið vildi geva A eitt ár út yvir normeraði lestrartíð til at gera seg lidna í, t.e. til 1. august 2007. Hetta tilboð vil Mentamálaráðið enn standa fast við soleiðis, at seinasta uppskot til loysn er sum niðanfyri standandi:

- A verður sett í tíðaravmarkað starv á Føroya Læraraskúla frá 1. august 2004 til 1. august 2007 treytað av, at hon kann vísa á, at hon á heysti 2004 er komin inn á eina av hesum útbúgvingum:

- *Professionsuddannelse og Professionsudvikling á Keypmannahavnar Universiteti,*
- *Master i Voksenuddannelse ella Master i Professionsudvikling á Danmarks Pædagogiske Universitet,*
- *Master i Voksenuddannelse á Roskilde Universitetscenter ella*
- *eina samanbærliga hægri útbúgving, sum Mentamálaráðið kann góðtaka.*
- A verður síðani sett í starv á Føroya Læraraskúla frá 1. august 2007 treytað av, at hon hevur lokið eina av frammanfyri nevndu útbúgvingum. Mentamálaráðið hevur annars ikki nakrar fíggjarligar ella formligar skyldur í sambandi við útbúgvingina hjá henni.

Viðmerkjast kann, at omanfyri nevndu útbúgvingar taka allar tvey ár at lesa og eru skipaðar sum hálvtíðarlestur. Umsóknarfreistirnar til heysthálvuna, ið A skal søkja, eru ávikavist 2. og 14. mai 2004.

Eisini kann upplýsast, at ein diplomútbúgving vanliga verður mett sum partur av grundarlagi undir eini kandidat ella masterútbúgving, og er oftast neyðug, um ikki viðkomandi hevur bachelor útbúgving frammanundan upptøku til kandidat ella master útbúgving.

Omanfyri nevnda tilsøgn um uppskot til loysn stendur við til 15. mai 2004. Hevur Mentamálaráðið ikki frætt aftur innan nevnda dag, stendur fráboðanin frá 22. januar 2003 við (sí eisini skriv frá Mentamálaráðnum, dagfest 23. mars 2004).“

Tann 29. apríl 2004 sendi I, adv., vegna A, soljóðandi skriv til Mentamálaráðið:

„…Í sambandi við skriv tykkara dagfest 22.04.04 sigur A seg góðtaka uppskot tykkara til semju í málinum.

Ein fyritreyt fyri semjuni er tó, at um so er, at A verður liðug við útbúgvingina innan tíðarfreistin er farin, so skal hon hava rætt til at verða sett í fast starv tá.

Tit verða vinaliga biðin um at vátta, at tit góðtaka nevndu fyritreyt.

A vil tó framvegis gera vart við, at uppskotið til semju ikki samsvarar við starvslýsingarnar, sum vóru í bløðunum og heldur ikki við tey alment galdandi krøv til slík størv.

Eg skal at enda viðmerkja, at eg vegna A kann vátta, at hon eftir umstøðunum gongur undir tær treytir, sum nevndar eru í skrivi tykkara dagfest 22.04.04 við fyritreytini, sum nevnd er í 2. petti.“

Tann 30. apríl 2004 sendi Mentamálaráðið soljóðandi teldupost til I, adv.:

„…Takk fyri brævið. Sjálvsagt fær hon starv so skjótt hon er liðug, men vit senda bræv hesum viðvíkjandi.

Eg síggi annars, at áheitan tykkara um innlit, dagfest 11.03.2004, ikki er avgreitt. Er henda áheitan framvegis aktuel ?“

Tann 14. mai 2004 sendi I, adv., soljóðandi teldupost til Mentamálaráðið:

„A hevur einki bræv fingið viðvíkjandi nevndu viðurskiftum og heldur ikki fráboðan um hvønn lønarflokk hon er sett í.

Hesi viðurskifti mugu fáast upp á pláss.“

Tann 25. mai 2004 sendi Mentamálaráðið soljóðandi skriv til I:

„…Boðað verður við hesum frá, at Mentamálaráðið tekur til eftirtektar fráboðanina, dagfest 29.04.2004, um, at A góðtekur uppskot Mentamálaráðsins til semju.

Í fráboðan tygara verður tó ynskt, at Mentamálaráðið váttar, at „um so er, at A verður liðug við útbúgvingina innan tíðarfreistin er farin, so skal hon hava rætt til at verða sett í fast starv tá“. Henda váttan verður við hesum givin.

Sigast skal annars, at formligt setanarskriv í tíðaravmarkað starv verður sent A so skjótt hon kann vísa á, at hon á heysti 2004 er komin inn á eina viðkomandi útbúgving (samsvarandi semjuuppskotinum, ið báðir partar hava góðtikið).“

Tann 25. mai 2004 sendi Mentamálaráðið skjølini í málinum hjá A til I, adv., við soljóðandi skrivi:

„Víst verður til áheitan tykkara um innlit, dagfest 11.03.2004. Viðmerkjast skal, at sum partur í málinum skal A ikki gjalda fyri skjølini (skjalainnlit sambært fyrisitingarlógini, eins og tú hevur víst á).“

## Partshoyring

Umboðsmaðurin gjørdi av at kanna hetta málið nærri. Við skrivi, dagfest 3. juni 2004, varð klagan tí send Mentamálaráðnum til ummælis. Í skrivinum var Mentamálaráðið biðið um at greiða umboðsmanninum nærri frá treytunum, sum settar vórðu A, fyri at hon kundi vera sett í fast starv, siðvenjuni fyri hesum treytum, sum

Mentamálaráðið sigur hava verið galdandi síðani 1997, heimildini/-grundgevingunum fyri hesum treytum, og hví tað hevur tikið so langa tíð at avgreiða innlitsumbønina. Mentamálaráðið varð samstundis biðið um at lata umboðsmanninum til láns øll skjølini í málinum.

Tann 24. juni 2004 sendi Mentamálaráðið umboðsmanninum hesar viðmerkingar:

„...Í skrivi, dagfest 3. juni 2004, biður Umboðsmaðurin Mentamálaráðið greiða nærri frá ávísum spurningum í sambandi við setanina av A og gevur samstundis Mentamálaráðnum møguleika at gera viðmerkingar til klaguna.

Mentamálaráðið vil í fyrsta lagi svara spurningunum frá Umboðsmanninum, í øðrum lagi gera viðmerkingar til klaguna og grundgevingarnar hjá A og seinast gera ein stuttan samandrátt.

**1. Svar til spurningarnar frá Umboðsmanninum**

*a. Treytir og siðvenja fyri setan í Føroya Læraraskúla síðan 1997*

Til 1. januar 1998 var siðvenjan ymisk, tá hugsað verður um førleikakrøv til lærarar í føstum størvum á Føroya Læraraskúla. Við hvørt vórðu umsøkjarar settir við akademiskum førleikum, meðan aðrir vórðu settir uttan akademiskar førleikar.

Tann 1. januar 1998 varð Landsskúlafyrisitingin niðurløgd, og skipað var eitt Undirvísingar- og Mentamálastýrið við trimum fakligum deildum, nevniliga Fólkaskúladeild, Vinnu- og miðnámsskúladeild og Mentamáladeild. Føroya Læraraskúli var lagdur til Mentamáladeildina at umsita. Mentamáladeildin umsitur hægri útbúgvingar. Síðan hetta eru øll føst størv (adjunkt / lektor /) sett við umsøkjarum, ið hava havt hægri útbúgving – altso útbúgving á akademiskum støði t.d. cand.pæd.pæd, cand.pæd. psych., cand. mag. e.l. Samanlagt eru sjey føst størv sett við akademiskt útbúnum fólki. Seinasti lærari uttan akademiska útbúgving, ið varð settur í fast starv, varð settur í desember 1997.

Bakgrundin fyri hesi praksis er tann, at allar læraraútbúgvingar í Norðurlondum í hesum árum eru vorðnar uppstigaðar ella eru í ferð við at verða uppstigaðar til BA støði ella hægri akademiskt støði. Sama er við øðrum útbúgvingum, eitt nú sjúkrarøktarfrøðingum og fysioterapeutum. Føroyar og Grønland eru einastu Norðurlond, sum enn ikki hevur broytt læraraútbúgvingina til at geva eitt prógv, sum er í minsta lagi á BA støði.

Mentamálaráðið arbeiðir í løtuni við lógaruppskotið fyri lærara- og pedagogútbúgvingina, sum fer at skipa útbúgvingarnar á BA støði. Nevnast kann í hesum høpi, at læraraútbúgvingarnar í eitt nú Svøríki og í Finnlandi nú eru á universitetsstøði.

Tá ið læraraskúlin varð lagdur til Mentamáladeildina at umsita, varð hetta m.a. gjørt við tí fyri eyga, at skúlin skuldi uppstigast á hædd við tilsvarandi skúlar í Norðurlondum.

Hetta er eisini neyðugt, av tí at vit sambært norðurlendska avtalu hava felags norðurlendskan arbeiðsmarknað fyri fólkaskúlalærarar. Hetta merkir, at neyðugt er at tryggja á leið sama fakliga støði í øllum londunum.

Í nøkrum førum hevur Mentamálaráðið gjørt avtalu við lærarar í føstum størvum um, at hesir útbúgva seg víðari og taka prógv frá hægri lærustovni. Í Sjúkrarøktarfrøðingaskúlanum eru 5 lærarar í ferð við at taka hægri útbúgving eftir avtalu við Mentamálaráðið. Hetta er gjørt, tí at útbúgvingarstøðið við løgtingslóg er hækkað til bachelor støði. Á Føroya Læraraskúla eru tveir lærarar í fyribils starvi farnir undir hægri útbúgving. Avtala skal gerast við hesar eisini, soleiðis at teir eftir lokið prógv fáa fast starv. Avtalan við A er tí ikki eindømi. Aðrir lærarar á Læraraskúlanum fáa somu avtalu, og hon er gjørd eftir samráð við fakfelagið og Lønardeildina í Fíggjarmálaráðnum. Avtalan ber í sær, at A fær fyribils starv í Føroya Læraraskúla í trý ár og síðan fast starv í skúlanum, um hon innan hesa tíðina hevur tikið master prógv frá hægri lærustovni. Útbúgvingartíðin er normerað til 2 ár sum parttíðarlestur.

*b. Heimildin og grundgevingin fyri treytunum*

Í § 16 í lóg um læraraútbúgving er ásett, at undirvísarar skúlans eru adjunktar / lektorar.

Hesi heiti eru sum kunnugt vanlig akademisk heiti. Mentamálaráðið hevur í skrivi til advokatin hjá A víst á, at krøvini í lógini er „neyðugur kunnleiki og námsfrøðilig útbúgving.“ Neyðugur kunnleiki kann tulkast sum kunnleiki til ávísar lærugreinir, men kann eins væl tulkast sum ávís førleikakrøv. Hesi krøv kunnu staðfestast ella prógvast við, at umsøkjarin hevur ávís prógv frá hægri lærustovni. Tað er Mentamálaráðið, sum er setanarmyndugleiki, og tí hevur framíhjárætt til at tulka førleikakrøvini. Mentamálaráðið tulkar kunnleikakrøvini ella førleikakrøvini, sum útbúgving frá hægri lærustovni. Henda tulking er staðfest í lýsingum og í sáttmálanum millum fakfelagið og Fíggjarmálaráðið. Kravið um útbúgv-

ing frá hægri lærustovni er eftir okkara fatan ikki í andsøgn við lógaráset-ingina.

Mentamálaráðið skal í hesum sambandi loyva sær at vísa til praksis í okkara grannalondum. Yvirornaða meginreglan í Norðurlondum við atliti at læraraútbúgving og líkandi útbúgvingum er, at tann, ið verður settur í fast starv á útbúgvingarstovni, eigur at hava hægri útbúgving enn hana, ið viðkomandi útbúgvingarstovnur bjóðar út. Av hesum fylgir sostatt eisini, at lærari í føstum starvi á Føroya Læraraskúla eigur at hava útbúgving frá hægri lærustovni enn læraraskúla ella skúla á sama stigi, um vit skulu megna at halda okkum á sama stigi sum grannalondini.

Ein adjunktur ella lektari er ein, sum undirvísir við ein hægri lærustovn ella við miðnámsskúla – ella við øðrum orðum ein akademiskt útbúgvin persónur.

Førleikakrøvini eiga at vera akademisk. Hetta kann eisini lýsast við, at gymnasiali miðnámsskúlin, haðan læraraskúlin fær sínar studentar, setir akademiskar førleikar sum minstukrøv fyri setan í fast starv. Lærarar á einum lærustovni, ið er hægri enn ein miðnámsskúli, eiga at hava í minsta lagi somu førleikar, sum kravdir verða av miðnámsskúlalærara, ið „leverar" studentarnar á viðkomandi stovni t.d. Føroya Læraraskúli.

Tað skal tó viðmerkjast, at tað kunnu vera lærugreinir, har tað ikki er møguligt at finna undirvísara við akademiskari útbúgving, men hesir verða ikki settir í føst størv í dag.

*c. Hví tók innlitsumbønin so langa tíð?*

Innlitsumbønin frá advokatinum hjá A gjørdist væl drúgvari, enn ein slík umbøn eigur eftir reglunum. Høvuðsorsøkirnar til hetta eru, at tað í fleiri førum gekk striltið við at fáa svar frá advokatinum uppá fyrispurningar um innlitsumbønina.

Regluligt samskifti hevur verið millum I og Mentamálaráðið um setanarviðurskiftini hjá A, og Mentamálaráðið hevur tvær ferðir sett seg í samband við advokatin um innlitsmálið.

*Málið kann lýsast soleiðis:*

12. februar 2004 fekk Mentamálaráðið áheitan um skjalainnlit, umbønin er dagfest 11. februar 2004. 18. februar 2004 boðar Mentamálaráðið I frá, at áheitan um skjalainnlit er móttikin, og at roynt verður at yvirhalda 10 daga freistina.

Mentamálaráðið er í iva um, hvørji skjøl A ynskti innlit í, tí flest øll skjølini í málinum vóru annaðhvørt skjøl frá I/A til Mentamálaráðið ella hinvegin. 19. februar 2004 sendir Mentamálaráðið tí I ein lista yvir øll

skjøl í málinum við áheitan um at boða frá, hvørji skjøl áhugi var fyri. Sí skjøl nr. 47, 48, 51 og 52 hesum viðvíkjandi. Ongi boð komu aftur frá I.

15. mars 2004 fekk Mentamálaráðið aftur bræv frá I við umbøn um skjalainnlit, brævið var dagfest 11. mars 2004. Hetta bræv var ikki svar uppá fyrispurningin frá Mentamálaráðnum og átti helst at verið fatað sum ein áminning á umbønina, men júst um hetta mundið var avtala við at verða gjørd um setanarviðurskiftini hjá A, og Mentamálaráðið var av teirri fatan, at innlitumbønin fór at verða slept, tá avtala var gjørd, m.a. tí flestu skjølini í málinum, ið ikki vóru innanhýsis notat, hevði A/advokaturin longu fingið.

Seinast í mars mánaði 2004 kom avtalan um setanarviðurskiftini í høvuðsheitum uppá pláss, og komandi mánaðin høvdu I og Mentamálaráðið nógv samskifti um ymsar lutir í avtaluni, uttan at innlitsumbønin var nevnd, sí skjøl nr. 59-70. Hetta fataði Mentamálaráðið sum um, at umbønin ikki var aktuel longur.

Síðst í apríl vóru partarnir samdir um øll formlig setanarviðurskifti, og Mentamálaráðið vildi tryggja sær, at umbønin ikki var aktuel longur. Mentamálaráðið spurdi tí við telduposti, dagfestur 30. apríl 2004 (skjal nr. 75), hvørt innlitsumbønin framvegis var aktuel. Mentamálaráðið fekk ongantíð svar uppá henda fyrispurning.

25. mai 2004 sendi Mentamálaráðið I bræv, ið endaliga váttaði formellu viðurskiftini viðvíkjandi avtaluni um setanarviðurskiftini. Hóast onki svar var komið uppá fyrispurningin 30. apríl 2004, var avgjørt at senda avrit av øllum viðkomandi skjølum samstundis, hetta vóru skjøl úr persónsmálinum og málinum viðv. lýsingum og setanum á Føroya Læraraskúla 2002 / 2003. Avgerðin var tikin til tess, at fáa alt málið avgreitt endaliga.

Mentamálaráðið harmast um, at innlitsumbønin tók so langa tíð, men okkara fatan er, at I eigur at taka ábyrgdina, tí virkið ikki svaraði fyrispurningunum frá Mentamálaráðnum, dagfestir 19. februar og 30. apríl 2004.

**2. Viðmerkingar til klaguna og grundgevingarnar**

Í klaguni gjøgnumgongur A málið kronologiskt. Mentamálaráðið skal gera vart við, at Ráðið ikki hevur móttikið tað skriv, dagfest 7. apríl 2003, sum A hevur sent fyrrverandi landsstýrismanni J. Hetta skriv er ikki skrásett í skjalagreiðsluni í Mentamálaráðnum, og onki embætisfólk kennir nakað til skrivið.

A kann møguliga persónliga hava handað landsstýrismanni J skrivið á fundi í Mentamálaráðnum, men onki embætisfólk hevur verið við á fundi, tá ið hetta skriv er handað. Hetta skriv ger eftir øllum at døma tað, at málið um setanina fær eina heilt nýggja vend. Eftir hetta fær fyrisitingin at vita frá fyrrverandi landsstýrismanni J, at ein onnur loysn enn tann, sum fyrrverandi landsstýrismaður K staðfesti, átti at verið møgulig. Hetta sæst m.a. av handskrivaðum notati frá landsstýrismanninum á einum avriti av skrivi frá I, dagfest 22. mars 2003, og í innanhýsis notati, dagfest 8. apríl 2003. Landsstýrismaðurin J boðaði ikki frá, hvør loysnin skuldi vera, men fyrisitingin fekk greiðar ábendingar, um at áður tikna avgerðin hjá landsstýrismanni K ikki skuldi staðfestast eina ferð afturat. Landsstýrismaðurin skuldi taka málið upp aftur fyri at finna eina loysn. Nakað av stígi kom nú í málið, m.a. tí at ongar greiðar ábendingar komu frá landsstýrismanninum um hesa nýggju loysnina, summarfrítíð var, og annar málsviðgeri var settur til málið.

**A vísir á,**

– *at Mentamálaráðið ikki hevur brúkt somu førleikakrøv í sambandi við avgerðina, sum tey førleikakrøv, sum upplýst vórðu í lýsingini.*

Viðmerkingar:

Hetta er ikki rætt. Seinna lýsingin, sum A søkti eftir, var broytt í mun til fyrru lýsingina. Hetta var gjørt fyri at herða krøvini. Í lýsingini var m.a. ásett: „Tey, ið sett verða í størvini, eiga at hava útbúgving frá hægri góðkendum lærustovni.“

Útbúgvingin hjá A er ikki frá hægri góðkendum lærustovni, og hon lýkur tí ikki krøvini sambært lýsingini. Í lýsingini er eisini ásett, at størvini verða sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Magistarafelag Føroya. Hesin sáttmáli ásetur m.a., at umsøkjarar til føst størv á Føroya Læraraskúla skulu hava útbúgving frá hægri lærustovni. Tað er sambært hesum eingin ivi um, at kravið sambært lýsingini er útbúgving frá hægri lærustovni, og at samsvar er millum førleikakrøvini í lýsingini og grundgevingarnar í sambandi við avgerðina í Mentamálaráðnum.

– *at Mentamálaráðið krevur førleikakrøv, sum tey ikki kunnu útgreina nærri.*

Viðmerkingar

Mentamálaráðið hevur í skrivum, dagfest 9. desember 2002, 22. januar 2003, 17. november 2003 og í teldubrøvum til I, dagfest 23. mars 2004 og 19. apríl 2004, víst á fleiri útbúgvingarmøguleikar, sum lúka krøvini sam-

bært lýsingini. Talan er m.a. um útbúgvingar, sum kunnu takast samstundis, sum tann lesandi er í starvi.

Mentamálaráðið hevur ikki víst á eina einstaka útbúgving. A hevur fleiri ferðir fingið boð um, at tað er hon og bert hon, sum eftir egnum ynski og áhuga skal velja ítøkiligu útbúgvingina innan ávístu karmarnar. Alt annað vildi verið formyndarí.

Tað vildi ikki verið rætt av Mentamálaráðnum at taka A av ræði í sambandi við val av útbúgving.

– *at Mentamálaráðið ikki hevur víst á sakligar grundgevingar fyri ikki at seta meg í fast starv.*

Viðmerkingar

Mentamálaráðið hevur víst á, at sambært lýsingini og siðvenju seinastu árini, er kravið fyri at verða settur í fast starv á Føroya Læraraskúla, at viðkomandi hevur útbúgving frá hægri lærustovni. Hesi krøv eru sett, fyri at hækka støðið hjá undirvísarum skúlans.

Grundgevingin, fyri ikki at seta A, er, at hon ikki hevur útbúgving frá hægri lærustovni. Hetta er ein saklig grundgeving, og Mentamálaráðið hevur tí ilt við at skilja uppáhald hennara.

– *at Mentamálaráðið hevur víst til lógartulking, sum hvørki hevur grundarlag í einari málsligari tulking ella endamálstulking.*

Viðmerkingar

Víst verður til svarið til Umboðsmannin fremst í skrivinum.

– *at Mentamálaráðið í meira enn 5 mánaðir ikki svarar skrivi frá sakførara mínum.*

Viðmerkingar

Í skrivi, dagfest 14. apríl 2003, boðaði Mentamálaráðið advokatinum hjá A frá, at fyrrverandi landsstýrismaður J skuldi kanna málið nærri, áðrenn støða var tikin í málinum. Hetta var ein vend í málinum, sum landsstýrismaðurin hevur tikið, eftir persónliga at hava móttikið áður nevnda skriv, dagfest 7. apríl 2003, frá A. Landsstýrismaðurin hevur í handskrivaðum notati, dagfest 14. apríl 2003, viðmerkt, at málið skuldi kannast betur, og ein frágreiðing gerast. Støða landsstýrismansins var ein greið ábending um, at onkur loysn var møgulig. Hetta var eisini ein greið ábending til advokatin. Støðan var nú vend. Onkur loysn skuldi finnast.

Tað er rætt, sum A førir fram, at onki skriv var sent advokatinum í umrødda tíðarskeiði, men málið var viðgjørt innanhýsis av landsstýrismanni og fyrisitingini. Hetta sæst m.a. av innanhýsis notatum, dagfest 25. mai 2003, 24. juni 2003 og 3. juli 2003. Í seinasta innanhýsis notatinum

verður víst á, at landsstýrismaðurin møguliga fór at seta seg í samband við A. Men bæði tað, at annar málsviðgeri var og at summarfrítíð var í hendi, gjørdi, at onki skriv var latið I. Tó var samband um telefonina við I í august og september fyri at avtala fund. Av tí at trupult var at finna eina hóskandi tíð, kom hesin fundurin ikki í lag fyrr enn 10. oktober 2003.

– *at teirra uppskot til loysn á málinum bert staðfestir teirra krøv um akademiska útbúgving.*

Viðmerking

Tað er rætt, at loysnin staðfestir kravið um akademiska útbúgving, men talan er eisini um eina loysn, sum gongur A á møti.

– *at Mentamálaráðið frá eg fekk starvið 1. august 2002 til nú, næstan 2 ár seinni, ikki hava givið mær nakað setanarbræv, og ikki hava sett meg í lønarflokk, so eg í 22 mánaðir havi fingið løn á conto, hóast royndir eru gjørdar bæði frá Læraraskúlanum, og gjøgnum sakførara at fáa hetta í rættlag.*

Viðmerkingar

Tað er rætt, at A ikki er sett í lønarflokk fyrr enn í mai mánaði 2004, sí skjal nr. 76 og 77. A hevur fingið setanarskriv, men einki formelt setanarbræv, har m.a. lønarflokkur er ásettur. Samskiftið hevur alla tíðina verið millum Fíggjarmálaráðið og Mentamálaráðið hesum viðvíkjandi, og Mentamálaráðið hevur fleiri ferðir mint á og rykt eftir svari frá Fíggjamálaráðnum bæði telefoniskt og við teldubrøvum (viðv. teldubrøvum, sí samskiftið í málinum, sum liggur í gulum umslagi undir heitinum „viðv. lønaráseting“). 26. mai 2004 boðar Fíggjarmálaráðið at enda frá, at Fíggjarmálaráðið tekur undir við Mentamálaráðnum um, at løna starvið eftir bachelor-stiganum. Mentamálaráðið sendir boðini víðari til Advokatfelagið og Læraraskúlan við brævi, dagfest 9. juni 2004, skjal nr. 74. A fær nú sendandi formelt sentanarbræv ein av fyrstu døgunum.

– *at Mentamálaráðið hóast áheitan er send teimum um skjalainnlit 11.02.04, og fleiri áminningar eru sendar, framvegis ikki hava givið mær tað.*

Viðmerkingar

Víst verður til svarið til Umboðsmannin fremst í skrivinum.

**3. Stuttur samandráttur**

Eftir Mentamálaráðsins fatan hevur fyrisitingin í sambandi við hetta mál sett førleikakrøv, sum eru í tráð við lógina og lýsingina, og roynt at finna eina loysn, sum er til frama fyri A.

Viðgerðartíðin kann tykjast í so long. Ein av orsøkunum er, at málið er loyst í tveimum pørtum. Fyrri partur av málinum var í tíðarskeiðinum frá tí, at avgerðin, um ikki at seta A í fast starv í juli 2002 var tikin, og fram til 22. januar 2003, tá fyrrverandi landsstýrismaður K endaliga staðfesti avgerðina. Í hesum tíðarskeiðinum fekk A og I fleiri ferðir fráboðanir um, at málið var endaliga avgreitt. Tey tóku ikki hesar fráboðanir til eftirtektar, og tí dró málið út fleiri mánaðir.

Seinni parturin av málinum fór fram í tíðarskeiðinum frá apríl 2003, tá fyrrverandi landsstýrismaður J vildi broyta fyrru avgerðina, og til endalig loysn fekst í lag í juni 2004. Serliga fyrstu mánaðirnar vóru ógreið viðurskifti um fleiri viðurskifti, sum eru umrødd aðrastaðni í hesum skrivinum. Hesi viðurskifti høvdu ta avleiðing, at viðgerðartíðin serliga fyrstu mánaðirnar var í so long, men regluligt samskifti var tó millum partarnar størsta partin av seinna tíðarskeiðinum."

Viðmerkingarnar hjá Mentamálaráðnum vóru tann 2. juli 2004 sendar klagaranum til ummælis. Við skrivi, dagfest 19. juli 2004, hevur A sent umboðsmanninum hesar viðmerkingar:

„Hjálagt eru mínar viðmerkingar til svarið frá Mentamálaráðnum, uppá fyrispurningar um kæruna.

Sum tit síggja er rættuliga langt ímillum sjónarmiðini.

Eg havi eftir førimuni roynt at undirbyggja mínar viðmerkingar við at vísa til lógir, sáttmálar og skjøl, men sakni at MMR í sínum viðmerkingum greiða frá, hvørjar lógir og reglugerðir tey hava til grundarlag fyri sína praksis og siðvenjur.

Eg vil eisini vísa á, at í sambandi við fyrra fundin sum var við umboðini frá MMR, fekk eg ábendingar um at tey viðurkendu, at eg ikki var rætt viðfarin, at míni rættindir ikki í nóg stóran mun vóru tikin við í metingunum hjá MMR, og at fultrúin fyri ein part var ósamdur við leiðsluna, tá talan var um míni rættindir sum umsøkjari. Nevnt varð at tað væntandi fer at vera gjørt eitt tilmæli ella upprit til leiðsluna um hetta. Millum annað av hesi orsøk undraðist eg á ta stóru broyting í sjónarmiðunum, sum fultrúin legði fram á seinna fundinum.

Eg haldi at tað kann hava stóran týdning, at fáa staðfest hví framferðin broyttist so nógv. Av tí at eg ikki havi innlit í innanhýsisskjøl á MMR, vil eg heita á Umboðsmannin um at kanna um eitt tilmæli / upprit er skrivað, og vil mæla tygum til at tosa við málsfultrúan fyri at tryggja, at øll skjøl og sjónarmið eru komin fram í málinum.

At enda vil eg gera vart við, at tann langa viðgerðartíðin saman við væntandi viljan hjá MMR at finna rímuligar loysnir, hevur verið til stóran ampa fyri meg og mína familju. Tað kennist sera svárt at MMR nú eisini roynir at raka meg fíggjarliga. Eg vóni at hetta verður tikið við tá metast skal um framferðina hjá Mentamálaráðnum.

Eg vil í hesum sambandi heita á tygum um at skunda undir, at eg fái formelt setanarbræv, tí MMR hevur orð fyri at „løna" tað aftur tá fólk eru „besverlig", tað kann tí vera óheppið um MMR fær mínar viðmerkingar til teirra skriv, áðrenn eg havi fingið setanarbrævið."

Omanfyri nevndu viðmerkingar hjá A eru soljóðandi:

„Vísandi til bræv tygara dagf. 2. juli 2004 sendi eg hervið mínar viðmerkingar til svarið frá Mentamálaráðnum (seinni stytt MMR).

Fyri at gera tað so greitt sum gjørligt, havi eg valt at gera viðmerkingarnar út frá spurningunum tit settu MMR.

Fyrsta spurninginum, um treytinar fyri at eg kundi fáa fast starv á læraraskúlanum, svarar MMR als ikki. Teir leggja hann saman við næsta spurningi, nevniliga hvør siðvenjan er, men svara ikki spurninginum um treytirnar.

<u>Treytir:</u>

Treytirnar MMR setur, er at útbúgvingin skal vera akademisk. Hvat tí fakligu útbúgvingini viðvíkir, sýnast teir ikki at vita hvørji krøv teir seta.

Eg havi fleiri ferðir roynt at fáa tey at siga mær, hvør útbúgving kann góðtakast, fyrispurningar um hetta síggjast m.a. í mínum skjølum (4.0 og 16.0). MMR hevur hvørja ferð sagt at: har eru nógvir møguleikar, tað kann samansetast á ymiskan hátt, men tey svara ongantíð spurninginum.

Tað sum eg gjørdi, stutt eftir at eg var byrjað at undirvísa fulla tíð á Læraraskúlanum, var at kanna hvørjir møguleikar vóru, at gera nakað við hetta, og tað úrslitið eg kom til var:

At Cand. Pæd. útbúgvingin, sum tey millum annað vísa til, ikki er til í løtuni, tí útbúgvingarnar verða lagdar um.

At designaraskúlarnir eru í hált við at blíva góðkendir á universitetsstøði, men at tað verða nøkur ár enn.

At ein master-útbúgving er í Noregi innan handarbeiði, men hon ber ikki til at taka sum fjarlestur.

At diplomútbúgvingin var tað nærmasta, sum hevði bæði pedagogiskt og fakligt innihald.

Eg fór so av eintingum undir diplomútbúgving í „Æstetik, kultur og håndværk“, og havi hiðartil tikið tvey modul av hesari útbúgving.

Tá fyrri fundurin 10.10.03, var millum umboð fyri MMR, mín advokat og meg, tosaðu vit fram ímóti at ein útbúgving skuldi finnast, sum MMR kundi góðtaka, og sum var relevant í mun til mítt fakøki. Av tí at eg longu sjálv hevði kannað økið, og ikki hevði funnið nakra útbúgving við fagligum relevansi á masterstøði, bað eg MMR um at vísa mær á hvørjar útbúgvingar tey meintu við. Eg spurdi tey um diplomútbúgvingin kundi verða góðtikin sum yvirbygningur aftrat fakligu útbúgvingini hjá mær, men fekk at vita, at tað var ikki nóg mikið.

Á seinna fundinum 01.12.03, sýntist okkurt at vera broytt, relevansur til fakøkið var ikki longur teirra áhugi, og har vórðu bert sett krøv fram, og ongar sømdir bjóðaðar, hvørki niðursett arbeiðstíð, ella studningur. Eg skal arbeiða fulla tíð, og sjálv gjalda allar útreiðslur í sambandi við at fara av landinum til skeiðini. Útbúgvingingarnar, sum Mentamálaráðið vísti á, eru pedagogiskar burturav, og hava onga fagliga relatión til undirvísingarøkið hjá mær.

Skrivið dagf. 22.04.04 (mítt skjal 39.0) er endaliga fráboðanin frá Mentamálaráðnum um hetta. Fyri at sleppa undan óvissuni við bert at vera sett fyri eitt ár á gangin, boðaði eg Mentamálaráðnum frá at gingið verður undir treytunum.

Um tær ávístu útbúgvingarnar skal gerast vart við, at eg eri upptikin sum lesandi á RUC til Master i voksenuddannelse. Lestrarvegleiðarin á RUC vísti á, at mín útbúgving lá rættuliga langt frá hesum fagøki, og mælti mær í fyrsta umfari frá at byrja har. Við tað at útbúgvingin er ein treyt fyri at fáa fast starv, havi eg kortini søkt um upptøku á RUC, og við grundarlag í teimum modulum, sum eg havi tikið innan diplomútbúgvingina, havi eg fingið undantaksloyvi til at byrja á universitetinum tann 4. september 2004. Tey hava tó ávarað meg um, at eg má rokna við at hetta verður tíðarkrevjandi og strævið.

<u>Siðvenja.</u>

Til fyrispurningin um siðvenju fyri treytunum, svarar MMR, at henda siðvenja, sum teir siga seg hava haft síðani 1998, er at bara fólk við akademiskari útbúgving verða sett í fast starv á Føroya Læraraskúla.

Tey siga at „*Seinasti lærari uttan akademiska útbúgving, ið var settur í fast starv, varð settur í december 1997*“. Hetta er ikki rætt; ein lærari, sum ikki hevur akademiska útbúgving, varð sett í fast starv í 2002. Hetta hendi eftir at hon í meira enn 15 ár hevði verið hildin hen. Mentamálaráðið

hevur áður viðurkent hetta (mítt skjal 21.0), tey vístu á at serligar umstøður vóru galdandi og tað tí ikki kundi roknast uppí. Tíverri eru serligar umstøður ikki nakað undantak á Mentamálaráðnum, og lærarin varð faktuelt sett í fast starv.

*„Bakgrundin fyri hesi praksis…“* her verða fleiri ting blandaði saman. Eg skal einans vísa á „Skriv um setanarviðurskifti á læraraskúlanum“ (mítt skjal 23.1), sum greitt vísir á hvussu lærarir verða settir fyri tey handaligu fakini runt um í norðurlondum.

Um umboðsmannastovnurin ivast í upplýsingunum hjá nevndini, vil eg mæla til at stovnurin kannar hetta.

„Í nøkrum førum hevur Mentamálaráðið gjørt avtalu…“

Mær vitandi er ongin lærari í fyribilsstarvi á Læraraskúlanum farin undir hægri útbúgving.

Hinvegin er tað alment kent at tveir lærarir, sum vórðu sett í fyribils starv áðrenn tey vóru liðug við sína útbúgving, hava fingið lyfti um, at tey fáa fast starv, tá tey eru liðug við sína útbúgving.

Lærararnir á Sjúkrasystraskúlanum, sum eru farnar undir víðari útbúgving, hava fingið heilt aðrar treytir enn eg havi. Eg skal heita á Umboðsmannastovnin at kanna treytirnar hjá Sjúkrarøktarfrøðingunum, samanlíknað við treytirnar eg havi fingið, og meta um rímuligheitina av teimum.

Har er munur á at krevja hægri støði fyri settar lærarar á einum stovni, tá lógin og skipanin eru broytt, og so tað sum MMR ger á læraraskúlanum, at broyta siðvenju og praksis áðrenn lógir og reglur eru broyttar.

Heimildir

Í lóg um læraraútbúgving § 16 er ásett, at *undirvísarar skúlans eru adjunktar / lektorar*. Hetta eru starvsheiti í tí starvsetanarskipan, sum er galdandi bæði fyri Føroya Læraraskúla og fyri læraraskúlar í Danmark.

Eg havi í prát við starvsfelagir sum arbeiða á donskum læraskúlum fingið váttað, at skipanin við adjunktum og lektorar verður brúkt tá størv verða sett.

Henda skipan er í stuttum, at lærarar verða settir sum adjunktar fyrst, í 2 ella 4 ár, síðani innstilla tey seg til lektorbedømmelse, har mett verður um heildina av fakligu og námsfrøðiligu førleikunum hjá tí einstaka læraranum, og har tey skulu prógva, at tey eru egnaði til arbeiðið.

Tað er sostatt ikki akademiskt heiti at vera adjunkt ella lektor, tað er starvsheiti, og umfatar lærarar við og uttan akademiska bakgrund.

Av onkrari orsøk verða heitini, men ikki skipanin nýtt á lærarskúlanum. Eg skal aftur vísa til „Skriv um setanarviðurskifti á lærarskúlanum“ (mítt skjal 23.1), har tikið verður saman um hetta.

Í seinasta reglubroti í hesum partinum kemur MMR til kjarnan í trupulleikanum. Tær handaligu útbúgvingarnar eru traditionelt ikki skipaðar sum akademiskar útbúgvingar. Av hesari orsøk vil MMR so innføra eina mannagongd, har fólk við góðari fakligari útbúgving bert kunnu verða sett eitt ár í senn. Eg havi ta hægstu útbúgvingina innan fyri mítt fag í Ríkunum, víst verður til brot í brævi frá Danska Kulturministerienum (mítt skjal 11.1) har sagt verður m.a. „Der er ingen uddannelse på et højere niveau i Danmark“ so eg vóni, at tygum skilja, eg illa kann góðtaka, at MMR ikki viðurkennir hetta.

Umframt at hugburðurin hjá MMR um at hava fólk í leysum fulltíðarstørvum í áravís er átaluverdur, er tað væntandi eisini brot á almenna setanarpolitikkinum.

<u>Hví tók innlitsumbønin so langa tíð.</u>

Her roynir MMR at senda bóltin víðari til I, men samskiftið hesum viðvíkjandi er, at umbøn um skjalainnlit varð send 11.02.04 (mítt skjal 33.0), vit fingu yvirlit yvir skjølini 19.02.04, við fyrispurningi um hvørji av teimum vit vildu hava, svarað varð aftur frá I 26.02.04, at vit vildu hava øll skjøl, uttan tey vit sjálvi høvdu sent, og 30.04.04 spyr MMR í teldupostí (mítt skjal 42.0) um áheitanin framvegis er galdandi. Tey bæði skjølini, sum ikki eru komin við fyrr, verða her hjáløgd sum (mítt skjal 33.1 og 33.2).

Sum tit uttan iva vita av, fekk eg skjølini frá MMR gjøgnum Advokatskrivstovuna beint aftaná at kæran til Umboðsmannastovnin var latin inn.

<u>Viðmerkingar til klaguna og grundgevingarnar.</u>

MMR ger vart við at tey ikki kenna til áheitanina, (mítt skjal 24) sum eg sendi J Landsstýrismanni. Bakgrundin fyri at eg sendi áheitanina gjøgnum løgmálaráðið og ikki gjøgnum MMR var, at eg frammanundan gjøgnum umsitingina á MMR hevði roynt at fáa fund við tann sitandi Landsstýrismannin, (mítt skjal 23.0), men leiðslan á mentamáladeildini lat ikki við seg koma.

Eg havi ikki sæð hvørji boð J hevur givið Mentamáladeildini, og vil tí heita á UMB. um at kanna um deildin í rímuligan mun hevur fylgt boðunum.

„At Mentamálaráðið ikki…“

Orðingin „hægri góðkendum læristovni“ er á føroyskum ikki tað sama sum ein Lærdur Háskúli ella Fróðskaparsetur, sum eru tey føroysku heitini fyri skúlar á universitetstøði, MMR hevur avíst hesum, men hevur kortini broytt orðingina í seinni lýsingum frá stovninum, soleiðis at lýsingarnar seinri hava nýtt føroysku heitini fyri skúlar á universitetstøði. Eg má tí halda fast um at har samb. lýsingini ikki er grundarlag fyri at krevja prógv frá einum Lærdum Háskúla, og skal aftur vísast á at ongin Lærdur Háskúli í Ríkinum bjóðar undirvísing í hesum fagi, sum er á hædd við ta útbúgving sum eg havi at vísa á.

MMR sigur at sáttmálin millum Magistarafelagið og Fíggjarmálastýrið ásetur, at umsøkjarar skulu hava útbúgving frá hægri lærustovni. Teir postulera hetta uttan at vísa á hvar hetta stendur, og tað er væl skilligt, tí tað er ikki tað sum stendur í sáttmálanum, men nú teir so staðiliga vísa til at sáttmálin er so avgerðandi er best at sláa fast hvat tað er sáttmálin inniheldur.

Í sáttmálanum stendur undir *§ 1. Øki.*

*Sáttmálin er fyri undirvísarar- og granskingarstørv, har tað er ein fyritreyt fyri setan, at tann setti hevur akademiska útbúgving, fyri fyrisitingarlig størv, har tað er ein fyritreyt, at tann setti hevur magistara útbúgving og fyri lærarar í fastum starvi á Føroya Læraraskúla.*

Her verður væl útgreinað at sáttmálin umfatar ymisk akademisk størv á ymiskum stovnum og so eisini føst størv á Føroya Læraskúla, hetta er av tí at á Føroya Læraraskúla er eisini brúk fyri lærarum við øðrum útbúgvingum enn tær akademisku.

Tað er tó áhugavert eisini at kanna hvørjar setanir sáttmálin umfatar.

Í § 1 er staðfest at sáttmálin umfatar lærarar í føstum størvum á Føroya Læraraskúla og í sáttmálanum stendur víðari undir *§ 2. Setan, stk 2 Leys størv, sum sett skulu verða eftir hesum sáttmála, skulu verða lýst leys alment. Tilskilað skal verða, hvat starvið fatar um, hvør útbúgving krevst og hvør lønin er.*

Starvið sum varð lýst leyst var eitt fast starv, og tá MMR uttan víðari broytir hetta til eitt tíðaravmarkað starv, er tað her sáttmálin verður brotin.

At enda skal verða víst til *§ 3 Setanarbræv*. Her haldi eg ikki viðmerkingar eru neyðugar.

„At MMR krevur førleika sum tey ikki…“

Her vendir MMR aftur upp og niður uppá logikkin. Eg havi víst á at MMR krevur eina útbúgving frá einum Lærdum Háskúla, sum ongin

Lærdur Háskúli í ríkinum hevur at bjóða møguligum næmingum. MMR hevur ongantíð svara spurninginum um hvat tað er fyri ein útbúgving sum sipað verður til í lýsingini. MMR hevur svarað at útbúgvingar kunnu kombinerast o.s.v men har er í lýsingini ikki víst til at starvið krevur eina kombineraða útbúgving frá fleiri stovnum, og tí noyðist eg at endurtaka, at teir krevja ein førleika, sum tey ikki kunnu útgreina nærri.

Fyri at undirbyggja sína sak vísir MMR á at tey í fleiri teldubrøvum hava víst á útbúgvingar sum lúka krøvini samb. lýsingini. Talan eru um útbúgvingar sum gaman í eru akademiskar, men tað kann ikki vera álvara, at hetta er einasta krav fyri at vera sett í fast starv í handarbeiði og evning á Føroya Læraraskúla. Tað sýnist sum MMR als ikki leggur dent á fakliga partin.

MMR skrivar víðari „*Mentamálastýrið hevur ikki víst á eina ávísa útbúgving. A hevur fleiri ferðir fingið boð um, at hon og bert hon, sum eftir egnum ynski og áhuga skal velja itøkjuligu útbúgvingina innanfyri ávístu karmarnar. Alt annað vildið verið formyndarí*“.

Tá MMR ikki hevur viljað svarað uppá spurningin frá mær um hvørja útbúgving tey sipa til, hevur tað einki at gera við at tey vilja geva mær fríari ræsur at ráða sjálv. Tað er av tí at har einki er at vísa til. Hetta sæst jú eisini av tí, at tá tey endiliga koma við uppskotum, so er tað bert reint pedagogiskar útbúgvingar, og einki sum kann knýtast til fakligu undirvísingina. Mín áhugi er stórur innan mítt fakøki, og tann didaktik og pedagogik sum hevur við hetta økið at gera.

Eg eri fullgreið yvir, at pedagogiski parturin má vera við tá undirvíst verður á læraraskúla, og havi alla tíðina verið áhugað í at víðka mín førleika á hesum økinum. Hetta sæst eisini av tí at eg av eintingum fór undir diplomútbúgving. Hevði tað borið til at tikið norsku masterútbúgvingina sum fjarlestur, so hevði eg farið undir hana. Men tað eru ikki nógvur hægri lestur sum kann takast samstundis sum eitt fulltíðarstarv skal røkjast. Mátin sum MMR her nýtir, er at tey latast sum har eru óavmarkaðir møguleikar, men hetta er ikki rætt.

Um tosast skal um formyndarí, kann øll gongdin í málinum, og ikki minst endaliga uppskotið frá MMR nýtast at meta út frá.

„At MMR ikki hevur víst á sakligar gru…“

Lýsingin hevur ikki krav um útbúgving frá Lærdum Háskúla, og siðvenjan sum víst verður til er ikki til staðar. Bæði tá hugt verður eftir at lærari uttan akademiska útbúgving er settur í fast starv eftir at eg eri sett í starv á skúlanum, og tá hugt verður eftir hvussu lítil partur av lærar-

unum í føstum størvum eru magistarir. Tað er í dag einans umleið helvtin av lærarunum í føstum størvum, sum eru magistarir, og tað kann neyvan nýtast til at undirbyggja pástandin hjá MMR um siðvenju.

Hetta vísir hinvegin at har er brúk fyri lærarum við nógvum ymiskum útbúgvingum, og summar av hesum útbúgvingum fáast so ikki frá Lærdum Háskúlum, men frá øðrum góðum skúlum sum hava ta útbúgving sum tørvur er á til at røkja størvini.

„At MMR hevur víst til lógartulking sum hvørki…"

MMR skrivar *„Víst verður til svarið til umboðsmannin fremst í skrivinum"*. Eg havi lisið tað sum MMR, skrivar fremst í skrivinum, men søguliga gongdin og teirra praksis kann neyvan nýtast sum grundarlag fyri lógartulkingar í setanarmálum. Siðvenja og praksis má byggja á lógargrundarlagið og ikki øvugt

„At teirra uppskot til loysn á málinum bert staðf.."

Loysnin er eitt einsíðugt diktat, sum á ongan hátt tekur hædd fyri mínum rættindum ella ynskjum.

Eiheldur tekur loysnin hædd fyri hvat ið námsfrøðisligt kundi verið eitt íkast til undirvísingina í evning og hondarbeiðið á Læraraskúlanum. Tað er einans ein avtala sum staðfestir teirra krav um eitt akademiskt heiti, og øll onnur sjónarmið sýnast at vera óviðkomandi. Tá lærarar innan onnur fakøkir, har ein akademisk útbúgving er til, verða settir í starv, verður bert kravt at tey skulu taka pedagogikum aftrat síni fakútbúgving, og ikki at tey skulu taka eina pedagogiska útbúgving á masterstøði. Tað er tí eisini her greiður mismunur á hvørji faklig krøv verða sett fyri at fáa fast starv.

*„At MMR frá eg fekk starvið 1. aug…"*

MMR sigur til hetta at *„samskifti hevur alla tíðina verið millum FMR og MMR…"*. Eg vil heita á Umboðsmannin um at meta, um tað er satt at har alla tíðina fra august 2002 til 26. maj 2004 hevur verið eitt regluligt samskifti millum FMR og MMR um at avklára, hvønn lønarflokk eg skuldi lønast eftir.

Viðmerkjast skal at hóast samskift millum MMR og FMR er umfatað av almennum innliti, og eg havi biðið um innlit í øllum samskiftinum í sambandi við setanina, havi eg ikki fingið innlit í henda partin.

MMR skrivar 24. juni at A fær nú sendandi formelt setunarbræv ein av fyrstu døgunum, eg skal tí gera vart við, at eg nú skjótt 4 vikur seinri, ikki havi fingið setunarbrævið enn."

Sama dag sendi klagarin eisini soljóðandi skriv til umboðsmannin:

„…Teir siga frá í sínum viðmerkingum, at eg havi fingið setanarskriv, og at eg fái formelt setanarbræv sendandi „ein av fyrstu døgunum". Hetta er framvegis ikki komið.

Setanarskrivið teir sipa til, er mítt skjal (3.0). Í hesum (sum er dagfest 19.07.02) stendur m.a. at „setanarbræv sum sáttmálasett verður sent tygum seinni".

Í sáttmálanum millum Fíggjarmálastýrið og Magistarafelagið § 3. Setanarbræv, verður sagt hvat eitt tílíkt skal umfata, og at starvsfólkið skal fáa setanarbrævið í seinasta lagi 14 dagar eftir setanina.

Eg vil enn eina ferð gera vart við, at tað nú eru 2 ár eg havi undirvíst á Læraraskúlanum uttan formella setan.

Tvey onnur vórðu sett samstundis sum eg í august 2002, og hava hesi langt síðani fingið setanarbræv, eins og tey ið vórðu sett í august 2003 eisini hava fingið setanarbræv…"

Umboðsmaðurin avgjørdi eisini at kanna hendan spurningin nærri. Tann 22. juli 2004 sendi umboðsmaðurin tí viðmerkingarnar hjá A og skrivið viðvíkjandi lønarflokkingini av starvinum til Mentamálaráðið til ummælis.

Við skrivi, dagfest 9. september 2004, sendi Mentamálaráðið umboðsmanninum hesar viðmerkingar:

„… *2. Viðmerkingar til skrivi frá A*

A vísir í sínum skrivi á, at hon fekk ábendingar um, at hon ikki var rætt viðfarin og at fulltrúin í Mentamálaráðnum var ósamdur við leiðsluna, tá tað snúði seg um, hvørji rættindi A hevði í sambandi við avtaluna. Av notati frá seinna fundinum 2. desember 2003 framgongur, hvat partarnir tosaðu um. Tað sæst ikki í notatinum at serligt ónøgdsemi var á fundinum ella at treytir vóru broyttar í mun til tær upprunaligu. Eftir okkara fatan vóru sjónarmiðini og framferðin tann sama hjá embætisfólkunum undir tilgongdini. Táverandi landsstýrismaður ynskti eina virðiliga loysn, sum var avtalað millum partarnar og arbeitt var fram ímóti eini tílíkari.

Fulltrúarnir høvdu ikki heimild at góðtaka nakra loysn uttan at støða var tikin til hana á hægri staði í fyrisitingini. Hetta fingu advokaturin og A at vita. Fundirnir vóru opnir og samrøðurnar snúðu seg um at lýsa málið og finna eina felags loysn. Men umboðini fyri Mentamálaráðið gjørdu undir allari tilgongdini greitt, at tað var ófrávíkiligt krav, at hon

mátti taka eina útbúgving frá hægri lærustovni. Hon kundi heldur ikki fáa serligar fíggjarligar sersømdir frá Mentamálaráðnum, men Mentamálaráðið skuldi kanna aðrar møguleikar.

Mentamálaráðið hevur í frágreiðingini, dagfest 24. juli 2004, víst á orsøkirnar til at viðgerðartíðin dróg so leingi út. Orsøkin var m.a., at málið var avsluttað 22. januar 2003 (sí skjal nr. 55) av táverandi landsstýrismanni K, men tikið upp aftur stutt eftir av landsstýrismanninum J. Hetta dróg málið út, tí tað í ein ávísan mun fekk viðgerð sum eitt nýtt mál.

*3. Viðmerkingar til viðmerkingarnar hjá A*

Mentamálaráðið hevur í sínum viðmerkingum í skrivinum, dagfest 24. juni 2004, víst á støðu sína til flestu av spurningarnar, sum A viðger í viðmerkingum sínum til viðmerkingarnar frá Mentamálaráðnum. Í nógvum førum eru, eftir okkara fatan, eingi nýggj sjónarmið komin fram, og Mentamálaráðið kann tí í nógvum førum ikki gera annað enn vísa til áður nevndu frágreiðing.

Vísandi til yvirskriftina „treytir".

Tað er rætt, tá A vísir á, at treytirnar, sum MMR setur, er, at útbúgvingin skal vera akademisk. Fakligi førleikin, t.e. førleikin innan fakið tekstildesign, hjá A er á so høgum støði, sum hann fæst í Danmark, men er ikki á akademiskum støði. Tað, at donsku designaraskúlarnir arbeiða við at umskipa útbúgvingarnar soleiðis, at útbúgvingarnar í framtíðini verða góðkendar sum bachelorútbúgvingar, ger ongan mun fyri útbúgvingina hjá A – hon kemur altíð at hava gomlu útbúgvingina.

Møguliga kann hon taka tað sum manglar í millum gomlu og nýggju útbúgvingina, um tekstilskúlarnir fara at gera eina slíka skipan einaferð í framtíðini.

Formligi pedagogiski førleikin hjá A er lítil, og diplomútbúgvingin, ið hon vísir á og sum hevur bæði fakligt og pedagogiskt innihald, hevði verið eitt gott millumlið millum tekstildesignútbúgvingina og eina master útbúgving. Vanligt er eisini, at universitetini krevja í minsta lagi útbúgving á diplomstøði (verður sammett við støði í eini bachelorútbúgving) innan ein masterútbúgving verður tikin. Hetta sæst eisini aftur í viðmerkingunum frá RUC, í sambandi við at A var upptikin til útbúgving á master støði (sí skjal nr. 82). Við at taka eina pedagogiska masterútbúgving vildi A lokið krøvini bæði til pedagogiskan førleika og akademiska støðið, og er tað hetta, sum hon hevur fingið møguleika at taka undir ávísum treytum.

Tað er rætt at treytirnar hjá sjúkrarøktarfrøðingum, sum skulu taka masterútbúgvingina eru betri, men talan er um starvsfólk, sum hava verið í føstum starvi í fleiri ár, og tað er í hesum føri myndugleikin, sum broytir førleikakrøvini við nýggjari lóg, soleiðis at tað krevst størri førleiki til at undirvísa. Talan er um eina serskipan, sum er ásett í viðmerkingunum til lógina um útbúgving av sjúkrarøktarfrøðingum. Tað er sostatt prinsippiellur munur á hesum báðum málunum.

Vísandi til yvirskriftina „ Siðvenja"

Málið, sum A her vísir til, snýr seg um praktikkleiðarin fyri pedagogútbúgvingini, sum var sett í fast starv sum praktikkleiðari í 2002, hóast viðkomandi ikki hevði útbúgving frá hægri lærustovni. Hetta var gjørt, tí løgfrøðilig niðurstøða var, at viðkomandi, sum tann 30. januar 1987 varð sett í fyribilsstarv sum pratikkleiðari á nýstovnaðu pedagogútbúgvingini, hevði rætt til fast starv, og varð hon tí sett í fast starv sum praktikkleiðari fyri pedagogútbúgvingina. Viðkomandi hevur síðan sagt seg úr starvinum.

Verður sæð burtur frá tí heilt serstaka fyribrigdinum við praktikkleiðaranum, ið var leiðari fyri praktikkina innan pedagogútbúgvingina, so eru allir lærarar, ið settir eru í fast starv sambært umsókn síðan 1. jan. 1998, persónar við útbúgving frá hægri lærustovni (cand. pæd. psych, cand. pæd. pæd., cand. mag. e.l).

Í skrivinum vísir A til „Skriv um setanarviðurskifti á Læraraskúlanum".

Talan er um eitt innanhýsis uppprit á læraraskúlanum. Mentamálaráðið hevur umrøtt uppritið saman við umboðum fyri Føroya Læraraskúla, men Mentamálaráðið, ið hevur myndugleikan at seta førleikakrøvini, hevur ikki góðkent uppritið sum støði undir førleikakrøvunum."

Hesar viðmerkingar vóru sendar klagaranum til ummælis tann 10. september 2004.

**Við skrivi, dagfest 11. oktober 2004, sendi A umboðsmanninum hesar viðmerkingar:**

„Viðmerkingar til seinasta svarskriv frá Mentamálaráðnum (MMR) dagfest 09.09.04., og til málið sum heild, nú eg havi fingið innlit í fleiri skjøl viðvíkjandi mínum … setanarbrævi.

…

Svarskrivið hjá MMR er serliga merkt av teimum manglandi svarunum.

Eg vil biðja Umboðsmannin leggja til merkis, at hóast meginparturin av grundgevingum hjá MMR eru mótprógvaðir sum ósakligir, og ikki í tráð við veruleikan, loypir leiðslan á MMR hesi fakta um, við eini viðmerking um at tað er onki nýtt í skrivinum. Tá teir á henda hátt velja tøgnina sum svar, taki eg tað sum eina góðtøku av tí framførda.

Í hesum svarskrivi kann eg út frá teimum nýggju skjølunum, sum eg havi fingið innlit í, vísa á fleiri dømir um skeivar framferðir í sambandi við viðgerðina. Ein stórur trupulleiki er eisini at MMR viðgerð málið uttan at dokumentera sínar pástandir.

Sum tað sæst í skrivinum eru fleiri skjøl, sum ikki eru útflýggjaði. Her er talan um skjøl, sum eru umrødd í teimum útflýggjaðu skrivunum og øðrum málsskjølum. Tað er tó serliga skjøl um setanarviðurskiftini, frá fundum og samskifti millum MMR og Magistarafelagið, sum mangla, hóast nógva staðni verður víst til hetta samskifti.

**1. Upprunaliga málið og viðmerkingar Mentamálaráðsins**

**1.1 Lektor og Adjunkt.**

Tá eg í mínum viðmerkingum undirbyggi, at Adjunkt- og lektorheitini eru starvsheitir galdandi fyri starvsfólk bæði við og uttan akademiskari útbúgving, og ikki knýtt at akademiskum prógvum frá ávísum undirvísingarstovnum, velur MMR at loypa tað um við eini felags viðmerking um, at har er onki nýtt í tí sum verður ført fram. Hetta sigur MMR, hóast teir í sínum svarskrivi dagf 24.06.04 skrivaðu, at hesi eru akademisk heiti.

**1.2 Sjúkrarøktarfrøðingar og avtala um útbúgving.**

MMR sigur í brævinum dagf. 24.06.2004, at fordømir eru um avtalur um víðari útbúgving, og vísa til avtalurnar sum eru gjørdar fyri lærararnar á Sjúkrarøktarfrøðiskúlanum.

Tá eg í mínum svari dagf, 19.07.2004 havi undirbygt, at fortreytirnar eru so ymiskar, at tað ikki er grundarlag fyri samanlíkning, góðtekur MMR hetta við svari sínum dagf. 09.09.04.

„Tað er sostatt prinsipiellur munur á hesum báðum málunum“. Eg kann sostatt staðfesta, at fordømi ikki er fyri samanlíkniligar avtalur, og at grundarlagið undir argumentatiónini hjá MMR eisini her var villeiðandi.

**1.3 Sjúkrarøktarfrøðiskúlin / Læraraskúlin við og uttan lógarbroyting.**

Støðan við Sjúkrarøktarfrøðiskúla Føroya er tó áhugaverd í øðrum sambandi, tí tað er eftir øllum at døma skipanin við at akademisera Sjúkrarøktarfrøðiskúlan, sum verður brúkt til fyrimynd fyri broyting á Føroya Læraraskúla (Flsk).

Har er tó ein sera týðandi munur millum broytingina á Sjúkrarøktarfrøðiskúlanum, og broytingina, sum er um at henda á Flsk. Fyri Sjúkrarøktarfrøðiskúla Føroya hevur Føroya Løgting við lóg hækkað útbúgvingina til Bachelorstøði, og reglugerð er gjørd fyri broytingina. Tað er eftir hesum reglum, at avtalur verða gjørdar við starvsfólkið um rímuligar sømdir fyri eftirútbúgving.

Fyri Flsk er støðan tann, at politikarirnir ikki eru spurdir eftir, og tí heldur ikki hava tikið støðu til um skúlin skal hava „Bachelor“ útbúgvingar. Tað er tí ein reint umsitingarlig avgerð, at kravið til útbúgvingar á Flsk verður broytt á henda hátt.

Tað sær út, sum embætismennirnir hava tikið politisku skipanina av ræði, og hava sett nýggja skipan í verk, áðrenn hon hevur verið til politiska viðgerð.

**Fakliga kanningin sum MMR ikki vil kennast við.**

Flsk gjørdi á vári í 2003 eina kanning av, hvussu setanarviðurskiftini eru í Føroyum, og hvussu hini norðanlondini handfara henda spurning, og hevur sent kanning og niðurstøðu til MMR, men tá eg vísi til stóra munin millum tað, sum kanningin er komin til, og tað sum MMR postulerar um viðurskiftini í hinum Norðanlondunum, er einasta MMR hevur at siga, at „ teir ikki hava góðkent uppritið“.

Eg veit ikki hvussu MMR, kann loyva sær at svara á henda hátt, kanningin hevur eina rúgvu av fakta um útbúgvingarnar í hinum norðurlondum, og vísir á konkret dømir um undantaksreglur fyri t.d. kreativu økini, í sambandi við starvssetanir.

MMR hevur møguliga vald til at kunnu nokta fyri at góðtaka kanning og tilmæli frá Flsk, men teir kunnu ikki nokta fyri at góðtaka, at kanningin, sum skúlin hevur gjørt um útbúgvingarnar í hinum norðanlondunum, hevur fakta, sum mótprógva pástandin hjá MMR um, at støðan í øllum hinum Norðurlondunum kann brúkast sum umskyldning til at seta eitt ófrávíkiligt krav um akademiska útbúgving, fyri at fáa fast starv á Flsk.

Serliga verður víst til viðmerkingarnar frá kanningini í Svøríki um munin millum „akademisk kompetence“ og „kunstnerisk/skabende kompetence“ og viðmerkingarnar um starvssetan á Donskum læraraskúlum.

At enda skal vísast á, at tilmælið frá nevndin er, at lektorbedømilsi, sum í veruleikanum er galdandi lóg í Føroyum, verður sett í verk.

**Ikki siðvenja men nýtt fyribrygdi.**

Í sambandi við at MMR førir fram, at har er siðvenja fyri at seta treytir um akademiska útbúgving, hevur MMR ikki kunnað prógvað, at siðvenja er á økinum. MMR hevur enn ikki kunnað prógvað, at har er nøkur samtykt, kunngerð ella skriv, sum sigur, at tað skal verða eitt krav, at tey sum sett verða í fast starv á Flsk, skulu hava Akademiska útbúgving.

Orsøkin er væntandi, at upprunin til krøvini er sera nýggjur. Fyrstu ferð eg síggi tað á skrift, er í brævinum frá Magistarafelagnum (MAG) dagf. 24.04.02 har teir hava ynski um, at krav verður sett um prógv frá hægri góðkendum skúla til størv á Flsk.

MAG ger somuleiðis vart, við at MMR hevur „siðvenju" fyri at lýsa leys størv á Flsk, uttan at krøv eru til útbúgvingar.

„Siðvenjan" við ikki at seta krav um útbúgving frá hægri góðkendum skúla, var eisini galdandi tá størvini vóru lýst leys, tá eg søkti starvið fyrstu ferð.

Í brævi til MAG dagf. 18.07.02 stuðlar MMR eisini hetta, tá teir vísa til *„sum avrátt á fundi við Magistarafelagið"*, tað vildi jú ikki verða neyðugt, at hava fund við MAG um nýggj útbúgvingarkrøv til størvini, um siðvenja var fyri krøvunum.

MAG kan sjálvandi sum fagfelag hava ynski um at ávirka útbúgvingarnar, men tað tykist heldur løgið, tá deildarleiðarin á MMR velur seta ynskini hjá MAG í verk, uttan at meting verður gjørd, um hetta er í tráð við lógargrundarlagið, og uttan at hoyra leiðsluna á Flsk, ella lærararáðið.

**1.6 Brot á verandi skipan**

Hinvegin vísir galdandi lóg á at *„sum treyt fyri setan í fast starv sum læraraskúlaadjunktur, -lektari ella rektari er, at viðkomandi, umframt at hava tann neyðuga kunnleikan og námsfrøðiliga kunnleikan, skal hava staðið eina roynd í námsfrøði og undirvísingarfimi. Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um hesa roynd" (§16)*. Nevnt verður ikki við einum orði, at talan skal vera um akademiska útbúgving, og tá MMR setur eitt generelt krav í gildi um akademiska útbúgving fyri at fáa fast starv, og at hetta eisini verður kravt fyri starvsøkir, har akademiskar útbúgvingar ikki eru vanligar, so má talan verða um brot á lógargrundarlagið.

Farið verður so langt, at tey beinleiðis skriva í viðmerkingunum til kæruna dagf. 24.06.2004. *„Tað skal tó viðmerkjast, at tað kunnu vera lærugreinir, har tað ikki er møguligt at finna undirvísarar við akademiskari útbúgving, men hesir vera ikki settir í starv í dag"*.

Tað er sostatt ikki nokk, at hin fagligi førleikin er í lagi, um útbúgvingin ikki er akademisk.

Við tílíkum fortreytum er ikki longur talan um objektiva meting av fakligum førleika innanfyri tað ávísa starvið, men at embætisfólk seta líkheitstekin millum akademiskt prógv og førleika. MMR fer tó uppaftur longur, tí í „tilboðnum" til mín verður kravt at eg skal taka eina akademiska útbúgving, sum ikki er relaterað til mítt starvsøki. Her er talan um eitt akademiskt prógv fyri prógvið í sær sjálvum og ikki fyri førleikan innanfyri starvsøkið.

Galdandi reglur vísa greitt til Adjunkt og Lektor skipanina. Av einihvørjari orsøk hevur MMR avgjørt ikki at fylgja lógini á hesum økinum. Eg veit ikki hvørja heimild MMR hevur til umsitingarliga at leggja galdandi lógir á hylluna, men tá teir innføra eina nýggja „siðvenju", sum gongur beinleiðis móti andanum í galdandi reglum, kann eg ikki trúgva at hetta er lógligt. Adjunkt / Lektor- skipanin byggir á, at tann sum settur verður í starv, eftir eitt ávíst áramál skal førleikametast út frá tí persónliga og fagliga førleika, sum viðkomandi hevur fyri at røkja eitt konkret fagøki. Tá MMR praktiserar eina skipan, har prógv frá ávísum stovnum er tað sama sum førleiki, er hetta í andsøgn við andan í lógarásetingini.

…

**4 Niðurstøður.**

Eg meti:

- at við at nokta at góðtaka hægstu útbúgving, sum kann takast í ríkinum innanfyri starvsøkið, sum nøktandi førleika, brýtur MMR andan í lógini um setan av størvum á Flsk. og misnýtur sítt vald sum setunarstovnur.
- at tað er eitt supplerandi krav, sum ikki er nevnt í lýsingini, tá kravt verður, at eg taki eina pædagogiska Masterútbúgving, fyri at kunna fáa fast starv.
- at sjónarmiðini fyri at nokta mær fasta starvið ikki eru objektiv, men subjektiv, grundað á at Mentamáladeildin av eintingum hevur avgjørt, at øll størv á Flsk skulu vera akademisk.
- at talan er um umsitingarlig valdsmisnýtslu, tá grundarlagið fyri at seta meg í lægri lønarflokk er tengt at mínum „áhuga" fyri at fara undir víðari útbúgving.

…

**5 Samanumtikið.**
Í sambandi við seinna skjalainnlitið, sum umfatar mína lønarflokking og setanarbræv, vísir *„regluliga sambandið"*, sum MMR sigur seg hava haft við FMR um viðgerðina av míni starvssetan…, seg fleiri ferðir at umfata steðg uppá 3-4 mánaðar, og verður í flestu førum einans tikið uppaftur, eftir áheitan frá Flsk ella mær.

MMR hevur so lítið skil á sínum skjølum, at hóast tað er MMR sum skrivar setanarbrøv, noyddust tey at senda fyrispurning til mín gjøgnum Flsk, um eg ikki hevði fingið setanarbræv, hóast manglandi setanarbrævið var orsøkin til at rykt varð eftir tí.

Stovnurin sýnist at arbeiða uttan fastar reglur, og uttan virðing fyri grundarlagið í teimum lógum, sum eru galdandi á økinum.

Brúkt verða hugtøk sum „siðvenja", har tað nú er greitt at eingin siðvenja er, samanlíkningar verða gjørdar við starvsøkir, har ikki er grundarlag fyri tí, og málsviðgerðin er merkt av villeiðandi argumentatión, og manglandi faktuellum innihaldi.

Har er rættuliga stórur munur á málsviðgerðini, har fyrri parturin sýnist byggja á sakligt grundarlag, meðan seinni parturin er merktur av persónligum sjónarmiðum, og skjúldum motivum.

Tað kann síggja út sum málið hevur koyrt tilvildarliga, við manglandi førleika hjá málsviðgerðunum. Tað er tó mín uppfatan at gongdin er tilætlað, og stýrd av leiðaranum á mentamáladeildini saman við forstjóranum á MMR, og at óseriøsa viðgerðin av málinum meira skyldast, at karmarnir, sum leiðslan hevur sett fyri loysn av málinum, ikki bara givið umsitingini møguleika fyri at loysa uppgávuna innanfyri karmarnar av góðum fyrisitingarsiði.

Eg vil tí heita á Umboðsmannin um, at ansað verður eftir, at starvsfólk, sum einans hava gjørt eftir boðum, ikki verða gjørd til syndabukkar, tí ordrarnir komu eftir øllum at døma úr erva. Hetta verður undirstrikað av leiðsluni sjálvari í brævinum dagf 09.09.2004 har víst verður til at „fultrúðarnir høvdu ikki heimild at góðtaka nakra loysn, uttan støða var tikin til hana á hægri staði í fyrisitingini".

Harumframt sendi A umboðsmanninum eisini hesar viðmerkingar við skrivi, dagfest 18. oktober 2004:

„Eg sendi við hesum hjálagt setunarbrøv, sum Mentamálaráðið (MMR) hevur sent mær til undirskrivingar.

Fyrra setunarbrævið (skjal 66.1) varð sent aftur við hjálagda fylgiskrivi (skjal 67.0), dagf. 13.09.04. Har víst varð á at tíðaravmarkingin, lønarflokking og starvsaldur ikki vóru í lagi. MMR sendi mær nýtt setanarbræv (skjal 68.1) dagfest 06.10.04, har tíðin var rættað, men annars óbroytt.

Seinra setunarbrævið varð sent aftur við fylgiskrivi (skjal 69.0) dagf. 18.10.04, har víst varð á, at hesi viðurskifti framvegis ikki eru í lagi.

Eg havi roynt at vísa MMR á, at tey ikki hava rætt til at fremja setanina á henda hátt, men út frá skjølunum í málinum eri eg noydd at ásanna, at MMR ikki hevur vilja ella evnir til at fremja setanina á einum fagligum grundarlagi, har míni rættindir eru vird.

Orsøkin til at eg ikki kann góðtaka at vera flokkað sum BS/BA er m.a. at hetta er fyri 3 ára útbúgvingar. Sí hjálagda lønartalva skjal 43.

Útbúgvingin sum textildesignari er ein 4 ára útbúgving, eins og læraraútbúgvingin, og eigur tí, eftir lønartalvuni hjá magistarafelagnum, at verða lønt sum cand.phil.
(førleikaløn 8).

Víst verður eisini til sáttmálan millum Magistarafelagið og Fíggjarmálastýrið, § 27 stk. 2, har staðfest verður, at sjálvt tímalærari, sum ikki lýkur krøvini fyri at verða settur í fast starv, verður løntur sum cand.phil (førleikaløn 8).

Eg havi eftir lokna útbúgving undirvíst í 15 ár, har ímillum 7 ár fulla tíð á Blindastovninum, og nógv ár í kvøldskúla, (sí skjal 48 um starvsroyndir), og tað er fyri meg óskiljandi, at MMR framvegis heldur fast við, at ongar av hesum starvsroyndum skulu telja.

Eg skal tí heita á Umboðsmannastovnin um at tryggja, at ein óheft faglig meting verður gjørd út frá galdandi lóg og sáttmála á økinum.“

Umboðsmaðurin sendi skrivini, dagfest 11. oktober og 18. oktober, til ummælis hjá Mentamálaráðnum tann 18. oktober 2004.

Við skrivi, dagfest 11. november 2004, sendi Mentamálaráðið umboðsmanninum soljóðandi viðmerkingar:

„…Við skrivi, dagfest 18. oktober 2004, sendir umboðsmaðurin Mentamálaráðnum tvinni skriv frá A, dagfest ávikavist 11. og 18. oktober 2004, við viðmerkingum til hetta málið. Skrivini verða send Mentamálaráðnum til ummælis og til møguligar viðmerkingar.

Í høvuðsheitum vil Mentamálaráðið vísa á tað, sum Mentamálaráðið longu hevur skrivað um hetta mál, tó ynskir Mentamálaráðið at gera

niðanfyri standandi viðmerkingar til punktini 1.2 og 1.3… og til niðurstøðurnar (punkt 4).

Ad 1.2 Sjúkrarøktarfrøðingar og avtala um útbúgving

Mentamálaráðið má vísa aftur pástandin um, at Mentamálaráðið nýtti villleiðandi argumentatión í sambandi við avtalur um útbúgving. Tá Mentamálaráðið í brævinum dagfest 24. juni 2004 vísir á, at fordømi finnast um avtalur um víðari útbúgving vísandi til avtaluna millum Mentamálaráðið og lærarar á Sjúkrarøktarfrøðiskúlanum, verður hetta bert gjørt fyri at staðfesta, at fordømi finnast um avtalur um víðari útbúgving. Mentamálaráðið samanlíknar hvørki fortreytir fyri ella innihaldið í avtalunum. Og í svarinum frá Mentamálaráðnum dagfest 09.09.04 verður eisini víst á, at tað er prinsipiellur munur á avtalunum.

**Ad 1.3 Sjúkrarøktarfrøðiskúlin / Læraraskúlin við og uttan lógarbroyting**

Vísandi til at nýggj lóg er samtykt um sjúkrarøktarfrøðiútbúgvingina, ið ger hesa til eina bachelorútbúgving, meðan eingin nýggj lóg er samtykt fyri útbúgvingarnar á Læraraskúlanum, leggur A embætismennirnar í Mentamálaráðnum undir fyri at hava tikið politisku skipanina av ræði, tí politiska skipanin hevur ikki tikið støðu til, um skúlin skal veita bachelorútbúgvingar. Hesa ákæru má Mentamálaráðið vísa aftur, og víst verður til, at longu í 1990'unum var arbeitt við at uppstiga læraraútbúgvingina, og hava fleiri arbeiðsbólkar síðani tá sitið við hesi uppgávu. Av ymiskum orsøkum er arbeiðið steðgað upp, men í februar 2003 setti landsstýrismaðurin í mentamálum nýggja nevnd at endurskoða lærara- og pedagogútbúgvingarnar. Arbeiðið hjá hesi nevnd gongur væl, og er komið so væl áleiðis, at álit væntandi verður sent til hoyringar um einar 2 mánaðar.

Í arbeiðssetninginum hjá nevndini stendur m.a., at nevndin skal gera „Lýsing av, hvussu útbúgvingarnar kunnu gerast hægri útbúgvingar við granskingartilknýti og -uppgávum“ og víðari „Uppskot um, hvussu hesar útbúgvingar og annar hægri lestur kunnu samskipast“. Í arbeiðssetninginum stendur, at lógaruppskot og kunngerðir skula tilevnast við støði í hesum. Eisini stendur í arbeiðssetninginum, at tað er ein fortreyt, at lógirnar tryggja, at útbúgvingarnar eru á hædd við tilsvarandi útbúgvingar í Norðurlondum. Her eru sostatt greiðar politiskar útmeldingar um at hækka støðið á útbúgvingunum, og er hetta ein politisk ætlan, ið hevur meira enn 10 ár á baki.

…

Síðani Landsskúlafyrisitingin bleiv umskipað til Mentamálaráð, og Læraraskúlin í 1998 bleiv lagdur til Mentamáladeildina saman við øðrum hægri útbúgvingum, eru eingi nýggj føst størv sett, har viðkomandi ikki hevur havt útbúgving frá hægri lærustovni, og er hetta orsakað av, at arbeitt hevur verið við at uppstiga útbúgvingarnar.

**Ad 4. Niðurstøður**

Mentamálaráðið hevur valt at seta nummar við hvørja niðurstøðu hjá A, sum sæst á s. 8 í viðmerkingunum hjá A frá 11.10.04.

Áseting í lógini fyri fast starv er neyðugur kunnleiki og námsfrøðiligur kunnleiki, umframt roynd í námsfrøði og undirvísingarfimi. A hevur góða fakliga útbúgving innan fakið tekstildesign. Lærugreinin handarbeiði fevnir sjálvandi um meira enn bara tekstildesign, og tí er tað enn meira neyðugt við einari góðari námsfrøðiligari útbúgving til at røkja eitt lærarastarv á Læraraskúlanum. Avtalan millum A og Mentamálaráðið er í tráð við omanfyri standandi.

Í lýsingini er førleikakravið, at viðkomandi hevur útbúgving frá hægri góðkendum lærustovni, og má kravið um námsfrøðiliga masterútbúgving tí júst metast at vera í tráð við bæði lýsing og lóg.

Politiska útmeldingin um, at útbúgvingarnar á Læraraskúlanum skula gerast hægri útbúgvingar, er greitt ásett í arbeiðssetninginum til nevndina, ið arbeiðir við at endurskoða útbúgvingarnar. Annars er at siga, at hetta er eitt mál, ið arbeitt hevur verið við í Landsskúlafyrisitingini/-Mentamálaráðnum í meira enn 10 ár. Lagt kann verða afturat, at innan undirvísing og skúla er ein meginregla, at lærarar/undirvísarar á einum og hvørjum skúla ella lærustovni, altíð eiga at vera útbúnir á einum hægri stigi, enn næmingarnir/ studentarnir eru útbúnir sum við lokna útbúgving.

…“

Tann 18. november 2004, sendi umboðsmaðurin viðmerkingarnar hjá Mentamálaráðnum til klagaran til ummælis.

Við skrivi, dagfest 19. november 2004, sendi A umboðsmanninum hesar viðmerkingar:

„Viðvíkjandi bræv tygara dagfest 18.11.04, við seinastu viðmerkingunum frá Mentamálaráðnum um mína starvssetan.

Eg meti at Mentamálaráðið framvegis fløkir ting saman, og eri langt

frá samd í teirra pástandum. Mentamálaráðið svarar framvegis ikki settu spurningunum, og eisini mangla enn skjøl í sakini.

Takast má til eftirtektar, at Mentamálaráðið ikki vil svara summum av teimum argumentum, sum eg havi ført fram. Eg haldi tó at málið er so mikið væl lýst, at eg vil heita á Umboðsmannin um at taka málið upp til viðgerðar. Tað er mín vón at Løgtingsins Umboðsmaður vil taka teir ósvaraðu spurningarnar upp til viðgerðar, á jøvnum føti við restina."

Umboðsmaðurin kunnaði tann 22. november 2004 Mentamálaráðið um síðsta skrivi frá klagaranum. Umboðsmaðurin boðaði harumframt frá, at hann í næstum fór undir endaligu viðgerðina av málinum.

Eftir at umboðsmaðurin var farin undir endaligu viðgerðina av málinum, lat A honum nakrar viðmerkingar afturat tann 6. januar 2005, ið vóru soljóðandi:

„Tann 1. desember 2004 bað eg enn eina ferð Mentamálaráðið um innlit í skjøl, viðvíkjandi mínari starvssetan…, av tí at eg út frá teimum skjølum og upplýsingum, eg longu hevði fingið, kundi síggja at skjøl manglaðu.

Tey skjøl, sum eg í hesum umfari havi fingið, snúgva seg eina mest um samskifti millum magistarafelagið og mentamálaráðið, og um starvssetanir á Føroya Læraraskúla.

Tíverri hevur MMR ikki givið mær innlit í teldubrævasamskiftið millum L deildarleiðara á Mentamáladeildina og umboð fyri Magistarafelagið, hóðast biðið var um hetta longu 1. desember, og nýggj áheitan varð tí send MMR um at fáa innlit í nevnda teldubrævasamskifti 14. desember, uttan at MMR hevur latið við seg koma.

Millum skjølini sum eg havi fingið frá MMR er ein frásøgn frá fundi millum MMR og MAG dagfest 03. oktober 2003.

…

Í sambandi við at Mentamálaráðharrin hevur sagt í fjølmiðlunum, at hann als ikki er sannførdur um, at pedagog- og læraraútbúgvingarnar eiga at verða umskipaðar til bachelor, vil eg enn eina ferð gera vart við tað margháttliga í, at Mentamálaráðið av sínum eintingum hevur broytt setanarkrøvini, sum um pedagog- og læraraútbúgvingarnar longu vóru broyttar til útbúgvingar á Bachelorstøði."

Hesar viðmerkingar vóru sendar Mentamálaráðnum til ummælis tann 10. januar 2005 við einari freist áljóðandi 14 dagar.

Við skrivi, dagfest 24. januar 2005, sendi Mentamálaráðið umboðsmanninum hesar viðmerkingar:

> „Viðvíkjandi klaguni frá A, dagfest 1. juni 2004
>
> Við skrivi, dagfest 10. januar 2005, sendir umboðsmaðurin Mentamálaráðnum skriv frá A, dagfest 6. januar 2005, har hon hevur nakrar viðmerkingar afturat. Skrivið verður sent Mentamálaráðnum til ummælis og til møguligar viðmerkingar.
>
> A vísir á, at hon 1. desember 2004 enn einaferð bað Mentamálaráðið um innlit í ávís skjøl. Mentamálaráðið avgreiddi hesa umsókn um innlit 10. desember 2004, har umboðsmaðurin eisini fekk avrit av øllum skjølum. 14. desember 2004 biður A enn einaferð um innlit í somu skjøl, sum hon bað um í fyrru umbønini frá 1. desember. Mentamálaráðið hevur svarað A við skrivi, dagfest 21. januar 2005, sí eisini hjáløgdu skjøl: Bræv frá Mentamálaráðnum til A, dagfest 21. januar 2005, og teldubrævasamskifti millum C og L, dagfest 18. og 19. januar 2005.
>
> …
>
> Í sambandi við síðsta punkt í brævinum frá A um ætlanina at skipa lærara- og pedagogútbúgvingarnar sum bachelor útbúgvingar er at siga, at landsstýrismaðurin hevur givið nevndini, ið arbeiðir við hesum, boð um at halda fram við arbeiðinum eftir óbroyttum arbeiðssetningi. Ætlanin er tí framvegis at skipa bæði lærara- og pedagogútbúgvingina sum bachelor útbúgvingar.“

Hjálagt hoyringsskrivinum var soljóðandi skriv frá Mentamálaráðnum til A, dagfest 21. januar 2005:

> **„Viðvíkjandi umsókn um innlit í sambandi við starvssetan**
>
> Víst verður til skriv tygara til Mentamálaráðið, dagfest 1. desember 2004, har tygum enn einaferð søkja um innlit í øll skjøl í sambandi við starvssetan tygara. Orsøkina til áheitanina siga tygum vera, at tygum síggja frá skjølum, tygum áður hava fingið, at eitt skjal frá Fíggjarmálaráðnum, dagfest 26. mai 2004, manglar.
>
> Av tí at mál tygara er rúgvismikið, og at tygum áður hava søkt um og fingið innlit í mál tygara, hevur Mentamálaráðið latið skrivað út nýggjan, dagførdan skjalalista soleiðis, at tygum kunna síggja, um tygum mangla

onnur skjøl enn tað, tygum nevna. Herumframt verða send tygum skjøl nr. 76 og 77, ið allarhelst eru tað/tey skjøl tygum siga, at tygum mangla.

Í triðu kolonnu í hjálagdi skjalalista síggjast bókstavarnir „I" fyri inngangandi postur, „U" fyri útgangandi postur, og bókstavarnir „N" og „X". Víst verður á, at skjøl, ið eru merkt „N" og „X", eru innanhýsis arbeiðsskjøl, sum vanliga ikki eru fevnd av almennum innliti. Um tygum við støði í skjalalistanum halda, at tygum framvegis mangla skjøl, eru tygum vælkomin at venda tygum aftur til Mentamálaráðið.

Herumframt ynskja tygum innlit í tað samskiftið, sum hevur verið millum Mentamálaráðið og Magistarafelagið um starvið, setanina og tey settu krøvini til starvið. Í hesum sambandi verður sent tygum niðanfyri standandi skjøl:

– Bræv frá Magistarafelagnum til Mentamálaráðið, dagfest 24. apríl 2002
– Teldupostur frá Magistarafelagnum til Mentamálaráðið, dagfest 7. mai 2002
– Frásøgn frá fundi millum Magistarafelagið og Mentamálaráðið 8. mai 2002 (persónlig viðurskifti um annan persón eru strikaði undir „Ad. 2. Ymiskt")
– Bræv frá Magistarafelagnum til Mentamálaráðið, dagfest 21. mai 2002
– Bræv frá Mentamálaráðnum til Magistarafelagið, dagfest 18. juli 2002
– Bræv frá Mentamálaráðnum til Magistarafelagið, dagfest 24. september 2003
– Bræv frá Magistarafelagnum til Mentamálaráðið, dagfest 27. september 2003
– Frásøgn frá fundi millum Mentamálaráðið og Magistarafelagið 3. oktober 2003 (persónlig viðurskifti um aðrar persónar enn tygum eru strikaði yvir við svørtum)."

Við skrivi, dagfest 31. januar 2005, sendi umboðsmaðurin seinastu viðmerkingarnar hjá Mentamálaráðnum til klagaran til kunningar. Samstundis boðaði umboðsmaðurin pørtunum frá, at hann helt fram við endaligu viðgerð síni av málinum.

## Niðurstøða

*Upprunaliga klagan snýr seg um starvssetanina hjá klagaranum, herundir tíðina at lata henni setanarbræv, og eina umbøn um skjalainnlit. Í sambandi við partshoyringina hevur klagarin eisini klagað um lønar-*

*flokkingina. Hesin spurningur, ið umframt Mentamálaráðnum eisini viðvíkur Fíggjarmálaráðnum, er enn ikki lýstur til fulnar, og fari eg tí í einum øðrum áliti at viðgera henda spurning, tá hann er búgvin, og í tí sambandi eisini at viðgera spurningin um tíðina at skriva setanarbræv.*

*Hetta álitið viðger tí bert starvssetanina og umbønina um skjalainnlit.*

*A førir í høvuðsheitum fram, at avgerðin hjá Mentamálaráðnum, um at krevja akademiska útbúgving til starvið innan evning og handarbeiði á Føroya Læraraskúla, byggir á skeiva tulking av galdandi lóggávu, og at avgerðin ikki er saklig.*

*Mentamálaráðið hevur ført fram, at avgerðin er saklig, byggir á galdandi lóggávu, sáttmálan millum Fíggjarmálaráðið og Magistarafelag Føroya og harumframt er í tráð við starvslýsingina. Eisini hevur ráðið ført fram, at avgerðin er í tráð við siðvenju hjá ráðnum.*

*Í løgtingslóg nr. 69 frá 28. mai 1980 um læraraútbúgvingar við seinni broytingum stendur m.a.:*

*„§ 1. Útbúgvingin hevur til endamáls at útbúgva lærarar til fólkaskúlan. Útbúgvingin miðar eisini ímóti at leggja støði undir undirvísing innan aðrar skúlaformar.*

*Stk. 2. Útbúgvingin skal geva tann fakliga og námsfrøðiliga kunnleika og ta praktisku skúling, ið er neyðug fyri at kunna leggja til rættis, fremja og meta um undirvísingina og laga hesa eftir skiftandi fortreytum í skúlanum og hjá næmingunum.*

*Stk. 3. Útbúgvingin skal fremja ta persónligu menningina hjá teimum lesandi at arbeiða við evninum við samarbeiði og við medábyrgd fyri útbúgving teirra.*

*Stk. 4. Útbúgvingin skal vekja áhuga fyri námsfrøðiligum menningararbeiði og leggja støði undir fatanina av, hvussu lærarayrkið og virki skúlans í samfelagnum hongur saman.*

*Stk. 5. Útbúgvingin skal venja tey lesandi til at samarbeiða við foreldur, starvsfelagar og onnur, ið hava ábyrgdina av uppaling og útbúgving næminganna.*

…

***§ 16.** Sum treyt fyri setan í fast starv sum læraraskúlaadjunktur, -lektorur ella -rektari er, at viðkomandi, umframt at hava tann neyðuga kunnleikan og námsfrøðiligu útbúgvingina, skal hava staðið eina roynd í námsfrøði og undirvísingarfimi. Landsstýrismaðurin ásetur nærri reglur um hesa roynd.“*

*Í lógaruppskotinum (løgtingsmál 69/1979) eru hesar viðmerkingar til §§ 1 og 16 í lóg um læraraútbúgvingar:*

> *„Til § 1.*
>
> *Til orðingina av endamálsreglunum eru brúktar reglurnar í teimum galdandi føroysku, donsku, íslendsku og norsku læraraútbúgvingunum.*
>
> *Í 1. stk. eru nýtslumøguleikarnir av útbúgvingini øktir, við tað at reglurnar fevna um aðrar skúlaformar, meðan tær galdandi reglur bæði í Føroyum og Danmark v.m. bert fevna um kvøld- og ungdómsskúla.*
>
> *…*
>
> *Til § 16.*
>
> *Reglurnar samsvara við § 18, 1. stk. í 1962-lógini.“*

*§ 18, stk. 1 í 1962-lógini (lov nr. 36 af 7. februar 1962 om læreruddannelse på Færøerne) var soljóðandi:*

> *„For at opnå fast ansættelse som seminarierektor eller lærer ved Færøernes seminarium skal den pågældende foruden at have den iøvrigt fornødne kundskabsmæssige og pædagogiske uddannelse have bestået en prøve i pædagogik og undervisningsfærdighed, ved hvilken han kan godtgøre, at han har øvelse i undervisning såvel af voksne som af børn. De nærmere regler for denne prøve fastsættes af undervisningsministeren i samråd med Færøernes skoledirektion.“*

*Sum tað framgongur av § 16 í løgtingslóg nr. 69 frá 28. mai 1980 um læraraútbúgving, við seinni broytingum, er tað ikki eitt lógarkrav, at lærarar á Føroya Læraskúla skulu hava útbúgving frá góðkendum hægri lærustovni. Øðrvísi er við studentaskúlalærarum, har tað er eitt krav, at teir hava akademiska útbúgving. Eg skal í hesum sambandi vísa til § 13, stk. 2, 1. pkt. í løgtingslóg nr. 106 frá 29. juni 1995 um studentaskúlar v.m. við seinni broytingum, ið er soljóðandi:*

> *„Setan sum adjunktur, lektari ella rektari við studentaskúla er treytað av, at viðkomandi innan lærugreinarøðina í studentaskúlanum hevur lokið kandidatprógv ella magistarakonferens á einum universiteti ella universitetssentri.“*

*Tað er sostatt ikki sambært lógini um læraraútbúgving eitt treytaleyst krav, at lærarar við Føroya Læraraskúla skulu hava útbúgving frá hægri lærustovni.*

*Tað er heldur ikki grundarlag fyri at avmarka hugtøkini „adjunktur“ og „lektari“ til lærarar, sum hava nomið sær akademiska útbúgving frá hægri lærustovni.*

*Móðurmálsorðabókin hevur hesar lýsingar av nevndu hugtøkunum:*

*„**adjunktur**- lærari á starvsstigi undir lektara (á hægri skúla)*

***lektari**- lærari á starvsstigi oman fyri adjunkti (á hægri skúla)“*

Í Nudansk ordbog, 13. útgáva eru hugtøkini lýst soleiðis:

„***adjunkt***- fast ansat lærer ved gymnasieskole eller seminarium (i lavere lønklasse end lektor).

***lektor***- lærer ved en højere læreanstalt;- betegnelse for højest lønnede lærergruppe ved gymaniseskoler og seminarier.“

*Hugtøkini adjunktur og lektari eru sostatt starvsheiti serliga við atliti til lønarviðurskifti hjá viðkomandi og bera í sjálvum sær ikki nakað krav um ávísa útbúgving.*

*Í sáttmálanum millum Fíggjarmálastýrið og Magistarafelag Føroya stendur m.a.:*

*„§ 1. Øki*

*Sáttmálin er fyri undirvísingar- og granskingarstørv, har tað er ein fyritreyt fyri setan, at tann setti hevur akademiska útbúgving, fyri fyrisitingarlig størv, har tað er ein fyritreyt, at tann setti hevur magistara útbúgving og fyri lærarar í føstum starvi á Føroya Læraraskúla.*

…

*§ 27. Tímalærarar á Føroya Læraraskúla*

*Tímalærari A er lærari, sum lýkur útbúgvingarkrøvini til at verða settur í fast starv. Hann hevur vanliga akademiska útbúgving…*

*Stk. 2. Tímalærari B er lærari, sum ikki lýkur krøvini fyri at verða settur í fast starv…“*

*§ 1 í sáttmálanum setir upp teir tríggjar bólkarnar, ið sáttmálin fevnir um, nevniliga: fyri undirvísingar- og granskingarstørv, fyri fyrisitingarlig størv og fyri lærarar í føstum starvi á Føroya Læraraskúla. Tað er ein fyritreyt fyri teir báðar fyrru bólkarnar, at viðkomandi starvsfólk hava akademiska útbúgving, men eingin treyt verður sett fyri føstum lærarastørvum á Føroya Læraraskúla fyri at koma undir sáttmálan.*

*Í § 27 í sáttmálanum stendur, at ein tímalærari <u>vanliga</u> hevur akademiska útbúgving (mín undirstriking). Hesa orðing tulki eg sum eina*

*staðfesting av, at tímalærarar á Føroya Læraraskúla vanliga hava akademiska útbúgving, men eg tulki ikki hetta sum nakað krav. Sáttmálin viðvíkur fyrst og fremst lønar- og setanarviðurskiftunum hjá teimum, sum eru ella verða fevnd av honum. Harafturímóti er tað upp til viðkomandi setanarmyndugleika innan fyri karmar lógarinnar at áseta førleikakrøvini til umsøkjarar til leys størv.*

*Tað er sostatt heldur ikki í sáttmálanum millum Fíggjarmálaráðið og Magistarafelag Føroya grundarlag fyri at krevja útbúgving frá hægri lærustovni fyri at verða settur í fast starv sum lærari á Føroya Læraraskúla.*

*Mentamálaráðið førir fram, at burtursæð frá einum heilt serstøkum fyribrigdi við einum praktikkleiðara, ið var leiðari fyri praktikkina innan pedagogútbúgvingina, so eru allir lærarar, ið settir eru í fast starv sambært umsókn síðan 1. januar 1998, persónar við útbúgving frá hægri lærustovni. Eg meti ikki, at talan er um so drúgva og reglufasta siðvenju, at hon kann skúgva galdandi lógarásetingar í løgtingslóg um læraraútbúgvingar til viks.*

*Mín niðurstøða viðvíkjandi útbúgvingarkravinum er sostatt, at tað hvørki í lóggávu, sáttmála ella siðvenju er grundarlag fyri treytaleyst at krevja, at viðkomandi hevur lokið útbúgving á hægri lærustovni, fyri at kunna verða settur í fast starv sum lærari á Føroya Læraraskúla.*

*Annað er sjálvandi, at setanarmyndugleikin eigur at seta best skikkaða umsøkjara í starv. Hetta er ein fyrisitingarlig meginregla, sum eisini er staðfest í setanarpolitikki landsins, har tað m.a. stendur:*

> *„Endamálið er at tryggja, at stovnurin setir umsøkjara, ið, úr einum heildarsjónarmiði, er best egnaður til starvið. „*

*Eg havi tí einki at siga til, at roynt verður, eins og tá talan er um studentaskúlarnar, at fáa lærarar til Føroya Læraraskúla við akademiskari útbúgving, um ein slík útbúgving finst viðvíkjandi teimum lærugreinum, læraraskúlalærarin skal undirvísa í. Hetta er júst trupulleikin viðvíkjandi hesi lærarasetan.*

*Tað má leggjast til grund, at tað viðvíkjandi evning og handarbeiði ikki finst nøkur akademisk útbúgving í hesum lærugreinum í danska ríkinum og møguliga heldur ikki í hinum norðanlondunum. Mentamálaráðið hevur í hvussu er ikki ávíst, at ein slík útbúgving finst. Kravið um, at umsøkjarin skal hava staðið útbúgving frá hægri lærustovni fyri at kunna verða sett í fast starv sum lærari í evning og handarbeiði, er tí*

*bæði ósakligt og meiningsleyst. Sambært upplýsingunum, sum Føroya Læraraskúli er komin fram til, verður slíkt krav heldur ikki sett, hvørki í Danmark, Noregi ella Svøríki.*

*A hevur útbúgving sum klæðisformgevi frá „Designskolen Kolding". Hendan útbúgving skuldi, út frá einum heildarsjónarmiði, verið væl egnað til starvið sum evnis- og handarbeiðslærari á Føroya Læraraskúla.*

*Mentamálaráðið góðtekur tó ikki hesa útbúgving sum eina hægri góðkenda útbúgving. Ráðið grundar hesa avgerð á skriv, dagfest 25. september 2002, frá danska Mentamálaráðnum, har sagt verður, at „Designskolen Kolding" er ein framhaldsútbúgving, men ikki ein útbúgving frá hægri lærustovni. Út frá teimum skjølum, ið eru í málinum, sær tað tó ikki út til, at Mentamálaráðið í síni málsviðgerð tekur hædd fyri, at danska Mentamálaráðið í sama skrivi sigur: „Der er ingen uddannelse på et højere niveau indenfor design-området i Danmark".*

*Eftir mínari meting, átti Mentamálaráðið at tikið hædd fyri, at útbúgvingin hjá A er tann hægsta útbúgvingin á økinum í Danmark.*

*Í staðin krevur Mentamálaráðið, at A skal taka eina hægri góðkenda útbúgving. Hóast hon longu 3. desember 2002 hevur spurt ráðið, hvørja útbúgving hon skuldi taka aftrat síni egnu, fær hon ikki klárt svar fyrr enn 17. november 2003. Hetta er eisini í sjálvum sær átaluvert. Ráðið vísir tá á ávísar hægri útbúgvingar, sum A kann taka fyri at uppfylla krøvini hjá Mentamálaráðnum og fáa eitt fast starv. Ongar av hesum útbúgvingum tykjast at kunna menna førleikan hjá A innan evning og handarbeiði, sum er hennara fak á Føroya Læraraskúla.*

*Umframt omanfyrinevndu grundgevingar, er grundgevingin hjá Mentamálaráðnum fyri at krevja akademiska útbúgving, at ráðið vil fáa Føroya Læraraskúla upp á eitt hægri fakligt støði. Ráðið hevur í hesum sambandi ført fram, at allar læraraútbúgvingar í Norðanlondum í hesum árum eru vorðnar uppraðfestar ella eru í ferð við at verða uppraðfestar til BA-støði ella hægri akademiskt støði. Hetta er helst orsøkin til, at Mentamálaráðið av sínum eintingum hevur hert útbúgvingarkrøvini. Hertil er at siga, at um útbúgvingarkrøvini skulu herðast á hendan hátt, kann tað bert gerast við løgtingslóg. Hetta kann Mentamálaráðið tí ikki gera av sínum eintingum.*

*Føroya Lærarskúli, ið má haldast at vera sakkønur viðvíkjandi setan av lærarum á skúlanum, gjørdi í skrivi, dagfest 11. juli 2002, sum eisini*

*er endurgivið frammanfyri, hetta tilmæli viðvíkjandi setan av lærara í evning og handarbeiði:*

> „Grundgevingin fyri at innstilla A sum nr. 1 er, at hon er liðug við hægri útbúgving, og at útbúgving hennara fevnir um tættir innan bæði handarbeiði og tilevning. Og tað er júst henda tørv Føroya Læraraskúli hevur.“

*Eftir mínum tykki átti Mentamálaráðið at lagt sera stóran dent á tilmælið frá Føroya Læraraskúla.*

*Avgerðin hjá Mentamálaráðnum um ikki at seta A í fast starv sum lærari í evning og handarbeiði byggir eftir mínari meting á ósaklig og óviðkomandi atlit, og fari eg tí í hesum sambandi at geva Mentamálaráðnum eina álvarsliga átalu. Samstundis skal eg mæla ráðnum til at taka málið til nýggja viðgerð viðvíkjandi spurninginum um setan í fast starv.*

*Eg fari at biðja Mentamálaráðið um at lata meg frætta, hvat víðari hendir í málinum.*

*Viðvíkjandi umbønini um skjalainnlit er at siga, at I vegna A tann 11. februar 2004 sendi Mentamálaráðnum umbøn um skjalainnlit. Mentamálaráðið móttók umbønina tann 12. februar 2004. Tann 18. februar 2004 sendi Mentamálaráðið teldupost til I, har sagt varð, at umsókn um skjalainnlit nú var komin undan kavi, og at hon varð avgreidd so skjótt sum gjørligt. Tann 19. februar 2004 sendi Mentamálaráðið I ein lista yvir øll skjøl í málinum við áheitan um at boða frá, hvørji skjøl áhugi var fyri. Tann 26. februar 2004 sendi I teldupost til Mentamálaráðið har boðað varð frá, at A ynskti innlit í øll skjøl í málinum. Mentamálaráðið sigur seg ikki hava móttikið hendan teldupostin. Tann 11. mars 2004 sendi I nýggja umbøn um skjalainnlit til Mentamálaráðið. Tann 25. mai 2004 svaraði Mentamálaráðið hesi umbøn og sendi I skjølini í málinum.*

*Sambært § 9 í fyrisitingarlógini hevði klagarin rætt til skjalainnlit í sítt mál í Mentamálaráðnum. Ein áheitan um skjalainnlit skuldi avgreiðast eftir § 16 í fyrisitingarlógini. § 16, stk. 2 í lógini er soljóðandi:*

> *„Stk. 2. Myndugleikin ger sum skjótast av, um ein áheitan kann verða gingin á møti. Er áheitanin ikki gingin á møti ella noktað innan 10 dagar aftaná, at myndugleikin hevur móttikið áheitanina, skal hesin geva partinum boð um orsøkina til hetta, og um nær avgerðin væntandi verður til skjals.“*

*Mentamálaráðið sigur í partshoyringini, at ráðið var av teirri fatan, at innlitsumbønin fór at verða slept, tá avtala var gjørd, m.a. tí flestu skjølini í málinum, ið ikki vóru innanhýsis notat, hevði A fingið.*

*Eg kann ikki góðtaka hesa grundgeving. Tá ið ein myndugleiki fær eina umbøn um innlit, skal myndugleikin avgreiða málið skjótast gjørligt. Er myndugleikin í iva, um, umbønin um skjalainnlit framvegis stendur við, eigur myndugleikin at kanna hetta.*

*Tað er atfinningarsamt, at Mentamálaráðið ikki gav A skjalainnlit fyrr enn nærum tveir og ein hálvan mánaða eftir, at advokatur hennara í aðru atløgu hevði biðið um skjalainnlit hennara vegna, og eg fari tí eisini at geva Mentamálaráðnum eina átalu fyri hetta.*

*Eg skal annars gera vart við, at einki er ásett í lóggávuni um, hvør er setanarmyndugleiki, tá ið talan er um setan í starv á Føroya Lærara-skúla. Mentamálaráðið hevur upplýst, at ráðið arbeiðir við at gera nýggja lóg um læraraútbúgvingar, og at ætlanin er at áseta reglur um setanarmyndugleika í nýggju lógini. Eg geri tí ikki meira við henda spurning.*

*Burtursæð frá framman fyri givnu átalum og áheitanini um at lata meg frætta, hvat meira hendir við setanarmálinum, geri eg ikki meira við málið í løtuni.*

*Við tað at eg haldi, at talan er um álvarslig mistøk í sambandi við málsviðgerðina av hesum setanarmáli, havi eg samsvarandi ásetingini í § 10, stk. 1 í umboðsmanslógini sent formansskapinum í Løgtinginum, løgmanni og landsstýrismanninum í mentamálum avrit av hesum álitinum.*

Við skrivi, dagfest 19. apríl 2005, hevur Mentamálaráðið kunnað umboðsmannin um, at ráðið tekur niðurstøðuna hjá umboðsmanninum til eftirtektar, og hevur gjørt av at fylgja tilmælinum frá setanarnevndini á Føroya Lærarskúla um at seta klagaran í fast starv sum lærari í evning og handarbeiði frá 1. aug. 2002 at rokna.

## 28.3. Starvssetan av leiðara fyri Frítíðarskúlan á Tvøroyri.

Umboðsmaðurin hevur viðgjørt eina klagu um handfaringina hjá Tvøroyrar kommunu og Almanna- og heilsumálaráðnum av málinum um setan av leiðara fyri Frítíðarskúlan á Tvøroyri.

Umboðsmaðurin var samdur við Almanna- og heilsumálaráðnum í, at tað sambært dagstovnalógini er eitt krav fyri at verða settur í starv sum leiðari í einum frítíðarskúla, at viðkomandi er útbúgvin pedagogur. Umboðsmaðurin kom til ta niðurstøðu, at Tvøroyrar kommuna í sambandi við hesa setanina hevur framt álvarslig brot á dagstovnalógina og grundleggjandi reglur í fyrisitingarlógini. Hann helt málsviðgerðina vera so óforsvarliga, at hann kundi ikki annað enn geva kommununi eina sera álvarsliga átalu fyri handfaringina av málinum. Umboðsmaðurin var ikki samdur við Almanna- og heilsumálaráðnum, tá ráðið segði seg ivast í heimildum sínum at kanna hetta málið. Hann helt ikki nýggju avgerðina hjá Tvøroyrar kommunu frá 14. sept. 2004 vera annað enn eina roynd at umganga reglurnar í dagstovnalógini. Hesum átti Almanna- og heilsumálaráðið at havt fylgt upp. Umboðsmaðurin gav tí eisini Almanna- og heilsumálaráðnum eina álvarsliga átalu fyri handfaring sína av hesum málinum. Hann mælti ráðnum til at taka neyðug stig til at fáa viðurskiftini í rættlag sum skjótast og bað ráðið lata seg frætta, hvørja niðurstøðu ráðið kom til. Umboðsmaðurin helt so álvarslig mistøk vera framd í hesum málinum, at hann hevur kunnað formansskapin í Løgtinginum, løgmann og landsstýrismannin í almannamálum um málið. (J. nr. 200400069)

### Klagan

Við skrivi, dagfest 17. sept. 2004, hevur Føroya Pedagogfelag latið umboðsmanninum soljóðandi klagu:

> **„KÆRA – um handfaringina hjá B, landsstýrismanni og Almanna- og Heilsumálaráðnum umframt Tvøroyrar Kommunu av málinum um setan av leiðara fyri frítíðarskúlanum á Tvøroyri.**
>
> Hjálagt senda vit „niðurstøðu“ frá fundi 12. september millum umboð fyri Tvøroyrar býráð og umboð fyri Almanna og Heilsumálaráðið umframt avrit av brævaskifti okkara við ráðið.

Vit meta ikki at handfaringin av málinum er í tráð við galdandi fyrisitingarreglur og vilja tí heita á Umboðsmannin, um at taka upp hetta mál.

Serliga meta vit tað vera burturvið, at landsstýrismaðurin og ráðið so eyðsýnt hevur gjørt avtalu við býráðið, har ráðið sum móttilsøgn fyri at býráðið skal átaka sær at halda galdandi lóggávu, gevur býráðnum tilsøgn um at taka stig til at broyta lógargreinina, sum býráðið hevur brotið og framhaldandi brýtur.

Vit skilja, at hvørki ráðið ella landsstýrismaðurin hava tikið stig til at steðga lógarbrotinum, nú persónur, sum ikki lýkur lógarkrøvini, heldur áfram sum settur leiðari fyri skúlan.

Vit meta tað heldur ikki er í tráð við galdandi reglur, at býráðið fyrst setir umsøkjara, sum ikki lýkur galdandi lógarkrøv og so heldur áfram við lógarbrotinum, aftaná at teir hava ásannað, at talan er um brot á galdandi lóg.

Umráðandi er, at Umboðsmaðurin krevur innlit í øll skjøl, sum hava við hetta mál at gera."

## Málsgongd

Sambært skjalatilfarinum hevur málsgongdin, ið hevur týdning fyri viðgerð mína av hesum málinum, verið hendan:

Við skrivi, dagfest 20. juni 2004, sendi A Tvøroyrar kommunu soljóðandi umsókn:

„Av tí at eg veit at leiðarin í Frítíðarskúlanum, hevur søkt um farloyvi, vil eg við hesum loyva mær at søkja leiðarastarvið, so leingi hon er í farloyvi.

Eg eri í starvi, sum pedagog í Frítíðarskúlanum. Tað havi eg veri í 3 av teimum 4 árunum, sum Frítíðarskúlin hevur veri í Trongisvági. Frítíðarskúlin er eitt starvspláss eg eri ógvuliga glað fyri at verða í, og av tí at eg kenni gongdina á stovninum, hevði eg fegin vilja roynt at røkt starvið sum leiðari.

Eg eri gift og eigi 3 børn, á ávikavist 10, 9 og 5 ár.

Eg eri útbúgvin pedagogur frá Esbjerg Seminarium, í juni 1999.

Av tí at eg átti mítt síðsta barn, meðan eg var í fer við at gerða útbúgvingina liðuga, og av tí at vit fluttu heim aftur til Føroyar, valdi eg at verða heimagangandi tað fyrstu tíðina. Eg byrjaði í Frítíðarskúlanum í august 2001, og havi verði har síðani.

Er nakað tit eru í iva um, eru tit vælkomin at seta tykkum í samband við meg.“

Tvøroyrar kommuna hevur 1. juli 2004 móttikið eitt viðmæli, dagfest sama dagin, og sum táverandi leiðarin á Frítíðarskúlanum, C, hevur skrivað um A. Viðmælið er soljóðandi:

**„VIÐMÆLI**
A, fødd…, hevur starvast sum pedagogur í Frítíðarskúlanum í Trongisvági í 3 ár.

A er fitt og fyrikomandi og ein dugnaligur pedagogur. Hetta hava bæði børn, starvsfólk og foreldur verið glað fyri.

Eg kann, út frá hesi 3 árini eg havi kent A, geva henni mítt besta viðmæli.

Frítíðarskúlin í Trongisvági

C, leiðari (sign.)“

Í fyrru helvt av juli mánaði stóð soljóðandi lýsing í bløðunum:

**„Pedagogur til frítíðarskúla**
Fyri leiðaran í farloyvi verður søkt eftir pedagogi til Frítíðarskúlan á Tvøroyri í eitt ár frá 15. august.

Umsóknir skulu vera Tvøroyrar býráð – sosialu nevnd – í hendi seinast 1. august.

Tvøroyrar Býráð“

Málið var viðgjørt á fundi í sosialu nevnd hjá Tvøroyrar kommunu 13. aug. 2004, kl. 14. Í gerðabókini, sum er undirskrivað av møttu limunum, stendur soleiðis um fundin:

„Fundur fríggjadagin, tann 13. august 2004 kl. 1400.
Allir limir møttir, tó møtti varamaðurin hjá D, E til fundin.
Skrivari borgarstjórin J.
Til viðgerðar:
Setan av leiðara í eitt ár frá 15. august 2004 til Frítíðarskúlan í Trongisvági, tí leiðarin C er farin í „orlov“ í eitt ár.
Tvær umsóknir komnar til starvið frá:
A, pedagogi, Trongisvágur, og frá F, lærara, Tórshavn.

G og H mæla til at seta F í starvið. E mælir til at seta A í starvið.
Bókin lisin Fundur lokin
G H E“

Málið er síðani viðgjørt á óalmennum býráðsfundi. Í gerðabókini, sum er undirskrivað av møttu limunum, stendur soleiðis um fundin:

Óalmennur býráðsfundur tann 13. august 2004 kl. 1415.
Allir limir møttir, uttan D hann var uttanlanda, við tað at I eisini var uttanlandað, var J skrivari ístaðin.
K var á telefonini undir allari viðgerðini.
Til viðgerðar:
Tilmælir frá sosialu nevnd, vegna leiðara til Frítíðarskúlan í eitt ár frá 15. august 2004.
G og H mæla til at seta F í starvið.
E mælir til at seta A í starvið.
Fyri tilmælinum hjá E atkvøddi E og K, ímóti atkvøddi G, H, L og J.
Fyri tilmælinum hjá G og H atkvøddi G, H, L, J og E, ímóti atkvøddi K.
Bókin lisin Fundur lokin
J G H
L K E“

Í skrivi, dagfest 13. aug. 2004, hevur Tvøroyrar kommuna boðað A frá, at annar umsøkjari er settur í starvið. Skrivið er soljóðandi:

„Viðv. starvinum sum leiðari hjá Frítíðarskúlanum í eitt ár frá 15. august 2004.
Tvøroyrar Býráð vil takka fyri umsókn tygara til starvið, men upplýsast kann at Tvøroyrar Býráð hevur samtykt at seta annan umsøkjara í starvið.

Grundgevingin fyri at tygum ikki hava fingið starvið er, at Tvøroyrar Býráð metir, at tann, ið er sett hevur drúgvari royndir við børnum í skúlaaldri og hevur relevanta útbúgving, sum í hesum føri mestsum kann líkastillast við tygara.“

Sama dag biður Tvøroyrar kommuna A átaka sær at røkja leiðarastarvið í nakrar dagar, til setti leiðarin kann taka við. Skrivið um hetta er soljóðandi:

„Við tað at hon sum er sett sum leiðari við Frítíðarskúlan er burturstødd, og ikki kann møta til arbeiðis fyrrenn tann 25. august 2004, vil Tvøroyrar Býráð heita á tygum um at arbeiða sum leiðari til 25. august 2004.“

Í skrivi, dagfest 17. juli 2004 (skal vera 17. aug.), hevur Føroya Pedagogfelag vent sær til Tvøroyrar kommunu um hetta málið. Skrivið er soljóðandi:

**„Viðv. setan av leiðara til Frítíðarskúlan á Tvøroyri.**

Limur okkara, A, sum er útbúgvin pedagogur og arbeiðir á frítíðarskúlanum hevur vent sær til felagið, tá hon hevur søkt leiðarastarvið á frítíðarskúlanum, men hevur fingið boð um at lærari er settur ístaðin.

Felagið ynskir skjótast tilber eina skrivliga grundgeving fyri hesi avgerð.

Felagið vil vísa á, at smb. Dagstovnalógina Gr.8 er greitt ásett, at leiðarin skal hava námsfrøðiliga útbúgving.

***Avrit av hesum skrivi er sent Almannaráðnum.“***

Við nýggjum skrivi, dagfest 19. juli 2004 (skal vera 19. aug.), hevur felagið aftur vent sær til kommununa. Skrivið er soljóðandi:

**„Viðv. setan av leiðara til Frítíðarskúlan á Tvøroyri.**

Vísandi til skriv okkara dagf. 17. aug. viðv. setanini av leiðara.

Okkum upplýst er ætlanin, at lærarin skal byrjað í starvinum 25. aug. 04

Felagið vil hervið boða frá, at um so verður, kemur felagið at niðurleggja arbeiði á stovninum.

Eisini vil felagið vísa á, at kommunan enntá í lýsingini í bløðunum søkti eftir pedagogi til starvið. – Annars er lýsingin heldur ikki í tráð við sáttmálaásetingina § 15, stk.2

***./. Hjálagt avrit av lýsingini.***

***Avrit av hesum skrivi er sent Almannaráðnum.“***

Við skrivi, dagfest 20. aug. 2004, hevur Tvøroyrar kommuna svarað Pedagogfelagnum soleiðis:

„Viðvíkjandi setan av leiðara í Frítíðarskúlanum á Tvøroyri.
Vísandi til brøv tykkara dagfest 17. juli og 19. juli 2004, eg rokni við, at dagfestingin skal vera 17. og 19. august 2004, skal verða sagt frá, at Tvøroyrar Býráð hvørki eftir lóg ella sáttmála hevur skyldu til at seta pedagog í starvið. At lýst varð eftir einum pedagogi, forpliktar heldur ikki býráðið at seta einasta umsøkjara við pedagogútbúgving í starvið, um tað vísir seg, at annar betri hóskandi umsøkjari er við námsfrøðiligari útbúgving.

Allir pedagogar hava havt høvi at søkja, tá lýst varð eftir pedagogi, og tí kundi man skilt tað, um tað t.d. Føroya Lærarafelagið, ið mótmælti.

Tvøroyrar Býráð skal við hesum siga frá, at um so verður, at pedagogurin á Frítíðarskúlanum á Tvøroyri rýmir úr arbeiðnum, verður viðkomandi koyrd úr starvið upp á standandi fót, líka mikið um hon rýmir eftir boðum frá tykkum ella ikki.

Avrit av hesum skrivi er sent Almannaráðnum og Føroya Lærarafelag.“

Við skrivi, dagfest 23. aug. 2004, sendi Almanna- og heilsumálaráðið Tvøroyrar kommunu soljóðandi svar uppá skrivið til Pedagogfelagið, dagfest 20. aug., ið varð sent ráðnum til kunningar:

**„Viðvíkjandi setan av leiðara av Frítíðarskúlanum á Tvøroyri**
Tvøroyrar kommuna hevur kunnað Almanna- og heilsumálaráðið um svar dagfest 20. august í ár til fyrispurning og fráboðan frá Føroya Pedagogfelag frá ávikavist 17. og 19. august 2004.

Í svarinum sigur kommunan seg hvørki eftir lóg ella sáttmála hava skyldu til at seta pedagog í starvið sum leiðari av Frítíðarskúlanum á Tvøroyri.

Svarið vísir, at kommunan, eftir øllum at døma, hevur misskilt galdandi lóggávu, tí § 8, stk. 1 í løgtingslóg um dagstovnar og dagrøkt ásetur greitt, at tann, sum settur verður sum leiðari, skal hava námsfrøðiliga útbúgving (tað merkir útbúgving sum pedagog). Hetta er eisini undirbygt í viðmerkingunum til lógaruppskotið. Í teimum førum, har ongin av umsøkjarunum hevur námsfrøðiliga útbúgving, kann kommunan í avmarkaða tíð seta annan í starv. Sum skilst hevur í hvussu er ein av umsøkjarunum námsfrøðiliga útbúgving.

Almanna- og heilsumálaráðið skal tí við hesum geva til kennar, hvat er galdandi lóggáva á hesum øki og heita á kommununa um beinanvegin at rætta tey mistøk, sum henda misskiljing hevur havt við sær.“

Í einari stuttari telefonsamrøðu 25. aug. 2004 hevur borgarstjórin í Tvøroyrar kommunu boðað deildarstjóranum í Almanna- og heilsumálaráðnum frá, at avgerðin hjá kommununi var endalig. Deildarstjórin hevur gjørt soljóðandi notat frá samrøðuni:

> „Eg havi í dag eina stutta samrøðu við J um setanina av einum leiðara í frítíðarskúlanum á Tvøroyri, ið ikki hevur námsfrøðiliga útbúgving (sí aðrastaðnis í málinum).
>
> Borgarstjórin segði, at avgerðin hjá kommununi var endalig, og at kommunan hevði sett ein advokat á málið.
>
> Eg segði honum, at um kommunan ikki broytti støðu í málinum, so kundi landsstýrismaðurin sambært § 10, stk. 3 í dagstovnalógini steðga virkseminum á stovninum, tí avgerðin hjá kommununi var eitt klárt brot á § 8, stk. 1 í dagstovnalógini.
>
> Hann endurtók at kommunan ikki broytti støðu í málinum, og at samskiftið millum Almanna- og heilsumálaráðið og kommununa um hetta málið skuldi fara gjøgnum sakføraran.
>
> Eg havi aftaná heitt á M, fulltrúa, um at gera eitt tilmæli til landsstýrismannin um hvussu farast skal fram í málinum.“

Í einum tilmæli frá fyrisitingini í Almanna- og heilsumálaráðnum til landsstýrismannin, dagfest 25. aug. 2004, stendur m.a. soleiðis:

> „Tilmæli:
> Vegna tess, at Tvøroyrar býráð ikki vil ganga áheitanini frá Almanna- og heilsumálaráðnum á møti, verður hervið mælt landsstýrismanninum til at taka síðsta møguleika í nýtslu, nevniliga sambært § 10, stk. 3 í dagstovnalógini at steðga virkseminum á Frítíðarskúlanum beinanvegin.

Tilmælið er góðkent av landsstýrismanninum 30. aug. 2004, tó við hesari hondskrivaðu viðmerking:

> *„Principielt samdur, men haldi tað verða best at fáa fund við advokatin hjá Tvør. býráð áðr. vit níta § 10.“*

Í teldubrævi, dagfest 30. aug. 2004, hevur Almanna- og heilsumálaráðið biðið N, advokat hjá Tvøroyrar kommunu, um ein fund um málið. Sama dagin svarar advokaturin ráðnum soleiðis:

„Eg eri í rættinum fyrrapartin týsdagin, so tað liggur tíverri ikki fyri.

Fundur við meg er eisini relativt óneyðugur. Eg havi greitt mínum klienti frá orðaljóðinum í lógini og eisini hvat stendur í viðmerkingunum til § 8 í lógini.

Tvøroyrar kommuna hevur valt at tvíhalda um ta tulking av § 8 í lógini, at „námsfrøðilig útbúgving“ ikki einans er tað sama sum pedagogútbúgving, men kann eisini vera t.d. læraraútbúgving.“

30. aug. 2004 sendi Pedagogfelagið Tvøroyrar kommunu soljóðandi skriv:

**„Viðv. setan av leiðara til Frítíðarskúlan á Tvøroyri.**

Sum fyrr fráboðað tær, er setanin av lærara, sum leiðara á Frítíðarskúlanum, greitt brot á Dagstovnalógina.

Felagið vil herviða siga frá, at um kommunan ikki setur leiðara í starv smb. lógarásetingina í Dagstovnalógini, fer felagið at kæra málið til løgtingsins umboðsmann og / ella við stevning at fáa staðfest at talan er um lógarbrot.“

3. sept. 2004 hevur Almanna- og heilsumálaráðið sent Tvøroyrar kommunu soljóðandi skriv:

**„Hoyringsskriv viðvíkjandi setan av leiðara á Frítíðarskúlanum á Tvøroyri**

Almanna- og heilsumálaráðið hevur áður kunnað Tvøroyrar Kommunu um, at kommunan hevur lógarásetta skyldu til at seta ein pedagog (námsfrøðing) sum leiðara á Frítíðarskúlanum á Tvøroyri.

Sambært § 3, stk. 1 í løgtingslóg nr. 67 frá 10. mai 2000 um dagstovnar og dagrøkt, verða frítíðarskúlar roknaðir sum dagstovnar sambært lógini. § 8, stk. 1 í somu lóg verður ásett førleikakrøvini hjá leiðaranum fyri dagstovnin:

*„Til tess at røkja tað dagliga arbeiðið, setir kommunan ein leiðara fyri dagstovnin ella dagrøktarskipanina við námsfrøðiligari útbúgving. Leiðari fyri sjálvsognarstovn verður settur av nevndini fyri stovnin. Starvið skal lýsast leyst alment.“*

Í viðmerkingunum til § 8, stk. 1 í somu lóg, verður lógarteksturin útgreinaður soleiðis:

*„Kravið, at leiðarin á stovninum ella dagrøktarleiðarin skal hava námsfrøðiliga útbúgving, t.v.s. vera pædagogur, er sett í lógina fyri at tryggja eitt fakligt støði á stovninum ella í dagrøktarskipanini.“*
Endamálið við kravinum í § 8 er, at lóggevarin hevur verið av tí áskoðan, at tað einans eru útbúnir pedagogar (námsfrøðingar), ið hava fakligan førleika til at tryggja tað fakliga støðið á stovninum, sum er ásett í endamálsorðingunum í lógarinnar § 2.

Advokatur kommununar, N, hevur í einum telduposti, dagfestur 30. august 2004, til O, deildarstjóra, vegna Tvøroyrar Kommunu boðað frá, at:
*„Tvøroyrar Kommuna hevur valt at tvíhalda um ta tulking av § 8 í lógini, at „námsfrøðilig útbúgving“ ikki einans er tað sama sum pedagogútbúgving, men kann eisini vera t.d. læraraútbúgving.“*
Hendan tulking er í beinleiðis andsøgn til ásetingarnar í omanfyristandandi lógargrein (§ 8, stk.1) og viðmerkingarnar til lógargreinina. Vísast kann annars til kunngerð nr. 13 frá 24. januar 1990 um námsfrøðiliga útbúgving, harav tað eisini greitt framgongur, at námsfrøðislig útbúgving er tað sama sum pedagogútbúgving. Tulkingin hjá Tvøroyrar Kommunu er sostatt eitt greitt brot á § 8 stk. 1, í løgtingslóg nr. 67 frá 10. mai 2000 um dagstovnar og dagrøkt, og harvið er starvssetanin av leiðaranum á Frítíðarskúlanum á Tvøroyri ólóglig.

Landsstýrismaðurin skal hervið gera Tvøroyrar Kommunu greitt, at hevur kommunan ikki í seinasta lagi **fríggjadagin tann 10. september 2004 kl. 12** skrivliga viðurkent, at kommunan hevur lógarásetta skyldu at seta ein pedagog (námsfrøðing) sum leiðara á Frítíðarskúlanum á Tvøroyri, og tikið ítøkilig stig til at seta ein pedagog (námsfrøðing) í starvið, verður virksemið á frítíðarskúlanum á Tvøroyri steðgað, sambært § 10, stk. 3 í løgtingslóg nr. 67 frá 10. mai 2000 um dagstovnar og dagrøkt.

Fyri at fáa eina loysn á málinum ynskir landsstýrismaðurin at hitta allar kommunustýrislimirnar á fundi í seinnu helvt av komandi viku. Vinarliga boða Almanna- og heilsumálaráðnum frá nær og hvar fundurin skal vera.“

Í einum teldubrævi til landsstýrismannin, dagfest 10. sept. 2004, hevur deildarstjórin í Almanna- og heilsumálaráðnum skrivað soleiðis:

„Eg havi avtalað við I, kommunuskrivara, at fundurin verður nú sunnudagin kl. 16 í hølunum hjá kommununi.

…

GG! Eg dugi ikki at síggja nakra aðra loysn enn at kommunan ógildar setanina, og setur ein pedagog ella søkir á nýggjum (um ongin kvalificerað umsókn er). Tað ber ikki til at seta læraran í eitt fyribilsstarv (t.d. eftir § 8, stk. 2, sum snýr seg um undantak „í heilt serligum føri"), tí ein pedagogur søkti eisini starvið.

Viðmerkingin til § 8 í lógaruppskotinum ljóðar soleiðis: „Kommunan kann í serligum førum gera undartak frá hesum kravi. Hetta kann t.d. vera neyðugt í teimum smáu kommununum, tá ið eingin við námsfrøðiligari útbúgving (tað stendur aðrastaðnis í viðmerkingunum at tað merkir pedagogur, O) søkir eitt leiðandi starv í einum dagstovni ella dagrøkt" – („frítíðarskúli" er eftir lógini ein dagstovnur, O)."

Almanna- og heilsumálaráðið hevur í telefaksi, dagfest 13. sept. 2004, sent Tvøroyrar kommunu soljóðandi skriv:

**„Niðurstøða frá fundi 12. september 2004 millum borgarstjóran, formannin og næstformannin í sosialu nevnd og landsstýrismannin í Almanna- og heilsumálum, B, um setan av leiðara til frítíðarskúla á Tvøroyri.**

Í samrøðu við undirritaða í morgun greiddi landsstýrismaðurin frá, at niðurstøðan á fundinum við Tvøroyrar Býráð var, at:

1) Tvøroyrar Býráð beinanvegin tekur neyðug stig fyri at fáa viðurskiftini í rættlag, harí at taka starvssetanina aftur.
2) Landsstýrismaðurin tekur stig til at broyta § 8 í dagstovnalógini, sum m.a, ásetur førleikakrøvini hjá stovnsleiðarum.

Eg skal við hesum heita á borgarstjóran um at vátta niðurstøðuna frá fundinum, og faksa váttanina til Almanna- og heilsumálaráðið skjótast gjørligt."

Málið er aftur viðgjørt í sosialu nevnd hjá Tvøroyrar kommunu 14. sept. 2004. Í Gerðabókini, sum er undirskrivað av øllum limunum stendur soleiðis:

„Fundur týsdagin hin 14. september 2004.

**<u>Til viðgerðar:</u>**

**<u>Leiðarin av frítíðarskúlanum:</u>**

1. Ógilda setanina frá august mánaða og lýsa starvið av nýggjum.

2. Til nýggjur leiðari er settur verður konstitueraður leiðari settur.

Til 1: Einmælt samtykt

Til 2: G og H mæla til at seta F sum konstitueraðan leiðara. D tekur støðu á býráðsfundinum.

Bókin lisin fundur lokin

G H D“

Málið er eisini viðgjørt á býráðsfundi hendan sama dagin. Í gerðabókini, sum er undirskrivað av møttu limunum, stendur soleiðis:

„Óalmennur fundur hin 14. september 2004. Allir limir møttir uttan E, sum er burturstaddur.

**Til viðgerðar:**

**Tilmæli frá socialu nevnd um leiðara av frítíðarskúlanum:**

1. Mælt verður at ógilda setanina frá 13. august í ár um setan av leiðara og lýsa av nýggjum.

Einmælt samtykt.

2. G og H mæla til at seta F sum konstitueraðan leiðara til nýggjur leiðari er settur.

D tekur støðu á býráðsfundinum.

Uppskot frá D:

Ikki neyðugt at hava leiðara í tí tíðarskeiðnum meðan vanligt umsóknarumfar fer framm, vísandi til, at býráðið hevur samtykt at lýsa eftir nýggjum leiðara.

Fyri uppskotinum 2 atkv. (D og K)

Ímóti 4 atkvøður.

Fyri uppskotinum frá G og H 4 atkv. teir sjálvir og J og L.

Ímóti 2 atkv. (D og K)

Bókin lisin fundur lokin

J L H

K G D“

14. sept. 2004 hevur Tvøroyrar kommuna sent Almanna- og heilsumálaráðnum soljóðandi telefaks:

„Býráðið hevur á fundi í dag ógilda setanina av leiðara í frítíðarskúlanum og samtykt at lýsa av nýggjum.

Til nýggjur leiðari er settur, er setti leiðarin, F, konstitueraður sum leiðari.“

15. sept. 2004 sendi Almanna- og heilsumálaráðið Tvøroyrar kommunu soljóðandi telefaks:

**„Viðmerkingar:**

1) Hjálagt skriv, ið skal svarast og handast Almanna- og heilsumálaráðnum í seinasta lagi fríggjadagin 17. september.
2) Avrit av skrivi frá Føroya Pedagogfelag d.d. verður sent kommununi til kunningar.
3) Vísandi til samrøðu við kommunuskrivara, I, skal eg heita á borgarstjóra J um at vátta fundarfrásøgnina frá fundi sunnudagin 12. september millum landsstýrismann, B, og borgarstjóra, J, ið var faksað Tvøroyrar kommunu 13. september.“

Hjálagda skrivið (nevnt undir pkt. 1 omanfyri) er somuleiðis dagfest 15. september og er soljóðandi:

**„Viðvíkjandi leiðarastarvinum á Frítíðarskúlanum á Tvøroyri.**
Almanna- og heilsumálaráðið takkar fyri fráboðan í telefaksi 14. september 2004 kl. 17.48 um, at Tvøroyar Býráð hevur ógildað setanina av leiðara á Frítíðarskúlanum.

Í telefaksinum verður eisini boðað frá, at sami persónur verður fyribilssettur sum leiðari, til nýggjur leiðari er settur.

Í Dagstovnalógini § 8 stk. 2. stendur, at í serligum førum kann í tíðaravmarkað skeið víkjast frá kravinum um námsfrøðiliga útbúgving. Sambært viðmerkingunum til § 8 í dagstovnalógini kann hetta bert gerast, um ongin umsøkjari við námsfrøðiligari útbúgving er tøkur.

Av tí at Almanna- og heilsumálaráðíð er vitandi um, at námsfrøðingur (pedagogur) søkti starvið sum leiðari á Frítíðarskúlanum, má sigast at undantakið í § 8 stk. 2 ikki kann nýtast, uttan so at ongin námsfrøðingur er tøkur nú.

Almanna- og heilsumálaráðið heitir tí við hesum á Tvøroyar Býráð um at grundgeva fyri:

1) ein námsfrøðingur ikki varð settur í starv sum leiðari fyri frítíðarskúlan, hóast ein námsfrøðingur søkti.

2) at ein umsøkjari uttan námsfrøðisliga útbúgving nú er fyrbilssettur leiðari av frítíðarskúlanum.

Svarið skal vera Almanna- og heilsumálaráðnum í hendi í seinasta lagið fríggjadagin tann 17. september 2004 kl. 10.00."

Við telefaksi, dagfest 16. sept. 2004, svarar Tvøroyrar kommuna Almanna- og heilsumálaráðnum soleiðis:

**„Tykkara j. nr. …um leiðarastarvi á frítíðarskúlanum á Tvøroyri:**

Ráðið spyr um 1: hví ein námsfrøðingur ikki varð settur í starv sum leiðari fyri frítíðarskúlan, hóast ein námsfrøðingur søkti?

Ein meiriluti í bæði sociaiu nevnd og í býráðnum mettu ikki námsfrøðingin skikkaðan til starvið, hetta útfrá lokalum kennskapi til umsøkjaran.

Spurningur 2 er: Hví ein umsøkjari uttan námsfrøðiliga útbúgving nú er fyribils settur leiðari av frítíðarskúlanum?

Tað vóru bert 2 umsóknir til starvið, nevnliga umrøddi námsfrøðingur og so lærarin.

Tá námsfrøðingurin ikki varð mettur skikkaður til starvið fall tað einum meiriluta í socialu nevnd og býráðnum náttúrligt at seta læraran í hetta fyribils starv, tí hesin meiriluti metir læraran sera skikkaðan at røkja slíkt starv og skuldi hetta ikki stoytt nakran tá hetta er fyribils til nýggjur leiðari er settur."

Við telefaksi, dagfest 17. sept. 2004, sendi Almanna- og heilsumálaráðið vegna landsstýrismannin Tvøroyrar kommunu soljóðandi skriv:

**„Viðv. setan av leiðara av frítíðarskúla á Tvøroyri**

Eftir áheitan frá Almanna- og heilsumálaráðnum hevur borgarstjórin fyri Tvøroyrar kommunu í telefaksi móttikið d.d. kl. 11.06 svarað Almanna- og heilsumálaráðnum uppá fyrispurning um:

1) hví ein námsfrøðingur ikki varð settur í starv sum leiðari fyri frítíð arskúlan, hóast ein námsfrøðingur søkti, og
2) hví ein umsøkjari uttan námsfrøðiliga útbúgving nú er fyribilssettur leiðari av frítíðarskúlanum.

Sum grundgeving skrivar borgarstjórin, at ein meiriluti í býráðnum metti ikki námsfrøðingin skikkaðan til starvið, hetta út frá lokalum kunnleika til umsøkjaran.

Tað vóru bert 2 umsóknir til starvið. Tá námsfrøðingurin ikki varð mettur skikkaður til starvið fall tað einum meiriluta í býráðmun natúrligt at seta læraran í hetta fyribils starv, tí hesin meiriluti metir læraran sera skikkaðan at røkja slíkt starv og skuldi hetta ikki stoytt nakran, tá hetta er fyribils til nýggjur leiðari er settur.

Landsstýrismaðurin metir ikki at grundgevingin er nøktandi, og heitir tí á Tvøroyrar kommunu um at útgreina grundgevingina skrivliga fyri landsstýrismanninum í seinasta lagi mánamorgunin 20. september 04, sum áður fráboðað munnliga í dag kl. 17.

Landsstýrismaðurin vónar at hitta umboð fyri býráðið á fundi í Almanna- og heilsumálaráðnum, mánamorgunin kl. 9.30, har høvi verður at geva landsstýrismanninum eina nøktandi frágreiðing.

Fær hann ikki eitt nøktandi svar uppá spurningarnar, ið eru endurtiknir fyrst í hesum skrivi, fer landsstýrismaðurin at taka neyðug stig sambært § 10, stk. 3 í løgtingslóg nr. 67 frá 10. mai 2000 um dagstovnar og dagrøkt."

Við telefaksi sent Almanna- og heilsumálaráðnum 17. sept. 2004 hevur borgarstjórin á Tvøroyri váttað niðurstøðuna frá fundinum 12. sept. (endurgivin frammanfyri), ið varð send kommununi við telefaksi 13. sept. 2004.

Í einum bornum brævi, dagfest 20. sept. 2004, hevur N, adv. vegna kommununa svarað Almanna- og heilsumálaráðnum soleiðis:

**„Viðv. leiðsluviðurskiftunum á frítíðarskúlanum á Tvøroyri.**
Tvøroyrar kommuna hevur biðið meg verið sær til hjálpar í málinum um setan av leiðara á frítíðarskúlanum.

Eg havi skilt faktum í málinum soleiðis:

Tvøroyrar kommuna lýsir eftir leiðara fyri frítíðarskúlan í eitt ár vegna farloyvi hjá tí setta leiðaranum. Tvær umsóknir koma – onnur frá einum læraralærdum persóni og hin frá einum við pedagogútbúgving. Kommunan samtykkir at seta tann læraralærda í avloysarastarvið.

Almanna- og Heilsumálastýrið ger hereftir vart við, at tað tulkar lógina um dagstovnar og dagrøkt soleiðis, at hugtakið „námsfrøðilig útbúgv-

ing" í lógini skal skiljast so smalt, at talan bert er um eina ávísa námsfrøðiliga / pedagogiska útbúgving, og tað er tann útbúgvingin, sum teir pedagogar fáa, sum traditionelt verða settir á ansingarstovnum til børn frá 0 til 7 ár.

Kommunan svarar, at hon tulkar lógina soleiðis, at „námsfrøðilig útbúgving" eisini kann vera lærarútbúgving, serliga tá hugsað verður um, at talan er um børn í skúlaaldri. Eisini vísir kommunan á, at persónurin við lærarautbúgving konkret verður mettur at vera betri egnaður til starvið.

Hereftir er líkt til, at landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum setir kommununi knívin á barkan og hóttir við at steingja skúlan, um kommunan ikki tekur undir við tulkingini hjá almanna- og heilsumálastýrinum av hugtakinum „námsfrøðilig útbúgving".

Eg havi fingið avrit av ymsum skjølum í málinum, herundir eina av aðalstjóranum og borgarstjóranum váttaða fundarfrásøgn frá fundi 12.09.2004 millum landsstýrismannin og kommununa, har niðurstøðan er

- at Tvøroyrar kommuna beinanvegin tekur neyðug stig til at fáa viðurskiftini í rættlag, herundir at taka starvssetanina aftur

og

- at landsstýrismaðurin tekur stig til at broyta § 8 í dagstovnalógini, sum m.a. ásetur førleikakrøvini hjá dagstovnaleiðarum

Síðani hevur landsstýrismaðurin síðani í fjølmiðlunum sagt, at øll lógin skal endurskoðast og møguliga eisini § 8, men at hann ikki hevur givið Tvøroyrar kommunu nakað lyfti um at eftir lógarbroytingina kunnu eisini lærarar setast sum leiðarar á dagstovnum.

Tvøroyrar kommuna hevur í samsvari við avtaluna við landsstýrismannin samtykt at ógilda setanina av tí setta lærarалærda persóninum, men hevur samstundis gjørt av at viðkomandi skal røkja starvið fyribils, meðan søkt verður av nýggjum eftir pedagogi í tí merking, sum almanna- og heilsumálaráðið leggur í hugtakið.

Hetta góðtekur almanna- og heilsumálaráðið heldur ikki – í brævi til kommununa verður kommunan biðin um at grundgeva fyri

- hví ein námsfrøðingur ikki varð settur í starv sum leiðari fyri frítíðarskúlan, hóast ein námsfrøðingur søkti

og

- hví ein umsøkjari uttan námsfrøðiliga útbúgving nú er fyribilssettur leiðari av frítíðarskúlanum

Kommunan hevur svarað í skrivi tann 16.09.2004

- at umsøkjarin við námsfrøðiligu útbúgvingini (í merkingini hjá almanna- og heilsumálaráðnum) ikki verður mettur at vera skikkaður til starvið

og

- at tá bert tær tvær fyrr nevndu umsóknirnar komu, og námsfrøðingurin ikki varð mettur egnaður at vera leiðari, var natturligt at seta hin umsøkjaran fyribils, meðan lýst verður av nýggjum

Síðani hevur almanna- og heilsumálastýrið í skrivi 17.09.2004 boðað kommununi frá, at landsstýrismaðurin „metir ikki at grundgevingin er nøktandi, og hótt verður við at steingja skúlan, um Tvøroyrar kommuna ikki „makkar rætt“ (mín orðing) í seinasta lagi mánadagin 20.09.2004.

– –

Eg kann av hesum staðfesta fylgjandi:

- at tulkingarósemja er millum ráðið og kommununa um § 8, stk. 1, fyrsta punktum, í dagstovnalógini
- at almanna- og heilsumálaráðið roynir at tvinga kommununa undir sína tulking við at hótta við at steingja skúlan

og

- at almanna- og heilsamálastýrið – uttan um tað fyrisitingarliga kompetenta organið, sum er kommunala eftirlitið/innlendismálaráðið, og uttan at kommunan fyrst fær høvi til at biðja rættarskipanin taka endaliga avgerð í málinum – roynir at tvinga kommununa at (fyribils)seta ein leiðara, sum kommunan ikki metir at vera egnaðan til tess.

Eg skal gera hesar viðmerkingar:

Hesi viðurskifti eru sjálvandi sera álvarsom, tí hetta brýtur við tað grundleggjandi princippið um at tað er dómsvaldið og ikki fyrisitingarvaldið, sum tulkar lógina.

At málið ikki verður lagt til tað kommunala eftirlitið, sum fyrisitingarliga er disiplinermyndugleiki hjá kommunum, ger rættartrygdina uppaftur verri.

Har afturat kemur, at almanna- og heilsumálaráðið eftir mínari hugsan fremur brot á reglurnar um proportionalitetin í hesum máli. Aðrastaðir eru lærarar settir í starv – enntá fast starv – sum dagligir leiðarar í frítíðarskúla, uttan at tað hevur verið mett sum nøkur vanlukka, til dømis í…

Fyrisitingarliga skal Tvøroyrar kommuna sjálvandi eisini taka onnur fyrilit enn útbúgving, og sjálvt um tað skuldi víst seg, at tann læraralærdi persónurin ikki lýkur útbúgvingarkrøvini eftir lógini, so inniber tað sjálvandi ikki, at hin persónurin, sum lýkur útbúgvingarkrøvini, skal setast í starvið – og her hevur kommunan sagt ráðnum frá, at vegna onnur kriterii verður viðkomandi persónur ikki settur sum leiðari. Tað kann tí ikki vera rætt, at almanna- og heilsumálaráðið skal tvinga Tvøroyrar kommuna at seta eitt fólk í starv, bara tí viðkomandi hevur útbúgving, sum pedagogur (í uppfatan ráðsins av hugtakinum), tá kommunan ikki metir viðkomandi persón at vera egnaðan og tí undir ongum umstøðum fer at seta viðkomandi – líka mikið hvat.

At kommunan fyribils letur tann læraralærda persónin røkja starvið sum leiðari, meðan lýst verður eftir (øðrum) pedagogi, er náttúrligt og er eisini ein liður í roynd kommununnar at minka eitt møguligt endurgjaldskrav frá tí læraralærda persóninum vegna tvingsul almanna- og heilsumálaráðsins um at ógilda ta framdu eitt-ára setanina av viðkomandi. Í hesum sambandi skal eg viðmerkja, at eg taki fyrivarni um at beina eitt møguligt endurgjaldskrav frá nevnda persóni víðari til almanna- og heilsumálaráðið, um tað eftirfylgjandi skuldi víst seg, at kommunan ikki hevði fyri neyðini at ógilda setan hennara.

Í sambandi við málið havi eg biðið borgarstjóran skriva mær eina stutta frágreiðing. Hana leggi eg við eisini til tykkara kunnleika."

Umrødda frágreiðingin frá borgarstjóranum, ið er dagfest 19. sept. 2004, er soljóðandi:

„Setan av fyribils leiðara til Frítíðarskúlan á Tvøroyri.

Fríggjadagin, tann 13. august 2004 kl. 1400 hevði sosiala nevnd hjá Tvøroyrar Býráð fund, til viðgerðar var:

Setan av fyribils leiðara í eitt ár frá 16. august 2004 til summarfrítíðina 2005.

Tvær umsóknir komnar inn, onnur frá A og hin frá F.

Ein minnilutið í sosialu nevnd skeyt upp at velja A, og ein meirilutið í sosialu nevnd skeyt upp at velja F. Meirilutað uppskotið var samtykt.

Sama dag fríggjadag, tann 13. august 2004 kl. 1500 hevði Tvøroyrar Býráð óalmennan býráðsfund, hvar setan av leiðara til Frítíðarskúlan var til viðgerðar. Eins og í sosialu nevnd vórðu tvey uppskot til býráðsfundin, og var samtykt at seta F í starvið.

Við tað at tað var fríggjadagur og skúlin skuldi byrja komandi mánadag ringdi borgarstjórin til A kl. 1536, og kunnaði A um avgerðina hjá býráðnum, hon hevði als onga viðmerking. Síðan spurdi borgarstjórin A um hon kundi røkja starvið framtil onsdagin, tann 25. august 2004, tí júst setti fyribils leiðarin var uttanlanda, til hettar svaraði A, at tað vildi hon gera.

Ætlanin hjá býráðnum var at fáa leiðaran á Barna og Útibarnagarðinum at røkja leiðarastarvið í hesar dagarnar til F kundi byrja, men hettar var ein trupulleiki, tí hon var í farloyvi, og varaleiðarin var eisini knappliga farin í farloyvið vegna sjúku, tí var A biðjin um at røkja leiðarastarvið í hesar dagarnar, og tað hevði hon sum sagt onki ímóti.

At enda vil undirritaði gera vart við, at Tvøroyrar Býráð hevur hildið seg til avtaluna, ið landsstýrismaðurin B kom við, somuleiðis kann upplýsast at Tvøroyrar Býráð hevur tosað við fólk, ið var í bólkinum, ið arbeiddi við dagstovnalógini, og har kom ongantíð fram, at ein námsfrøðingur var ein pedagogur, sum tað stendur í viðmerkingunum.

Tvøroyrar Býráð kann heldur ikki góðtaka sum tað stendur í lógini, at landsstýrismaðurin hevur tað yvirskipaða eftirlitið, hvar hettar er ein beinleiðis kommunalur stovnur, tí har ein vil valda, har skal ein eisini gjalda.“

Við skrivi, dagfest 27. sept. 2004, sendi Almanna- og heilsumálaráðið Tvøroyrar kommunu soljóðandi avgerð:

**„Avgerð í málinum um setan av leiðari av frítíðarskúlanum á Tvøroyri.**
Almanna- og heilsumálaráðið hevur viðgjørt málið um setan av leiðara av frítíðarskúlanum á Tvøroyri sambært heimildunum sum eftirlitsmyndugleiki sambært § 10, stk. 2 í Ll. nr. 67 frá 10. mai 2000 um dagstovnar og dagrøkt.

*Heimild:*
Advokaturin hjá Tvøroyrar kommunu hevur í skrivi handað Almanna- og heilsumálaráðnum 20. september 2004 ført fram, at Innlendismálaráðið er rætti myndugleikin at taka avgerð í setanarmálum.

Spurningurin hevur verið umrøddur við Innlendismálaráðið. Niðurstøðan var, at kommunala eftirlitið sum meginregla ikki umfatar mál, ið eru umfataði av lógarásettum sektoreftirliti – í hesum førinum eftirlitsskyldan hjá landsstýrismanninum sambært § 10, stk. 2 í dagstovnalógini, ið ásetur at landsstýrismaðurin hevur yvirskipaða eftirlitið við, at komm-

unurnar umsita dagstovnar og dagrøktir sambært dagstovnalógini. § 8 í hesi lóg er eitt dømi um, at lógin eisini umfatar setanarviðurskifti. Almanna- og heilsumálaráðið metir tí, at eftirlitið hjá landsstýrismanninum sambært dagstovnalógini umfatar allar kommunalar avgerðir í sambandi við mál, ið eru umfataði av dagstovnalógini – eisini eftirlitið við hvussu kommunurnar umsita setanarviðurskifti.

*Málslýsing:*

Tvøroyrar kommuna søkti í bløðunum tann 9. juli í ár eftir pedagogi, at røkja starvið sum leiðari í frítíðarskúla á Tvøroyri í eitt ár frá 15. august.

Tað vóru tvær umsóknir til starvið. Tann eina frá einum námsfrøðingi og hin frá einum lærara. Uttan at hava setanarsamrøður við umsøkjararnar avgjørdi kommunan á býráðsfundi 13. august, at seta læraran í starvið. Sama dag fingu umsøkjararnir skrivlig boð um avgerðina. Í skrivinum til námsfrøðingin varð sagt, at annar umsøkjari hevði fingið starvið, tí viðkomandi var betri skikkaður til starvið.

Sambært § 8, stk. 1 í dagstovnalógini skal leiðarin fyri dagstovn (herundir frítíðarskúlar) hava námsfrøðiliga útbúgving. Í viðmerkingunum til § 8 í lógaruppskotinum stendur, at tað er ein pedagogur. Sambært § 8, stk. 2 kann kommunan í serligum førum fyribils seta annan í starv, ið ikki hevur námsfrøðiliga útbúgving. Í viðmerkingunum til § 8 er hetta undantakið treytað av, at ongin námsfrøðingur hevur søkt starvið.

Vísandi til § 8, stk. 1 hevur Tvøroyrar kommuna sostatt sýtt námsfrøðinginum leiðarastarvið við ógyldugari grundgeving, tí hin umsøkjarin hevði ikki rætta útbúgving til starvið. Tað visti kommunan, tí hon søkti í bløðunum eftir pedagogi, og grundgav fyri námsfrøðinginum at læraralærdi umsøkjarin hevði útbúgving, sum í hesum føri „mestsum kann líkastillast við tygara“. Kommunan hevur síðani, eftir áheitan frá landsstýrismanninum, ógildað setanina av læraranum.

Almanna- og heilsumálaráðið heitti í skrivi til kommununa tann 15. september um at grundgeva fyri hví námsfrøðingurin ikki fekk starvið. Kommunan svaraði tveir dagar seinni, men landsstýrismaðurin hevur síðani boðað kommununi frá, at svarið ikki var nøktandi, og heitt á kommununa um at koma við eini neyvari grundgeving. Henda grundgeving er enn ikki komin.

13. august (sama dag, sum námsfrøðingurin skrivliga fekk at vita, at hann ikki hevði fingið starvið) heitti kommunan skrivliga á námsfrøðingin, um at røkja starvið sum leiðari fram til 25. august, ið var fyrsti arbeiðsdagur hjá nýsetta læraranum. Tí hevur Almanna- og heilsumála-

ráðið ilt við at skilja, at námsfrøðingurin ikki er skikkaður til at røkja leiðarastarvið í eitt ár, serliga tá hugsað verður um at hetta var einasti umsøkjari við røttu útbúgvingini, og at umsøkjarin hevur starvast á stovninum í 3 ár sum námsfrøðingur.

*Niðurstøða:*

Almanna- og heilsumálaráðið er av teirri fatan, at setanarmálið hjá kommununi ikki kann metast at vera avgreitt, tí námsfrøðingurin hevur enn ikki fingið eina haldgóða grundgeving fyri hví hann ikki fekk starvið. Við tað at kommunan hevur ógildað setanina av læraranum er námsfrøðingurin einasti umsøkjari til starvið.

Tí verður álagt Tvøroyrar Kommunu, at viðgera umsóknina hjá námsfrøðinginum av nýggjum, har kommunan við grundarlagi í eini konkretari meting tekur avgerð um námsfrøðingurin kann setast í starvið.

Um kommunan avgerð ikki at seta námsfrøðingin í starv, so skal viðkomandi hava at vita hví hann ikki fekk starvið. Sambært § 23, stk. 1 í LL nr. 132 frá 10. juni 1993 um fyrisitingarlóg skal ein grundgeving, í tann mun hon hvílir á eini fyrisitingarligari meting, „eisini tilskila tey høvuðsfyrilit, ið hava verið avgerandi fyri útinningina av metingini", og § 23, stk. 2, ið ásetur at grundgevingin um neyðugt eisini skal hava eina stutta frágreiðing viðvíkjandi teimum veruligu umstøðunum, sum hava havt stóran týdning fyri avgerðina.

Tað merkir at haldgóð grundgeving, um neyðugt við ítøkiligum dømum, skal gevast námsfrøðinginum, um hildið verður fast við, at hann ikki er skikkaður til starvið. Í lýsingini til starvið vóru tvey krøv til umsøkjararnar:

- umsøkjarin skuldi vera pedagogur, og
- umsøkjarin skuldi virka sum leiðari í 1 ár.

Tað merkir, at um Tvøroyrar kommuna velur ikki at seta námsfrøðingin, so skal kommunan – við konkretum dømum – kunna prógva, at námsfrøðingurin ikki er skikkaður til at vera leiðari á dagstovninum. Dømini mugu taka atlit til leiðaraevnini hjá námsfrøðinginum, og onnur krøv, ið vanliga verða sett einum leiðara, tí umsøkjarin lýkur krøvini til útbúgving.

Almanna- og heilsumálaráðið hevur fyrr kunnað kommununa um, at fær landsstýrismaðurin ikki eina nøktandi grundgeving, fer landsstýrismaðurin at taka neyðug stig sambært § 10, stk. 3 í dagstovnalógini, ið heimilar landsstýrismanninum at steðga virkseminum á dagstovninum, um krøvini í lógini ikki vera hildin.

Landsstýrismaðurin skal tí gera Tvøroyrar Kommunu greitt, at hevur kommunan ikki í seinasta lagi **fríggjadagin 1. oktober 2004 kl. 12** avgreitt upprunaliga setanarmálið á fullgóðan hátt (tað merkir, at námsfrøðingurin verður settur í starvið, ella at haldgóð grundgeving verður givin fyri at sýta umsøkjaranum starvið) verður virksemið á frítíðarskúlanum á Tvøroyri steðgað, sambært § 10, stk. 3 í løgtingslóg nr. 67 frá 10. mai 2000 um dagstovnar og dagrøkt. Hetta verður framt við at Fútarætturin tá verður biðin um at seta fútaforboð fyri virkseminum á frítíðarskúlanum á Tvøroyri, sambært lovbekendtgørelse nr. 148 af 9. marts 2004 af lov for Færøerne om rettens pleje (rættargangslógin)."

Við skrivi, dagfest 30. sept. 2004, hevur Tvøroyrar kommuna latið A soljóðandi frágreiðing um vantandi setanina av henni:

„Viðvíkjandi umsókn tínari um avloysarastarv sum leiðari á frítíðarskúlanum.

Av tí at almanna- og heilsumálaráðið metir, at lærarin, sum varð settur í avloysarastarvið fram um tygum, eftir lógini ikki kann setast í starvið, um tygum við pedagogútbúgving lúka tær persónligu treytirnar fyri at fáa starvið, skal kommunan eftir boðum frá almanna- og heilsumálastýrinum geva fylgjandi ískoyti til grundgeving fyri ikki at ganga umsókn tygara á møti:

Mett verður ikki, at tygum hava teir neyðugu persónligu eginleikarnar til at røkja slíkt leiðarastarv.
*Mett verður, at tygum ikki í nøktandi mun eru før fyri at stýra í „pressaðum situatiónum", og tað er eftir býráðsins áskoðan ein eginleiki, sum krevst av einum leiðara á slíkum stovni, og sum býráðið leggur avgerandi dent á.*

*Sum konkret dømi um hetta verður víst til ein fund millum foreldur og starvsfólk í barnagarðinum, sum tygum tóku lut sum foreldur, og har eisini býráðslimir vóru hjástaddir. Tað kom týðuliga til sjóndar, at tygum ikki í nøktandi mun klára at stýra tygara temperamenti, at tygum østu tygum upp yvir lítið og einki og eisini brúktu ljótan munn.*
Tvøroyrar Býráð heldur eisini fast við ta fyrru grundgevingina og hevði vónað at sloppið undan at seta upp á prent, men umstøðurnar hava lagað tað soleiðis, at hetta gjørdist neyðugt.

Sagt verður frá hesum.

Avrit av hesum skrivi er sent almanna- og heilsumáláráðnum."

N, adv. hevur við telefaksi, dagfest 30. sept. 2004, sent Almanna- og heilsumálaráðnum avrit av skrivinum til A.

Við skrivi, dagfest 30. sept. 2004, hevur Føroya Pedagogfelag sent Tvøroyar kommunu soljóðandi viðmerkingar:

„Viðvíkjandi skrivi tykkara til lim okkara A.

Vit hava fingið avrit av skrivi, sum býráðið í dag hevur handað A.

Í fyrra fráboðanarskrivinum til A hevur býráðið als onga grundgeving fyri ikki at seta hana í starv, meðan býráðið í skrivinum frá í dag gevur sum grundgeving, at hon ikki hevur persónligu eginleikarnar til at røkja slíkt starv.

Sum einasta „*dømi*" um at A ikki skal hava hesar eginleikar vísir býráðið til fund, har A hevur luttikið sum foreldur, og har hon eftir fráboðan býráðsins:

- ikki í nøktandi mun kláraði at stýra temperamentinum,
- østi seg upp og
- brúkti ljótan munn.

Hesar skuldsetingar móti A eru beinleiðis ósannar, og tað kunnu fleiri foreldur vátta. Eisini kunnu vit upplýsa, at A hevur sera góð starvsummæli, og tí eru skuldsetingar tykkara tiknar úr leysum lofti.

Býráðið skrivar, at „*eisini býráðslimir vóru hjástaddir*", og í hesum sambandi verða tit biðin um at upplýsa, hvørjir hesir býráðslimir vóru, eins og tit verða biðin um at upplýsa skrivligt hvør hevur upplýst, at A á nevnda fundi østi seg upp og brúkti ljótan munn.

Eisini verður heitt á býráðið um meira ítøkjuliga at greiða frá hvat A segði á fundinum, sum kann metast sum at „brúka ljótan munn". Av tí at talan er um rættuliga álvarsligar skuldsetingar síggja vit okkum noydd at taka fyrivarni um at gera ábyrgd galdandi mótvegis tí ella teimum, sum eru upphavsfólk til hesar skuldsetingar, serliga nú hesar skuldsetingar verða brúktar sum undanførsla fyri at nokta A starv.

Tað ber ikki til hjá kommunalum myndugleika, at seta fram slíkar ótespuligar skuldsetingar, uttan at leggja fram prógv fyri at hesar skuldsetingar eru rættar, og tí vænta vit at frætta aftur <u>áðrenn</u> 6 dagar.

Vit skulu eisini gera vart við, at vit meta avgerðina um ikki at seta A í starv sum leiðara, at vera ógilduga, tí býráðið upprunaliga als ikki hevur grundgivið fyri avgerð sínari, og við skrivinum frá í dag tykist

at royna at finna eitthvørt, sum hvørki er útgreinað og enn minni dokumenterað.

Um býráðið ikki er sinnað at taka málið upp aftur til viðgerðar, so síggja vit ikki annan møguleika enn at senda kæru til Løgtingsins Umboðsmann, hóast A ikki hevði vónað, at slíkt hóvasták skuldi standast av málinum.

Avrit av hesum skrivinum er sent Almanna- og heilsumálaráðnum."

Við skrivi, dagfest 1. okt. 2004, hevur Almanna- og heilsumálaráðið sent Tvøroyrar kommunu soljóðandi fráboðan:

„**Avgerð í málinum um setan av leiðara til frítíðarskúla á Tvøroyri**
Almanna- og heilsumálaráðið sendi týsdagin 27. september skriv til Tvøroyrar kommunu, har sagt varð frá, at ráðið var av teirri fatan, at setanarmálið hjá kommununi ikki kundi metast at vera avgreitt, tí námsfrøðingurin enn ikki hevði fingið eina haldgóða grundgeving fyri, hví hann ikki fekk starvið. Við tað, at kommunan hevði ógildað setanina av læraranum, var námsfrøðingurin einasti umsøkjari til starvið.

Tí varð Tvøroyrar Kommunu álagt, **at viðgera umsóknina hjá námsfrøðinginum av nýggjum**, har kommunan við grundarlagi í eini ítøkiligari meting avgjørdi, um námsfrøðingurin kundi setast í starvið.

Um kommunan avgjørdi ikki at seta námsfrøðingin í starv, so skuldi viðkomandi hava at vita, hví hann ikki fekk starvið. Víst varð til § 23, stk. 1 í Ll. nr. 132 frá 10. juni 1993 um fyrisitingarlóg, ið ásetur, at ein grundgeving, í tann mun hon hvílir á eini fyrisitingarligari meting, skal „eisini tilskila tey høvuðsfyrilit, ið hava verið avgerandi fyri útinningina av metingini", og § 23, stk. 2, ið ásetur, at grundgevingin um neyðugt eisini skal hava eina stutta frágreiðing viðvíkjandi teimum veruligu umstøðunum, sum hava havt stóran týdning fyri avgerðina.

Um Tvøroyrar kommuna valdi ikki at seta námsfrøðingin, so skuldi kommunan við ítøkiligum dømum grundgeva nærri fyri, at námsfrøðingurin ikki var skikkaður til at vera leiðari á dagstovninum.

Almanna- og heilsumálaráðið fekk 30. september avrit av grundgevingini til námsfrøðingin um, hví viðkomandi ikki fekk starvið sum leiðari fyri frítíðarskúlan á Tvøroyri. Grundgevingin var sambært kommununi handað námsfrøðinginum sama dag.

Í grundgevingini fyri ikki at geva námsfrøðinginum starvið verður víst til vantandi persónligar eginleikar, ið gera, at kommunan ikki metir, at viðkomandi er førur fyri at røkja starvið sum leiðari. Í grundgevingini verður eisini víst á eitt ítøkiligt dømi, um hví umsøkjarin ikki varð mettur at vera skikkaður til starvið.

*Niðurstøða um upprunaliga setanarmálið:*

Almanna- og heilsumálaráðið kann staðfesta, at umsøkjarin nú hevur fingið eina grundgeving fyri, hví kommunan ikki ynskir at seta viðkomandi í starv.

Almanna- og heilsumálaráðið sær seg **sum eftirlitsmyndugleiki** ikki ført fyri betri enn Tvøroyrar kommuna at kunna meta um tað materiella innihaldið í grundgevingini, sum snýr seg um vantandi persónligar eginleikar hjá umsøkjaranum at røkja starvið sum leiðari í frítíðarskúlanum. Kommunan er setanarmyndugleikin, og treytað av at hon lýkur formligu krøvini, so má vera rúm fyri eini meting hjá kommununi.

Almanna- og heilsumálaráðið metir tí, at Tvøroyrar kommuna við grundgevingini hevur avgreitt upprunaliga setanarmálið, sambært teimum treytum, ið settar vórðu í skrivinum frá landsstýrismanninum 27. september 2004, og soleiðis sum málið er upplýst fyri Almanna- og heilsumálaráðnum annars – tað er, at býráðið tekur avgerðir í setanarmálum av hesum slag.

*Viðmerking og støðutakan til avgerðina at lata læraran røkja fyribilsstarvið:*

Í skrivi frá Tvøroyrar Kommunu dagfest 14. september varð Almanna- og heilsumálaráðið kunnað um, at Býráðið hevði avgjørt, at ógilda setanina av leiðaranum av frítíðarskúlanum, og samtykt at lýsa av nýggjum. Til nýggjur leiðari varð settur, varð lærarin konstitueraður sum leiðari.

Sambært § 8 stk. 2 í dagstovnalógini kann kommunan í serligum førum gera av, at lata annan enn námsfrøðing røkja starvið sum leiðari í tíðaravmarkað skeið. Í viðmerkingunum til lógaruppskotið stendur sum dømi, at hetta kann gerast neyðugt í teimum smáu kommununum, um ongin við námsfrøðiligari útbúgving søkir eitt leiðandi starv í einum dagstovni ella eini dagrøkt.

Almanna- og heilsumálaráðið metir ikki, at Tvøroyrar kommuna lýkur undantaksregluna í § 8 stk. 2, tá hon enn ikki hevur lýst starvið leyst av nýggjum, nú 3 vikur eftir at setanin av læraranum varð ógildað. Kommunan kundi lýst av nýggjum, fyri at tryggja sær at ongin skikkaður námsfrøðingur søkti starvið.

Landsstýrismaðurin ynskir kortini ikki at brúka sína heimild til at steðga virkseminum á frítíðarskúlanum sambært § 10 stk. 3 í dagstovnalógini. Orsøkin er, at starvið er eitt avloysarastarv, og dagligi leiðarin kemur aftur úr farloyvi aftaná summarferiuna 2005, tvs. nú um 10 mánaðir, og landsstýrismaðurin heldur ikki at avgerðin um at steðga virkseminum á frítíðarskúlanum, við teimum avleiðingum sum tað fær fyri borgararnar, stendur mát við metingina av, at kommunan ikki til fullnar lýkur undantaksregluna í § 8 stk. 2."

Við skrivi, dagfest 7. okt. 2004, hevur Pedagogfelagið sent Tvøroyrar kommunu soljóðandi áminning:

„Vit vilja við hesum rykkja eftir svarið uppá skrivið dagfest 30. september 2004.

Harumframt vilja vit biðja um notat, sum eru gjørd í sambandi við foreldrafundin, sum tit nevna í skrivi tykkara til A dagfest 30.09.04.

Vit vilja eisini vegna lim okkara biðja um øll skjøl, viðvíkjandi hesum málinum."

Við skrivi, dagfest 13. okt. 2004, hevur Pedagogfelagið sent Tvøroyrar kommunu enn eina áminning, ið er soljóðandi:

„Vit skulu enn einaferð heita á býráðið um at svara skrivum okkara.

Vit skulu gera vart við, at kommunan hvørki hevur latið A ella felag okkara avrit av teimum skjølum, sum vit hava biðið um, hóast freistin at svara slíkari áheitan er farin, og heldur ikki hevur býráðið svarað skrivum okkara.

Vit kunnu ikki bíða longur og skulu tí boða frá, at um býráðið ikki hevur svarað skrivum okkara í morgin hósdagin 14.10.2004, so verður kæra send Innlendismálaráðnum, eins og Umboðsmaðurin fær áheitan um at taka upp hetta mál."

Við skrivi, somuleiðis dagfest 13. okt. 2004, hevur Tvøroyrar kommuna svarað Pedagogfelagnum soleiðis:

„Vísandi til skriv frá tykkum og frá A um at fáa avrit av skjølum, ið hava samband við setan av fyribils leiðara í frítíðarskúlanum á Tvøroyri.

Tað er rætt at hvørki tit ella A hava fingið hesi skjøl, men verða hesi skjøl útflýggjað tykkum í Tórshavn í morgin, og til A fríggjadagin, tann 15. oktober 2004.

Sagt verður frá hesum.“

Við skrivi, dagfest 14. okt. 2004, hevur Tvøroyrar kommuna latið Pedagogfelagnum avrit av ymiskum skjølum.

## Partshoyring

Umboðsmaðurin gjørdi av at kanna hetta málið nærri. Við skrivi, dagfest 6. okt. 2004, varð klagan send Almanna- og heilsumálaráðnum og Tvøroyrar kommunu til ummælis, eins og biðið varð um skjølini.

Eftir at tað hevði verið frammi í fjølmiðlunum, at Føroya Pedagogfelag umhugsaði at stevna Tvøroyrar kommunu í sambandi við hetta málið, sendi umboðsmaðurin 3. nov. 2004 felagnum ein fyrispurning um hetta. Avrit av fyrispurninginum vóru send Almanna- og heilsumálaráðnum og Tvøroyrar kommunu til kunningar.

Við skrivi, dagfest 4. nov. 2004, sendi N, adv. vegna Tvøroyrar kommunu umboðsmanninum skjølini í málinum og soljóðandi frágreiðing:

„Viðv. kæru um setan av fyribilsleiðara á frítíðarskúlanum á Tvøroyri, LUM …

Vegna Tvøroyrar kommunu leggi eg við tað umbidna tilfarið í málinum.

Eg havi talmerkt skjølini kronologiskt frá 1 til 31.

Málsgongdin skuldi framgingið av sær sjálvum.

Tó skal eg gera ta viðmerking, at skjal 24, sum er eitt notat frá býráðslimunum H og G, dagfest 19. september 2004, er skjal, sum er skrivað til mín, eftir at eg hevði biðið kommununa um eina neyvari grundgeving fyri, at viðkomandi ikki varð sett í starvið.

Hesa seinni útgreinaðu grundgeving við ávísing til persónligar eginleikar fyri ikki at seta viðkomandi í starv var neyðugt at koma við, tá Almanna- og Heilsumálaráðið ikki vildi góðtaka ta fyrru grundgevingina, sum eftir proportionalitetsreglunum varð mett at vera nóg mikið í

fyrstani, tá Tvøroyrar kommuna tulkaði „námsfrøðilig útbúgving“ sum eisini umfatandi læraraútbúgving.

Eru spurningar ella viðmerkingar, eru tit vælkomin at venda tykkum til mín.

Eg skal gera vart við, at eg í bløðunum havi lisið, at kærarin hevur stevnt ella fer at stevna Tvøroyrar kommunu í málinum.“

Skjal 24, sum er umrøtt í svarinum frá advokatinum, er undirskrivað av báðum teimum nevndu býráðslimunum og er soljóðandi:

**„Setan av leiðara til Frítíðarskúlan.**

Tveir umsøkarir vóru, ein lærari og ein pedagogur.

Lærarin bleiv settur, tí vit vóru av tí áskoðan, at lærarin var betur egnaður til hetta starv, tí her var talan um børn í skúlaaldri (seinri blivu vit varugir við at í viðmerkingunum til lógina stendur, at ein námsfrøðingur er ein pedagogur), hetta er eftir okkara metan í andsøgn við føroyskt mál.

Hví settu vit so ikki pedagogin?

Á einum fundi millum pedagogar og foreldur í barnagarðinum, har býráðslimir eisini luttóku, legði vit týðiliga til merkis, at umsøkjarin ikki kundi stýra sínum temperamenti, og østi seg upp yvir einki, harímillum brúkti hon ein ljótan munn. Tá ið eg nú skuldi vera ein av teimum, sum skuldi gera av um umsøkjarin skuldi fáa søkta **leiðarastarvið**, gjørdi eg av, at eg skuldi spyrja aðrar leiðarar á okkara stovnum, sum kenna viðkomandi, um teir mettu, at umsøkjarin var egnaður sum leiðari, svarið var í flestu førum nej. Hetta styrkti mína uppfatan, at tað er ikki nokk at hava nógv 13 tøl í karakterbókini, um ein skuldi vera leiðari, ein skal eisini kunna stýra sær sjálvum í pressaðum situatiónum og her peikaði fingurin beint niðureftir, tá ið tosað varð um umsøkjarin. Sostatt kundi eg ikki og kann enn ikki stemmað fyri at seta henda umsøkjarin í starv sum leiðari á einum stovni hjá Tvøroyrar Kommunu.

Tvøroyri, tann 19. september 2004

H

býráðslimur, næstformaður í sosialu nevnd

At eg taki fult undir við omanfyristandandi, vátti eg

G

býráðslimur, formaður í sosialu nevnd“

Við skrivi, dagfest 5. nov. 2004, sendi Pedagogfelagið umboðsmanninum soljóðandi svar uppá fyrispurningin frá 3. nov. 2004:

> **„Viðvíkjandi klaguni um fríðtíðarskúlan á Tvøroyri**
> Felagið fer ikki at lata rættinum nakra stevning fyrr enn Løgtingsins Umboðsmaður hevur viðgjørt og komið við einari niðurstøðu í málinum um Frítíðarskúlan á Tvøroyri.
>
> Ætlanin er at stevna Tvøroyrar Kommunu um at avgerðin um ikki at seta pedagogin í starv er ógildug.
>
> Viðmerkjast skal, at kommunan enn ikki hevur latið felagnum møgulig notat frá foreldraráðsfundinum.“

Við skrivi, dagfest 12. nov. 2004, boðaði umboðsmaðurin pørtunum frá, at hann grundað á svarið frá Pedagogfelagnum, fór at halda fram við viðgerð sínari.

Við skrivi, dagfest 15. nov. 2004, hevur Almanna- og heilsumálaráðið latið umboðsmanninum skjølini og soljóðandi frágreiðing um málið:

> **„Frágreiðing til umboðsmannin um leiklutin hjá landsstýrismanninum í almanna- og heilsumálum í málinum um setan av leiðara í frítíðarskúlanum á Tvøroyri.**
> Í skrivi dagfest 6. oktober 2004 heitir Løgtingsins umboðsmaður á Almanna- og heilsumálaráðið (AHR) um at lata honum eina frágreiðing um handfaringina av málinum um setan av leiðara í frítíðarskúlanum á Tvøroyri.
>
> Somuleiðis verður AHR biðið um at lata umboðsmanninum til láns øll skjøl viðvíkjandi hesum málinum. Skjølini eru øll skrásett í máli nr. 0.03-200400599, og eru avrit av øllum skjølunum hjáløgd frágreiðingini.
>
> Frágreiðingin er býtt upp í hesar partar:
> 1. Lógargrundarlagið fyri virksemið í frítíðarskúla og fyri leiklutin hjá AHR í hesum máli.
> 2. Lýsing av málinum (tilvísing til viðkomandi skjøl. Samskiftið við Pedagogfelagið og innanhýsis skjølini í AHR eru nærum ikki umrødd í frágreiðingini).
> 3. Samandráttur um leiklutin hjá AHR í hesum málinum.

**1. Lógargrundarlagið fyri virksemið í frítíðarskúla og fyri leiklutin hjá AHR í hesum málinum:**

Virksemið í Frítíðarskúlum er umfatað av Ll. Nr. 67 frá 10. mai 2000 um dagstovnar og dagrøkt (sí § 3 stk. 1 í dagstovnalógini).

Ábyrgd:

Kommunurnar hava ábyrgdina av virkseminum í dagstovnum sambært hesi lóg (sí § 3 stk. 1).

Førleikakrøv til leiðara:

Sambært § 8, stk. 1 skal leiðarin hava námsfrøðiliga útbúgving. Í viðmerkingunum til lógaruppskotið (nr. 29 frá 8. februar 2000) stendur ítøkiliga, at tað merkir útbúgving sum pedagogur.

Sambært § 8, stk. 2 kann kommunan í serligum førum í tíðaravmarkað skeið gera undantak frá kravinum um útbúgving hjá leiðaranum. Í viðmerkingunum til lógaruppskotið stendur, at hetta kann gerast neyðugt á teimum smáu støðunum, um ongin við námsfrøðiligari útbúgving søkir starvið. Tað var undir viðgerðini í Løgtinginum, at undantaksheimildin varð herd til bert at galda „í tíðaravmarkað skeið“.

Eftirlitið hjá landsstýrismanninum:

Sambært § 10, stk. 2 hevur landsstýrismaðurin „yvirskipaða eftirlitið við, at kommunurnar umsita dagstovnar og dagrøktir eftir hesi lóg“. Viðmerkingarnar áseta ikki nærri, hvat eftirlitið hjá kommununum snýr seg um. Ásett verður, at kommunurnar hava eftirlit við øllum virkseminum á dagstovnum sambært hesi lóg. Talan kann vera um foreldragjald, brunaumsjón ella starvsfólkaviðurskifti.

Sambært § 10, stk. 3 kann kommunan ella landsstýrismaðurin steðga virkseminum á einum dagstovni, um krøvini í lógini ikki verða lokin. Viðmerkingarnar til ásetingina í lógaruppskotinum siga ikki meir.

§ 10, stk. 4 í dagstovnalógini áleggur landsstýrismaninum at áseta nærri reglur um eftirlit. Hetta er tíverri ikki gjørt enn. Í viðmerkingunum til hesa áseting í lógaruppskotinum er hetta nærri greinað til at snúgva seg um eftirlit „bæði viðvíkjandi námsfrøðiliga og trygdarliga grundarlagnum“. Í viðmerkingunum einki ásett um, hvørt landsstýrismaðurin hevur eftirlit við, um kommunurnar lúka vanligu fyrisitingarreglurnar í eitt nú setanarmálum.

**2. Málslýsing – gongdin í málinum:**

Málið snýr seg um, at Tvøroyrar kommuna í summar søkti eftir avloysara í eitt ár til starvið sum leiðari á frítíðarskúlanum á Tvøroyri. Tann 13.

august avgjørdi kommunan at seta ein umsøkjara í starvið, sum var lærararaútbúgvin, hóast ein námsfrøðingur hevði søkt starvið. Tað vóru 2 umsóknir til starvið.

AHR varð við telefaksi tann 17. august av Føroya Pedagogfelagi kunnað um avgerðina (sí skjal 1), og valdi beinanvegin at taka málið upp. AHR hevði frá Pedagogfelagnum m.a. fingið avrit av grundgevingini til námsfrøðingin fyri, at hann ikki fekk starvið. Í grundgevingini varð sagt, at tann, ið hevði fingið starvið (lærarin), hevði „relevanta útbúgving, sum í hesum føri mestsum kann líkastillast við tygara".

Tann 23. august fekk AHR avrit av brævi frá Tvøroyrar kommunu til Pedagogfelagið, har sagt varð frá, at kommunan ikki metti, at hon hevði skyldu til at seta námsfrøðing í starvið.

AHR sendi tí tann 23. august Tvøroyrar kommunu eitt skriv, har kommunan varð kunnað um galdandi lóggávu, og heitt varð á kommununa um at fáa viðurskiftini í rættlag beinanvegin (sí skjal 5).

Í samrøðu við borgarstjóran 25. august kunnaði deildarstjóri í AHR borgarstjóran um, at um kommunan ikki broytti støðu í málinum, kundi landsstýrismaðurin sambært § 10, stk. 3 í dagstovnalógini steðga virkseminum á stovninum, tí avgerðin hjá kommununi var eitt klárt brot á § 8 stk. 1 í dagstovnalógini (skjal 9).

Tann 3. september varð hoyringsskriv sent Tvøroyrar kommunu frá landsstýrismanninum, har hótt varð við at steðga virkseminum á frítíðarskúlanum, um setanin ikki innan eina viku varð ógildað, og ítøkilig stig vórðu tikin til at seta ein námsfrøðing í starvið. Eisini vórðu allir kommunustýrislimirnir bjóðaðir á fund við landsstýrismannin fyri at fáa eina loysn á málinum. Hetta skriv varð sent til allar kommunustýrislimirnar, og avrit til Føroya Pedagogfelag (skjal 19).

Tann 12. september var fundur á Tvøroyri millum umboð frá Tvøroyrar kommunu og landsstýrismannin, har 2 niðurstøður vórðu gjørdar:

1) at Tvøroyrar Býráð beinanvegin skuldi taka neyðug stig fyri at fáa viðurskiftini í rættlag, eisini at taka starvssetanina aftur.
2) at landsstýrismaðurin fór at taka stig til at broyta § 8 í dagstovnalógini, sum m.a. ásetur førleikakrøvini hjá stovnsleiðarum (skjal 24 og 37).

Hesin fundurin hevur fingið heilt nógva umrøðu bæði í fjølmiðlum og í Løgtinginum, har landsstýrismaðurin 27. oktober svaraði einum skrivligum fyrispurningi frá løgtingskvinnu P um m.a. hetta (svarið uppá fyrispurningin er hjálagt).

Endamálið við fundinum var at fáa kommununa til at ógilda ólógligu setanina. At landsstýrismaðurin á sama fundi kunnaði um sínar politisku ætlanir um at broyta dagstovnalógina á fleiri økjum, eisini útbúgvingarkravið til leiðarar á frítíðarskúlum, var kanska ikki væl umhugsað, men tað var bert ein kunning um hansara politiska ynski – ikki eitt lyfti, ið var tengt at tí ítøkiliga málinum.

Í AHR hevur verið arbeitt við at dagføra dagstovnalógina á nógvum økjum (sí hjálagda fundarupplegg og fundarfrágreiðing frá innanhýsis fundi mikudagin 1. september 2004 um ætlaðu broytingarnar í dagstovnalógini). Av hesum sæst at eisini leiðarakrøvini vórðu umrødd.

At onki embætisfólk var við á fundinum er óvanligt. Upprunaliga ætlanin var eisini, at fundurin skuldi vera í Almanna- og heilsumálaráðnum við luttøku av øllum býráðslimunum, men tað lá ikki fyri, og tá landsstýrismaðurin kortini skuldi suður í øðrum ørindum, valdi hann at fara á fundin einsamallur.

At fundarfrásøgn varð skrivað frá hesum fundi var ein beinleiðis fylgja av, at almenna fyrisitingin hevur notatskyldu í øllum sínum virksemi, og at tað hevði týdning fyri málið, at kommunan váttaði at hon fór at taka starvssetanina aftur.

14. september varð skriv sent frá Tvøroyrar kommunu, har kunnað varð um, at byráðið sama dag hevði ógildað setanina av leiðara í frítíðarskúlanum, og samtykt at lýsa av nýggjum. Samstundis varð sagt, at lærarin røkti starvið sum settur leiðari, til nýggjur leiðari varð settur (skjal 28).

Dagin eftir svaraði AHR, at undantakið í § 8 stk. 2 í dagstovnalógini ikki kundi brúkast, tí ein námsfrøðingur var tøkur. Tí bað AHR Tvøroyrar kommunu um at grundgeva fyri, hví námsfrøðingurin ikki fekk starvið frá byrjan, og hví ein persónur uttan námsfrøðiliga útbúgving nú var fyribilssettur leiðari fyri stovnin, til nýggjur leiðari varð settur (skjal 31).

16. september svaraði Tvøroyrar kommuna: 1) at ein meiriluti í býráðnum við lokalari vitan í huga ikki metti, at námsfrøðingurin var skikkaður til starvið, og 2) at av tí at býráðið metti læraran at vera skikkaðan til starvið, skuldi tað ikki stoytt nakran, at hon røkti starvið sum leiðari, til nýggjur leiðari er settur (skjal 35).

17. september sendi AHR eitt telefaks til Tvøroyrar kommunu, har sagt varð frá, at landsstýrismaðurin ikki metti svarið at vera nøktandi, og heitti á kommununa um at útgreina grundgevingina skrivliga fyri lands-

stýrismanninum í seinasta lagi mánamorgunin 20. september. Tað varð enn einaferð hótt við at nýta heimildma í § 10, stk. 3 (skjal 36).

20. september varð bræv frá advokatinum hjá kommununi handað AHR (skjal 40). Advokaturin metti, at:

- tað er tulkingarósemja millum kommununa og AHR um lógarásettu førleikakrøvini í dagstovnalógini.
- AHR roynir at noyða kommununa til sína tulking við at hótta við at steingja skúlan.
- AHR – uttan um kommunala eftirlitið – og uttan at kommunan fær høvi at royna málið í rættinum roynir at noyða kommununa at seta ein leiðara, sum kommunan ikki metir vera egnaðan til hetta starv.

Advokaturin gjørdi m.a. hesar viðmerkingar:

- Tað er dómsvaldið, sum tulkar lógina
- Tað er kommunala eftirlitið, ið fyrisitingarliga er disciplinermyndugleikin hjá kommununum
- Brot á reglurnar um „proportionalitet", tí aðrastaðir eru leiðarar á dagstovnum, ið ikki eru námsfrøðingar.
- Setanarkriteriir: Fyri tað um námsfrøðingurin hevur røttu útbúgving, er tað ikki tað sama sum, at hann hevur krav um at fáa starvið.
- At kommunan fyribils letur tann læraralærda persónin røkja starvið sum leiðari, meðan lýst verður eftir (øðrum) námsfrøðingi, er náttúrligt og er eisini ein liður í roynd hjá kommununi at minka um eitt møguligt endurgjaldskrav frá tí læraralærda persóninum.

Atfinningarnar í brævinum fekk AHR til at umhugsa støðuna enn einaferð. AHR vendi sær til Innlendismálaráðið fyri at umrøða spurningin um, hvør er rætti eftirlitsmyndugleikin, í hesum málinum (skjal 41 og 43). Niðurstøðan var, at AHR er rætti eftirlitsmyndugleikin, eisini í setanarmálum, ið viðvíkja dagstovnum sambært hesi lóg.

Í AHR var óvissa um, hvussu langt AHR kundi fara í sínum eftirliti av einum setanarmáli, og tí varð tann 21. september avgjørt at venda sær til Lønardeildina í Fíggjarmálaráðnum fyri at fáa fakliga vegleiðing viðv. fyribilssetanini av læraranum, til annar leiðari var settur (skjal 46).

Lønardeildin svaraði, at tað var ein tulkingarspurningur av dagstovnalógini, og tí kundi tey ikki svara spurninginum generelt. At enda varð niðurstøðan í AHR, at setanin av læraranum í veruleikanum ikki varð ógildað, tí eitt starvsfólk hevur tey somu rættindini sum konstitueraður og sum settur í fast starv.

Tá avgjørdi AHR at viðgera tað upprunaliga setanarmálið viðvíkjandi námsfrøðinginum. Áðrenn hevði málið snúð seg um at fáa kommununa til at ógilda eina ólógliga setan, uttan at viðgera, at kommunan hevði sýtt námsfrøðinginum starvið.

20. september fekk AHR øll skjølini í málinum útflýggjað frá Tvøroyrar kommunu (skjal 44). AHR metti upprunaliga, at málið um setan av lærara var nóg væl lýst, og kravdi sostatt ikki at kommunan ógildaði ólógligu setanina. Men upprunaliga setanarmálið var ikki avgreitt á fullgóðan hátt, og tí var neyðugt at tryggja sær, at AHR hevði øll skjølini í málinum.

27. september álegði AHR í skrivi kommunini at viðgera umsóknina frá námsfrøðinginum av nýggjum, og at geva umsøkjaranum eina sakliga grundgeving, um hon ikki fekk starvið (skjal 52).

30. september fekk AHR avrit av nýggjari grundgeving til námsfrøðingin um, hví hon ikki fekk starvið (skjal 56).

1. oktober sendi AHR Tvøroyrar kommunu avgerðina hjá landsstýrismanninum í málinum um upprunaliga setanarmálið og viðmerking og støðutakan til avgerðina hjá kommununi um at lata læraran røkja fyribilsstarvið. AHR kundi staðfesta, at umsøkjarin nú hevði fingið eina grundgeving fyri ikki at fáa starvið, og at grundgevingin var vend móti vantandi førleikanum hjá umsøkjaranum sjálvum. AHR tók ikki støðu til metingina hjá setanarmyndugleikanum, og viðgjørdi heldur ikki dømið, ið skuldi undirbyggja grundgevingina (skjal 57). AHR avgjørdi tískil ikki at gera meira við hendan partin av málinum.

**3. Samandráttur um leiklutin hjá AHR í málinum:**

AHR hevur verið eftirlitsmyndugleiki í hesum málinum, ikki kærumyndugleiki, og AHR hevur tí bert hoyrt Tvøroyrar kommunu í málinum fyri at gera sínar niðurstøður. Av tí at tað í AHR var ivi um leiklutin hjá Føroya Pedagogfelag í hesum máli, so varð felagið í telefonsamrøðu millum deildarstjóra í AHR og formannin í pedagogfelagnum spurt um áheitanin frá felagnum skuldi skiljast sum ein kæra, har felagið umboðaði námsfrøðingin, ið ikki fekk starvið. Svarið var, at tað var tað ikki. Pedagogfelagið varð eisini kunnað um, at hetta hevði týdning fyri hvør skuldi hoyrast í málinum.

Hetta er fyrstu ferð, at AHR hevur brúkt sínar heimildir sum eftirlitsmyndugleiki sambært dagstovnalógini í einum setanarmáli. Tí er málið prinsipielt fyri AHR, sum hevur roynt at fáa greiðu á, hvørji mørk eru fyri

eftirlitinum. § 10, stk. 4 í dagstovnalógini áleggur landsstýrismaninum at áseta nærri reglur um eftirlit. Hetta er tíverri enn ikki gjørt. Í viðmerkingunum til hesa áseting í lógaruppskotinum er hetta nærri greinað til at snúgva seg um eftirlit „bæði viðvíkjandi námsfrøðiliga og trygdarliga grundarlagnum", men onki er ásett um eftirlit við, um kommunurnar lúka vanligu fyrisitingarreglurnar í eitt nú setanarmálum. Í hesum førinum hevur AHR mett, at setanarmálið var umfatað av eftirlitinum, tí útbúgvingarkravið til leiðaran hevur sum endamál at tryggja eitt ávíst námsfrøðisligt stig í virkseminum á dagstovnum. Harumframt er AHR, eftir at hava umrøtt málið við Innlendismálaráðið, komið til ta niðurstøðu, at AHR hevur tað fulla eftirlitið við dagstovnaøkinum, eisini í setanarmálum. Innlendismálaráðið tekur ikki mál upp, har annar landsmyndugleiki hevur eftirlit sambært serligari lóggávu (sektoreftirlit). AHR ivast kortini í, hvar markið fyri eftirlitinum gongur. Í hesum málinum valdi AHR at steðga við metingini hjá setanarmyndugleikanum um, at umsøkjarin ikki var skikkaður til starvið. At heimildin fyri eftirlitið hjá landsstýrismanninum sambært dagstovnalógini er so lítið ítøkilig, og at AHR fyri fyrstu ferð brúkar heimildina í einum setanarmáli hevur havt ta avleiðing, at AHR hevur avgjørt ikki at fara longur í eftirlitinum, enn heimildin kundi bera.

Alt hetta hevur týdning fyri at skilja avgerðina hjá AHR um at góðtaka grundgevingina hjá kommununi fyri ikki at seta námsfrøðingin í starv, og fyri ikki at brúka heimildina til at steðga virkseminum á stovninum, tá samanum kemur.

Tað hevur verið fullur opinleiki í handfaringini hjá AHR í hesum máli. Soleiðis hevur Føroya Pedagogfelag, ið hevur kært málið fyri Løgtingsins umboðsmann, fingið fult innlit í øll tey skjøl, felagið hevur rætt til sambært lóg um alment innlit.

AHR hevur arbeitt so skjótt, sum til ber í hesum máli, fyri at fáa viðurskiftini í rættlag.

Endaliga avgerðin hjá landsstýrismanninum um ikki at gera meiri við málið um setta læraran var tikin eftir at hava vigað brotið á útbúgvingarkravið sambært § 8. stk. 1 upp móti einasta revsimøguleikanum í dagstovnalógini – at stongja frítíðarskúlan – við teimum fylgjum hetta hevði havt fyri børn og foreldur, ið brúka ansingartilboðið."

Við skrivi, dagfest 19. nov. 2004, vórðu viðmerkingarnar frá Tvøroyrar kommunu og Almanna- og heilsumálaráðnum sendar Pedagogfelagnum til ummælis.

Við skrivi, dagfest 8. des. 2004, sendi Føroya Pedagogfelag umboðsmanninum hesar viðmerkingar:

> „Vísandi til skriv tykkara dagfest 19.11.04 skulu vit við hesum boða frá, at vit hava lisið brævið dagfest 04.11.2004, sum N, advokatur vegna Tvøroyrar kommunu hevur borið umboðsmanninum og brævið frá landsstýrismanninum dagfest 15.11.2004.
>
> Vit hava hesar viðmerkingar til nevndu brøv:
>
> Viðv. Tvøroyrar kommunu.
>
> Í brævinum frá advokatinum hjá kommununi er eingin viðmerking yvirhøvur til kæru okkara, men hinvegin verður víst til skjølini 1 til 31, sum kommunan hevur latið umboðsmanninum, og sagt verður bert í skrivinum at **„málsgongdin skuldi framgingið av sær sjálvum“**.
>
> Vónandi skilir umboðsmaðurin, at vit ikki kunnu gera viðmerkingar til skjøl, sum vit ikki kenna.
>
> Vit hava avrit av nøkrum skjølum, men vit vita ikki um hetta partvíst eru somu skjøl, sum umboðsmaðurin hevur fingið.
>
> Vit skulu gera vart við:
>
> - at Tvøroyrar kommuna framvegis ikki hevur eftirlíkað áheitan okkara, um sambært fyrisitingarlógini, at lata okkum sum partsumboð avrit av øllum skjølum í málinum,
> - at vit staðiliga hava heitt á kommununa, um at senda okkum avrit av møguligum notati, sum lagt er fyri býráðið í sambandi við viðgerðina av umsóknini hjá A,
> - at vit staðiliga hava heitt á kommununa, um at upplýsa hvørjir aðrir upplýsingar annars eru lagdir fyri býráðið í sambandi við viðgerðina av umsóknini hjá A,
> - at kommunan framvegis tykist at royna at fjala veruligu umstøðurnar í málinum fyri felag okkara, hóast felagið er partsumboð hjá A,
> - at kommunan sambært orðingin av lýsingini søkti eftir **„pedagogi“** sum leiðara fyri frítíðarskúlan (sí hjálagda avrit),
> - at hugtakið „pedagogur“ er at skilja, sum persónur við pedagogútbúgving,

- at eingin áður hevur sett spurnartekin við nevnda hugtak,
- at kommunan ikki fyrr enn kæra varð send landsstýrismanninum, hevur sett spurnartekin við hugtakið pedagogur,
- at A, sum er útbúgvin pedagogur, søkti nevnda starv,
- at A hevur fingið sera gott skrivligt viðmæli frá leiðaranum fyri frítíðarskúlan,
- at býráðið hevur fingið nevnda viðmæli,
- at A hevur drúgvar royndir sum pedagogur,
- at A hevur starvast 3 ár á frítíðarskúlanum,
- at A ongantíð hevur fingið nakra átalu um arbeiði sítt,
- at A ikki varð kallað inn til samrøðu hjá kommununi,
- at býráðið við skrivi dagfest 13.08.04 boðar A frá, at orsøkin til at hon ikki fekk starvið var, at ***„tann, ið er sett hevur drúgvari royndir við børnum í skúlaaldri og hevur relevanta útbúgving, sum í hesum føri mest sum kann líkastillast við tygara“***,
- at býráðið í sama skrivi heitti á A, um at átaka sær fyribils starv sum leiðari í avmarkað tíðarskeið,
- at býráðið við skrivi dagfest 30.09.04 boðar A frá, at orsøkin til at hon ikki varð sett í starv sum leiðari var, ***„… at tygum ikki í nøktandi mun eru før fyri at stýra í „pressaðum situatiónum“***,
- at býráðið í skrivinum dagfest 30.09.04 vístu til innanhýsis fund millum foreldur og starvsfólk í barnagarðinum, har A verður skuldsett fyri at hava øst seg upp yvir lítið og einki og eisini at hava ***„brúkt ljótan munn“***,
- at tann ella teir býráðslimir, sum siga seg hava verið á nevnda fundi millum foreldur og starvsfólk í barnagarðinum, eftir øllum at døma hava lagt fyri býráðið upplýsingar (skuldsetingar), sum A ikki hevur fingið fyrilagdar,
- at A sostatt ikki hevur fingið høvi at gera viðmerkingar til nevndu upplýsingar (skuldsetingar, um m.a. at hava brúkt ljótan munn),
- at A hóast áheitanir, ikki hevur fingið upplýst hvat hon ítøkjuliga skal hava sagt, sum kann kallast at „brúka munn“ og sum kann geva ábendingar um, at hon „ikki í nøktandi mun er før fyri at stýra í pressaðum situatiónum“,
- at hesir upplýsingar (skuldsetingar) kortini tykjast hava verið beinleiðis orsøkin til, at byráðið avgjørdi ikki at seta A í starv,
- at talan tí er um brot av grundleggjandi fyrisitingarligar reglur um partshoyring,

- at spurnartekin helst kann setast við heimildina hjá tí ella teimum býráðslimum, sum siga seg hava verið við á fundi millum foreldur og starvsfólk í barnagarðinum, at geva víðari upplýsingar frá fundinum, serliga tá talan var um afturlatnan fund.

Vit undrast á, at ein kommuna so miðvíst kann seta til viks heilt grundleggjandi fyrisitingarreglur, tí veruleikin er tann, at A sum partur í málinum og felag okkara sum partsumboðan framvegis ikki hava fingið upplýst veruliga grundina til avgerðina, um ikki at seta A í starv sum leiðari fyri frítíðarskúlan, hóast A var einasti umsøkjari sum uppfylti tey krøv, sum bæði lýsingin og lógin seta fyri slíka starvssetan.

Greiðar ábendingar eru eisini um, at kommunan tilætlað og miðvíst royna at fjala veruligu umstøðurnar í málinum, tí hvørki A ella felag okkara hava enn fingið avrit av notatinum, sum vit skilja hevur verið avgerandi fyri avgerð býráðsins, og sum kommunan hevur talmerkt sum nr. 24 í teimum skjølum, sum vit skilja at umboðsmaðurin hevur fingið.

Vit undrast á, at ein kommunal fyrisiting og fólkavaldir býráðslimir so eyðsýniliga kunnu seta til viks heilt grundleggjandi fyrisitingarreglur, og vit kunnu bert staðfesta, at um slík framferð ikki fær avleiðingar, so kunnu føroysku kommunurnar hóreiggja sær sum teimum lystir, uttan at fylgja fyrisitingarlóg og øðrum lógum.

Vit heita á umboðsmannin, um at kanna nær umsøkjarin, sum søkti og fekk nevnda leiðarastarv hevur sent kommununi starvsumsókn sína.

Tað er eftir okkara meining sera átaluvert, tá fólkavaldir politikkarar, sum settir eru at umsita galdandi lóggávu, so miðvist bróta somu lóggávu, og tí vóna vit, at umboðsmaðurin viðgerð hesa kæru so gjølla sum tilber, tí bæði fyri A og onnur, sum framyvir fara at søkja starv, er tað umráðandi at fáa staðfest, at kommunurnar skulu halda galdandi lógir.

Viðv. B, landsstýrismanni.

Vit skulu fyrst viðmerkja, at vit framvegis halda, at málsviðgerðin hjá landsstýrismanninum ikki er í tráð við fyrisitingarlógina og fyrisitingarreglur annars.

Meginparturin av skrivinum frá landsstýrismanninum er ein gjøgnumgongd av málsgongdini, sum fyri meginpartin er púra irrelevant og í nógvum førum er villeiðandi.

Vit ivast eisini í, um Løgtingsins Umboðsmaður hevur fingið øll tey skjøl, sum eru í varðveitslu hjá Almanna- og Heilsumálaráðnum og her hugsa vit serliga um innanhýsisskjøl og notat, sum gjørd eru í sambandi við málsviðgerðina.

Viðvíkjandi semjuni, sum gjørd varð millum landsstýrismannin og býráðið tann 12.09.04, so skulu vit vísa á, at semjan bert kann skiljast sum ein tilsøgn frá landsstýrismanninum, um at taka stig til at broyta § 8 í dagstovnalógini, afturfyri, at býráðið skuldi taka starvsetanina aftur.

Tann sannroynd, at einki embætisfólk var við á fundinum kann sjálvsagt ikki frítaka landsstýrismannin fyri at viðgera hetta mál sakliga og sambært galdandi lóggávu.

Vit skulu gera vart við, at landsstýrismaðurin ikki, tá hann fekk skrivligu niðurstøðuna frá býráðnum, hevur gjørt vart við at talan ikki um nakra tilsøgn frá hansara síðu, og hetta bendir greitt á, at landsstýrismaðurin veruliga hevur „handlað" við býráðið og hevur eftirlíkað, at tikið stig til lógarbroyting fyri at fáa býráðið at fylgja greiðari lógaráseting.

Hetta í sjálvum sær er eitt greitt brot á vanligar fyrisitingarreglur, tí tað kann ikki bera til, at hægsti fyrisitingarligi leiðari skal lata sær lynda, at eitt býráð, sum tilætlað brýtir galdandi lóggávu skal kunna seta treytir fyri at fylgja hesari somu lóggávu.

Viðvíkjandi viðmerkingunum á síðu 6, 3. stk. so er orðingin skrivað soleiðis, at ein kann fáa fatan av, at umboð fyri Almanna- og Heilsumálaráðið longu tá hetta mál stakk seg upp, hevur tosað við formannin í Føroya Pedagogfelag um talan var um eina kæru.

Hetta er ikki rætt, tí tað er fyri stuttari tíð síðani at umboð fyri Almanna- og Heilsumálaráðið tosaði við formannin í felagnum og tá var kæra longu send Løgtingsins Umboðsmanni um hetta mál.

Hetta er bert eitt dømi um, hvussu landsstýrismaðurin roynir at snúgva sær undan ábyrgd sínari, tí veruleikin er tann, at hann hevur ikki víst vilja at skorið ígjøgnum í málinum, men hevur hinvegin latið kommuna stýra gongdini, og hetta síggja vit bæði í sambandi við „semjuna", sum gjørd varð á Tvøroyri og tá kommunan framvegis ikki vildi fylgja galdandi lóg, tí tá bakkaði landsstýrismaðurin beinanvegin og fann eina grundgeving fyri ikki at gera meira við hetta greiða lógarbrot, sum kommunan framdi og framvegis fremur (nú við óbeinleiðis góðkenning frá landsstýrismanninum).

Samanumtikið skulu vit endurtaka, at eftir okkara meting, so er skrivið frá landsstýrismanninum ein roynd at skava út yvir tann veruleika, at landsstýrismaðurin í sambandi við málsviðgerð sína ikki hevur hildið galdandi fyrisitingarlóg og fyrisitingarreglur annars."

Við skrivum, dagfest 10. des. 2004, vórðu viðmerkingarnar frá Pedagogfelagnum sendar Almanna- og heilsumálaráðnum og Tvøroyrar kommunu til ummælis.

Við telefaksi, dagfest 17. des. 2004, hevur Almanna- og heilsumálaráðið sent umboðsmanninum avrit av ymsum skjølum, sum ráðið hevði fingið, síðani umboðsmaðurin fekk skjølini fyrru ferð.

Við teldubrævi, dagfest 6. jan. 2005, hevur Almanna- og heilsumálaráðið sent umboðsmanninum avrit av svarinum frá landsstýrismanninum uppá fyrispurning í løgtingsmáli nr. 100-7/2004 um hetta málið.

Við skrivi, dagfest 11. jan. 2005, hevur Almanna- og heilsumálaráðið sent umboðsmanninum soljóðandi viðmerkingar:

> „Í skrivi dagfest 10. desember 2004 bjóða tygum undirritaða at gera viðmerkingar til skriv frá Føroya Pedagogfelag, ið varð latið tygum 8. desember, har Føroya Pedagogfelag m.a. ger sínar viðmerkingar til frágreiðingina frá mær til málið um setan av leiðara fyri frítíðarskúla á Tvøroyri.
>
> Føroya Pedagogfelag skrivar í sínum viðmerkingum at tey ivast í, at tygum hava fingið øll tey skjøl (í málinum), sum eru í varðveitslu hjá Almanna- og heilsumálaráðnum, serliga innanhýsis skjøl og notat, sum eru gjørd í sambandi við málsviðgerðina. Til tað er at siga, at tygum hava fingið avrit av øllum skjølunum í málinum, og at alt, sum hevur týdning fyri málsviðgerðina í AHR av hesum máli er skrásett í málinum.
>
> Mín leiklutur á umrødda fundinum við umboð fyri Tvøroyrar kommunu er til fulnar lýstur í frágreiðingini eg fyrr havi latið tygum.“

Við skrivi, dagfest 14. jan. 2005, boðaði umboðsmaðurin pørtunum frá, at hann fór at taka hetta málið upp til endaliga viðgerð, tí at hann einki hevði frætt aftur frá Tvøroyrar kommunu, eins og at landsstýrismaðurin ikki hevði fleiri viðmerkingar til hetta málið. Avrit av teimum 3 seinastu skrivunum frá Almanna- og heilsumálaráðnum vórðu samstundis send kommununi og Pedagogfelagnum til kunningar.

Við telefaksi, dagfest 17. jan. 2005, boðaði N, adv. umboðsmanninum frá, at umboðsmaðurin hevði fingið øll skjølini hjá Tvøroyrar kommunu í hesum máli.

## *Niðurstøða*

*§ 8 í løgtingslóg nr. 67 frá 10. mai 2000 um dagstovnar og dagrøkt (dagstovnalógin) er soljóðandi:*

> *„**§ 8.** Til tess at røkja tað dagliga arbeiðið, setir kommunan ein leiðara fyri dagstovnin ella dagrøktarskipanina við námsfrøðiligari útbúgving. Leiðari fyri sjálvsognarstovn verður settur av nevndini fyri stovnin. Starvið skal lýsast leyst alment.*
>
> *Stk. 2. Í serligum førum kann kommunan í tíðaravmarkað skeið víkja frá kravinum um, at leiðarin skal hava námsfrøðiliga útbúgving. Landsstýrismaðurin kann í kunngerð áseta reglur, sum heimila kommununum í heilt serligum førum at geva varandi undantaksloyvi frá útbúgvingarkravinum.*
>
> …“

Í viðmerkingunum til lógaruppskotið (løgtingsmál nr. 29 frá 1999) stendur soleiðis:

> *„**Ad. § 8**) Kravið, at leiðarin á stovninum ella dagrøktarleiðarin skal hava námsfrøðiliga útbúgving, t.v.s. vera pædagogur, er sett í lógina fyri at tryggja eitt fakligt støði á stovninum ella í dagrøktarskipanini.*
>
> …
>
> *Kommunan kann í serligum førum gera undantak frá hesum kravi. Hetta kann t.d. verða neyðugt í teimum smáu kommununum, tá ið eingin við námsfrøðiligari útbúgving søkir eitt leiðandi starv í einum dagstovni ella eini dagrøkt…“*

*Eg eri tí samdur við Almanna- og heilsumálaráðnum, tá sagt verður, at sambært lógini og viðmerkingunum merkir kravið um, at leiðarin skal hava námsfrøðiliga útbúgving, at viðkomandi skal vera útbúgvin pedagogur.*

*Tvinnar umsóknir vóru til avloysarastarvið í Frítíðarskúlanum á Tvøroyri. Annar umsøkjarin var útbúgvin lærari, og lýkur tí ikki krøvini, sum eru ásett í § 8, stk. 1 í dagstovnalógini. Tað var sostatt bert hin umsøkjarin, sum kundi koma uppá tal til starvið. Hesin umsøkjarin var útbúgvin pedagogur og hevði arbeitt á stovninum sum slíkur í 3 ár. Harumframt hevði hon eitt gott viðmæli frá leiðaranum á stovninum. Hóast hetta, tekur kommunan eftir tilmæli frá sosialu nevnd avgerð um at seta læraran í starvið. Einki er sagt um orsøkina til hetta, hvørki í*

*tilmælinum frá sosialu nevnd ella í gerðabókini hjá kommununi fyri hendan fundin. Tað finst heldur einki skjalatilfar í málinum, sum lýsir, hvørja viðgerð umsóknirnar hava fingið.*

*Í notatinum frá formanninum og næstformanninum í sosialu nevnd, dagfest 19. sept. 2004, og sum sostatt er skrivað stívliga 5 vikur aftaná, at setanin varð framd, verður greitt frá, at avgerð teirra var grundað á, hvussu pedagogurin skal hava uppført seg á einum fundi í barnagarðinum, har hon luttók sum foreldur. Til hetta er at siga, at eingin dokumentatión er fyri hesum uppáhaldum, sum heldur ikki eru nærri útgreinað. Víðari verður sagt í hesum notati, at leiðarar á øðrum kommunalum stovnum eisini eru spurdir til ráðs, og at hesir í flestu førum ikki hava hildið pedagogin vera egnaðan til leiðarastarvið.*

*Fyri tað fyrsta hevði kommunan skyldu til, tá møgulig ummæli vóru fingin til vega frá øðrum stovnsleiðarum, sambært § 6 í innlitslógini at gjørt notat frá hesum samrøðum. Eingi slík notat eru í málinum, hvørki viðvíkjandi hvønn tosað er við, ella hvat hesi møguliga hava sagt.*

*Fyri tað næsta hevði kommunan sambært § 18, stk. 1 í fyrisitingarlógini skyldu at kunna pedagogin um møgulig ummæli, sum ikki vóru til fyrimuns fyri hana, og at geva henni høvi til at koma við einum ummæli av hesum, áðrenn avgerð varð tikin í málinum. Hetta er als ikki gjørt – hvørki viðvíkjandi teimum úttalilsum, sum teir báðir limirnir í sosialu nevnd siga seg hava fingið frá øðrum stovnsleiðarum ella tí, sum skal vera hent á umrødda fundinum í barnagarðinum.*

*Reglan um partshoyring í § 18 í fyrisitingarlógini er ein sokallað „garantiforskrift", tvs. ein regla sum skal tryggja, at avgerðir verða tiknar á einum nøktandi og fullgóðum grundarlagi. Eg haldi talan vera um eitt so álvarsamt brot á hesa regluna, at avgerðin hjá kommununi má metast at hava verið ógildug.*

*Afturat hesum kemur, at kommunan heldur ikki hevur givið pedagoginum eina nøktandi grundgeving fyri avgerð sínari, hvørki í skrivinum frá 13. aug. ella 30. sept. 2004. Fyrru ferðina var grundgevingin beinleiðis skeiv, tí lærarin lýkur ikki lógarásettu krøvini fyri at gerast leiðari, og orðingin av skrivinum til pedagogin kundi eisini bent á, at kommunan var vitandi um hetta. Seinnu ferðina var eisini grundgivið við viðurskiftum, ið als eingin dokumentatión var fyri, og sum tað er ivasamt, um dentur annars yvirhøvur kundi verið lagdur á.*

*Kommunan hevur heldur ikki givið pedagoginum nakra kæruvegleiðing um, at talan var um eina avgerð, sum kundi kærast til lands-*

*stýrismannin í almannamálum. Hetta hevði kommunan annars skyldu til at gera sambært § 24, stk. 1 í fyrisitingarlógini.*

*Samanumtikið haldi eg talan vera um sera álvarslig brot á dagstovnalógina og grundleggjandi reglur í fyrisitingarlógini. Hendan málsviðgerðin hevur verið so óforsvarlig, at eg kann ikki annað enn geva kommununi eina sera álvarsliga átalu fyri handfaringina av hesum málinum.*

*Landsstýrismaðurin fer inn í hetta málið og hóttir við at steingja frítíðarskúlan, men tá á stendur bakkar hann. Í frágreiðingini frá Almanna- og heilsumálaráðnum til mín, dagfest 15. nov. 2004, stendur m.a. soleiðis:*

> ***„3. Samandráttur um leiklutin hjá AHR í málinum:***
> *AHR hevur verið eftirlitsmyndugleiki í hesum málinum, ikki kærumyndugleiki, og AHR hevur tí bert hoyrt Tvøroyrar kommunu í málinum fyri at gera sínar niðurstøður. Av tí at tað í AHR var ivi um leiklutin hjá Føroya Pedagogfelag í hesum máli, so varð felagið í telefonsamrøðu millum deildarstjóra í AHR og formannin í pedagogfelagnum spurt um áheitanin frá felagnum skuldi skiljast sum ein kæra, har felagið umboðaði námsfrøðingin, ið ikki fekk starvið. Svarið var, at tað var tað ikki. Pedagogfelagið varð eisini kunnað um, at hetta hevði týdning fyri hvør skuldi hoyrast í málinum."*

*Einki notat finst frá hesari samrøðuni í skjølunum hjá Almanna- og heilsumálaráðnum. Pedagogfelagið hevur hinvegin afturvíst hesum í ummæli sínum, dagfest 8. des. 2004, har tað stendur soleiðis:*

> *„Viðvíkjandi viðmerkingunum á síðu 6, 3. stk. so er orðingin skrivað soleiðis, at ein kann fáa fatan av, at umboð fyri Almanna- og Heilsumálaráðið longu tá hetta mál stakk seg upp, hevur tosað við formannin í Føroya Pedagogfelag um talan var um eina kæru.*
>
> *Hetta er ikki rætt, tí tað er fyri stuttari tíð síðani at umboð fyri Almanna- og Heilsumálaráðið tosaði við formannin í felagnum og tá var kæra longu send Løgtingsins Umboðsmanni um hetta mál.*
>
> *Hetta er bert eitt dømi um, hvussu landsstýrismaðurin roynir at snúgva sær undan ábyrgd sínari, tí veruleikin er tann, at hann hevur ikki víst vilja at skorið ígjøgnum í málinum, men hevur hinvegin latið kommuna stýra gongdini, og hetta síggja vit bæði í sambandi við „semjuna", sum gjørd varð á Tvøroyri og tá kommunan framvegis ikki vildi fylgja galdandi lóg, tí tá bakkaði landsstýrismaðurin beinanvegin og fann eina grundgeving fyri ikki at gera meira við hetta greiða lógarbrot, sum kommunan framdi og framvegis fremur (nú við óbeinleiðis góðkenning frá landsstýrismanninum)."*

*Ráðið sigur, at málið er viðgjørt sum eitt eftirlitsmál, tí at talan ikki er um nakra kæru frá felagnum. Hesum sjónarmiði eri eg ikki samdur í. Sambært skjølunum hjá Almanna- og heilsumálaráðnum byrjar málið í ráðnum aftaná, at Pedagogfelagið í trimum umførum ávikavist við telefaksi 17. aug. og við avriti av skrivum frá 17. og 19. aug. 2004 sendir ráðnum skjalatilfar í málinum. Viðlagt telefaksinum var eitt teldubræv frá A til felagið, umsókn hennara um starvið og tey bæði skrivini frá kommununi til hennara, dagfest 13. aug. 2004. Hetta skuldi verið ein greið ábending um, at felagið samsvarandi reglunum í § 8 í fyrisitingarlógini umboðaði A í hesum málinum. Um ráðið var í iva um hetta, átti ráðið at kanna hendan spurningin. Sum nevnt frammanfyri er eingin dokumentatión fyri, at hetta er gjørt. Felagið krevur eisini seinni í fleiri umførum, at landsstýrismaðurin ger nakað við hetta málið, m.a. í telefaksi, dagfest 30. aug. 2004, ið er soljóðandi:*

> ***„Viðv. setan av leiðara til Frítíðarskúlan á Tvøroyri.***
>
> *Sum tær kunnugt er starvssetan av leiðara farin fram, sum er í stríð við galdandi lóggávu.*
>
> *Tað hevur stóran týdning, at fáa hetta mál avgreitt beinanvegin, eisini sæð út frá, at pedagogurin, ið søkti leiðarastarvið, arbeiðir á stovninum, har lærari er møttur til arbeiðis sum leiðari.*
>
> *Felagið vil vísa á, at ónøgdin ímillum limir okkara er so stór, at tað endar við tiltøkum um landsstýrismaðurin ikki beinavegin fær málið avgreitt.*
>
> *Felagið væntar, at landsstýrismaðurin sær álvaran í, at greitt brot er framt á Dagstovnalógina og tískil fær málið avgreitt í dag.*
>
> *Vit vænta at frætta aftur beinanvegin."*

*Eg haldi tí talan vera um óneyðuga formalismu, tá ráðið sigur seg ikki hava móttikið nakra kæru. Tað er felagið, umboðandi pedagogin, sum biður landsstýrismannin (kærumyndugleikan) gera nakað við málið. Hóast orðið kæra ikki er nýtt í skrivunum frá felagnum, er tað fyri mær eingin ivi um, at talan er um eitt kærumál. Almanna- og heilsumálaráðið hevur eisini gjørt soljóðandi notat, dagfest 1. sept. 2004, frá telefonsamrøðu við Pedagogfelagið um hetta málið:*

> *„Undirritaða hevur í dag kl. 11:30 ringt til Føroya Pedagogfelag og boðað teimum frá, at málið viðvíkjandi Frítíðarskúlanum á Tvøroyri liggur til avgreiðslu hjá aðalstjóra og landsstýrismanni. Partshoyringsskriv verður sent Tvøroyrar kommunu í dag.*
>
> *Eisini heitti undirritaði á felagið, um at bíða við at gera nakað víðari í málinum, fyrrenn felagið hevur fingið avrit av skrivinum, ið verður sent*

*Tvøroyrar kommunu frá Almanna- og heilsumálaráðnum. Vónandi verður hettar seinni í dag.“*

*Heimildirnar hjá Almanna- og heilsumálaráðnum eru ásettar í lógini, har tað stendur soleiðis:*

*„Eftirlit*

*§ **10.** Kommunurnar hava eftirlit við dagstovnum og dagrøktum.*

*Stk. 2. Landsstýrismaðurin hevur yvirskipaða eftirlitið við, at kommunurnar umsita dagstovnar og dagrøktir sambært hesi lóg.*

*Stk. 3. Kommunan ella landsstýrismaðurin kann steðga virkseminum á einum dagstovni ella dagrøkt, um krøvini í lógini ikki verða hildin.*

*Stk. 4. Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um eftirlit.*

*Kærumøguleiki*

*§ **11.** Avgerðir, tiknar av kommununi sambært hesi lóg, kunnu kærast til landsstýrismannin.*

*…“*

*Umframt at hava yvirskipaða eftirlitið við, at kommunurnar umsita dagstovnar sambært lógini, er landsstýrismaðurin eisini kærumyndugleiki viðvíkjandi teimum avgerðum, sum kommunurnar hava tikið sambært § 8, stk. 1 í lógini. Eingin ivi kann vera um, at ein slík starvssetan er ein avgerð. Landsstýrismaðurin hevði tí fulla heimild at eftirkanna øll viðurskifti í sambandi við avgerðina hjá kommununi í hesum setanarmálinum umframt at broyta ella ógilda avgerðina, um hann helt tað vera rættast.*

*Advokaturin hjá Tvøroyrar kommunu hevur ført fram, at tað ikki var landsstýrismaðurin í almannamálum, men landsstýrismaðurin í kommunumálum, sum var rætti eftirlitsmyndugleiki. Henda spurning hava Almanna- og heilsumálaráðið og Innlendismálaráðið umrøtt, og eg eri samdur við teimum, at tað er landsstýrismaðurin í almannamálum, sum hevur eftirlitið og er kærumyndugleiki í málinum.*

*Í skrivi, dagfest 27. sept. 2004, áleggur landsstýrismaðurin kommununi antin at seta pedagogin í starvið ella at geva henni eina nøktandi grundgeving fyri, hví hon ikki fekk starvið. Sambært avgerðini, dagfest 1. okt. 2004, sum er send kommununi, tykist Almanna- og heilsumálaráðið sláa seg til tols við, at kommunan hevur ógildað upprunaligu setanina, hevur givið vrakaða pedagoginum eina „grundgeving“, og hevur gjørt av fyribils at seta læraran í starvið, meðan hetta verður lýst leyst av nýggjum. Í skrivinum stendur m.a. soleiðis:*

*„Niðurstøða um upprunaliga setanarmálið:*

*Almanna- og heilsumálaráðið kann staðfesta, at umsøkjarin nú hevur fingið eina grundgeving fyri, hví kommunan ikki ynskir at seta viðkomandi í starv.*

*Almanna- og heilsumálaráðið sær seg* ***sum eftirlitsmyndugleiki*** *ikki ført fyri betri enn Tvøroyrar kommuna at kunna meta um tað materiella innihaldið í grundgevingini, sum snýr seg um vantandi persónligar eginleikar hjá umsøkjaranum at røkja starvið sum leiðari í frítíðarskúlanum. Kommunan er setanarmyndugleikin, og treytað av at hon lýkur formligu krøvini, so má vera rúm fyri eini meting hjá kommununi.*

*Almanna- og heilsumálaráðið metir tí, at Tvøroyrar kommuna við grundgevingini hevur avgreitt upprunaliga setanarmálið, sambært teimum treytum, ið settar vórðu í skrivinum frá landsstýrismanninum 27. september 2004, og soleiðis sum málið er upplýst fyri Almanna- og heilsumálaráðnum annars – tað er, at býráðið tekur avgerðir í setanarmálum av hesum slag."*

*Tað er rætt, at kommunan sum setanarmyndugleiki er tann, sum best átti at verið før fyri at mett um umsøkjararnar. Men í hesum førinum var talan ikki einans um at meta um umsøkjararnar, men hinvegin um at grundleggjandi brot vórðu framd á reglurnar í fyrisitingarlógini, eins og § 8 í dagstovnalógini heldur ikki var hildin, og tí átti Almanna- og heilsumálaráðið ikki at havt slept málinum, eins og gjørt var.*

*Sum nevnt samtykti Tvøroyrar býráð 14. sept. 2004 at ógilda fyrru setanina. Hetta kann eg einans taka undir við. Men samstundis samtykti býráðið at konstituera læraran í starvið, hetta hóast kommunan hevði ein umsøkjara, sum leyk formellu førleikakrøvini til starvið, sum kendi arbeiðsgongdina og arbeiddi í Frítíðarskúlanum, sum hevði eitt gott ummæli frá hesum sama dagstovni, og sum var góð nokk at røkja starvið ta fyrstu tíðina, tá setti lærarin var burturstaddur.*

*Henda konstituering skuldi sambært avgerðini bert vera fyribils, til nýggjur umsøkjari varð settur. Sambært upplýsingum frá Tvøroyrar kommunu er starvið framvegis ikki lýst leyst av nýggjum. Í telefonsamrøðu 5. apríl 2005 hevur borgarstjórin upplýst fyri umboðsmanninum, at ein nýggj lýsing er við at verða skrivað. Hetta hendir nú meira enn eitt hálvt ár aftaná, at samtykt var at lýsa starvið leyst av nýggjum. Eg haldi tí ikki, at Tvøroyrar kommuna við avgerðini frá 14. sept. 2004 hevur gjørt annað enn at royna at umganga reglurnar í dagstovnalógini. Hesum átti Almanna- og heilsumálaráðið eftir mínari fatan at*

*havt fylgt upp. Vísandi til hetta fari eg umframt at geva Almanna- og heilsumálaráðnum eina álvarsliga átalu fyri handfaring sína av málinum, at mæla ráðnum til, at taka neyðug stig til at fáa viðurskiftini í rættlag sum skjótast.*

*Av tí, at eg haldi talan vera um, at álvarslig mistøk eru framd í hesum máli, fari eg sambært § 10, stk. 1 í umboðsmanslógini at kunna formansskapin í Løgtinginum, løgmann og landsstýrismannin í almannamálum um hetta málið. Burtursæð frá hesum geri eg ikki meira í løtuni, men fari at biðja Almanna- og heilsumálaráðið lata meg frætta, hvørja niðurstøðu ráðið kemur til.*

Við skrivi, dagfest 13. apríl 2005, hevur Almanna- og heilsumálaráðið kunnað umboðsmannin um, at ráðið hevði álagt Tvøroyrar kommunu beinanvegin at lýsa alment eftir einum leiðara fyri Frítíðarskúlan á Tvøroyri, og at hesin skuldi hava útbúgving sum námsfrøðingur. Um hetta ikki bleiv gjørt í seinasta lagi 21. apríl 2005, kl. 9, fór ráðið at steðga virkseminum á frítíðarskúlanum við fútaforboði.

Tvøroyrar kommuna lýsti síðani starvið leyst.

Pedagogfelagið hevur sent umboðsmanninum avrit einum skrivi, dagfest 14. apríl 2005, ið er undirskrivað av leiðaranum á Dagstovninum Mýrifípuni og táverandi formanninum í sosialu nevnd hjá Tvøroyrar kommunu. Í hesum skrivi verður tað avsannað, sum stóð í notatinum frá 19. sept. 2004, um at leiðarar á øðrum kommunalum stovnum eisini eru spurdir til ráðs, og at hesir í flestu førum ikki hava hildið pedagogin vera egnaðan til leiðarastarvið. Sagt verður í skrivinum, at ongin leiðari hjá kommununi er spurdur um nakað viðvíkjandi hesum málinum.

## 28.4. Avgerð hjá Kærunevndini hjá Arbeiðsloysisskipanini.

A hevði frá arbeiðsávísingini tann 12. august 2004 fingið boð um at venda sær til ein arbeiðsgevara um møguligt arbeiði. A var tann 19. august 2004 til samrøðu hjá arbeiðsgevaranum og fekk bjóðað starvið. Dagin eftir boðaði A arbeiðsgevaranum frá, at hon ikki var sinnað at átaka sær ávísta arbeiðið.

Tann 22. september 2004 tók Arbeiðsloysisskipanin (ALS) avgerð um at steðga útgjaldi av arbeiðsloysisstuðli til A frá og við 21. august 2004, av tí at ALS ikki metti, at A longur var tøk á arbeiðsmarknaðinum. Kærunevndin hjá ALS staðfesti hesa avgerð tann 5. november 2004. Tann 31. mars 2005 sendi Rættarhjálp Føroya, vegna A, eina klagu til umboðsmannin viðvíkjandi avgerðini.

Umboðsmaðurin metti fyri tað fyrsta, at ALS-stýrið ikki hevði heimild til at áseta nærri reglur í kunngerð viðvíkjandi treytunum í § 14, stk. 1 í ALS-lógini. Harumframt metti hann tað verða ein álvarsligan vanda fyri rættartrygdina hjá borgaranum at áseta rættarreglur um kanska víðfevnd inntriv í støðuna hjá teimum, uttan at hesar reglur verða kunngjørdar í almenna kunngerðarblaðnum. Vísandi til § 12 í umboðsmanslógini mælti umboðsmaðurin tí landsstýrismanninum í vinnumálum til at taka til umhugsunar at broyta mannagongdina hjá ALS soleiðis, at í øllum førum kunngerðir av stórum týdningi fyri borgararnar, verða lýstar í kunngerðarblaðnum. Samstundis mælti umboðsmaðurin landsstýrismanninum til at fáa samsvar ímillum kunngerð um útgjald v.m. av arbeiðsloysisstuðli og ALS-lógina.

Viðvíkjandi sjálvari avgerðini hjá Kærunevndini hjá ALS kom umboðsmaðurin til ta niðurstøðu, at avgerðin hjá Kærunevndini hjá ALS var skeiv og mælti tí nevndini til at taka kæruna upp til nýggja viðgerð. Umboðsmaðurin metti, at hetta málið átti at verið viðgjørt eftir § 19 í ALS-lógini, soleiðis at A misti rættin til 4 vikurs tryggingarútgjald, men ikki soleiðis at útgjaldið av arbeiðsloysisstuðli varð steðgað.

Umframt hetta gav umboðsmaðurin ALS eina átalu fyri ikki at hava kunnað A nóg skjótt og nóg væl um støðuna, hon var komin í. (J. nr. 200400039)

## Klagan

Tann 31. mars 2005 sendi Rættarhjálp Føroya, vegna A, soljóðandi klagu til umboðsmannin:

**„Viðvíkjandi klagu um avgerð hjá Kærunevndini hjá Arbeiðsloysisskipanini**

A, …, vendi sær 30. september 2004 til Rættarhjálp Føroya, av tí at Arbeiðsloysisskipanin (ALS) hevði gjørt av at steðga útgjaldinum úr ALS frá og við 21. august 2004. Rættarhjálp Føroya kærdi, vegna A, málið til kærunevndina hjá Arbeiðsloysisskipanini. Kærunevndin avgjørdi í skrivi, dagfest 5. november 2004, at staðfesta avgerðina hjá ALS.

*Lýsing av málinum*

Sambært skrivi frá ALS, dagfest 20. august 2004, var mett, at A ikki var tøk á arbeiðsmarknaðinum, av tí at hon ikki hevði átikið sær tað arbeiði, ið hon fekk bjóðað frá … Skipasmiðju 20. august 2004. ALS metti tí ikki, at hon hevði rætt til arbeiðsloysisstuðul úr skipanini.

Seinastu tvey árini, frá umleið oktober 2002 til oktober 2004, hevur A verið fimm ferðir til samrøðu hjá arbeiðsgevara. Ongar av hesum samrøðum hava ført til starvsetan. Hetta var tí fyrstu ferð, at A ikki tók av einum arbeiðstilboði, og metti hon seg, aftaná ikki at hava átikið sær ítøkiliga starvið, framvegis at vera tøkan á arbeiðsmarknaðinum.

A helt, at hon sum arbeiðsleys í mesta lagi kundi missa rættin til tryggingargjald í 4 vikur, sbrt. § 19 í løgtingslóg nr. 113 frá 13. juni 1997 um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing.

ALS upplýsti í skrivinum, dagfest 20. august 2004, at ALS aftaná at A hevði sent frágreiðing til ALS, fór at gera eina meting av, um hon misti rættin til arbeiðsloysisstuðul í 4 vikur, sbrt. § 19 í lógini, og/ella um hon framhaldandi var at meta sum tøk á arbeiðsmarknaðinum.

Onki var nevnt í skrivinum frá ALS um, at fylgjan av ikki at átaka sær júst hetta arbeiði kundi verða, at útgjaldið steðgaði, um ALS ikki metti hana vera tøka á arbeiðsmarknaðinum.

Ásetingarnar í lógini um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing, sum viðgera rættin hjá tí arbeiðsleysa til tryggingarútgjald, eru í §§ 18-19. Arbeiðsleysur, sum er uppsagdur vegna tænastumisbrot, sum sjálvur uttan haldgóða grund hevur sagt seg úr starvi, ella ikki vil átaka sær ávíst arbeiði, hevur ikki rætt til arbeiðsloysisstuðul í 4 vikur, sbrt. §§ 18 og 19. Harafturat eru í §§ 22-23 reglur um, hvussu leingi fólk kunnu vera í skipanini.

Í skrivi frá ALS, dagfest 22. september 2004, varð fráboðað A, at ALS ikki metti hana vera tøka á arbeiðsmarknaðinum. Víst varð í nevnda skrivi til § 19 og § 24, stk. 2 í lógini, sum ásetur, at Føroyar eru at rokna sum ein arbeiðsmarknaður. Eisini verður víst til § 14, stk. 1 í lógini, og til § 2 í kunngerð um útgjald v.m. av arbeiðsloysisstuðli frá 26. november 1999, sum m.a. snýr seg um, nær tann arbeiðsleysi er tøkur á arbeiðsmarknaðinum.

ALS kemur til ta niðurstøðu, at tá A *ikki hevur verið sinnað at átaka sær ávísta arbeiði, verður í hennara føri konkret mett, at hon ikki er tøk á arbeiðsmarknaðinum, og hevur harvið ikki rætt til arbeiðsloysisstuðul frá Arbeiðsloysisskipanini.*

Kærunevndin hjá ALS staðfesti avgerðina hjá ALS og vísti m.a. til ásetingarnar í § 2 í kunngerðini um útgjald, *harav framgongur, at tøkur á arbeiðsmarknaðinum er tann, sum er sinnaður at átaka sær eitt og hvørt arbeiði, ávist av ALS, og sum viðkomandi hevur fakligan førleika til, og til ásetingina í § 24, stk. 2 í ALS-lógini, um at allar Føroyar eru at rokna sum ein arbeiðsmarknaður í sambandi við arbeiðsávísing.*

Kærunevndin viðmerkti tó, at *skrivið frá ALS, dagfest 20. august 2004, er ógreitt, tá tað ikki beinleiðis framgongur, at ein grundgeving, ið avmarkar arbeiðsøkið hjá hinum arbeiðsleysa, førir við sær, at hin arbeiðsleysi ikki verður mettur at vera tøkur á arbeiðsmarknaðinum. Ógreiða skrivið gevur tó ikki Kærunevndini høvi til at broyta avgerðina hjá ALS.*

Grundgevingin hjá kærunevndini verður ikki mett at vera nøktandi, sbrt. § 23 í fyrisitingarlógini. Grundgivið er ikki fyri, hvussu kærunevndin er komin fram til, at fyrsta arbeiðstilboðið, sum A ikki tók av, orsakað av serligum umstøðum, ikki er fevnt av § 19 í lógini, hóast hetta er nakað, sum er ført fram av kæraranum.

Klagan snýr í fyrsta lagi um, at hóast A ikki var mett at vera tøk til júst hetta eina ávísa arbeiðstilboðið, er kærarin annars at meta sum tøk á arbeiðsmarknaðinum, bæði tí at hetta er einasta arbeiðstilboði, sum hon ikki hevur tikið av, og tí at hon hevur upplýst, at hon eftir hetta fekk arbeiði. Í øðrum lagi snýr klagan seg um, at heimild ikki er í lógini til, at niðurstøðan hjá ALS og kærunevndini um, at A ikki hevur verið tøk til nevnda arbeiðstilboð, kann fáa ta fylgju, at útgjaldið verður steðgað. Sambært § 19 í lógini er bara heimild til at steðga útgjaldinum í 4 vikur, um arbeiðsleysur uttan serliga orsøk noktar at taka á seg arbeiði, ávíst av arbeiðsávísingini. Reglurnar í lógini um rættin til útgjald í slíkum føri mugu metast at vera tømandi, og mett verður tí ikki, at heimild er í lógini

til at steðga útgjaldinum í meira enn 4 vikur grundað á, at takkað verður nei til einstakt tilboð.

Í viðmerkingunum til § 14 í lógini verður sagt:

„Ein persónur er ikki tøkur, um hann / hon til dømis er sjúkur, er í barnsburðarfarloyvi, er raktur av verkfalli ella verkbanni, er undir útbúgving, **noktar at taka ímóti arbeiði, ið ávísingin ávísir honum/henni, uttan haldgóða grund heldur uppat við arbeiði sínum ella verður uppsagdur av orsøkum, ið kunnu roknast at hann / hon sjálv / ur er orsøk til.**"

Sum sæst í seinnu helvt av viðmerkingunum eru hetta júst somu orðingar, sum lóggevari hevur nýtt í §§ 18 og 19 í lógini. Lóggevari hevur sostatt tikið støðu til, hvør fylgjan skal verða, tá ikki verður tikið av slíkum arbeiðstilboði, nevniliga at tann arbeiðsleysi missir rættin til tryggingargjald í 4 vikur.

Um ALS skuldi mett, at rættarstøðan er broytt við t.d. siðvenju, sum ikki sæst í lógini, átti ALS í øllum førum at fráboðað tí arbeiðsleysa, hvør fylgjan kann verða av ikki at taka av nevnda arbeiðstilboði, serliga tá tað snýr seg um so víðgongda fylgju. Tað er tó onki í skrivunum, hvørki frá ALS ella kærunevndini, sum týðir á, at henda avgerð, sum ikki sæst hava heimild í lógini, er grundað á t.d. siðvenju. Mett verður, at ein møgulig siðvenja í øllum føri eigur at taka hædd fyri vanligum óskrivaðum rættargrundreglum, so sum lutfalsmeginregluni (proportionalitetsprincippet).

Av tí at tað ikki verður mett, at heimild er í lógini til slíka niðurstøðu, sum ALS og kærunevndin hjá ALS eru komin til í nevndu skrivum, skal Rættarhjálp Føroya við hesum, vegna A, klaga avgerðina hjá ALS, og staðfestingina hjá kærunevndini hjá Arbeiðsloysisskipanini, dagfest 5. november 2004, til Løgtingsins umboðsmann.

Avrit av skrivum frá ALS og kærunevndini hjá ALS eru hjáløgd."

## Málsgongd

Sambært skjølunum hevur gongdin í málinum verið hendan:

Tann 16. juli 2002 boðaði A skrivliga Arbeiðsloysisskipanini frá, at hon var tøk á arbeiðsmarknaðinum frá hesum degi.

Tann 22. juli 2002 sendi Arbeiðsloysisskipanin soljóðandi skriv til A:

**„Viðvíkjandi umsókn tygara um arbeiðsloysisstuðul**
Arbeiðsloysisskipanin váttar við hesum at hava móttikið fráboðan tygara tann 16. juli 2002. Í hesum sambandi verða tygum biðin um at koma til eina samrøðu á skrivstovuni hjá Arbeiðsloysisskipanini, á Smyrilsvegi 20 í Tórshavn, hósdagin 15 08 2002 kl. 9:30.

Byrjað verður við eini felagskunning kl. 9.30, ið varar umleið 1-1 $^1/_2$ tíma, har ein málsviðgeri greiður frá rættindum og skyldum hjá tí arbeiðsleysa. Aftaná verður ein persónlig samrøða, har umsóknarblaðið verður gingið ígjøgnum. Eisini kunnu onnur viðurskifti vera, sum tygum ella Arbeiðsloysisskipanin skulu hava greiðu á. Hetta kann bæði snúgva seg um tryggingar- og ávísingarspurningar. Roknað verður við, at hesar samrøður taka ímillum 2-4 tímar í alt, og skulu tygum tí ikki hava børn við.

Vit skulu gera vart við, at tygum hava skyldu at møta hjá Arbeiðsloysisskipanini tann dagin, sum nevndur er omanfyri.

Í hesum sambandi verður víst til § 2, stk. 1, nr. 4 í Kunngerð um útgjald v.m. av arbeiðsloysisstuðli frá 26. november 1999, við seinni broytingum. Her er ásett, at:

*„§ 2, stk. 1. Tøkur á arbeiðsmarknaðinum er tann, sum:*

*Nr. 4. seinast dagin eftir, um boð verða givin um hetta, kann møta hjá Arbeiðsloysisskipanini til ásetta tíð.*"
Um so er, at tygum ikki fáa møtt til ásettu tíð, verða tygum biðin um at seta tygum í samband við Arbeiðsloysisskipanina so skjótt sum gjørligt, og innan omanfyri nevndu tíð. Møta tygum ikki, verður mett, at tygum hava tikið umsóknina aftur.

Ferðaútreiðslur verða endurgoldnar sambært vanliga kostnaðinum við almenna ferðasambandinum.

Roknað verður við, at umleið 2-4 vikur ganga, áðrenn umsókn tygara er endaliga viðgjørd. Fyri at tygum ikki skulu missa rættin til útgjald fyri ta tíðina, umsóknin verður viðgjørd, verða tygum biðin um at lata inn ALS-kort teir ALS-dagar, ið eru fráboðaðir á ALS-kalendaranum. ALS-kort eru at fáa á posthúsunum og á skrivstovuni hjá Arbeiðsloysisskipanini. Arbeiðsloysisstuðul verður tó ikki útgoldin, fyrr enn tygum hava verið til samrøðu hjá Arbeiðsloysisskipanini.

Tygum verða vinarligast biðin um at útfylla hjáløgdu umsókn, og hava hana við til samrøðuna. Somuleiðis verða tygum biðin um at hava uppsøgn / váttan frá / til seinasta arbeiðsgevara tygara við til samrøðuna.

Hava tygum viðmerkingar hesum viðvíkjandi, verða tygum biðin um at seta tygum í samband við okkum innan 14 dagar."

Í samband við fund við Arbeiðsloysisskipanina, hevur klagarin skrivað undir uppá, at hon hevur lisið niðanfyristandandi leiðbeining, dagfest 16. august 2002 og adresserað til klagaran:

**„UMSÓKN**
**um arbeiðsloysisstuðul**
**Leiðbeining**

**Treytirnar fyri at fáa rætt til útgjald eru, at tú:**

- Ert arbeiðsleys / ur og mótvegis Arbeiðsloysisskipanini prógvar at so er,
- Ert tøk / ur á arbeiðsmarknaðinum,
- Hevur fylt 16, men ikki 67 ár,
- Hevur bústað í Føroyum og
- Ert arbeiðsfør / ur.

Í sambandi við at tú fært útgoldið arbeiðsloysisstuðul, hevur tú skyldu til at taka av arbeiði, sum arbeiðsávísingin hevur til tín. Allar Føroyar eru at rokna sum ein arbeiðsmarknaður. Tú mást soleiðis verða fyrireikað/ur at átaka tær arbeiði allastaðni í Føroyum.

Seinast dagin eftir at eitt arbeiði verður ávíst, skalt tú kunna byrja hetta arbeiðið.

Um tú noktar at taka av arbeiðstilboði uttan serliga orsøk, missir tú rættin til arbeiðsloysisstuðul í 4 vikur.

Eru heilsuligar orsøkir, sum gera, at tú ikki kanst átaka tær eitt og hvørt arbeiði, skal læknaváttan vera til skjals.

**Skjøl, sum skulu latast inn saman við umsóknarblaðnum:**

**Løntakarar og onnur:**

- Uppsøgn frá arbeiðsgevara ella
- Uppsøgn til arbeiðsgevara.

**Sjálvstøðug vinnurekandi:**

- Sjálvuppgáva og skattarokskapur fyri síðst lokna roknskaparár, áðrenn arbeiðsloysið. Herumframt neyðug skjøl, sum prógva, at persónliga arbeiði títt í virkinum er hildið uppat.

Umsóknarblaðið skal fyllast út nágreiniliga. Vanta upplýsingar ella neyðug skjalprógv, loyvir Arbeiðsloysisskipanin eini 14 daga freist, frá tí at umsókn er móttikin á ALS, til at útvega neyðugu skjølini.

Um tú gevur skeivar ella misvísandi upplýsingar, verða upphæddir, sum av órøttum eru útgoldnar, kravdar afturgoldnar, og tú kanst verða revsað/ur við sekt ella hefti.

Vend tær til ALS og fá nærri at vita, um tú ivast.

Vinarliga fyll umsóknarbláðið út við spjaldrastavum."

Tann 20. august 2004 sendi Arbeiðsloysisskipanin soljóðandi skriv til klagaran:

**„Viðvíkjandi arbeiðstilboði**

Tygum hava fingið áheitan frá arbeiðsávísingini tann 12. august 2004 um at venda tygum til … Skipasmiðju um møguligt arbeiði.

Tygum vóru til samrøðu og tann 19. august 2004 fingu tygum bjóðað starvið. Av tí at tygum í telefonsamrøðu við arbeiðsgevara tann 20. august 2004 boðaðu frá, at tygum ikki eru sinnað at átaka tygum ávíst arbeiðið, verður víðari mannagongdin henda.

Tygum eru í løtuni skrásett/ur sum arbeiðstøk / ur í arbeiðsávísingini og fáa arbeiðsloysisstuðul útgoldnan. Men av tí at tygum ikki vóru sinnað / ur at átaka tygum ávísta arbeiðið, verða tygum biðin um at geva Arbeiðsloysisskipanini eina skrivliga frágreiðing hesum viðvíkjandi. Frágreiðingin skal verða Arbeiðsloysisskipanini í hendi innan 27. august 2004.

Kontaktpersónur tygara er B, varaleiðari.

Arbeiðsloysisskipanin ger síðani eina meting av, um tygum missa rættin til arbeiðsloysisstuðul í 4 vikur, sambært § 19 í løgtingslóg um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing, og/ella um tygum framhaldandi eru at meta sum tøk/ur á arbeiðsmarknaðinum.

Fyribils er 20. august 2004 seinasti dagur tygum fáa útgjald."

Tann 26. august 2004 sendi klagarin soljóðandi skriv til Arbeiðsloysisskipanina:

„Viðvíkjandi arbeiðstilboði. J.nr. …

Hin 20. august 2004 fekk eg bjóðað starv á … Skipasmiðju. Sjálvt um eg fegin vil sleppa at arbeiða, valdi eg tó, ikki at átaka mær hetta starvið.

Orsøkin er m.a. tann, at eg eigi ongan bil. Í løtuni láni eg ein, men tað er bert eitt stutt tíðarskeið. So eg skuldi ferðast við bussi, og tá skuldi eg við bussleiðini av … kl. 6.22 og so víðari við Bygdaleiðum kl. 7.00. Eg

hevði so verið heima aftur kl. 17.30. Hetta meti eg vera ov langan arbeiðsdag.

Nú stendur veturin fyri durðum, og er tað nakað eg ræðist, so er tað at koyra í hálku og kava.

Vónandi skilja tit støðu mína.“

Tann 22. september 2004 tók Arbeiðsloysisskipanin avgerð um at steðga útgjaldi til klagaran frá og við 21. august 2004. Avgerðin var soljóðandi:

**„Viðvíkjandi arbeiðstilboðið frá arbeiðsávísingini.**

Arbeiðsloysisskipanin hevur tann 27. august 2004 móttikið skrivligu frágreiðing tygara í sambandi við eitt arbeiðstilboð. Her skriva tygum millum annað:

„Hin 20. august 2004 fekk eg bjóðað starv á … Skipasmiðju. Sjálvt um eg fegin vil sleppa at arbeiða, valdi eg tó, ikki at átaka mær hetta starvið.

Orsøkin er m.a. tann, at eg eigi ongan bil. Í løtuni láni eg ein, men tað er bert eitt stutt tíðarskeið. So eg skuldi ferðast við bussi, og tá skuldi eg við Bussleiðini av … kl. 6:22, og so víðari við Bygdaleiðum kl. ca. 7:00. Eg hevði so verið heima aftur ca. kl. 17:30. Hetta meti eg at vera ov langan arbeiðsdag.

Nú stendur veturin fyri durðum, og er tað nakað eg ræðist, so er tað at koyra í hálku og kava.“

Víst skal í hesum sambandi verða til § 19 og § 24, stk. 2 og 3 í Løgtingslóg um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing frá 13. juni 1997, við seinni broytingum. Har er ásett, at:

*„§ 19. Arbeiðsleysur, sum uttan serliga orsøk noktar at taka á seg arbeiði ávíst av arbeiðsávísingini, missur rættin til tryggingarútgjald í 4 vikur.*

*§ 24. stk. 2. Allar Føroyar eru at rokna sum ein arbeiðsmarknaður í sambandi við arbeiðsávísing.*

*Stk. 3. Ikki er loyvt at seta fakmørk fyri arbeiðsávísing, burtursæð frá neyðugum førleika.“*

Og til § 14, stk. 1:

*„14. Arbeiðsloysisstuðul verður útgoldin, tá viðkomandi:*

1. *er arbeiðsleysur og mótvegis Arbeiðsloysisskipanini prógvar, at so er,*
2. *er tøkur á arbeiðsmarknaðinum,*
3. *hevur fylt 16 ár, men ikki 67 ár,*

*4. hevur bústað í Føroyum og*

*5. er arbeiðsførur.“*

Somuleiðis skal verða víst til § 2, stk. 1 nr. 2 og 3 og stk. 2 nr. 2, og stk. 3 og 4 í Kunngerð um útgjald v.m. av arbeiðsloysisstuðli frá 26. november 1999, við seinni broytingum. Har er ásett, at:

*„§ 2. Tøkur á arbeiðsmarknaðinum er tann, sum:*

*Nr. 2. er sinnaður at átaka sær eitt hvørt arbeiði, ávíst av Arbeiðsloysisskipanini, og sum viðkomandi hevur fakligan førleika til,*

*Nr. 3. seinast dagin eftir, um eitt arbeiði verður ávíst, kann byrja hetta arbeiði til ásetta tíð.*

*Stk. 2. tann arbeiðsleysi hevur skyldu at átaka sær eitt og hvørt arbeiði í Føroyum. Undantak frá hesum verður t.d. ikki givið hóast:*

*Nr. 2. arbeiðið ikki hevur áhuga, t.d. vegna slag av arbeiði, arbeiðstíðum ella lønarviðurskiftum.*

*Stk. 3. Undantak frá stk. 1, nr. 3 og 4 kann tó verða givið, um:*

*Almenna ferðasambandið ikki virkar vegna t.d. verkfalll ella ringt veður, ella viðkomandi ikki fær møtt vegna sjúku, sum kann staðfestast við læknaváttan.*

*Stk. 4. Undantak frá stk. 1, nr. 2 og 3 og stk. 2. kann í serligum førum verða givið:*

*nr. 1. um lønin fyri ávísta arbeiði er lægri enn sáttmálalønin fyri slíkt arbeiði,*

*nr.2. um daglig ferðing til og frá arbeiði ikki er møgulig, og bústaðarviðurskiftini á staðnum, har arbeiði er, eru sea vánalig, ella*

*nr. 3, um talan er um serliga vánaligar ferðamøguleikar til og frá arbeiði, og viðkomandi er einligur við smærri børnum.*

*Nr. 2. um daglig ferðing til og frá arbeiði ikki er møgulig, og bústaðarviðurskiftini á staðnum, har arbeiðið er, eru sera vánalig, ella*

*Nr. 3. um talan er um serliga vánaligar ferðamøguleikar til og frá arbeiði, og viðkomandi er einligur við smærri børnum.*

Sambært omanfyri endurgivnu § 2, stk. 1 skulu tygum verða sinnað at átaka tygum eitt og hvørt arbeiði tygum hava fakligan førleika til, sum Arbeiðsloysisskipanin hevur at ávísa, og skulu tygum seinast dagin eftir arbeiði verður ávíst, kunna byrja hetta arbeiði til ásetta tíð. Sambært § 2, stk. 2 hava tygum skyldu at átaka tygum eitt og hvørt arbeiði í Føroyum, og verður undantak frá hesum ikki givið hóast t.d. um arbeiði ikki hevur áhuga, t.d. vegna slag av arbeiði, arbeiðstíðum ella lønarviðurskiftum.

Tá tygum ikki hava verið sinnað at átaka tygum ávísta arbeiði verður í tygara konkreta føri mett, at tygum ikki eru tøk á arbeiðsmarknaðinum, og hava tygum harvið ikki rætt til arbeiðsloysisstuðul frá Arbeiðsloysisskipanini. Hettar grunda á omanfyri endurgivnu greinir, at grundgeving tygara verður mett ikki at koma undir undantøkini nevnd í § 2, stk. 3 og 3 endurgivin omanfyri, og skrivligu frágreiðing tygara.

Útgjald tygara verður tí steðgað frá og við 21. august 2004.

Ein møgulig endurstaðfesting av arbeiðsloysinum fær ikki gildi fyrr enn Arbeiðsloysisskipanin hevur móttikið skrivliga fráboðan frá tygum.

Hava tygum viðmerkingar hesum viðvíkjandi, verða tygum biðin um at seta tygum í samband við okkum innan 14 dagar.

Henda avgerð kann, innan 4 vikur eftir at tygum hava móttikið avgerðina, kærast til kærunevndina fyri Arbeiðsloysisskipanina, Postsmogu 106, 110 Tórshavn."

Tann 7. oktober 2004 sendi Rættarhjálp Føroya, vegna A, soljóðandi kæru til Kærunevndina hjá Arbeiðsloysisskipanini:

**„Viðvíkjandi arbeiðstilboði frá arbeiðsávísingini**

A, …, hevur 30. september 2004 vent sær til Rættarhjálp Føroya, av tí at Arbeiðsloysisskipanin (ALS) hevur gjørt av at steðga útgjaldinum úr ALS frá og við 21. august 2004.

Rættarhjálp Føroya skal við hesum vegna A kæra avgerðina hjá ALS, dagfesta 22. september 2004.

Sambært skrivinum frá ALS verður mett, at A ikki er tøk á arbeiðsmarknaðinum, av tí at hon ikki hevur átikið sær tað arbeiði, ið hon fekk bjóðað frá … Skipasmiðju 20. august 2004. ALS metir tí ikki, at hon hevur rætt til arbeiðsloysisstuðul úr skipanini.

Seinastu tvey árini hevur A verið fimm ferðir til samrøðu hjá arbeiðsgevara. Ongar av hesum samrøðum hava ført til starvssetan. Hetta er tí fyrstu ferð, at A ikki hevur tikið av einum arbeiðstilboði, og metir hon seg, eftir ikki at hava átikið sær ítøkiliga starvið, framvegis at vera tøkan á arbeiðsmarknaðinum.

A heldur, at hon sum arbeiðsleys í mesta lagi kann missa rættin til tryggingargjald í 4 vikur, sbrt. § 19 í løgtingslóg um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing.

ALS upplýsir í skrivi, dagfest 20. august 2004, at ALS, aftaná at A hevur sent frágreiðing til ALS, fer at gera eina meting av, um hon missir rættin

til arbeiðsloysisstuðul í 4 vikur, sbrt. § 19 í lógini, og/ella um hon framhaldandi er at meta sum tøk á arbeiðsmarknaðinum.

Einki er nevnt í skrivinum frá ALS um, at fylgjan av ikki at átaka sær júst hetta arbeiði kann verða, at útgjaldið steðgar, um ALS ikki metir hana vera tøka á arbeiðsmarknaðinum. Heldur ikki sæst hendan fylgja í teimum ásetingum í lógini, sum viðgera, nær rætturin til útgjald fellur burtur.

Um ALS metir, at A ikki longur er tøk á arbeiðsmarknaðinum, átti ALS í øllum førum at fráboðað arbeiðsleysa, hvør fylgjan kann verða ikki at taka av nevnda arbeiðstilboði, serliga tá tað snýr seg um so víðgongda fylgju."

Tann 12. oktober 2004 sendi Arbeiðsloysisskipanin soljóðandi ummæli til Kærunevndina hjá Arbeiðsloysisskipanini:

**„Viðv. kæru frá Rættarhjálp Føroya vegna A, ...**
Hjálagt verður latið kærunevndini avrit av skjølunum í ítøkiliga málinum viðv. omanfyrinevndu.

Sum kæruummæli skal ALS vísa til gongdina í hesum málinum sambært hjáløgdu skjølunum, har tað greitt framgongur, at kærarunum varð bjóðað starv hjá ... Skipasmiðju (í ...) og at kærarin bar seg undan við eini grundgeving, sum ikki „bara" kundi viðføra 4 vikurs karantenu samb. § 19 í als-lógini (Ll. nr. 113 frá 13 juni 1997 við seinni broytingum), men harafturímóti, at kærarin ikki longur var at meta sum tøk á arbeiðsmarknaðinum jvb. § 14, stk. 1, nr. 2 í als-lógini og § 2 í kunngerð um útgjald v.m. av arbeiðsloysisstuðli frá 26. november 1999 við seinni broyting.

Viðvíkjandi tí, sum Rættarhjálp Føroya førir fram í skrivinum dagf. 7. okt. 2004, skal ALS viðmerkja, at tað sambært als-løggávuni ongan týdning hevur í mun til hugtakið „tøkur á arbeiðsmarknaðinum", at tað er fyrstu ferð, at persónur ikki tekur av einum arbeiðstilboði frá ALS.

ALS er heldur ikki samd við Rættarhjálpini í, at tað í skrivinum frá ALS dagf. 20.08.2004 ikki verður fráboðað kæraranum, at avleiðingin av at siga nei til arbeiðstilboði kann gerast, at kærarin heilt missir rættin til útgjald. Hetta framgongur beinleiðis av orðingini *„..og/ella um tygum framhaldandi eru at meta sum tøk/ur á arbeiðsmarknaðinum"*. Annars er hetta skrivið einans ein áheitan til kæraran um at grundgeva fyri, hví hon ikki tók av arbeiðstilboðnum, so ALS kundi gera eina ítøkiliga meting av, hvør avleiðingin skuldi verða í hennara føri. Undir øllum umstøðum

verður tað í skrivinum frá ALS, dagf. 22.09.2004 – sum avgerðin í málinum – greitt boðað kæraranum frá, at útgjaldið av arbeiðsloysisstuðli steðgar, tí hon ikki longur er at meta sum tøk á arbeiðsmarknaðinum."

Tann 14. oktober 2004 sendi Rættarhjálp Føroya, vegna A, soljóðandi skriv til Kærunevndina hjá Arbeiðsloysisskipanini:

**„Viðvíkjandi tykkara j.nr. … – A**
Vísandi til skriv tykkara, dagfest 13. oktober 2004, skal Rættarhjálp Føroya við hesum koma við viðmerkingum sínum til nevnda skriv.

Rættarhjálpin metir, at høvuðstrupulleikin í málinum er tann, at A ikki hevur verið vitandi um rættarstøðu sína, herundir at noktan at taka ímóti arbeiðstilboði, kundi havt tað avleiðing, at hon kundi missa rætt til arbeiðsloysisstuðul frameftir.

Hesa óvissu um rættarstøðu sína meta vit als ikki, at ALS hevur fingið A burturúr við skrivi sínum, dagfest 20.08.2004.

ALS hevur í áðurnevnda skrivi boðað frá, at ALS – eftir at hava móttikið skrivliga frágreiðing frá A – ger eina meting av, um hon missir „rættin til arbeiðsloysisstuðul í 4 vikur, sambært § 19 í løgtingslóg um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing, og / ella um (hon) framhaldandi (er) at meta sum tøk … á arbeiðsmarknaðinum.

Í omanfyrinevndu orðing meta vit ikki, at tað á nakran hátt verður gjørt A greitt, at tann mest sannlíka fylgjan av, at hon hevur noktað at tikið arbeiðið er, at hon missir rættin til framhaldandi arbeiðsloysisstuðul med alla.

Í hoyringskrivi sínum, dagfest 12. oktober 2004, vísir ALS á, at tað beinleiðis framgongur av orðingini „og / ella um (hon) framhaldandi (er) at meta sum tøk … á arbeiðsmarknaðinum", at avleiðingin av at siga nei til arbeiðstilboðið kann gerast, at A heilt missir rættin til útgjald.

Rættarhjálp Føroya er ikki samd í, at henda orðingin er so mikið greið, at ein vanligur borgari kann fáa ta fatan, at hetta merkir, at viðkomandi heilt missir rættin til útgjald. Sostatt metir Rættarhjálpin ikki, at vanligir borgarar eru vitandi um, at ein treyt fyri at varðveita rættin til útgjald er, at ein er tøkur á arbeiðsmarknaðinum.

Rættarhjálpin er av tí fatan, at hetta átti at verið skrivað beinleiðis í brævinum til A, havandi í huga sera inntrívandi avleiðingina, sum avgerðin kundi fáa fyri hana.

A hevur vísandi til omanfyristandandi alla tíðina verið av tí fatan, at um hon segði nei til starvstilboðið, var avleiðing tann, at hon varð koyrd í karantenu í 4 vikur. Hetta kundi hon liva við, og tók tí avgerðina um at siga nei til tilboðið við vón um, at okkurt betri hóskandi tilboð fór at koma seinni.

Hon upplýsir tó, at um hon hevði vitað, at avleiðing fór at verða, at hon heilt misti rættin til útgjald, hevði hon sjálvandi av neyð tikið av tilboðnum.“

Við skrivi, dagfest 26. oktober 2004 boðaði Arbeiðsloysisskipanin Kærunevndini hjá Arbeiðsloysisskipanini frá, at Arbeiðsloysisskipanin ikki hevði fleiri viðmerkingar til málið.

Tann 5. november 2004 tók Kærunevndin hjá Arbeiðsloysisskipanini soljóðandi avgerð:

**„Avgerð í kærumáli tykkara vegna A mótvegis Arbeiðsloysisskipanini (ALS)**

Kærunevndin hjá Arbeiðsloysisskipanini viðgjørdi á fundi tann 1. november 2004 kæru tykkara vegna A yvir avgerðina hjá ALS, dagfest 22. september 2004 um at steðga útgjaldi hennara frá og við 21. august 2004, tá mett varð, at hon ikki var tøk á arbeiðsmarknaðinum.

**Kærunevndin avgjørdi at staðfesta avgerðina hjá ALS.**

Sum kunnugt fekk A ávíst arbeiði í … tann 19. august 2004. Sambært upplýsingum frá arbeiðsgevaranum, ringdi A tann 20. august til arbeiðsgevaran og upplýsti, at hon ikki tók við starvinum.

Í frágreiðing síni til ALS skrivar A m.a., at „Sjálvt um eg fegin vil sleppa at arbeiða, valdi eg tó, ikki at átaka mær hetta starvið. Orsøkin er m.a. tann, at eg eigi ongan bil. Í løtuni láni eg ein, men tað er bert eitt stutt tíðarskeið. So skuldi eg ferðast við bussi, og tá skuldi eg við Bussleiðini av … kl. 6:22, og so víðari við Bygdaleiðum kl. ca. 7.00. Eg hevði so verið heima aftur ca. kl. 17:30. Hetta meti eg verða ov langan arbeiðsdag. Nú stendur veturin fyri durum, og er tað nakað, eg ræðist, so er tað at koyra í hálku og kava.“

Í avgerð síni frá 22. september 2004 kom ALS til ta niðurstøðu, at tá A ikki var sinnað at átaka sær ávísta arbeiðið, varð í hennara konkreta føri mett, at hon ikki var tøk á arbeiðsmarknaðinum, og at hon harvið ikki hevði rætt til arbeiðsloysisstuðul.

Avgerðin var við støði í § 14, stk. 1, § 19, og § 24, stk. 2 og 3 í ALS-lógini og § 2, stk. 1, nr. 2 og 3, og stk. 2, nr. 2, og stk. 3 og 4 í útgjaldskunngerðini frá 26. november 1999, grundað á, at grundgevingin hjá A ikki varð mett at koma undir undantøkini í § 2, stk. 3, nr. 3 um serliga vánaligar ferðamøguleikar til og frá arbeiði, og á skrivligu frágreiðingina frá A.

Tit hava í kæru tykkara viðmerkt, at tit meta, at høvuðstrupulleikin í málinum er tann, at A ikki hevur verið vitandi um rættarstøðu sína, herundir at noktan at taka ímóti arbeiðstilboði, kundi hava ta avleiðing, at hon kundi missa rætt til arbeiðsloysisstuðul frameftir.

Vísandi til ásetingarnar § 2, stk. 1, nr. 2 í útgjaldskunngerðini frá 26. november 1999, harav framgongur, at tøkur á arbeiðsmarknaðinum er tann, sum er sinnaður at átaka sær eitt og hvørt arbeiði, ávíst av ALS, og sum viðkomandi hevur fakligan førleika til, og til ásetingina í § 24, stk. 2 í ALS-lógini um at allar Føroyar eru at rokna sum ein arbeiðsmarknaður í sambandi við arbeiðsávísing, samtykti Kærunevndin at staðfesta avgerðina hjá ALS.

Kærunevndin viðmerkti tó, at skrivi frá ALS dagfest 20. august 2004 er ógreitt, tá tað ikki beinleiðis framgongur, at ein grundgeving, ið avmarkar arbeiðsøkið hjá hinum arbeiðsleysa, førir við sær, at hin arbeiðsleysi ikki verður mettur at vera tøkur á arbeiðsmarknaðinum. Ógreiða skrivið gevur tó ikki Kærunevndini høvi til at broyta avgerðina hjá ALS.

Hendan avgerð Kærunevndarinnar er endalig og kann sambært § 26, stk. 1 í ALS-lógini ikki kærast víðari til hægri fyrisitingarligan myndugleika.

Avrit av hesum skrivi er í dag sent ALS."

## Partshoyring

Í einum øðrum máli, ið er endurgivið í ársfrágreiðingini hjá Løgtingsins umboðsmanni fyri 2003 bls. 23 ff kom umboðsmaðurin til ta niðurstøðu, at ALS er ein fyrisitingarmyndugleiki, sum er fevndur av fyrisitingarlógini og innlitslógini og harvið eisini av virksemi umboðsmansins.

Umboðsmaðurin gjørdi tí av at kanna málið hjá A nærri.

Við skrivi, dagfest 8. apríl 2005, varð klagan send Kærunevndini hjá Arbeiðsloysisskipanini til ummælis við einari freist áljóðandi 4 vikur, eins og biðið varð um skjølini í málinum.

Tann 14. apríl 2005 sendi Kærunevndin hjá Arbeiðsloysisskipanini soljóðandi skriv til umboðsmannin:

> **„Viðvíkjandi klagu frá A – Tykkara j.nr. …**
> Vegna Kærunevndina viðleggi eg skjølini í málinum, og skal eg annars viðmerkja, at Kærunevndin ikki hevur fleiri viðmerkingar til málið.“

Tann 18. apríl 2005 boðaði umboðsmaðurin pørtunum frá, at málið varð tikið upp til endaliga viðgerð. Av tí, at fleiri onnur mál vóru til viðgerðar, boðaði umboðsmaðurin samstundis frá, at tað kundu ganga einir 2-3 mánaðir, áðrenn umboðsmaðurin varð liðugur við viðgerð sína.

Tann 24. juni 2005 ringdi deildarleiðari frá Arbeiðsloysisskipanini til umboðsmannin og spurdi, um umboðsmaðurin hevði fingið skjølini frá Arbeiðsloysisskipanini í hesum málinum. Tað hevði umboðsmaðurin ikki. Stovnurin sendi við skrivi, dagfest 24. juni 2005, umboðsmanninum síni skjøl í málinum. Skrivið er soljóðandi:

> **„Viðv. kæru frá Rættarhjálp Føroya vegna A.**
> Arbeiðsloysisskipanin hevur frætt, at Løgtingsins umboðsmaður viðgerð eina kæru frá omanfyri nevndu, viðvíkjandi avgerðini hjá Arbeiðsloysisskipanini um, at hon ikki longur var at meta sum tøk á arbeiðsmarknaðinum.
>
> Soleiðis sum Arbeiðsloysisskipanin er kunnað, meta vit ikki, at Løgtingsins umboðsmaður hevur allar neyðugar upplýsingar fyri at kunna taka avgerð í málinum, og vilja vit við hesum koma við teimum írestandi upplýsingunum.
>
> Viðlagt senda vit skjølini í máli nr. …, ið er viðgerðin av umsøknini hjá kæraranum um arbeiðsloysisstuðul.
>
> Víst verður til bræv frá ALS til kæraran, dagfest 22. juli 2002, har tað framgongur, at hon var innkallað til eina samrøðu á skrivstovuni hjá ALS tann 15. august 2002 kl. 9:30. Eina slíka samrøðu vóru øll, ið søktu um arbeiðsloysisstuðul innkallaði til, og var endamálið við hesari samrøðu, at kunna umsøkjararnar um teirra skyldur og rættindi.
>
> Samrøðurnar vóru skipaðar á tann hátt, at fyrst var ein felagskunning (uml. 10-12 fólk) og aftaná var ein persónlig samrøða. Í felagskunningini var serliga stórur dentur lagdur á, at greiða fólki frá hvørjar skyldir tey

høvdu, og hvørji krøv tey skuldu lúka, fyri at hava rætt til arbeiðsloysisstuðul.

Orsaka av, at mannagongdin við at kalla øll, ið søktu um arbeiðsloysisstuðul inn til eina samrøðu var tung, og seinkaði endaligu viðgerðina av umsóknini rættuliga nógv, var henda mannagongd broytt á heysti 2003. Tá varð í staðin fari yvir til, at senda eitt kunningarskriv til umsøkjaran saman við játtanini av umsóknini. Í hesum skrivi verður stutt greitt frá teimum skyldum og rættindum, sum umsøkjarin hevur mótvegis ALS, og samstundis fær umsøkjarin tilboð um at koma á skrivstovuna hjá ALS at fáa nágreiniligari kunning. Tað er tó ikki tvungið at taka av tilboðnum.

Omanfyri nevnda søkti um og fekk játtað arbeiðsloysisstuðul á sumri 2002, og varð tí innkalla til kunning / samrøðu á skrivstovuni hjá ALS. Sum framgongur av skjalinum „umsókn um arbeiðsloysisssstuðul", varð kunningin/samrøðan av einhvørjari orsøk flutt til tann 16. august 2002.

Viðlagt er til tygara kunnleika eitt eintak av kunningarskrivinum, sum í dag verður sent til umsøkjararnar.

Um tørvur er á fleiri upplýsingum, ella tit hava spurningar, eru tit vælkomin at seta tykkum í samband við Arbeiðsloysissskipanina."

## *Niðurstøða*

§§ 14, 18, 19, 22, 23 og 24 í Løgtingslóg nr. 113 frá 13. juni 1997 um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing, við seinni broytingum, eru soljóðandi:

*„**§ 14**. Arbeiðsloysisstuðul verður útgoldin, tá viðkomandi:*

*1. er arbeiðsleysur og mótvegis Arbeiðsloysisskipanini prógvar, at so er.*

*2. er tøkur á arbeiðsmarknaðinum.*

*3. hevur fylt 16 ár, men ikki 67 ár.*

*4. hevur bústað í Føroyum og*

*5. er arbeiðsførur.*

*Stk. 2. Arbeiðsleys kunnu tó fáa stuðul uttan at vera tøk í dagatal svarandi til teir dagar, persónur hevur rætt til frítíð eftir løgtingslógini um frítíð við løn. Stýrið ásetir í kunngerð nærri reglur um fráboðanarfreist v.m.*

*Stk. 3. Arbeiðsleys kunnu í styttri tíðarskeiði, við loyvi frá Arbeiðsloysisskipanini, sleppa undan treytini at vera tøk á arbeiðsmarknaðinum og samstundis fáa arbeiðsloysisstuðul. Stýrið fyri Arbeiðsloysisskipanina ásetir í kunngerð nærri reglur um longdina á tíðarskeiðnum, umframt treytirnar annars.*

...

*§ **18**. Arbeiðsleysur, sum verður burturvístur orsakað av tænastubroti, missir samstundis rættin til stuðul í 4 vikur. Sama er galdandi, um so er, at hin arbeiðsleysi uttan haldgóða grund sigur seg úr starvi.*
*§ **19**. Arbeiðsleysur, sum uttan serliga orsøk noktar at taka á seg arbeiði ávíst av arbeiðsávísingini, missur rættin til tryggingarútgjald í 4 vikur.*
…
*§ **22**. Rætturin til útgjald fellur burtur tá arbeiðsleysur í undanfarna 5-ára skeiði, hevur fingið arbeiðsloysisstuðul útgoldnan í 798 dagar.*
*§ **23**. Tá rætturin er fallin burtur sambært § 22, hevur hin arbeiðsleysi ikki rætt at fáa útgjald úr skipanini fyrr enn eitt 24-mánaða skeið er farið, og verður tá at meta sum um hann kemur uppí skipanina fyrstu ferð.*
…
*§ **24**. Arbeiðsloysisskipanin umsitur arbeiðsávísing fyri arbeiðsleys og onnur, sum ynskja at vera skrásett á arbeiðsávísingini.*
*Stk. 2. Allar Føroyar eru at rokna sum ein arbeiðsmarknaður í sambandi við arbeiðsávísing.*
*Stk. 3. Ikki er loyvt at seta fakmørk fyri arbeiðsávísing, burtursæð frá neyðugum førleika.*
*Stk. 4. Stýrið ger í kunngerð nærri reglur um virkið hjá arbeiðsávísingini, sum m.a. kunnu stovnseta lokalar arbeiðsávísingar.“*

*Viðmerkingarnar til hesar greinir í løgtingsmáli nr. 99/1996 eru soljóðandi:*

***„Viðv. § 15 (mín viðmerking: § 14 í løgtingslógini)***

Umframt at ein persónur skal lúka treytirnar, ið eru: at vera arbeiðsleysur og mótvegis Arbeiðsloysisskipanini prógva, at so er, at vera tøkur á arbeiðsmarknaðinum, hava fylt 16 ár, men ikki 67 ár, hava bústað í Føroyum, fyri at fáa arbeiðsloysisstuðul útgoldin, skal viðkomandi eisini lúka treytina at vera arbeiðsførur.

Ein persónur er ikki tøkur, um hann/hon til dømis er sjúkur, er í barnsburðarfarloyvi, er raktur av verkfalli ella verkbanni, er í varðhaldi, er undir útbúgving, noktar at taka ímóti arbeiði, ið ávísingin ávísir honum /-henni, uttan haldgóða grund heldur uppat við arbeiði sínum ella verður uppsagdur av orsøkum, ið kunnu roknast at hann / hon sjálv / ur er orsøk til.

Møguleiki verður fyri, at hin arbeiðsleysi kann halda frítíð við stuðul uttan at vera tøkur í dagatali svarandi til teir dagar, hin arbeiðsleysi hevur rætt til frítíð eftir Ll. nr. 30 frá 07.04.1986 um frítíð við løn við seinni broytingum.

…

***Viðv. § 19 og § 20 (mín viðmerking: § 18 og § 19 í løgtingslógini)***
*Her er ásett at arbeiðsleysur, sum verður uppsagdur av egnum áðum, ella uttan haldgóða grund sigur seg úr starvi, fær karantenu, sum verður trekt frá longsta tíðarskeiðinum, viðkomandi kann verða í skipanini.*

*Arbeiðsleysur, sum uttan serliga orsøk noktar at taka á seg arbeiði ávíst av arbeiðsávísingini, missur rættin til tryggingarútgjald í 4 vikur, og verða hesar taldar við í tí í § 23 nevnda tíðarskeiði.*

…

***Viðv. § 23 (mín viðmerking: § 22 í løgtingslógini)***
*Rætturin til útgjald fellur burtur tá arbeiðsleysur í undanfarna 5-ára skeiði, hevur fingið arbeiðsloysisstuðul útgoldnan í 798 dagar. Tað stendur greitt í lógini og verður harvið ein trygd fyri tann arbeiðsleysa, at tíðarskeiðið ikki verður broytt við stuttum millumbilum.*

*5-ára skeiðið er ikki ein broyting í mun til tað, sum hevur verið ásett í kunnngerð síðan august 1996.*

*Viðv. § 24 (mín viðmerking: § 23 í løgtingslógini)*

*Tá arbeiðsleysur hevur fingið stuðul í 798 dagar, fær hin arbeiðsleysi ikki rætt til útgjald úr skipanini fyrr enn eitt 24-mánaða skeið er farið. Tá verður hann/hon hinvegin at meta sum um hann / hon kemur uppí skipanina fyrstu ferð. Hetta er í flestu førum ein linking hjá teimum arbeiðsleysu í mun til verandi lóg.*

…

***Viðv. § 25 (mín viðmerking: § 24 í løgtingslógini)***
*Reglurnar um arbeiðsávísingina eru óbroyttar í mun til verandi lóg. Arbeiðsloysisskipanin umsitur arbeiðsávísingina. Ávísingin er fyri arbeiðsleys og onnur, sum ynskja at vera skrásett á arbeiðsávísingini.*

*Allar Føroyar eru at rokna sum ein arbeiðsmarknaður í sambandi við arbeiðsávísing, soleiðis at skilja, at um einki arbeiði er til hin arbeiðsleysa á staðnum, har hann / hon býr, kann arbeiði ávísast viðkomandi aðrastaðni í landinum, har arbeiði er at fáa. Tó skal arbeiði altíð ávísast so nær bústaðinum hjá viðkomandi sum gjørligt. Í serligum førum kunnu tó undantøk gerast, sum t.d. vánaligir ferðamøguleikar til og frá arbeiði, og bústaðarviðurskifti. Somuleiðis eiga eisini undantøk at verða gjørd fyri familjur við børnum í og undir skúlaaldri, og einlig við børnum.*

*Tað er ikki loyvt at seta fakmørk fyri arbeiðsávísing, burtursæð frá neyðugum førleika. Førleiki er at skilja bæði likamliga og yrkisliga. Endamálið*

*við hesi áseting er at skipa so fyri, at arbeiðsleys fólk í eini vinnugrein kunnu søkja arbeiði í vinnugrein, har tørvur er á arbeiðsmegi.*

*Stýrið ger í kunngerð nærri reglur um virkið hjá arbeiðsávísingini, millum annað um undantøk sambært viðmerkingarnir omanfyri.“*

*§ 2, stk. 1-4 í kunngerð um útgjald v.m. av arbeiðsloysisstuðli frá 26. november 1999, sum er gjørd við heimild í § 14, stk. 2 og 3 og § 16, stk. 4 og 5, er soljóðandi:*

*„§ 2. Tøkur á arbeiðsmarknaðinum er tann, sum:*

1. *Ikki hevur tilknýti til arbeiðsgevara,*
2. *er sinnaður at átaka sær eitt og hvørt arbeiði, ávíst av Arbeiðsloysisskipanini, og sum viðkomandi hevur fakligan førleika til,*
3. *seinast dagin eftir, um eitt arbeiði verður ávíst, kann byrja hetta arbeiði til ásetta tíð,*
4. *seinast dagin eftir, um boð verða givin um hetta, kann møta hjá Arbeiðsloysisskipanini til ásetta tíð,*
5. *letur inn ALS-kort sambært § 5,*
6. *í rímiligan mun er arbeiðssøkjandi. Arbeiðsloysisskipanin kann krevja prófførslu fyri, at viðkomandi søkir arbeiði, sum er leyst,*
7. *ikki kemur undir ásetingarnar í § 6, stk. 4 og 5,*
8. *ikki er í útbúgving í normalarbeiðstíðini, sí tó stk. 7, og*
9. *ikki er sjálvstøðugur vinnurekandi sambært kunngerð um arbeiðsloysistrygging fyri sjálvstøðug vinnurekandi.*

*Stk. 2. Tann arbeiðsleysi hevur skyldu at átaka sær eitt og hvørt arbeiði í Føroyum. Undantak frá hesum verður t.d. ikki givið hóast:*

1. *Ferðasambandið ikki loyvir dagligari ferðing millum arbeiðspláss og bústað,*
2. *arbeiðið ikki hevur áhuga, t.d. vegna slag av arbeiði, arbeiðstíðum ella lønarviðurskiftum, ella*
3. *viðkomandi ikki fær møtt vegna vantandi barnaansing.*

Hetta er eisini galdandi fyri arbeiði umborð á skipi.

Stk. 3. Undantak frá stk. 1, nr. 3 og 4 kann tó verða givið, um:

1. *Almenna ferðasambandið ikki virkar vegna t.d. verkfall ella ringt veður, ella*
2. *viðkomandi ikki fær møtt vegna sjúku, sum kann staðfestast við læknaváttan.*

*Stk. 4. Undantak frá stk. 1, nr. 2 og 3 og stk. 2 kann í serligum førum verða givið:*

1. *Um lønin fyri ávísta arbeiði er lægri enn sáttmálalønin fyri slíkt arbeiði,*
2. *um daglig ferðing til og frá arbeiði ikki er møgulig, og bústaðarviðurskiftini á staðnum, har arbeiðið er, eru sera vánalig, ella*
3. *um talan er um serliga vánaligar ferðamøguleikar til og frá arbeiði, og viðkomandi er einligur við smærri børnum.*

*…"*

*Sum nevnt í § 14, stk. 2 og stk. 3 í lógini hevur Stýrið fyri Arbeiðsloysisskipanina fingið heimild til í kunngerðum at áseta nærri reglur, men soleiðis sum eg tulki lógina eru hesar heimildir avmarkaðar til tey viðurskifti, sum eru nevnd í ávikavist § 14, stk. 2 og stk. 3, nevniliga, at arbeiðsleys kunnu fáa stuðul uttan at vera tøk svarandi til teir dagar tey hava rætt til frítíð við løn, og at arbeiðsleys í styttri tíðarskeið við loyvi frá Arbeiðsloysisskipanini, kunnu sleppa undan treytini at vera tøk á arbeiðsmarknaðinum og kortini fáa arbeiðsloysisstuðul. Harafturímóti hevur stýrið eftir míni áskoðan ikki heimild til at áseta serligar reglur viðvíkjandi treytunum í § 14, stk. 1.*

*Kunngerðin um útgjald v.m. av arbeiðsloysisstuðli sæst ikki vera kunngjørd í Kunngerðablaðnum; men hon er til skjals á heimasíðuni hjá Arbeiðsloysisskipanini.*

*Í løgtingslóg nr. 109 frá 17. desember 1987 um alment kunngerðablað, sum broytt við løgtingslóg nr. 47 frá 30. mars 1990 stendur m.a.:*

*„**§ 2**. Í Kunngerðablaðið skulu allar løgtingslógir og kunngerðir, reglugerðir og aðrar almennar fyriskipanir yvirhøvur givnar av landsstýrinum lýsast.*

*2. stk. Í kunngerðablaðið kunnu eisini upptakast:*

*a. Lýsingar, fráboðanir o.t. frá tí almenna*

*b. Kunngerðir, reglugerðir og aðrar almennar fyriskipanir yvirhøvur frá øðrum almennum stovnum enn landsstýrinum og fráboðanir frá privatum í rættarviðurskiftum.*

***§ 3**. Frá 1. oktober 1988 er lýsingin í Kunngerðablaðnum einasti bindandi kunngerðarhátturin av løgtingslógum v.m. eftir § 2, stk. 1. Verða tær í § 2, 2. stk. nevndu kunngerðir v.m. lýstar í kunngerðarblaðnum, hevur lýsingin sama lóggildi sum lýsing av løgtingslógum v.m., hesin kunngerðarháttur er tó eingin treyt, um viðkomandi løgtingslóg sjálv ikki krevur hann.*

*…"*

*Sum eina avleiðing av avgerð míni, endurgivin í ársfrágreiðingini fyri 2003 bls. 23 ff, er Arbeiðsloysisskipanin eftir míni meting ein almennur stovnur, men sambært § 2, 2. stk. litra b í løgtingslógini um alment*

*kunngerðarblað hevur Stýrið fyri Arbeiðsloysisskipanina ikki skyldu men møguleika til at lýsa kunngerðir í Kunngerðablaðnum.*

*Hinvegin meti eg tað vera ein álvarsligan vanda fyri rættartrygdina hjá borgarunum at áseta rættarreglur um kanska víðfevnd inntriv í støðuna hjá teimum, uttan at hesar reglur verða kunngjørdar í almenna kunngerðablaðnum.*

*Rætt er tað, at nevnda kunngerð er til skjals á heimasíðuni hjá Arbeiðsloysisskipanini; men tað eru ikki allir borgarar, sum hava teldu ella atgongd at alnótini.*

*Eg skal tí vísandi til § 12 í umboðsmanslógini mæla landsstýrismanninum í vinnumálum til at taka til umhugsunar at broyta mannagongdina hjá Arbeiðsloysisskipanini soleiðis, at í øllum førum kunngerðir av stórum týdningi fyri borgararnar, verða lýstar í Kunngerðablaðnum. Eg skal samstundis vísandi til somu grein mæla landsstýrismanninum til at taka stig til at fáa samsvar ímillum kunngerð um útgjald v.m. av arbeiðsloysisstuðli frá 26. november 1999 og løgtingslóg nr. 113 frá 13. juni 1997 um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing við seinni broytingum.*

*Sum nevnt haldi eg ikki, at heimild er fyri við kunngerð at seta aðrar og strangari treytir fyri útgjalding av arbeiðsloysisstuðli enn tær, sum eru nevndar í § 14, stk. 1 í løgtingslógini um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing, og haldi eg tí ikki, at § 2 í kunngerðini um útgjald av arbeiðsloysisstuðli hevur týdning í hesum máli, sum snýr seg um, um A eftir at hava sýtt fyri at taka av einum arbeiðstilboði kundi metast at vera tøk á arbeiðsmarknaðinum longur. Hesin spurningur skal tí avgerast við eini tulking av § 14, stk. 1 í lógini um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing.*

*Sambært § 14, stk. 1, nr. 2 er ein av treytunum fyri at fáa útgoldið arbeiðsloysisstuðul, at viðkomandi er tøkur á arbeiðsmarknaðinum.*

*Í viðmerkingunum til § 14 stendur m.a.:*

> *„Ein persónur er ikki tøkur, um hann / hon til dømis er sjúkur, er í barnsburðarfarloyvi, er raktur av verkfalli ella verkbanni, er i varðhaldi, er undir útbúgving, noktar at taka ímóti arbeiði, ið ávísingin ávísir honum / henni, uttan haldgóða grund heldur uppat við arbeiði sínum ella verður uppsagdur av orsøkum, ið kunnu roknast at hann / hon sjálv / ur er orsøk til.“*

*Tað er greitt, at persónar ikki eru tøkir á arbeiðsmarknaðinum, eru teir sjúkir, í barnsburðarfarloyvi, raktir av verkfalli ella verkbanni, í varðhaldi ella undir útbúgving. Tað seinasta dømi um ikki at taka ímóti*

*arbeiði, ið ávísingin ávísir er ikki eins greitt. Er tað nokk fyri at staðfesta, at viðkomandi ikki er tøkur, bert viðkomandi sum í hesum førinum hevur noktað at tikið ímóti einum arbeiðstilboðið? Ella krevst meira. Eg haldi ikki, at tað eftir viðmerkingunum í sjálvum sær er nóg mikið at staðfesta at viðkomandi ikki er tøkur á arbeiðsmarknaðinum, at hann noktar at taka av arbeiði, sum verður ávíst honum; men tað kann verða ein ábending í einari samlaðari meting.*

*Mær tykir tað ikki vera í samsvari við vanligt málbrúk, at tulka § 14, stk. 1 nr. 2 soleiðis, at ein persónur bert við í einstøkum føri at nokta at átaka sær arbeiði, ið arbeiðsávísingin hevur ávíst honum, generelt kann metast ikki at vera tøkur á arbeiðsmarknaðinum. Eg haldi hvørki at nevnda orðaljóð í § 14, stk. 1 ella nevndu viðmerkingar til greinina tvinga til hesa niðurstøðu.*

*Bæði Arbeiðsloysisskipanin og kærunevndin hava ført fram, at tað út frá eini konkretari meting má leggjast til grund, at A ikki var tøk á arbeiðsmarknaðinum, tá hon hevði noktað at taka við starvinum á … Skipasmiðju.*

*Eg skilji ikki hesa grundgeving, tí tað einasta konkreta í málinum er, at A sambært skrivi hennara, dagfest 26. august 2004 til Arbeiðsloysisskipanina, hevði noktað at taka av ávísta arbeiðinum á … Skipasmiðju við teirri grundgeving, at tað var trupult at koma aftur og fram, men at hon fegin vildi sleppa at arbeiða. Hetta talar tvørturímóti fyri, at hon var tøk á arbeiðsmarknaðinum.*

*Ímóti tulkingini hjá Arbeiðsloysisskipanini og kærunevndini talar eisini, at § 19 í lógini ger upp við hesa støðu, at ein arbeiðsleysur ikki tekur av ávístum arbeiði. Skuldi slík tulking verið røtt, er § 19 í lógini meiningsleys.*

*Eg eri samdur við Arbeiðsloysisskipanini og kærunevndini í, at trupulleikarnir við at ferðast millum bústað og …ikki var ein nóg góð grundgeving fyri at nokta at átaka sær ávísta arbeiðið.*

*Eftir mínum tykki átti bert § 19 verið tikin í nýtslu og ikki § 14, stk. 1.*

*Eg meti tí avgerðina hjá Kærunevndini hjá Arbeiðsloysisskipanini vera skeiva, og skal eg tí mæla nevndini til at taka kæruna upp til nýggja viðgerð.*

*Eg fari at biðja nevndina lata meg frætta, hvørja niðurstøðu hon kemur til.*

*Eg skal harumframt gera nakrar viðmerkingar til málsviðgerðina hjá Arbeiðsloysisskipanin.*

*Í kæruskrivinum til kærunevndina førir Rættarhjálpin fram m.a., at A ikki hevur verið vitandi um rættarstøðu sína, herundir at noktan av at taka ímóti arbeiðstilboði, kundi hava ta avleiðing, at hon fór at missa rættin til arbeiðsloysisstuðul framyvir. Ført verður eisini fram, at um hon hevði verið vitandi um, at avleiðingin fór at verða, at hon misti rættin til útgjald, hevði hon sjálvandi av neyð tikið av tilboðnum.*

*Í hoyringsskrivi sínum til Kærunevndina hevur Arbeiðsloysisskipanin ført fram, at hon ikki er samd við Rættarhjálpini um, at kærarin ikki var nóg væl kunnað um avleiðingarnar av at siga nei til arbeiðstilboðið.*

*Sum tað framgongur av málsgongdini fekk A áheitan frá Arbeiðsloysisskipanini um at seta seg í samband við … Skipasmiðju um møguligt arbeiði. Eftir at hon hevði boðað frá, at hon ikki var sinnað at taka við starvinum, sum stóð henni í boðið, bað Arbeiðsloysisskipanin hana í skrivi, dagfest 20. august 2004, koma við nærri frágreiðing. Í skrivinum stendur síðani m.a.:*

> *„Arbeiðsloysisskipanin ger síðani eina meting av, um tygum missa rættin til arbeiðsloysisstuðul í 4 vikur, sambært § 19 í løgtingslóg um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing, og ella/um tygum framhaldandi eru at meta sum tøkur á arbeiðsmarknaðinum.“*

*Í Avgerðini hjá Arbeiðsloysisskipanini frá 22. september 2004 stendur m.a.:*

> *„Víst skal í hesum sambandi verða til § 19 og…*
>
> *§ 19. Arbeiðsleysur, sum uttan serliga orsøk noktar at taka á seg arbeiði ávíst av arbeiðsávísingini, missur rættin til tryggingarútgjald í 4 vikur.*
>
> *…*
>
> *Tá tygum ikki hava verið sinnað at átaka tygum ávísta arbeiði verður í tygara konkreta føri mett, at tygum ikki eru tøk á arbeiðsmarknaðinum, og hava tygum harvið ikki rætt til arbeiðsloysisstuðul frá Arbeiðsloysisskipanini.“*

*Í skrivinum frá 20. august 2004 sigur Arbeiðsloysisskipanin seg vilja kanna møguleikin fyri, at A verður sett í karantenu í 4 vikur sambært § 19 og / ella um hon framhaldandi átti at verða mett sum tøk á arbeiðsmarknaðinum. Í mótsetning til fyrra møguleikan verður einki nevnt um álvarsomu fylgjuna av at verða mett sum ikki tøk á arbeiðsmarknaðinum. Hetta átti at verið gjørt longu í hesum skrivinum, og kann eg*

*ikki útihýsa tann møguleika, at hevði hetta verið gjørt, er tað ikki óhugsandi at hon hevði tikið av arbeiðstilboðnum.*

*Eg haldi tí ikki, at Arbeiðsloysisskipanin hevur kunnað A nóg skjótt og nóg væl um støðuna, hon var komin í, og gevi eg tí Arbeiðsloysiskipanini eina átalu fyri hetta.*

*Burtursæð frá nevndu tilmælum, átalu og áheitan til Kærunevndina hjá Arbeiðsloysisskipanini um at lata meg frætta aftur, hvørja niðurstøðu nevndin kemur til, geri eg ikki meira við málið í løtuni.*

Við skrivi, dagfest 15. sept. 2005, hevur Kærunevndin hjá Arbeiðsloysisskipanini sent umboðsmanninum eitt skriv, har tað m.a. stendur:

> *„Kærunevndin hevur viðgjørt álitið frá Løgtingsins Umboðsmanni á kærunevndarfundi tann 12. september 2005.*
>
> *Sum kunnugt framgongur m.a. av álitinum, at Løgtingsins Umboðsmaður metir avgerðina hjá Kærunevndini vera skeiva, og hevur hann tí mælt Kærunevndini at taka kæruna uppaftur til nýggja viðgerð, umframt at Umboðsmaðurin hevur mælt til, at Kærunevndin letur seg frætta, hvørja niðurstøðu Kærunevndin kemur til.*
>
> *Kærunevndin skal í hesum sambandi viðmerkja, at avgerðirnar hjá Kærunevndini eru endaligar, og metir Kærunevndin seg ikki hava heimild til at taka kærumál uppaftur. Kærunevndin vil tí heita á Umboðsmannin um at venda sær til ALS.*
>
> *Annars skal Kærunevndin viðmerkja, at til Kærunevndin hevur frætt úrslitið hesum málið viðvíkjandi, verður kærunevndarpraksis hin sami.“*

Við skrivi, dagfest 27. sept. 2005, svaraði umboðsmaðurin Kærunevndini soleiðis:

> „…
>
> Í skrivinum sigur nevndin, at avgerðir hjá kærunevndini eru endaligar, og at kærunevndin ikki metir seg hava heimild til at taka kærumálið uppaftur. Kærunevndin heitir tí í hesum sambandi á meg um at venda mær til ALS.
>
> Eg eri ósamdur í, at kærunevndin ikki kann taka eina avgerð upp til nýggja viðgerð.
>
> …

At ein avgerð er endalig hjá einum fyrisitingarmyndugleika merkir bert, at avgerðin ikki kann kærast til ein hægri fyrisitingarligan myndugleika. Hetta merkir ikki, at ein borgari ikki hevur rætt til at fáa eitt mál viðgjørt av nýggjum um talan er um eina skeiva avgerð (remonstratión).

Í hesum sambandi verður víst til bls. 923 í „Forvaltningsret, 2. udgave“ eftir Hans Gammeltoft-Hansen v.fl.:

„Ligeledes må borgeren antages at have krav på genoptagelse hvis der (typisk efterføgende) fremkommer væsentlige nye retlige forhold – dvs. en væsentlig ændring med tilbagevirkende kraft i det retsgrundlag der forelå på tidspunktet for den oprindelige afgørelse.

Noget sådant kan særligt tænkes hvis en dom eller en ombudsmandsudtalelse underkender forvaltningsmyndighedens fortolkning eller den administrative praksis i relation til en tilsvarende sag.“

Viðvíkjandi áheitanini um, at umboðsmaðurin skal venda sær til ALS er at siga, at omanfyri nevnda klaga snýr seg um eina avgerð tikna av Kærunevndini hjá Arbeiðsloysisskipanini. Arbeiðsloysisskipanin er bundin at hesi avgerð, til kærunevndin hevur tikið nýggja avgerð. Tí hevur tað onga meining hjá mær at venda mær til Arbeiðsloysisskipanina viðvíkjandi hesum málinum.

Eg vil tí enn einaferð mæla Kærunevndini hjá Arbeiðsloysisskipanini til at taka kæruna upp til nýggja viðgerð og lata meg frætta, hvat víðari hendir í málinum.“

Arbeiðsloysisskipanin hevur sent umboðsmanninum skriv, dagfest 26. sept. 2005, har tað m.a. stendur:

„Vísandi til niðurstøðuna hjá Løgtingsins Umboðsmanni í málinum … skal Arbeiðsloysisskipanin við hesum kunna um niðanfyristandandi.

Løgtingsins Umboðsmaður vísti á, at ALS átti at havt kunnað … meiri nágreiniliga um álvarsomu fylgjuna av at verða mett sum ikki tøk á arbeiðsmarknaðinum. Til hetta er at nevna, at ALS hevur broytt mannagongdirnar samsvarandi tí, sum Umboðsmaðurin nevnir, so tað nú ikki longur er nakar ivi um, hvat tað merkir ikki at vera tøkur á arbeiðsmarknaðinum.

Løgtingsins Umboðsmaður vísti eisini á, at hann ikki metir heimild vera fyri at áseta serligar reglur viðvíkjandi treytunum í § 14, stk. 1 í ALS-lógini. Til hetta er at nevna, at í vár varð ein bólkur, sum varð settur at endurskoða ALS-lógina, liðugur við arbeiði sítt, og varð lógaruppskot til nýggja ALS-lóg handað landsstýrismanninum, … Í hesum uppskoti

vórðu orðaðar heimildir fyri at áseta serligar reglur á hesum økinum. Treytað av hvat hendir við lógaruppskotinum, kann antin heimild fáast fyri ásetingum á hesum økinum, ella kunngerðin verða broytt.

…“

Við skrivi, dagfest 27. okt. 2005, hevur landsstýrismaðurin sent umboðsmanninum soljóðandi skriv:

„Vísandi til skriv tygara, dagfest 22. juli 2005, verður við hesum boðað frá, at landsstýrismaðurin í vinnumálum fer at viðgera málið um Kunngerð um útgjald v.m. av arbeiðsloysisstuðli frá 26. november 1999 í mun til Løgtingslóg nr. 113 frá 13. juni 1997 um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing.

Somuleiðis fer landsstýrismaðurin í vinnumálum at viðgera málið um mannagongdirnar í sambandi við kunngerðir hjá Arbeiðsloysisskipanini.“

Kærunevndin hjá Arbeiðsloysisskipanini hevur sent umboðsmanninum soljóðandi skriv, dagfest 18. nov. 2005:

„Víst verður til bræv tygara, dagfest 27. september 2005, og skal við hesum verða sagt frá, at nevnda skriv varð umrøtt á kærunevndarfundi tann 14. november 2005.

Innleiðandi skal Kærunevndin viðmerkja, at Kærunevndin framvegis ikki metur seg hava heimild til at taka kærumál, har Kærunevndin hevur tikið endaliga avgerð, upp til nýggja viðgerð.

Í sambandi við ítøkiliga kærumálið viðvíkjandi …, skal Kærunevndin tó vísa á, at tað ikki tykist vera neyðugt at taka kærumálið upp til nýggja viðgerð, tá Kærunevndin ikki metur avgerðina hjá Kærunevndina vera skeiva.

Kærunevndin kann upplýsa, at tað í sambandi við, at ein arbeiðsleysur noktar at átaka sær ávíst arbeiði, kann vera torført at meta um, hvør avleiðingin skal verða, t.e. um viðkomandi skal verða settur í karantenu samsvarandi § 19 í ALS-lógini, ella um viðkomandi ikki kann metast sum tøkur á arbeiðsmarknaðinum samsvarandi § 14 í ALS-lógini við tí avleiðing, at viðkomandi verður koyrdur úr skipanini.

Kærunevndin skal í hesum sambandi vísa á, at sambært § 14, stk. 1, nr. 2 í ALS-lógini verður arbeiðsloysisstuðul útgoldin, tá viðkomandi er tøkur á arbeiðsmarknaðinum, ið sambært § 24, stk. 2 í ALS-lógini umfatar allar Føroyar í sambandi við arbeiðsávísing.

Kravið um at verða tøkur á arbeiðsmarknaðinum er ein av teimum grundleggjandi treytunum fyri at fáa útgoldið arbeiðsloysisstuðul, og skal hin arbeiðsleysi framhaldandi lúka hesa treyt fyri at fáa útgoldið arbeiðsloysisstuðul, um tala ikki er um undantøkini, ið nevnd eru í § 14, stk. 2 og 3 í ALS-lógini viðvíkjandi frítíð og styttri tíðarskeið við loyvi frá ALS.

Treytirnar í lógini fyri at fáa útgjald frá ALS eru sostatt, at viðkomandi framhaldandi kann og vil átaka sær arbeiði, hvar sum helst í Føroyum.

Arbeiðsleys sum nokta at átaka sær ávíst arbeiði, vísandi til arbeiðsstað í Føroyum, slag av arbeiðið, arbeiðstíðir ella líknandi generellar avmarkingar, hava sambært galdandi praksis avmarkað sína arbeiðsmegi á ein slíkan hátt, at tey ikki verða mett at verða tøk á arbeiðsmarknaðinum og lúka tí ikki treytirnar fyri at móttaka arbeiðsloysisstuðul. Við fáum undantøkum, nevnd í viðmerkingunum til lógina, hevur hetta ta avleiðing at tey verða koyrd úr skipanini.

Í hesum ítøkiliga kærumáli hevði … upplýst fyri ALS, at hon valdi ikki at átaka sær ávísta starvið í Vestmanna m.a. orsakað av, at hon ongan bil átti, og talan hevði verið um ein ov langan arbeiðsdag, umframt at hon ræddist at koyra í hálku og kava.

Ein arbeiðsleysur í Havn, sum ikki kann átaka sær arbeiði í Vestmanna, er ikki tøkur á einum arbeiðsmarknaði, ið sambært lógini fevnir um allar Føroyar.

Samanumtikið heldur Kærunevndin tí ikki at grund er at finnast at avgerðini hjá Kærunevndini, dagfest 5. november 2004, og verður tí ikki gjørt meira við málið.

…"

Við skrivi, dagfest 1. des. 2005, sendi umboðsmaðurin Kærunevndini hjá Arbeiðsloysisskipanini soljóðandi fráboðan:

„Eg havi fingið skriv tykkara, dagfest 18. nov. í ár, har Kærunevndin sigur, at hon framvegis ikki heldur seg hava heimild at taka málið uppaftur til viðgerðar, og í øðrum lagi, at nevndin ikki heldur avgerðina vera skeiva.

Eg dugi framvegis ikki at síggja nakra forðing fyri, at nevndin kann taka málið uppaftur, og haldi framvegis at avgerðin um at koyra klagaran úr skipanini ikki var í tráð við lógina.

Niðurstøður og tilmæli frá umboðsmanninum eru ikki bindandi fyri myndugleikarnar, og eg kann bert taka til eftirtektar, at Kærunevndin hjá Arbeiðsloysisskipanini hevur valt ikki at fylgja tilmæli mínum.

 Eg havi tí boðað klagaranum frá, at um hann ynskir at royna hetta málið í rættinum, fari eg at viðmæla fría rættarførslu sambært § 10, stk. 3 í umboðsmanslógini. Skriv um hetta er sent Rættarhjálp Føroya.“

Við skrivi, dagfest 26. jan. 2006, hevur Rættarhjálp Føroya boðað umboðsmanninum frá, at klagarin eftir at hava umhugsað støðuna hevði gjørt av, at hann ikki vildi fara í rættin við málinum.

Við skrivi, dagfest 26. febr. 2006, hevur umboðsmaðurin sent formansskapinum í Løgtinginum, løgmanni og landsstýrismanninum í vinnumálum soljóðandi skriv:

„Viðvíkjandi klagu um Kærunevndina hjá Arbeiðsloysisskipanini

Løgtingsins umboðsmaður hevur viðgjørt eina klagu frá Rættarhjálp Føroya vegna A um avgerðina hjá Kærunevndini hjá Arbeiðsloysisskipanini í sambandi við eitt mál um arbeiðsloysisstuðul.

Málið snýr seg í stuttum um, at A, sum býr í Tórshavn, fær eitt arbeiðstilboð í… Eftir at hava verið til samrøðu boðar hon arbeiðsgevaranum frá, at hon ikki ynskir at taka av arbeiðinum við teirri grundgeving, at tað var trupult at koma aftur og fram. Hetta fær tær avleiðingar, at Arbeiðsloysisskipanin ikki metir A at vera tøka á arbeiðsmarknaðinum, og at hon tí verður koyrd úr skipanini. A kærir avgerðina til kærunevndina, sum staðfestir avgerðina. Víst verður annars til álitið frá umboðsmanninum, ið er viðlagt hesum skrivi.

Umboðsmaðurin kom í álitinum fram til, at avgerðin hjá Kærunevndini hjá Arbeiðsloysisskipanini var skeiv og mælti nevndini til at taka málið uppaftur. Hesum hevur nevndin síðani í tveimum umførum sýtt fyri. Fyrru ferðina við teirri grundgeving, at nevndin ikki hevði heimild at taka málið uppaftur. Seinnu ferðina segði nevndin harumframt, at hon ikki helt grundarlag vera fyri hesum, tí hon metti avgerðina vera rætta.

Sambært kærunevndini er ein persónur ikki at meta sum tøkur á arbeiðsmarknaðinum, um hesin noktar at taka av einum ávístum arbeiði, og hevur hann tí heldur ikki rætt til arbeiðsloysisstuðul sambært § 14, stk. 1 í lógini um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing.

Hesum sjónarmiði eri eg ikki samd í. Í § 19 í lógini er ásett, at um ein persónur uttan serliga orsøk noktar at taka ímóti ávístum arbeiði, missur hann rættin til tryggingarútgjald í 4 vikur. Eg haldi tí avgerðina hjá

kærunevndini vera beinleiðis í stríð við lógina. Tað er mín greiða fatan, at hetta málið átti at verið avgjørt eftir § 19.

Tað er rætt, at ein persónur, sum boðar Arbeiðsloysisskipanini frá, at hann ikki ynskir at taka av nøkrum arbeiðstilboði yvirhøvur, ikki er at meta sum tøkur á arbeiðsmarknaðinum, og tískil ikki hevur rætt til útgjald frá Arbeiðsloysisskipanini. Tað sama kann hugsast, um ein persónur í fleiri førum noktar at átaka sær ymisk arbeiði við skiftandi grundgevingum.

Í tí konkreta málinum hevur borgarin sagt nei takk til eitt einstakt ávíst arbeiðstilboð. Í slíkum føri kann eingin ivi vera um, at tað er § 19 í lógini og ikki § 14, sum skal nýtast.

Í avgerð sínari vísir kærunevndin m.a. til § 2, stk. 1 nr. 2 í kunngerðini um útgjald av arbeiðsloysisstuðli frá 26. nov. 1999, har hugtakið tøkur á arbeiðsmarknaðinum verður greinað. Eins og umrøtt í álitinum haldi eg ikki, at nøkur heimild er í lógini fyri at áseta reglur um, hvør er at meta sum tøkur á arbeiðsmarknaðinum.

Hesum hevur umboðsmaðurin boðað landsstýrismanninum í vinnumálum frá í skrivi, dagfest 22. juli 2005. Í skrivi til umboðsmannin, dagfest 27. okt. 2005, sigur landsstýrismaðurin seg fara at viðgera málið um kunngerðina. Eg havi einki frætt aftur frá landsstýrismanninum síðani, og fari tí at spyrja landsstýrismannin um, hvat síðani er hent hesum viðvíkjandi.

Vísandi til tað, sum er umrøtt omanfyri, álitið frá umboðsmanninum og samskiftið millum umboðsmannin og Kærunevndina hjá Arbeiðsloysis-skipanini, ið er viðlagt tykkum til kunningar, fari eg sambært § 10, stk. 1 í umboðsmanslógini at mæla formansskapinum í Løgtinginum, løgmanni og landsstýrismanninum til at taka neyðug stig til at tryggja, at kunngerðin og umsitingin av arbeiðsloysisstuðli kann vera í tráð við lóggávuna.

Avrit av hesum skrivi er sent Kærunevndini hjá Arbeiðsloysisskipanini og klagaranum til kunningar.“

## 28.5. Setan av maskinmeistarum hjá Fiskiveiðieftirlitinum

Umboðsmaðurin hevur viðgjørt eina klagu frá A um setanina av maskinmeistarum hjá Fiskiveiðieftirlitinum í trimum umførum í 2003. Umboðsmaðurin helt ikki grundarlag vera fyri at staðfesta, at leiðarin á Fiskiveiðieftirlitinum skuldi hava verið ógegnigur, og helt tí ongan trupulleika vera í, at leiðarin hevði útnevnt limirnar í setanarnevndunum. Umboðsmaðurin gav Fiskimálaráðnum eina álvarsliga átalu fyri ikki at hava partshoyrt A um tær referensur, sum í fyrsta setanarumfarinum vórðu nýttar sum grundgeving fyri ikki at seta hann í starvið. Umboðsmaðurin segði seg hava umhugsað at heita á Fiskimálaráðið um at taka fyrsta setanarumfarið uppaftur til viðgerðar, men valdi ikki at gera hetta, grundað á tíðina, sum var liðin síðani setanina, og at skikkaðir umsøkjarar vóru settir í størvini. Umboðsmaðurin helt ikki grundarlag vera fyri at halda, at 2. og 3. setanaumfar bygdu á annað enn saklig atlit. Í øllum trimum setanarumførunum helt umboðsmaðurin tó, at grundgevingin ikki leyk krøvini í § 23 í fyrisitingarlógini, og gav tí eisini Fiskimálaráðnum átalu fyri hetta. Av tí, at umboðsmaðurin helt talan vera um álvarslig brek viðvíkjandi fyrsta setanarumfarinum, boðaði hann samsvarandi § 10 í umboðsmanslógini formansskapi Løgtingsins, løgmanni og landsstýrismanninum frá niðurstøðu sínari. (J. nr. 200500032. Álitið er ikki tikið við í ársfrágreiðingina).

# 29. *Ymiskt*

## 29.1. Noktan av innflutningsloyvi til hund

Umboðsmaðurin hevur viðgjørt eina klagu um málsviðgerðina og avgerðina hjá Vinnumálaráðnum um at nokta innflutningi av einum hundi av slagnum Staffordshire Bull Terrier. Sambært kunngerð nr. 15 frá 7. apríl 2004 er forboð ímóti at innflyta kamphundar. Hóast umboðsmaðurin helt, at kunngerðin kundi verið eitt sindur greiðari orðað, soleiðis at eingin ivi stóðst av, hvørjir hundar eru at meta sum kamphundar, helt hann tað vera í samsvari við lógina at meta hesar eftir hundaslagi og ikki eftir tí einstaka hundinum. Umboðsmaðurin helt seg ikki hava fortreytir fyri at meta um rættleikan av metingini hjá Landsdjóralæknanum um, at Staffordshire Bull Terrier er ein kamphundur, men mælti til at ólógligu hundasløgini blivu nevnd beinleiðis í kunngerðini ella einum lista, ið varð knýttur at hesari. Umboðsmaðurin gav Vinnumálaráðnum átalu fyri vantandi partshoyring og fyri at hava givið eina ógrundaða ábending um úrslitið, áðrenn avgerð varð tikin. (J. nr. 200500042).

### Klagan

Við skrivi, dagfest 4. apríl 2005, hevur A, advokatfulltrúi sent umboðsmanninum soljóðandi klagu:

**„Viðv.: kæru um avgerð tikið av Heilsufrøðiligu Starvsstovuni og staðfest av Vinnumálaráðnum**

Við hesum skal eg kæra avgerð, ið tikin er av Vinnumálaráðnum tann 18. december 2004, og endurtikin við avgerð Vinnumálaráðsins tann 14. januar 2004. Avgerðin hjá Vinnumálaránum er ein staðfesting av avgerð, ið Heilsufrøðiliga Starvsstovan tók tann 24. august 2004.

Henda kæra er í tveimum pørtum, og snýr fyrri parturin av kæruni seg um málsviðgerðina í Vinnumálaránum, meðan seinni parturin av kæruni snýr seg um tey materiellu viðurskiftini í málinum.

**Málsviðgerðin í Vinnumálaráðnum**

Við skrivi, dagfest tann 27. oktober 2004, (skjal A) kærdi undirritaði vegna klientar mínar, B og C, avgerð hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni um ikki at loyva klientum mínum at taka hund sín av slagnum Stafforshire Bull Terrier við til Føroya.

Vinnumálaráðið sendi síðan skriv, dagfest tann 1. december 2004, (skjal B) har boðað varð frá, at „*Við hesum verður gjørt vart við, at ein avgerð í málinum er á gáttuni og verður væntandi send tykkum í vikuni. Niðurstøðan verður helst, at hundurin fær loyvi at koma til Føroya.*"

Tá so avgerðin kom tann 18. december 2004, (skjal C) var niðurstøðan hjá Vinnumálaráðnum júst tann øvugta, nevniliga, at „*VMR tekur undir við HSF, at ikki skal verða loyvt at flyta inn viðkomandi hund av slagnum SBT til Føroya.*"

Undirritaði metti ikki hesa mannagongd vera í tráð við góðan fyrisitingarsið, og við skrivi til Vinnumálaráðið, dagfest tann 20. december 2004, (skjal D) gjørdi eg vart við hetta, og heitti á Vinnumálaráðið um at taka avgerðina upp til nýggja viðgerð og koma við eini avgerð, ið var í samsvari við skriv Vinnumálaráðsins, dagfest tann 1. december 2004.

Vinnumálaráðið tók síðan málið upp til nýggja viðgerð, og í skrivi, dagfest tann (skjal E) varð boðað frá, at niðurstøðan var tann sama sum í skrivinum frá 18. december 2004, nevniliga at hundurin ikki fær loyvi at koma til Føroya.

Sum ført fram í skrivi mínum til Vinnumálaráðið, dagfest tann 20. december 2004, so eri eg framvegis av teirri fatan, at Vinnumálaráðið ikki kann geva borgaranum eina „fyribils niðurstøðu" fyri síðan at koma við eini endaligari niðurstøðu, ið gongur beint ímóti fyrru niðurstøðuni, uttan at nýggjar upplýsingar fyriliggja ella onnur broytt viðurskifti gera seg galdandi, ið rættvísgera, at endaliga niðurstøðan ikki verður tann sama sum, ella í minsta lagi í tráð við fyribils niðurstøðuna.

Við fyribils niðurstøðuni varð givin klientum mínum ein „berettiget forventning" um at kæra teirra fór at verða gingin á møti, soleiðis at hundur teirra kundi koma við til Føroya. Tað er tí trupult hjá klientum mínum at skilja, at ein almennur fyrisitingarligur myndugleiki kann broyta niðurstøðu, uttan at fyritreytirnar fyri niðurstøðuni somuleiðis eru broyttar.

**Materiellu viðurskiftini í málinum**

*Málsgongdin*

Sum fyrr nevnt, so snýr málið seg um, hvørt klientar mínir kunnu taka hund sín H, ið er av slagnum Staffordshire Bull Terrier við sær til Føroya.

Í sambandi við at klientar mínir skuldu flyta til Føroya úr … á heysti 2004, vendu tey sær til myndugleikarnar í Føroyum fyri at vita, hvørjar koppsetingar v.m. vóru kravdar, fyri at hundur teirra, H kundi koma til Føroya. Tey fingu tá at vita, at Heilsufrøðiliga Starvsstovan hevði sett

forboð ímóti at hetta hundaslag, saman við øðrum útvaldum hundasløgum, kundi innflytast til Føroya. Hetta forboð var sett í einum lista, ið Heilsufrøðiliga Starvsstovan hevði lagt á heimasíðuna www.hfs.fo og vísti hesin listi til kunngerð nr. 15 frá 7. apríl 2004. Listin verður hjálagdur sum undirskjal 4 til skjal A.

Við skrivi, dagfest tann 16. august 2004, (undirskjal 2 til skjal A) gjørdi undirritaði Heilsufrøðiligu Starvsstovuna varuga við, at eg ikki metti, at heimild var fyri einum tílíkum lista, ið er at meta sum eitt generelt forboð, hvørki í omanfyri nevndu kunngerð ella í lógini, ið henda kunngerð vísir til. Somuleiðis heitti undirritaði á Heilsufrøðiligu Starvsstovuna um at endurskoða henda lista, við tað at eingin saklig ella faklig grundgeving var fyri at hundaslagið Staffordshire Bull Terrier var á listanum. Skrivið við tilhoyrandi skjølum verður hjálagt sum undirskjal 2 til skjal A.

Svarið frá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni kom í skrivi, dagfest tann 24. august 2004 (undirskjal 1 til skjal A), har Heilsufrøðiliga Starvsstovan *„kann ikki geva loyvi til hetta.“*, og verður annars sagt, at hundurin er ein kamphundur *„…og kann vísa aggressivan atburð móti fólki og djórum sambært tilburði í okkara grannalondum…“* Í avgerðini verður víst til eitt hoyringsnotat úr Noregi sum var hjálagt avgerðini. Viðmerkjast skal her, at hetta hoyringsnotat viðvíkur forboði móti Amerikansk Staffordshire Terrier, hóast hetta hundaslag ikki er sama rasa sum Staffordshire Bull Terrier.

Undirritaði kærdi hesa avgerð til Vinnumálaráðið við skrivi, dagfest tann 27. oktober 2004 (skjal A). Sum grundgeving fyri kæruni varð m.a. gjørt galdandi, at

- eingin skjalprógvan er fyri, at Staffordshire Bull Terrier er ein kamphundur,
- hóast innihaldið í hoyringsnotatinum úr Noregi, so er hundaslagið ikki bannað í Noregi, hóast lógin í Noregi júst er endurskoðað,
- ávísingarnar til einstakar ódefineraðar tilburðir í grannalondum okkara, og til hugburð í Spania, eru ósakligar kriteriir í tulkingini av orðingini kamphundur eftir føroysku lógini,
- at hundaslagið ikki er bannað í t.d. Noregi, Svøríki, Danmark, Svøríki, Onglandi v.fl.
- um generelt forboð skal setast móti einum ávísum hundaslagi, so eigur hetta at vera gjørt við greiðari heimild í lóg ella kunngerð, og eigur hundaslagið at verða nevnt og útgreinað,
- eingin tílík heimild fyriliggur,

– at hvørki lógin ella kunngerðin geva eina tílíka heimild,
– at so leingi eingin tílík heimild fyriliggur, so eigur eingin avgerð at verða tikið á einum ivasomum fakligum grundarlagi.

Sum omanfyri nevnt, so tók Vinnumálaráðið undir við avgerðini hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni um at hundurin var bannaður í Føroyum.

*Løgfrøðilig sjónarmið*

Heilsufrøðiliga Starvsstovan hevur sum stuðul undir sínum forboð bert valt út einstøk viðurskifti, ið tala ímóti hundaslagnum, og víst til hesi viðurskifti sum fakkunnleikan á økinum, hóast Heilsufrøðiliga Starvsstovan er gjørd varug við, at altjóða fakkunnleikin als ikki er samdur, hvussu hugtakið kamphundur skal definerast, ella um hundaslagið Staffordshire Bull Terrier er at meta sum ein kamphundur. Víst verður í hesum sambandi til m.a. undirskjal 5 til skjal A, síðurnar 10, 11, 12, 13, 14 og 15.

Vinnumálaráðið hevur eftir øllum at døma tikið undir við mannagongdini hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni, tá sagt verður í avgerðini frá 18. december 2004, at *„Eftir tí upplýsta verður hundurin, sum talan er um at innflyta, av fakkunnleikanum bólkaður sum kamphundur“*. Einki fæst at vita um, hvønn fakkunnleika talan er um, ella hvat hesin fakkunnleiki ítøkiliga sigur um hundaslagið.

Tá hundaslagið verður hildið um alt Europa, og fleiri týðandi fakligir stovnar í t.d. Noregi og Danmark hava ymiska áskoðan á hundaslagið, so er eftir mínum tykki ikki nóg mikið at leggja til grund, at fakkunnleikin í Vinnumálaráðum ella Heilsufrøðilig Starvsstovuni meta hundin vera ein kamphund.

Um vit í Føroyum skulu meta hundaslagið meira vandamikið enn metingin í øðrum londum sigur, og forbjóða hundslagnum, so eigur hetta at vera gjørt við greiðari lógarheimild. Núverandi støðan er tann, at kamphundar er bannaðir eftir lógini, men heimildin og argumentatiónin hjá Vinnumálaráðnum og Heilsufrøðiligu Starvsstovuni fyri at meta júst hundaslagið Staffordshire Bull Terrier sum kamphund, als ikki er løgfrøðiliga haldbar ella nøktandi. Uppá fyrispurning hava hvørki Heilsufrøðiliga Starvsstovan ella Vinnumálaráðið kunnað ella viljað greitt frá, hvørji saklig kriteriir hava verið nýtt til at definera hundaslagið Staffordshire Bull Terrier sum kamphund, annað enn tað, ið víst verður til í avgerðini hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni.

Málið hevur serstakan týdning fyri klientar mínar av fleiri orsøkum, í fyrsta lagi tí at tey hava havt hundin í meira enn 2 ár, síðan hann var hvølpur, og er hann tí vorðin ein týðandi partur av teirra gerandisdegi.

…

Eitt forboð ímóti at taka H við til Føroya rakar tey tí serstakliga meint, og av tí at forboðið ger eitt so álvarsamt inntriv í lívið hjá klientum mínum, meti eg at heimildin fyri einum tílíkum forboði eigur at vera heilt greið og avgerðin sakliga grundað.

Umframt tey sjónarmið, ið undirritaði omanfyri havi gjørt galdandi, so verður hildið fast við tey sjónarmið, ið eru gjørd galdandi yvirfyri Heilsufrøðiligu Starvsstovuni og Vinnumálaráðum.

Við hesum fari eg at heita á Løgtingsins Umboðsmann um at taka málið upp, og meta um fyriliggjandi avgerðin í málinum hevur neyðuga heimild, eins og at meta um viðgerðin í Vinnumálaráðnum er í samsvari við góðan fyrisitingarsið.“

## Málsgongd

Tann 21. januar 2004, hevur Heilsufrøðiliga Starvsstovan sent D, …, soljóðandi skriv:

**„Viðvíkjandi: Fyrispurningi um innflutning av Staffordshire bull terrier**

Í sambandi við fyrispurning tygara, um tað er loyvt at innflyta ein Staffordshire bull terrier til Føroyar, hevur Heilsufrøðiliga starvsstovan ráført seg við Landsdjóralæknan, E.

Landsdjóralæknin boðar frá, at í komandi kunngerð um innflutning av hundum stendur, at tað er ikki loyvt at flyta inn ella hava kamphundar ella hundar, sum kunnu hava agressiva atferð. Ein Staffordshire bull terrier er gamal kamphundur, sum kann verða aggressivur, og sum altíð skal havast í bandi.

Heilsufrøðiliga starvsstovan skal hervið boða frá, at tað er ikki loyvt at innflyta ein Staffordshire bull terrier til Føroyar.

**Kæra**

Avgerðir tiknar av Heilsufrøðiligu starvsstovuni kærast til Føroya landsstýri. Kærufreistin er fýra vikur frá tí degi, innflytarin er kunnaður um avgerðina. Um kært verður, skal kæran sendast Heilsufrøðiligu starvsstovuni.

Eru spurningar ella viðmerkingar til hetta brævið, eru tit vælkomin at ringja.“

Tann 5. juli 2004 hevur Heilsufrøðiliga Starvsstovan sent Landsdjóralæknanum soljóðandi fyrispurning:

> **„Viðvíkjandi: Hundar sum ikki eru loyvdir at innflyta til Føroyar**
> Í samband við at gera ein lista til heimasíðuna yvir hundar, sum ikki eru loyvdir at innflyta til Føroyar, sendi eg tær ein lista til viðmerkingar.
> Á listanum eru fyribils hesir:
> - Pit bull terrier
> - Old fashion staffords
> - Traditional staffords
> - Staffordshire bull terrier
> - Amerikansk staffordshire terrier
> - Amerikansk bulldog
> - Japanska Tosa
> - Dogo argentino
> - Fila braxiliero
>
> Eg havi eisini fingið fyrispurningar um Grønlendskan sletuhund og Sibirian husky, hvussu við teimum.“

Við teldubrævi, dagfest 5. juli 2004, hevur landsdjóralæknin svarað Heilsufrøðiligu Starvsstovuni soleiðis:

> „Jeg har ingen indvendinger mod din liste over ’kamphunde’.
>
> Grønlandsk slædehund og Siberian husky er ikke specielt kendt for aggressivitet, så de kan efter min opfattelse godt indføres.“

Tann 7. juli 2004 hevur Heilsufrøðiliga Starvsstovan gjørt soljóðandi yvirlit:

> **„Hesar hundar er ikki loyvi at innflyta til Føroyar ella hava í Føroyum**
> Sambært kunngerð nr. 15 frá 7. apríl 2004 um innflutning av hundum, kettum og øðrum kelidjórum, §3, stk. 2, er ikki loyvt at flyta inn ella hava kamphundar.
>
> Niðanfyristandandi hundar er ikki loyvt at innflyta ella hava í Føroyum.
> - Pit bull terrier
> - Old fashion staffords
> - Traditional staffords

- Staffordshire bull terrier
- Amerikanskur staffordshire terrier
- Amerikanskur bulldog
- Japanskur Tosa
- Dogo argentino
- Fila braxiliero“

Í einum ikki-dagfestum skrivi hava B og C sent Heilsufrøðiligu Starvsstovuni soljóðandi umsókn:

„Vit, B og C søkja hervið um loyvi til, at hundur okkara, H, fær loyvi til at flyta heim til Føroyar við okkum. H er av slagnum Staffordshire Bull Terrier.

Vit søkja um loyvi, av tí at H er av slagnum SBT, og av eini ella aðrari orsøk er umfataður av Kunngerð nr. 15 frá 7. apríl 2004 um innflutning av hundum, kettum og øðrum kelidýrum.

Í § 2, stk 4 stendur soleiðis: „Kamphundur: hundur, sum er aldur ella vandur til aggressiva atferð, íroknað Pitt Bull Terrier, Tosa og blendingar av hesum slagnum“.

Víðari í § 3, stk 2 stendur at lesa: „Ikki er loyvt at flyta inn ella hava kamphundar“.

Sum vit lesa tað á listanum hjá Heilsufrøðisligu Starvsstovuni so er SBT á listanum. Vit fara bert at fyrihalda okkum til H sum individ og SBT sum rasu, av tí at tað er okkara hundur og SBT og okkara konkreta sak.

Áðrenn vit fingu okkum hundin (H) í Januar 2003, settu vit okkum í samband við mynduleikarnar i Føroyum, fyri at spyrja okkum fyri, um vit kundu flyta hettar slagið av hundi (Staffordshire Bull Terriara) inn til Føroyar. Har fingu vit at vita, at um hundurin hevði tær vaccinirnar sum krevjast, so var onki í vegin fyri at flyta hundin inn. Í tí góðu trúgv fingu vit okkum hettar slagið av hundi, tí meiningin hjá okkum hevur altíð verið at flyta heim aftur til Føroyar.

Tá ið eg (B) nú havið fingið fast arbeiði í Føroyum (…), og skal byrja har 1. septembur 2004, setti eg meg í samband við somu mynduleikar aftur fyri at tryggja mær, at tær vaccinurnar sum hundurin hevur fingið her í … vóru tær sum kravdust. Tá fái eg at vita, at SBT ikki má havast ella innflytast til Føroyar sambart kunngerð nr. 15 frá 7. apríl 2004.

Vit hava nú verið knýtt at H í 18 mánaðar, og vilja tí gera alt fyri at fáa hann heim við okkum, nú vit endiliga kunnu koma heim aftur eftir at hava verið uttanlands í … ár. H er fyri okkum meir enn bert ein hundur.

…

Vónandi kunnu tit tískil skilja tað støðuna sum vit eru komin í.

Í samband við telefonsamrøður við Heilsufrøðisligu Starvsstovuna, og F á VMR, hava vit samla upplýsningar um SBT, sum vísa, at hettar slagið av hundi, sum skal verða forboðin at hava og innflyta til Føroyar, ikki er so vandamikil sum mynduleikarnir í Føroyum vilja gera hann til.

Lat okkum geva tygum nakrar góðar grundgevingar fyri, hví vit biða tygum geva okkum loyvi til, at vit kunnu fáa H við heim til Føroyar. Hettar undirbyggja vit við fakta sum er at finna um SBT.

1. Í 1935 bleiv SBT upptikin í UK Kennel Club. Bakgrundin fyri hesum var tann, at man í Englandi vildi avla ein familjuhund við einum sterkum lindi og førleika, sum eisini kundi luttaka á jøvnum føti saman við øðrum hundum á hundaframmsýningum. Rasan sum er í dag hevur ongantíð verið ald til at vera kamphundur. Rasan er sprottin úr tí upprunaliga Enska bulldogginum og Brúna terriaranum. Lat meg kvotera hvat kennelklubburin SBT-Danmark skrivar á sínari heimasíðu um SBT: *„Den er den oprindelige engelske bull-dog der blev krydset med den nu uddøde Brune Terrier, SBT er en rigtig familiehund og meget børnevenlig“ I England siger man, at der ikke findes en bedre baby-sitter, at den er en rigtig Nanny-dog, SBT er en utrolig trofast over for sin familie, den vogter simpelten sin familie og sit hjem“*. Á heimasíðuni hjá tí elsta SBT kennelklubbanum í Onglandi stendur at lesa at SBT er tann einasta rasan, sum hevur prætikatið *„total reliability and affinity with people and in particular children“*. B. Fogle skrivar soleiðis um SBT í 'The Encyclopaedia of the Dog': *„From these beginnings would evolve one of the most loveable, popular, loyal and trusted breeds on the face of the earth. There is probably no breed that is more loving with its family…“*. Í Onglandi er SBT tann næstmest útbreidda terriara rasan, og er á einum 6 plássi av 190 rasum, fyri mest havdu hundar. Hettar hevði neyvan verið so, um so var, at SBT er so farligur sum summi fólk vilja gera hann til at vera.
2. Vit fara at spyrja, um tit sum mynduleikar á hesum øki hava tikið í betragtning, at í grannalondum og brøðralondum okkara, eitt nú Danmark, Svøríki, Onglandi og Noregi er SBT ikki á nøkrum lista sum umfatar sokallaðar farligar kamphundar. Har stórtrívast SBT kennel-

klubbar og SBT hundaframmsýningar. Noreg var í ferð við at gera ein lista yvir sokallaðar farligar hundar, sum ikki mugu havast ella innflytast til landið, og har bleiv SBT tikin av uppskotslistanum eftir hart trýst frá Norsk Terrier Klub, tí ikki kundi prógvast, at nakað hald var í hesum. Hettar er veruleikin. Okkum vitandi hevur ongin SBT nakrantíð sett síni bein á Føroya land, og tí er kunnskapurin til rasuna yvaleyst sera avmarkaður.

3. Um ein velur at gruppera ávísar hundarasur, sum ein heldur líkjast, og geva teimum ein felagsnevnara, so halda vit ein skal verða ómetaliga varin. Eitt nú hava vit lisið okkum til, og fingið fortalt, at tað er beinleiðis skeift at líkastilla ella samanbera SBT við eitt nu American Staffordshire Terrier og Pitt Bull Terrier. Fyri tað fyrsta er tað ikki sama rasan. DNA kann prógva hettar. Fyri tað næsta kemur SBT úr Onglandi meðan hinir báðir koma úr USA.

Góða G. Vit duga at skilja, at meiningin við kunngerð nr 15 frá 7. apríl er fyribirging. Men vit duga ikki at skilja, at SBT skal verða umfataður í hesi fyribirging. Vit bøna og biða tygum um, at loyva okkum at taka H við heim til Føroyar, og at tit taka SBT sum rasu av listanum fyri forbodnar hundar, og at argumentini eru sannførandi. Vit kunnu ikki fyristilla okkum at búgva í Føroyum uttan H, sum vit hava fingið okkum í góðari trúgv, langt áðrenn kunngerðina, og vitandi at SBT ikki fór at verða forboðin. Vit hava fingið okkum H at verða góð við alt hansara lív. Hann gevur okkum ferfalt aftur við sínum kærleika til okkum og øllum sum hann møtir. Hann er ein stórur partur í okkara lívið, og vit vilja ikki tveita hann til viks tá forðingar koma í vegin. Vit lova at ongir trupulleikar koma at standast av H í Føroyum.

Vónandi fáa vit eitt svar so skjótt sum møguligt, so B fær givið … eitt endaligt svar."

Tann 16. august 2004 hevur A, advokatfulltrúi sent Heilsufrøðiligu Starvsstovuni soljóðandi skriv:

**„Viðv.: innflutningi av einum Staffordshire Bull Terrier.**

B og C, ið eru búsitandi í … hava vent sær til skrivstovu mína og biðið um ráðgeving í sambandi við at tey skulu flyta heim og í hesum sambandi ætla at taka hund teirra við. Klientar mínir er vorðin varugir við, at hundur teirra av slagnum Staffordshire Bull Terrier er komin á listan yvir hundar, ið ikki er loyvt at innflyta ella hava í Føroyum.

Tá klientar mínir fingu sær hundin H fyri umleið 1 1/2 ári síðan, kannaðu tey, um nakað forboð ella forðingar vóru, fyri at taka hundin við til Føroya um tey fluttu heim, og fingu tey tá at vita, at tað ikki var forboð fyri innflutningi av hundinum. Tey vóru sostatt í góðari trúgv tá tey fingu sær hundin.

Omanfyri nevndi listi, ið Heilsufrøðiliga Starvsstovan hevur gjørt yvir hundar, sýnist at vera gjørdur við atliti til at útgreina nærri, hvørjir hundar eru at meta sum kamphundar sambært § 3 stk. 2 í kunngerð nr. 15 frá 7. apríl 2004. Hinvegin er ikki greitt, hvørt listin er at meta sum eitt alment forboð ella bert sum ein innanhýsis vegleiðing hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni.

Løgfrøðiliga sæð meti eg, at spurnaðartekin kann setast við, hvar heimildin fyri hesum lista er og tí eisini við tað forboð, ið er sett sambært hesum lista; í hesum konkreta føri nevniliga forboðið móti at innflyta ella hava hund av slagnum Staffordshire Bull Terrier í Føroyum.

Annars undrast klientar mínir yvir, at hundur teirra er settur á henda lista, av tí at hetta hundaslag ikki er at meta sum ein kamphundur. Tvørtur ímóti hevur hetta hundaslag millum kennarar fingið skotsmálið, at hann er familjuhundur burturav og serliga vælegnaður til børn, og verður í hesum samband víst til hjáløgdu avrit av útskrift frá heimasíðuni hjá SBT-Danmark og The Kennel Club í Onglandi.

Eisini kann nevnast, at ikki er forboð ímóti at innflyta ella hava Staffordshire Bull Terrier í londunum rundan um okkum, sum t.d. Onglandi, Danmark, Noregi og Svøríki. Tað sýnist tí løgið, at hetta hundaslag er ikki er loyvt at innflyta til Føroyar, og eri eg tí av teirri fatan, at talan helst er um eina misskiljing, tá hundurin er forboðin í Føroyum.

Klientar mínir vilja fegnir hava greiðu á, eftir hvørjum fyritreytum hundarnir, ið standa á listanum eru útvaldir, tá t.d. hundasløg sum doberman og rottweiler ikki eru á listanum. Tey vilja serstakliga fegin vita, eftir hvørjum kriterium, avgjørt er, at Staffordshire Bull Terrier er ein kamphundur.

Klientar mínir hava havt hund sín H í umleið 1 1/2 ár, og ynskja at taka hund sín við sær til Føroya, nú tey hava ætlanir um at flyta heim. Tað er tí hugstoytt fyri klientar mínar um tey skulu noyðast at avhenda ella í ringasta føri avlíva hundin, orsakað av tí, ið helst er ein misskiljing um, hvørt hundurin er ein kamphundur ella ei.

Vísandi til hjáløgdu skjølini um hundaslagið Staffordshire Bull Terrier fari eg tí vinarligast at heita á Heilsufrøðiligu Starvsstovuna um at endur-

skoða listan soleiðis, at slagið Staffordshire Bull Terrier verður tikin av listanum.

Um tygum ikki fáa tikið støðu til beinanvegin, hvørt tað er rætt, at Staffordshire Bull Terrier skal standa á listanum, fari eg til seinast at spyrja, hvørt tað á nakran hátt er gjørligt eftir umstøðunum at fáa fyribilsloyvi til, at klientar mínir taka hundin við sær til Føroya, meðan tit kanna málið nærri.

Av tí at B skal byrja í nýggjum starvi í Føroyum tann 1. september 2004, skal eg orsaka av hesum umstøðum vinarligast heita á tygum um at svara hesum skrivi skjótast gjørligt.

Annars leggi eg við avrit av fylgjandi skjølum:

– skriv frá klienti mínum til tygara,
– útskriftir frá heimasíðuni hjá SBT-Danmark,
– útskriftir frá heimasíðuni hjá The Kennel Club í Onglandi,
– hoyringarskriv frá Norsk Terrier Club,
– Pet Travel Scheme,
– Record of primary and booster vaccination.

Avrit av hesum skrivi við skjølum er sent Vinnumálaráðnum, Veterinærdeildina."

Við skrivi, dagfest 24. august 2004, hevur Heilsufrøðiliga Starvsstovan svarað A soleiðis:

**„Viðvíkjandi: innflutningi av Staffordshire Bull Terrier**

Í umsókn frá B og C verður søkt Heilsufrøðiligu starvsstovuna um loyvi at innflyta hund av slagnum Staffordshire Bull Terrier.

Heilsufrøðiliga starvsstovan kann **ikki geva loyvi til hetta**.

Sambært Kunngerð nr. 15 frá 7. apríl 2004 um innflutning av hundum, kettum og øðrum kelidjórum, grein 3 stk. 1 og 2 er ikki loyvt at:

• Innflyta kelidjór, sum kunnu verða til vanda hjá djórum og menniskjum
• Innflyta og hava kamphundar

Ein kamphundur er sambært áðurnevndu kunngerð grein 2:4 hundur, sum er aldur og vandur til aggressiva atferð.

Staffordshire Bull Terrier er kamphundur og kann vísa aggressivan atburð móti fólki og djórum sambært tilburðum í okkara grannalondum, og er av hesum orsøkum til dømis ikki loyvdur í Týsklandi.

Í norskum hoyringsnotati í samband við gerð av nýggjari kunngerð um hundar, kemur Justisdepartementet til niðurstøðuna, at Staffordshire Bull Terrier er ein kamphundur og átti ikki at verið loyvdur í Noregi. Í sama notati stendur, at í Spaniu verður Staffordshire Bull Terrier roknaður sum møguligt vandamikið djór.

Listin á heimasíðuni hjá Heilsufrøðiligu starvsstovuni, yvir hundar, sum ikki er loyvi at innflyta til Føroyar, er gjørdur, sum vegleiðing til innflytarar av hundum og byggir á ítøkiliga meting av einstaka hundaslagnum við atliti til grein 2:4 *í Kunngerð nr. 15 frá 7. apríl 2004 um innflutning av hundum, kettum og øðrum kelidjórum.*

**Kæra**

Sambært grein 18 í kunngerð nr. 15 frá 7. apríl 2004 um innflutning av hundum, kettum og øðrum kelidjórum kunnu avgerðir tiknar av Heilsufrøðiligu starvsstovuni kærast til Veterinerdeildina í Vinnumálaráðnum, Tinganes, postrúm 139, 110 Tórshavn.

Eru spurningar ella viðmerkingar til hetta brævið, eru tit vælkomin at ringja.

…

Høringsnotat – utkast til forskrift om hunder punkt 4 Forbud mot amerikansk staffordshire terrier. Frá heimasíðuni hjá Justis- og Politidepartementet www.odin.dep.no"

Norska notatið, sum víst verður til í skrivinum, er soljóðandi:

**„4 Forbud mot amerikansk staffordshire terrier**

I Ot.prp. nr. 48 (2002-2003) foreslo Justisdepartementet at blant annet hundetypen amerikansk staffordshire terrier skulle anses som „farlig hund", som det skulle være forbudt å holde, avle eller innføre jf. lovutkastet § 19 andre ledd bokstav a) jf. første ledd. I proposisjonen side 181 flg. vurderer Justisdepartementet om nærmere angitte hundetyper, herunder amerikansk staffordshire terrier, bør anses som farlige hunder. I proposisjonen heter det om dette:

„Departementet foreslår at enkelte nye hundetyper blir eksplisitt forbudt i tråd med rettslig utvikling i andre land og faktisk utvikling i drabantbyene hos oss. Det synes som om gamle kamphundtyper nå reetableres som reelle kamphunder i visse miljøer. Departementet vil her vise til notatet fra Oslo politidistrikt, kriminalavdelingen, 17. oktober 2002 og

enkelte andre høringsuttalelser som er inne på dette. Særlig amerikansk staffordshire terrier er mye brukt i miljøene.

En del av disse hundene må antas reelt sett å være av typen pitbullterrier. Departementet er kjent med flere metoder som det er grunn til å tro kan være brukt for å få pitbullterrier eller blandinger med denne registrert som amerikansk staffordshire bullterrier med papirer fra Norsk Kennel Klub. Den allerede foretatte iblandingen lar seg nå ikke skille ut ved hjelp av genetiske metoder eller ved at Norsk Kennel Klub fra 1. januar 2002 krever avstamningskontroll med blodtyping på valper av typen amerikansk staffordshire terrier før registrering. De to hundetypene lar seg i Norge i dag rent praktisk ikke skille fra hverandre, og det er opprinnelig samme type hund. Amerikansk staffordshire terrier er et utvalg av typen pitbullterrier som fra 1936 er godkjent som rase i det internasjonale nettverk av hundeklubber som Norsk Kennel Klub er tilknyttet. Pitbullterrier er ansett som rase fra 1898 av amerikanske klubber som ikke er tilknyttet samme nettverk.

Staffordshire bullterrier og bullterrier er ikke mye brukt nå i de norske kamphundmiljøene, men også de er inne i miljøene etter det Oslo politidistrikt opplyser.

For så vidt gjelder et mulig forbud mot amerikansk staffordshire terrier og bullterrier, har Norsk Kennel Klub og Norges Jeger- og Fiskerforbund tatt til orde mot dette. Departementet legger til grunn at innvendingene også refererer seg til mulig forbud mot staffordshire bull terrier, selv om ikke dette er nevnt i den skriftlige henvendelsen. Generelt har imidlertid disse instansene samt Norges Hundekjørerforbund og Fuglehundklubbenes Forbund uttalt at det er «viktig at man følger utviklingen og at angivelsen av farlige raser utvides ved behov».

Den beste reelle indikasjon på hvilke hunder som har kamphundegenskaper, er etter departementets vurdering å se på utviklingen i kamphundmiljøene og hvilke hundetyper disse fokuserer på gjennom bruk og avl. Den faktiske utviklingen mht. de tre hundetypene amerikansk staffordshire terrier, staffordshire bullterrier og bullterrier i disse miljøene, veier tungt for departementets vurdering av om de bør anses som uønskede kamphundtyper som bør forbys. For så vidt gjelder amerikansk staffordshire bullterrier mener departementet at utviklingen vedrørende bruken av hunden både i seg selv og som inngangsport til omgåelse av forbudet mot hunder av typen pitbullterrier klart er kommet så langt at det tilsier et forbud. Et forbud vil bidra til å gjenopprette trygghet i

bomiljøer som er plaget av kamphunder og deres eiere, gi klare signaler til disse miljøene, forebygge angrep på både folk og andre hunder, og også forebygge lidelser for kamphundene selv som de blir påført ved hundekamper. Departementet ønsker å bidra til å stanse tilveksten av nye hunder med kamphundegenskaper. Departementet mener at når gamle kamphundtyper reetableres, veier hensynet til å motvirke denne utviklingen tyngre enn hensynet til miljøer som holder akkurat disse hundetypene som familiehund og ønsker å fortsette med det.

Departementet har drøftet spørsmålet med Landbruksdepartementet og blitt frarådet å la et forbud omfatte bullterrier. Etter Landbruksdepartementets vurdering kan ikke denne hundetypen i dag antas å ha slike egenskaper at den bør kategoriseres som en særlig farlig hund. For så vidt gjelder utenlandsk rett, omfatter restriksjonene i Tyskland denne hundetypen, mens fransk rett ikke underlegger bullterrieren slike restriksjoner som de to andre terriertypene som forbudet vurderes utvidet til. Ved den nye spanske forordning av 2002 er bl.a. både staffordshire bullterrier og amerikansk staffordshire terrier ansett som potensielt farlige dyr, mens bullterrieren ikke er nevnt. Det kan også nevnes at bullterrieren har et utseende som avviker klart fra pitbullterrier, staffordshire bullterrier og amerikansk staffordshire terrier. De tre sistnevnte hundetypene har derimot et ganske ensartet utseende. Den klareste forskjellen mellom disse er at staffordshire bullterrier etter rasestandarden skal være mindre enn de andre, men i praksis er det en del størrelsesvariasjoner ut over rasestandardens idealbeskrivelser. Departementet er kommet til at hundetypene amerikansk staffordshire terrier og staffordshire bull terrier bør forbys. Under tvil er departementet imidlertid blitt stående ved at bullterrier ikke bør foreslås omfattet av forbudet. Man bør imidlertid følge utviklingen i kamphundmiljøene og vurdere bullterrieren nærmere ut fra de erfaringer som måtte komme, jf. punkt 15.5.3 nedenfor.

Departementet er klar over at en del av kamphundene kan se nokså tilforlatelige ut utseendemessig, og heller ikke er de blant de aller største hundetypene. Med riktig behandling kan også kamphundtypene fungere godt som normale familiehunder. Bull-Terrier Forum har opplyst at det er ca. 350 bullterriere i Norge i dag. Departementet antar at antallet staffordshire bullterrier er rundt det samme, mens det antas å være en god del flere hunder av typen amerikansk staffordshire terrier. Av hensyn til det vanlige familieholdet av hundetyper som rammes av forbud, vil departementet foreslå overgangsregler som gjør at enkelthunder som i

dag er lovlig holdt kan beholdes, selv om dette ikke er ønskelig av hensynet til personer som lever i bomiljøer der de aktuelle hundetypene skaper frykt og uro.

Departementet er klar over at det er ulike syn på enkelte faktiske forhold relatert til disse hundetypene. Mange antar at en av grunnene til kamphundenes farlighet er at de «låser kjeven» ved angrep. Departementet vil ellers kort nevne at man ved avl kan søke å få frem bestemte egenskaper eller en mental profil ved å kombinere hundetyper planmessig. Derfor er forbudet mot blandingshunder som delvis består av kamphundtyper minst like vesentlig som forbudet mot de rene kamphundtypene.

Departementet har vurdert om hunder som ut fra sine ytre, fysiske kjennetegn kan forveksles med forbudte hundetyper, i seg selv bør være forbudt, jf. den franske lovgivningen som rammer hunder ut fra en klassifisering etter utseende. En slik regel ville gjort en del av de omgåelser man har sett umulige, men departementet foreslår likevel ikke en slik ubetinget og generell regel. Andre former for omgåelser vil likevel kunne utføres selv med en slik absolutt regel. Ulovlige hunder kan ved krysning med andre hundetyper gis ytre kjennetegn som avviker klart fra opphavet. Ved krysning som legger vekt på å få frem eller beholde visse mentale egenskaper og samtidig på å få frem et avvikende utseende, kan man prøve å omgå loven. Slike krysninger vil rammes av forbudet mot bestemte hundetyper og blandinger med disse. Slike forsøk på omgåelser og introduksjon av nye hunder med ukjent opphav kan forfølges dersom politiet følger med på utviklingen i miljøet og avkrever dokumentasjon for hundetypen også for hunder med avvikende utseende som i fremtiden måtte dukke opp i kamphundmiljøene, se nærmere punkt 15.5.5 nedenfor.

Departementet har også vurdert om nye hundetyper av mastiff-, bulldog- og terriertypene og blandinger av disse m.m. bør forbys, fordi dette kan dekke hundetyper som kamphundmiljøene kan komme til å holde. Departementet er her blitt stående ved å videreføre en mulighet til å utvide forbudet ved forskrift, jf. punkt 15.5.3.“

Når det gjelder sitatet ovenfor, for så vidt gjelder „kamphundenes farlighet ved at de låser kjeven ved angrep, vil departementet komme med en presisering: Kamphundene er kompromissløse, lettrente og lærevillige. Formen på kjeven og det faktum at de er avlet frem for å holde fast okser i mulen, gjør dem spesielt egnet som kamphunder. Ved avl kan man

søke å få frem bestemte egenskaper og en mental profil ved å kombinere hunderaser planmessig. Dette gjelder alle hunderaser, og forbudet mot blandingshunder, som delvis består av kamphunder, er like vesentlig som forbudet mot de rene kamphundtypene."

Við skrivi, dagfest 27. oktober 2004, hevur A sent Vinnumálaráðnum soljóðandi kæru um avgerðina hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni:

**„Viðv.: kæru um avgerð hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni, dagfest tann 24. august 2004**
Við hesum verður kærd avgerð, dagfest tann 24. august 2004, ið er tikin av Heilsufrøðiligu Starvsstovuni um ikki at loyva innflutningi til Føroya av hundinum „H", ið er av slagnum Staffordshire Bull Terrier. Avgerðin er tikin sum svar uppá skriv mítt, dagfest tann 16. august 2004. Avrit av avgerð og umsókn verða hjáløgd sum ávikavist **skjal 1 og 2**.

Grundgevingarnar fyri hesum kærumáli eru fleiri.

Fyri tað fyrsta, so verður í avgerðini hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni lagt til grund, at Staffordshire Bull Terrier er ein kamphundur. Til hetta er at viðmerkja, at eingin skjalprógvan er fyri, at Staffordshire Bull Terrier er ein kamphundur.

Í avgerðini verður sagt, at *„Staffordshire Bull Terrier er ein kamphundur og kann vísa aggressivan atburð móti fólki og djórum sambært tilburðum í grannalondum okkara…"* Sum skjalprógvan fyri hesum vísir Heilsufrøðiliga Starvsstovan til eitt hoyringsnotat frá Noregi, ið viðvíkur *„forbud mot Amerikansk Staffordshire Terrier"*. Viðmerkjast skal her, at Staffordshire Bull Terrier og Amerikansk Staffordshire Terrier eru tvey ymisk hundasløg.

Somuleiðis verður í avgerðini víst til, at sambært hoyringsnotatinum úr Noregi verður Staffordshire Bull Terrier roknaður sum møguligt vandamikið djór í Spania. Upplýsast kann, at nýggj lóg viðvíkjandi hundahaldi, „Forskrift om hunder" er komin í gildi í Noregi tann 20. august 2004, og sambært hesi lóg, ið verður hjáløgd í avriti sum **skjal 3**, er Staffordshire Bull Terrier ikki á listanum yvir hundar, ið eru forbodnir í Noregi. Annars verður í síni heild víst til skjal 3, ið vísir, at hoyringsnotatið ikki kann nýtast sum faklig ella saklig skjalprógvan fyri støðuni í Noregi til forboð móti vandamiklum hundum í Noregi.

Eftir mínum tykki eru ávísingarnar hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni til hoyringsnotatið úr Noregi og óskjalprógvaðan hugburð úr Spania

kriteriir, ið eru ósaklig og sum ikki eiga at verða nýtt í sambandi við tulkingina av, hvussu „*kamphundur*" skal skiljast sambært føroysku lógini, serstakliga tá hugsað verður um, at hoyringsnotatið enntá ikki hevur verið lagt til grund í sambandi við broytingina av lógini í Noregi.

Sambært kunngerð nr. 15 frá 7. apríl 2004, § 2 stk. 1 nr. 4 er definitiónin uppá ein kamphund hendan: „*Kamphundur: hundur, sum er aldur og vandur til aggressiva atferð, íroknað t.d. Pitt bull terrier, Tosa og blandingar av hesum sløgum.*"

Tað tykist ikki heilt greitt sambært hesi áseting, hvat týdningurin av „*aldur og vandur til aggressiva atferð*" er, t.d. um hesi kriteriir eru knýtt at hundaslagnum ella at hvørjum einstøkum hundi sær. At ávís hundasløg eru nevnd í ásetingini, bendir á, at hugsanin aftanfyri ásetingina er, at ávís hundasløg eru „kamphundar" longu tá teir verða føddir. Tað kann ikki útihýsast, at ávís hundasløg kunnu hava eginleikar sum t.d. dirvi, lýdni, v.m. ið kunnu gera at teir eru egnaðir til at venja upp til kamphundar, men eftir mínum tykki er tað, at „*ala og venja*" ein hund, nakað sum verður gjørt við hvørt hundaindivid sær.

Fyri tað næsta, so verður gjørt galdandi, at Heilsufrøðiliga Starvsstovan ikki hevur lógarásetta heimild at gera ein tílíkan lista, ið sipað verður til í avgerðini. Heilsufrøðiliga Starvsstovan hevur sambært kunngerð nr. 15 frá 7. apríl 2004, § 8 „*...eftirlit við innflutningi av kelidýrum.*", men ongastaðni sæst verða givin heimild til Heilsufrøðiligu Starvsstovuna at gera av, hvørji hundasløg eru kamphundar ella til at gera tílíkan lista, ið víst verður til í avgerðini.

Sambært Heilsufrøðiligu Starvsstovuni er listin vegleiðandi, men um hugt verður á heimasíðuna www.hs.fo so sæst, at „*Niðanfyristandandi hundar er ikki loyvt at innflyta ella hava í Føroyum.*" Avrit av listanum verður hjálagt sum **skjal 4**. Eftir mínum tykki kann ein borgari ikki síggja listan sum annað enn eitt generelt forboð og ikki sum eina vegleiðing. Um eitt generelt forboð skal setast móti at innflyta ávíst hundaslag, so eigur hetta at verða gjørt í lóg ella kunngerð.

Hinvegin, um listin bert er vegleiðandi til hundainnflytarar, sum Heilsufrøðiliga Starvsstovan vil vera við, so er spurningurin, hvør støðan verður, um klientar mínir ikki ynskja at fylgja hesi vegleiðing. Eftir mínum tykki eigur tá at verða hugt at, hvørt lógin ella kunngerðin setir nakað forboð móti at taka ein hund av slagnum „Staffordshire Bull Terrier" við til Føroya. Um hugt verður eftir kunngerð nr. 15 frá 7. apríl 2004, so er einki í hesi kunngerð, ið gevur grundarlag undir einum

forboði móti at klientar mínir taka hund sín „H“ við sær heim til Føroya, bert tí at hundurin er av slagnum Staffordshire Bull Terrier, og kann eitt forboð móti hesi rasu ikki útleiðast av hesi kunngerð, í øllum førum ikki uttan haldgóða sakliga skjalprógvan fyri, at Staffordshire Bull Terrier er ein kamphundur. Henda skjalprógvan fyriliggur ikki.

Samanumtikið verður gjørt galdandi, at eingin heimild er fyri forboðnum hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni um at nokta klientum mínum at taka hundin „H“ við sær til Føroya, hvørki í lóg, kunngerð ella sambært tí óheimilaða listanum hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni.

Til seinast vil eg ávísa, at í skrivi mínum frá 16. august 2004 havi eg biðið Heilsufrøðiligu Starvsstovuna um at útgreina nærri, eftir hvørjum kriterium hundarnir á listanum eru útvaldir, tá hundasløg sum schæfer, doberman og rottweiler, ið bera orð fyri at vera vandamiklir, ikki eru á listanum. Heilsufrøðiliga Starvsstovan hevur ikki svarað hesum, og meti eg ikki hesa framferð at vera í samsvari við góðan fyrisitingarsið.

Vísandi til ta serstøðu, ið klientar mínir eru í, nevniliga

- at tey hava átt hundin í nærum 2 ár, síðan hundurin var hvølpur, og tí kunnu prógva at hava fult tamarhald á hundinum,
- at tey kannaðu og fingu staðfest, at eingin forðing var fyri innflutningi til Føroya, tá tey fingu sær hundin,
- at tey tí vóru í góðari trúgv tá tey fingu sær hundin,
- at talan fyri tey er um ein familjuhund, ið ikki er ætlaður til nakra ávísa nýtslu, og avgjørt ikki er aldur ella vandur til aggressiva atferð, skal eg hervið heita á Vinnumálaráðið um at broyta avgerðina hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni og loyva, at klientar mínir fáa loyvi at taka „H“ við til Føroya. Upplýsast kann, at B longu er í Føroyum og arbeiðir, meðan C og H eru stødd í Danmark og bíðar eftir eini avgerð í hesum máli.

Annars vil eg vísa til hjálagda avrit av *„forslag til lov om ændring af lov om hunde*“ (skjal 5), og vil eg serliga vísa til viðmerkingarnar, síðurnar 10, 11, 12, 13, 14 og 15. Víst verður somuleiðis til tey skjøl, ið vórðu send Vinnumálaráðnum saman við avriti av skrivi mínum til Heilsufrøðiligu Starvsstovuna, dagfest tann 16. august 2004.

Áðrenn Vinnumálaráðið tekur avgerð viðvíkjandi hesi kæru, fari eg at biðja um, at fundur verður hildin, soleiðis at klientar mínir munnliga fáa høvi at føra sjónarmið síni fram.

Vænti at frætta aftur sum skjótast.“

Tann 18. november 2004 er soljóðandi notat skrivað í Vinnumálaráðnum:

> **„<u>Noterað 18.11.2004 í mál nr. … um innflutning av Staffordshire Bull Terrier.</u>**
> Tosað við <u>I</u>, sum er <u>hundaatferðarkonsulentur</u> hjá <u>Dansk Kennel Klub</u> og m.a. vegleiðir donsku løgregluni í hundamálum.
>
> Hon greiddi mær frá, at í Danmark er man farin frá at „tosa um“ vandamiklar hundarasur – man tosar í staðin um vandamikil individ. Tó eru tvey undantøk í hesum sambandi, nevniliga hundarasurnar Pitt Bull Terrier og Tosa.
>
> Argumentið fyri hesi broyting í Danmark er serliga trupulleikin við blandingsrasum. Tað er forholdsvís lætt at kamuflera ein kamphund, td. ein Pitt Bull Terrier, við at para hann við einum hundi, sum sær fittur og friðarligur út – úrslitið kann lættliga blíva ein „úlvur í seyðaskinni“. Í Danmark hevur man mett, at tað er betri, at fólk kunnu síggja, at talan er um ein kamphund í staðin fyri at hava kamufleraðar kamphundar gangandi. Og so verður fokuserað uppá, at hundaeigarar uppføra seg ansvarliga við hundum sínum.
>
> I segði, at eingin ivi er um, at hundaslagið Staffordshire Bull Terrier er ein kamphundur! Og kamphundar hava vanliga „lavere tærskel for aggressivitet“ – og um / tá teir bíta, er bitið vanliga eisini verri og skaðin størri enn hjá øðrum hundum.
>
> Hon sendi mær avrit av broytingunum í donsku reglunum.“

Tann 1. desember 2004 hevur Vinnumálaráðið sent A soljóðandi skriv:

> **„Viðv. kæru um avgerð hjá Heilsufrøðiligu starvsstovuni í máli um ein Staffordshire Bull Terrier – dagfest 24.08.2004.**
> Við hesum verður gjørt vart við, at ein avgerð í málinum er á gáttuni og verður væntandi send tykkum í vikuni.
>
> Niðurstøðan verður helst, at hundurin fær loyvi til at koma til Føroya.“

Við skrivi, dagfest 18. desember 2004, hevur Vinnumálaráðið sent A soljóðandi avgerð:

**„Viðv. kæru um avgerð hjá Heilsufrøðiligu starvsstovuni í máli um ein Staffordshire Bull Terrier – dagfest 24.08.2004.**

Vinnumálaráðið (VMR) hevur tann 01.11.2004 fingið kæru sendandi frá tygum í máli, har Heilsufrøðiliga starvsstovan (HFS) hevur noktað fyri, at ein hundur varð fluttur til Føroya.

**Í stuttum er málið hetta**

B og C hava søkt HFS um loyvi til at flyta ein hund av slagnum Staffordshire Bull Terrier (SBT) til Føroya.

HFS gevur ikki loyvi til innflutning av hundinum. Í skrivi dagfest 24.08.04 verður víst til § 3, stk. 1 og 2 í kunngerð nr. 15 frá 07. apríl 2004 um innflutning av hundum, kettum og øðrum kelidjórum.

**Avgerð í málinum**

VMR tekur undir við HFS, at ikki skal verða loyvt at flyta inn viðkomandi hund av slagnum SBT til Føroya.

**Grundgeving**

Eftir § 1, stk. 1 í løgtingslóg nr. 58 frá 22. apríl 2003 um innflutning og hald av vandamiklum djórum o.a. kann landsstýrismaðurin seta generelt bann fyri innflutningi av ávísum hundasløgum. Hetta er gjørt við kunngerð nr. 15 frá 07. apríl 2004 um innflutning av hundum, kettum og øðrum kelidýrum.

Eftir § 3 í kunngerðini er bannað at innflyta kamphundar. Hundaslagið kamphundur er í kunngerðini lýst sum hundur, ið er aldur og vandur til aggressiva atferð. Eftir kunngerðini eru ávís hundasløg sostatt kamphundar, sum tað er bannað at innflyta og hava, uttan at støða í hvørjum føri sær skal takast til, um einstaki hundurin konkret er aldur og vandur til aggressiva atferð.

Eftir tí upplýsta verður hundurin, sum talan er um at innflyta, av fakkunnleikanum bólkaður sum kamphundur. Hundurin er sostatt fevndur av § 3 í kunngerðini, og tí er bannað at innflyta hundin. Kæran kann sostatt ikki verða komin á møti.“

Tann 20. desember 2004 hevur A sent Vinnumálaráðnum soljóðandi skriv:

**„Viðv.: innflutningi av hundi av slagnum Staffordshire Bull Terrier**

Undirritaði havi móttikið avgerðina frá Vinnumálaráðnum, dagfest tann 18. december 2004, uppá kæru mína um avgerð hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni.

Tað er við undran at eg nú kann staðfesta, at kæran ikki verður gingin á møti.

Í skrivi tygara til undirritaða, dagfest tann 1. december 2004, verður sagt, at „*…ein avgerð í málinum er á gáttuni og verður væntandi send tykkum í vikuni. Niðurstøðan verður helst, at hundurin fær loyvi at koma til Føroya.*“ Eg leggi við avrit av skrivinum. Tað er mín greiða fatan, at Vinnumálaráðið við skrivinum frá 1. december 2004 hevur givið klientum mínum eina „berettiget forventning“ um, at kæran fór at verða gingin á møti, soleiðis at hundur fekk loyvi at koma til Føroya, og hava klientar mínir í áliti á hetta innrættað seg eftir hesum.

Eftir mínum tykki skulu nýggjar upplýsingar fyriliggja ella nýggj viðurskifti hava gjørt seg galdandi, fyri at Vinnumálaráðið skal kunna broyta ta „fyribils“ niðurstøðu, ið varð givin í fyrra skrivinum. Undirritaði kann ikki síggja, at nýggjar upplýsingar fyriliggja ella at broytt ella nýggj viðurskifti hava gjørt seg galdandi ella kunnu ávísast í tíðarskeiðnum frá 1. til 18. december 2004.

Samanumtikið meti eg, at Vinnumálaráðið hevur handlað í stríð við góðan fyrisitingarsið við at senda eitt skriv við eini ábending um, hvat niðurstøðan verður, og síðan uttan aðra grundgeving at koma við eini avgerð, ið gongur hesum beint tvørturímóti.

Eg fari tí at heita á Vinnumálaráðið at taka avgerðina frá 18. december 2004 upp til nýggja viðgerð, soleiðis at málið verður avgreitt sambært teirri ábending um niðurstøðu, ið varð givin við skrivinum frá 1. december 2004.

Um nýggj avgerð ikki fyriliggur áðrenn 10. januar 2005, verður málið sent Løgtingsins umboðsmanni til støðutakan, samstundis sum umhugsað verða at úttaka stevning í málinum.

Eg vænti at frætta aftur.“

Í teldubrævi, dagfest 23. desember 2004, hevur Vinnumálaráðið sent A soljóðandi fráboðan:

**„Kæra um innflutning av Staffordshire Bull Terrier (j. nr. 3300402)**
Vinnumálaráðið hevur móttikið skriv tygara dagfest 20.12.2004 í áðurnevnda máli. Og boðað verður frá, at málið verður tikið upp aftur.“

Í teldubrævi, dagfest 10. januar 2005, hevur Vinnumálaráðið boðað A frá, at avgerð verður tikin seinni í vikuni.

Við skrivi, dagfest 14. januar 2005, hevur Vinnumálaráðið sent A soljóðandi avgerð:

**„Viðv: Kæru um avgerð í máli um innflutning av hundi av slagnum Staffordshire Bull Terrier til Føroya**

Sum avtalað við Advokatfelagið í skrivi okkara, dagfest 23. desember 2004, hevur Vinnumálaráðið havt fyriliggjandi mál til nýggja viðgerð. Men niðurstøðan er hin sama, sum í skrivi til tykkara dagfest 18.12.2004.

Afturat grundgevingunum, sum eru nevndar í skrivinum frá 18.12.2004, kann verða lagt, at Vinnumálaráðið ikki metir, at skriv Vinnumálaráðsins til tykkara dagfest 01.12.2004 er at meta sum eitt endaligt svar í nevnda máli, men sum ein fyribils meting í málinum. Í skrivinum verður beinleiðis sagt, at „ein avgerð í málinum er á gáttuni og verður send tykkum í vikuni". Endaliga avgerðin varð givin stutt eftir fyribils metingina, og Vinnumálaráðið metir ikki, at addressaturin hevur havt orsøk til at innrætta seg grundað á fyribils metingina í málinum. At endaliga metingin í málinum bleiv ein onnur enn fyribils metingin er óheppið, men broytir ikki tann veruleika, at talan var um eina fyribils meting.

Harumframt metir Vinnumálaráðið, at tað vildi skapt ójavnað í umsitingina av lóggávuni, um loyvi varð givið í hesum einstaka føri.

Tí verður avgerðin frá 18.12.2004 fasthildin."

## Partshoyring

Umboðsmaðurin gjørdi av at kanna hetta málið nærri, og við skrivi, dagfest 6. apríl 2005, varð klagan send Vinnumálaráðnum til ummælis.

Við skrivi, dagfest 22. apríl 2005, hevur Vinnumálaráðið sent umboðsmanninum soljóðandi frágreiðing:

**„Viðvíkjandi klagu frá A, adv.ft, dagfest 04.04.2005.**

Vinnumálaráðið fekk tann 08.04.2005 skriv frá Løgtingsins Umboðsmanni, har biðið verður um eina frágreiðing í máli, har Vinnumálaráðið hevur noktað innflutningi av einum hundi av slagnum Staffordshire bull terrier.

**Málið í stuttum** (skjølini í málinum eru løgd við í tíðarrað sum skjal 1-16):

Primo 2004 fær Heilsufrøðiliga starvsstovan ein fyrispurning um innflutning av viðkomandi hundi. Heilsufrøðiliga starvsstovan svarar fyrispurninginum í skrivi dagfest 21.01.04 (skjal 11). Loyvi verður ikki givið til at innflyta hundin.

Tann 05.07.04 sendir Heilsufrøðiliga starvsstovan Landsdjóralæknanum / Vinnumálaráðnum ein lista við kamphundarasum, sum Heilsufrøðiliga starvsstovan metir ikki eiga at verða innfluttir til Føroya (skjal 12). Landsdjóralæknin svarar uppá skrivið í maili dagfest 24.08.04 (skjal 15). Hann hevur einki at finnast at.

Hin 08.07.04 sendir Heilsufrøðiliga starvsstovan Toll- og skattstovu Føroya listan við kamphundarasunum (skjal 13). Staffordshire bull terrier er á listanum.

Medio 2004 fær Heilsufrøðiliga starvsstovan eina umsókn um at sleppa at flyta hundin til Føroya (skjal 4).

Í skrivi dagfest 16.08.04 vendir Advokatfelagið sær til Heilsufrøðiligu starvsstovuna (skjal 14). Sagt verður m.a., at hundaánararnir fyri 1 1/2 ári síðani fingu at vita frá Heilsufrøðiligu starvsstovuni, at ongar forðingar vóru fyri, at hundurin varð innfluttur til Føroya, og at teir tí vóru „í góðari trúgv." Eisini setir Advokatfelagið spurnartekin við kamphundalistan hjá Heilsufrøðiligu starvsstovuni og við, hvørt talan í heila tiki er um ein kamphund.

Heilsufrøðiliga starvsstovan svarar skrivinum tann 24.08.04 (skjal 16). Víst verður til kunngerð um innflutning av hundum, kettum og øðrum kelidjórum, og loyvi verður ikki givið til innflutning av hundinum.

Tann 27.10.04 kærir Advokatfelagið avgerðina hjá Heilsufrøðiligu starvsstovuni til Vinnumálaráðið (skjal 1). Deils verður víst á orðingina „*aldur og vandur*" í § 2, 4) í áðurnevndu kunngerð, og sagt verður, at hetta er naka „*sum verður gjørt við hvørt hundaindivid sær*", og deils verður funnist at kamphundalistanum hjá Heilsufrøðiligu starvsstovuni.

Í notati dagfest 18.11.04 verður víst á, at Vinnumálaráðið hevur tosað við Dansk Kennel Klub (skjal 6). Haðani varð m.a. upplýst, at „*eingin ivi er um, at hundaslagið Staffordshire bull terrier er ein kamphundur!*", at kamphundar vanliga hava „*lavere tærskel for aggressivitet*" og at møguligt bit av einum kamphundi er „*verri og skaðin størri enn hjá øðrum hundum.*"

Hin 01.12.04 sendir Vinnumálaráðið Advokatfelagnum eina fyribils niðurstøðu í málinum (skjal 2). Sagt verður m.a., at „*niðurstøðan verður helst, at hundurin fær loyvi til at koma til Føroya.*" Endaliga avgerðin

verður send 18.12.04 (skjal 3). Niðurstøðan í málinum er, at tað verður ikki givið loyvi til, at Staffordshire bull terriarin verður innfluttur.

Í skrivi dagfest 20.12.04 biður Advokatfelagið Vinnumálaráðið um at taka málið upp aftur (skjal 5). Advokatfelagið er ónøgt við fyribils niðurstøðuna og metir, at hon hevur givið hundaánaranum eina *„berettiget forventning“* um, at kæran fór at verða gingin á møti. Tann 23.12.04 váttar Vinnumálaráðið at hava móttikið skrivið (skjal 7). Og tann 11.01.05 boðar Vinnumálaráðið Advokatfelagnum frá, at ein avgerð í málinum er á veg (skjal 8).

Tann 14.01.05 verður avgerðin send (skjal 9). Í avgerðini verður víst á, at Vinnumálaráðið ikki metir, at skrivið frá 01.12.04 er at meta sum eitt endaligt svar men sum ein *„fyribils meting“* í málinum. Víðari verður sagt, at *„endaliga avgerðin varð givin stutt eftir fyribils metingina, og VMR metir ikki, at adressaturin hevur havt orsøk til at innrætta seg grundað á fyribils metingina í málinum.“*

**Lógarheimild:**

Løgtingslóg nr. 58 frá 22. apríl 2003 um innflutning og hald av vandamiklum djórum o.ø.

*§1. Landsstýrismaðurin kann áseta reglur um forboð fyri innflutningi av vandamiklum og eksotiskum djórum til Føroya og haldi av slíkum djórum í Føroyum.*

Kunngerð nr. 15 frá 7. apríl 2004 um innflutning av hundum, kettum og øðrum kelidýrum

***§2. …***

4) Kamphundur: hundur, sum er aldur og vandur til aggressiva atferð, íroknað Pitt bull terrier, Tosa og blendingar av hesum sløgum.

*§3. Ikki er loyvt at flyta inn kelidýr, sum kunnu verða til vanda hjá dýrum ella menniskjum, t.d. orsaka av eiturbiti ella eiturstingi teirra.*

*Stk. 2. Ikki er loyvt at flyta inn ella hava kamphundar.*

**Støða Vinnumálaráðsins er hendan:**

Víst verður til grundgevingarnar í skjølunum 3 og 9. Og Vinnumálaráðið hevur framvegis ta áskoðan, at heimild er í lógini og kunngerðini at seta bann fyri innflutningi av ávísum hundasløgum, sum fakserkunnleikin generelt metir sum kamphundar, sbr. eisini, at í § 2 í kunngerðini verður víst til hundasløgini Pitt bull terrier, Tosa og blendingar av hesum sløgum. Tað er tí ikki ein treyt fyri at seta bann, at tað í konkreta førinum er ávíst, at hundurin er aldur og vandur til aggessiva atferð, og at hundurin konkret kann metast at vera vandamikil.

Vinnumálaráðið tók avgerð í málinum í skrivi dagfest 18.12.04, hóast ráðið í einum fráboðanarskrivi 01.12.04, í eini fyribils meting av hvat úrslitið fór at verða, hevði givið vón um, at innflutingsloyvið fór at verða givið. Men atlit at, at tað í umsitingini av lógini fór at verða gørdur mismunur millum borgararnar, um loyvið varð givið í hesum einstaka førinum, grundað á eina fyribils meting (sum ráðið seinni metti at vera skeiva), og ikki í øðrum førum, gjørdi, at ráðið ikki helt seg kunna geva loyvið.

Nevnast kann annars, at ymiskt er, hvussu man í londunum rundan um okkum loysir trupulleikar við vandamiklum hundum. Í Norra hevur man reglur, sum líkjast teim føroysku, sbr. § 1 í FOR 2004-08-20 nr. 1204: Forskrift om hunder. Í greinini verður m.a. sagt: *„Det er forbudt å holde, avle eller innføre farlige hunder, eller å innføre sæd eller embryo fra farlige hunder.“* Og sum vandamiklir hundar verða hundasløgini *„Pitt bull terrier, Amerikanskur staffordshire terrier* (eitt „systkinabarn“ hjá Staffordshire bull terrier, red.), *Fila brasileiro, Tosa inu og Dogo argentino“ positivt nevndir.*

Sum sagt metir fakserkunnleikin generelt, at hundaslagið Staffordshire bull terrier er ein kamphundur. Umframt metingina hjá Dansk Kennel Klub (skjal 6) skal bert verða víst á tvey kend verk á økinum, nevniliga:

1. David Alderton: „Eyewitness Handbooks: Dogs“
   (1. útgáva, 3. upplag 1996 – A Dorling Kindersley Book)
   á donskum „Hund i farver“ – lagað til av Ullu Sørensen, Politikens forlag og
2. Eva-Maria Krämer: „Der Kosmos Hundeführer“
   (3. útgáva, 1. upplag 1995 – Verlags-GmbH & Co. Stuttgart)
   á donskum „Hundeleksikon“ – lagað til av Lisbeth Nielsen og Ullu Sørensen og givið út í samstarvi við Dansk Kennel Klub, Aschehoug.

Ivan um hvørt einstaki hundurin konkret kann reagera aggressivt, hevur man í føroysku lóggávuni latið koma einum møguliga skambitnum persóni til góðar.“

Við skrivi, dagfest 28. apríl 2005, vórðu viðmerkingarnar frá Vinnumálaráðnum sendar klagaranum til ummælis.

Við skrivi, dagfest 25. mai 2005, hevur klagarin sent umboðsmanninum soljóðandi viðmerkingar til málið:

**„Viðv.: Tygara j. nr. … – Klaga frá B móti Vinnumálaráðnum**
Víst verður til skriv tygara, dagfest tann 28. apríl 2005, har hjálagt til okkara viðmerkingar var skriv Vinnumálaráðsins, dagfest 22. apríl 2005.

Hervið skal eg koma við fylgjandi viðmerkingum til skriv Vinnumálaráðsins:

Fyrst av øllum er at viðmerkja, at tá Vinnumálaráðið vísir til eitt telefonnotat (skjal 6) frá eini telefonsamrøðu, ið Vinnumálaráðið hevur havt við I frá Dansk Kennel Klub um málið, so er endurgevingin av faktum í notatinum beinleiðis skeiv.

Undirritaði havi fyrilagt I telefonnotatið hjá Vinnumálaráðnum, og sum tað framgongur av hjáløgdum mailum frá henni, so undirstrikar hon, at hennara frágreiðing um Staffordshire Bull Terrier er ein kommentarur um *„historiske tilhørsforhold“* hjá hundaslagnum. Fyri at endurgeva orðing hennara í maili til undirritaða, so sigur hon, at hundurin ikki er forboðin í Danmark, *„idet dens „kamphunderødder“ ligger langt tilbage i tiden – mere end 100 år – at den som race ikke anses for at være væsentlig mere farlig end øvrige hunderacer. Staffordshire bull terrier „bedømmes“ på individ basis på ligefod med alle øvrige hunderacer.“*

Í fyrra mailinum sigur I, at *„Staffordshire Bull Terrier er en af de hunderacer som historisk set har været anvendt til kamp mod bl.a. tyre. Denne anvendelse har dog været forbudt i mange år, hvorfor racen siden er avlet mod at have et mere venligt og omgængeligt temperament. I Danmark holdes staffordshire bull terrier i dag som familiehunde.“*

Omanfyri endurgivnu citat frá mailunum við I eru endurgivin fyri at vísa á, hvussu stórt ósamsvar er ímillum tað, ið I hevur sagt, og tað sum Vinnumálaráðið endurgevur hana fyri at hava sagt. Eftir mínum tykki er hetta í besta føri skeiv endurgeving av fakta, ið sýnist at hava til endamáls, gjøgnum eina viðurkenda organisatión sum Dansk Kennel Klub, at undirbyggja einsíðugu støðuna, ið Vinnumálaráðið hevur tikið í hesum máli.

Tað er nógv sum bendir á, at talan er um tilvitaða skeiva endurgeving av faktum, og hóast hetta undir øllum umstøðum er átaluvert, so er hetta eftir mínum tykki serstakligt grovt og átaluvert, tí talan er um ein almennan myndugleika, og sum samstundis er kærumyndugleiki í málinum.

Fyri tað næsta kann tað undra, at Vinnumálaráðið tann 18. november 2004, t.v.s eftir at kæra okkara er innkomin til Vinnumálaráðið, setur seg í samband við Dansk Kennel Klub fyri at kanna hundaslagið, og útvega

argumentatión fyri, at Staffordshire Bull Terrier er ein kamphundur. Henda argumentatión átti av røttum at verið til staðar og kanningar gjørdar, longu áðrenn kunngerðin varð gjørd, og áðrenn Heilsufrøðiliga Starvsstovan gjørdi ein lista yvir sokallaðar „forbodnar hundar". Tað eru jú útfrá hesum fakligu atlitum, at kunngerð og listi sigast at vera gjørdir. Hetta vísir, at hvørki kunngerð ella listi eru hugsaði ígjøgnum, áðrenn tey eru sett í verk.

Somuleiðis kann tað undra, at Vinnumálaráðið, eftir at hava tosað við Dansk Kennel Klub (sambært skjali 6) kom við eini fyribils niðurstøðu, ið var, *„at hundurin helst fær loyvi at koma til Føroya"*. Sum grundgeving fyri, at fyribils niðurstøðan varð broytt, verður av Vinnumálaráðnum ført fram, at umsitingarligar orsøkir vóru til hetta. Tað vóru sostatt ikki faklig atlit og orsøkir, ið avgjørdi, um hundurin skuldi til Føroya ella ikki, men umsitingarligar orsøkir.

Eftir hvat eg dugi at síggja, so kann fyribils niðurstøðan bert byggja á tveir møguleikar, nevniliga á 1) at hundurin ikki er ein kamphundur, ella 2) at undantaksloyvi kann gevast, hóast hundurin er ein kamphundur. Í hesum sambandi kann spyrjast, um Vinnumálaráðið kann ávísa eina heimild fyri, at undantaksloyvi til innflutning kann gevast av øðrum orsøkum, tá Heilsufrøðiliga Starvsstovan og Vinnumálaráðið annars meta hundin sum ein kamphund. Eftir mínum tykki er grundgevingin um *„umsitingarligar orsøkir"* sostatt ikki haldbar, og ber brá av at vera ein eftirrationalisering av grundgevingum, ið eru ætlaðar at hóska til úrslitið.

Annars kann nevnast, at trupulleikar longu eru við umsitingini av reglunum, og leggi eg sum dømi um hetta, við avrit úr blaðgrein úr Sosialinum frá 17. mai 2005. (print frá www.portal.fo). Eftir øllum at døma er sostatt neyðugt hjá myndugleikunum undir øllum umstøðum at taka reglurnar upp til umhugsan.

Eitt annað, ið er vert at leggja merki til er, at soleiðis sum kunngerðin er orðað, so er ein kamphundur ein *„hundur, ið er aldur og vandur til aggressiva atferð, íroknað Pitt bull, Tosa ella blendingar av hesum."* Til hetta er fyrst at viðmerkja, at sambært omanfyri nevndu citatum frá Dansk Kennel Klub, so liggja *„kamphunderødder"* meira enn 100 ár afturi í tíðini, soleiðis, *„at den som race ikke anses for at være væsentlig mere farlig end øvrige hunderacer"*, og at rasan er *„avlet mod at have et mere venligt og omgængeligt temperament,"* soleiðis at Staffordshire Bull Terrier í dag er at rokna sum ein familjuhundur. Fyri tað næsta kann við vissu sigast, at hundarasan Stafforshire Bull Terrier hvørki er ein Pitt bull terrier, Tosa

ella blending av hesum. Upp á fyrispurning um hetta svaraði I frá Dansk Kennel Klub, at Staffordshire Bull Terrier er líka lítið ein Pitt bull terrier, Tosa ella blending av hesum, sum ein *„appelsin er ein blanding av einum súrepli og eini banan.*"

Sum fyrr nevnt er støðan tann, at Staffordshire Bull Terrier ikki er forboðin í Noregi, Danmark, Stórabretlandi, Hollandi, Svøríki, Íslandi o.s.fr. Tað er tí ósakligt, tá Vinnumálaráðið til seinast í skrivi sínum, av sínum eintingum vísir til, at í Noregi hevur man reglur, ið líkjast teimum føroysku – og síðan vísir til, at Amerikanskur Staffordshire Terrier er forboðin í Noregi – Amerikanskur Staffordshire Terrier og Staffordshire Bull Terrier eru hvør sín hundarasa, og hava sum so einki við hvørja aðra at gera.

Um man í Føroyum politiskt velur eina aðra loysn í sambandi við innflutning av hundum enn grannalond okkara gera, er sín sak, men tað er í besta føri grovt átaluvert av Vinnumálaráðnum og Heilsufrøðiligu Starvsstovuni at misnýta fakkunnleikan í grannalondum okkara innan hundalívfrøði, hundaatferð og hundapsykologi til at stuðla eini politiskari støðu, ið hesi sami fakkunnleikin fyri langari tíð síðan er gingin burtur frá. Til hetta politiska endamál eiga løgfrøðilig amboð at verða nýtt – tað er heilt einfalt ikki hvørki løgfrøðiligur ella „hundafakligur" stuðul fyri teirri støðu, ið Heilsufrøðiliga Starvsstovan og Vinnumálaráðið hava tikið í hesum máli.

Undirritaði meti, at vit við hesum yvirfyri Løgtingsins Umboðsmanni hava prógvað, at bæði formliga málsviðgerðin, fakliga viðgerðin og løgfrøðiligu grundgevingarnar hjá myndugleikunum ikki hava verið nøktandi í hesum máli. Verður henda kæra gingin á møti, fari eg tí til seinast at heita á Løgtingsins Umboðsmann um somuleiðis at áleggja Vinnumálaráðnum at endurrinda klientum mínum tær útreiðslur, ið tey hava havt av hesum máli."

Í teldubrøvunum, dagfest 12. mai 2005, sum klagarin vísir til, sigur I m.a.:

„Jeg har ved tidligere lejligheder talt med repræsentanter fra de veterinære myndigheder på Færøerne omkring emnet „farlige hunde".

Det er fagligt korrekt at sige, at nogle hunderacer historisk set har været anvendt til formål som kamp mod tyr, bjørn og andre hunde.

Staffordshire bull terrier er en af de hunderacer som historisk set har været anvendt til kamp mod bl.a. tyre. Denne anvendelse har dog været forbud i mange år, hvorfor racen siden er avlet mod at have et mere venligt og omgængeligt temperament. I Danmark holdes staffordshire bull terrier i dag som familiehunde.
…"

„Det fremsendte notat er et notat af en lang samtale hvori jeg bl.a. har kommenteret på staffordshire bull terrierens historiske tilhørsforhold.

Racen staffordshire bull terrier er imidlertid ikke forbudt i Danmark, idet dens „kamphunderødder" ligger så langt tilbage i tiden – mere end 100 år – at den som race ikke anses for at være væsentlig mere farlig end øvrige hunderacer. Staffordshire bull terrier „bedømmes" på individ basis på lige fod med alle øvrige hunderacer."

Við skrivi, dagfest 27. mai 2005, vórðu viðmerkingarnar frá klagaranum sendar Vinnumálaráðnum til ummælis.

Við skrivi, dagfest 16. juni 2005, hevur Vinnumálaráðið sent umboðsmanninum soljóðandi viðmerkingar:

**„Viðv. klagu hjá A, adv. ft., dagfest 04. apríl 2005.**
Víst verður til skriv tygara dagfest tann 27. mai 2005 og hjálagda avritið av skrivi frá A adv. ft. dagfest 25. mai 2005 við fylgiskjølum.

Vinnumálaráðið metir ikki, at naka í áðurnevnda skrivi er í andsøgn við tað, sum vit longu hava sagt í málinum. Tó vilja vit leggja okkurt smávegis afturat atfinningunum.

Í ummæli sínum førir A, adv. ft. fram:

1. at Vinnumálaráðið hevur endurgivið upplýsingar frá I úr Dansk Kennel Klub skeivt.
2. at argumentatiónin, sum Vinnumálaráðið hevur útvegað sær frá Dansk Kennel Klub fyri, at Staffordshire bull terrier er ein kamphundur, skuldi verið til staðar, áðrenn kunngerðin og listin yvir forbodnar hundar varð gjørd/-ur, og at tað vísir, at hvørki kunngerð ella listi vóru hugsað ígjøgnum, áðrenn tey vórðu sett í verk.
3. at Vinnumálaráðið, eftir at hava tosað við Dansk Kennel Klub, kom til ta fyribils niðurstøðu, at hundurin helst fekk loyvi til at koma til Føroyar. Grundgevingin hjá Vinnumálaráðnum at broyta fyribils niðurstøðuna var umsitingarligar orsøkir. Tað vóru tí hvørki faklig atlit og

orsøkir, ið avgjørdi, um hundurin skuldi koma til Føroyar ella ikki, men umsitingarligar orsøkir. Fyrbils niðurstøðan kann bert byggja á tveir møguleikar: 1) at hundurin ikki er ein kamphundur, ella 2) at undantaksloyvi kann gevast, hóast hundurin er ein kamphundur. Um Heilsifrøðiliga starvsstovan og Vinnumálaráðið meta hundin at vera ein kamphund, kann støðutakan til, um undantaksloyvi til innfluting skal gevast ella ikki bert takast eftir fakligum atlitum. Grundgevingin um umsitingarligar orsøkir er tí ikki haldbar.

4. Staffordshire bull terrier er ikki forboðin í Noregi, Danmark, Stórabretlandi, Hollandi, Svøríki, Íslandi, o.s.fr. Tað er tí ósakligt, at Vinnumálaráðið vísir til, at í Noregi hevur man reglur, ið líkjast teimum føroysku – og síðan vísir til at Amerikanskur staffordshire terrier er forboðin í Noregi – Amerikanskur staffordshire terrier og Staffordshire bull terrier eru hvør sín hundarasa, sum einki hava við hvørja aðra at gera.

Viðmerkingar:

Til 1

Vinnumálaráðið tvíheldur um, at upplýsingarnar frá Dansk Kennel Klub eru rætt endurgivnar. Tað sum hevur týdning er, at tað er sligið fast, at Staffordshire bull terrier er ein kamphundarasa! Og tað er hann, hóast hann, eins og aðrar kamphundarasur, ikki hevur verið nýttur til hundakamp í nógv ár, av tí at hundakampur hevur verið bannaður í nógv ár. Okkara lóggáva leggur ikki upp til eina generella meting av, hvørt, ella í hvønn mun, „kamphunda-arvaeindirnar" hjá ávísum rasum eru modifiserað við árunum ella eina konkreta meting av einstaka individinum. Tvørturímóti hevur man í føroysku lóggávuni valt ikki at taka nakrar kjansir við slíkum hundum.

At man í Danmark hevur lagt á annan bógv og givið kamphundum (Pitt bull terrier og Tosa tó undantiknir) sama status sum allir aðrir hundar, er okkum óviðkomandi.

Til 2

At Vinnumálaráðið biður um upplýsingar frá Dansk Kennel Klub, sigur einki um, hvørjir upplýsingar vóru til staðar, tá kunngerðin og listin var gjørd/-ur, ella um teir tankar, ið tá vóru havdir á lofti.

Til 3

Talan var ikki um at geva undantaksloyvi, men um, hvørt Vinnumálaráðið møguliga var bundið av fyribils niðurstøðuni, og at loyvi tí skuldi

gevast í hesum førinum, hóast tað ikki var í samsvari við kunngerðina. Men Vinnumálaráðið helt seg ikki verða bundið av fyribils niðurstøðuni og metti, at loyvi ikki skuldi gevast, m.a. tí tað fór at skapa umsitingarligan ójavna millum borgararnar at loyva innflutningi í hesum førinum, tá tað eftir kunngerðini skal gevast avslag í øðrum líknandi førum. Tí varð víst til umsitingarligar grundir.

Til 4

A adv. ft. hevur m.a. í málinum ført fram, at eftir føroysku lóggávuni skal ein konkret meting gerast av hvørjum hundi sær. Reglurnar í Noregi og í Føroyum líkjast á tann hátt, at í Noregi, eins og í Føroyum, verða ávís hundasløg definerað sum vandamikil, og tí er forboð fyri at innflyta tey, uttan at hugt verður eftir einstaka individinum. Tí varð víst til norsku reglurnar.

Síðani varð víst til, hvørji hundasløg eru á norska listanum, Staffirdsshire bull terrier er ikki á listanum men t.d. hundaslagið Amerikanskur staffordsshire terrier. Og hesir stava frá sama upphavi, sum ikki liggur so nógv ættarlið afturi í tíðini.“

Við skrivi, dagfest 20. juni 2005, vórðu viðmerkingarnar frá Vinnumálaráðnum sendar klagaranum til ummælis.

Í telefonsamrøðu 5. juli 2005 boðaði klagarin umboðsmanninum frá, at hann ikki ynskti at gera fleiri viðmerkingar til hetta málið. Umboðsmaðurin boðaði tí pørtunum frá, at málið bleiv tikið upp til endaliga viðgerð.

## *Niðurstøða*

*Hetta málið snýr seg um, hvørt heimild var fyri avgerðini hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni (staðfest av Vinnumálaráðnum) um at nokta innflutningi av hundi av slagnum Staffordshire bull terrier, og um málsviðgerðina hjá Vinnumálaráðnum av kæruni hesum viðvíkjandi.*

*Í løgtingslóg nr. 58 frá 22. apríl 2003 um innflutning og hald av vandamiklum djórum o.ø. stendur soleiðis:*

*„**§ 1.** Landsstýrismaðurin kann áseta reglur um forboð fyri innflutningi av vandamiklum og eksotiskum djórum til Føroya og haldi av slíkum djórum í Føroyum.*

*Stk. 2. Vandamikil djór eru djór, sum við biti, eiturstingi ella á annan hátt kunnu verða til vanda fyri menniskju ella djór.*

…

*§ 3. Leggur landsstýrismaðurin heimildir eftir lógini til stovnar, ið eru skipaðir undir honum, kann hann áseta reglur um høvi at kæra avgerðirnar hjá hesum stovnum – íroknað at avgerðirnar ikki kunnu leggjast fyri annan umsitingarligan myndugleika, og um høvi hjá einum myndugleika at taka upp-aftur til viðgerðar eitt mál, sum er kært.“*

*Í almennu viðmerkingunum til lógaruppskotið stendur soleiðis:*

*„Endamálið við lógaruppskotinum er at fáa greitt heimildargrundarlag fyri at nokta innflutningi og haldi av vandamiklum og eksotiskum djórum, sum við biti, eiturstingi ella á annan hátt kunnu verða til vanda fyri menniskju ella djór, ella sum ikki natúrliga hoyra heima í føroyska djóraheiminum.*

*Við vandamikil djór verður serliga hugsað um kamphundar (pit bull terriar, tosa og blandingar av hesum rasum), eiturslangur, kvalaraslangur, eitrandi eiturkoppar, skorpiónir og onnur eitrandi ella vandamikil djór.*

*Heimildargrundarlagið var áður í Lov nr. 36 af 28. februar 1908 for Færøerne om Foranstaltninger mod smitsomme Sygdomme hos Husdyrene m.m. (1908-lógini), og reglurnar um innflutning av djórum vóru í kunngerð nr. 55 frá 26. mai 1983 um innflutning av djórum og smittuberandi lutum, sum seinast broytt við kunngerð nr. 31 frá 12. apríl 1996.*

*1. februar 2001 kom djórasjúkulógin (Ll. nr. 16 frá 23. februar 2001 um djórasjúkur – um fyribyrging og niðurberjing av sjúkum hjá djórum og um marknaeftirlit við djórum og djóraúrdráttum) í gildi. Henda lóg var alneyðug at fáa upp á pláss í sambandi við veterineravtaluna, sum Føroyar gjørdu við ES, og í hesi lóg varð 1908-lógin avtikin – hon var avoldað og lá sum ein forðing fyri veterineravtaluni. Við 1908-lógini fór áðurnevnda kunngerð nr. 55 um innflutning av djórum v.m. úr gildi. Kunngerðin fevndi um øll súgdjór, fuglar, skriðdjór og paddur – t.v.s., bæði húsdjór, sum eru fevnd av veterineravtaluni við ES, og sum vit tí hava skyldu til at implementera í føroyska lóggávu, og onnur djór, sum ikki eru fevnd av veterineravtaluni, og sum vit ikki hava skyldu at implementera, men hvørs reglur fullu burtur, tá áðurnevnda kunngerð fall burtur.“*

*Sambært § 1 í lógini hevur landsstýrismaðurin heimild til at áseta reglur um forboð móti innflutningi av m.a. vandamiklum hundum, sum við biti ella á annan hátt kunnu verða til vanda fyri menniskju ella djór. Hesar reglur eru settar í gildi við kunngerð nr. 15 frá 7. apríl 2004 um innflutning av hundum, kettum og øðrum kelidýrum, ið er soljóðandi:*

*„§ **1**. Kunngerðin snýr seg um ikki vinnuligan innflutning av hundum, kettum og øðrum kelidýrum til Føroya.*

*§ **2**. Í hesi kunngerð merkir:*

*1) Kelidýr: smærri súgdýr (Mammalia), … sum verða havd til stuttleika.*

*…*

*4) Kamphundur: hundur, sum er aldur og vandur til aggressiva atferð, íroknað t.d. Pitt bull terrier, Tosa og blendingar av hesum sløgum.*

*…*

*§ **3**. Ikki er loyvt at flyta inn kelidýr, sum kunnu verða til vanda hjá dýrum ella menniskjum, t.d. orsakað av eiturbiti ella eiturstingi teirra.*

*Stk. 2. Ikki er loyvt at flyta inn ella hava kamphundar.*

*§ **4**. Kelidýr kunnu bert verða innflutt av:*

*1) persóni, sum hevur fastan bústað í Føroyum ella*

*2) persóni, sum flytir til Føroya úr útlandinum.*

*…*

*§ **8**. Heilsufrøðiliga starvsstovan hevur eftirlit við innflutningi av kelidýrum.*

*…*

*§ **18**. Avgerð tikin av Heilsufrøðiligu starvsstovuni sambært hesi kunngerð, kann kærast til Vinnumálaráðið, Veterinerdeildina.“*

*Í § 3, stk. 2 í kunngerðini er ásett, at ikki er loyvt at flyta inn ella hava kamphundar í Føroyum. Í § 2, nr. 4) í kunngerðini er ásett, hvat er at skilja sum ein kamphundur. Har verður ein kamphundur defineraður sum ein hundur, sum er aldur og vandur til aggressiva atferð. Í hesum sambandi eru nevnd nøkur dømi um slíkar kamphundar.*

*Sum eg havi skilt, fata Heilsufrøðiliga Starvsstovan og Vinnumálaráðið definitiónina í § 2, nr. 4) „…aldur og vandur til aggressiva atferð“ sum eina meting av hundaslagnum sum slíkum og ikki eina meting av tí einstaka hundinum. Klagarin hevur hinvegin víst á, at tað ikki er rætt at útihýsa ávísum hundasløgum í sínari heild, men at ein konkret meting í staðin eigur at verða gjørd av tí einstaka hundinum.*

*Í viðmerkingunum til lógina verður tosað um kamphundar sum rasu, eins og kunngerðin nevnir dømi um kamphundarasur. Tað er tí mest nærliggjandi at halda, at talan er um eina meting av hundaslagnum og ikki tí einstaka hundinum. Um talan skuldi verið um eina individuella meting av tí einstaka hundinum, hevði einki endamál verið við, at nevnt hesi dømi. Eg dugi tí ikki at síggja, at lógin skal forða fyri, at innflutningsloyvi verður givið ella noktað grundað á eina generella meting av hundaslagnum heldur enn tí einstaka hundinum. Eg eri tí*

*ikki samdur í sjónarmiði klagarans, hóast eg haldi, at § 2, nr. 4) í kunngerðini kundi verið eitt sindur greiðari orðað, soleiðis at eingin ivi stóðst av, hvat liggur í hugtakinum aldur og vandur til aggressiva atferð, og harvið hvørjir hundar eru at meta sum kamphundar.*

*Heilsufrøðiliga Starvsstovan hevur gjørt ein lista yvir hundar, sum ikki er loyvt at innflyta til Føroya. Listin er soljóðandi:*

***„Hesar hundar er ikki loyvi at innflyta til Føroyar ella hava í Føroyum***

*Sambært kunngerð nr. 15 frá 7. apríl 2004 um innflutning av hundum, kettum og øðrum kelidjórum, §3, stk. 2, er ikki loyvt at flyta inn ella hava kamphundar.*

*Niðanfyristandandi hundar er ikki loyvt at innflyta ella hava í Føroyum.*

- *Pit bull terrier*
- *Old fashion staffords*
- *Traditional staffords*
- *Staffordshire bull terrier*
- *Amerikanskur staffordshire terrier*
- *Amerikanskur bulldog*
- *Japanskur Tosa*
- *Dogo argentino*
- *Fila braxiliero"*

*Heilsufrøðiliga Starvsstovan hevur vent sær til sakkunnleikan í Føroyum, nevniliga Landsdjóralæknan, áðrenn listin yvir ikki-loyvdu hundarnar er gjørdur. Eg havi ikki fortreytir fyri at døma um rættleikan av einari meting hjá Landsdjóralæknanum, um at Staffordshire bull terrier er at meta sum ein kamphundur ella ein vandamikil hundur, sum ikki er loyvt at hava ella innflyta til Føroya. Eg haldi tó, at tað hevði verið rættast, um tey hundasløgini, sum ikki skulu verða loyvd at innflyta ella hava í Føroyum, vórðu nevnd beinleiðis í kunngerðini ella einum lista, sum varð knýttur at kunngerðini. Eg fari tí at mæla Vinnumálaráðnum at umhugsa hendan spurningin nærri.*

*Vinnumálaráðið átti at havt partshoyrt kæraran um notatið frá telefonsamrøðuni 18.11.2004. Hetta er ikki gjørt, og hevur Vinnumálaráðið tí ikki hildið reglurnar í § 18 í fyrisitingarlógini. Reglurnar um partshoyring eru ein sokallað „garantiforskrift", og brot á hesar reglur hava vanliga við sær, at ein avgerð er at meta sum ógildug. Eg havi tí umhugsað, hvørt eg skuldi mæla Vinnumálaráðnum til at taka hetta málið uppaftur til nýggja viðgerð, men av tí, at hetta neyvan vildi broytt fatanina av, at Staffordshire bull terrier framvegis er at meta sum ein*

*kamphundur, vildi hetta heldur ikki broytt avgerðina. Eg havi tí valt ikki at gera hetta, men fari at geva Vinnumálaráðnum eina átalu fyri ikki at hava hildið § 18 í fyrisitingarlógini.*

*Klagarin hevur eisini víst á, at hann ikki heldur, at Vinnumálaráðið kann broyta avgerðina, aftaná at ráðið í skrivinum, dagfest 1. des. 2004, hevði boðað frá, at innflutningsloyvi væntandi fór at verða givið. Skrivið var soljóðandi:*

*„Við hesum verður gjørt vart við, at ein avgerð í málinum er á gáttuni og verður væntandi send tykkum í vikuni.*

*Niðurstøðan verður helst, at hundurin fær loyvi til at koma til Føroya.“*

*Til hetta er at siga, at eg haldi tað vera sera óheppið og eitt dømi um vánaligan fyrisitingarsið, tá ein myndugleiki eins og í hesum førinum boðar partinum frá einari væntaðari niðurstøðu, áðrenn málið er liðugt viðgjørt. Ein slík ábending tænir als ongum endamáli, og átti tí ikki at verið givin. Afturat hesum kemur, at Vinnumálaráðið sambært skjalatilfarinum als einki grundarlag hevði fyri hesari fyribilsfatanini, kanska heldur tvørturímóti, og fari eg tí at geva Vinnumálaráðnum eina átalu fyri at hava givið hesa ógrundaðu ábendingina.*

*Eg haldi ikki, at borgarin grundað á hesa fyribilsfráboðanina hevur nakað krav uppá innflutningsloyvi, tí tað framgongur hóast alt av skrivinum, at málið ikki er endaliga avgreitt, og at ein avgerð væntandi verður send partinum fyrsta dagin.*

*Burtursæð frá hesum viðmerkingum, tilmæli og átalum haldi eg ikki grundarlag vera fyri at gera meira við hetta málið.*

# *V. Egnar kanningar*

## 31.1. Frágreiðing viðvíkjandi kanning av 70 ymiskum málum hjá Almannastovuni

Umboðsmaðurin hevur gjørt eina kanning av viðgerðini hjá Almannastovuni av 70 ymiskum málum. Kanningin fevndi um:

- 20 mál um fyritíðarpensjón v.m.,
- 20 mál um sjúkradagpening,
- 10 mál um gangistativ v.m.,
- 10 mál um koyristólar,
- 5 mál um avlamisbilar og
- 5 mál um umbyggingar.

Sum heild helt umboðsmaðurin ikki viðgerðina av málunum um fyritíðarpensjón hava verið nøktandi, serliga við atliti at viðgerðartíðini. Hinvegin hevði hann ta fatan, at viðgerðin av sjúkradagpeningamálum gekk bæði smidliga og skjótt. Tó vóru onkrir trupulleikar viðvíkjandi skráseting av avgerðarskrivum. Heildarmyndina viðvíkjandi málunum um hjálpartól helt umboðsmaðurin eisini vera góða, hóast onkrir smávegis trupulleikar vóru. (J. nr. 200500059).

### Inngangur

Umboðsmaðurin hevur gjørt av at fremja eina kanning av nøkrum útvaldum málsøkjum hjá Almannastovuni. Heimildin fyri einari slíkari kanning er at finna í § 5, § 6, stk. 5 og § 8, stk. 1 í umboðsmanslógini, ið eru soljóðandi:

„**§ 4**. Virksemið umboðsmansins fevnir um alla fyrisiting heimastýrisins (t.e. lands- og kommunalu).

…

**§ 5**. Umboðsmaðurin hevur eftirlit við, at tær í § 4 nevndu umsitingareindir ikki gera mistøk ella vanrøkja skyldur sínar, og at almenna umsitingin ikki fremur órætt móti einstaka borgaranum.

**§ 6**. …

*5. stk*. Umboðsmaðurin kann sjálvur taka eitt mál til viðgerðar og fremja neyðugar kanningar í hesum sambandi.

…

**§ 8**. Tær í § 4 nevndu umsitingar hava skyldu at geva umboðsmanninum tær upplýsingar og at leggja fram øll tey skjøl, sum hesin embætis vegna krevur at fáa fyrilagt.

…

*3. stk.* Umboðsmaðurin hevur rætt til at vitja støð, ið kannað verða, og hann hevur fría atgongd til at gera kanningar í øllum neyðugum hølum."

Fyrireikingarnar til kanningina byrjaðu við einum fyrireikandi fundi við Almannastovuna. Fundurin varð hildin 8. juni 2005, og Johnhard Klettheyggj, ráðgevi hevur gjørt soljóðandi frágreiðing frá fundinum:

„Í sambandi við, at umboðsmaðurin ætlar sær undir at gera eina kanning av ávísum málum hjá Almannastovuni, varð ein kunnandi fundur avtalaður við leiðsluna á Almannastovuni.

Á fundinum, ið varð hildin á Almannastovuni 8. juni, kl. 14, luttóku

- vegna umboðsmannin: Joen H. Andreassen, umboðsmaður (JHA)<br>Johnhard Klettheyggj, ráðgevi (JK) og<br>Birita Ludvíksdóttir Poulsen, ráðgevi (BLP)
- vegna Almannastovuna: A , stjóri<br>C, deildarstjóri

JHA byrjaði við stutt at greiða frá heimildunum fyri ætlaðu kanningini, frá lógargrundarlagnum og upprunanum til Almannastovuna og frá teimum málum, sum umboðsmaðurin hevði viðgjørt viðvíkjandi Almannastovuni. Hann greiddi frá, at orsøkin til, at hann hevði valt at kanna Almannastovuna fyrst og fremst stavaði frá tí stóra kundaskara, sum Almannastovan hevði, og harvið eisini tí stóra týdninginum, sum stovnurin hevði fyri samfelagið.

A greiddi síðandi generelt frá um virksemið hjá Almannastovuni. Sambært einari kanning, sum tey høvdu gjørt av einum ári í 2003, kundi staðfestast, at uml. 18.000 fólk høvdu fingið útgjald frá Almannastovuni. Tá hesi tølini vóru reinsað fyri fólk, sum fingu útgjald frá meira enn einari skipan, vóru tey komin eftir, at uml. 10.000 ymisk fólk høvdu fingið útgjald hetta árið.

Sum A mintist hetta, var talan um uml. 7.000 pensjónistar, 3.000 dagpeningamál og 3.000 forsorgarmál eftir §§ 9, 15, 17 og 18. Peningaliga var býtið uml. 300 mió. kr. til fólkapensjónir, 200 mió. kr. til fyritíðarpensjónir, 50 mió. kr. til dagpening og 100 mió. kr. til forsorg.

Uppá fyrispurning greiddu A og C frá, at Almannstovan hevði beinleiðis atgongd til upplýsingar hjá Toll- og Skattstovu Føroya. Uppá fyrispurning um starvsfólkatalið hjá Almannastovuni, greiddu tær frá, at 48 fólk starvaðust í nýggju hølunum uppi á Hálsi, 15 á økisdeildini í J. Broncksgøtu, 13 á Hjálpartólamiðstøðini, 4 á økisdeildini í Suðuroy, 4 á økisdeildini í Klaksvík og 7-8 fólk á økisdeildini í Eysturoynni. Økisdeildirnar virka sum portrið til kundan.

Almannastovan hevði fingið eina nýggja EDV-skipan í 2000. Pensjónirnar koyrdu nú undir hesari skipanini, meðan útrokningarparturin viðvíkjandi forsorg og dagpeningum ikki var komin uppá pláss enn, men hetta hevur Almannastovan søkt um játtan til.

Almannastovan nýtir Scan-Jour skipanina, ið er bygd inn í útgjaldsskipan teirra. Tey eru glað fyri skipanina og eru farin at scanna skjølini inn fyri uml. 1 ári síðani.

Uppá fyrispurning frá BLP um starvsfólkaviðurskiftini, greiddu A og C frá, at arbeiðsbyrðan er ov stór, og at um arbeiðið skal gerast til lítar, krevur hetta fleiri fólk ella aðrar mannagongdir. Fíggjarlógararbeiðið tyngir stovnin nógv, tí krøvini um dokumentatión eru vaksandi. Almannastovan hevur heldur ikki fingið fulla kompensatión fyri lønarhækkanirnar seinnu árini. Eisini eru krøvini frá Landsgrannskoðanini og Føroya Kærustovni herd, og hetta viðførir størri arbeiðsbyrðar. Harumframt umsitir Almannastovan eisini Nordisk Konvention om Social Sikring, og gevur hetta alsamt størri umsiting. Stress er ein trupulleiki, og í hesum sambandi hava 8 fólk verið á skeiði um „stresshondtering“ og skulu nú bera hendan kunnleikan út til starvsfelagarnar.

Uppá fyrispurning frá JHA um talið av løgfrøðingum, greiddi A frá, at tey hava ein løgfrøðing á lógardeildini. Harumframt eru hon sjálv og tveir av deildarstjórunum eisini løgfrøðingar, so tey hava eitt løgfrøðiligt forum at umrøða mál.

Annars greiddi A frá, at Almannstovan hevði fingið undantøku frá krøvunum í Persónsupplýsingarlógini fram til ársskiftið. Tey arbeiddu eisini í løtuni við at fáa til vega betri hagtøl fyri virksemið, soleiðis at hetta kundi mátast bæði kvalitativt og kvantitativt. Tá hetta er komið uppá pláss, kunnu tey lýsa støðuna betri og harvið eisini síggja, hvar tørvur er á meira orku osv. C greiddi eisini frá arbeiðinum við at tilevna vegleiðingar fyri øll málsøkini, sum Almannastovan umsitir. Hetta arbeiðið verður ætlandi liðugt um ársskiftið, og fer at lætta um málsviðgerðina.

JK greiddi at enda frá, at ætlanin við hesari kanningini ikki er at leita eftir einstøkum smærri feilum, men hinvegin eftir „systemfeilum“ í málsviðgerðini og evt. óhepnum mannagongdum. JHA segði, at verður komið fram á álvarsligar feilir í einstøkum málum, kundu hesi møguliga blíva tikin upp til viðgerðar. JK greiddi frá, at umboðsmaðurin fór at biðja um eitt ávíst tal av málum til eftirkanningar. Ein frágreiðing verður síðani skrivað, og JHA helt tað vera natúrligt at halda ein fund aftaná hetta at umrøða frágreiðingina. A spurdi, nær hendan kanningin skuldi vera. JK greiddi frá, at kanningin ætlandi verður í juli og august, men at frágreiðingin helst ikki verður liðugtskrivað fyrr enn seinni. A vísti á, at tey ikki høvdu so nógv starvsfólk í summarfrítíðini, men JHA gjørdi vart við, at Almannastovan ikki skuldi gera annað enn lata okkum tey málini, sum biðið verður um.

Fundurin endaði uml. kl. 15.15 við at A vísti okkum runt á stovninum.“

Aftaná hendan fundin gjørdi umboðsmaðurin av, hvørji málsøki hann ynskti at kanna. Úrslitið bleiv, at biðið varð um 20 mál um fyritíðarpensjónir, 20 mál um sjúkradagpening, 10 mál viðvíkjandi koyristólum, 10 mál viðvíkjandi gongustativum, 5 mál viðvíkjandi avlamisbilum og 5 mál viðvíkjandi íbúðarbroytingum. Í øllum førum varð biðið um tey seinast avgreiddu málini í hvørjum bólki.

Hendan frágreiðingin er bygd upp soleiðis:

1. Fyrisitingarlógin / málsviðgerðarreglur
   a. Partshoyring
   b. Vegleiðing og umboðan v.m.
   c. Grundgeving
   d. Latan av upplýsingum til annan fyrisitingarmyndugleika
   e. Notatskylda
   f. Kæruvegleiðing
   g. Málsviðgerðartíð
2. Fyritíðarpensjónir
   a. Lógargrundarlagið v.m.
   b. 20 mál um fyritíðarpensjón v.m.
   c. Samandráttur og niðurstøða
3. Sjúkradagpeningur
   a. Lógargrundarlagið v.m.

b. 20 mál um sjúkradagpening
c. Samandráttur og niðurstøða
4. Hjálpartól
a. Lógargrundarlagið v.m.
b. 10 mál um gangistativ v.m.
Samandráttur og niðurstøða
c. 10 mál um koyristólar
Samandráttur og niðurstøða
d. 5 mál um stuðul til avlamisbilar
Samandráttur og niðurstøða
e. 5 mál um umbyggingar
Samandráttur og niðurstøða
5. Viðmerkingar
6. Niðurstøða / Samandráttur

## 1. Fyrisitingarlógin / Málsviðgerðarreglur

### a. Partshoyring

§§ 18 og 19 í løgtingslóg nr. 132 frá 10. juni 1993 um fyrisitingarlóg eru soljóðandi:

„**§ 18**. Má tað haldast, at ein partur í einum máli ikki er kunnigur við, at myndugleikin hevur ávísar upplýsingar viðvíkjandi teim veruligu umstøðunum, kann avgerð ikki verða tikin, fyrr enn myndugleikin hevur gjørt partin kunnugan við upplýsingarnar og hann hevur fingið høvi til at koma við einum ummæli.

Hetta er tó bert galdandi, um upplýsingarnar ikki eru til fyrimuns fyri viðkomandi part, og hava stóran týdning fyri avgerðina í málinum. Myndugleikin kann áseta eina freist fyri, nær ummælið skal verða givið.

Stk. 2. Ásetingin í stk. 1 er ikki galdandi, um so er, at

*1)* tað, soleiðis sum upplýsingarnar og málið er háttað, ikki kann metast at vera ivingarsamt, at taka avgerð í málinum á verandi grundarlag,

*2)* frest fer at viðføra, at farið verður út um lógásetta freist fyri avgerð í málinum.

*3)* áhugi partanna í, at avgerðin í málinum verður útsett, eigur at víkja fyri avgerandi umhugsni fyri pørtunum sjálvum, ella øðrum privatum áhugamálum, ið tala í móti eini tílíkari útsetan.

*4)* parturin viðvíkjandi av varðandi spurningum ikki hevur rætt til skjalainnlit sambært reglunum í kapittul 4.

5) ætlaða avgerðin fer at nema ein víðari óvissan skara av persónum, fyritøkum v.m., ella um framløga av upplýsingunum fyri partinum fer at geva stórar trupulleikar, ella
6) tað við lóg eru gjørdar serstakar ásetingar, ið tryggja, at parturin fær høvi til at kunna seg um støðið fyri teirri ætlaðu avgerðini og til at geva ummæli í málinum, áðrenn avgerðin verður tikin.

*Stk. 3.* Landsstýrið kann áseta reglur um, at nærri ásett málsøkir, har ásetingarnar í stk. 2, nr. 1 ella 5 vanliga eru galdandi, ikki skulu verða umfatað av ásetingini í stk. 1.

**§ 19**. Í málum, har myndugleikin, tá ein partur hevur biðið um tað, kann broyta avgerðina, kann myndugleikin lata verða við at hoyra partin, um málið og umhugsni fyri partinum sjálvum talar fyri tí.

*Stk. 2.* Er parturin ikki hoyrdur sambært stk. 1, skulu tær upplýsingar fylgja við, sum parturin annars átti at verið gjørdur kunnigur við sambært § 18. Parturin skal samstundis verða kunnaður um høvið til at fáa málið tikið uppaftur. Myndugleikin kann áseta eina freist fyri, nær áheitan um uppafturtøku av málinum skal verða sett fram.

*Stk. 3.* Tá høvið er til at kæra ta tiknu avgerðina til ein annan fyrisitingarmyndugleika er tíðarbundið, og áheitanin um, at málið verður tikið uppaftur er sett fram, áðrenn kærufreistin er úti, verður kærufreistin brotin av. Um so er, rennur kærufreistin aftur frá tí mundi tann nýggja avgerðin verður fráboðað partinum, tó við í minsta lagi 14 døgum.“

## b. Vegleiðing og umboðan v.m.

§§ 7 og 8 í løgtingslóg nr. 132 frá 10. juni 1993 um fyrisitingarlóg eru soljóðandi:

„**§ 7**. Ein fyrisitingarmyndugleiki skal í tørvandi mun veita vegleiðing og hjálp til persónar, sum venda sær til myndugleikan við spurningum innan málsøkið hjá myndugleikanum.

*Stk. 2.* Fær ein myndugleiki eina skrivliga áheitan, sum ikki viðvíkir málsøkinum hjá honum, skal áheitanin um gjørligt sendast rætta myndugleika.

**§ 8**. Hann, sum er partur í einum máli, kann til eina og hvørja tíð, tá málið verður viðgjørt, lata seg umboða av øðrum ella fáa hjálp frá øðrum. Myndugleikin kann tó krevja, at parturin persónliga er við, tá tað er av týdningi fyri avgerðina í málinum.

*Stk. 2*. Ásetingin í stk. 1, 1. pkt. er ikki galdandi, um so er, at áhugi partanna í at lata seg umboða ella vera hjálptur má metast at eiga at víkja fyri munandi umhugsni fyri almennum ella privatum áhugamálum, ella har annað er ásett við lóg."

## c. Grundgeving

§§ 21 og 23 í løgtingslóg nr. 132 frá 10. juni 1993 um fyrisitingarlóg eru soljóðandi:

„**§ 21**. Tá ein avgerð verður fráboðað skrivliga, skal hon hava grundgeving uttan so, at avgerðin til fulnar gongur partinum á møti.

…

**§ 23**. Ein grundgeving fyri eini avgerð, skal hava eina tilvísing til tær rættarreglur, sum avgerðin er grundað á. Í tann mun, avgerðin eftir hesum reglum hvílir á eini fyrisitingarligari meting, skal grundgevingin eisini tilskila tey høvuðsfyrilit, ið hava verið avgerandi fyri útinningina av metingini.

*Stk. 2*. Grundgevingin skal eisini um neyðugt hava eina stutta frágreiðing viðvíkjandi teimum veruligu umstøðunum, sum hava havt stóran týdning fyri avgerðina.

*Stk. 3*. Grundgevingin kann verða avmarkað í tann mun áhugi partanna í at kunna nýta kunnleika til hesa til røkjan av sínum tørvi má metast at eiga at víkja fyri avgerandi umhugsni fyri honum sjálvum ella øðrum privatum ella almennum áhugamálum, jbr § 15."

## d. Latan av upplýsingum til annan fyrisitingarmyndugleika

§§ 27 til 31 í løgtingslóg nr. 132 frá 10. juni 1993 um fyrisitingarlóg eru soljóðandi:

„27. Upplýsingar um heilt privat viðurskifti hjá einstaklingum, herundir upplýsingar um ættarslag, trúgv, og húðalit, um politisk, felagsskaplig, kynslig og revsiverd viðurskifti eins og upplýsingar um heilsuviðurskifti, stórar almannatrupulleikar og misnýtsla av njótingarevnum og líknandi, er ikki loyvt at lata øðrum fyrisitingarmyndugleika.

Stk. 2. Tær í stk. 1 nevndu upplýsingar kunnu tó latast víðari til annan fyrisitingarmyndugleika tá

1) hann, sum upplýsingin viðvíkur, hevur givið samtykki,

2) tað fylgir av lóg ella ásetingum við heimild í lóg, at upplýsingin skal latast víðari,
3) upplýsingin verður latin víðari fyri at røkja privat ella almenn áhugamál, sum greitt fara fram um fyrilitið fyri teimum áhugamálum, ið geva grund fyri dyljan, herundir umhugsni honum, sum upplýsingin viðvíkur, ella
4) tað er ein neyðugur liður í viðgerðini av málinum, at upplýsingin verður latin víðari, ella tað er neyðugt fyri at ein myndugleiki kann fremja eftirlits- ella umsjónaruppgávur.

*Stk. 3.* Aðrar trúnaðarupplýsingar kunnu umframt tey í stk. 2 nevndu føri bert latast víðari til annan fyrisitingarmyndugleika, tá tað má metast, at upplýsingin er av stórum týdningi fyri virksemið hjá myndugleikanum ella fyri eina avgerð, sum myndugleikin skal taka.

*Stk. 4.* Samtykki sambært stk. 2, nr. 1, skal vera latið skrivliga og hava upplýsing um, hvat slag av upplýsingum og til hvat endamál, upplýsingar kunnu latast víðari. Vikið kann tó verða frá kravinum um, at upplýsingin skal vera skrivlig, um málið er soleiðis háttað ella umstøðurnar annars tala fyri tí.

*Stk. 5.* Samtykki sambært stk. 2, nr. 1, fellur burtur í seinasta lagi eitt ár eftir, at tað er givið.

*Stk. 6.* Staðbundnir fyrisitingarligir stovnar, sum við lóg hava fingið sjálvstøðugan myndugleika, eru at meta sum ein sjálvstøðugur myndugleiki sambært stk. 1 og 3.

**§ 28**. Í málum, ið verða reist við umsókn, er ikki loyvt at biðja um upplýsingar um heilt privat viðurskifti hjá umsøkjaranum frá øðrum pørtum av fyrisitingini ella frá einum øðrum fyrisitingarmyndugleika.

*Stk. 2.* Ásetingin í stk. 1 er ikki galdandi, um so er, at:
1) umsøkjarin hevur givið samtykki,
2) annað fylgir av lóg ella reglum ásettar sambært lóg ella
3) serstøk fyrilit viðvíkjandi umsøkjara ella triðjamanni greitt fara fram um áhuga umsøkjarans í, at ikki verður biðið um upplýsingina.

…

§ 30. Í tann mun ein fyrisitingarmyndugleiki hevur rætt til at lata eina upplýsing víðari, skal myndugleikin eftir áheitan frá einum øðrum fyrisitingarmyndugleika lata upplýsingina víðari, um hon hevur týdning fyri virksemið hjá myndugleikanum ella fyri eina avgerð, sum myndugleikin skal taka.

*Stk. 2*. Ásetingin í stk. 1 er ikki galdandi, um hetta hevur við sær meirarbeiði fyri myndugleikan, ið er munandi størri enn áhugin hjá hinum myndugleikanum í, at fáa upplýsingarnar.

**§ 31**. Hann, sum virkar innan almennu umsitingina, hevur ikki loyvi til at útvega sær trúnaðarupplýsingar, ið ikki hava týdning fyri tær uppgávur, ið hann hevur at greiða."

## e. Notatskylda

§ 6 í løgtingslóg nr. 133 frá 10. juni 1993 um innlit í fyrisitingina, sum broytt við løgtingslóg nr. 76 frá 8. mai 2001, er soljóðandi:

„**§ 6**. Í málum, har avgerð fer at verða tikin av einum myndugleika, skal myndugleiki, sum munnliga tekur ímóti upplýsingum viðvíkjandi teimum veruligu umstøðunum, ið hava týdning fyri avgerðina í málinum, ella sum á annan hátt er kunnugur við sovorðnar upplýsingar, skriva upp innihaldið av teimum. Hetta er tó ikki galdandi, um upplýsingarnar annars síggjast í skjølunum í málinum.

*Stk. 2*. Landsstýrið kann fyri nærri ásett fyrisitingarøkir áseta reglur um varðveitslu v.m. av fráboðanum, ið eru gjørdar ella móttiknar við edv.

*Stk. 3*. Landsstýrið kann áseta reglur um uppskrivingarskyldu viðvíkjandi nærri ásettum bólkum av málum um útinnan av øðrum fyrisitingarvirksemi enn nevnt í stk. 1."

Umframt hesa lógarásettu notatskylduna er galdandi ein ikki-lógarfest meginregla um, at ein fyrisitingarmyndugleiki skal notera øll málsviðgerðarstig, sum eru av týdningi fyri málið.

## f. Kæruvegleiðing

§ 24 í løgtingslóg nr. 132 frá 10. juni 1993 um fyrisitingarlóg er soljóðandi:

„**§ 24**. Avgerðir, sum kunnu kærast til annan fyrisitingarmyndugleika skulu, tá tær verða fráboðaðar skrivliga, hava vegleiðing um kærumøguleika, við tilskilan av kærustovni og upplýsing um mannagongd tá kært verður, herundir um eina møguliga tíðarfreist. Hetta er tó ikki galdandi um so er, at avgerðin til fulnar gongur viðkomandi parti á møti.

*Stk. 2*. Landsstýrið kann áseta reglur um, at latast kann vera við at geva kæruvegleiðing á nærri ásettum málsøkjum, har serstøk viðurskifti gera seg galdandi, ella at kæruvegleiðing kann verða givin á annan hátt enn nevnt í stk. 1."

## g. Málsviðgerðartíð

Ongar lógarfestar generellar reglur eru um viðgerðartíð. Í „Vejledning nr. 11740 af 04/12/1986 om forvaltningsloven“, frá danska Justitsministeriet, verður sagt soleiðis um málsviðgerðartíð og svarfreistir:

„HURTIG OG SMIDIG SAGSBEHANDLING

**200**. Det selvfølgelige krav om, at alle sager, der behandles af den offentlige forvaltning, skal behandles så enkelt, hurtigt og økonomisk som muligt, gælder i særlig grad sager, hvori enkeltpersoner eller private selskaber, institutioner, foreninger m.v. er part.

I kravet om en så enkel sagsbehandling som muligt ligger bl.a., at sagsbehandlingen ikke bør tynges ved unødig formalisme, herunder f.eks. unødvendige krav om skriftlighed, hvor f.eks. en telefonisk henvendelse kan anvendes i stedet med samme sikkerhed. Det bør også i øvrigt i videst muligt omfang sikres, at der ikke pålægges den enkelte borger processuelle pligter, f.eks. med hensyn til sagens oplysning, eller egentlige formkrav, der kun vil kunne opfyldes af borgere med særlige forudsætninger i form af uddannelse og lignende, eller som nødvendiggør, at borgeren må søge sagkyndig bistand. Hvor lovgivningen tillægger borgerne nogle rettigheder kan det ikke pålægges den, der ansøger herom at udfylde særlige ansøgningsskemaer og andet blanketmateriale som forudsætning for, at sagen tages under behandling, medmindre der er hjemmel til at stille et sådant formkrav. På sagsområder, hvor myndigheden har brug for en række faktiske oplysninger for at kunne afgøre en sag, kan det imidlertid være en hjælp for såvel borgerne som myndigheden, at der udarbejdes spørgeskemaer, blanketter og lignende, som en sags parter opfordres til at udfylde. Myndigheden bør så vidt muligt bistå med tilvejebringelse af de nødvendige oplysninger til sagens behandling, herunder i fornødent omfang vejlede om, hvordan oplysningerne kan tilvejebringes lettest muligt.

I kravet om, at sagsbehandlingen skal tilrettelægges så økonomisk som muligt, ligger ikke alene, at der med hensyn til behandlingen af de enkelte sagstyper skal foretages en vurdering af, hvilke ressourcer myndigheden skal sætte ind på løsningen af opgaven, men også på, hvilken økonomisk betydning en hurtig og smidig sagsbehandling kan have for den pågældende borger. I sager, hvor det er af væsentlig økonomisk betydning for den pågældende borger, at der hurtigt meddeles afgørelse i sagen, som

det f.eks. kan være tilfældet med hensyn til eksporttilladelser og eksportstøtte, bør dette også tages i betragtning.

Endelig ligger der i kravet om en hurtig sagsbehandling, at unødig høring af andre myndigheder bør undgås, jfr. herom nedenfor under pkt. 202-204.

…

SVARFRISTER M.V.

**205**. Forvaltningsloven indeholder ikke generelle regler om sagsbehandlingstiden. Baggrunden herfor er bl.a., at de opgaver, der udføres af den offentlige forvaltning, er af så forskellig karakter og omfang, at det ikke vil være muligt i en lov, der skal gælde for hele den offentlige forvaltning, at fastsætte bestemte regler for sagsbehandlingstiden, som med rimelighed vil kunne håndhæves ved domstolene.

Derimod kan der på baggrund af folketingets ombudsmands udtalelser om, hvad der med hensyn til sagsbehandlingstiden må antages at følge af almindelig god forvaltningsskik, gives nogle vejledende regler om sagsbehandlingens tilrettelæggelse, herunder om underretning til den, der er part i en sag, om den forventede sagsbehandlingstid.

Ombudsmanden har i nogle afgørelser også peget på, at myndighederne med henblik på at sikre, at sager ikke henligger i længere tid, inden afgørelse træffes, og at sager ikke bliver glemt og derfor ikke afgjort, bør oprette tilstrækkeligt EFFEKTIVE ERINDRINGSSYSTEMER.

**206**. Hvis en forvaltningsmyndighed som følge af sagens karakter eller den almindelige sagsbehandlingstid for den pågældende myndighed ikke kan træffe afgørelse inden kortere tid efter sagens modtagelse, bør myndigheden give den, der er part i sagen, underretning om, hvorpå sagen beror og så vidt muligt oplysning om, hvornår myndigheden regner med, at afgørelsen kan foreligge.

**207**. Myndigheden bør endvidere give den, der er part i sagen, underretning, når behandlingen af den konkrete sag på grund af særlige omstændigheder vil tage længere tid end sædvanligt.

**208**. Rykkerskrivelser fra den, der er part i sagen, og som er rimeligt begrundet i sagsbehandlingstiden, bør i almindelighed besvares med det samme. Besvarelsen bør indeholde oplysning om, hvorpå sagen beror og så vidt muligt oplysning om, hvornår myndigheden regner med, at afgørelsen kan foreligge.“

## 2. Fyritíðarpensiónir

### a. Lógargrundarlagið

Í løgtingslóg nr. 48 frá 10. mai 1999 um almannapensjónir o.a., sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 45 frá 9. mai 2005, stendur m.a.:

**„Kapittul 2**

**Veitingar**

§ 2. Pensjónir eftir hesi lóg eru:

1) fólkapensjón,
2) hægsta fyritíðarpensjón,
3) miðal fyritíðarpensjón,
4) lægsta fyritíðarpensjón,
5) veitingar eftir kap. 11 og
6) avlamisveiting.

*Stk. 2.* Allar pensjónir sambært § 4 og §§ 6-8 eru settar saman við eini grundupphædd og eini viðbót. Afturat pensjónunum sambært § 6 og § 7, verður veitt ein avlamisviðbót.

*Stk. 3.* Afturat pensjónini kunnu eftir reglunum í kapittul 4 verða veittar hesar viðbøtur:

1) barnaviðbót,
2) hjálparviðbót,
3) røktarviðbót og
4) persónlig viðbót.

*Stk. 4.* Barnaviðbót og persónlig viðbót kunnu ikki tillutast teimum, sum fáa avlamisveiting sambært stk. 1, nr. 6.

**Kapittul 3**

**Treytir**

*Heimarættur, bústaður, o.a.*

*§ 3.* Rætturin til pensión er treytaður av, at tann, ið fær pensión

1) hevur danskan heimarætt ella er giftur við ella seinast hevur verið giftur við einum persóni við donskum heimarætti,
2) hevur fastan bústað í Føroyum ella hevur hýru við skipi skrásett í Føroyum, og
3) hevur havt fastan bústað í danska ríkinum í minsta lagi 3 ár frá fylta 15. árinum til fylta 67. árið.

*Stk. 2.* Samsvarandi reglum í sáttmálum við onnur lond, kann landsstýrismaðurin áseta reglur um undantak frá treytunum í stk. 1, nr. 1 og 2.

*Stk. 3.* Tá heilt serligar umstøður tala fyri tí, kann landsstýrismaðurin

gera undantøk frá regluni í stk. 1, nr. 1 fyri persónar, sum hava havt fastan bústað í Føroyum í minsta lagi 10 ár millum fylta 15. árið og fylta 67. árið, herav minst 5 ár beint áðrenn pensión verður tillutað. Somuleiðis kann landsstýrismaðurin gera undantøk frá regluni í stk. 1, nr. 2 fyri persónar, sum aftaná at hava fingið pensión, búsetast í útlandinum.

*Treytir fyri tillutan av tí einstøku veitingini*

§ **4**. Rætt til fólkapensión hava persónar, sum hava fylt 67 ár.

§ **5**. Pensión kann ikki tillutast persónum undir 60 ár, um møguleikar eru fyri at seta í verk fyriskipanir, ið meira enn fyribils betra arbeiðsevnini ella um møguleiki er fyri at útvega eitt eftir viðurskiftunum hjá viðkomandi hóskandi arbeiði.

§ **6**. Hægsta fyritíðarpensión kann tillutast persónum, sum hava fylt 18 ár, men sum ikki hava fylt 60 ár, tá umsóknin verður latin inn, ið, orsakað av likamligum ella sálarligum avlamni, mugu roknast sum varandi óarbeiðsførir í eini og hvørjari vinnu, ella sum einans hava smávegis eftir av arbeiðsføri.

§ **7**. Miðal fyritíðarpensión kann tillutast

1) persónum, sum hava fylt 18 ár, men sum ikki hava fylt 60 ár, tá umsóknin verður latin inn, hvørs arbeiðsføri, orsakað av likamligum ella sálarligum avlamni, varandi er minkað við í minsta lagi $^{2}/_{3}$,
2) persónum yvir 60 ár, hvørs arbeiðsføri er minkað sum ásett í § 6, og
3) einkjum og einkjumonnum við uppihaldsskyldu mótvegis børnum undir 18 ár.

§ **8**. Lægsta fyritíðarpensión kann tillutast

1) persónum millum 18 og 67 ár, hvørs arbeiðføri, orsakað av likamligum ella sálarligum avlamni, varandi er minkað við í minsta lagi eini helvt,
2) persónum millum 50 og 67 ár og persónum ið hava móttikið pensión eftir § 7, stk. 1, nr. 3, men hava mist ættin til hesa, tí yngsta barnið hevur fylt 18 ár, tá viknandi heilsa, vantandi arbeiðsmøguleikar ella aðrar serligar umstøður gera, at viðkomandi hevur brúk fyri hjálp til uppihald.

§ **8a**. Avlamisveiting kann tillutast persónum millum 18 og 67 ár, sum vegna inntøku ikki kunnu fáa pensjón eftir dømingini sambært § 9, tá avlamni læknaliga mett er so mikið umfatandi, at teir vildu havt rætt til hægstu ella miðal fyritíðarpensjón sambært §§ 6 og 7, nr. 1 og 2, um teir ikki høvdu arbeiði.

*Stk. 2.* Avlamisveiting kann eisini tillutast persónum, sum vegna álvarsamar hoyriskaðar hava stórar samskiftistrupulleikar.

**§ 9.** Í metingini av í hvønn mun arbeiðsførið er minkað eftir § 6, § 7, stk. 1, nr. 1 og 2 og § 8, nr. 1, skal metast um

1) ta inntøku, sum viðkomandi verður mettur at kunna forvinna við einum arbeiði, sum svarar til hansara kreftir og førleikar, og sum við atliti til útbúgving og virksemi fyrr, kann verða kravt av honum, samanborið við ta inntøku, sum persónar við samsvarandi útbúgving vanliga kunnu forvinna í sama øki,
2) aldur, lívsstarv, bústað og arbeiðsmøguleikar, umframt líkindi fyri betran ella versnan av avlamninum,
3) slíkar aðrar umstøður, sum hildið verður í tí einstaka førinum, at dentur skal leggjast á í heildarmetingini av skerda arbeiðsførinum.

…

**§ 11.** Hjálparviðbót kann tillutast einum fyritíðarpensionisti, um viðkomandi støðugt má hava persónliga hjálp frá øðrum, ella um avlamnið stavar frá blindi ella nógv niðursettari sjón.

*Stk. 2.* Røktarviðbót kann tillutast í staðin fyri hjálparviðbót, um avlamnið hevur við sær tørv á varandi røkt ella støðugari umsjón, ið ger tað neyðugt, at annar persónur er støðugt hjáverandi.

*Stk. 3.* Almannastovan kann taka avgerð um, at hjálparviðbót og røktarviðbót verða ikki útgoldnar, um pensionisturin í sama tíðarskeiði fær stuðul sambært lóg um samsýning fyri at ansa eldri og óhjálpnum heima. Útgjaldingin verður tikin uppaftur, tá ansingarstuðulin heldur uppat.

*Stk. 4.* Persónar, sum fáa avlamisveiting, hava eisini rætt til hjálpar- og røktarviðbót eftir reglunum í stk. 1-3.

…

*Lækking av pensión*

**§ 18.** …

*Stk. 2.* Grundupphæddin til fyritíðarpensjón og viðbøturnar verða útroknaðar eftir inntøku sambært reglunum í § 19.

*Stk. 3.* Avlamis-, barna-, hjálpar- og røktarviðbótin og avlamisveitingin verða ikki útroknaðar eftir inntøku.

**§ 19.** …

*Stk. 2.* Viðbótin til fyritíðarpensjón verður lækkað við 60% av inntøkugrundarlagi pensjónistsins sambært § 20. Skiftisupphæddin til fyritíðarpensjónistar sambært § 7, stk. 2, í løgtingslóg um áseting og javning av almannaveitingum verður lækkað á sama hátt í framhaldi av viðbótini.

*Stk. 3.* Grundupphæddin til fyritíðarpensión verður lækkað við 60% í framhaldi av og eftir somu reglum sum lækkingin av viðbótini eftir stk. 2.

…

**Kapittul 8**

**Umsókn, útgjalding o.a.**

§ 30. Veitingar sambært hesi lóg verða bert veittar eftir umsókn.

*Stk. 2.* Serligt umsóknarblað skal nýtast, tá søkt verður um veiting.

*Stk. 3.* Tað áliggur Almannastovuni at senda einum og hvørjum upplýsingar- og umsóknarblað til fólkapensjón 3 mánaðir, áðrenn persónurin gerst 67 ár.

*Stk. 4.* Við umsóknini skulu fylgja upplýsingar og skjalprógv, sum eru neyðug fyri, at avgerð kann takast.

*Stk. 5.* Almannastovan sendir umsóknina um pensjón eftir § 6, § 7, nr. 1 og 2, § 8, nr. 1, og § 8a við tilráðing víðari til Vanlukkutryggingarráðið. Við umsóknini og tilráðingini frá Almannastovuni skulu fylgja neyðugar upplýsingar og skjalprógv.

*Stk. 6.* Læknaváttanir, sum Almannastovan biður um, og aðrar útreiðslur, sum eru fylgja av tilráðingini, verða goldnar sambært hesi lóg.

*Stk. 7.* Almannastovan kann av sínum eintingum reisa mál um játtan av veitingum eftir hesi lóg.

**§ 31**. Almannastovan og Vanlukkutryggingarráðið kunnu krevja skattamyndugleikar, Landsfólkayvirlitið, kommunalar myndugleikar, arbeiðsgevarar og onnur viðkomandi, herímillum sjúkrahús, læknar o.o., ið hava kunnleika til viðurskiftini, eftir upplýsingum av týdningi fyri viðgerð av pensiónsmálum.

**§ 32.** Pensjón eftir § 6, § 7, nr. 1 og 2, § 8, nr. 1, og § 8a verður útgoldin frá tí degi, sum er uppgivin í avgerðini hjá Vanlukkutryggingarráðnum ella Den Sociale Ankestyrelse.

*Stk. 2.* Pensjón annars verður veitt frá 1. í mánaðinum aftaná, at treytirnar eru loknar, tó í fyrsta lagi frá 1. í mánaðinum aftaná dagfestingina fyri móttøku av umsóknini.

…

**Kapittul 9**

**Vanlukkutryggingarráðið**

**§ 37.** Vanlukkutryggingarráðið tekur avgerð um tillutan, broyting og afturtøku av pensjón eftir § 6, § 7, nr. 1 og 2, § 8, nr. 1, og § 8a, og við-

bótum eftir § 11, umframt nær treytirnar fyri tillutan, broyting og afturtøku eru loknar.
*Stk. 2.* Ráðið kann avgera, at eitt mál skal takast uppaftur til kanningar seinni.
*Stk. 3.* Ráðið kann avgera, at ein pensión í sambandi við afturtøku, skal gjaldast aftur yvir í mesta lagi 12 mánaðir. Harumframt kann ráðið, tá umstøðurnar tala fyri tí, avgera, at rætturin til pensión fyribils, tó hægst í 3 ár, skal verða hvílandi.
*Stk. 4.* Ráðið kann áleggja einum umsøkjara at møta í ráðnum at geva frágreiðing. Harumframt kann ráðið, grundað á móttikna frágreiðing, áleggja einum pensionisti at møta í ráðnum at geva frágreiðing.
*Stk. 5.* Ráðið kann eisini áleggja umsøkjaranum at viðvirka í lýsingini av málinum, millum annað við at lata seg kanna og viðgera av lækna ella innleggja til kanningar og viðgerð.
*Stk. 6.* Ráðið kann avgera, at málið dettur burtur ella pensión verður tikin aftur í førum, har ein persónur ikki virkar við í neyðugum kanningum, uppvenjing ella øðrum fyriskipanum, sum ætlast at hava við sær munandi betran av arbeiðsførinum.
*Stk. 7.* Ráðið hevur heimild til at senda ein ella fleiri sakkøn at útinna eftirlit á staðnum við atliti til arbeiðsførið ella at kalla pensionistar inn til eftirlit.
*Stk. 8.* Darvar ein pensionistur kanning ráðsins, kann formaðurin í ráðnum, tá hann metir sannlíkt, at ein nýggj avgerð í málinum vil hava við sær, at pensiónin verður tikin aftur, fyribils steðga útgjaldingini. Ráðið skal í slíkum førum taka avgerð skjótast møguligt. Útreiðslur til eftirlit verða goldnar av ráðnum.
…
**Kapittul 10**
**Kærurættur**
**§ 39**. Avgerðir hjá Almannastovuni sambært hesi lóg kunnu kærast til Kærunevndina í Almannamálum.
*Stk. 2.* Kærast skal innan 4 vikur eftir, at kærarin hevur fingið fráboðan um avgerðina.
**§ 40**. Avgerðir hjá Vanlukkutryggingarráðnum sambært hesi lóg kunnu kærast til Den Sociale Ankestyrelse.
*Stk. 2.* Kærast skal innan 3 mánaðar eftir, at kærarin hevur fingið fráboðan um avgerðina.
*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin kann taka avgerð um, at heimildin hjá Den

Sociale Ankestyrelse eftir stk. 1 kann leggjast til Kærunevndina í Almannamálum."

**b. 20 mál um fyritíðarpensjón v.m.**

Sum nevnt í § 37 í almannapensjónslógini er tað í flestu førum Vanlukkutryggingarráðið, sum tekur avgerð um, hvørt pensjón ella viðbøtur skulu veitast. Í teimum førunum fyrireikar Almannastovan málið, serliga við atliti at endurbúgvingarmøguleikum, og sendir síðani málið við einari tilráðing til Vanlukkutryggingarráðið til støðutakan. Í nøkrum førum er tað tó Almannastovan, sum tekur avgerð í málinum. Í sambandi við viðgerð sína av málunum, útfyllir Almannastovan eisini ymisk upprit, sum verða nevnd í gjøgnumgongdini av málunum. Hesi eru:

- Blað A (samandráttur, meting og tilráðing)
- Blað B (grundupplýsingar, herundir endurbúgvingarmøguleikar)
- Blað D (heilsuupplýsingar)
- Blað E (uppihaldsgrundarlag og fíggjarlig viðurskifti)
- Blað F (hjálpar- og røktartørvur)
- Blað G (húsligar uppgávur)

Málini, sum skulu leggjast fyri Vanlukkutryggingarráðið, verða fyrst fyrireikaði av einum sosialráðgeva, og síðani løgd fyri tað sonevnda Endurbúgvingar- og pensjónsráðið (hereftir nevnt EP-ráðið), ið tekur støðu til, um málið er klárt at senda víðari, ella um fleiri og neyvari upplýsingar eru neyðugar.

<u>Mál nr. 1</u>

Miðal fyritíðarpensjónistur, sum søkir um pensjón (steðgað í 2000 orsakað av arbeiðsinntøku) og um at fáa fyritíðarpensjónina hækkaða frá miðal til hægstu pensjón. Umsóknin er móttikin 4. nov. 2004, og 8. nov. hevur Almannastovan móttikið læknaváttan frá kommunulækna, har tað m.a. stendur:

> „59-ára gamal maður við sera ringum invaliderandi morbus Bechterew
> …
> Arbeiðsførið verður mett at vera minkað við meira enn 2/3 í øllum vanligum yrki vegna sera ringan mb.Bechterew við kroniskari pínu og stívleika í øllum ryggunum, men eisini vegna spondylisthesis col. lumbalis og kroniskan venøsan insufficiens og kroniskt eksem."

Í einum ikki-dagfestum brævi hevur Almannastovan biðið umsøkjaran koma til eina samrøðu 2. des. 2004, kl. 10.

2. febr. 2005 hevur Almannastovan útfylt uppritabløð A (samandráttur, meting og tilráðing), B (grundupplýsingar) og D (heilsuupplýsingar).

14. mars 2005 boðar Almannastovan umsøkjaranum frá, at EP-ráðið 14. febr. 2005 hevur gjørt av at biðja um eina serlæknaváttan. 14. mars 2005 er áheitan um hetta send serlæknanum.

8. apríl 2005 hevur kona umsøkjaran spurt, um til ber at sleppa til onkran annan serlækna, tí trupult er at sleppa framat hjá hesum læknanum. Hesum hevur Almannastovan játtað.

11. apríl 2005 hevur Almannastovan afturkallað áheitanina um serlæknaváttan frá fyrra læknanum, samstundis er annar lækni biðin um váttan.

27. apríl 2005 hevur Almannastovan móttikið serlæknaváttan, dagfest 18. apríl 2005, frá fyrra serlæknanum, har tað m.a. stendur:

> „Hesin sjúklingurin hevur í veruleikanum roynt at arbeitt, alt tað hann kann. Hann er nú komin hartil, at hann ikki kann verða í vinnuni meira.“

Grundað á hetta tilmælið, hevur EP-ráðið á fundi 13. juni 2005, mælt til, at veita umsøkjaranum hægstu fyritíðarpensión. Skriv um hetta er sent Vanlukkutryggingarráðnum 20. juni 2005.

Mín viðmerking:
*Tað er ikki nøktandi, at tað ganga meira enn 4 mðr. frá móttøkuni av umsóknini og læknaváttanini, til biðið verður um eina serlæknaváttan. Eisini gongur ein heilur mánaði, frá tí, at avgjørt er at biðja um serlæknaváttan, til hetta verður gjørt. Samlaða viðgerðartíðin (7 1/2 mðr.) er eftir mínum tykki alt ov long, tá havt verður í huga, at Almannastovan ikki skal taka avgerð, men bert gera tilmæli.*

<u>Mál nr. 2</u>
Kvinna, sum søkir um einkjupensjón. Umsóknin er móttikin 15. febr. 2005. Føðibræv fyri barnið er móttikið 9. mars.

2. mai 2005 hevur umsøkjarin rykt eftir málinum, og málsviðgerin hevur upplýst, at málið hevur bíðað, tí at málsviðgerin orsakað av sjúku, frítíð v.m. ikki er byrjaður aftur fyrr enn 1. mai. Umsøkjarin er samstundis biðin um at koma til samrøðu 11. mai 2005, kl. 9.30.

Í uppritablaði A, dagfest 31. mai 2005, mælir málsviðgerin til, at EP-ráðið viðmælir umsóknini. Somuleiðis er uppritablað E útfylt.

Á fundi 13. juni 2005 staðfestir EP-ráðið, at kvinnan lýkur krøvini um einkjupensjón, men deildarstjóri skal taka støðu til, nær pensjónin skal roknast frá.

Í skrivi, dagfest 22. juni 2005, hevur Almannastovan boðað umsøkjaranum frá, at avgjørt er at játta umsóknini, fram til yngsta barnið gerst 18 ár. Sagt verður, at umsøkjarin fær nærri boð frá Veitingardeildini viðvíkjandi útgjaldi og stødd av pensjónini.

Mín viðmerking:
*Hetta málið tekur fyri mær at síggja alt ov langa tíð. Almannastovan skal einans staðfesta, hvørt umsøkjarin veruliga er einkja, og um einkjan hevur uppihaldsskyldu mótvegis børnum undir 18 ár. Tað er ikki nøktandi, at hetta málið liggur og bíðar 2 1/2 mðr., tí at málsviðgerin ikki er til arbeiðis. Tað sær út til, at føðibræv er umbiðið og latið inn tann 9. mars. Um so er, at føðibræv krevst, hevði tað verið skilagott, um hetta stóð á umsóknarblaðnum. Í uppritablaði E hevur Almannastovan noterað ogn og skuld hjá umsøkjaranum. Eg dugi als ikki at síggja nakra orsøk til hetta, og um hetta ikki er neyðugt fyri ásetan av pensjónini, er hetta eisini í stríð við § 31 í fyrisitingarlógini. Eftir at umsøkjarin rykkir, verður hon boðsend at koma til samrøðu tann 11. mai 2005. Eg dugi ikki at síggja, hvat orsøkin er til, at hon verður kallað til samrøðu.*

*Í málinum eru eingir læknaligir upplýsingar, og dugi eg tí heldur ikki at síggja, hví hetta málið skal leggjast fyri læknaráðgevan til ummælis, tí her krevst als eingin læknalig meting. Eg gangi út frá, at leikluturin hjá einum læknaligum ráðgeva er at vegleiða viðkomandi myndugleika um læknaligar spurningar. Í málum viðvíkjandi § 7, nr. 3 eru eingir læknaligir spurningar at taka støðu til. Sakkunnleikin hjá læknaráðgevanum er á tí læknaliga økinum.*

*Viðvíkjandi leiklutinum hjá læknaligum ráðgevum í málsviðgerðum skal eg annars vísa til eina kanning hjá Folketingets Ombudsmand av 75 endurbúgvingarmálum hjá 5 donskum kommunum. Kanningin er endurgivin í ársfrágreiðingini hjá Folketingets Ombudsmand fyri 2003, bls. 794 til 928. Eg skal vísa á nøkur brot úr frágreiðingini:*

„(bls. 888): Af det citerede notat af … fremgår det, at lægekonsulenten ikke mente at ansøgerens helbredstilstand berettigede til at revalidere ham til pædagog. Notaterne viser at lægekonsulenten tog direkte stilling

til om ansøgeren var berettiget til revalideringshjælp. I Socialministeriets vejledning nr. 66 af 10. marts 1998 om social pension, pkt. 3.2.4.7, anføres følgende om lægekonsulenters medvirken i pensionssager.

**'119**. I forbindelse med myndighedernes forberedelse af sagen, kan en lægekonsulent medvirke. Lægekonsulenten rådgiver om, hvilke oplysninger om ansøgerens helbredsmæssige forhold, der bør indhentes for at sikre, at sagen bliver fyldestgørende belyst om disse forhold.

I forbindelse med pensionsmyndighedernes vurdering af de lægelige oplysninger, der er indhentet til sagens behandling, kan en lægekonsulent bistå myndigheden med at forstå indholdet af de lægelige oplysninger i sagen.

Lægekonsulenten er at betragte som en af myndigheden ansat person, der ud fra sit fagområde skal bistå myndigheden med at klarlægge indholdet af andre lægers udtalelser. Lægekonsulenten skal således alene bidrage til at udlægge/tolke udtalelser fra praktiserende læger eller speciallæger.

Lægekonsulenten træffer ikke afgørelse i en sag. Det gør alene pensionsmyndigheden. Dette har bl.a. sammenhæng med, at de helbredsmæssige forhold som udgangspunkt forudsættes at være delelementer i den samlede bedømmelse af en persons erhvervsevne.

…

(bls. 925) I to af sagerne har lægekonsulenten udtalt sig på en måde der gik klart videre end konsulentens særlige fagkundskab tilsagde. I strid med Socialministeriets vejledning nr. 66 af 10. marts 1998, pkt. 3.2.4.7, udtalte lægekonsulenten sig i begge sager om ansøgerens ret til revalidering samt om erhvervsplanens udformning. I begge sager synes lægekonsulentens udtalelse at have været afgørende for sagens udfald.“

*Í tí samlaðu niðurstøðuni á bls. 928 verður m.a. sagt:*

„I en af kommunerne har lægekonsulenterne generelt haft indflydelse på afgørelsens udfald som deres ansættelse og fagkundskab ikke har berettiget til. I flere af de øvrige kommuner er jeg i undersøgelsen stødt på samme problem i enkelte sager. Den kommune hvor spørgsmålet havde en mere generel karakter, har oplyst at praksis er ændret i mellemtiden. Jeg finder, uanset dette forhold og uanset at der i de øvrige kommuner ikke har kunnet peges på gennemgående problem, at jeg bør henlede kommunernes opmærksomhed på risikoen for at den lægelige bedømmelse af sagerne får større vægt end loven lægger op til.“

*Út frá hesum haldi eg ikki, at læknaráðgevin átti at havt medvirkað í viðgerðini av málinum.*

<u>Mál nr. 3</u>
64-ára gamal maður, sum søkir um fyritíðarpensjón. Umsóknin er móttikin 4. mars 2005. Læknaváttan frá kommunulækna, ið er móttikin 15. mars, er m.a. soljóðandi:

> „Viðgjørdur fyri hypertensio arterialis í umleið 20 ár, seinastu 13 árini viðgjørdur fyri diabetes mellitus.
>
> …
>
> Meti ikki, at sjúklingurin er førur fyri at átaka sær tyngri ófaklært arbeiði."

Í skrivi, dagfest 3. mai 2005, er umsøkjarin biðin um at koma til viðtalu 10. mai, kl. 13.

10. mai eru uppritabløð B og D útfylt.

12. mai hevur Almannastovan móttikið upplýsingar frá umsøkjaranum um skuld og um inntøkuna hjá hjúnarfelaganum.

19. mai hevur málsviðgerin útfylt bløðini E og A, har mælt verður til, at umsøkjarin fær lægstu fyritíðarpensjón. Sama dagin eru kontoavrit frá skattavaldinum útvegaði viðvíkjandi umsøkjaranum og hjúnafelaganum.

Málið er viðgjørt á fundi í EP-ráðnum 13. juni 2005, har avgjørt er at viðmæla lægstu fyritíðarpensjón. Skriv um hetta, dagfest 20. juni 2005, er sent Vanlukkutryggingarráðnum.

Mín viðmerking:
*Tað ganga meira enn 3 mánaðir frá tí, Almannastovan hevur fingið umsókn og læknaváttan, til málið verður avgreitt til Vanlukkutryggingarráðið. Hetta haldi eg vera í longra lagi. Málið átti eftir mínum tykki at verið avgreitt innan ein mánað. Eg haldi ikki, at nøkur grund var til at kalla umsøkjaran til samrøðu. Maðurin var jú 64 ár, og endurbúgving kundi tí neyvan koma upp á tal. Hesin spurningur er heldur ikki umrøddur í útfyltu uppritabløðunum. Aftaná fundin við umsøkjaran, hevur hesin sent Almannastovuni upplýsingar um ognarviðurskifti og inntøkuna hjá hjúnafelaganum. Eg dugi ikki at síggja, hvat Almannastovan skal nýta hesar upplýsingar til.*

Mál nr. 4
54-ára gomul kvinna, sum søkir um miðal fyritíðarpensjón. Umsóknin er móttikin 26. nov. 2004.

15. des. 2004 heitir Almannastovan á kommunulæknan um at fáa eina læknaváttan; samstundis verður kvinnan biðin um at venda sær til læknan.

10. febr. 2005 hevur Almannastovan móttikið læknaváttan frá kommunulækna, dagfest 1. febr., har m.a. verður sagt:

„Diagnosan er cancer recti seqv.
arbeiðsevnini hjá henni eru hampulig. Hon hevði uttan iva klára eitt flexjobb, men hetta átti at verið…, eftir sum hon ikki kann arbeiða á flakavirki sum hon plagdi, ei heldur eigur hennara arbeiðstíð at verða meira enn 1/2 tíð.

Tað er ringt at siga nakað um útlitini heilt konkret, men eftirkanningarnar bera góð tíðindir.

Henda læknaváttan er skriva út frá journal og viðtalu tann 08.12.04.“

6. juni 2005 hevur málsviðgeri útfylt uppritabløð A, B, D og E. Í blaði E eru noteraði ognar- og inntøkuviðurskifti hjá hjúnafelaganum. Í blaði A stendur m.a.:

„Hon ynskir ikki endurbúgving, meti ikki tað er sannlýkt at hon gjøgnumførður nakað slag av endurbúgving.
Mælt verður til at játta pensión.“

Málið er viðgjørt á EP-ráðsfundi 13. juni 2005, har mælt verður til, at hon fær tillutað lægstu fyritíðarpensjón. Skriv um hetta er sent umsøkjaranum og Vanlukkutryggingarráðnum 20. juni 2005.

Mín viðmerking:
*Viðgerðartíðin í hesum málinum (næstan 7 mðr.) er als ikki nøktandi. Tað ganga meira enn 4 mðr. frá móttøkuni av læknaváttanini, til málið verður viðgjørt í EP-ráðnum. Tað sær ikki út til, at nakað er hent í málinum, fyrr enn uppritabløðini verða útfylt 6. juni. Hetta er als ikki nøktandi. Almannastovan kundi eisini havt biðið um læknaváttan heldur skjótari enn gjørt er, eins og áminning kundi verið send læknanum. Eg dugi ikki at síggja, hvat Almannastovan skal nýta upplýsingarnar um ognar- og inntøkuviðurskiftini hjá hjúnarfelaganum til.*

Mál nr. 5

65-ára gomul kvinna, sum fær miðal fyritíðarpensjón, søkir við vanligum brævi, dagfest 3. juli 2003, um hækkan av fyritíðarpensjónini. Skrivið er móttikið 7. juli, og 22. juli verður umsóknarblað sent henni, sum hon verður biðin um at undirskriva. Umsóknin er móttikin 30. juli 2003.

1. aug. 2003 er upprit skrivað í málið um, at málsviðgeri skal biðja umsøkjaran útvega nýggja læknaváttan, so málið kann viðgerast.

24. sept. 2003 verður kommunulæknin biðin um læknaváttan. Samstundis verður umsøkjarin biðin um at venda sær til læknan.

Í uppriti, dagfest 17. des. 2004, ivast Almannastovan í, um málið er liðugt viðgjørt, tí umsøkjarin gerst fólkapensjónistur 1. jan. 2005, eins og hon orsakað av aldrinum ikki kundi fáa útgoldið hægstu fyritíðarpensjón, tá søkt varð.

Málið er viðgjørt á EP-ráðsfundi 13. juni 2005, har mælt verður frá at játta umsóknini orsakað av aldrinum. Skriv um hetta verður sent umsøkjaranum og Vanlukkutryggingarráðnum 20. juni 2005.

Mín viðmerking:

*Hetta málið verður ikki sent Vanlukkutryggingarráðnum fyrr enn næstan 2 ár aftaná, at umsóknin er innkomin. Hetta er avgjørt ikki nøktandi. Tað átti beinanvegin at staðið Almannastovuni greitt, at eingin heimild var fyri at játta umsóknini um hækkan av pensjónini, og tí skuldi hetta málið verið avgreitt eftir heilt fáum døgum. Almannastovan varnast í des. 2004, at eingin heimild var fyri at játta umsóknini, men kortini verður málið ikki avgreitt fyrr enn í juni 2005. Eg fari at geva Almannastovuni ein átalu fyri handfaringina av hesum málinum. Eg dugi heldur ikki at síggja, hví hetta málið verður lagt fyri læknaráðgevan til ummælis.*

Mál nr. 6

64-ára gomul kvinna, sum søkir um fyritíðarpensjón frá 1. nov. 2005.

Læknaváttan er móttikin 17. mai 2005, og í henni stendur m.a.:

„Diagnosur: slitgikt í hondum, serliga høgru

Heberden Bouchard's artrose

…

Ikki neyðugt við fleiri serlæknakanningum.

Arbeiðsevni: orsaka av broytingunum í hondunum, serliga høgru hond, er hon ikki før at halda fram í sínum arbeiði sum…
Støðan er varandi.
Ikki útlit til bata.
Versnar uttan iva.“

24. mai 2005 hevur Almannastovan sent umsøkjaranum umsóknarblað at fylla út.

Umsóknin er móttikin 30. mai 2005.

1. juni 2005 hevur málsviðgeri útfylt blað A, har mælt verður til at játta lægstu fyritíðarpensjón.

Málið er viðgjørt á EP-ráðsfundi 13. juni, har mælt verður til at játta henni lægstu fyritíðarpensjón. Skriv um hetta er sent Vanlukkutryggingarráðnum og umsøkjaranum 20. juni 2005.

<u>Mál nr. 7</u>
58-ára gomul kvinna, sum søkir um hjálparviðbót. Umsóknin er innkomin 13. aug. 2004, og í læknaváttanini, ið er móttikin 30. aug. 2004, stendur soleiðis:

„Har altid været retarderet.
…
Det største problem er hendes manglende evne til at klare sig selv, fuldstændig uselvstændig og ude af stand til af ordne om sig ud over den nødvendige personlige hygiejne. Hun er generelt bange for fremmede og kan derfor ikke passes af andre end familien.
…
Vedkommende aktuelle tilstand har varet hele livet så behovet skønnes vedvarende.“

7. juni hevur málsviðgeri útfylt uppritablað A, har mælt verður til at játta hjálparviðbót.

Málið er viðgjørt á EP-ráðsfundi 13. juni 2005, har mælt verður til at játta hjálparviðbót. Skriv um hetta er 20. juni sent Vanlukkutryggingarráðnum og umsøkjaranum.

Mín viðmerking:
*Tað ganga næstan 10 mánaðir frá tí, Almannastovan hevur fingið umsókn og læknaváttan, til málið verður avgreitt til Vanlukkutryggingarráðið. Hetta er alt ov leingi. Málið átti at verið avgreitt innan fyri 1*

*mánað, tí tær neyðugu upplýsingarnar fyri at taka støðu til umsóknina framganga av pkt. 9 í læknaváttanini.*

<u>Mál nr. 8</u>

65-ára gomul óhjálpin kvinna, sum søkir um røktarviðbót, tí at maðurin noyðist at vera um hana. Málið byrjar við einari umsókn frá manninum um samsýning fyri at ansa eldri og óhjálpnum heima.

Í einum notati, dagfest 6. des. 2004, stendur m.a. soleiðis:

> „Ums. um samsýning fyri at ansa eldri og óhjálpnum heima er innkomin 24/11-04 … søkir um at gerast ansari hjá konu sínari … er 65 ár og fær hægstu fyritíðarpensjón.
>
> Smb. nýggjari kunngerð um ansing skal tann óhjálpni verða vorðin 67 ár fyri at ansing kann játtast. Viðk. lýkur tessvegna ikki treytirnar fyri at fáa ansing.
>
> Mælt verður til at viðk. søkir um at fáa hjálpar- ella røktarviðbót. Viðk. hevur fingið skrivligt og munnligt avslag á ums. um samsýning og vegleiðing um hjálpar- og røktarviðbót.
>
> Sakin um ansing skal niðurleggjast.“

Umsóknin um røktarviðbót er móttikin 10. mai 2005 og undirskrivað av heimasjúkrarøktarfrøðingi vegna umsøkjaran.

27. mai 2005 er blað F útfylt, grundað á samrøðu við kommunulæknan og hjúnafelagan, og stendur har m.a.:

> „… er støðugt seingjarliggjandi og hevur tørv á hjáveru alt samdøgrið…
>
> Støðug hjávera krevst og maður … hjálpir henni við tí, hon ikki klárar. Kommunulæknin metir ikki, at nakað er til hindurs fyri, at hjúnafelagin kann átaka sær at veita ta neyðugu hjálpina.
>
> …hevur eina varandi sjúku og út frá omanfyrinevndu upplýsingum verður ikki mett, at viðk. verður sjálvhjálpin.“

28. mai 2005 er blað A útfylt, og mælt verður til at játta røktarviðbót.

Málið er viðgjørt á EP-ráðsfundi 13. juni 2005, har mett verður at hon lýkur treytirnar fyri at fáa tillutað røktarviðbót. Í uppritinum frá fundinum stendur soleiðis:

> „Søkti fyrst um ansing og síðan um røktarviðbót í november 2004. Nýtt umsóknarblað er útfylt nú, tí tað fyrra var skeivt fylt út.“
>
> Tilmæli um at játta røktarviðbót er sent Vanlukkutryggingarráðnum 20. juni 2005, og samstundis er umsøkjarin kunnaður um hetta.

Mín viðmerking:
*Sambært tí, sum er endurgivið frá EP-ráðnum hevur kvinnan longu søkt um røktarviðbót í nov. 2004. Hendan umsóknin er ikki at finna í málinum.*

<u>Mál nr. 9</u>
64-ára gamal maður, sum søkir um hægstu fyritíðarpensjón. Umsóknin er móttikin 28. apríl 2005.

Í læknaváttanini, sum er móttikin 3. mai 2005, stendur m.a.:

> „Hans arbejdsevne er nedsat med over halvdelen p.g.a. de flere lidelser han har, og dermed nedsatte kræfter.
>
> Ansøgeren bliver 65 år i år og revalidering skønnes ikke relevant."

1. juni 2005 er blað A útfylt, og mælt verður til at játta lægstu fyritíðarpensjón. Í grundgevingini fyri hesum stendur:

> „Samanum tikið meti eg ikki, at hesin maður er arbeiðsførur meira og verður tað neyvan aftur. Eisini havandi hansara aldur í huga…"

2. juni 2005 eru bløðini B, D og E útfylt, og í hesum seinasta eru ognarviðurskiftini eisini útgreinaði.

Málið er viðgjørt á EP-ráðsfundi 13. juni 2005, har mælt verður til at veita lægstu fyritíðarpensjón. 20. juni er skriv sent Vanlukkutryggingarráðnum og umsøkjaranum hesum viðvíkjandi.

Mín viðmerking:
*Upplýsingar um ogn og skuld hava ikki týdning í málum um fyritíðarpensjón, og áttu tí sambært § 31 í fyrisitingarlógini ikki at verið innheintaðir.*

<u>Mál nr. 10</u>
58-ára gamal maður, sum søkir um hægstu fyritíðarpensjón. Umsóknin er móttikin 10. nov. 2004.

29. nov. 2004 biður Almannastovan kommunulæknan um eina læknaváttan, eins og umsøkjarin verður biðin um at venda sær til læknan.

10. des. 2004 móttekur Almannastovan læknaváttanina, har tað m.a. stendur:

> „Meti ikki, at sjúklingurin er førur fyri at átaka sær nakað arbeiði bæði tí hann fysiskt er so veikur umframt hevur ringa sjón."

Við skrivi, dagfest 16. des. 2004, verður umsøkjarin biðin um at venda sær til Almannastovuna 5. jan. 2005, kl. 10, til eina nærri útdýpan av umsókníni.

Við einsljóðandi skrivi, dagfest 14. jan. 2005, er umsøkjarin aftur biðin um at venda sær til Almannastovuna 20. jan., kl. 14. Í skrivi, dagfest 20. febr. 2005 (helst skeiv dagfesting) er umsøkjarin biðin um at venda sær til Almannastovuna 18. febr., kl. 14.

21. febr. 2005 hevur málsviðgerin útfylt bløðini A, B, D og E. Í blaði E eru ognarviðurskiftini hjá umsøkjaranum umrødd, og í blaði A stendur:

> „Mett verður ikki at umsøkjarin er førur fyri at átaka sær naka arbeiði, orsaka av hansara heilsustøðu.
>
> Mælt verður tí til at játta honum fyritíðarpensión.“

14. mars 2005 biður Almannastovan um serlæknaváttan, og umsøkjarin verður samstundis kunnaður um, at læknin fer at senda honum nærri boð.

Í einum ikki-dagfestum skrivi kunnar Almannastovan umsøkjaran um, at hann eisini hevur rætt til pensjón úr Noregi og Íslandi, og biður í hesum sambandi um heimild til at nýta læknaváttanirnar, sum liggja í málinum.

18. mai 2005 móttekur Almannastovan hesa váttanina, saman við einum yvirliti yvir, hvar umsøkjarin hevur búð.

20. mai 2005 móttekur Almannastovan eina serlæknaváttan við hesari niðurstøðu:

> „Er ikki arbeiðsførur í sínum arbeiði higartil sum … Er ikki førur fyri at koyra bil vegna vánaliga sjón.“

20. mai biður Almannastovan ein umsetara um at umseta læknaváttanina til danskt mál. Samstundis verður umsøkjarin biðin um at upplýsa útlendsku p-tølini.

27. mai móttekur Almannastovan umsettu læknaváttanina.

31. mai 2005 er upprit gjørt, um hvussu stóran brotpart umsøkjarin eigur í pensjón frá teimum ymsu londunum, og umsókn verður samstundis send teimum.

3. juni 2005 móttekur Almannastovan útlendsku p-tølini frá umsøkjaranum, og 8. juni verða send víðari.

Málið er viðgjørt á EP-ráðsfundi 13. juni, har mælt verður til at veita honum hægstu fyritíðarpensjón (brotpart). 20. juni er skriv um hetta sent umsøkjaranum og Vanlukkutryggingarráðnum.

Mín viðmerking:
*Viðvíkjandi viðgerðartíðini má havast í huga, at her er ikki talan um eitt vanligt pensjónsmál, og havi eg tí heldur ongar viðmerkingar til, at umsøkjarin verður innkallaður til fundar til nærri útdjúpan av umsóknini og at vera kunnaður um sína støðu. Tað hevur eisini gingið rímiliga skjótt at avgreiða málið, eftir at serlæknaváttan var latin inn. Almannastovan átti tó beinanvegin, eftir at hava móttikið ta fyrstu læknaváttanina, at biðið um serlæknaváttan.*

<u>Mál nr. 11</u>
50-ára gamal maður, sum søkir um fyritíðarpensjón. Umsóknin er móttikin 8. okt. 2004, og frammanundan hevur Almannastovan fingið eina læknaváttan frá kommunulæknanum, har tað m.a. stendur:

> „Samanumtikið 50 ára gamal maður, sum týðiliga er heilaskaddur, og har eingi arbeiðsevni eru eftir … og endurbúgvingarmøguleikarnir eru ongir."

Við skrivi, dagfest 2. mars 2005, verður umsøkjarin í sambandi við umsóknina innkallaður til samrøðu við Almannastovuna 11. mars, kl. 13.30.

Við skrivi, dagfest 4. apríl verður umsøkjarin innkallaður til samrøðu við Almannastovuna 8. apríl, kl. 9.30.

4. mai 2005 móttekur Almannastovan telefaks frá kommunulækna, har mint verður á umsóknina og spurt verður, um nakað kann gerast, soleiðis at umsøkjarin skjótast gjørligt kann fáa fíggjarligan stabilitet og tryggleika.

6. juni eru blað A, B, D og E útfylt. Í blaði E eru fíggjarviðurskiftini hjá umsøkjaranum og konuni umrødd. Mælt verður til at veita fyritíðarpensjón, og í blaði B stendur:

> „Set ud fra ansøgerens helbredsmæssige forhold, skønnes revalidering at være urealistisk."

Málið er viðgjørt á EP-ráðsfundi 13. juni, har mett verður at eingi vinnuevni eru eftir, og mælt verður til at veita hægstu fyritíðarpensjón. Skriv um hetta er sent Vanlukkutryggingarráðnum og umsøkjaranum 20. juni.

Mín viðmerking:
*Frá tí at gongd kemur á málið fyrst í mars mánaði, gongur tað toluliga skjótt at avgreiða málið. Men tað er als ikki nøktandi, at einki hendir í*

*smáar 5 mðr. frá tí, at umsóknin kemur inn. Eg fari at biðja Almannastovuna greiða mær frá, hvør orsøkin er til hetta ?*

*Grundað á metingina hjá kommunulæknanum, dugi eg ikki at síggja, at nøkur orsøk er til at biðja umsøkjaran koma á fund við Almannastovuna. Eg fari tí at biðja Almannastovuna greiða mær frá, hví hetta verður gjørt ?*

<u>Mál nr. 12</u>
47-ára gomul kvinna, sum fær miðal fyritíðarpensjón, søkir um hækking til hægstu fyritíðarpensjón. Umsóknin er innkomin 21. mai 2004.

Við skrivi, dagfest 26. mai 2004, biður Almannastovan kommunulæknan um læknaváttan. Samstundis verður umsøkjarin biðin um at venda sær til læknan.

Í skrivi til Almannastovuna, dagfest 4. juni 2004, greiðir kommunulæknin frá, at hann ikki heldur hækking av pensjónini verða røttu og bestu loysnina fyri umsøkjaran, men heldur eitt hóskandi lætt arbeiði.

Við skrivi, dagfest 19. aug. 2004, verður umsøkjarin biðin um at koma til samrøðu 2. sept., kl. 13.

8. sept. 2004 hevur Almannastovan útfylt blað A, B og D. Av tí, at samsvar ikki er millum tilráðingina frá kommununlæknanum og einum psykiatara, sum heldur, at umsøkjarin lýkur treytirnar fyri hægstu fyritíðarpensjón, ger Almannastovan av at biðja um eina serlæknaváttan. Avgerð um hetta er tikin á EP-ráðsfundi 20. sept., men hendan verður ikki umbiðin fyrr enn við skrivi, dagfest 25. okt. 2004.

27. mai 2005 móttekur Almannastovan serlæknaváttanina. Einki bendir á, at Almannastovan hevur rykt serlæknan eftir váttanini. Í váttanini greiðir serlæknin frá lívssøguni, sjúkrasøguni og medisinnýtsluni hjá umsøkjaranum, men sigur einki beinleiðis um, hvussu hann metir vinnuevni hennara. Tað sær út til, at ein síða manglar í serlæknaváttanini.

Málið er viðgjørt á EP-ráðsfundi 13. juni 2005. EP-ráðið vísir til serlæknaváttanina, sum sigur at eingi vinnuevni eru eftir, men er kortini ikki samt í hesum og vísir til kommunulæknaváttanina. Tí mælir EP-ráðið frá at játta umsóknini.

Við skrivi, dagfest 20. juni 2005, sendir Almannastovan tilráðingina til Vanlukkutryggingarráðið. Samstundis er umsøkjarin kunnaður um, at hetta er gjørt.

Mín viðmerking:
*Eg haldi viðgerðartíðina í hesum málinum vera átaluverda. Grundað á kommunulæknaváttanina átti Almannastovan, um hon var í iva, beinanvegin at biðið um eina serlæknaváttan. Tað er átaluvert, at Almannastovan ikki biður um hesa váttan fyrr enn 5 mðr. aftaná móttøkuna av umsóknini. Somuleiðis er tað átaluvert, at tað ganga 7 mðr., uttan at Almannastovan eina einastu ferð rykkir serlæknan eftir váttanini. Hetta átti longu at verið gjørt aftaná 1 ella 2 mðr. og síðani við jøvnum millumbilum.*

<u>Mál nr. 13</u>
49-ára gomul kvinna, sum søkir um fyritíðarpensjón. Umsóknin er móttikin 15. des. 2004. Sama dag er læknaváttan frá kommunulækna móttikin, og í henni stendur soleiðis:

> „Arbeiðsførið verður mett at vera minkað við heldur meira enn 2/3 vegna fylgir av cancer í … við eftirfylgjandi strálu- og kemoterapi saman við ringari kroniskari depressión, asteni og insufficientia dorsi."

Einki verður sagt í læknaváttanini um framtíðarútlitini.

11. mai 2005 hevur Almannastovan móttikið skriv frá arbeiðsgevara, dagfest 10. mai. Hesin hevur havt umsøkjaran í starvsuppvenjing í 15 tímar um vikuna. Í skrivinum sigur arbeiðsgevarin, at umsøkjarin heldur tað vera passandi við 15 tímum og megnar í løtuni ikki meira.

Almannastovan hevur 30. mai 2005 útfylt blað A, B, D og E – uml. 7 síður til samans. Í blaði E er gjørt nógv búrturúr at lýsa ognarviðurskiftini hjá umsøkjaranum og hjúnarfelaga hennara, umframt inntøkuviðurskifti hansara. Í blaði A stendur soleiðis:

> „Ansøgeren har i samarbejde med Almannastovan, AMD opnået revalidering til arbejdsoptræning med henblik på afklaring af hendes erhvervsevne…
>
> Det er aftalt med arbejdsgiver, at såfremt ansøgeren opnår pension vil arbejdsgiveren ansætte hende i vart starv som pensionist med $^{1}/_{3}$ lønrefusion fra Almannastovan.
>
> Det indstilles til, at ansøgeren opnår førtidspension."

Málið er viðgjørt á EP-ráðsfundi 13. juni 2005, og grundað á, at hon hevur klárað at arbeitt 3 tímar um dagin, verður mælt til, at hon fær tilluta lægstu fyritíðarpensjón.

Mín viðmerking:
*Tað ganga stívliga 6 mðr. frá tí, at umsókn og læknaváttan fyriliggur, til málið verður avgreitt. Hetta kann tykjast í so leingi. Hinvegin er talan um eitt mál við revalideringsatlitum. Tað hevur tí verið grund til at gera eitt sindur meira burtur úr teimum sosialu viðurskiftunum. Eg dugi tó ikki út frá málinum at lesa, hvat er hent í tíðarskeiðnum frá 15. des. 2004 til 11. mai 2005. Eg haldi, at eitt notat átti at verið gjørt í sambandi við, at avtalað var við umsøkjaran, at hesin skuldi fara undir endurbúgving til arbeiðsuppvenjing. Eg dugi heldur ikki í hesum málinum at síggja, hví Almannastovan ger so nógv burturúr ognarviðurskiftunum og inntøkuviðurskiftunum hjá hjúnafelaganum.*

<u>Mál nr. 14</u>
59-ára gomul kvinna, sum søkir um lægstu fyritíðarpensjón grundað á viknandi heilsu v.m. Umsóknin er móttikin 22. okt. 2004.

Við skrivi, dagfest 2. nov. 2004, hevur Almannastovan biðið kommunulæknan um eina læknaváttan, og samstundis er umsøkjarin biðin um at venda sær til læknan hesum viðvíkjandi.

2. des. 2004 er læknaváttanin móttikin, og í henni stendur m.a.:

> „Vegna vøddapínu sær hon seg ikki føran fyri at átaka sær nakað vinnuligt arbeiði.“

Læknin heldur ikki, at møguleikar fyri endurbúgving eiga at kannast, men at málið kann avgreiðast við einari serlæknaváttan frá ortopedkirurgi.

Við skrivi, dagfest 7. des. 2004, boðsendir Almannastovan umsøkjaranum at koma til viðtalu 16. des., kl. 13.

20. og 21. des. 2004 hevur Almannastovan útfylt bløðini A, B og D. Mett verður ikki, at grundarlag er fyri endurbúgving.

Við skrivi, dagfest 19. jan. 2005, hevur Almannastovan biðið um serlæknaváttan frá ortopedkirurgi, og samstundis er umsøkjarin kunnaður um hetta. Serlæknaváttanin er móttikin 18. mai, og læknin skrivar m.a.:

> „Jeg har svært ved at udtale mig om pt.s arbejdsevne, da hendes symptomer er overvejende subjektive. Det er dog klart at hun ikke ville kunne

> klare rygbelastende arbejde og at hendes arbejdsevne indenfor erhverv, hvor der forekommer tunge løft vil være nedsat med skønsmæssigt 50%."

Málið er viðgjørt á EP-ráðsfundi 13. juni 2005. Læknaráðgevin er samdur við serlæknan um, at vinnuevnini ikki eru skerd meira enn til helvtar. Í niðurstøðuni hjá ráðnum verður sagt, at ortopedkirurgisk meting kom til, at vinnuevnini eru skerd meira enn til helvtar, og mælt verður til at veita lægstu fyritíðarpensjón. Samsvarandi hesum er málið 20. juni 2005 sent Vanlukkutryggingarráðnum, eins og umsøkjarin er kunnaður um hetta.

Mín viðmerking:
*Eg haldi viðgerðartíðina í hesum málinum hava verið ov drúgva. Grundað á læknaváttanina, átti beinanvegin at verið biðið um serlæknaváttan uttan at bíða eftir samrøðu við umsøkjaran. Eg dugi heldur ikki at síggja nakað endamál við at innkalla umsøkjaran til samrøðu. Tað tók í so langa tíð at fáa serlæknaváttanina. Tað sær ikki út til at nakar rykkjari er sendur. 4 mánaðir er í so leingi at bíða eftir váttanini, og tí átti Almannastovan at havt rykt serlæknan. Eg havi einki at siga til viðgerðartíðina frá tí, at serlæknaváttan er fingin, til málið er avgreitt.*

<u>Mál nr. 15</u>

63-ára gamal maður, sum søkir um hægstu fyritíðarpensjón. Umsóknin er móttikin 11. nov. 2004.

Við skrivi, dagfest 10. jan. 2005, hevur Almannastovan biðið kommunulæknan um læknaváttan, eins og umsøkjarin er biðin um at seta seg í samband við læknan.

20. apríl 2005 móttekur Almannastovan læknaváttanina, har tað m.a. stendur:

> „Er fyri stuttum gjølla kannaður á psyk.deild, so ikki er neyðugt við fleiri serlæknakanningum.
>
> Hesin sjúklingurin er somikið ávirkaður av sínum sálarligu trupulleikum at hansara arbeiðsevnir og arbeiðsførið eru heilt burtur. Er í massivari psykofarmakaviðgerð. Tilmælt verður eisini frá psyk.deild at sjúklingurin søkir um fyritíðarpensión."

Tann 1. og 6. juni 2005 hevur Almannastovan útfylt bløðini A, B, D, E, F og G, og mælt verður til at játta fyritíðarpensjón. Í blaði E eru

inntøkuviðurskiftini og ognarviðurskiftini hjá hjúnarfelaganum eisini umrødd.

6. juni hevur málsviðgeri noterað, at kommunulæknin er biðin um útskrivingarskjal frá psykiatrisku deild, men at hesin hevur sagt hetta vera óneyðugt.

Málið er viðgjørt á EP-ráðsfundi 13. juni, og mælt er til at játta miðal fyritíðarpensjón sambært § 7, stk. 2. Tann 21. juni er skriv um hetta sent Vanlukkutryggingarráðnum og umsøkjaranum.

Mín viðmerking:
*Eg haldi viðgerðina av hesum málinum hava tikið ov langa tíð. Almannastovan átti ikki at bíða út við 2 mðr., áðrenn biðið varð um læknaváttan. Eisini átti Almannastovan at rykt læknan eftir váttanini. Tað eigur heldur ikki at taka 2 mðr. at avgreiða hetta málið, aftaná at læknaváttan er fingin til vega.*

<u>Mál nr. 16</u>
42-ára gamal maður, sum søkir um hægstu fyritíðarpensjón. Umsóknin er móttikin 1. febr. 2005.

Læknaváttan er móttikin 10. febr. 2005, og har stendur m.a.:

> „Ansøgerens arbejdsevne, med relation til fysisk formåen, uddannelse, psykisk formåen samt aktuelle arbejdsmarked, må anses som værende ikke eksisterende. Grundet ryglidelsen samt misbrugsproblemer kan ansøgeren ikke ernære sig som sømand eller, i øvrigt, ved rygbelastende arbejde. Revalideringsforsøg har ikke tidl. lykkedes og jeg har ikke den store tiltro til, at det skulle være tilfældet nu, spec. da ansøgeren ikke virker spec. positiv her over for.“

3. juni 2005 hevur Almannastovan útfylt bløðini A, B, D og E. Málsviðgerin metir ikki, at endurbúgvingarmøguleikarnir eru troyttir, og mælir tí til at sýta umsóknini um pensjón.

Málið er viðgjørt á EP-ráðsfundi 13. juni 2005, har mett verður, at arbeiðsevnini eru skerd við umleið einari helvt. Mælt verður tí til at játta lægstu fyritíðarpensjón.

20. juni er skriv um hetta sent Vanlukkutryggingarráðnum, eins og umsøkjarin er kunnaður um, at málið er sent ráðnum.

Mín viðmerking:
*Viðgerðin av hesum málinum hevur tikið alt ov langa tíð. Tað skal tó sigast, at spurningurin um endurbúgving hevur verið inni í myndini. Tað sær kortini ikki út til, at nakað er hent í málinum millum 10. februar og 3. juni 2005. Hetta er ikki nøktandi.*

Mál nr. 17
46-ára gamal maður, sum søkir um hækkan av fyritíðarpensjón. Umsóknin er móttikin 24. sept. 2004.

Við skrivi, dagfest 19. okt. 2004 hevur Almannastovan biðið um eina læknaváttan, og umsøkjarin er biðin um at seta seg í samband við læknan.

Læknaváttan er móttikin 30. nov. 2004, og í henni stendur m.a.:

„Arbeiðsevnini eru nú somikið niðursett at hetta svarar til meira enn 2/3 av tí normala…

Roknast má við, at støðan bara versnar tí gikt setur seg í knæið."

Í framhaldi av telefonsamrøðu 30. nov. hevur umsøkjarin í skrivi, dagfest 2. des. 2004 boðað Almannastovuni frá, at metta inntøka hansara verður uml. 60-65.000 kr.

Í skrivi, dagfest 20. des. 2004, hevur Almannastovan biðið umsøkjaran koma til samrøðu 13. jan. 2005, kl. 12.30.

7. jan. 2005 móttekur Almannastovan fráboðan frá ALS um, at umsøkjarin hevur meldað seg úr ALS frá 3. jan. 2005.

14. jan. 2005 hevur Almannastovan sent umsøkjaranum eitt skriv um umrokning av pensjón hansara grundað á broyttu inntøkuviðurskiftini.

16. febr. 2005 hevur Almannastovan útfylt bløðini A, B og D. Mett verður ikki, at endurbúgvingarmøguleikar eru, og mælt verður til hægri pensjón.

Við skrivi, dagfest 14. mars 2005, hevur Almannastovan biðið um eina serlæknaváttan, eins og umsøkjarin er kunnaður um hetta.

2. juni móttekur Almannastovan serlæknaváttanina, ið er soljóðandi:

„Útlitini hjá honum eru jú, at hann um ikki alt ov langa tí má fáa eina knæprotesu. Mett verður ikki, at hesin sjúklingurin kann klára seg á lægstu pensjón."

Málið er viðgjørt á EP-ráðsfundi 13. juni 2005, har niðurstøðan er, at vinnuevnini framvegis eru skorin við umleið einari helvt, men at tey

væntandi batna, tá knæprotesan er fingin. Tí verður mælt frá at hækka pensjónina.

Skriv hesum viðvíkjandi er 20. juni 2005 sent Vanlukkutryggingarráðnum, eins og umsøkjarin er kunnaður um hetta.

Mín viðmerking:
*Viðgerðartíðin uppá uml. 9 mðr. er ov long eftir mínum tykki, hetta hóast endurbúgvingaratlit eru inni í myndini, eins og biðið verður um serlæknaváttan. Almannastovan átti at borið skjótari at við at biðið um bæði læknaváttan og serlæknaváttan.*

Mál nr. 18
44-ára gamal maður, sum søkir um hægstu fyritíðarpensjón. Umsóknin er móttikin 24. nov. 2004.

29. nov. 2004 biður Almannastovan um eina læknaváttan, og samstundis verður umsøkjarin biðin um at venda sær til læknan.

13. jan. 2005 móttekur Almannastovan læknaváttanina, har tað m.a. stendur:

> „Arbeiðsevni hansara sum línumaður er munandi niðursett. Hann hevur í fleiri ár roynt at sloppið við skipum, men hann er ikki mentur at taka sær slíkt arbeiði og orsaka av sínari misnýtslu, hevur hann ongan møguleika fyri arbeiði uppi á landi heldur.
>
> Revalidering: ikki møgulig…
>
> Støðan er varandi.
>
> Ikki útlit til bata.
>
> Kann ivaleyst versna.“

Við skrivi, dagfest 18. jan. 2005, hevur Almannastovan biðið umsøkjaran koma til samrøðu (nærri útdýpan av umsókn) 25. jan., kl. 10. Brævið er komið retur 7. febr.

Við skrivi, dagfest 2. febr. er umsøkjarin aftur biðin um at koma til samrøðu 17. febr., kl. 13.

Við skrivi, dagfest 20. mai 2005, er umsøkjarin biðin um at koma til samrøðu 27. mai, kl. 10.

26. mai er notat skrivað um, at umsøkjarin er møttur ávirkaður á Almannastovuni. Avgjørt var ikki at innkalla hann aftur, tí at hann altíð er ávirkaður, og neyðugu upplýsingarnar kunnu útvegast úr forsorgarmálinum.

31. mai 2005 hevur Almannastovan útvega sær inntøku- og ognarupplýsingar frá fyribilsskránni hjá Toll- og skattstovuni.

Tann 1. juni 2005 hevur Almannastovan útfylt bløðini A, B, D og E. Mett verður ikki, at grundarlag er fyri endurbúgving orsakað av misnýtslu. Mælt verður tí til at játta honum fyritíðarpensjón. Sama dag er skriv sent umsøkjaranum, har sagt verður, at málið er fyrireikað, og at ikki er neyðugt hjá honum at koma til samrøðu.

Málið er viðgjørt á EP-ráðsfundi 13. juni 2005. Mett verður, at vinnuevnini eru minkað við stívari helvt, og mælt verður til at veita lægstu fyritíðarpensjón.

20. juni verður skriv um hetta sent Vanlukkutryggingarráðnum, eins og umsøkjarin verður kunnaður um hetta.

Mín viðmerking:

*Viðgerðartíðin í hesum málinum er eftir mínum tykki alt ov drúgv. Læknaváttanin hevur gjølliga frágreiðing um sjúkrasøguna, evnini og rúsdrekkatrupulleikar v.m. Hóast umsøkjarin bert er 44 ár, og endurbúgving tí kundi hugsast at verið ein møguleiki, haldi eg við støði í læknaváttanini ikki, at nøkur orsøk er til at kalla umsøkjaran inn til fund.*

<u>Mál nr. 19</u>

34-ára gomul kvinna, sum søkir um einkjupensjón. Umsóknin saman við føði- / navnabrævi hjá børnum er móttikin 27. mai 2005.

7. juni 2005 hevur Almannastovan útfylt bløðini A og E, og mælt verður til at veita einkjupensjón.

Málið er viðgjørt á EP-ráðsfundi 13. juni 2005, har mælt verður til at játta umsóknini.

22. juni verður játtan av umsóknini send umsøkjaranum. Sagt verður, at hon seinni fær nærri boð um útgjald og stødd á pensjónini.

Mín viðmerking:

*Hetta málið er avgreitt rímiliga skjótt. Eg skal tó gera nakrar viðmerkingar til sjálva málsviðgerðina.*

*Sambært notatinum sær tað út til, at tað er læknaráðgevin, sum staðfestir, at umsøkjarin lýkur lógarinnar krøv. Í málum viðvíkjandi § 7, nr. 3 eru eingir læknaligir spurningar at taka støðu til. Eg dugi tí ikki at sígga, hví læknaráðgevin hevur luttikið í viðgerðini. Eg gangi út frá, at*

*leikluturin hjá einum læknaráðgeva er at vegleiða viðkomandi stovn um læknaligar spurningar. Tí eigur læknaligi ráðgevin als ikki at luttaka í viðgerðini í slíkum málum. Viðvíkjandi luttøku hjá læknaligum ráðgevum í málsviðgerð í pensiónsmálum skal eg annars vísa til tað, sum er ført fram viðvíkjandi máli nr. 2.*

<u>Mál nr. 20</u>
50-ára gomul kvinna, sum fær miðal fyritíðarpensjón, og sum søkir um hægstu fyritíðarpensjón. Umsóknin er móttikin 12. aug. 2004.

3. sept. 2004 biður Almannastovan um læknaváttan, eins og umsøkjarin er biðin um at venda sær til læknan.

18. apríl 2005 móttekur Almannastovan læknaváttanina, har tað m.a. stendur:

> „Arbeiðsevnini til handaligt arbeiði eitt nú á fiskavirki eru munandi skerd. Tað er ikki hugsandi, at hon framyvir verður før fyri at átaka sær slíkt arbeiði ella líknandi, við atlit til nevndu trupulleikar frá rørslulagnum. Tað eru hesir, ið serliga avmarka arbeiðsførleikan. Eisini psykiska støðan, ið tað, eg veit, hevur verið rættuliga kronisk við depressivum tíðarskeiðum havandi við sær vánaligan trivna og ikki sjálvdan brennivínsmisnýtslu, ger fortre…
>
> Væntandi er ikki, at samlaða støðan viðvíkjandi arbeiðsførleikanum batnar framyvir."

Við skrivi, dagfest 19. mai 2005, verður umsøkjarin biðin um at koma til samrøðu á Almannastovuni 9. juni, kl. 10.

1. juni 2005 eru bløðini A, B, D og E útfylt. Mett verður ikki, at grundarlag er fyri endurbúgving orsakað av sjúku. Sama dag eru kontoavrit viðvíkjandi inntøku- og ognarviðurskiftum útvegaði frá Toll- og skattstovuni.

Málið er viðgjørt á EP-ráðsfundi 13. juni 2005. Mett verður, at millum 2/3 og øll vinnuevnini eru burtur, og tí verður mælt til at sýta umsóknini.

Skriv um hetta er sent Vanlukkutryggingarráðnum og umsøkjaranum 20. juni 2005.

Mín viðmerking:
*Samlaða viðgerðartíðin av hesum málinum er alt ov drúgv. Tað gongur 7 1/2 mðr. frá tí, at Almannastovan biður um læknaváttan, til hendan*

*fyriliggur. Einki bendir á, at Almannastovan hevur rykt eftir hesari váttanini, eins og hon átti at gjørt.*

**c. Samandráttur og niðurstøða**

*Av teimum 20 málunum, ið eg havi havt til láns, snúgva 2 seg um fyritíðarpensión eftir § 7 nr. 3 (einkjustøða), og er tað Almannastovan, ið tekur avgerð í slíkum málum. Hóast eingir læknaligir spurningar eru at taka støðu til, sær tað út til, at læknaráðgevin hjá Almannastovuni hevur luttikið í viðgerðini av hesum málum, og er hetta ikki í tráð við hansara leiklut sum læknaráðgevi. Í øðrum av málunum ganga meira enn 4 mánaðir frá móttøku av umsóknini til avgerð fyriliggur, og er hetta átaluvert. Í hinum málinum tekur tað minni enn ein mánað at avgreiða umsóknina, og havi eg tí ongar viðmerkingar viðvíkjandi viðgerðartíðini av tí málinum.*

*Hini 18 málini snúgva seg um fyritíðarpensjón eftir § 6, § 7, nr. 1) og nr. 2), § 8 nr. 1) og um hjálpar- og røktarviðbót eftir § 11. Í slíkum málum er tað Vanlukkutryggingarráðið, ið sambært § 37, stk. 1 tekur avgerð, eftir at Almannastovan sambært § 30, stk. 5 hevur sent ráðnum umsókn við tilráðing saman við neyðugum upplýsingum og skjalprógvum. Tað er sostatt ráðið, ið skal taka avgerð í málunum, meðan Almannastovan skal koma við tilráðing. Hóast læknaligu upplýsingarnar ikki eru einaavgerandi fyri spurningin, hvørt ein persónur hevur rætt til fyritíðarpensjón, eru teir ein sera týðandi og oftast avgerandi táttur í grundarlagnum undir avgerðini, um ein umsøkjari lýkur treytirnar fyri fyritíðarpensjón. Tað er tí eyðsæð, at læknaráðgevin í flestu av hesum málum hevur og eigur at hava ein virknan leiklut. Við sínum sakkunnleika er tað hann, sum hevur førleika til at meta, um samsvar er millum niðurstøðurnar í læknaváttanunum og læknaligu upplýsingarnar.*

*Í 5 av málunum hevur Almannastovan útvega serlæknaváttanir. Í 2 av teimum er serlæknaváttan ikki umbiðin fyrr enn meira enn 4 mánaðar aftaná, at læknaváttan var latin Almannastovuni, í 2 málum er hetta hent meira enn 3 mánaðir aftaná og í einum máli 1 ½ mánað aftaná. Hetta hevur óivað seinkað avgreiðsluna av málunum til Vanlukkutryggingarráðið munandi.*

*Í restini av málunum hevur ikki verið hildið neyðugt at útvega serlæknaváttan.*

*Í einum máli er talan um ein 65 ára gamlan umsøkjara við miðal fyritíðarpensión, ið søkir hægstu. Hóast heimild sambært § 6 ikki er fyri at játta umsóknina, tekur tað næstan 2 ár at avgreiða málið til Vanlukkutryggingarráðið. Hetta átti at verið gjørt beinanvegin, eftir at Almannastovan hevði móttikið umsóknina, og uttan at tað var neyðugt at ráðføra seg við læknaráðgevan. At tað hevur tikið so langa tíð at avgreiða málið til Vanlukkutryggingarráðið er sera átaluvert.*

*Sum tað framgongur av hesum, ganga tað oftast fleiri mánaðir, og ikki so sjáldan nógvir mánaðir frá tí, at ein persónur letur umsókn inn til Almannastovuna, til hendan avgreiðir málið til Vanlukkutryggingarráðið, sum er tann stovnurin, ið tekur avgerð í hesum málum. Hetta kann ikki góðtakast og er átaluvert.*

*Orsøkin til hesa seinu viðgerð tykir mær at vera tann mannagongd, sum Almannastovan nýtir í hesum málum. Sum nevnt er uppgávan hjá Almannastovuni ikki at taka støðu í hesum málum, men bert at senda málini til Vanlukkutryggingarráðið við tilráðing.*

*Í útgangsstøðuni er tað nóg mikið fyri at taka støðu til eina umsókn um fyritíðarpensión, at tað fyriliggur ein læknaváttan, og er tørvur á nærri inntøkuupplýsingum, kann Almannastovan útvega sær hesar frá Toll & Skatt. Í mongum førum hevur Almannastovan kallað umsøkjarar inn til samrøðu. Hetta tykir mær at vera óneyðugt, uttanso at tað fyriliggja serlig viðurskifti, herundir at møguleikarnir fyri endurbúgving eiga at kannast. Eg skal her vísa til § 5 í lógini, ið ásetur, at pensjón ikki kann tillutast, um møguleiki er fyri at útvega viðkomandi hóskandi arbeiði. Tað er tí av týdningi, at Almannastovan kannar spurningin um endurbúgving, áðrenn hon letur tilmæli. Eg dugi ikki at síggja, at spurningurin um endurbúgving hevur verið serliga nógv frammi í teimum málum, har umsøkjarin er kallaður inn til samrøðu. Í flestu málunum er talan um umsøkjarar, sum eru komnir væl til árs, og spurningurin um endurbúgving hevur tí ikki verið serliga aktuellur.*

*Í málum, har serlæknaváttan hevur verið hildin at vera neyðug, eru stig ikki tikin til hetta, fyrr enn fleiri mánaðir aftaná, at Almannastovan hevur fingið læknaváttan.*

*Tað tykist sum Almannastovan leggur stóra orku í at útfylla bløðini A, B, D og E. Í hesum seinasta blaði eru eisini ofta upplýsingar um ognarviðurskiftini hjá umsøkjarunum. Upplýsingar um ognarviðurskifti, ið eftir mínum tykki eru trúnaðarupplýsingar, hava ongan týdning fyri spurningin, um viðkomandi hevur rætt til fyritíðarpensjón og*

*heldur ikki fyri útrokningina av pensjónini. Eg skal í hesum sambandi vísa á § 31 í fyrisitingarlógini, ið er soljóðandi:*

*„§ 31. Hann, sum virkar innan almennu umsitingina, hevur ikki loyvi til at útvega sær trúnaðarupplýsingar, ið ikki hava týdning fyri tær uppgávur, ið hann hevur at greiða.“*

*Eg meti tað vera í stríð við § 31 í fyrisitingarlógini at draga upplýsingar um ognarviðurskifti inn í hesi mál. Harafturat kemur, at hetta er reint orkuspill.*

*Formaðurin í Vanlukkutryggingarráðnum, Henrik Møller, sorinskrivari, hevur yvir fyri mær upplýst, at Vanlukkutryggingarráðið fyrst og fremst tekur avgerðir grundað á læknaligu upplýsingarnar og lítlan og ongan dent leggur á omanfyri nevndu bløð, sum málsviðgerar á Almannastovuni fylla út uttanso, at talan kann verða um endurbúgving.*

*Í nøkrum førum gongur long tíð frá tí, at læknaváttan ella serlæknaváttan verður umbiðin, til Almannastovan fær hana, uttan at Almannastovan rykkir.*

***d. Tilmæli***

*Sum nevnt er tað Vanlukkutryggingarráðið, ið tekur avgerð um fyritíðarpensión sambært § 6, § 7, nr. 1) og nr. 2), § 8, nr. 1) og um viðbøtur eftir § 11 í lógini um almannapensjónir. Uppgávan hjá Almannastovuni í hesum málum er at fyrireika tey og senda tey til Vanlukkutryggingarráðið við tilmæli. Við tað, at tað í mongum førum ganga nógvir mánaðir til málini koma fram til myndugleikan, sum skal taka avgerð, virkar Almannastovan sum ein fløskuhálsur við tí úrsliti, at viðgerðartíðin fyri málini gerst alt ov drúgv.*

*Fyri at stytta um fyrireikingina av málunum skal eg mæla Almannastovuni til at umhugsa hesar broytingar í mannagongdini:*

1) *Ein hóskandi áminning um at minnast til at útvega læknaváttan eigur eftir mínum tykki at framganga týðiliga av umsóknarblaðnum.*
2) *Tá umsókn og læknaváttan fyriliggur, verður málið beinanvegin lagt fyri læknaráðgevan, ið tekur støðu til um nøktandi læknaligt grundarlag er fyri at gera tilmæli til Vanlukkutryggingarráðið.*
3) *Um læknaráðgevin heldur, at so er, verður málið beinanvegin sent Vanlukkutryggingarráðnum við tilmæli, uttanso at møguleikin fyri endurbúgving eigur at kannast.*

4) *Um málsviðgerin og / ella læknaráðgevin heldur, at serlæknaváttan skal útvegast, eigur hetta at verða gjørt beinanvegin.*
5) *Um endurbúgving kann koma uppá tal, verður umsøkjarin kallaður inn til samrøðu á Almannastovuni fyri at kanna, um møguleikar eru fyri hesum, og verður upprit gjørt frá samrøðuni.*
6) *Í øðrum førum er vanliga ikki nøkur grund til at gera serlig upprit.*
7) *Almannastovan ger fasta mannagongd viðvíkjandi áminningum, tá læknaváttanir og annað tilfar, ið skal útvegast, ikki kemur nóg skjótt.*
8) *Um inntøkuupplýsingar skulu útvegast, verður hetta gjørt beinanvegin.*

*Eg havi lagt til merkis, at endaliga tilmælið til Vanlukkutryggingarráðið verður gjørt á einum sokallaðum EP-ráðsfundi, har læknaráðgevin og ein ella tveir deildarleiðarar luttaka. Mær vitandi er eingin lógarheimild fyri hesum ráði, og er hetta tí helst ein formur fyri málsviðgerð, sum Almannastovan hevur sett í verk av sínum eintingum. Tað er tað helst ikki nakað í vegin fyri, og havi eg heldur ikki nakrar viðmerkingar til tað, um hesin formur ikki seinkar málini munandi. Tað kann tó tykjast eitt sindur løgið at nýta henda hátt í pensjónsmálum, sum skulu viðgerast av øðrum ráði. Hinvegin kann hesin viðgerðarháttur kanska vera skilagóður, har endurbúgving kemur uppá tal. Her skal viðmerkjast, at tað er Almannastovan, sum sambært § 18 í forsorgarlógini tekur avgerð um at veita stuðul til endurbúgving.*

**3. Sjúkradagpeningur**

Nú verandi dagpeningalóg hevur verið í gildi síðani 2001, metti umboðsmaðurin tað vera av áhuga at eftirkanna, hvørt lógin verður umsitin á nøktandi hátt, og hvørt málsviðgerðin av dagpeningamálum er í lagi.

Umboðsmaðurin bað tí Almannnastovuna lata sær 20 tey seinast avgreiddu dagpeningamálini til láns, soleiðis at málsviðgerðin í hesum málum kundi verða eftirkannað.

Generelt um málsviðgerðina í hesum málum kann sigast, at Almannastovan útvegar standard umsóknarbløð til umsøkjarar at útfylla. Á umsóknarblaðnum váttar umsøkjarin, at hann ikki hevur rætt til fulla ella partvísa løn undir sjúku, sambært lóg, trygging ella sáttmála. Somuleiðis váttar hann at hava fastan bústað og at verða

undir fullari skattskyldu í Føroyum. Eisini útvegar Almannastovan standard inntøkuváttanir frá arbeiðsgevara og standard læknaváttanir til útfyllingar. Við umsóknarbløðunum er ein nágreinilig vegleiðing um, hvussu umsóknarbløðini skulu útfyllast.

**a. Lógargrundarlagið v.m.**

§§ 1-25 í løgtingslóg nr. 74 frá 8. mai 2001 um dagpening vegna sjúku v.m., seinast broytt við løgtingslóg nr. 9 frá 30. mars 2004, er soljóðandi:

**„Kapittul 1**

**Øki lógarinnar**

**§ 1**. Lógin hevur til endamáls at veita fíggjarligan stuðul í sambandi við mista inntøku og / ella sjálvbodna trygging vegna sjúku, skaðatilburð og fráveru áðrenn føðing vegna heilsuvanda fyri móður ella barn.

**Kapittul 2**

**Rætturin til dagpening**

*Orsøkir*

**§ 2.** Dagpeningur verður sambært hesari lóg veittur orsakað av óarbeiðsføri vegna sjúku, skaðatilburð og fráveru áðrenn føðing, vegna heilsuvanda fyri móður ella barn.

*Stk. 2.* Við partvísum óarbeiðsføri kann dagpeningur verða veittur við lægri upphæddum, eftir nærri reglum ásettar av landstýrismanninum.

*Stk. 3.* Dagpeningur verður tó ikki veittur í tann mun viðkomandi, sambært lóg, trygging ella sáttmála, frá arbeiðsgevara ella øðrum, hevur rætt til løn undir sjúku v.m. ella aðrar veitingar, sum eru endurgjald fyri mista inntøku vegna sjúku v.m.

*Stk. 4.* Persónur, sum hevur fingið løn undir sjúku, og sum framvegis er sjúkrameldaður í teirri løtu, hann fer úr starvinum, hevur framhaldandi rætt til dagpening restina av tíðarskeiðinum sambært § 12, stk. 2.

*Persónsskarin*

**§ 3.** Dagpeningur kann veitast til løntakarar, herundir sjómenn, sum hava hýru, ella ætlandi skuldu hava hýru, við føroyskum ella útlendskum fari.

*Stk. 2.* Dagpeningur kann somuleiðis veitast:

1) útróðrarmonnum, sum rógva út við egnum ella annan mans fiskifari,
2) sjálvstøðugum vinnurekandi, sum ikki ella bert í lítlan mun hava leysa arbeiðsmegi aftrat sær, ella
3) persónum, sum hava teknað trygging sambært kap. 7.

*Stk. 3.* Dagpeningur kann somuleiðis veitast persónum, sum eru fevndir av stk. 1 ella 2, og hvørs børn ella hjúnafelagi gerast álvarsliga sjúk, um tað av lækna verður mett alneyðugt, at persónurin er um tann sjúka.
*Stk. 4.* Sum álvarslig sjúka eftir stk. 3 er at meta sjúka, har álvarsligur vandi er fyri lívinum ella heilsustøðuni hjá persóninum.
**§ 4.** Rætt til dagpening hava persónar frá tí degi, teir eru vorðnir 16 ára gamlir. Hesin rættur dettur burtur frá tí 1. í mánaðinum eftir fylta 70. árið.
*Burturfall*
**§ 5.** Rætturin til at fáa dagpening dettur burtur, um ein persónur eftir áheitan frá lækna noktar at leggja seg inn á sjúkrahús, at móttaka neyðuga læknaviðgerð ella at luttaka í hóskandi uppvenjing, fyri at endurvinna mistan arbeiðsførleika.
**Kapittul 3**
**Vanligar treytir**
*Bústaður og skattskylda*
**§ 6.** Rætturin til dagpening er treytaður av føstum bústaði og fullari skattskyldu í Føroyum.
*Stk. 2.* Samsvarandi reglum í sáttmálum við onnur lond, kann landsstýrismaðurin áseta reglur um undantak frá treytunum í stk. 1.
*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin kann áseta serligar reglur um rættin til dagpening fyri persónar, sum ikki lúka treytirnar í stk. 1, men sum hava hýru við einum skipi, ið er skrásett í Føroysku Altjóða Skipaskránni.
Tilknýti til arbeiðsmarknaðin
**§ 7.** Tann, ið seinastu 5 vikurnar undan sjúkrafráveruni hevur verið í løntum arbeiði í minst 20 tímar tilsamans, hevur rætt til dagpening frá 1. fráverudegi.
*Stk. 2.* Um persónur hevur verið burtur frá arbeiði orsakað av lógligum forfalli, verða seinastu 5 arbeiðsvikurnar hjá persóninum nýttar sum grundarlag ístaðin.
*Stk. 3.* Almannastovuni verður í serligum førum heimilað at veita umsøkjarum dagpening, hóast hesir hava arbeitt eitt lægri tímatal enn ásett í stk. 1, um tað verður prógvað, at starvssetanin annars skuldi halda áfram.
*Stk. 4.* Gjald úr arbeiðsloysisskipan ella aðrari líknandi skipan, er at javnmeta við vanligt lønt arbeiði sambært stk. 1, og gevur tí rætt til dagpening.

**Kapittul 4**

**Dagpeningaveitingin**

*Inntøkugrundarlagið*

**§ 8**. Dagpeningaveitingin verður vanliga ásett við grundarlagi í miðalinntøkuni seinastu 5 vikurnar undan sjúkrafráveruni. Um inntøkan orsakað av lógligum forfalli er lækkað í hesum tíðarskeiðinum, verða seinastu 5 arbeiðsvikurnar ístaðin nýttar sum grundarlag.

*Stk. 2*. Hevur viðkomandi, beint undan sjúkrafráveruni, verið í starvi styttri enn 5 vikur, verður dagpeningaveitingin ásett við grundarlagi í miðalinntøkuni hetta styttra tíðarskeiðið, um ætlanin var, at arbeiðið skuldi halda áfram gjøgnum alt veitingartíðarskeiðið.

*Stk. 3*. Í eini arbeiðssetan við skiftandi arbeiðstíðum ella inntøkum, kann eitt longri og meira umboðandi tíðarskeið ásetast sum útrokningargrundarlag, enn tað í stk. 1 nevnda.

*Stk. 4*. Fyri sjálvstøðug vinnurekandi, fevnd av § 3, stk. 2, nr. 2, sum ikki hava A-inntøku, verður seinasta álíknaða inntøkuárið nýtt sum grundarlag.

*Dagpeningaupphæddin*

**§ 9**. Dagpeningaveitingin er væntaða mista inntøkan, roknað sambært § 8.

*Stk. 2*. Dagpeningaveitingin er tó í mesta lagi 80% av lønini sambært sáttmála millum Føroya Arbeiðsgevarafelag og Føroya Arbeiðarafelag, íroknað viðbøtur og við tí í lóg ásetta vikutímatalinum hjá ófaklærdum, rundað til nærmastu heilu krónuupphædd.

*Stk. 3*. Av dagpeningaveitingini verður eisini veitt frítíðarløn, sum fer í grunn.

*Stk. 4*. Upphæddir roknaðar fyri eina viku, og sum eru lægri enn 10% av tí hægstu dagpeningaupphæddini, verða ikki útgoldnar.

*Stk. 5*. Um dagpeningurin saman við øðrum regluligum útgjaldingum, tó undantikið almennari hjálp, verður hægri enn væntaða arbeiðsinntøkan sambært § 8, verður dagpeningurin lækkaður við einari samsvarandi upphædd.

*Stk. 6*. Almannastovan almannakunnger mest loyvdu dagpeningaveiting sambært stk. 2.

**Kapittul 5**

**Umsóknarfreistir**

**§ 10**. Verður fráboðan um sjúkrafráveru móttikin á Almannastovuni í seinasta lagi 30. dagin aftaná 1. fráverudag, kann dagpeningur játtast frá og við 1. fráverudegi.

*Stk. 2*. Verður fráboðanin móttikin á Almannastovuni seinni enn ásett í stk. 1, kann dagpeningur bert játtast frá móttøkudegnum.

*Stk. 3*. Um heilt serligar orsøkir tala fyri tí, kann Almannastovan víkja frá freistini í stk. 2. Er fráboðanin móttikin á Almannastovuni seinni enn 8 vikur eftir fyrsta fráverudag, er tó ikki møguleiki at víkja frá hesi freist.

*Stk. 4*. Dagpengamóttakarin hevur sjálvur ábyrgdina av, at fráboðanin verður latin Almannastovuni rættstundis.

*Stk. 5*. Fyri persónar, fevndir av § 2, stk. 4, er fyrsti fráverudagur í stk. 1-3 at skilja sum fyrsti sjúkradagur uttan løn.

**Kapittul 6**

**Útgjaldingin**

**§ 11**. Dagpeningaveitingin verður goldin afturút fyri eina viku í senn.

*Dagpeningatíðarskeiðið*

**§ 12**. Útgjaldingin av dagpeningi heldur uppat, tá móttakarin aftur er arbeiðsførur, uttan mun til, um hann fer í vinnu aftur ella ikki.

*Stk. 2*. Dagpeningur verður í mesta lagi veittur í 40 vikur frá 1. fráverudegi í einum 12 mánaða skeiði. Persónar, sum fáa fólkapensjón, kunnu tó ikki móttaka dagpening í meira enn 20 vikur í einum 12 mánaða skeiði.

**§ 13**. Tá dagpeningarætturin er brúktur sambært § 12, stk. 2, í einum samanhangandi tíðarskeiði, kann dagpeningur bert útgjaldast í einum framhaldandi dagpeningatíðarskeiði, um viðkomandi aftur hevur verið arbeiðsførur, og í byrjanini av nýggja sjúkratíðarskeiðinum, lýkur treytirnar í § 7.

*Stk. 2*. Persónur, sum hevur tryggjað seg sambært kap. 7, og sum hevur brúkt dagpengarættin upp sambært § 12, stk. 2, skal ístaðin prógva, at hann aftur hevur verið arbeiðsførur, og at tað eru gingnar minst 5 vikur, innan hann av nýggjum er vorðin sjúkrameldaður.

**Kapittul 7**

**Sjálvboðin trygging**

*Upptøkutreytir*

**§ 14**. Sjálvstøðug vinnurekandi kunnu tryggja sær dagpening sambært hesari lóg frá 1. fráverudegi.

*Stk. 2.* Fólk, ið gera húsligt arbeiði heima fyri seg sjálvan og fyri í minsta lagi einum fólki afturat, kunnu tryggja sær dagpening frá 1. sjúkradegi. Fyri hvørt húskið kann bert teknast ein trygging.

**§ 15**. Persónar, sum burturav ella í mestan mun eru sjálvstøðug vinnurekandi, kunnu tekna trygging við fullari dagpengaupphædd sambært § 9, stk. 2.

*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin ásetir í kunngerð nærri reglur fyri sjálvbodnu tryggingarnar.

**§ 16**. Umsókn um trygging av dagpeningi, kann ikki latast inn, meðan tryggingartakarin er óarbeiðsførur. Tað sama er galdandi, um tryggingartakarin er munandi viknaður, ella vandin fyri sjúku er munandi øktur. Til at meta, um heilsutreytirnar eru uppfyltar, kann um neyðugt krevjast læknaváttan, sum Almannastovan rindar.

Tíðaravmarkingar

**§ 17**. Persónur fær rætt til dagpening 4 vikur eftir, at umsóknin um upptøku í sjálvbodnu tryggingina er innlatin, og tryggingargjaldið er goldið.

*Stk. 2.* Um framhaldandi gjald til sjálvbodnu tryggingina ikki er inngoldið í seinasta lagi ein mánað eftir gjaldkomudagin, dettur tryggingin burtur.

*Stk. 3.* Avmarkingarnar í rættinum til dagpening sambært § 12 eru eisini galdandi fyri sjálvbodnu tryggingarnar.

Burturfall ella lækking

**§ 18**. Um inntøku- og arbeiðsviðurskiftini broytast munandi soleiðis, at viðkomandi tað seinasta árið ikki hevur lokið treytirnar í § 15, stk. 1, dettur tryggingin burtur.

**Kapittul 8**

*Dagpeningur vegna arbeiðsskaða*

**§ 19**. Persónar, hvørs mál eru fráboðað Vanlukkutryggingarráðnum sum arbeiðsskaðamál, fáa dagpening eftir vanligu reglunum í lógini.

**Kapittul 9**

**Fígging**

**§ 20**. Dagpeningur verður goldin av landskassanum.

*Stk. 2.* Arbeiðsgevarin afturrindar landskassanum tær útreiðslur, ið standast av, at Almannastovan rindar 1. og 2. fráverudag sambært hesi lóg, tó undantikið í teimum førum, har ongin arbeiðsgevari er. Toll- og Skattstova Føroya krevur inn peningin frá arbeiðsgevaranum.

*Stk. 3*. Gjaldsfreistin fyri kravinum sambært § 20, stk. 2, 1. pkt. er verandi mánaði umframt 30 dagar eftir, at Almannastovan hevur skrivað uppgerð út.
*Stk. 4*. Um dagpeningurin ikki verður goldin rættstundis sambært stk. 3, verður renta roknað av kravinum við 0,7% um mánaðin frá 1. degi í tí mánaði, sum kemur eftir, at dagpeningurin skuldi verið goldin, og til goldið er.
*Stk. 5*. Dagpeningur, ið er fallin til gjaldingar, kann, saman við rentum og innkrevjingarkostnaði, verða innheintaður við panting.
*Stk. 6*. Toll- og Skattstova Føroya fremur panting sambært stk. 5 eftir reglunum í skattalógini fyri innkrevjing av skattum.
**§ 21**. Gjøld til sjálvbodnu tryggingina verða eftir nærri reglum ásett av landsstýrismanninum fyri eitt ár í senn. Gjøldini verða ásett í mun til støddina av tryggjaða dagpeninginum soleiðis, at tey samlaðu inngjøldini verða mett at rinda 2/5 av útreiðslunum av sjálvbodnu tryggingunum sambært kap. 7.

**Kapittul 10**

**Umsiting**

**§ 22**. Almannastovan umsitur hesa lóg.
*Stk. 2*. Landsstýrismaðurin kann leggja umsitingina av lógini heilt ella partvíst til annan myndugleika.
**§ 23**. Arbeiðsinntøkan og starvssetanin skal skjalprógvast av arbeiðsgevaranum á umsóknarblað, sum Almannastovan útflýggjar.
*Stk. 2*. Óarbeiðsføri og longdin av óarbeiðsførinum skal skjalprógvast við læknaváttan. Læknaváttanin verður goldin av Almannastovuni.
**§ 24**. Almannastovan kann frá viðkomandi persónum, myndugleikum og feløgum, sum hava innlit í viðurskiftini, krevja upplýsingar, sum mugu metast neyðugar fyri viðgerðina og avgerðina í málinum.
*Stk. 2*. Eftir samráðingar við Føroya læknafelag ásetir landsstýrismaðurin eftir nærri reglum gjøldini fyri og innihaldið í læknaváttanunum.

**Kapittul 11**

**Kærumøguleiki**

**§ 25**. Avgerðir eftir hesi lóg, sum eru tiknar av Almannastovuni ella øðrum myndugleika sambært § 22, stk. 2, kunnu kærast til Kærunevndina í almannamálum innan 4 vikur eftir, at avgerðin er fráboðað viðkomandi.
*Stk. 2*. Um serligar orsøkir tala fyri tí, kann kærunevndin víkja frá kærufreistini.
…“

Kunngerð nr. 63 frá 16. september 2004 um sjálvbodna trygging, sum broytt við kunngerð nr. 24 frá 30. mars 2005, er soljóðandi:

„Við heimild í §§ 15, stk. 2 og 21 í løgtingslóg nr. 74 frá 8. mai 2001 um dagpening vegna sjúku v.m., seinast broytt við løgtingslóg nr. 88 frá 8. mai 2003, verður ásett:

*Persónsskarin*

**§ 1.** Sjálvstøðugt vinnurekandi og fólk, ið gera húsligt arbeiði fyri seg sjálvan og fyri í minsta lagi eitt fólk afturat, kunnu tekna sjálvbodna trygging á Almannastovuni, ið gevur rætt til dagpening og skyldu at rinda tryggingargjald sambært ásetingum í dagpeningalógini og hesi kunngerð.

*Stk. 2.* Við „sjálvstøðugt vinnurekandi" sambært hesi kunngerð er at skilja, at viðkomandi skal virka sum sjálvstøðugur í so stóran mun, at eitt møguligt vanligt løntakaraarbeiði við síðuna av bert er at meta sum viðfáningur.

*Gjald og tíðarskeið*

**§ 2.** Tá tryggingartakarin meldar seg til tryggingarskipanina, verður kravt tryggingargjald fyri tíðarskeiðið frá tilmeldingardegnum og til komandi 31. mars.

*Stk. 2.* Tað fyrsta kravið eftir upptøku verður sent saman við váttanarbrævinum, og skal verða goldið áðrenn 4 vikur frá dagfestingini á váttanarbrævinum at rokna, annars fellir tryggingin burtur.

**§ 3.** Tryggingargjald verður goldið einaferð um árið.

*Stk. 2.* Tryggingargjaldið verður goldið frammanundan fyri tíðarskeiðið frá 1. apríl til og við 31. mars árið eftir.

*Stk. 3.* Krøvini verða send út innan 1. mars. Er tryggingargjaldið ikki goldið í seinasta lagi 16. mai á hvørjum ári, fellur tryggingin burtur.

*Stk. 4.* Almannastovan sendir út áminningarskriv um, at tryggingin fellur burtur sambært stk. 3.

*Stk. 5.* Tryggingartakarin skal kunnast um gjaldstreytirnar, tá ið tryggingin verður teknað.

*Burturfall og útmelding*

**§ 4.** Tá ið ein tryggingartakari meldar seg úr tryggingini ella verður útihýstur úr tryggingarskipanini sambært § 18 í dagpeningalógini, fellur rætturin til dagpening sambært tryggingini burtur við virknaði frá 1. í næstkomandi mánaða.

*Stk. 2.* Við útmelding verður afturrindað ov nógv goldið tryggingargjald.

*Uppafturtøka*

**§ 5**. Ynskir ein tryggingartakari at verða uppafturtikin í tryggingarskipanina, skal hann senda inn nýggja umsókn, ið verður viðgjørd av nýggjum sambært dagpeningalógini og hesi kunngerð.

*Stk. 2*. Almannastovan kann í serligum førum síggja burtur frá kravinum um læknaváttan, sambært § 16 í dagpeningalógini.

Tryggingargjaldið

**§ 6**. Tryggingargjaldið til sjálvbodnu tryggingina sambært § 21 í dagpeningalógini verður fyri tíðarskeiðið 1. apríl 2005 til 31. mars 2006 kr. 3.563.

*Stk. 2*. Landsstýrismaðurin javnar tryggingargjaldið við kunngerð á hvørjum ári sambært § 21 í dagpeningalógini.

Gildiskoma

**§ 8**. Henda kunngerðin kemur í gildi tann 1. november 2004.

Stk. 2. Tryggingartakarar, ið hava rindað partvíst tryggingargjald í 2004, fáa hetta inngjald drigið frá samlaða tryggingargjaldinum sambært § 6, stk. 1.“

## b. 20 mál um sjúkradagpening

Mál nr. 1

Tann 5. juli 2005 móttekur Almannastovan læknaváttan A um óarbeiðsføri hjá einari mammu vegna sjúkt barn. Læknafrágreiðingin ljóðar soleiðis:

> „Sønnen … har haft en byld ved endetarmen og haft meget stort plejebehov.“

Læknin metir, at umsøkjarin hevur verið óarbeiðsførur vegna sjúkt barn frá og við 22.06.05 til og við 03.07.05.

Tann 25. juli 2005 móttekur Almannastovan umsókn um dagpening vegna sjúku. Umsøkjarin hevur útfylt standard umsóknarblað um dagpening frá løntakara í samband við sjúku og skaða. Upplýst verður, at fráveran byrjaði 22. juni 2005.

Tann 25. juli 2005 móttekur Almannastovan inntøkuváttan arbeiðsgevarans. Arbeiðsgevarin upplýsir, at umsøkjarin hevur arbeitt sum … í tíðarskeiðinum frá 30.05.2005 til og við 21.06.2005. Skrivað verður, at til 29.05.05 var umsøkjarin sjúkrameldaður, tí er tað ikki 5 vikur. Inntøkan í hesum tíðarskeiði hevur tilsamans verið kr. 13.600,- uttan frítíðarløn. Umsøkjarin skuldi hildið á fram í arbeiðinum, um barnið ikki gjørdist sjúkt. Umsøkjarin fær partvísa løn undir sjúku og fyrsti sjúkradagur var 22.06.2005.

Tann 3. august 2005 varð umsóknin noktað og Almannastovan sendi soljóðandi avgerð til umsøkjaran:

**„Vísandi til læknaváttan dagfest 30.06.05 og til umsókn tygara dagfest 21.07.05**

Tygum eru sjúkrameldað vegna sjúkt barn. Tað framgongur ikki av læknaváttanini, at álvarsligur vandi er fyri lívinum ella heilsustøðuni hjá barninum, og koma tygum tí ikki undir dagpeningalógina, vísandi til **§ 3, stk. 3 og stk. 4** í dagpeningalógini, sum er viðlagt hesum skrivi.

Læknin skal ávísa, hví tað verður mett alneyðugt, at verða um tann sjúka, ella hvør tann álvarsligi vandin er fyri lívinum ella heilsuni hjá tí sjúka, fyri at dagpeningur kann verða veittur.

Tygum hava møguleika at søkja um forsorgarhjálp vendi tygum tá til Almannastovuna.

Henda avgerð kann innan 4 vikur kærast til Føroya Kærustovn, Skálatrøð 20, Postboks 45, 100 Tórshavn."

Mín viðmerking:

*Í hesum máli verður umsókn um dagpening noktað. Tá ið ein umsókn verður noktað, skal umsøkjarin hava eina grundgeving og kæruvegleiðing sambært §§ 21 og 24 í fyrisitingarlógini. Eftir mínari meting verður nøktandi grundgeving og kæruvegleiðing givin í skrivi, dagfest 3. august 2005.*

*Samlaða málsviðgerðartíðin, frá tí at umsókn er innkomin til avgerð er tikin, er 9 dagar.*

Mál nr. 2

Tann 20. juli 2005 móttekur Almannastovan umsókn um dagpening vegna sjúku frá einari kvinnu, ið er 36 ára gomul. Umsøkjarin hevur útfylt umsóknarblað um dagpening frá fólki, sum er tilmeldað sjálvbodnu dagpeningaskipanini sum sjálvstøðug vinnurekandi ella húsarhaldsfólk.

Upplýst er, at fráveran er orsakað av skaða. Upplýst verður, at fráveran byrjaði 18. juli 2005. Á umsóknarblaðnum váttar umsøkjarin, at hann burturav ella í mestan mun er sjálvstøðugt vinnurekandi.

Tann 21. juli 2005 móttekur Almannastovan læknaváttan A. Í læknaváttanini stendur:

*at* umsøkjarin er óarbeiðsførur frá og við 18.07.05 til og við 01.08.05,

*at* óarbeiðsførið er fult og

*at* fráveran er íkomin av sjúku annars.

Tann 3. august 2005 er soljóðandi innanhýsis notat skrivað í málið á Almannastovuni:

„Læknaváttan innkomin 21.07.05 og umsókn innkomin 20.07.05.

Dagpeningur er játtaður frá 18.07.05 til 01.08.05 kr. 3.613,- um vikuna írokna frítíðarløn, sum samb. dagpengalógina § 9, stk. 2 er dagpengahámarki.

Umsøkjarin er tryggjað sum sjálvstøðug og hevur goldið gjaldið rættstundis."

Tann 3. august 2005 verður umsóknin játtað og soljóðandi bræv sent umsøkjaranum:

**„Viðvíkjandi dagpeningi vegna sjúku/skaða**

Vísandi til umsókn tygara um dagpening/leingjan av dagpeningaskeiðnum verður við hesum sagt frá at, at avgjørt er at játta tygum dagpening í tíðarskeiðnum frá 18.07.2005 til 01.08.2005 við kr. 3.613,00 fyri hvørja heila arbeiðsviku. Her er íroknað frítíðarløn, sum ikki verður útgoldin, men fer í grunn til seinni útgjaldingar.

Játtanin er tó givin við fyrivarni sambært § 2 stk. 3 í dagpeningalógini, sum er soljóðandi:

*Dagpeningur verður tó ikki veittur í tann mun viðkomandi, sambært lóg, trygging ella sáttmála frá arbeiðsgevara ella øðrum, hevur rætt til løn undir sjúku v.m. ella aðrar veitingar, sum eru endurgjald fyri mista inntøku vegna sjúku v.m.*

Dagpeningurin er útroknaður við støði í upplýsingum frá arbeiðsgevara tygara.

Grundarlagið fyri útrokningarnar av dagpeninginum er vanliga 5 tær seinastu vikurnar undan fráveruni. Í serligum førum kann eitt annað tíðarskeið tó liggja til grund fyri útrokningini (§ 8 í dagpengalógini). Dagpeningur verður útgoldin fyri allar vanligar arbeiðsdagar, t.v.s. at leygar-, sunnu- og halgidagar ikki geva rætt til dagpening.

Dagpeningaveitingin er væntaða mista arbeiðsinntøkan, tó í mesta lagi 80% av lønini sambært sáttmála millum Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag (§ 9).

Um tygum framhaldandi eru sjúk/ur aftaná omarfyrinevnda tíðarskeið, skulu tygum venda tygum til lækna og senda inn eina nýggja læknaváttan.

Eru tygum arbeiðsleys / ur, skal avrit av hesum brævi sendast til Arbeiðsloysisskipanina.

Um tygum hava spurningar til omanfyri standandi ella eru í iva um útrokningargrundarlagið ella annað, eru tygum vælkomin til at seta tygum í samband við undirritaða/u ella deildina hjá Almannastovuni í økinum, har tygum búgva.

Avgerðin kann innan 4 vikur frá tí tygum hava móttikið hetta skriv kærast til Føroya Kærustovn, Skálatrøð 20, Postsmoga 45, 100 Tórshavn."

Mín viðmerking:
*Í hesum málinum eru ongar upplýsingar um inntøkuna hjá umsøkjaranum. Men í hesum málinum eru inntøkuupplýsingarnar irrelevantar, av tí at tað av § 15, stk. 1 í dagpeningalógini framgongur, at persónar, sum burturav ella í mestan mun eru sjálvstøðug vinnurekandi, kunnu tekna trygging við fullari dagpeningaupphædd sambært § 9, stk. 2. Samlaða málsviðgerðartíðin frá tí, at umsókn er innkomin til avgerð er tikin er 14 dagar.*

*Almannastovan sær út til at nýta standardskriv, tá hon svarar umsøkjarunum. Hetta havi eg einki at siga til, tí standardskriv kunnu vera praktisk og spara arbeiðsorku. Men júst hetta málið er eitt gott dømi um, hvussu standardskriv ikki eiga at verða nýtt. Talan er um ein sjálvstøðugan vinnurekandi, sum hevur teknað sjálvstøðuga trygging, og harvið hevur rætt til fulla dagpeningaupphædd undir sjúku. Kortini verður sagt í skrivinum, at dagpeningurin er útroknaður við støði í upplýsingum frá arbeiðsgevaranum, eins og fyrivarni verður tikið fyri, at umsøkjarin fær løn undir sjúku v.m. Hetta samsvarar als ikki við støðuna hjá umsøkjaranum, og sigur honum tí einki um støðu hansara. Hetta haldi eg vera óheppið.*

<u>Mál nr. 3</u>
Tann 5. juli 2005 móttekur Almannastovan umsókn um dagpening vegna sjúku frá einum manni, ið er 66 ára gamal. Umsøkjarin hevur útfylt standard umsóknarblað um dagpening frá løntakara í samband við sjúku og skaða. Upplýst verður, at fráveran byrjaði 1. juni 2005.

Tann 5. juli 2005 móttekur Almannastovan inntøkuváttan arbeiðsgevarans. Arbeiðsgevarin upplýsir, at umsøkjarin hevur arbeitt frá 26.04.2005 til og við 23.05.2005 í tilsamans 24 dagar. Inntøka um-

søkjarans hevur hesa tíðina verið tilsamans kr. 47.800,54. Arbeiðið skuldi halda áfram, um viðkomandi ikki gjørdist sjúkur. Umsøkjarin skuldi verið farin til skips aftur 07.06.2005.

Tann 12. juli 2005 móttekur Almannastovan eina læknaváttan B. Frágreiðingin frá læknanum ljóðar soleiðis:

„Er skurðviðgjørdur á báðum fótum.

(Rætting) skuldi verða sjúkrameldaður 1/6-1/7 og ikki frá 15/6, sum áður upplýst."

Læknin upplýsir eisini, at óarbeiðsførið er fult.

Tann 3. august 2005 er soljóðandi notat skrivað:

„Læknaváttanir innkomnar 28.06., 05.07. og 12.07.05. Umsókn innkomin 05.07.05.

Sjúkralegan er frá 01.06.05 til og við 01.07.05. Ums. skuldi avstað aftur tann 07.06.05 um hann ikki gjørdist sjúkur og hevur sostatt fyrst inntøkumiss og fær dagpening frá hesum degi.

Útrokningargrundarlagið er kr. 47.800,54/24 x 5 = kr. 9.958,-. Íroknað frítíðarløn gevur hetta kr. 3.613,- um vikuna.

Smb. dagpengalógini § 9, stk. 2 rakar dagpengamóttakarin dagpengahámarki á kr. 3.613,- um vikuna. Hann hevur sostatt ikki rætt til meira enn kr. 3.613,-, um vikuna."

Tann 3. august 2005 verður avgerðin send umsøkjaranum. Brot úr skrivinum er soljóðandi:

**„Viðvíkjandi dagpeningi vegna sjúku/skaða**

Vísandi til umsókn tygara um dagpening/leingjan av dagpeningaskeiðnum verður við hesum sagt frá at, at avgjørt er at játta tygum dagpening í tíðarskeiðnum frá 07.06.2005 til 01.07.2005 við kr. 3.613,00 fyri hvørja heila arbeiðsviku. Her er íroknað frítíðarløn, sum ikki verður útgoldin, men fer í grunn til seinni útgjaldingar.

…

Avgerðin kann innan 4 vikur frá tí tygum hava móttikið hetta skriv kærast til Føroya Kærustovn, Skálatrøð 20, Postsmoga 45, 100 Tórshavn."

Tann 3. august 2005 verður ein rokning til arbeiðsgevaran áljóðandi kr. 1.445,20 fyri 1. og 2. sjúkradag útskrivað á Almannastovuni. Samlaða málsviðgerðartíðin, frá tí at umsókn er innkomin, til avgerð er tikin, er ein knappur mánaður.

Mál nr. 4

Tann 1. juli 2005 móttekur Almannastovan skriv viðvíkjandi „avrokning av sjúkratrygd“ frá Lønjavningarstovuni (Fiskimálaráðnum) fyri tíðarskeiðið 18. apríl 2005 til 1. juli 2005. Talan er um ein mann, ið er 64 ára gamal.

Tann 14. juli 2005 móttekur Almannastovan læknaváttan í málinum. Læknin metti, at umsøkjarin var óarbeiðsførur frá og við 13.04.05 til og við 02.09.05, og at óarbeiðsførið var fult.

Tann 21. juli 2005 móttekur Almannastovan umsókn um dagpening vegna sjúku. Umsøkjarin hevði útfylt standard umsóknarblað um dagpening frá løntakara í samband við sjúku og skaða. Upplýst varð, at fráveran byrjaði 29. mars 2005.

Tann 21. juli 2005 móttekur Almannastovan inntøkuváttan frá arbeiðsgevaranum fyri sjófólk. Arbeiðsgevarin upplýsir, at umsøkjarin hevði arbeitt frá 19.02.2005 til og við 28.03.2005 í tilsamans 26 dagar og hevði inntøkan í hesum tíðarskeiði verið tilsamans kr. 60.437,93. Eisini er upplýst, at umsøkjarin skuldi hildið áfram at arbeitt, um viðkomandi ikki gjørdist sjúkur, og at hann skuldi verið farin til skips aftur beinanvegin.

Tann 2. august 2005 varð soljóðandi notat skrivað í málið á Almannastovuni:

„Læknaváttan er innkomin 14.07.05 og umsókn innkomin 21.07.05.

Dagpeningur er játtaður frá 04.07.05 til 02.09.05 við kr. 3.613,- um vikuna írokna fríðtíðarløn.

Útrokningargrundarlagið er 16.459,02 x 3 mán./13 vikur = 3. 798,-.

Íroknað frítíðarløn gevur hetta kr. 3.613,- um vikuna.

Smb. dagpengalógini § 9, stk. 2 rakar dagpengamóttakarin dagpengahámarki á kr. 3.613,- um vikuna. Hann hevur sostatt ikki rætt til meira enn kr. 3.613,- um vikuna.“

Sama dag varð soljóðandi notat eisini skrivað í málið:

„Umsøkjarin hevur fingið løn úr Lønjavningarstovuni til og við 01.07.05 og fær dagpening frá 04.07.05 at rokna.“

Viðmerkjast kann, at tann 2. og 3. juli eru ávikavist leygardagur og sunnudagur.

Tann 3. august 2005 varð umsóknin játtað. Brot úr skrivinum til umsøkjaran er soljóðandi:

**„Viðvíkjandi dagpeningi vegna sjúku / skaða**

Vísandi til umsókn tygara um dagpening/leingjan av dagpeningaskeið-

num verður við hesum sagt frá at, at avgjørt er at játta tygum dagpening í tíðarskeiðnum frá 04.07.2005 til 02.09.2005 við kr. 3.613,00 fyri hvørja heila arbeiðsviku. Her er íroknað frítíðarløn, sum ikki verður útgoldin, men fer í grunn til seinni útgjaldingar.

…

Avgerðin kann innan 4 vikur frá tí tygum hava móttikið hetta skriv kærast til Føroya Kærustovn, Skálatrøð 20, Postsmoga 45, 100 Tórshavn.“

Tann 2. august 2005 verður rokning til arbeiðsgevaran fyri 1. og 2. sjúkradag áljóðandi kr. 1.445,20 útskrivað á Almannastovuni. Samlaða málsviðgerðartíðin, frá tí at umsókn er innkomin, til avgerð er tikin, er 13 dagar.

Mál nr. 5

Tann 4. juli 2005 móttekur Almannastovan læknaváttan A um óarbeiðsføri viðvíkjandi einum 63 ára gomlum manni. Læknin metir, at umsøkjarin er óarbeiðsførur frá og við 30.06.05 til og við 08.07.05. Upplýst verður, at óarbeiðsførið er fult.

Tann 15. juli 2005 móttekur Almannastovan umsókn um dagpening vegna sjúku. Umsøkjarin hevði útfylt standard umsóknarblað um dagpening frá løntakara í samband við sjúku og skaða. Upplýst verður, at fráveran byrjaði 30. juni 2005.

Inntøkuváttan frá arbeiðsgevaranum liggur í málinum. Arbeiðsgevarin upplýsir, at umsøkjarin hevði arbeitt hjá honum frá 27/06 2005 til og við 30/6 2005 í tilsamans 28 tímar. Inntøkan í hesum tíðarskeiðnum var tilsamans kr. 3.387,16. Umsøkjarin hevði verið í hesum starvi síðani 27.06.2005, og fyrsti fráverudagur var 30. juni 2005. Umsøkjarin skuldi halda á fram í arbeiðinum, um hann ikki gjørdist sjúkur.

Tann 2. august 2005 varð soljóðandi notat skrivað:

„Læknaváttan innkomin 04.07.05 og umsókn innkomin 15.07.05.

Dagpeningur er játtaður frá 30.06.05 til 08.07.05 við kr. 3.613,- um vikuna í rokna frítíðarløn.

Útrokningargrundarlagið er kr. 3.387,16/4x5 = kr. 4.234,-. Íroknað frítíðarløn gevur hetta kr. 3.613 um vikuna.

Smb. dagpengalógini § 9, stk.2 rakar dagpengamóttakarin dagpengahámarki á kr. 3.613,-, um vikuna.

Umsøkjarin hevur verið í starvið í 4 dagar áðrenn hann gjørdist sjúkur, men treytirnar í dagpeningalógini samb. § 7 eru uppfyltar og útrokningin framd samb. § 8 stk. 2."

Tann 3. august 2005 varð umsóknin játtað. Brot úr skrivinum til umsøkjaran var soljóðandi:

„**Viðvíkjandi dagpeningi vegna sjúku / skaða**

Vísandi til umsókn tygara um dagpening / leingjan av dagpeningaskeiðnum verður við hesum sagt frá at, at avgjørt er at játta tygum dagpening í tíðarskeiðnum frá 30.06.2005 til 08.07.2005 við kr. 3.613,00 fyri hvørja heila arbeiðsviku. Her er íroknað frítíðarløn, sum ikki verður útgoldin, men fer í grunn til seinni útgjaldingar.

. . .

Avgerðin kann innan 4 vikur frá tí tygum hava móttikið hetta skriv kærast til Føroya Kærustovn, Skálatrøð 20, Postsmoga 45, 100 Tórshavn."

Mín viðmerking:

*Tað framgongur ikki av málinum, hvørt ein rokning er send arbeiðsgevaranum fyri 1. og 2. fráverudag í hesum máli, sambært § 20, stk. 2 í dagpeningalógini. Eg fari at spyrja Almannastovuna, hví rokning eftir øllum at døma ikki varð send arbeiðsgevaranum í hesum førinum.*

*Samlaða málsviðgerðartíðin, frá tí at umsókn er móttikin, til avgerð er tikin, er 19 dagar.*

<u>Mál nr. 6</u>

Tann 22. juni 2005 móttekur Almannastovan læknaváttan A við sjúkuupplýsingum viðvíkjandi einum manni, ið er 60 ára gamal. Læknin metir umsøkjaran verða óarbeiðsføran frá og við 13.06.2005 til og við 26.06.2005. Upplýst er, at óarbeiðsførið er fult.

Tann 18. juli 2005 móttekur Almannastovan umsókn um dagpening vegna sjúku. Umsøkjarin hevur útfylt standard umsóknarblað um dagpening frá løntakara í samband við sjúku og skaða. Á umsóknarblaðnum hevur umsøkjarin viðmerkt, at hann er uppsagdur. Upplýst verður, at fráveran byrjaði 13. juni 2005.

Tann 18. juli 2005 móttekur Almannastovan inntøkuváttan frá Arbeiðsloysisskipanini. Upplýst er, at umsøkjarin síðstu 5 vikurnar – frá 09.05.2005 til og við 12.06.2005 hevur havt eina inntøku uppá tilsamans kr. 13.674,24.

Tann 2. august 2005 verður soljóðandi notat skrivað:

„Læknaváttan innkomin 22.06.05 og umsókn innkomin 18.07.05.

Dagpeningur er játtaður frá 13.06.05 til 26.06.05 við kr. 3.063,- um vikuna írokna frátíðarløn.

Útrokningargrundarlagið er kr. 13.674,24/25 x 5 = 2.735,- Íroknað frítíðarløn gevur hetta kr. 3.063,- um vikuna.

Inntøkugrundarlagið er samb. inntøkuváttan frá ALS."

Tann 3. august verður avgerðin send umsøkjaranum. Brot úr skrivinum er soljóðandi:

**„Viðvíkjandi dagpeningi vegna sjúku/skaða**

Vísandi til umsókn tygara um dagpening/leingjan av dagpeningaskeiðnum verður við hesum sagt frá at, at avgjørt er at játta tygum dagpening í tíðarskeiðnum frá 13.06.2005 til 24.06.2005 við kr. 3.063,00 fyri hvørja heila arbeiðsviku. Her er íroknað frítíðarløn, sum ikki verður útgoldin, men fer í grunn til seinni útgjaldingar.

…

Avgerðin kann innan 4 vikur frá tí tygum hava móttikið hetta skriv kærast til Føroya Kærustovn, Skálatrøð 20, Postsmoga 45, 100 Tórshavn.

Vinarliga"

Samlaða málsviðgerðartíðin, frá tí at umsókn er innkomin, til avgerð verður tikin, er 16 dagar.

<u>Mál nr. 7</u>

Tann 8. juli 2005 móttekur Almannastovan læknaváttan B, viðvíkjandi framhaldandi- og langtíðarhjálp eftir dagpeningalógini. Talan er um ein 40 ára gamlan mann. Í læknaváttanini stendur m.a.:

„Óarbeiðsføri er: Fult

…

Fyrsti sjúkradagur var frá og við 08.06.05.

Eg meti sjúklingin framhaldandi óarbeiðsføran til og við 10.07.05. „

Tann 14. juli 2005 móttekur Almannastovan umsókn um dagpening vegna sjúku. Umsøkjarin hevur útfylt standard umsóknarblað um dagpening frá løntakara í samband við sjúku og skaða. Upplýst verður, at fráveran byrjaði 8. juni 2005.

Tann 25. juli 2005 móttekur Almannastovan soljóðandi skriv frá Arbeiðsloysisskipanini:

**„Viðvíkjandi fyrispurningi um útgjald**

Arbeiðsloysisskipanin hevur tann 18.07.2005 móttikið fyrispurning tykkara viðvíkjandi umsøkjara.

Í hesum sambandi kann arbeiðsloysisskipanin upplýsa fylgjandi:

Hevur fingið útgoldið kr. 11.711,28 í arbeiðsloysisstuðli seinastu 5 vikurnar

Viðmerkingar:

Umsøkjarin hevur ein dagsats áljóðandi kr. 557,68.

Skeið 09/2005 er skert vegna frítíðarløn."

Tann 1. august 2005 er soljóðandi notat skrivað:

„Læknaváttan innkomin 08.07.05 og umsókn innkomin 14.07.05 og váttan frá ALS 25.07.05.

Dagpeningur er játtaður frá 08.06.05 til 10.07.05 við kr. 2.623,- um vikuna írokna frátíðarløn og er hetta samb. váttan frá ALS.

Útrokningargrundarlagið er 11.711,28/25x5 = 2.342,-. Íroknað frítíðarløn gevur hetta kr. 2.623,- um vikuna."

Tann 3. august 2005 verður avgerðin send umsøkjaranum. Brot úr skrivinum er soljóðandi:

**„Viðvíkjandi dagpeningi vegna sjúku/skaða**

Vísandi til umsókn tygara um dagpening / leingjan av dagpeningaskeiðnum verður við hesum sagt frá at, at avgjørt er at játta tygum dagpening í tíðarskeiðnum frá 08.06.2005 til 08.07.2005 við kr. 2.623,00 fyri hvørja heila arbeiðsviku. Her er íroknað frítíðarløn, sum ikki verður útgoldin, men fer í grunn til seinni útgjaldingar.

…

Avgerðin kann innan 4 vikur frá tí tygum hava móttikið hetta skriv kærast til Føroya Kærustovn, Skálatrøð 20, Postsmoga 45, 100 Tórshavn."

Mín viðmerking:

*Tað framgongur av skrivinum frá Arbeiðsloysisskipanini, dagfest 25. juli 2005, at Almannastovan hevur sett ALS fyrispurning um inntøkuna hjá umsøkjaranum.*

*Sambært § 24, stk. 1 í dagpeningalógini kann Almannastovan innheinta neyðugar upplýsingar frá viðkomandi myndugleikum. Tað er í tráð við hesa áseting, at Almannastovan innheintar upplýsingar uttan samtykki frá umsøkjarum í dagpeningamálum.*

*Skriv við fyrispurningi frá Almannastovuni til Arbeiðsloysisskipanina liggur ikki í málinum. Einki notat liggur heldur í málinum um, at fyrispurningurin er settur telefoniskt. Almannastovan hevur notatskyldu sambært § 6, stk. 1 í innlitslógini, men í hesum førinum síggjast upplýsingarnir um inntøku í skrivinum frá Arbeiðsloysisskipanini og tí*

*meti eg ikki, at tað var neyðugt at gera notat um hetta málsviðgerðarstig, jb. § 6, stk. 1, síðsta punktum í innlitslógini.*

*Samlaða málsviðgerðartíðin, frá tí at umsóknin er móttikin, til avgerð verður tikin, er 20 dagar.*

<u>Mál nr. 8</u>

Í hesum málinum móttekur Almannastovan tríggjar læknaváttanir A um óarbeiðsføri frá einum manni, ið er 26 ára gamal. Tann 21. juni 2005 móttekur Almannastovan fyrstu læknaváttanina. Í læknaváttanini stendur m.a.:

> „Óarbeiðsføri: Fult
>
> …
>
> Eg meti sjúklingin óarbeiðsføran frá og við 17/06 til og við 23/06/05.“

Tann 24. juni 2005 móttekur Almannastovan ta næstu læknaváttanina. Í læknaváttanini stendur m.a.:

> „Óarbeiðsføri: Fult
>
> …
>
> Eg meti sjúklingin óarbeiðsføran frá og við 24/6 til og við 30.06.05.“

Tann 1. juli 2005 móttekur Almannastovan ta síðstu læknaváttanina. Í læknaváttanini stendur m.a.:

> „Óarbeiðsføri: Fult
>
> …
>
> Eg meti sjúklingin óarbeiðsføran frá og við 1/7 til og við 05.07.05.“

Tann 20. juli 2005 móttekur Almannastovan umsókn um dagpening vegna sjúku. Umsóknin er dagfest 1. juli 2005. Umsøkjarin hevur útfylt standard umsóknarblað um dagpening frá løntakara í samband við sjúku og skaða. Upplýst verður, at fráveran byrjaði 17. juni 2005.

Tann 20. juli 2005 móttekur Almannastovan inntøkuváttan frá arbeiðsgevara. Í váttanini verður upplýst, at frá 12.05.2005 til og við 16.06.2005 hevur umsøkjarin arbeitt tilsamans 161 tímar, og inntøkan hevur verið kr. 16.351,10 í hesum tíðarskeiðnum. Fyrsti fráverudagur var 17. juni 2005. Hendan dagin arbeiddi hann tó 3 tímar.

Tann 2. august verður soljóðandi notat skrivað:

> „Læknaváttan innkomin ml. 21. juni og 11. juli og umsókn innkomin 20. juli 2005.

Dagpeningur er játtaður frá 17.06.05 til 05.07.05 við kr. 3.613,- um vikuna írokna frítíðarløn.

Útrokningargrundarlagið er (kr. 16.531/25) x 5 = 3.270. Íroknð frítíðarløn gevur hetta 3.613,- um vikuna."

Tann 3. august 2005 verður avgerðin send umsøkjaranum. Í skrivinum stendur m.a.:

**„Viðvíkjandi dagpeningi vegna sjúku/skaða**

Vísandi til umsókn tygara um dagpening/leingjan av dagpeningaskeiðnum verður við hesum sagt frá at, at avgjørt er at játta tygum dagpening í tíðarskeiðnum frá 17.06.2005 til 05.07.2005 við kr. 3.613,00 fyri hvørja heila arbeiðsviku. Her er íroknað frítíðarløn, sum ikki verður útgoldin, men fer í grunn til seinni útgjaldingar.

…

Avgerðin kann innan 4 vikur frá tí tygum hava móttikið hetta skriv kærast til Føroya Kærustovn, Skálatrøð 20, Postsmoga 45, 100 Tórshavn."

Tann 2. august 2005 verður ein rokning til arbeiðsgevara útskrivað á Almannastovuni. Rokningin er fyri 1. og 2. fráverudag. Samlaða málsviðgerðartíðin, frá tí at umsókn er móttikin, til avgerð er tikin, er 14 dagar.

Mál nr. 9

Tann 26. apríl 2005 móttekur Almannastovan læknaváttan A viðvíkjandi óarbeiðsføri hjá einum 40 ára gomlum manni. Í læknaváttanini verður skrivað, at læknin metir umsøkjaran at verða óarbeiðsføran frá og við 18.04.05 til og við 22.04.05. Teigurin viðvíkjandi, hvørt óarbeiðsførið er fult er ikki útfyltur. Eingin frágreiðing er um sjúkuorsøk ella diagnosu.

Tann 8. juli 2005 móttekur Almannastovan umsókn um dagpening vegna sjúku. Umsøkjarin hevur útfylt standard umsóknarblað um dagpening frá løntakara í samband við sjúku og skaða. Upplýst verður, at fráveran byrjaði 18. apríl 2005.

Tann 8. juli 2005 móttekur Almannastovan inntøkuváttan frá arbeiðsgevara. Inntøkuváttanin er dagfest 26. juni 2005. Í henni stendur, at umsøkjarin hevur arbeitt frá 07.03.2005 til og við 15.04.2005 í tilsamans 205 tímar, og hevur hetta tíðarskeiðið havt eina inntøku áljóðandi kr. 23.575,-. Viðmerkt er eisini, at fyrsti fráverudagur var 18. apríl 2005. Umsøkjarin hevur verið í starvi síðani 13. januar 2003.

Tann 2. august 2005 verður soljóðandi notat skrivað:

„Læknaváttan innkomin 26.04.05 og umsókn innkomin 02.08.05. (mín viðmerking: umsóknarblaðið er móttøkustemplað 08.07.05)

Dagpeningur er játtaður frá 18.04.05 til 22.04.05 við kr. 3.613,- um vikuna írokna frítíðarløn.

Útrokningargrundarlagið er (kr. 23.575/30)x5 = 3.929.

Smb. dagpengalógini § 9, stk. 2 rakar dagpengamóttakarin dagpengahámarki á kr. 3.613,- um vikuna. Hann (hevur) tískil ikki rætt til meir enn kr. 3.613,-, um vikuna.“

Tann 3. august 2005 verður umsóknin játtað. Í skrivinum til umsøkjaran stendur m.a.:

**„Viðvíkjandi dagpeningi vegna sjúku / skaða**

Vísandi til umsókn tygara um dagpening/leingjan av dagpeningaskeiðnum verður við hesum sagt frá at, at avgjørt er at játta tygum dagpening í tíðarskeiðnum frá 18.04.2005 til 22.04.2005 við kr. 3.613,00 fyri hvørja heila arbeiðsviku. Her er íroknað frítíðarløn, sum ikki verður útgoldin, men fer í grunn til seinni útgjaldingar.

…

Avgerðin kann innan 4 vikur frá tí tygum hava móttikið hetta skriv kærast til Føroya Kærustovn, Skálatrøð 20, Postsmoga 45, 100 Tórshavn.“

Tann 2. august 2005 verður rokning útskrivað til arbeiðsgevaran fyri 1. og 2. fráverudag. Rokningin er áljóðandi kr. 1445,20.

Mín viðmerking:

*Læknin hevur í hesum málinum ikki upplýst, hvørt óarbeiðsførið var fult. Hetta er ikki í tráð við § 23, stk. 2 í dagpeningalógini.*

*Samlaða málsviðgerðartíðin, frá tí at umsókn er móttikin, til avgerð er tikin, er 26 dagar.*

<u>Mál nr. 10</u>

Tann 12. juli 2005 móttekur Almannastovan læknaváttan B, skrivað av einum lækna á skaðastovu í samband við arbeiðsskaða. Talan er um ein 27 ára gamlan mann. Í læknaváttanini stendur m.a.:

„Óarbeiðsføri er: Fult

…

Læknin metir umsøkjaran vera óarbeiðsføran frá og við 08.07.2005 til og við 01.08.2005.“

Tann 20. juli 2005 móttekur Almannastovan umsókn um dagpening vegna arbeiðsskaða. Umsøkjarin er tryggjaður fyri arbeiðsskaða. Umsøkjarin hevur útfylt standard umsóknarblað um dagpening frá løntakara í samband við sjúku og skaða. Upplýst verður, at fráveran byrjaði 8. juli 2005.

Tann 20. juli 2005 móttekur Almannastovan inntøkuváttan frá arbeiðsgevara. Arbeiðsgevarin upplýsir, at umsøkjarin hevur arbeitt frá 03.06.2005 til og við 07.07.2005 í tilsamans 231 tímar, og inntøkan í hesum tíðarskeiði var áljóðandi kr. 26.218,-. Harumframt er eisini upplýst, at umsøkjarin hevur verið í starvi síðani 01.12.1997, og at fyrsti fráverudagur var 8. juli 2005.

Tann 2. august 2005 verður soljóðandi notat skrivað:

> „Læknaváttan innkomin 12.07.05 og umsókn innkomin 20.07.05.
>
> Dagpeningur er játtaður frá 08.07.05 til 21.07.05 við kr. 3.613,- um vikuna írokna frítíðarløn.
>
> Útrokningargrundarlagið er (kr.26.218/25)x5 = 5.244.
>
> Smb. dagpengalógini § 9, stk. 2 rakar dagpengamóttakarin dagpengahámarki á kr. 3.613,- um vikuna. Hann (hevur) tískil ikki rætt til meir enn kr. 3.613,-, um vikuna.
>
> Orsaka av at talan er um arbeiðsskaða, skal Almannastovan gjalda fyri teir fyrstu 14 dagarnar. Hetta er orsaka av at tryggingin fyrst tekur við eftir 14 dag."

Tann 2. august 2005 verður eisini soljóðandi notat skrivað í málið:

> „Eftir at hava eftirkanna í T&S um umsøkjarin hevur havt løn í sjúkutíðarskeiðinum vísir tað seg at umsøkjarin hevur fingið fulla løn fyri juli 2005.
>
> Vitandi um at SMS hevur serligar reglur, tá tað kemur til arbeiðsskaðar havi eg í dag kontakta SMS fyri at fáa greiði á hví hann hevur fingið løn meðan hann er sjúkur.
>
> Frágreiðingin er at tey ikki vildu hava hann at ganga uttan løn meðan viðgerðin fór fram á Almannastovuni og tryggingini. Tá Almannastovan og tryggingin fara at veita honum pening verður hann trektur í løn hjá SMS.
>
> Kvinnan eg tosaði við boðaði frá at umsøkjarin verður trektur í løn fyri august mánaða. Eisini boðaði hon frá, at skriv var komi frá tryggingini um at tey vóru í gongd við at viðgera málið."

Tann 2. august 2005 verður soljóðandi skriv sent umsøkjaranum:

> **„Viðvíkjandi umsókn tygara um dagpening, dagfest 18.07.05.**

Tygum søkja um dagpening í samband við skaða. Sambært dagpeningalógini hevur persónur sum hevur rætt til tryggingardagpening, ikki rætt til sjúkradagpening eftir § 2, stk. 3 í dagpeningalógini.

Tá talan er um tryggingarskaða, tekur tryggingin vanliga við frá 15. degi.

Av tí at talan er um skaða, hava vit játtað tygum dagpening frá 08.07.05 til 21.07.05. Tygum verða biðin um at seta tygum í samband við Tryggingarfelagið Føroyar, fyri at kanna um talan er um tryggingarskaða.

Tygum verða biðin um at senda okkum avrit av svarskrivinum frá Tryggingarfelagnum Føroyar so at málið kann verða endaliga avgreitt.

Víst verður til Dagpeningalógina.

Løgtingslóg nr. 74. frá 08. mai 2001 um dagpening vegna sjúku v.m.

Rætturin til dagpening

*Orsøkir*

§ 2, stk. 3. Dagpeningur verður tó ikki veittur í tann mun viðkomandi, sambært lóg, **trygging** ella sáttmála, frá arbeiðsgevara ella øðrum, hevur rætt til løn undir sjúku v.m. ella aðrar veitingar, sum eru endurgjald fyri mista inntøku vegna sjúku v.m.

Henda avgerð kann innan 4 vikur kærast til Føroya Kærustovn, Skálatrøð 20, Postboks 45, 110 Tórshavn.“

Tann 2. august verður rokning útskrivað til arbeiðsgevaran fyri 1. og 2. fráverudag áljóðandi kr. 1445,20.

Tann 3. august 2005 verður soljóðandi avgerð send umsøkjaranum:

**„Viðvíkjandi dagpeningi vegna sjúku/skaða**

Vísandi til umsókn tygara um dagpening/leingjan av dagpeningaskeiðnum verður við hesum sagt frá at, at avgjørt er at játta tygum dagpening í tíðarskeiðnum frá 08.07.2005 til 21.07.2005 við kr. 3.613,00 fyri hvørja heila arbeiðsviku. Her er íroknað frítíðarløn, sum ikki verður útgoldin, men fer í grunn til seinni útgjaldingar.

Játtanin er tó givin við fyrivarni sambært § 2 stk. 3 í dagpeningalógini, sum er soljóðandi:

*Dagpeningur verður tó ikki veittur í tann mun viðkomandi, sambært lóg, trygging ella sáttmála frá arbeiðsgevara ella øðrum, hevur rætt til løn undir sjúku v.m. ella aðrar veitingar, sum eru endurgjald fyri mista inntøku vegna sjúku v.m.*

Dagpeningurin er útroknaður við støði í upplýsingum frá arbeiðsgevara tygara.

Grundarlagið fyri útrokningarnar av dagpeninginum er vanliga 5 tær seinastu vikurnar undan fráveruni. Í serligum førum kann eitt annað tíðarskeið tó liggja til grund fyri útrokningini (§ 8 í dagpengalógini). Dagpeningur verður útgoldin fyri allar vanligar arbeiðsdagar, t.v.s. at leygar-, sunnu- og halgidagar ikki geva rætt til dagpening.

Dagpeningaveitingin er væntaða mista arbeiðsinntøkan, tó í mesta lagi 80% av lønini sambært sáttmála millum Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag (§ 9).

Um tygum framhaldandi eru sjúk/ur aftaná omarfyrinevnda tíðarskeið, skulu tygum venda tygum til lækna og senda inn eina nýggja læknaváttan.

Eru tygum arbeiðsleys/ur, skal avrit av hesum brævi sendast til Arbeiðsloysisskipanina.

Um tygum hava spurningar til omanfyri standandi ella eru í iva um útrokningargrundarlagið ella annað, eru tygum vælkomin til at seta tygum í samband við undirritaða / u ella deildina hjá Almannastovuni í økinum, har tygum búgva.

Avgerðin kann innan 4 vikur frá tí tygum hava móttikið hetta skriv kærast til Føroya Kærustovn, Skálatrøð 20, Postsmoga 45, 100 Tórshavn."

Mín viðmerking:

*Sambært § 19 í dagpeningalógini hava persónar, hvørs mál eru fráboðað Vanlukkutryggingarráðnum sum arbeiðsskaðamál, rætt til dagpening eftir vanligu reglunum í lógini, tvs. dagpening í upp til 40 vikur.*

*§§ 23 og 27 í vanlukkutryggingarlógini eru soljóðandi:*

*„**§ 23**. Dagpengene løber fra den 15. dag efter ulykkestilfældets indtræden, jfr. dog § 27.*

…

***§ 27**. Der ydes ikke dagpenge efter denne anordning for en periode, hvor der ydes dagpenge efter den færøske dagpengelov. Almannastovan giver på begæring Føroya Vanlukkutrygging de fornødne oplysninger til afgørelser efter denne bestemmelse."*

*Í hesum máli verður umsókn um dagpening lutvíst noktað. Vísandi til § 19 í dagpeningalógini og §§ 23 og 27 í vanlukkutryggingarlógini meti eg hesa avgerðina verða skeiva. Eg skal tí mæla til, at hetta málið verður tikið uppaftur til viðgerðar.*

*Samlaða málsviðgerðartíðin, frá tí at umsókn er móttikin, til avgerð er tikin, er 13 dagar.*

Mál nr. 11

Tann 17. juni og 27. juni 2005 er læknaváttan A stemplað, sum móttikin á Almannastovuni. Váttanin er dagfest 10. juni 2005 og er viðvíkjandi óarbeiðsføri hjá einum manni, ið er 60 ára gamal. Læknin metir umsøkjaran óarbeiðsføran frá og við 6. juni 2005 til og við 10. juni 2005. Annars upplýsir læknin, at fráveran er íkomin av „sjúku annars", og at óarbeiðsførið er fult.

Tann 22. juli 2005 móttekur Almannastovan umsókn um dagpening vegna sjúku. Umsøkjarin hevur útfylt standard umsóknarblað um dagpening frá løntakara í samband við sjúku og skaða. Upplýst verður, at fráveran byrjaði 6. juni 2005.

Hjálagt umsóknini er soljóðandi skriv frá umsøkjaranum, dagfest 13. juli 2005:

**„Viðvíkjandi umsókn um dagpening.**

Eg vil her gera vart við, at eg ikki sjálvur fekk at vita hvussu leingi eg skuldi verða sjúkrameldaður. Eg ringdi fleiri ferðir á sjúkrahúsið at spyrja, men eg fekk onki at vita.

Men tá eg framvegis onki hevði fingið at vita um, hvussu leingi eg skuldi verða sjúkrameldaður, fór eg tí til arbeiðis aftur mánadagin vikuna eftir.

So eg var heima frá arbeiði í eina viku, viku 23."

Tann 22. juli 2005 móttekur Almannastovan inntøkuváttan frá arbeiðsgevara. Arbeiðsgevarin upplýsir, at umsøkjarin hevur arbeitt seinastu 5 vikurnar frá 02.05.2005 til og við 03.06.2005 í tilsamans 182 tímar. Inntøkan hetta tíðarskeiðið hevur verið kr. 23.660,- uttan frítíðarløn. Fyrsti fráverudagur var 6. juni 2005, og umsøkjarin hevur starvast hjá arbeiðsgevaranum síðani 1. juli 2003.

Tann 2. august 2005 verður soljóðandi notat skrivað:

„Læknaváttan innkomin 17.06.05 og umsókn innkomin 22. juli 2005.

Dagpeningur er játtaður frá 06.06.05 til 10.06.05 við kr. 3.613,- um vikuna írokna frítíðarløn.

Útrokningargrundarlagið er (kr.23.660/25) x 5 = 4.732.

Smb. dagpengalógini § 9, stk. 2 rakar dagpengmóttakarin dagpengahámarki á kr. 3.613,- um vikuna. Hann hevur tískil ikki rætt til meir enn kr. 3.613,-, um vikuna."

Tann 3. august verður soljóðandi skriv sent umsøkjaranum:

**„Viðvíkjandi dagpeningi vegna sjúku / skaða**

Vísandi til umsókn tygara um dagpening / leingjan av dagpeningaskeiðnum verður við hesum sagt frá at, at avgjørt er at játta tygum dagpening í tíðarskeiðnum frá 06.06.2005 til 10.06.2005 við kr. 3.613,00 fyri hvørja heila arbeiðsviku. Her er íroknað frítíðarløn, sum ikki verður útgoldin, men fer í grunn til seinni útgjaldingar.

…

Avgerðin kann innan 4 vikur frá tí tygum hava móttikið hetta skriv kærast til Føroya Kærustovn, Skálatrøð 20, Postsmoga 45, 100 Tórshavn.“

Tann 2. august 2005 verður ein rokning útskrivað til arbeiðsgevaran fyri 1. og 2. fráverudag áljóðandi kr. 1445,20. Samlaða málsviðgerðartíðin, frá tí at umsóknin er móttikin, til avgerð er tikin, er 12 dagar.

Mál nr. 12

Tann 27. juni 2005 móttekur Almannastovan læknavátttan A, viðvíkjandi óarbeiðsføri hjá einari kvinnu, ið er 64 ára gomul. Læknin upplýsir, at umsøkjarin er skurðviðgjørdur 22.06.2005. Læknin metir umsøkjaran óarbeiðsføran frá og við 22.06.2005 til og við 07.08.2005. Í læknaváttanini stendur eisini, at óarbeiðsførið hjá umsøkjaranum er fult.

Tann 15. juli 2005 móttekur Almannastovan umsókn um dagpening vegna sjúku. Umsøkjarin hevur útfylt standard umsóknarblað um dagpening frá løntakara í samband við sjúku og skaða. Upplýst verður, at fráveran byrjaði 22. juni 2005.

Tann 15. juli 2005 móttekur Almannastovan inntøkuváttan frá Arbeiðssloysisskipanini. ALS upplýsir, at umsøkjarin hevur verið í skipanini frá 18.05.2005 til og 21.06.2005, og hevur hetta tíðarskeiðið havt eina inntøku áljóðandi kr. 10.236,00.

Tann 2. august 2005 verður soljóðandi notat skrivað:

„Læknaváttan innkomin 27.06.05 og umsókn innkomin 15.07.05.

Dagpeningur er játtaður frá 22.06.05 til 07.08.05 við kr. 2.293,- um vikuna írokna frítíðarløn.

Útrokningargrundarlagið er (kr.10.236/25) x 5 = 2.047. Íroknað frítíðarløn gevur hetta 2.293,- um vikuna.“

Tann 3. august 2005 verður soljóðandi skriv sent umsøkjaranum:

**„Viðvíkjandi dagpeningi vegna sjúku/skaða**

Vísandi til umsókn tygara um dagpening/leingjan av dagpeningaskeiðnum verður við hesum sagt frá at, at avgjørt er at játta tygum dagpening í tíðarskeiðnum frá 22.06.2005 til 05.08.2005 við kr. 2.293,00 fyri hvørja

heila arbeiðsviku. Her er íroknað frítíðarløn, sum ikki verður útgoldin, men fer í grunn til seinni útgjaldingar.

…

Avgerðin kann innan 4 vikur frá tí tygum hava móttikið hetta skriv kærast til Føroya Kærustovn, Skálatrøð 20, Postsmoga 45, 100 Tórshavn."

Samlaða málsviðgerðatíðin, frá tí at umsóknin er móttikin til avgerð er tikin, er 19 dagar.

<u>Mál nr. 13</u>

Tann 15. juli 2005 verður læknaváttnan B viðvíkjandi framhaldandi og langtíðarhjálp eftir dagpeningalógini móttikin á Almannastovuni. Talan er um óarbeiðsføri hjá einum 49 ára gomlum manni. Í læknaváttanini stendur m.a.:

„Óarbeiðsføri er: Fult

…

Fyrsti sjúkradagur var 11.07.2005.

Eg meti sjúklingin óarbeiðsføran til 21.08.2005."

Tann 22. juli 2005 móttekur Almannastovan umsókn um dagpening vegna sjúku. Umsøkjarin hevur útfylt standard umsóknarblað um dagpening frá løntakara í samband við sjúku og skaða. Upplýst verður, at fráveran byrjaði 11. juli 2005.

Tann 22. juli 2005 móttekur Almannastovan inntøkuváttan fyri sjófólk frá arbeiðsgevaranum. Arbeiðsgevarin upplýsir, at umsøkjarin hevur verið við skipi frá 07.06.2005 til og við 11.07.2005 í tilsamans 35 dagar. Inntøkan hetta tíðarskeiðið hevur verið kr. 25.624,82. Um umsøkjarin ikki gjørdist sjúkur skuldi hann verið farin umborð aftur 14.07.2005.

Tann 2. august 2005 verður soljóðandi notat skrivað:

„Læknaváttan innkomin 15.07.05 og umsókn innkomin 22.07.05.

Dagpeningur er játtaður frá 14.07.05 (tá hann ætlandi skuldi til skips aftur og hevur ikki inntøkumiss fyrr enn tá) til 21.08.05 við kr. 3.613,- um vikuna írokna frítíðarløn.

Útrokningargrundarlagið er (kr. 25.625/25) x 5 = 5.125,-.

Smb. dagpengalógini § 9, stk. 2 rakar dagpengamóttakarin dagpengahámarki á kr. 3.613,- um vikuna. Hann hevur tískil ikki rætt til meir enn kr. 3.613,-, um vikuna."

Tann 2. august 2005 verður rokning til arbeiðsgevaran fyri 1. og 2. fráverudag útskrivað í málinum.

Tann 3. august 2005 verður soljóðandi skriv sent umsøkjaranum:

**„Viðvíkjandi dagpeningi vegna sjúku/skaða**

Vísandi til umsókn tygara um dagpening/leingjan av dagpeningaskeiðnum verður við hesum sagt frá at, at avgjørt er at játta tygum dagpening í tíðarskeiðnum frá 14.07.2005 til 19.08.2005 við kr. 3.613,00 fyri hvørja heila arbeiðsviku. Her er íroknað frítíðarløn, sum ikki verður útgoldin, men fer í grunn til seinni útgjaldingar.

…

Avgerðin kann innan 4 vikur frá tí tygum hava móttikið hetta skriv kærast til Føroya Kærustovn, Skálatrøð 20, Postsmoga 45, 100 Tórshavn."

Samlaða málsviðgerðartíðin, frá tí at umsókn er móttikin, til avgerð er tikin, er 12 dagar.

Mál nr. 14

Tann 14. juli 2005 móttekur Almannastovan umsókn um dagpening vegna sjúku frá einari kvinnu, ið er 54 ára gomul. Umsøkjarin hevur útfylt standard umsóknarblað um dagpening frá løntakara í samband við sjúku og skaða. Upplýst verður, at fráveran byrjaði 22. juni 2005.

Tann 14. juli 2005 móttekur Almannastovan inntøkuváttan. Arbeiðsgevarin upplýsir, at umsøkjarin hevur arbeitt frá 07.06.2005 til og við 12.07.2005 í tilsamans 73 tímar. Inntøkan hetta tíðarskeiðið var áljóðandi kr. 7.570,- uttan frítíðarløn. Fyrsti fráverudagur var 12.07.2005.

Tann 20. juli 2005 móttekur Almannastovan læknaváttan A um óarbeiðsføri. Í læknaváttanini stendur m.a. soleiðis:

„Óarbeiðsføri er: Fult

…

Læknin metir umsøkjaran óarbeiðsføran frá og við 12.07.05 til og við 24.07.05."

Tann 22. juli 2005 móttekur Almannastovan læknaváttan B viðvíkjandi framhaldandi og langtíðarhjálp eftir dagpeningalógini. Í læknaváttanini stendur m.a. hetta:

„Óarbeiðsføri er: Fult

…

Læknin metir umsøkjaran óarbeiðsføran 12.07.2005 til og við 31.07. 2005."

Tann 1. august 2005 verður soljóðandi notat skrivað:

„Umsókn innkomin 14.07.05 og læknaváttan innkomin 22.07.05.

Dagpeningur er játtaður sambært læknaváttan frá 12.07.05 til 31.07.05 við kr. 1.696,- um vikuna írokna frítíðarløn.

Útrokningargrundarlagið er (kr.7.570/25) x 5 = 1.514,-. Íroknað frítíðarløn gevur hetta kr. 1.696,- um vikuna.“

Tann 3. august 2005 verður soljóðandi skriv sent umsøkjaranum:

**„Viðvíkjandi dagpeningi vegna sjúku / skaða**

Vísandi til umsókn tygara um dagpening/leingjan av dagpeningaskeiðnum verður við hesum sagt frá at, at avgjørt er at játta tygum dagpening í tíðarskeiðnum frá 12.07.2005 til 29.07.2005 við kr. 1.696,00 fyri hvørja heila arbeiðsviku. Her er íroknað frítíðarløn, sum ikki verður útgoldin, men fer í grunn til seinni útgjaldingar.

…

Avgerðin kann innan 4 vikur frá tí tygum hava móttikið hetta skriv kærast til Føroya Kærustovn, Skálatrøð 20, Postsmoga 45, 100 Tórshavn.“

Tann 1. august 2005 verður rokning til arbeiðsgevaran útskrivað fyri 1. og 2. sjúkradag. Samlaða málsviðgerðartíðin, frá tí at umsókn er móttikin, til avgerð verður tikin, er 20 dagar.

Mál nr. 15 – J.nr.: 2004-10/1034

Tann 19. apríl 2005 móttekur Almannastovan læknaváttan A um óarbeiðsføri hjá einum 67 ára gomlum manni, frá kommunulækna. Læknin sjúkrameldar umsøkjaran frá 18.04.2005 til og við 27.05.2005 vegna sjúku annars. Upplýst verður, at óarbeiðsføri er fult.

Tann 26. apríl 2005 móttekur Almannastovan umsókn um dagpening vegna sjúku. Umsøkjarin hevur útfylt standard umsóknarblað um dagpening frá løntakara í samband við sjúku og skaða. Upplýst verður, at fráveran byrjaði 18. apríl 2005.

Tann 26. apríl 2005 móttekur Almannastovan inntøkuváttan frá arbeiðsgevara. Arbeiðsgevarin upplýsir, at umsøkjarin hevur arbeitt hjá honum seinastu fimm vikurnar frá 14.03.2005 til og við 15.04.2005 í tilsamans 156 tímar. Inntøkan hetta tíðarskeiðið hevur verið áljóðandi kr. 17.813,64 uttan frítíðarløn. Fyrsti fráverudagur var 18.04.2005, og umsøkjarin hevur verið í starvi síðani uml. 1997-1998.

Tann 3. mai 2005 verður soljóðandi notat skrivað:

„Umsókn og læknaváttan innkomin 26.04.05.

Dagpeningur játtaður frá 18.04.05 til 27.04.05 við kr. 3613,- um vikuna.

Grundarlag 17.813,64/25 dagar"

Tann 3. mai 2005 verður ein rokning til arbeiðgevaran útskrivað fyri 1. og 2. sjúkradag hjá umsøkjaranum áljóðandi kr. 1.445,20.

Tann 8. juni 2005 móttekur Almannastovn læknaváttan A frá lækna á sjúkrahúsi. Umsøkjarin verður sjúkrameldaður frá og við 06.06.2005 til og við 20.06.2005. Óarbeiðsføri er fult.

Tann 27. juni 2005 móttekur Almannastovan læknaváttan B um framhaldandi og langtíðarhjálp eftir dagpeningalógini frá kommunulækna. Umsøkjarin verður sjúkrameldaður frá og við 18.04.2005 til og við 01.07.2005. Upplýst verður, at óarbeiðsføri er fult.

Tann 29. juni 2005 verður soljóðandi notat skrivað:

„Longd til 01.07.05 samb. læknav T / S Kanna…

**Er Fólkapensionist … OBS"**

Tann 25. juli 2005 móttekur Almannastovan læknaváttan B frá kommunulækna. Umsøkjarin verður sjúkrameldaður frá og við 18.04.2005 til og við 02.09.2005. Óarbeiðsføri er fult.

Tann 2. august 2005 verður soljóðandi notat skrivað:

„Dagpeningurin er longdur til 02.09.05 sambært læknaváttan. Havi eftirkannað T&S um umsøkjarin hevur havt inntøku í sjúkratíðarskeiðinum og er eingin inntøka.

*Hetta er síðsta leinging. Umsøkjarin hevur ikki rætt til dagpening eftir 02.09.05, tá hann her rakar 20 vikurs markið."*

Tann 3. august 2005 verður soljóðandi skriv sent umsøkjaranum:

„Viðvíkjandi dagpeningi vegna sjúku/skaða

Vísandi til umsókn tygara um dagpening/leingjan av dagpeningaskeiðnum verður við hesum sagt frá at, at avgjørt er at játta tygum dagpening í tíðarskeiðnum frá 18.04.2005 til 27.05.2005 við kr. 3.613,00 fyri hvørja heila arbeiðsviku. Her er íroknað frítíðarløn, sum ikki verður útgoldin, men fer í grunn til seinni útgjaldingar.

Játtanin er tó givin við fyrivarni sambært § 2 stk. 3 í dagpeningalógini, sum er soljóðandi:

*Dagpeningur verður tó ikki veittur í tann mun viðkomandi, sambært lóg, trygging ella sáttmála frá arbeiðsgevara ella øðrum, hevur rætt til løn undir sjúku v.m. ella aðrar veitingar, sum eru endurgjald fyri mista inntøku vegna sjúku v.m.*

Dagpeningurin er útroknaður við støði í upplýsingum frá arbeiðsgevara tygara.

Grundarlagið fyri útrokningarnar av dagpeninginum er vanliga 5 tær seinastu vikurnar undan fráveruni. Í serligum førum kann eitt annað tíðarskeið tó liggja til grund fyri útrokningini (§ 8 í dagpengalógini). Dagpeningur verður útgoldin fyri allar vanligar arbeiðsdagar, t.v.s. at leygar-, sunnu- og halgidagar ikki geva rætt til dagpening.

Dagpeningaveitingin er væntaða mista arbeiðsinntøkan, tó í mesta lagi 80% av lønini sambært sáttmála millum Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag (§ 9).

Um tygum framhaldandi eru sjúk / ur aftaná omanfyrinevnda tíðarskeið, skulu tygum venda tygum til lækna og senda inn eina nýggja læknaváttan.

Eru tygum arbeiðsleys / ur, skal avrit av hesum brævi sendast til Arbeiðsloysisskipanina.

Um tygum hava spurningar til omanfyri standandi ella eru í iva um útrokningargrundarlagið ella annað, eru tygum vælkomin til at seta tygum í samband við undirritaða/u ella deildina hjá Almannastovuni í økinum, har tygum búgva.

Avgerðin kann innan 4 vikur frá tí tygum hava móttikið hetta skriv kærast til Føroya Kærustovn, Skálatrøð 20, Postsmoga 45, 100 Tórshavn."

<u>Mín viðmerking:</u>
Av notatunum í málinum skilst, at dagpeningajáttanin verður longd so hvørt sum fleiri læknaváttanir verðar sendar Almannastovuni. Avgerð um at játta dagpening verður tikin 3. mai og rokning til arbeiðsgevaran verður útskrivað sama dag.

Tað verður viðmerkt í málinum, at umsøkjarin er fólkapensjónistur. Umsøkjarin er 67 ár. Sambært § 12, stk. 2, 2. pkt. í dagpeningalógini hava persónar, ið fáa fólkapensjón, rætt til dagpening í 20 vikur í einum 12 mánaða skeiði. Eg havi tí onga viðmerking til avgerðina hjá Almannastovuni hesum viðvíkjandi.

Samlaða málsviðgerðatíðin, frá tí at umsókn er móttikin, til avgerð er fráboðað umsøkjaranum, er umleið 3 mánaðir. Hetta kann tykjast sum long málsviðgerðartíð, men í veruleikanum er málsviðgerðartíðin 14 dagar frá móttøkuni av umsóknini, til avgerð verður tikin um at játta dagpening. Eg havi tí onga viðmerking til hesa málsviðgerðartíð.

Mál nr. 16

Tann 18. juli 2005 móttekur Almannastovan læknaváttan B viðvíkjandi framhaldandi og langtíðarhjálp eftir dagpeningalógini. Talan er um ein 33 ára gamlan mann. Upplýst verður, at óarbeiðsføri er fult. Tíðarskeiðið fyri óarbeiðsføri er ikki upplýst í læknaváttanini.

Tann 22. juli 2005 móttekur Almannastovan umsókn um dagpening vegna sjúku. Umsøkjarin hevur útfylt standard umsóknarblað um dagpening frá løntakara í samband við sjúku og skaða. Upplýst verður, at fráveran byrjaði 15. juli 2005.

Tann 22. juli 2005 móttekur Almannastovan inntøkuváttan arbeiðsgevarans. Arbeiðsgevarin upplýsir, at umsøkjarin hevur arbeitt frá 13.06.2005 til og við 15.07.2005 í tilsamans 241,5 tímar. Fyrsti fráverudagur var 15. 07.05, og umsøkjarin hevur verið í starvi síðani 07.03.05.

Tann 1. august 2005 sendir Almannastovan telefaks til viðkomandi kommunulækna, tí tað vísir seg, at læknin hevur gloymt at skriva tíðarskeiðið fyri sjúkrameldingina í læknaváttanina. Telefaksið er skrivað á ein standardformular.

Mín viðmerking:
*Hetta er tað seinasta sum er hent í málinum, sum sostatt ikki er endaliga avgreitt, tá ið umboðsmaðurin móttók hesi 20 málini frá Almannastovuni í august 2005.*

Mál nr. 17

Tann 3. mars 2005 móttekur Almannastovan læknaváttan A frá kommunulækna viðvíkjandi óarbeiðsføri hjá einari 28 ára gamlari kvinnu. Í læknaváttanini stendur m.a.:

> „Óarbeiðsføri er: Fult
>
> …
>
> Eg meti sjúklingin óarbeiðsføran frá og við 02.03.05 til og við 10.03.05.
>
> …
>
> Fráveran er íkomin av:
>
> …
>
> Skaða í ferðslu“

Tann 4. mars 2005 móttekur Almannastovan umsókn um dagpening. Umsøkjarin hevur útfylt standard umsóknarblað um dagpening frá

løntakara í samband við sjúku og skaða. Upplýst verður, at fráveran byrjaði 2. mars 2005.

Tann 4. mars 2005 móttekur Almannastovan inntøkuváttan arbeiðsgevarans. Arbeiðsgevarin upplýsir, at umsøkjarin hevur arbeitt fra 27.01.2005 til og við 02.03.2005 í tilsamans 165,35 tímar. Inntøkan í hesum tíðarskeiði var áljóðandi kr. 16.886,07. Fyrsti sjúkradagur var 2. mars 2005, og umsøkjarin hevur verið í hesum starvi síðani 20.12.2000.

Tann 9. mars 2005 móttekur Almannastovan læknaváttan B viðvíkjandi framhaldandi og langtíðarhjálp eftir dagpeningalógini. Læknin metir sjúklingin framhaldandi óarbeiðsføran til og við 20.03.2005, og at óarbeiðsførið er fult.

Tann 11. mars 2005 er soljóðandi notat skrivað:

„Umsókn og læknaváttan komin 04.03.05.

Dagpeningur játtaður frá 02.03.05 til 10.03.05 við kr. 3613,- um vikuna.

Grundarlag 16.886,07,- kr. 25 dagar."

Tann 11. mars 2005 verður rokning útskrivað fyri 1. og 2. sjúkradag til arbeiðsgevaran áljóðandi kr. 1.350,80.

Tann 21. mars 2005 er soljóðandi notat skrivað:

„Longd til 20.03.05 samb. læknav. T/S kannað."

Tann 21. mars 2005 móttekur Almannastovan læknaváttan B frá kommunulækna. Umsøkjarin verður nú sjúkrameldaður frá og við 02.03.05 til og við 31.03.05. Upplýst verður, at óarbeiðsførið er fult.

Tann 30. mars 2005 er soljóðandi notat skrivað:

„Longd til 31.03.05 samb. læknaváttan. T/S kannað um løn og dp. goldin samstundis."

Tann 31. mars 2005 móttekur Almannastovan læknaváttan B frá kommunulækna. Læknin metir sjúklingin óarbeiðsføran frá og við 02.03.05 til og við 15.04.05. Upplýst verður, at óarbeiðsførið er fult.

Tann 8. apríl 2005 er soljóðandi notat skrivað:

„Leinging av dagpeningi til 15.04.05 samb. læknaváttan. Lvt er goldin.

Kannað T/S um løn og DP er goldin samstundis."

Tann 15. apríl 2005 móttekur Almannastovan læknaváttan B frá kommunulækna. Læknin metir sjúklingin framhaldandi óarbeiðsføran til og við 19.05.2005. Upplýst verður, at óarbeiðsførið er fult.

Tann 27. apríl 2005 er soljóðandi notat skrivað:

„Longd til 19.05.05 samb. læknav. T/S kanna."

Tann 18. mai 2005 móttekur Almannastovan læknaváttan B frá kommunulækna. Læknin metir sjúklingin framhaldandi óarbeiðsføran til og við 19.07.2005. Upplýst verður, at óarbeiðsførið er fult.

Tann 31. mai 2005 er soljóðandi notat skrivað:

„Longd til 19.07.05 samb. lækna T/S kannað"

Tann 19. juli 2005 móttekur Almannastovan læknaváttan B frá kommunulækna. Læknin metir sjúklingin framhaldandi óarbeiðsføran til og við 19.08.05. Upplýst verður, at óarbeiðsførið er fult.

Tann 2. august verður soljóðandi notat skrivað:

„Dagpeningurin er longdur fram til 19.08.05 sambært læknaváttan. Havi eftirkannað T&S um … hevur havt inntøku í sjúkraskeiðinum og tað hevur hon ikki."

Tann 3. august 2005 verður umsóknin játtað fyri tíðarskeiðið, ið er nevnt í fyrstu læknaváttanini, og soljóðandi bræv verður sent umsøkjaranum:

**„Viðvíkjandi dagpeningi vegna sjúku / skaða**

Vísandi til umsókn tygara um dagpening/leingjan av dagpeningaskeiðnum verður við hesum sagt frá at, at avgjørt er at játta tygum dagpening í tíðarskeiðnum frá 02.03.2005 til 10.03.2005 við kr. 3.613,00 fyri hvørja heila arbeiðsviku. Her er íroknað frítíðarløn, sum ikki verður útgoldin, men fer í grunn til seinni útgjaldingar.

…

Um tygum framhaldandi eru sjúk/ur aftaná omarfyrinevnda tíðarskeið, skulu tygum venda tygum til lækna og senda inn eina nýggja læknaváttan.

…

Avgerðin kann innan 4 vikur frá tí tygum hava móttikið hetta skriv kærast til Føroya Kærustovn, Skálatrøð 20, Postsmoga 45, 100 Tórshavn."

Mín viðmerking:

*Sjúkrameldingin verður longd fleiri ferðir og sum skilst á notatunum sum verða skrivað, verður dagpeningur játtaður, so hvørt sum læknaváttaninar verða sendar Almannastovuni.*

*Játtanarbrævið er dagfest 3. august 2005, men vísir bert til tað fyrsta tíðarskeiðið av sjúkrameldingini. Men sum sæst á notatunum, so verður dagpeningur játtaður fyri alla sjúkrameldingina. Eg skal í hesum sambandi vísa til viðmerkingar mínar til mál nr. 15.*

*Samlaða málsviðgerðartíðin, frá tí at umsókn er móttikin, til avgerð verður fráboðað umsøkjaranum, er umleið 5 mánaðir. Hetta kann tykjast long málsviðgerðartíð, men í veruleikanum er málsviðgerðartíðin 8 dagar. Tað vil siga frá tí, at umsókn kemur inn, til avgerð verður tikin. Eg havi tí onga viðmerking til hesa málsviðgerðartíð.*

*Eg havi lagt til merkis, at Almannastovan í hesum málinum, hóast fult dagpeningaútgjald, einans hevur kravt arbeiðsgevaran eftir 1350,80 kr. fyri 1. og 2. sjúkradag, meðan tað í øðrum málum eru kravdar 1445,20 kr. fyri somu dagpeningaupphædd.*

Mál nr. 18

Tann 19. juli 2005 móttekur Almannstovan læknaváttan B frá yvirlækna. Talan er um leingjan av sjúkradagpeningi. Umsøkjarin er sjúkrameldaður frá og við 07.01.05 til og við 31.10.05. Upplýst verður, at óarbeiðsførið er fult.

Tann 1. august 2005 verður soljóðandi notat skrivað:

„Leinging av dagpeningi til 13.10.05 samb. læknaváttan. Kannað T&S um løn og DP er goldin samstundis. Er sjúkraskrivaður til 31.10.05, men hevur fingið rakar fult skeið tann 13.10.05."

Tann 1. august 2005 verður soljóðandi skriv sent umsøkjaranum:

„Tygum hava fingið dagpening játtaðan frá: 07.01.05 til 13.10.05.

Sambært § 12, stk.2 í dagpeningalógini kann dagpeningur í mesta lagi veitast í 40 vikur tilsamans.

Um tygum framhaldandi eru óarbeiðsfør/ur aftaná tann 13.10.05 hava tygum møguleika at søkja um forsorgarhjálp.

Um so er at tygum hava spurningar hesum viðvíkjandi, eru tygum vælkomin at ringja til Almannastovuna, tlf. 35 35 10, og biðja um forsorgardeildina.

Er talan um skaða, skulu tygum eisini venda tygum til Tryggingarfelagið Føroya, Kongabrúgvin, Postsmoga 329, 110 Tórshavn, tlf. 34 56 00.

Hjálagt er avrit av § 12 í dagpeningalógini."

Mín viðmerking:

*Málsviðgerðartíðin er sostatt 13 dagar, og havi eg ongar viðmerkingar til hetta.*

Mál nr. 19

Tann 13. juli 2005 móttekur Almannastovan læknaváttan A viðvíkjandi óarbeiðsføri hjá 62 ára gomlum manni. Læknin metir, at umsøkjarin er óarbeiðsførur frá og við 11.07.2005 til og við 17.07.2005. Upplýst verður, at óarbeiðsførið er fult, og at fráveran er íkomin av sjúku annars.

Tann 18. juli 2005 móttekur Almannastovan umsókn um dagpening vegna sjúku. Umsøkjarin hevur útfylt standard umsóknarblað um dagpening frá løntakara í samband við sjúku og skaða. Upplýst verður, at fráveran byrjaði 11. juli 2005.

18. juli 2005 móttekur Almannastovan inntøkuváttan. Arbeiðsgevarin upplýsir, at umsøkjarin hevur arbeitt frá og við 30.06.2005 til og við 03.07.2005 í tilsamans 8,24 tímar. Inntøkan hetta tíðarskeiðið hevur verið kr. 868,05. Eisini er upplýst, at umsøkjarin hevur verið í hesum starvi síðani juni 2001, og at fyrsti fráverudagur var 11.07. 2005. Arbeiðsgevarin hevur harafturat skrivað soljóðandi viðmerking í inntøkuváttanina:

„Hevur fingið frá ALS. Virkið ligið stilt í perioduni, vika 27 í feriu.“

Tann 2. august 2005 verður soljóðandi áheitan send til ALS:

„Áheitan um 5 vikursváttan fyri umsøkjaran. Tíðarskeið 30.05.05-03.07.05“

Tann 2. august 2005 verður umsóknin fyribils noktað og soljóðandi bræv sent umsøkjaranum:

„Vísandi til umsókn um dagpening, dagfest 18.juli 2005, vegna sjúku.

Tygum hava søkt um dagpening, vegna tess, at tygum eru sjúkrameldaður frá 11.07.05 til 17.07.05.

Sambært arbeiðsgevaraváttan frá Føroya Fiskavirking hava tygum bert arbeitt í 8,24 tímar 5 tær seinastu vikurnar undan fráveruni, vegna at virkið hevur ligið stilt í perioduni.

Sambært treytunum í Dageningalógini § 7, skulu tygum hava arbeitt minst 20 tímar 5 tær seinastu vikurnar fyri at fáa dagpening og § 9, stk. 4 ásetur minsta mark fyri útgjald.

Tygum lúka hvørki treytirnar í § 7 ella § 9, stk. 4 og hava tygum tí í verandi løtu ikki rætt til dagpening.

Vitandi um at tygum hava fingið útgjald frá ALS tær 5 vikurnar undan fráveruni hevur Almannastovan d.d. biðið ALS um eina 5 vikurs váttan uppá inntøku. Tá henda váttan kemur frá ALS verður málið tikið upp-

aftur til nýggja viðgerð og fáa tygum tá dagpening treyta av at inntøkan kemur uppum ein vikusats yvir kr. 361,-.

Viðlagt er avrit av Dagpeningalógini § 7 og § 9.

Henda avgerð kann innan 4 vikur kærast til Føroya Kærustovn, Skálatrøð 20, Postboks 45, 110 Tórshavn."

Mín viðmerking:
*Í hesum máli verður umsókn um dagpening fyribils noktað. Tá ið ein umsókn verður noktað, skal umsøkjarin hava eina grundgeving fyri hesum sambært § 21 í fyrisitingarlógini. Eftir mínari meting verður nøktandi grundgeving og kæruvegleiðing givin í skrivinum, dagfest 2. august 2005.*

Mál nr. 20
Tann 22. juli 2005 móttekur Almannastovan læknaváttan B. Í læknaváttanini stendur m.a. soljóðandi:

„Fyrsti sjúkradagur var frá og við 06.12.04 Lønj. st.

Eg meti sjúklingin frammhaldandi óarbeiðsføran til og við 31.08.05."

Upplýst verður ikki, hvørt óarbeiðsføri er fult.

Umsókn og inntøkuváttan arbeiðsgevarans liggja ikki í málinum.

Tann 3. august 2005 verður soljóðandi notat skrivað:

„Leinging av dagpeningi til 31.08.05 samb. læknaváttan. Kannað T&S um løn og dagpening er goldin rættstundis. Læknaváttan er goldin.

OBS! hevur nú fingið sjúkradagpening samanlagt í 145 dagar íroknað Lønjavningarstovan."

Onki játtanarskriv liggur í málinum.

Mín viðmerking:
*Sum skilst av notatinum, dagfest 3. august 2005, hevur umsøkjarin fingið játtað dagpening nakað síðani, og nú er dagpeningur játtaður fram til 31.08.05 sambært læknaváttanini, dagfest 22. juli 2005.*

*Út frá teimum skjølum, sum liggja í málinum, er trupult at síggja, hvussu málsgongdin annars hevur verið í málinum.*

**c. Samandráttur og niðurstøða**

*Í teimum dagpeningamálum, sum eg havi eftirkannað, eru ongar upplýsingar viðvíkjandi teimum veruligu umstøðunum, sum ikki eru til*

*fyrimuns fyri umsøkjaran. Tí er partshoyring sambært § 18, stk. 1 í fyrisitingarlógini ikki viðkomandi í hesum málum.*

*Í samband við málsviðgerð av dagpeningamálum, hevur Almannastovan tilevnað standard umsóknarbløð til ávikavist løntakarar og sjálvstøðug vinnurekandi, standard inntøkuváttanir frá arbeiðsgevara og standard læknaváttanir. Við umsóknarbløðunum fylgir ein nágreinilig skrivlig vegleiðing um, hvussu umsóknarbløðini verða útfylt. Hetta ger tað lættari hjá umsøkjarunum og øðrum at geva Almannastovuni rættar upplýsingar.*

*Við hesum umsóknarbløðum meti eg, at Almannastovan gevur brúkaranum góða vegleiðing, og hetta vil vanliga føra við sær, at Almannastovan eisini fær eina nøktandi skjalprógvan og skjóta málsviðgerð í dagpeningamálum.*

*Sambært § 24, stk. 1 í dagpeningalógini kann Almannastovan útvega sær upplýsingar frá viðkomandi persónum, myndugleikum og feløgum, sum mugu metast at vera neyðugar fyri viðgerðina og avgerðina í málinum. Eg havi tí onga viðmerking til, at Almannastovan útvegar sær upplýsingar viðvíkjandi umsøkjaranum, sum hava týdning fyri viðgerðina av málinum, uttan at hava fingið samtykki frá honum.*

*Sambært § 23 í dagpeningalógini skal arbeiðsinntøkan og starvssetanin skjalprógvast av arbeiðsgevaranum, og óarbeiðsførið og longdin av hesum skal skjalprógvast við læknaváttan.*

*Læknaváttan um, at óarbeiðsførið er fult, longdina av hesum og sjúkuorsøk liggur í øllum málunum. Tó upplýsir læknin ikki í máli nr. 9, hvørt óarbeiðsførið umsøkjarans er fult. Í hesum føri átti Almannastovan at biðið um upplýsingar hesum viðvíkjandi.*

*Inntøkuváttan frá arbeiðsgevara liggur í øllum málunum, uttan í málum nr. 18 og 20. Eg havi ikki fingið allar upplýsingar í hesum málum og vil við hesum biðja Almannastovuna um at senda mær allar upplýsingarnar.*

*Eg havi ongar viðmerkingar til, at Almannastovan nýtir standardskriv, tá avgerðir verða fráboðaðar, men treytin fyri hesum er, at skrivini verða tillagað tí einstaka málinum.*

*Eg skal eisini vísa á, at tað hevði verið rættast og best, um dagpeningaupphæddin varð útgreinað í avgerðarskrivinum, soleiðis at umsøkjarin sær, hvussu nógv hann fær útgoldið, og hvussu nógv fer í frítíðargrunn.*

*Í teimum málum, har dagpeningur verður noktaður lutvíst ella heilt, meti eg, at Almannastovan hevur givið umsøkjarunum nøktandi grundgeving og kæruvegleiðing sambært §§ 21 og 24 í fyrisitingarlógini.*

*Sambært § 20, stk. 2 í dagpeningalógini skal arbeiðsgevarin afturrinda landskassanum tær útreiðslur, ið standast av, at Almannastovan rindar 1. og 2. fráverudag, tó undantikið í teimum førum, har ongin arbeiðsgevari er.*

*Tað er í tráð við hesa áseting, at Almannastovan útskrivar rokning til arbeiðsgevaran fyri 1. og 2. fráverudag. Tað framgongur tó ikki av málunum, ið eg havi fingið til láns, at rokningin verður send til arbeiðsgevaran, og rokningin verður ikki journaliserað í málið.*

*Í málunum nr. 6, 7 og 12 útfyllir ALS inntøkuváttan arbeiðsgevarans, men er annars ikki at meta sum arbeiðsgevari. Almannastovan sendir tí samsvarandi § 20, stk. 2 í dagpeningalógini ikki rokning fyri 1. og 2. fráverudag.*

*Sum heild er málsviðgerðin sera smidlig og viðgerðartíðin stutt.*

**4. Hjálpartól**

Ein stórur partur av umsitingini hjá Almannastovuni fevnir um umsiting av veitingum sambært forsorgarlógini. Forsorgarlógin fevnir um nógvar ymiskar veitingar. Hetta kann verða alt frá vanligari forsorgarhjálp til heimahjálp og stuðul til fólk, ið bera brek við meira.

Tað vildi verið ov umfatandi at gjørt eina eftirkanning av øllum økjum innan forsorgarøkið, og tí hevur umboðsmaðurin valt at gera eina eftirkanning av 30 málum um hjálpartól, ið verða veitt sambært § 18, stk. 5 í forsorgarlógini.

Fyri at fáa innlit í málsviðgerðina hjá Almannastovuni viðvíkjandi ávísum størri og smærri veitingum sambært § 18, stk. 5 í forsorgarlógini, hevur umboðsmaðurin eftirkannað 10 mál viðvíkjandi gangistativum og kallitólum, 10 mál viðvíkjandi koyristólum, 5 mál viðvíkjandi stuðul til avlamisbil og 5 mál viðvíkjandi umbyggingum. Alt umsóknir, ið eru játtaðar sambært § 18, stk. 5 í forsorgarlógini.

Tá ið Almannastovan tekur støðu til, um ein persónur hevur rætt til hjálpartól, skal Almannastovan fyri tað fyrsta kanna, hvørt talan er um ein avlamnan persón ella ein persón við varandi sjúku ella ellisbreki, jb. § 18, stk. 5 í forsorgarlógini. Almannastovan má í hesum sambandinum fáa til vega upplýsingar, ið kunnu prógva, at persónurin er avlamin, hevur varandi sjúku ella ellisbrek.

Tá ið hesin spurningur er avkláraður, skal Almannastovan gera eina meting av, hvørt tað hjálpartólið, ið umsøkjarin søkir um, er neyðugt fyri at viðkomandi kann útinna sítt arbeiði, um hjálpartólið kann betra munandi um sjúkuna/brekið, ella um hjálpartóli munandi kann lætta um gerandisdagin í heiminum hjá umsøkjaranum, jb. § 18, stk. 5 í forsorgarlógini.

**a. Lógargrundarlagið v.m.**

Í forsorgarlógini, „lovbekendtgørelse nr. 100 af 2. marts 1988 om offentlig forsorg, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 71 frá 11. november 2004“ stendur m.a.:

> „**§ 1.** Det offentlige er forpligtet til at komme enhver til hjælp, som ikke er i stand til at skaffe sig og sine det fornødne til livets ophold, samt til at yde den, der ikke selv kan afholde udgiften, hjælp til kur og pleje i sygdomstilfælde og til at yde hjælp i andre tilfælde, hvor det er bestemt i denne lov. Det skal herved tilstræbes i stedet for understøttelse at skaffe den, der søger hjælp, mulighed for erhvervsmæssigt arbejde eller om fornødent at yde hjælp til at udvikle eller genoprette hans erhvervsevne, således at han kan blive i stand til at forsørge sig selv og opfylde sine forpligtelser.
> *Stk. 2.* Der skal efter regler, som fastsættes af Landsstyret, gives befolkningen vejledning om rettigheder efter den sociale lovgivning.
> Stk. 3. Landsstyret kan fastsætte regler om, at der skal kunne ydes råd og vejledning i spørgsmål af forsorgsmæssig og personlig art.
> …
> **§ 18.** Når det anses for påkrævet af hensyn til en persons mulighed for fremtidig at klare sig selv og sørge for sin familie, kan der ydes pågældende hjælp til uddannelse og erhvervsmæssig optræning eller omskoling.
> *Stk. 2.* Hvis det skønnes rimeligt ud fra den pågældendes økonomiske forhold, kan der ydes hjælp til anskaffelse af værktøj og arbejdsmaskiner, når det er af afgørende betydning for en person med nedsat erhvervsevne.
> *Stk. 3.* Der kan endvidere ydes hjælp til iværksættelse af selvstændig virksomhed. Hjælpen kan ydes som lån, når det findes rimeligt under hensyn til pågældendes fremtidige erhvervsmuligheder.
> *Stk. 4.* Til invalidepensionister, der har en uudnyttet delvis erhvervsevne i behold, kan der ydes et rentefrit lån svarende til højst 2 års pension, når der herved kan opnås en varig forbedring af pågældendes erhvervsevne.
> *Stk. 5.* Til personer med invaliditet eller varig sygdoms- eller aldersbetinget svagelighed kan der ydes støtte til heilivág, (ingen dansk tekst)

hjælpemidler, herunder merudgifter til særlige beklædningsgenstande, som

1) er nødvendige for, at pågældende kan udøve et erhverv, eller

2) i væsentlig grad kan afhjælpe pågældendes lidelse, eller

3) i væsentlig grad kan lette den daglige tilværelse i hjemmet.

Stk. 6. Landsstyret kan fastsætte nærmere regler om ydelse af hjælp efter stk. 1-5, íroknað reglur um egingjald og nær stuðul til hjálpitól kann veitast sum lán. (Ingen dansk tekst)

…

**§ 36**. Henvendelse om hjælp sker til kommunalbestyrelsen, der videresender ansøgningen til Landsstyrets Socialforvaltning, hvis det påhviler denne at træffe afgørelse i sagen, jf. § 33.

*Stk. 2.* Alle offentlige myndigheder skal uden betaling udfærdige de attester og udskrifter, der er nødvendige for en sags afgørelse. De i § 33 nævnte myndigheder kan endvidere kræve enhver oplysning fra sygekasser, kommunalbestyrelser og arbejdsgivere. Landsstyret og Landsstyrets Socialforvaltning er endvidere berettiget til at lade optage retsligt forhør og kan begære bistand fra politiet og sysselmændene.“

Kunngerð nr. 38 frá 22. mars 1993 um ráðgevingar- og vegleiðingarskyldu sambært forsorgarlógini er soljóðandi:

„Við heimild í § 1, stk. 2 og „Lov for Færøerne om offentlig forsorg“ (forsorgarlógini), smb. lógarkunngerð nr. 100 frá 2. mars 1988, sum broytt við lóg nr. 154 frá 15. mars 1989, lóg nr. 392 og 393 frá 20. mai 1992 og lóg nr. 1075 frá 23. desember 1992, hevur Landsstýrið fyrisett:

**Almenn ráðgeving og vegleiðing**

**§ 1**. Almannastovan hevur skyldu til at kunna almenningin um rættindi tess sambært almannalóggávuni. Hetta kann gerast í skapi av leiðbeiningum, lýsingum í dagbløðum, tíðindaskrivum, smáritum, bóklingum, v.m.

**§ 2**. Tað skal tryggjast veikum ella hóttum persónum og familjum, so sum t.d. avlamis- og fólkapensionistum, arbeiðsleysum og barnaríkum familjum, at tað kunningartilfar, ið er ætlað til teirra upplýsing, eisini er tilevnað á slíkan hátt, at hetta er lætt skiljandi hjá teimum. Alt kunningartilfar eigur somuleiðis at verða tillagað eftir tørvinum hjá teimum ymisku bólkunum.

**§ 3**. Almannastovan skal ansa eftir, at kunningartilfarið er til taks á almennum støðum, so sum bókasøvnum, sjúkrakassum, kommunulæknum, sjúkrahúsi, arbeiðsloysistrygging og -ávísing, o.l.

**Persónlig ráðgeving og vegleiðing.**

**§ 4**. Almannastovan og kommunalar sosialar deildir skulu bjóða støkum og familjum eina framhaldandi vegleiðing. Endamálið við vegleiðingar-arbeiðnum er í fyrstu syftu at hjálpa viðkomandi persónum og familjum við teimum í løtuni verandi trupulleikunum, men eisini at gera tey betri før fyri frameftir at loysa íkomandi trupulleikar sjálvi. Vegleiðingin kann verða givin sjálvstøðugt ella saman við aðrari hjálp ella stuðli.
**§ 5**. Vegleiðingin kann vera antin samrøður við persónin ella familjuna um umstøður teirra, ella at fáa í lag samband við aðrar myndugleikar umframt stuðul til at megna verkligar trupulleikar. Sum dømi kunnu nevnast fíggjarligir trupulleikar, vánaligar bústaðarumstøður, heilsuligir og arbeiðsligir trupulleikar.
**§ 6**. Til vegleiðingararbeiðið skulu so vítt møguligt nýtast persónar, sum vegna útbúgving ella virki frammanundan mugu roknast at hava serligar fyritreytir fyri hesum arbeiði.
**§ 7**. Almannastovan og kommunalu sosialu deildirnar skulu ansa eftir, at tilboðið um vegleiðing gerst alment kent sum eitt hjálpartiltak, sum stendur øllum í boði. Hetta kann m.a. gerast við lýsingum, framløgu av bóklingum v.m.
**§ 8**. Hendan kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd."

Í samband við eftirkannan av omanfyri standandi 30 málum, hevði umboðsmaðurin nakrar spurningar viðvíkjandi málsviðgerðini av slíkum málum á Hjálpartólamiðstøðini. Birita L. Poulsen, ráðgevi tosaði við deildarleiðaran á Hjálpartólamiðstøðini um hesi ivamál í telefonsamrøðu tann 9. september 2005, og hevur gjørt soljóðandi notat frá hesari samrøðu:

**„Telefonnotat eftir samrøðu við E, Hjálpitólamiðstøðin**

Undirritaða ringdi í dag til E, leiðara á HTM, viðvíkjandi teimum málum um gangistativ, koyristólar, avlamisbilar og íbúðarumbyggingar, sum umboðsmaðurin hevur fingið til láns frá stovninum.

*Umsókn / lániseðil*

Tá ið ein umsókn verður latin HTM verður hon fyrst bólkað í brámál, snarmál, vanlig mál v.m. Síðani verður umsóknin latin til ein málsviðgera. Hvør málsviðgeri hevur hvør sítt geografiska øki at taka sær av.

Um ein umsókn liggur í nakrar dagar eftir at hon er innkomin, til umsóknin verður viðgjørd og lániseðil verður skrivaður, er tað tí, at hesin málsviðgerðin hevur ov nógv annað arbeiðið, ið skal avgreiðast fyrst. Tað kann eisini koma fyri at málsviðgerðin er sjúkur, á skeiði ella á fundi og tí ikki fær avgreitt umsóknina beinanvegin.

*Lániseðil skrivaður / Lániseðil avgreiddur*
Undirritaða spurdi, hvat hendir frá tí, at ein lániseðil er útskrivaður til lániseðilin verður avgreiddur. E segði, at í hesum tíðarbilinum fer eingin málsviðgerð fram.

Arbeiðsbyrðan á lagrinum ger tó ofta, at mál ikki verða avgreidd beint eftir at lániseðilin er útskrivaður. Tað kann eisini verða, at HTM ikki eigur hjálpartólið á lagri og tí má bíleggja hjálpartólið, áðrenn lániseðilin kann verða avgreiddur. Tað kann taka 14 dagar ella meiri at fáa eitt bílagt tól heim.

HTM viðger ca. 150 mál í snitt um mánaðin. Summi taka longri tíð, summi styttri tíð.

Tá ið skrivið „lániseðilin er avgreiddur“ verður skrivaður, verður hjálpartólið skrásett í goymsluskipanini sum farið út av húsinum. Sama dag ella dagin eftir kemur eitt transportvirki og koyrir hjálpartólið út til brúkaran.

*Móttøkuváttan*
E segði, at móttøkuváttan verður skrivað, tá ið talan er um „vanlig mál“, ið vanliga taka longri tíð. Móttøkuváttan verður ikki skrivað til „brámál“ ella „snarmál“, av tí at HTM miðjar ímótir at avgreiða málini innan 14 dagar og at tað tí ikki verður mett at verða neyðugt at senda móttøkuváttan.

*Læknaváttanir v.m.*
Undirritaða spurdi, hví læknaváttanir ikki eru í øllum málum. E segði, at HTM ger eina meting hesum viðvíkjandi í hvørjum einstøkum føri. Í flestu málum, serliga tá ið talan er um smá hjálpartól, verður ikki mett at tørvur er á læknaváttan. Tá ið HTM metir, at tað er neyðugt við læknaváttan, biður HTM oftast umsøkjaran sjálvan skaffa læknaváttan til málið. Metir HTM, at tað er neyðugt at kanna umstøðurnar í heiminum nærmari, fara starvsfólk frá HTM (ergo- ella fysioterapeutar) á heimavitjan, har hugt verður nærmari eftir umstøðunum hjá umsøkjaranum.

Fyrr var tað soleiðis, at HTM í flestu førum kravdi læknaváttan sum dokumentatión fyri heilsustøðuna hjá umsøkjaranum. Hetta kravið er nú slept, av tí at tað tók alt ov langa tíð at fáa læknaváttanir til vega og soleiðis gjørdis málsviðgerðartíðin alt ov long í teimum einstøku málunum.

*Hjálp frá heilsustarvsfólki*
E upplýsti, at tá ið tað í umsóknarblaðnum stendur, at eitt heilsustarvsfólk hevur hjálpt umsøkjaranum við umsóknini, merkir hetta, at heilsu-

starvsfólkið hevur útfylt umsóknarblaðið og stendur inni fyri tí lýsing av heilsustøðuni hjá umsøkjaranum, ið verður lýst á umsóknarblaðnum.

*Fakturi í málinum*

Undirritaða spurdi, hví fakturi uppá hjálpartól liggur í summum málum. E segði, at hetta er bert eitt internt skjal, ið ikki verður sent brúkaranum. Tað er altíð HTM, sum rindar rokningina, ímeðan brúkarin lænir hjálpartólið. HTM selur ikki hjálpartól. Tó fær brúkarin upplýst, hvat hjálpartólið hevur kosta. Hetta fyri at brúkarin skal fara væl um hjálpartólið.

*Mál fyri § 18 ráðið*

Undirritaða spurdi, hvørji mál verða løgd fyri § 18 ráðið og hví málini verða løgd fyri ráðið.

E segði, at umleið 80% av málunum verða avgreidd av terapeutunum á HTM (4 terapeutar). Umleið 15% av málunum verða avgreidd á fundi saman við leiðaranum og bert umleið 5% verða avgreidd á § 18 ráðs fundi. Hetta eru tey málini, ið snúgva seg um stór og dýr tól, sosum avlamisbilar, umbyggingar og elkoyristólar og har mett verður at serlig læknalig meting skal gerast, áðrenn hjálpartólið verður játtað.

Tá ið eitt mál verður avgreitt av terapeutunum, verður í skrivinum til brúkaran skrivað: „Almannastovan hevur avgjørt…“. Tá ið terapeutar saman við leiðaranum hava tikið avgerð, verður skrivað til brúkaran: „Á fundi… er avgjørt…“. Tá ið § 18 ráðið hevur tikið avgerð, verður skrivað til brúkaran: „§ 18 ráðið hevur avgjørt…“.

Á § 18 ráðs fundum luttaka leiðarin, terapeutarnir á stovninum og Pál Weihe, lækni. Fundirnir verða hildnir á HTM umleið 14 hvønn dag. Notat verður skrivað frá øllum fundum. Fundarfrásagnirnar frá § 18 ráðs fundum verða ikki journaliseraðar í tey einstøku málini, men verða journaliseraðar í einum máli fyri seg á HTM.

*Fáa hjálpartól heimaftur*

E segði, at HTM fyri stuttum hevur fingið nýggja goymsluskipan, sum ger tað lættari at fáa hjálpartólini heim aftur eftir brúk. Tá ið HTM móttekur deyðsváttan frá brúkaranum, kann skriv verða sent til familju um at innlevera hjálpartólið til HTM.

*Nýggj hagtøl*

E segði, at hann skuldi senda okkum nýggj hagtøl um málsviðgerðartíðina fyri avgreiðslu av málum um hjálpartól.“

Hjálpartólamiðstøðin hevur tilevna niðanfyri standandi málsviðgerðarreglur, ið verða nýttar í sambandi við, at hjálpartól skulu latast brúkarum:

*„HTM – Hjálpartólamiðstøðin 08-00, starvsfólkahandbók*

**Málflokkar**

**Lýsing av málflokkum og hvussu teir verða málsviðgjørdir**

| Atgerð | Lýsing | Skjøl / viðmerkingar |
|---|---|---|
| **1. Málflokkur** | Bráðmál<br>Snarmál<br>Vanlig mál<br>Bilmál<br>Íbúðarmál<br>Sjónsmál<br>Onnur mál | |
| **2. Bráðmál** | Eru mál, har tað er bráðneyðugt at málið verður skrásett og viðgjørt beinanvegin. Tólini skulu verða latin seinast 2-3 arbeiðsdagar eftir at málið er skrásett. | 1. Snarterapeuturin<br>2. Allir terapeutarnir |
| **3. Snarmál** | Eru mál, ið ikki eru bráðmál. Málini eiga at verða skrásett beinanvegin og viðgjørd seinast 2 arbeiðsdagar eftir at málið er skrásett. Tólini skulu verða latin seinast 10 arbeiðsdagar eftir at málið er skrásett. | 1. Snarterapeuturin |
| **4. Vanlig mál** | Eru mál sum ikki eru bráðella snarmál. Umsóknirnar verða skrásettar beinanvegin og málið verður lagt í vanligu bíðirøðina hjá terapeutinum | 1. Allir terapeutarnir |
| **5. Bilmál** | Sí vegleiðing | Kunnu raðfestast |
| **6. Íbúðarmál** | Sí vegleiðing | Kunnu raðfestast |
| **7. Sjónsmál** | Minni sjónmál verða viðgjørd sum snarmál. Størri sjónsmál verða viðgjørd sum vanlig mál | |

**b. 10 mál um gangistativ v.m.**

Mál nr 1

Tann 17. juni 2005 móttekur Hjálpartólamiðstøðin umsókn um gangistativ og kallitól til eina kvinnu, ið er 90 ára gomul. Umsøkjarin hevur nýtt standard umsóknarblaðið hjá Hjálpartólamiðstøðini.

Í umsóknarblaðnum stendur soleiðis um orsøkina til, at viðkomandi skal hava gangistativ:

> „Mamma er rættuliga svimbul, tá hon skal reisa seg, og er ofta við at detta.
>
> Eitt gongustativ við hjólum meta vit hevði hjálpt uppá hetta."

Soljóðandi læknaváttan er skrivað á umsóknarblaðið:

> „Er svimmel og usikker med faldtendens. Anbefales varmt."

Umsøkjarin hevur undirskrivað umsóknina og samstundis givið HTM loyvi til at savna inn neyðugar upplýsingar til málsviðgerðina. Umsøkjarin hevur fingið hjálp til at útfylla umsóknarblaðið frá dóttir síni og kommunulæknin hevur sent umsóknina við telefaks til HTM.

Tann 24. juni 2005 verður soljóðandi bræv sent umsøkjaranum:

> „Almannastovan hevur tann 24.06.2005 viðgjørt umsókn tygara, og avgjørt varð at játtað umsóknini og veita stuðul til tað, ið søkt er um til láns.
>
> Um ikki annað er avtalað, sendir HTM tygum hjálpartólini."

Sama dag verður lániseðil fyri gangistativið skrivaður og sendur umsøkjaranum. Tann 30. juni 2005 er lániseðilin avgreiddur. Samlaða málsviðgerðartíðin í málinum er 13 dagar.

Mín viðmerking:

*Í standard umsóknarbløðunum hjá Hjálpartólamiðstøðini viðvíkjandi umsókn um hjálpartól, er ein teigur, har heilsustarvsfólk skrivar undir uppá at hava hjálpt umsøkjaranum við umsóknini. Í telefonsamrøðu 9. september 2005 hevur leiðarin á Hjálpartólamiðstøðini upplýst, at tá ið heilsustarvsfólk skrivar undir í hesum teigi, stendur heilsustarvsfólkið inni fyri tí lýsing av heilsustøðuni hjá umsøkjaranum, ið verður lýst á umsóknarblaðnum. Í teiginum stendur: „Eg fekk hjálp við umsóknini frá:". Hetta merkir ikki, at tann, ið skrivar undir, stendur inni fyri upplýsingunum á umsóknarblaðnum.*

*Eg fari tí at mæla Hjálpartólamiðstøðini til at umhugsa at broyta orðingina í nevnda teigi í standardumsóknarbløðunum, soleiðis at*

*heilsustarvsfólkið váttar, at givnu upplýsingarnar eru rættar, og at undirskrivað verður við navni og starvsheiti.*

*Hetta er tó ikki ein trupulleiki í hesum konkreta málinum, har ein læknaváttan eisini er til skjals.*

Mál nr. 2

Tann 23. juni 2005 móttekur Hjálpartólamiðstøðin umsókn um kurv til eitt gangistativ til ein mann, ið er 73 ára gamal. Umsøkjarin hevur nýtt standard umsóknarblaðið hjá Hjálpartólamiðstøðini.

Í umsóknarblaðnum stendur soleiðis um orsøkina til, at viðkomandi skal hava gangistativ:

> „Niðursetta kraft í V.E, trupulleikar v. vatnlating
> Niðursetta sjón (tí skrivar konan undir)
> Fær blóðtransf. regl.“

Eingin læknaváttan er skrivað á umsóknarblaðið.

Kona umsøkjaran hevur undirskrivað umsóknina fyri mannin og samstundis givið HTM loyvi til at savna inn neyðugar upplýsingar til málsviðgerðina. Umsøkjarin hevur fingið hjálp til at útfylla umsóknarblaðið frá einum sjúkrarøktarfrøðingi, og Heimarøktin hevur sent umsóknina til HTM við telefaksi.

Tann 3. juli 2005 sendir HTM umsøkjaranum soljóðandi bræv:

> „Almannastovan hevur tann 01.07.2005 viðgjørt umsókn tygara, og avgjørt varð at játtað umsóknini og veita stuðul til tað, ið søkt er um til láns.
> Um ikki annað er avtalað, sendir HTM tygum hjálpartólini.“

Sama dag verður lániseðil fyri kurvina skrivaður og sendur til umsøkjaran.

6. juli 2005 verður soljóðandi notat skrivað:

> „Goymslan veit ikki hvat slag av rollatori, umsøkjarin hevur, og vit hava helst onga kurv til tað slagið, tí hesin er gamal. Havi avtalað við konuna, at vit ístaðin senda ein annan rollator við kurv, sum hann kann royna. Um hesin roynist senda tey tann gamla rollatorin suður aftur.“

Sama dag verður lániseðil uppá ein rollator v/ kurv – umbýti sendur umsøkjaranum. Lániseðilin er somuleiðis avgreiddur tann 6. juli 2005.

Samlaða viðgerðartíðin av umsóknini var 13 dagar.

Mál nr. 3

Tann 10. juni 2005 móttekur Hjálpartólamiðstøðin umsókn um rollator til innandura nýtslu til eina kvinnu, ið er 94 ára gomul. Umsøkjarin hevur nýtt standard umsóknarblaðið hjá Hjálpartólamiðstøðini.

Í umsóknarblaðnum stendur soleiðis um orsøkina til, at viðkomandi skal hava rollator:

> „93 ára gomul kona, er ofta svimbul og ósikkur á beininum, dettur ofta."

Eingin læknaváttan er skrivað á umsóknarblaðið.

Umsøkjarin hevur undirskrivað umsóknina og samstundis givið HTM loyvi til at savna inn neyðugar upplýsingar til málsviðgerðina. Umsøkjarin hevur fingið hjálp til at útfylla umsóknarblaðið frá eini heimasjúkrasystir og Heimarøktin hevur sent umsóknina til HTM við telefaksi.

Tann 20. juni 2005 sendir Hjálpartólamiðstøðin soljóðandi skriv til umsøkjaran:

> „Almannastovan hevur tann 20.06.2005 viðgjørt umsókn tygara, og avgjørt varð at játtað umsóknini og veita stuðul til tað, ið søkt er um til láns.
>
> Um ikki annað er avtalað, sendir HTM tygum hjálpartólini."

Sama dag verður lániseðil fyri rollatorin skrivaður og sendur til umsøkjaran.

20. juni 2005 er soljóðandi notat skrivað:

> „Eftir upplýsingunum í umsóknini er óvist um umsøkjarin er før fyri at nýta rollator. Avtalað er tí við Sambýlið, at tey royna rollatorin av saman við umsøkjaranum, áðrenn hon sjálv fer at ganga við honum."

Tann 29. juni 2005 verður lániseðilin avgreiddur. Samlaða viðgerðartíðin í hesum máli hevur var 19 dagar.

Mál nr. 4

Tann 13. juni 2005 móttekur Hjálpartólamiðstøðin umsókn um gongustativ til eina kvinnu, ið er 88 ára gomul. Umsøkjarin hevur nýtt standard umsóknarblaðið hjá Hjálpartólamiðstøðini.

Í umsóknarblaðnum stendur soleiðis um orsøkina til, at viðkomandi skal hava gongustativ:

> „Er dottin, torir ikki upp at ganga uttan stuðul."

Eingin læknaváttan er skrivað á umsóknarblaðið.

Umsøkjarin hevur undirskrivað umsóknina og samstundis givið HTM loyvi til at savna inn neyðugar upplýsingar til málsviðgerðina.

Viðmerkt er, at ein persónur hevur hjálpt umsøkjaranum at útfylla umsóknina, men einki er viðmerkt um, hvør hesin persónur er.

Tann 16. juni 2005 sendir Hjálpartólamiðstøðin umsøkjaranum soljóðandi skriv:

> „Almannastovan hevur tann 16.06.2005 viðgjørt umsókn tygara, og avgjørt varð at játtað umsóknini og veita stuðul til tað, ið søkt er um til láns.
>
> Um ikki annað er avtalað, sendir HTM tygum hjálpartólini.“

Sama dag verður lániseðil fyri gangistativið skrivaður og sendur til umsøkjaran. Tann 17. juni 2005 verður lániseðilin avgreiddur.

Mín viðmerking:

*Tað framgongur ikki av málinum, hvørt eitt heilsustarvsfólk hevur hjálpt umsøkjaranum við umsóknini. Eg meti tí ikki, at tað fyriliggur nøktandi skjalprógvan um, at treytirnar í § 18, stk. 5 í forsorgarlógini eru loknar. Samlaða viðgerðartíðin av hesum málinum tók einans 5 dagar.*

<u>Mál nr. 5</u>

Tann 27. mai 2005 móttekur Almannastovan umsókn um rollator til eina kvinnu, ið er 77 ára gomul. Umsóknin er móttikin á Hjálpartólamiðstøðini tann 8. juni 2005. Umsøkjarin hevur nýtt standard umsóknarblaðið um stuðul til hjálparráð.

Í umsóknarblaðnum stendur soleiðis um orsøkina til, at viðkomandi skal hava gongustativ:

> „Sera illa gongd vegna ringa slitgikt á báðum knøum.“

Hjálagt umsóknini er læknaváttan frá kommunulækna. Í læknaváttanini stendur m.a. soljóðandi:

> „…
>
> 2. Sjúkuviðgerð (diagnosa): Slitgikt á knøunum
>
> 3. Sjúkan er varandi/kronisk
>
> …
>
> Hon er sera illa gongd við 2 høkjum og væntast at klára seg betur við rollator. Er dottin fleiri ferðir.“

Umsóknin er ikki undirskrivað ella dagfest. Hjálagda læknaváttanin er undirskrivað av kommunulækna tann 25. mai 2005.

Tann 15. juni 2005 verður soljóðandi bræv sent til umsøkjaran:

„Almannastovan hevur tann 15.06.2005 viðgjørt umsókn tygara, og avgjørt varð at játtað umsóknini og veita stuðul til tað, ið søkt er um til láns.
Um ikki annað er avtalað, sendir HTM tygum hjálpartólini.“

Sama dag verður lániseðil fyri rollatorin skrivaður og sendur til umsøkjaran.

Tann 27. juni 2005 verður lániseðilin avgreiddur. Tað gongur sostatt ein heilur mánaði áðrenn hjálpartólið verður útflýggjað, hóast bæði læknaváttan og umsókn eru send samstundis.

Mín viðmerking:
*Almannastovan sendir ikki umsóknina til Hjálpartólamiðstøðina fyrr enn 12 dagar eftir, at Almannastovan hevur móttikið hana. Hetta meti eg ikki vera nøktandi.*

Mál nr. 6

Tann 19. mai 2005 móttekur Hjálpartólamiðstøðin umsókn um talarastól og gangibelti til eina kvinnu, ið er 86 ára gomul. Umsøkjarin hevur nýtt standard umsóknarblaðið hjá Hjálpartólamiðstøðini.

Í umsóknarblaðnum stendur soleiðis um orsøkina til, at viðkomandi skal hava hjálpartól:

„Fys. saman við starvsfólki komin til, at … gongur við hjálp av hesum hjálpitólum og starvsfólki.“

Eingin læknaváttan er skrivað á umsóknarblaðið.

Umsøkjarin hevur undirskrivað umsóknina og samstundis givið HTM loyvi til at savna inn neyðugar upplýsingar til málsviðgerðina. Viðmerkt er, at ein sjúkrarøktarfrøðingur hevur hjálpt umsøkjaranum við umsóknini.

Tann 23. mai 2005 sendir Hjálpartólamiðstøðin umsøkjaranum soljóðandi skriv:

„Almannastovan hevur tann 23.05.2005 viðgjørt umsókn tygara, og avgjørt varð at játtað umsóknini og veita stuðul til tað, ið søkt er um til láns.
Um ikki annað er avtalað, sendir HTM tygum hjálpartólini.“

Sama dag verður lániseðil fyri talarastól og gangibelti skrivaður og sendur til umsøkjaran.

Tann 26. mai 2005 verður lániseðilin avgreiddur. Samlaða viðgerðartíðin av hesum málinum var 7 dagar.

Mál nr. 7

Tann 26. apríl 2005 móttekur Hjálpartólamiðstøðin umsókn um gangistativ og rollator til ein mann, ið er 82 ára gamal. Umsøkjarin hevur nýtt standard umsóknarblaðið hjá Hjálpartólamiðstøðini.

Í umsóknarblaðnum stendur soleiðis um orsøkina til, at viðkomandi skal hava hjálpartól:

> „Umsøkjarin hevur canser, orkar illa at ganga. Konan, sum eisini er gomul og skroybilig, má styðja hann. Umsøkjarin vil fegin royna bæði gangistativ og rollator og evt. hava bæði ella senda annað aftur."

Eingin læknaváttan er skrivað á umsóknarblaðið.

Umsøkjarin hevur undirskrivað umsóknina og samstundis givið HTM loyvi til at savna inn neyðugar upplýsingar til málsviðgerðina. Viðmerkt er, at ein økisterapeutur hevur hjálpt umsøkjaranum við umsóknini.

Tann 28. apríl 2005 sendir Hjálpartólamiðstøðin umsøkjaranum soljóðandi skriv:

> „Almannastovan hevur tann 28.04.2005 viðgjørt umsókn tygara, og avgjørt varð at játtað umsóknini og veita stuðul til tað, ið søkt er um til láns.

Um ikki annað er avtalað, sendir HTM tygum hjálpartólini."

Sama dag verður lániseðil fyri gangistativ og rollator skrivaður og sendur til umsøkjaran.

Lániseðilin uppá gangistativið verður avgreiddur tann 9. mai 2005, meðan lániseðilin uppá rollatorin verður avgreiddur 20. mai 2005. Samlaða viðgerðartíðin av hesum málinum var 13 dagar.

Mál nr. 8

Tann 25. mai 2005 móttekur Almannastovan umsókn um gangistativ til eina kvinnu, ið er 81 ára gomul. Umsøkjarin hevur nýtt standard umsóknarblaðið hjá Hjálpartólamiðstøðini.

Ein kontaktpersónur hevur undirskrivað umsóknina vegna umsøkjaran og samstundis givið HTM loyvi til at savna inn neyðugar upplýsingar til málsviðgerðina. Viðmerkt er, at ein sjúkrarøktarfrøðingur hevur hjálpt umsøkjaranum við umsóknini.

Í umsóknarblaðnum stendur soleiðis um orsøkina til, at viðkomandi skal hava gongustativ:

> „Collum fem. frakt. op. 09.05.05.
>
> Tørv á rullustativi til gonguvenjingar."

Ein kommunulækni hevur skrivað læknaváttan á umsóknina.

Tann 6. juni 2005 hevur fysioterapeutur skrivað soljóðandi notat í málið á Hjálpartólamiðstøðini:

> „Sambært h.sjs. … er talan um varandi tørv.“

Tann 6. juni 2005 verður soljóðandi bræv sent umsøkjaranum:

> „Almannastovan hevur tann 06.06.2005 viðgjørt umsókn tygara, og avgjørt varð at játtað umsóknini og veita stuðul til tað, ið søkt er um til láns.
>
> Um ikki annað er avtalað, sendir HTM tygum hjálpartólini.“

Sama dag verður lániseðilin fyri gangistativið skrivaður og sendur umsøkjaranum.

Lániseðilin verður avgreiddur tann 8. juni 2005. Tað tók 14 dagar at avgreiða hesa umsóknina.

<u>Mál nr. 9</u>

19. apríl 2005 móttekur Hjálpartólamiðstøðin umsókn um gangistativ til eina kvinnu, ið er 88 ára gomul. Umsøkjarin hevur nýtt standard umsóknarblaðið hjá Hjálpartólamiðstøðini.

Umsøkjarin hevur undirskrivað umsóknina og samstundis givið HTM loyvi til at savna inn neyðugar upplýsingar til málsviðgerðina. Viðmerkt er, at ein heimasjúkrasystir hevur hjálpt umsøkjaranum við umsóknini. Umsóknin er send frá Heimarøktini.

Í umsóknarblaðnum stendur soleiðis um orsøkina til, at viðkomandi skal hava gongustativ:

> „Er illa gongd. Høgra knæ er vánaligt. Hevur havt blóðtøpp í høvdinum og sær illa við høgra eygað. Er einsamøll inni allan dagin.“

Eingin læknaváttan fylgir við umsóknini.

Tann 20. apríl 2005 verður soljóðandi skriv sent umsøkjaranum:

> „Almannastovan hevur tann 20.04.2005 viðgjørt umsókn tygara, og avgjørt varð at játtað umsóknini og veita stuðul til tað, ið søkt er um til láns.
>
> Um ikki annað er avtalað, sendir HTM tygum hjálpartólini.“

Sama dag verður lániseðilin fyri gangistativið skrivaður og sendur umsøkjaranum.

Tann 3. mai 2005 sendir sjúkrarøktarfrøðingur í Heimarøktini eitt telefax til Hjálpartólamiðstøðina viðvíkjandi umbýting av gangistativi.

Tann 6. mai 2005 verður lániseðilin avgreiddur. Málsviðgerðartíðin av hesi umsókn var tilsamans 17 dagar.

Mál nr. 10
Tann 20. juni 2005 móttekur Hjálpartólamiðstøðin umsókn um gangistativ, vesihækkara og armstuðlar til vesi til eina kvinnu, ið er 77 ára gomul. Umsøkjarin hevur nýtt standard umsóknarblaðið hjá Hjálpartólamiðstøðini.

Umsøkjarin hevur undirskrivað umsóknina og samstundis givið HTM loyvi til at savna inn neyðugar upplýsingar til málsviðgerðina. Viðmerkt er, at ein ergoterapeutur hevur hjálpt umsøkjaranum við umsókníni.

Í umsóknarblaðnum stendur soleiðis um orsøkina til, at viðkomandi skal hava hjálpartól:

> „Heimavitjan hevur verið hjá umsøkjaranum eftir at hon hevur ligið innløgd…
>
> Umsøkjarin er versnað fysiskt. Hon gongur ikki gott leys. Gongur væl við gangistativi.
>
> Baðiverilsi er funktionelt innrættað.
>
> Wc kumman er heldur lág hjá henni.
>
> Tørvar ein stuðul at halda sær í, tá hon reisir seg frá wc.
>
> Wc kumman stendur í einum hjørni, har veggurin er 46 cm, og tað er soleiðis trupult at seta ein stuðul/stativ fast í veggin har.
>
> Um umsøkjarin fekk hesi hjálpatól hevði tað lætt væl um í tí dagliga hjá henni."

Medisinskur sjúkrahúsyvirlækni hevur váttað umsókníni.

Tann 22. juni 2005 verður soljóðandi skriv sent umsøkjaranum:

> „Almannastovan hevur tann 22.06.2005 viðgjørt umsókn tygara, og avgjørt varð at játtað umsókníni og veita stuðul til tað, ið søkt er um til láns.
>
> Um ikki annað er avtalað, sendir HTM tygum hjálpartólini."

Sama dag verður lániseðil fyri gangistativið og vesihækkaran skrivaður og sendur umsøkjaranum.

Tann 23. juni 2005 verður lániseðilin avgreiddur. Málsviðgerðartíðin í hesum máli var einans 3 dagar.

**Samandráttur og niðurstøða**

*Í samband við hesa kanning av málum um gangistativ v.m. havi eg eftirkannað málsviðgerðina og málsviðgerðartíðina hjá Almannastovuni.*

*Partshoyring er ikki viðkomandi í omanfyri standandi málum viðvíkjandi gangistativum v.m., av tí at Hjálpartólamiðstøðin ikki hevur*

*útvegað sær upplýsingar í hesum málum. Tað sær eisini út til, at nøktandi ráðgeving og vegleiðing er givin í mun til kunngerð um ráðgevingar- og vegleiðingarskyldu sambært forsorgarlógini og § 7 í fyrisitingarlógini.*

*Í telefonnotati frá 9. september 2005 hevur leiðarin á Hjálpartólamiðstøðini upplýst, at Hjálpartólamiðstøðin ikki krevur læknaváttan, tá ið talan er um smá hjálpartól. Eg eri samdur við leiðaran, at tað í hesum málum ikki er neyðugt við formligum læknaváttanum, men at tað er nøktandi, at annað heilsustarvsfólk váttar, at umsøkjari hevur tørv á hjálpartólinum, ella at heimavitjan frá Hjálpartólamiðstøðini váttar hetta.*

*Tó kann viðmerkjast, at í máli nr. 4 er ikki upplýst, hvørt tað er eitt heilsustarvsfólk, ið hevur hjálpt til við at útfylla umsóknina. Hetta er tí ikki nøktandi skjalprógvan fyri, at treytirnar í § 18, stk. 5 í forsorgarlógini eru loknar.*

*Tað er ikki neyðugt við grundgeving sambært §§ 21 og 23 í fyrisitingarlógini og kæruvegleiðing sambært § 24 í fyrisitingarlógini í hesum málum, av tí at hjálpartólini verða játtað í øllum málunum. Eg dugi heldur ikki at síggja, at notatskyldan sambært § 6 í innlitslógini ikki er hildin í hesum málum. Eg havi tí heldur onga viðmerking hesum viðvíkjandi.*

*Viðvíkjandi málsviðgerðartíðini er at siga, at hon hevur verið stutt.*

*Í máli nr. 5 sendi Almannastovan tó ikki umsóknina til Hjálpartólamiðstøðina fyrr enn 12 dagar eftir, at Almannastovan hevur móttikið hana. Hetta meti eg ikki vera nøktandi.*

*Sum heild meti eg, at málsviðgerðin í hesum málum er nøktandi og sær út til at liva upp til stevnumiðið, ið Hjálpartólamiðstøðin hevur sett sær við innanhýsis reglum sínum.*

**c. 10 mál um koyristólar**

<u>Mál nr. 1</u>

Tann 2. juni 2005 móttekur Hjálpartólamiðstøðin umsókn um komfortkoyristól til eina kvinnu, ið er 77 ára gomul. Sama dag er mátitalva somuleiðis Hjálpartólamiðstøðini í hendi. Umsøkjarin hevur nýtt standard umsóknarblaðið hjá Hjálpartólamiðstøðini.

Umsøkjarin hevur undirskrivað umsóknina og samstundis givið HTM loyvi til at savna inn neyðugar upplýsingar til málsviðgerðina.

Viðmerkt er, at ein ergoterapeutur hevur hjálpt umsøkjaranum við umsókníni. Tað er Ergo-somatisk deild á Landssjúkrahúsinum, sum hevur sent bæði umsókn og mátitalvu til Hjálpartólamiðstøðina.

Í umsóknarblaðnum stendur soleiðis um orsøkina til, at viðkomandi skal hava hjálpartól:

> „Hevur brotið mjødnina – er stórur og ringur at flyta og hevur nógva pínu.
>
> Fer heim 06. 06. 05."

Tann 6. juni 2005 er innanhýsis notat skrivað á Hjálpartólamiðstøðini:

> „Umsøkjarin hevur brotið mjødnina og søkt er um koyristól. Ongar upplýsingar eru í umsókníni um prognosu og um talan er um varandi tørv. Havi tí sent fax til ergoterapiina á LS og biðið um læknaváttan, har upplýst verður um diagnosu, prognosu og um væntast kann at tørvurin á koyristóli er varandi."

Tann 6. juni 2005 er telefax sent til erogterapiina á Landssjúkrahúsinum, har biðið verður um læknaváttan. Hjálpartólamiðstøðin móttekur hesa læknaváttan tann 7. juni 2005. Í læknaváttanini stendur m.a.:

> „Tiltagende dårlig gangfunktion med faldtendens. Har brug for kørestol permanent. Epelepsi, dementia, …"

Tann 7. juni 2005 verður soljóðandi notat skrivað:

> „Læknaváttan er komin frá LS (verður journaliserað seinni), har mett er, at tørvurin á koyristóli er varandi. …, LS biðjur okkum senda koyristól til …."

Tann 7. juni 2005 verður soljóðandi skriv sent umsøkjaranum:

> „Almannastovan hevur tann 07.06.2005 viðgjørt umsókn tygara, og avgjørt varð at játtað umsókníni og veita stuðul til tað, ið søkt er um til láns.
>
> Um ikki annað er avtalað, sendir HTM tygum hjálpartólini."

Sama dag verður láníseðil skrivaður og sendur Landssjúkrahúsinum. Tann 8. juni 2005 verður láníseðilin avgreiddur. Umsóknin varð avgreidd eftir 6 døgum.

<u>Mál nr. 2</u>

Tann 28. juni 2005 móttekur Hjálpartólamiðstøðin umsókn um transportkoyristól til eina kvinnu, ið er 38 ára gomul. Umsøkjarin hevur nýtt standard umsóknarblaðið hjá Hjálpartólamiðstøðini.

Umsøkjarin hevur undirskrivað umsóknina og samstundis givið HTM loyvi til at savna inn neyðugar upplýsingar til málsviðgerðina. Umsøkjarin hevur sjálvur sent umsóknina til Hjálpartólamiðstøðina.

Í umsóknarblaðnum stendur soleiðis um orsøkina til, at viðkomandi skal hava koyristól:

„kokuloysn.“

Eingin læknaváttan ella váttan frá øðrum fakpersóni liggur í málinum. Mátitalva er gjørd.

Tann 7. juli 2005 verður soljóðandi skriv sent umsøkjaranum:

„Almannastovan hevur tann 07.07.2005 viðgjørt umsókn tygara, og avgjørt varð at játtað umsóknini og veita stuðul til tað, ið søkt er um til láns.

Um ikki annað er avtalað, sendir HTM tygum hjálpartólini.“

Sama dag verður lániseðil skrivaður og sendur umsøkjaranum. Tann 8. juli er lániseðilin avgreiddur.

Mín viðmerking:

*Tað framgongur ikki av málinum, hvørt váttan frá heilsustarvsfólki er fingin til vega. Eftir mínari meting átti antin læknaváttan ella váttan frá øðrum heilsustarvsfólki at verið til staðar, áðrenn hjálpartólið varð játtað, soleiðis at prógv var fyri tørvi á hjálpartóli. Málsviðgerðartíðin í hesum máli var 10 dagar.*

<u>Mál nr. 3</u>

Tann 4. juli 2005 móttekur Hjálpartólamiðstøðin umsókn um komfortkoyristól til ein mann, ið er 68 ára gamal. Umsøkjarin hevur nýtt standard umsóknarblaðið hjá Hjálpartólamiðstøðini.

Tað er viðmerkt á umsóknina, at umsøkjarin ikki er í stand til at skriva undir. Viðmerkt er, at ein fysioterapeutur hevur hjálpt umsøkjaranum við umsóknini.

Í umsóknarblaðnum stendur soleiðis um orsøkina til, at viðkomandi skal hava hjálpartól:

„Dialysusjúklingur. Ógvuliga avkreftaður, ofta óklárur.

Amputeraður á hø. femur 13.06.05. Væntast ikki at skula hava prot. vi. bein hevur sár á hælinum og tærnar eru ógvuliga myrkar. Og 2 tær eru deilvíst amputeraðar. Vi. VE er amputatiónsfríða.

Hevur sár á báðum bøllum, decubitus

Væntandi fær sj. brúk fyri koyristólinum í framtíðini.“

Ein váttan frá lækna er eisini skrivað á umsóknina. Eingin mátitalva liggur í málinum.

Tann 11. juli 2005 verður soljóðandi notat skrivað í málið á Hjálpartólamiðstøðini:

> „Viðmerkingar: Sambært … fysioterapeuti skal umsóknin annulerast. … Eg endi sostatt málið herfrá."

Hetta málið verður sostatt ikki endaliga avgreitt frá Hjálpartólamiðstøðini, men endar eftir ynski frá umsøkjaranum.

Mál nr. 4

Tann 24. juni 2005 móttekur Hjálpartólamiðstøðin eina umsókn um ein transportkoyristól við einhondsborði og ein 4 punktsstav frá eini kvinnu, ið er 73 ára gomul. Sama dag móttekur Hjálpartólamiðstøðin somuleiðis eina útfylta mátitalvu. Umsøkjarin hevur nýtt standard umsóknarblaðið hjá Hjálpartólamiðstøðini.

Umsøkjarin hevur undirskrivað umsóknina og samstundis givið HTM loyvi til at savna inn neyðugar upplýsingar til málsviðgerðina. Ergoterapeutur á Landssjúkrahúsinum hevur hjálpt umsøkjaranum við umsóknini og sent Hjálpartólamiðstøðini umsóknina.

Í umsóknarblaðnum stendur soleiðis um orsøkina til, at viðkomandi skal hava koyristól:

> „… hevur verið innløgd á E3 síðan mitt í apríl. Er lammað í hø. síðu – kann nú ganga við 4 punktsstavi + eftirlit, men má hava ein stól til útibrúk. Hevur onga funktion í hø. armi – nýtir einhondstól.
>
> Kunnu vit fáa stól og stav oman á E3 (hon verður her eina viku afturat.)"

Eingin læknaváttan liggur í málinum.

Tann 30. juni 2005 verður soljóðandi skriv sent umsøkjaranum:

> „Almannastovan hevur tann 30.06.2005 viðgjørt umsókn tygara, og avgjørt varð at játtað umsóknini og veita stuðul til tað, ið søkt er um til láns.
>
> Um ikki annað er avtalað, sendir HTM tygum hjálpartólini."

Sama dag verður lániseðil skrivaður og sendur umsøkjaranum. Tann 4. juli 2005 verður lániseðilin avgreiddur. Samlaða málsviðgerðartíðin av hesum máli var 10 dagar.

Mál nr. 5

Tann 17. juni 2005 móttekur Hjálpartólamiðstøðin eina umsókn um koyristól við fótstuðlum til eina gentu, ið er 17 ára gomul. Umsóknin

er dagfest 14. juni 2005. Umsøkjarin hevur nýtt standard umsóknarblaðið hjá Hjálpartólamiðstøðini. Tann 17. juni 2005 móttekur Hjálpartólamiðstøðin eisini eina útfylta mátitalvu.

Verjin hjá umsøkjaranum hevur undirskrivað umsóknina og samstundis givið HTM loyvi til at savna inn neyðugar upplýsingar til málsviðgerðina. Tað er viðmerkt, at ein kvinna hevur hjálpt umsøkjaranum við umsóknini. Tað er líkt til, at hendan kvinnan starvast á einum umlættingarstovni, av tí at umsóknin er send hagani frá.

Í umsóknarblaðnum stendur soleiðis um orsøkina til, at viðkomandi skal hava koyristól:

> „…
> Hevur ein koyristól, ið er vorðin ov lítil. Hevur tørv á einum størri stóli til at nýta úti."

Læknaváttan fyriliggur ikki í málinum.

Tann 22. juni 2005 verður soljóðandi skriv sent umsøkjaranum:

> „Almannastovan hevur tann 22.06.2005 viðgjørt umsókn tygara, og avgjørt varð at játtað umsóknini og veita stuðul til tað, ið søkt er um til láns.
>
> Um ikki annað er avtalað, sendir HTM tygum hjálpartólini."

Sama dag verður lániseðil skrivaður og sendur umsøkjaranum. Tann 23. juni 2005 verður lániseðilin avgreiddur. Samlaða málsviðgerðartíðin í hesum málinum var 6 dagar.

<u>Mál nr. 6</u>

Tann 17. juni 2005 móttekur Hjálpartólamiðstøðin umsókn um transportkoyristól til ein mann, ið er 85 ára gamal. Umsøkjarin hevur nýtt eitt umsóknarblað um hjálpiamboð/heilivág. Tann 17. juni 2005 móttekur Hjálpartólamiðstøðin eisini eina mátitalvu.

Umsøkjarin hevur undirskrivað umsóknina. Heimarøktin hevur sent umsóknina og mátitalvuna til Hjálpartólamiðstøðina.

Tað framgongur ikki av umsóknarblaðnum, hvør orsøkin er til, at umsøkjarin skal hava koyristól. Eingin læknaváttan fylgir við umsóknini.

Tann 22. juni 2005 verður soljóðandi skriv sent umsøkjaranum:

> „Almannastovan hevur tann 22.06.2005 viðgjørt umsókn tygara, og avgjørt varð at játtað umsóknini og veita stuðul til tað, ið søkt er um til láns.
>
> Um ikki annað er avtalað, sendir HTM tygum hjálpartólini."

Sama dag verður lániseðil skrivaður og sendur umsøkjaranum. Tann 23. juni 2005 verður lániseðilin avgreiddur.

Mín viðmerking:
*Sambært § 18, stk. 5 kann koyristólur bert verða latin, um serlig orsøk er fyri tí. Tað framgongur ikki av umsóknini, hvørt eitt heilsustarvsfólk hevur hjálpt umsøkjaranum við umsóknini. Læknaváttan fyriliggur ikki í málinum. Eftir mínari meting átti Hjálpartólarmiðstøðin at kanna, hvørt umsøkjarin hevði tørv á koyristóli, áðrenn hjálpartólið varð játtað. Av tí at Heimarøktin hevur sent umsóknina við telefaksi, stendur stovnurin møguliga inni fyri upplýsingunum á umsóknini, men eingin undirskrift er frá heilsustarvsfólki á umsóknini. Samlaða málsviðgerðartíðin í hesum máli var 6 dagar.*

<u>Mál nr. 7</u>
Tann 15. juni 2005 móttekur Hjálpartólamiðstøðin eina umsókn um koyristól til ein mann, ið er 72 ára gamal. Umsøkjarin hevur útfylt eina umsókn um hjálpartól. Tann 15. juni 2005 móttekur Hjálpartólamiðstøðin eisini eina útfylta mátitalvu.

Umsøkjarin hevur undirskrivað umsóknina og samstundis givið HTM loyvi til at savna inn neyðugar upplýsingar til málsviðgerðina. Heimasjúkrasystrar hava hjálpt umsøkjaranum við umsóknini og mátitalvuni.

Í umsóknarblaðnum stendur soleiðis um orsøkina til, at viðkomandi skal hava koyristól:

> „Umsøkjarin hevur sequele eftir apoplexi.
>
> Niðursetta kraft í v. síðu.“

Eingin læknaváttan fylgir við umsóknini.

Tann 22. juni 2005 verður soljóðandi skriv sent umsøkjaranum:

> „Almannastovan hevur tann 22.06.2005 viðgjørt umsókn tygara, og avgjørt varð at játtað umsóknini og veita stuðul til tað, ið søkt er um til láns.
>
> Um ikki annað er avtalað, sendir HTM tygum hjálpartólini.“

Tann 22. juni 2005 verður láníseðil skrivaður og sendur umsøkjaranum. Tann 23. juni 2005 verður láníseðilin avgreiddur. Til samans var málsviðgerðartíðin í hesum málinum 8 dagar.

<u>Mál nr. 8</u>
Tann 2. juni 2005 móttekur Hjálpartólamiðstøðin umsókn um luftmadrassu, komfortkoyristól og lyftu til ein mann, ið er 80 ára gamal. Umsøkjarin hevur útfylt eina umsókn um hjálpartól. Tann 2. juni 2005 móttekur Hjálpartólamiðstøðin eisini eina útfylta mátitalvu.

Umsøkjarin hevur undirskrivað umsóknina og samstundis givið HTM loyvi til at savna inn neyðugar upplýsingar til málsviðgerðina. Heimasjúkrasystrar hava hjálpt umsøkjaranum við umsóknini og mátitalvuni.

Í umsóknarblaðnum stendur soleiðis um orsøkina til, at viðkomandi skal hava koyristól:

„Collum femoris fraktur dxt. 31/5-05.

Opr. 1/6 LIH seym

Liggur sera tungt í songini.

Er dementur → kann ikki skrivað undir.

Útskr. frá … 2/6 → kunnu vit fáa eina luftmadrassu skjótast gjørligt."

Eingin læknaváttan fylgdi við umsóknini.

Tann 3. juni 2005 verður soljóðandi skriv sent umsøkjaranum:

„Umsókn tygara, dagfest 02.06.2005 um Luftmadrassu, konfortkoyristól og lyft

Forsorgarlógin § 18, stk. 5.

…

Almannastovan hevur tann 03.06.2005 viðgjørt umsókn tygara, og avgjørt varð at játtað umsóknini og veita stuðul til tað, ið søkt er um til láns.

Um ikki annað er avtalað, sendir HTM tygum hjálpartólini."

Tann 3. juni 2005 verður lániseðil skrivaður viðvíkjandi luftmadrassuni. Sama dag verður lániseðilin avgreiddur.

Tann 8. juni 2005 verður lániseðil skrivaður uppá koyristól, lyft, heilsegl og toiletsegl. 10. juni 2005 verður ein lániseðil avgreiddur. Tað framgongur ikki hvat hesin lániseðil viðvíkur, men tað er sannlíkt, at koyristólur, lyft og segl verða avgreidd hendan dag, tí lániseðilin uppá hesi tólini verður skrivaður 8. juni.

Tann 15. juni 2005 verður soljóðandi notat skrivað:

„H.sj.s. … ringir og biður um eina standilyft í staðin fyri fyrr umbidnu lyft. Játti og gevi boð til goymsluna.“

17. juni 2005 verður aftur notat skrivað:

„H.sj.s. ringir aftur og sigur at … ikki torir at brúka standilyftian. Biður tí um at fáa lyft við segli, sum tey fyrst søktu um. Leggi málið aftur til goymsluna at avgreiða umbýti av lyft.“

Tann 28. juni og 29. juni 2005 verða tveir lániseðlar afturat avgreiddir. Tað stendur ikki í skjalinum hvat fyri hjálpartól talan er um, men allarhelst er talan um omanfyri standandi umbýti av lyft.

Mín viðmerking:
*Samlaða málsviðgerðartíðin í hesum málinum var 27 dagar. Hetta kann tykjast at verða ein í so drúgv málsviðgerð, serliga sæð í mun til, at umsøkjarin var útskrivaður av sjúkrahúsi tann 2. juni 2005. Men málið var avgreitt 8. juni, síðani var ein umbýting av lyft, og tí var málið ikki endaliga avgreitt fyrr enn 29. juni. Eg havi tí ikki orsøk til at fýlast á málsviðgerðartíðina.*

<u>Mál nr. 9</u>
Tann 27. mai 2005 móttekur Hjálpartólamiðstøðin umsókn um koyristól, baðiskammil, bækkenstól, gangistativ og stong at spenna ímillum loft og gólv til eina kvinnu, ið er 84 ára gomul. Umsøkjarin hevur nýtt standard umsóknarblaðið hjá Hjálpartólamiðstøðini. Tann 27. mai 2005 móttekur Hjálpartólamiðstøðin eisini eina útfylta mátitalvu.

Umsøkjarin hevur undirskrivað umsóknina og samstundis givið HTM loyvi til at savna inn neyðugar upplýsingar til málsviðgerðina. Tað er viðmerkt, at Dóttir umsøkjaran og ein økisterapeutur hava hjálpt umsøkjaranum við umsóknini.

Í umsóknarblaðnum stendur soleiðis um orsøkina til, at viðkomandi skal hava koyristól:

> „Hon hevur bert eitt eyga har sjónin er +13.
>
> Aldur og tann vánalig sjón ger at hon hevur trupulleika at orientera seg gerst tí ósikkur og bangin fyri at rena seg inn í eitthvørt. Hon heldur seg til mest til inni í kamarinum. At ganga túr við henni, nakað hon ynskir er ógjørligt, orsaka av at hon ikki sær og er hon veruliga handikappa og skerd fyri upplivilsum."

Eingin læknaváttan fylgdi við umsóknini.

Tann 27. mai 2005 er ískoyti til umsókn í hendi á Hjálpartólamiðstøðini, sum ein økisterapeutur hevur skrivað. Hetta skriv er soljóðandi:

> „… er at kalla heilt blind, hon fær javnan smáar blóðtøppar, tykist nakað dement og er illa gongd. … fær hjálp til persónliga røkt og brúsubað. …"

Tann 3. juni 2005 verður soljóðandi skriv sent umsøkjaranum:

> „Almannastovan hevur tann 03.06.2005 viðgjørt umsókn tygara, og avgjørt varð at játtað umsóknini og veita stuðul til tað, ið søkt er um til láns.
>
> Um ikki annað er avtalað, sendir HTM tygum hjálpartólini."

Sama dag verður lániseðil skrivaður og sendur umsøkjaranum.

Tann 7. juni 2005 verður soljóðandi arbeiðsviðmerkingar skrivaðar í málið:

> „Kanst tú seta eina stong upp í einari brúsukabinu, longdin er 233 cm.
> Konan er sera blind so stongin skal brúkast til at orienterea seg við.“

Tann 8. juni 2005 er lániseðilin avgreiddur.

15. juni 2005 verður soljóðandi notat skrivað í málið:

> „Havi montera RF stong í brúsukabin.“

Mín viðmerking:

*Samlaða málsviðgerðartíðin av umsóknini tók 18 dagar. Hetta kann tykjast sum ein heldur long málsviðgerðartíð, men av tí at talan í hesum førinum var um eina umsókn um nógv ymisk hjálpartól, har tað síðsta hjálpartólið varð sett upp 15. juni, havi eg ikki orsøk til at fýlast á málsviðgerðartíðina. Havast skal í huga, at avgerð varð tikin um at játta umsóknini longu tann 3. juni, og lániseðilin varð avgreiddur longu 8. juni.*

Mál nr. 10

Tann 13. juni 2005 móttekur Hjálpartólamiðstøðin eina áheitan frá døtrunum hjá eini kvinnu, ið er 69 ára gomul. Døtrarnar halda, at mamman hevur bráfeingis tørv á koyristóli og tær heita í hesum sambandi á Hjálpartólamiðstøðina um at koma á vitjan í heiminum hjá mammuni, fyri at hyggja eftir viðurskiftunum.

Tað framgongur ikki av málinum, hvørt ein heimavitjan hevur verið. Onki notat er gjørt um eina slíka vitjan. Viðmerkt er tó á sjálvan teldupostin, at umsóknin eisini skal fevna um ein bækkenstól, polstring og eina lyft. Undir hesi viðmerking stendur eitt fornavn og fartelefonnummar. Harumframt er skrivað við hándskrift á teldupostin: sitandi balancu, má hava sela – eitt sindur av megi í ørmunum. Tað sæst ikki, hvør hevur skriva hetta.

Eingin læknaváttan ella váttan frá øðrum heilsustarvsfólki fylgdi við umsóknini.

Tann 14. juni 2005 verður soljóðandi skriv sent umsøkjaranum:

> „Umsókn tygara, dagfest 13.06.2005 um ein koyristól, ein bækkenstól og eina lyft
>
> …

Almannastovan hevur tann 03.06.2005 viðgjørt umsókn tygara, og avgjørt varð at játtað umsóknini og veita stuðul til tað, ið søkt er um til láns.

Um ikki annað er avtalað, sendir HTM tygum hjálpartólini."

Sama dag verður lániseðil skrivaður og sendur umsøkjaranum.

Tann 23. juni verður lániseðilin avgreiddur.

Mín viðmerking:

*Í hesum málinum er einki umsóknarblað útfylt. Tí eru eingir upplýsingar um, hví umsøkjaranum tørvar hjálpartól v.m. Eingin læknaváttan ella váttan frá heilsustarvsfólki liggur í málinum, um at tørvur er á koyristóli. Eftir mínari meting átti eitt heilsustarvsfólk at gjørt eina meting av tørvinum hjá umsøkjaranum, og hetta átti at verið noterað í málið. Tað framgongur heldur ikki av málinum, hvørt ein heimavitjan hevur verið. Um so er, at ein persónur frá Hjálpartólamiðstøðini var á heimavitjan, átti viðkomandi at skriva eitt notat um hetta, jb. § 6, stk. 1 í innlitslógini. Hetta er ikki gjørt. Eg meti tí ikki, at málsviðgerðin í hesum málinum er nøktandi. Eg havi tó einki at finnast at samlaðu viðgerðartíðini av umsóknini, ið var 10 dagar.*

**Samandráttur og niðurstøða**

*Eins og við gangistativunum v.m. er partshoyring ikki viðkomandi í omanfyri standandi málum um umsókn um koyristól v.m., tí at Hjálpartólamiðstøðin hevur ikki útvegað sær upplýsingar í hesum málum. Tað sær eisini út til, at nøktandi ráðgeving og vegleiðing er givin í hesum málum í mun til kunngerð um ráðgevingar- og vegleiðingarskyldu sambært forsorgarlógini og § 7 í fyrisitingarlógini.*

*Í málum nr. 2, 6 og 10 er eingin læknaváttan ella váttan frá heilsustarvsfólki um tørvin hjá umsøkjaranum á hjálpartóli. Hetta meti eg ikki vera nøktandi málsviðgerð.*

*Viðvíkjandi skjalprógvan fyri tørvinum hjá umsøkjaranum á hjálpartóli kann sigast, at í hesum førum er talan um dýrari fyriskipanir. Tað er tó heldur ikki í hesum førunum orsøk til at krevja formliga læknaváttan e.l., men tørvurin á hjálpartóli átti kortini at verið skjalprógvaður onkursvegna. Eg skal í hesum sambandi vísa til tað, sum er nevnt frammanfyri viðvíkjandi gangistativum v.m.*

*Av tí at allar umsóknirnar í omanfyri standandi málum vórðu játtaðar, hevði Almannastovan ikki sambært §§ 21 og 23 í fyrisitingarlógini skyldu til at grundgeva fyri avgerðum sínum ella at veita umsøkjar-*

*unum kæruvegleiðing sambært § 24. Eg havi tí onga viðmerking hesum viðvíkjandi.*

*Sum heild meti eg, at málsviðgerðartíðin í hesum málum er nøktandi. Í málið nr. 1, 4 og 8 verður sjúklingur útskrivaður av sjúkrahúsi innan ávíst tíðarskeið og tørvar hjálpartól, tá ið hann kemur heim. Málini verða í hesum førum avgreidd soleiðis, at umsøkjarin fær koyristól stutt eftir heimkomuna frá sjúkrahúsi.*

**d. 5 mál um stuðul til avlamisbil**

Stuðul til keyp av avlamisbili verður veittur sambært § 18, stk. 5 í forsorgarlógini. Í juni 2005 varð kunngerð nr. 91 frá 22. juni 2005 um stuðul til keyp av avlamisbili sett í gildi. Av tí at tey mál, ið umboðsmaðurin hevur fingið til láns frá Hjálpartólamiðstøðini, eru eldri enn so, hevur kunngerðin ikki týdning fyri hesa kanning.

Almannastovan hevur gjørt eitt vegleiðingarskriv um viðgerð av slíkum málum, ið er soljóðandi:

*„HTM – Hjálpartólamiðstøðin 06-01,02,03,04 starvsfólkahandbók*

**Málsviðgerð í samband við útvegan av avlamisbili fyrstuferð**

| Atgerð | Lýsing | Skjøl/viðmerkingar |
|---|---|---|
| **1. Viðskiftafólkið** | Biður HTM senda sær umsóknarblað í sambandi við at hann/hon ætlar sær at søkja um avlamisbil | Umsókn<br>Vegleiðing<br>Kunning um treytir. |
| **2. Umsókn kemur til HTM** | Umsókn um avlamisbil kemur til HTM.<br>Umsóknin verður journaliserað og latin málsviðgerða til víðari avgreiðslu.<br>Málsviðgerðin fær til vega neyðug skjøl so at málsviðgerðin kann halda áfram | Umsókn<br>Læknaváttan |
| **3. Fyribils tørvsmeting** | Málsviðgerðin ger, við grundarlagi í umsóknini og læknaváttanini, eina fakliga meting av umsøkjaranum fyri at staðfesta, um hann hevur tørv á avlamisbili. | Serlæknaváttan<br>Heimavitjunarskriv<br><br><br>Læknaráðgevin<br>Koyrikort átekning |

| | | |
|---|---|---|
| | Er ivamál, kann serlæknaváttan ella annað umbiðast.<br>Eru framvegis ivamál kann heimavitjan ella vitjan av viðskiftafólkinum á HTM verða ein hjálp til staðfestingina.<br>**Málsviðgerðin hevur ábyrgdina av at útvega allar neyðugar upplýsingar áðrenn málið kann fara til støðutakan á §18 fundi.** | 100 m gongd<br>Stíga uppí bus |
| **4. Lýsing av tørvinum** | Málsviðgerðin ger eina skrivliga tørvslýsing, ið skal leggjast fyri §18 ráðið til støðutakan.<br>Betri máli er lýst, skjótari verða avgerðirnar tiknar. | |
| **5. §18** | Sýtur<br>Grundgeving fyri sýting. | Sýtanarskriv. |
| **6. Kæra** | Kæruummæli | |
| **7. Kæruavgerð** | 1. Staðfesting<br>2. Nýggj viðgerð<br>3. Viðhald | Málið endar.<br>Byrjar umaftur<br>Kærarin fær av-lamisbil |
| **8. §18** | Játtar fyribils | Játtanarskriv. |
| **9. Tørvsmeting** | Málsviðgerðin ger avtalu við viðskiftafólkið um:<br>– Neyvari meting av tørvinum.<br>– Støðd á bili.<br>– Serligar tillagingar.<br>Líknandi bilar kunnu roynast. | Vanligan bil / st. car<br>Stóran bil<br>Eykaútgerð |
| **10. Tørvslýsing** | Málsviðgerðin ger ein neyva fakliga lýsing av tørvinum.<br>Um neyðugt skal skitsa gerast av innrætting. | |
| **11. Kanning av bilum** | Kanningin skal, grunda á tørvslýsingina, staðfesta hvønn bilviðskiftafólki hevur tørv á við atliti at | Tilboð verða heintaði.<br>Standard tørvsmeting. |

| | | |
|---|---|---|
| | – Bíligastu nøktandi loysn<br>– Ynski hjá viðskiftafólkinum<br>**Stuðul verður ikki veittur til bil sum <u>ikki nøktar tørvin</u> hjá viðskiftafólkinum.**<br>Ynskir viðskiftafólki dýrari loysn verður hann/hon at gjalda munin sjálvi. | |
| **12. Góðkenning** | Tá funnið er fram til egnaða/-ynskta bilin, er neyðugt at viðskiftafólki og HTM eru komin til sættis um<br>– bil<br>– innrætting<br>– eykaútgerð<br>– Býtisbil<br>– Gjaldsviðurskifti<br>Viðskiftafólki **<u>skal skrivligani</u>** góðkenna bíleggingarseðilin og møguligar skitsur ella tekningar. | Bíleggingarseðil saman við øðrum skjølum verða greið.<br>– Stuðul<br>– Lán<br>– Skrásetingargjald<br>– Eginfígging<br>– Evt. pensións viðursk. |
| **13. §18 Endalig játtan** | Endalig játtan frá § 18 ráðnum skal fyriliggja uppá bíleggingarseðilin og tilboðið. | Játtanarskriv |
| **14. Bílegging** | Bilurin verður bílagdur. | |
| **15. Skrásetingargjald** | Tá bilurin er eyðmerktur (tvs. merki, model, typa og skrokknr. er kennt) skal áheitan við nevndu upplýsingum og eigaraviðurskiftum sendast til<br>Toll- & Skattstova Føroya sum roknar út skrásetingargjaldi. | Skrásetingargjald +mvg verður flutt til bilhandlaran saman við láns- og stuðulsgjøldunum. |

| | | |
|---|---|---|
| **16. Gjaldsviður skifti** | Áður enn HTM kann útgjalda pening skal pantibræv verða tinglýst í bilinum.<br>Avrit av pantibrævinum skal sendast Bileftirlitinum til átekningar. Bileftirlitið sendur áteknaða pantibrævi aftur til HTM. | |
| **17. Útflýggjan** | Áðrenn bilurin verður útflýggjaður viðskiftafólkinum, skal kannast, um øll viðurskifti eru sum tey eiga. | Bilurin við útgerð<br>Skráseting<br>Gjaldsviðurskifti<br>Tinglýsing v.m. |
| **18. Rustviðgerð** | Allir avlamisbilar eiga at rustverjast áðrenn teir verða útflýggjaðir – hetta fyri at økja um brúktbilavirði. | |
| **19. Útskifting** | Tá søkt verður um at útskifta verandi bil, eigur Bileftirlitið at kanna bilin fyri at vita hvussu long livitíð við rímuligum nýtslukostnaði er eftir.<br>Verður mett at livitíðin á 10 ár gomlum bili er 4 ár ella meir, verður umsóknin sýtt. Tó kann søkjast aftur um 2 ár.<br>Verður mett at livitíðin er 1-2 ár verður umsóknin játtað. | Avgerð á § 18 fundi 24.10.2001 |
| **20. Mannagongd við útskifting.** | Mannagongdin í sambandi við útskifting av avlamisbili er sum greitt frá omanfyri. | |

<u>Mál nr. 1</u>

Tann 2. mars 2005 móttekur Hjálpartólamiðstøðin soljóðandi umsókn frá einum manni, ið er 36 ár. Maðurin fær fyritíðarpensjón og arbeiðir ikki:

> „Undirritaði …, vil hervið søkja um at fáa sak mína upp aftur latna viðvíkjandi játtan til bilkeyp.

Tit skuldu havt allar teir upplýsingar tit hava brúk fyri, eisini frá lækna.

Eg havi verið hjá Berg Motors og roynt ymiskar bilar, av tí at tað ikki kann verða hvør sum helst, vegna mítt problem við at sleppa út og inn í bilin. Tann sum royndist best, tað er ein sum eitur Grand Vitara 1.6 í bensin til virði 189.990,- kr.

Vónandi hoyri eg skjótt aftur frá tykkum, av tí at hettar er vorið ein hastisak.

Við vón um skjóta og góða viðgerð."

Tað framgongur ikki av málinum, hvørt Hjálpartólamiðstøðin hevur sent umsøkjaranum móttøkuváttan viðvíkjandi hesum skrivi.

Tann umsóknin, ið umsøkjarin vísir til, liggur í málinum og er dagfest 17. juni 2002. Standard umsóknarblað um stuðul til avlamisbil er útfylt og undirskrivað av umsøkjaranum. Avrit av koyrikorti er hjálagt umsóknarblaðnum.

Tvær læknaváttaninir liggja eisini í málinum. Ein frá einum føroyskum kommunulækna, dagfest 24. oktober 2001, og ein serlæknaváttan frá lækna í medesini á Ríkissjúkrahúsinum, dagfest 17. september 2003. Harumframt er skriv, ið lýsir støðuna hjá umsøkjaranum, frá sosialráðgeva á Ríkissjúkrahúsinum í málinum. Skrivið er dagfest 17. apríl 2000.

Tann 8. mai 2003 fær umsøkjarin fráboðan um, at § 18-ráðið á fundi tann 30. apríl 2003 hevur samtykt at játta umsóknini og veita stuðul til keyp av avlamisbili. Tann 28. oktober 2003 er eitt notat gjørt frá bilaroynd.

Tann 27. mai 2004 verður soljóðandi skriv sent umsøkjaranum:

„Viðvíkjandi: umsókn tygara um avlamisbil

Tilvísing: Telefonsamrøða okkara millum 26.05.2004.

Við hesum skal vera sagt frá at málið endar.

Sambært telefonsamrøðu okkara millum er tað tygara ynski at málið steðgar."

Eftir at áheitanin er komin frá umsøkjaranum um at taka málið uppaftur, er málsgongdin henda:

Tann 17. mars 2005 hevur umsøkjarin saman við fysioterapeuti á HTM royndarkoyrt tveir bilar og soljóðandi notat er skrivað í málið:

„Vit hava royndarkoyrt Wagon R 1.3 og Grand Vitara 1.6. Vit tosaðu um hvat og hvussu við automatiskum gearum, men í løtuni er ikki tørvur á tí. Eisini vendi vit spurninginum viðvíkjandi stoytdoyving, og har er Grand V. bilurin nakað betri.

Wagon R nøktar tørvin hjá …, men hann hevur ynski um at keypa ein Grand Vitara. … vendir aftur til HTM viðvíkjandi hvat slag av bili talan verður um.

Báðir bilanir kunnu hava automatisk gear, men Grand V. skal uppá ein 2.o

Malt verður til ein Wagon R 1.3, og er ynski um ein Grand Vitara 1.6 er tað í lagi, men … rindar so eisini munin millum hesar bilar.“

Tann 18. mars 2005 verður umsóknin endaliga játtað og soljóðandi játtanarskriv sent umsøkjaranum (skrivið er ikki dagfest, so ikki sæst nær tað er skrivað ella sent út):

„**Viðvíkjandi**: Endalig játtan av umsókn um avlamisbil

**Tilvísing**: Umsókn tygara, dagfest 17.06.2002 sum eftir áheitan frá tygum er uppaftur tikin 02.03.2005 um avlamisbil.

Forsorgarlógin § 18, stk. 5.

Sagt skal vera frá, at málið varð viðgjørt á fundi í § 18 ráðnum tann 30.04.2003 og var umsóknin játtað tá.

Endalig støða er tikin í málinum 18.03.2005 til játtanina.

Avgjørt varð at játta umsóknini og veita stuðul eftir § 18, stk. 5, í forsorgarlógini til:

| | |
|---|---|
| 1. UMLÆTTINGARBIL, fyri tilsamans | kr. 101.648,75 |
| Stuðulin verður veitt á henda hátt: | |
| 1. RENTUFRÍTT LÁN | kr. 30.000,- |
| 2. STUÐUL | kr. 30.000,- |
| 3. SKRÁSETINGARGJALD | kr. 41.648,75 |

Lánið skal **afturgjaldast** yvir 72 mðr. við kr. 416,67 um mánaðin.

Stuðulin verður niðurskrivaður yvir 72 mðr. við kr. 416,67 um mánaðin.

Skrásetingargjaldið verður niðurskrivað yvir 72 mðr. við kr. 578,45 um mánaðin.

Viðvíkjandi stuðulstreytum, sluttseðli / sáttmála, útvegan av skelti til avlamisakfør og upplýsingum annars, sí vegleiðing.

Hjálagt er veðbræv í leysafæ. Veðbrævið verður tinglisið sum trygd fyri tí veitta stuðlinum.

Tygum verða biðin um, saman við vitnum, at undirskriva veðbrævið, og senda tað aftur til Hjálpitólamiðstøðina saman við føði- / navnabræv og vígslubrævi. Alt verður síðani sent til tinglýsingar.

Aftaná, at veðbrævið er tinglýst, fáa tygum skriv higani, um at ávísing er send til bilseljara. Tá fylgir við makaskjal av tinglýsta veðbrævinum."

Tann 21. mars 2005 móttekur Almannastovan tilboð uppá bil frá bilasølu uppá tann bilin, sum umsøkjarain ynskti at keypa. Tann 28. apríl 2005 móttekur Hjálpartólamiðstøðin faktura uppá hendan bilin frá bilasøluni.

Tann 4. apríl 2005 hevur umsøkjarin undirskrivað veðbrævið saman við tveimum vitnum og sent tað aftur til Hjálpartólamiðstøðina. Vígslubræv og føðingar- og dópsbræv liggja í málinum.

Tann 5. apríl 2005 er veðbrævið tinglýst. Tann 8. apríl 2005 er soljóðandi notat skrivað á Hjálpartólamiðstøðini:

„Tinglýst veðbræv er afturkomið."

Tann 21. apríl 2005 verður útgjaldingarskjal skrivað.

Hjálpartólamiðstøðin móttekur tann 21. apríl 2005 skriv frá Bileftirlitinum um, at skrásetingargjaldið er áljóðandi kr. 41.483,-. Tann 27. mai 2005 sendir Hjálpartólamiðstøðin áheitan til Bileftirlitið um at skráseta Almannastovuna / HTM sum veðhavara og um skráseting av vektgjaldi. Tann 2. juni 2005 verður váttan send Hjálpartólamiðstøðini frá Bileftirlitinum, um at avlaminsbilurin er skrásettur.

Tann 27. mai 2005 verður veðhavaralýsing / trygging send Tryggingarfelagnum Føroyar. Tann 13. juli 2005 sendir Tryggingarfelagið váttan um at veðhavaralýsingarnar eru skrásettar hjá felagnum.

Tann 27. mai 2005 verður bræv sent til Toll og Skattstovu Føroya, um at hava veðbrævið í varðveitslu og at heinta lánskjølini um hesi ikki verða goldin til ásettu tíðina.

Tann 27. mai 2005 er notat skrivað, um at avrit at veðbrævinum er sent umsøkjaranum tann 27. mai 2005.

Mín viðmerking:
*Tað framgongur ikki av málinum, at móttøkuváttan er send umsøkjaranum.*

*Umsóknin verður játtað longu umleið 14 dagar eftir, at hon er móttikin. Samlaða málsviðgerðartíðin er eitt sindur undir 3 mánaðir.*

<u>Mál nr. 2</u>

Tann 29. juni 2004 móttekur Hjálpartólamiðstøðin umsókn um avlamisbil til ein drong, ið er 5 ár. Umsóknarblað um avlamisbil frá Hjálpartólamiðstøðini er útfylt. Avrit av koyrikortinum hjá mammuni og øðrum persóni eru hjáløgd umsóknini. Sama dag móttekur

Hjálpartólamiðstøðin eisini skjal, har mamman hevur undirskrivað stuðulstreytirnar í sambandi við keyp av avlamisbili.

Á umsóknarblaðnum váttar mamma umsøkjaran við undirskrivt, at givnu upplýsingarnir eru rættir og at umsøkjarin er kunnaður um treytirnar fyri at fáa stuðul til avlamisbil, sum eru lýstar í vegleiðing og treytir í sambandi við umsókn um fíggjarligan stuðul eftir § 18, stk. 5, til útvegan av einum avlamisbili. Eisini loyvir mamma umsøkjaran Hjálpartólamiðstøðini at savna neyðugar upplýsingar til málsviðgerina. Sambúgvin skrivar eisini undir umsóknarblaðið.

Í umsóknarblaðnum skrivar mamman soleiðis sína uppfatan av heilsuligu avmarkingunum, sum gera, at bilurin er neyðugur:

> „av tí at barnið er handicappa ber illa til at koma runt við rullistóli, hann eldist og gerst tyngri, so tað sigur seg sjálvt."

Tann 22. juni 2004 móttekur Hjálpartólamiðstøðin kommunulæknaváttan. Í læknaváttanin stendur soleiðis:

> „Hervið verður váttað, at omanfyri nevndi hevur fingið sett diagnosuna .... Er multihandikappaður, kann ikki seta beinini undir seg, dugir ikki at sita og ber ikki høvdið. Tað er tí neyðugt at hann nýtir special koyristól."

Tann 8. juli 2004 sendir Hjálpartólamiðstøðin móttøkuváttan til umsøkjaran.

Tann 22. juli 2004 sendir Hjálpartólamiðstøðin soljóðandi fyribilsjáttan til umsøkjaran:

> „**Viðvíkjandi** Fíggjarligum stuðli til keyp av umlættingarbili í samband við sjúku / brek tygara.
>
> **Tilvísning:** Vísandi til umsókn tygara, dagfest 29.06.2004
> Forsorgarlógin § 18, stk. 5.
>
> Málið hevur verið fyri á fundi í § 18 ráðnum tann 22.07.2004.
>
> Avgjørt var at játta umsóknini og veita stuðul og lán eftir § 18, stk. 5 í forsorgarlógini, tí mett verður, at ein bilur sum hjálpitól er neyðugur í samband við arbeiði og/ella kann bøta um brekið.
>
> Áðrenn støða kann takast til upphæddir um lán og stuðul, fer málsviðgeri / terapeutur tygara á Hjálpitólamiðstøðini at seta seg í samband við tygum og verða tygum til hjálpar við ráðum og vegleiðing fyri at finna tann besta og bíligasta bilin, umframt at finna út av møguligum broytingum ella serligari innrættan av bilinum.
>
> <u>Tað ber ikki til at keypa bilin áðrenn hetta er gjørt.</u>
>
> Tá støða er tikin til val av bili og kostnaði, verður endalig játtan givin, og samstundis fáa tygum boð um stuðulstreytirnar.

Eru ivamál, ber til at venda sær til Hjálpitólamiðstøðina, tlf. 358300 í avgreiðslutíðini mánadag-fríggjadag kl. 09.00-15.00."

Tann 11. august 2004 móttekur Hjálpartólamiðstøðin tilboð uppá 2 bilar – tann eini sum HTM hevur mælt til, og hin sum mamman hevur mælt til.

Tann 14. september 2004 hevur ergoterapeutur skrivað notat um krøvini til bilin, og avtala varð gjørd um at innheinta tilboð uppá ein bil sum Hjálpartólamiðstøðin mælir til. Í notatinum stendur, at mamman og sambúgvi hennara hava verið á Hjálpartólamiðstøðini fyri at tosa um krøv til bilin tann 13. september 2004.

Tann 14. september 2004 sendir ergoterapeuturin teldupost til starvsfelaga og biður viðkomandi innheinta tilboð uppá bilin og uppá eina umbygging av bilinum.

Tann 20. september móttekur HTM tilboð frá danska virkinum: „Langhøj" uppá umbygging av bilinum áljóðandi kr. 61.355,- uttan mvg.

Tann 24. september 2004 sendir starvsfólk á HTM teldupost til eina aðra fyritøku: "Handi-mobil" fyri at fáa tilboð uppá umbygging av bili.

Tann 30. september móttekur HTM enn eitt tilboð uppá umbygging av bilinum frá danska virkinum Handi Mobil, hetta tilboðið er áljóðandi kr. 66.300,- uttan mvg.

Tann 23. november 2004 verður soljóðandi notat skrivað í málið á Hjálpartólamiðstøðini:

„Á fundi 10.11.2004 varð avgjørt at taka av tilboðið frá bilasølu uppá … kr. 234.000,- og tilboð uppá umbygging av bilinum frá Langhøj kr. 61.355,- Gevi boð um at bíleggja bil og umbygging."

Tann 23. november 2004 skrivar ergoterapeutur teldupost til starvsfelaga og sigur frá, at avgjørt er at taka av tilboðnum uppá bilin, sum HTM mælti til og til umbyggingina frá Langhøj. Starvfelagin verður biðin um at bíleggja bilin og umbyggingina.

Tann 8. februar 2005 verður soljóðandi bræv sent umsøkjaranum:

„**Viðvíkjandi:** Endalig játtan av umsókn um avlamisbil

**Tilvísing:** Umsókn tygara, dagfest 29-06-2004 um fíggjarligan stuðul til avlamisbil eftir forsorgarlógini § 18, stk.5.

Sagt skal verða frá, at málið varð viðgjørt á fundi í § 18 ráðnum tann 22.07.2004 og er endalig støða tikin.

Avgjørt varð at játtað umsóknini og veita tygum stuðul eftir § 18, stk. 5, í forsørgarlógini til:

1. UMLÆTTINGARBIL

Stuðulin verður veittur á henda hátt:

| | |
|---|---|
| 1. RENTUFRÍTT LÁN | kr. 42.500,00 |
| 2. RENTU- OG AVDRÁTTARFRÍTT LÁN | kr. 86.975,00 |
| 3. STUÐUL | kr. 42.500,00 |
| 4. STUÐUL TIL SERLIGA INNRÆTTAN ELLA BROYTING | kr. 76.694,00 |
| 5. SKRÁSETINGARGJALD | kr. 68.075,00 |

Lánið skal afturgjaldst yvir 72 mðr. við kr. 590,28 um mánaðin.

Rentu- og avdráttarfríða lánið verður niðurskrivað yvir 72 mðr. við kr. 1.207,99 um mánaðin.

Stuðulin verður niðurskrivaður yvir 72 mðr. við kr. 590,28 um mánaðin.

Stuðulin til serinnrættan verður niðurskrivaður yvir 72 mðr. við kr. 1.065,19 um mánaðin.

Skrásetingargjaldið verður niðurskrivað yvir 72 mðr. við kr. 945,49 um mánaðin.

Viðvíkjandi stuðulstreytum, sluttseðli / sáttmála, útvegan av skelti til avlamisakfør og upplýsingum annars, sí vegleiðing.

Hjálagt er veðbræv í leysafæ. Veðbrævið verður tinglisið sum trygd fyri tí veitta stuðlinum.

Tygum verða biðin um, saman við vitnum, at undirskriva veðbrævið, og senda tað aftur til Hjálpitólamiðstøðina saman við føði- / navnabrævi og vígslubrævi. Alt verður síðani sent til tinglýsingar.

Aftaná, at veðbrævið er tinglýst, fáa tygum skriv higani, um at ávísing er send til bilseljara. Tá fylgir við makaskjal av tinglýsta veðbrævinum."

Tann 17. februar 2005 verður notat skrivað, um at myrku rútarnir í tilboðnum frá bilasøluni skulu avbestillast, tí mamman skal gjalda teir sjálv og tað vil hon ikki.

Tann 1. mars 2005 hevur mamma umsøkjaran skrivað undir veðbrævið saman við tveimum vitnum og sent tað aftur til Hjálpartólamiðstøðina. Føði- og dópsbræv hjá mammuni verður samstundis sent Hjálpartólamiðstøðini.

Tann 3. mars 2005 er veðbrævið tinglýst og HTM móttekur kvittan fyri tinglýsingina.

Tann 17. mars 2005 móttekur Hjálpartólamiðstøðin faktura fyri umbyggingina av bilinum. Tann 18. mars 2005 móttekur Hjálpartólamiðstøðin faktura fyri bilin.

Útgjaldingarskjal verður skrivað 6. apríl 2005.

Hjálpartólamiðstøðin móttekur tann 6. apríl 2005 skriv frá Bileftirlitinum um, at skrásetingargjaldið er áljóðandi kr. 68.075,-. Tann 30. mai 2005 verður bræv sent Bileftirlitinum um at skráseta avlamisbilin. Tann 2. juni 2005 móttekur HTM veðbrævið frá Bileftirlitinum við váttan um skrásetingina.

Tann 30. mai 2005 verður bræv sent Toll- og Skattstovu Føroya um at varðveita veðbrævið og at heinta lánsgjøldini um tey ikki verða goldin til ásettu tíð.

Tann 30. mai 2005 verður bræv somuleiðis sent Tryggingarfelagnum Føroyar um at tryggja avlamisbilin og at skráseta at avlamisbilurin er skuldabundin við undirveðhaldi. 13. juli 2005 móttekur HTM veðbrævið frá Tryggingarfelagnum við váttan um at veðhavaralýsingar er skrásett hjá felagnum.

Tann 30. mai 2005 verður avrit av veðbrævinum sent til umsøkjaran.

Mín viðmerking:
*Samlaða málsviðgerðartíðin av hesum máli er umleið 11 mánaðir. Hetta kann tykjast at verða ein drúgv málsviðgerðartíð, men sæð í mun til at sjálv fyribilsjáttanin viðvíkjandi stuðul til keyp av umlættingarbili er send umsøkjaranum umleið ein mánað eftir, at umsóknin er móttikin, og at so nógv ymisk málsviðgerðarstig eru í málinum, herímillum at umbyggingar skuldu gerast í bilinum, áðrenn málið kundi verða endaliga avgreitt, havi eg ikki viðmerkingar til málsviðgerðartíðina.*

<u>Mál nr. 3</u>
Tann 8. september 2004 hevur Hjálpartólamiðstøðin móttikið eina umsókn um stuðul til avlamisbil frá einum manni, ið er 36 ára gamal. Umsóknarblað til stuðul til avlamisbil frá Hjálpartólamiðstøðini er útfylt. Umsøkjarin hevur eisini undirskrivað eitt skjal við stuðulstreytum í sambandi við keyp av avlamisbili.

Á umsóknarblaðnum váttar umsøkjarin við undirskrivt, at givnu upplýsingarnir eru rættir og at umsøkjarin er kunnaður um treytirnar fyri at fáa stuðul til avlamisbil, sum eru lýstar í vegleiðing og

treytir í sambandi við umsókn um fíggjarligan stuðul eftir § 18, stk. 5, til útvegan av einum avlamisbili. Eisini loyvir umsøkjarin Hjálpartólamiðstøðini at savna neyðugar upplýsingar til málsviðgerina.

Umsøkjarin er blindur. Upplýst er, at konan og onnur skulu koyra bilin fyri hann. Undir viðmerkingum á umsóknarblaðnum stendur soleiðis:

„Umsøkjarin hevur starv ymisk arbeiðsstøð, har alment ferðasamband ikki passar saman við arbeiðstíðunum.

Ein onnur orsøk til at tað er hent, at umsøkjarin hevur egnan bil er, at hann ikki altíð er so vælkomin í bilar hjá øðrum við hundi.“

Ársinntøkan hjá umsøkjaranum er upplýst í umsóknarblaðnum.

Tann 8. september 2004 móttekur HTM somuleiðis kommunulæknavváttan, har m.a. soljóðandi er skrivað:

**„Sjúkruavgerð – útlit og funktiónsstøði við serligum denti á lýsing av gonguføri og gongulag:**

Tað skal hervið váttast at omanfyrinevndi er blindur

**Læknans meting av førleika umsøkjarans at koyra bil:**

Kann ikki sjálvur koyra bil

**Eigur annar persónur at verða bilførari:**

Ja“

Sama dag sendir Hjálpartólamiðstøðin skriv til Gjaldstovuna um at gjalda læknaváttanina áljóðandi kr. 141,-.

Tann 13. september 2004 verður móttøkuváttan send umsøkjaranum.

Tann 4. januar 2005 verður soljóðandi fyribilsjáttan send umsøkjaranum:

„**Viðvíkjandi**: Fíggjarligum stuðli til keyp av umlættingarbili í sambandi við sjúku / brek tygara.

**Tilvísing**: Vísandi til umsókn tygara, dagfest 06.09.2004
Forsorgarlógin § 18, stk. 5

Málið hevur verið fyri á fundi í § 18 ráðnum tann 03.11.2004.

Avgjørt var at játta umsóknini og veita stuðul og lán eftir § 18, stk. 5 í forsorgarlógini, tí mett verður, at ein bilur sum hjálpitól er neyðugur í sambandi við arbeiði og/ella kann bøta um brekið.

Áðrenn støða kann takast til upphæddir um lán og stuðul, fer málsviðgeri / terapeutur tygara á Hjálpitólamiðstøðini at seta seg í samband við tygum og verða tygum til hjálpar við ráðum og vegleiðing fyri at finna tann best egnaða og bíligasta bilin, umframt at finna út av møguligum

broytingum ella serligari innrættan av bilinum.

Tað ber ikki til at keypa bilin áðrenn hetta er gjørt.

Tá støða er tikin til val av bili og kostnaði, verður endalig játtan givin, samstundis fáa tygum boð um stuðulstreytirnar.

Eru ivamál, ber til at venda sær til Hjálpitólamiðstøðina, tlf. 358300 í avgreiðslutíðini mánadag – fríggjadag kl. 09.00-15.00.

Sum avtalað í telefon við tygum í dag hoyra vit aftur frá tær um hvønn bil, tú vilt hava, og sum vit síðani biðja um tilboð uppá. Biðið verður eisini um tilboð uppá aðrar bilar, sum kunnu metast egnaðir til tygara tørv, soleiðis at stuðul verður veittur svarandi til bíligasta egnaða bilin."

Tann 5. januar 2005 skrivar ergoterapeutur á HTM soljóðandi teldupost til ein starvsfelaga:

„Kanst tú biðja um tilboð uppá Suzuki Wagon R 1,3 GL og ein Madza 2 1,25 bensin. Hann velur væntandi ein Toyota Corolla, sum vit eisini skulu hava tilboð uppá, men bíða við hesum."

Tann 11. januar 2005 skrivar ergoterapeuturin soljóðandi notat í málið:

„Til arbeiðsbrúk hevur umsøkjarin brúk fyri bili við rúm fyri hundinum og briks (sum eitt stórt kuffert), og onkur annar skal koyra bilin. Tey eru annars 5 fólk í húsi.

Mett verður at Suzuki Wagon R nøktar henda tørvin á bili og prísurin er kr. 128.990,- (kr.5.000,- í avslátri uttan bil í býti. Hesin er væl bíligari enn aðrir egnaðir bilar og mælt verður til at játta stuðul til ein Suzuki Wagon R sum bíligasta egnaða bil.

Umsøkjarin ætlar at keypa ein Toyota Corolla og vil gjalda munin sjálvur. Hann gevur boð aftur um hvat model av Toyota Corolla hann hugsar um."

Viðheft hesum notati er príslisti fyri mazda og Suzuki bilar.

Tann 24. januar 2005 skrivar ergoterapeutur teldupost til (sama) starvsfelaga:

„Umsøkjarin hevur nú sagt frá hvønn bil frá Toyota hann vil hava. Stuðul verður játtaður í mun til ein Suzuki Wagon R, sum bíligasta egnaða bil. Kanst tú biðja um útgreinað tilboð uppá hesar bilar Toyota Corolla 1600 Sedan Terra og Suzuki Wagon R, 1,3i Bensin."

Tann 25. januar 2005 móttekur Hjálpartólamiðstøðin tilboð frá bilasølu uppá ein Toyota Corolla. Sama dag móttekur Hjálpartólamiðstøðin tilboð uppá ein Suzuki Wagon R.

Tann 15. februar 2005 verður soljóðandi notat skrivað í málið á HTM:

„Á fundi 02.02 varð avgjørt at játta stuðul til Suzuki Wagon R 1,3i, sum bíligasta egnaða bil – sí tilboð, men umsøkjarin vil hava Toyota Corolla 1600 Sedan Terra. Gevi boð til JP at bíleggja henda bilin."

Tann 15. februar 2005 sendir Hjálpartólamiðstøðin soljóðandi skriv til umsøkjaran:

| | |
|---|---|
| „**Viðvíkjandi:** | Endalig játtan av umsókn um avlamisbil |
| **Tilvísing:** | Umsókn tygara, dagfest 06.09.2004 um fíggjarligan stuðul til avlamisbil<br>Forsorgarlógin § 18, stk.5. |

Sagt skal verða frá, at málið varð viðgjørt á fundi í § 18 ráðnum tann 02.02.2005 og er endalig støða tikin.

Avgjørt varð at játtað umsóknini og veita tygum stuðul eftir § 18, stk. 5, í forsorgarlógini til:

VINNUBIL

Stuðulin verður veittur á henda hátt:

| | |
|---|---|
| 1. RENTUFRÍTT LÁN | kr. 40.000,- |
| 2. STUÐUL | kr. 20.000,- |
| 3. SKRÁSETINGARGJALD | kr. 33.845,- |

Lánið skal **afturgjaldst** yvir 72 mðr. við kr. 555,56 um mánaðin.

Stuðulin verður niðurskrivaður yvir 72 mðr. við kr. 277,78 um mánaðin.

Skrásetingargjaldið verður niðurskrivað yvir 72 mðr. við kr. 470,07 um mánaðin.

Viðvíkjandi stuðulstreytum, sluttseðli/sáttmála, útvegan av skelti til avlamisakfør og upplýsingum annars, sí vegleiðing.

Hjálagt er veðbræv í leysafæ. Veðbrævið verður tinglisið sum trygd fyri tí veitta stuðlinum.

Tygum verða biðin um, saman við vitnum, at undirskriva veðbrævið, og senda tað aftur til Hjálpitólamiðstøðina saman við føði- / navnabræv og vígslubrævi. Alt verður síðani sent til tinglýsingar.

Aftaná, at veðbrævið er tinglýst, fáa tygum skriv higani, um at ávísing er send til bilseljara. Tá fylgir við makaskjal av tinglýsta veðbrævinum."

Tann 4. mars 2005 hevur umsøkjarin undirskrivað veðbrævið saman við vitnum og sent tað aftur til Hjálpartólamiðstøðina. Vígslubræv og føðingar- og navnabræv umsøkjarans eru hjáløgd. Tann 7. mars 2005 er veðbrævið tinglýst.

Tann 19. apríl 2005 móttekur Hjálpartólamiðstøðin faktura uppá bílagda bilin.

Tann 21. apríl 2005 verður útgjaldingarskjal skrivað.

Tann 21. apríl 2005 móttekur Hjálpartólamiðstøðin skriv frá Bileftirlitinum um, at skrásetingargjald er áljóðandi 53.206,25 kr. Tann 31. mai 2005 verður bræv sent til Bileftirlitið um at skráseta avlamisbilin. Tann 2. juni 2005 sendir Bileftirlitið Hjálpartólamiðstøðini váttan, um at bilurin er skrásettur.

Tann 31. mai 2005 verður bræv sent Toll- og Skattstovu Føroya um at varðveita veðbrævið og heinta lánsgjøld um hesi ikki verða goldin til ásettu tíðina.

Tann 31. mai 2005 verður bræv sent Tryggingarfelagnum Føroyar um at tryggja avlamisbilin og at skráseta at bilurin er skuldarbundin við undirveðhaldi. Tann 13. juli 2005 sendir Tryggingarfelagið Hjálpartólamiðstøðini váttan um at veðhavaralýsingarnar eru skrásettar hjá felagnum.

Tann 31. mai 2005 verður avrit av veðbrævinum sent umsøkjaranum.

Mín viðmerking:
*Samlaða málsviðgerðartíðin í hesum máli er 8 mánaðir. Í hesum málinum er fyribilsjáttan ikki send umsøkjaranum fyrr enn umleið fýra mánaðir eftir, at umsóknin er móttikin. Hetta hóast tað, at fundur hevur verið í § 18-ráðnum um málið umleið tveir mánaðir eftir, at umsóknin var móttikin. Eg dugi ikki at síggja, at onnur málsviðgerðarstig eru framd í hesum tíðarskeiðnum. Eg meti tí, at málið kundi verið skjótari avgreitt, serliga sæð í mun til at einki serligt er við tí bilinum, ið verður játtaður.*

Mál nr. 4

Tann 22. november 2004 móttekur Hjálpartólamiðstøðin eina umsókn frá tveimum systrum, sum eru 9 og 12 ára gamlar. Umsóknarblað um stuðul til avlamisbil frá Hjálpartólamiðstøðini er útfylt.

Á umsóknarblaðnum váttar mamma teirra við undirskrivt, at givnu upplýsingarnir eru rættir, og at hon er kunnað um treytirnar fyri at fáa stuðul til avlamisbil, sum eru lýstar í vegleiðing og treytir í sambandi við umsókn um fíggjarligan stuðul eftir § 18, stk. 5, til

útvegan av einum avlamisbili. Eisini loyvir umsøkjarin Hjálpartólamiðstøðini at savna neyðugar upplýsingar til málsviðgerina.

Av umsóknarblaðnum framgongur m.a. hetta:

„…

Hvørja sjúku / brek hevur umsøkjarin: musklasjúku / stoffskiftissjúku

Hvussu leingi hevur umsøkjarin havt sjúkuna/breki: alt lívið

…

Upplýs egnu uppfatan av heilsuligu avmarkingunum, sum gera, at bilurin er neyðugur:

Mugu ikki blíva kaldar og troyttar.“

Hjálagt umsóknini er soljóðandi frágreiðing frá mammuni um støðuna hjá døtrunum:

„Koyritørvur.

Báar genturnar skulu koyrast allastani í tí dagliga, tvs fleiri reisur hvønn dag.

Báar genturnar skulu koyrast til og frá skúla.

Til handikapríðing.

Til fysioterapi.

Til føðingardagar, hjá øðrum børnum í flokkinum.

Til bindiklubb hjá hinum gentunum í flokkinum.

Tá tær skulu spæla við onkran.

Tá tær skulu í biografin.

Tá tær skulu vitja familiu.

Tá vit skulu keypa.

Tá vit skulu ein túr í plantaguna.

Til skúlatannlæknan. (Hini børnini í 5 flokki ganga.)

Tá tey í flokkinum fara ein túr í fjøruna, ella sinnað skal eg koyra barn mítt niðan aftur í skúla

Um tann eldra skal ein túr í SMS eftir skúlatíð við eini vinkonu flokksfelaga, so skal eg koyra oman í skúlan eftir teimum, koyra tær til SMS og síðan heinta tær aftur.

Vildi verið feðin um tit hava í huga, at vit hava tvey børn ið ikki mugu blíva troyttar og kaldar.

Tær hava báar koyristól, men lærarin hjá tí yngru dóttrini segði at ikki ber til, at hava hana í koyristóli tá tey fara túr, tí at gentan verður ov køld.“

Tað framgongur ikki av málinum, at Hjálpartólamiðstøðin hevur sent eina móttøkuváttan til umsøkjararnar.

Tann 22. november 2004 móttekur Hjálpartólamiðstøðin læknaligu upplýsningarnar.

Serlækni á Landssjúkrahúsinum skrivar soleiðis um 12 ára gomlu gentuna í læknaváttan dagfest 5. desember 2003:

„… genta hevur viðfødda stofskiftissjúku sum gera vøddarnar veikar og hetta ger at hon nú troyttast fysiskt skjótari enn vanlig børn.

Tað er tí ein balancugongd at stimulera hana til fysiskan aktivitet, at menna kropp og vøddar uttan at hon kemur at gera ov nógv av tí hon so kann tøma orkugoymslurnar í vøddunum, so hon er fyri ongum í fleiri dagar aftaná.

Ríðitrening er ein vælegnaður háttur til børn sum … og skal tí mælast til at hetta verður játtað."

Um 9 ára gomlu gentuna skrivar sami lækni soleiðis í læknaváttan dagfest 31. januar 2002:

„… genta er undir sterkum illgruna at hava somu viðføddu stofskiftissjúkuna, sum stórasystirin, og er hetta ein sjáldsom, arvalig sjúka, har enzymir í mitochondrium í kyknunum, ikki virka sum tey skulu. Hevur hjá gentuni við sær, at ein kann siga, at orkugoymslur hennara sum heild eru lítlar og er tí umráðandi at hon ikki verður alt ov troytt, tí hon tá oftani gerst sjúk og kann verða leingi um at koma fyri seg aftur.

Í núverandi barnagarði hava foreldrini ikki hildið nóg stór atlit verða tikin at hesum, soleiðis at gentan er stimbrað at verða eins aktiv og hini børnini og har umframt hevur tað eisini verið ringt hjá … at fella til í júst hesum barnagarðinum.

Mælt verður til at ein onkursvegna skipar so fyri at tikið verður meira hond um … í barnagarðinum, evt. við stuðuli og helst hevði tað verið lættast at broytt vanar hennara, um hon samstundis byrjaði í einum øðrum stovni."

Tvær læknaváttanir frá barnaserlækna liggja eisini í málinum frá juli 1993 og oktober 1996 um báðar systrarnar.

Tann 20. desember 2004 verður fyribilsjáttan send umsøkjaranum:

| | |
|---|---|
| „**Viðvíkjandi:** | Fíggjarligum stuðli til keyp av umlættingarbili í sambandi við sjúku / brek tygara. |
| **Tilvísing:** | Vísandi til umsókn tygara, dagfest 22.11.2004<br>Forsorgarlógin § 18, stk. 5 |

Málið hevur verið fyri á fundi í § 18 ráðnum tann 01.12.04.

Avgjørt var at játta umsóknini og veita stuðul og lán eftir § 18, stk. 5 í

forsorgarlógini, tí mett verður, at ein bilur sum hjálpitól er neyðugur í sambandi við arbeiði og / ella kann bøta um brekið.

Áðrenn støða kann takast til upphæddir um lán og stuðul, fer málsviðgeri / terapeutur tygara á Hjálpitólamiðstøðini at seta seg í samband við tygum og verða tygum til hjálpar við ráðum og vegleiðing fyri at finna tann best egnaða og bíligasta bilin, umframt at finna út av møguligum broytingum ella serligari innrættan av bilinum.

Tað ber ikki til at keypa bilin áðrenn hetta er gjørt.

Tá støða er tikin til val av bili og kostnaði, verður endalig játtan givin, samstundis fáa tygum boð um stuðulstreytirnar.

Eru ivamál, ber til at venda sær til Hjálpitólamiðstøðina, tlf. 358300 í avgreiðslutíðini mánadag – fríggjadag kl. 09.00-15.00."

Tann 6. januar 2005 var bilaroynd gjørd, og ergoterapeutur skrivar soljóðandi notat í málið:

„**Notat frá bilaroynd**: Tilstaðar vóru foreldrini.

Trupulleikin hjá systrunum er, at tær vegna sjúku ikki orka/skulu útsetast fyri strongd av ymiskum slag og herundir ganga longri teinar. Játtan fyriliggur um fyribils játtan til bil. Tørvur er fyri, at pláss er fyri, at 2 samanlagdir koyristólar kunnu takast við í bilin uppá ein rímiliga lættan máta. Harumframt skal pláss verða fyri 4 fólkum. Annars eru ongi serlig krøv til innrætting.

Familjan ynskir oljufýr til bilin, tí genturnar ikki mugu útsetast fyri kulda. Harafturat ynskja tey bil við dieselmotori. Hesi ynski skal støða takast til á § 18-fundi.

Royndir eru ymiskir bilar, og hesir lúka treytirnar:

VW Touran, VW Caddy, Mazda Premacy og Citroén Berlingo.

Foreldrini eru kunnað um, at stuðul verður latin til tann bíligasta bilin, sum nøktar tørvin, men at tey kunnu keypa ein dýrari bil og gjalda munin. Ein dýrari bilur skal tó eisini lúka somu treytir um innrætting."

Tann 19. januar 2005 sendir ergoterapeuturin teldupost til ein starvsfelaga og biður hendan, um at innheinta tilboð uppá bilarnar, sum tey hava royndarkoyrt.

Tann 20. og 21. januar 2005 móttekur Hjálpartólamiðstøðin tey 4 umbidnu tilboðini.

Tann 17. februar 2005 verður soljóðandi bræv/avgerð send umsøkjaranum:

„**Viðvíkjandi**: Sýtan av umsókn

**Tilvísing:** Munnligur fyrispurningur tygara um at fáa oljufýring í bil

Forsorgarlógin § 18, stk. 5
Almannastovan hevur á § 18 fundi tann 12.01.05 viðgjørt umsókn tygara um oljufýring í bil, eftir forsorgarlógini grein 18, stk. 5.

Avgjørt varð ikki at veita stuðul til tað sum søkt er um, av tí at mett verður samanumtikið, at oljufýring í bilinum ikki er ein fullgóð loysn, men at hóskandi klædnadrakt, t.d. termodrakt er ræ ttara loysnin, tí at henda kann eisini brúkast, tá umsøkjarin ferðast millum bil og skúla og úti í fríkorterunum. Við hesum grundarlag verður umsóknin um oljufýring til bil sýtt.

Henda avgerð kann innan 4 vikur kærast til:

Føroya Kærustovnur, Postboks 45, 110 Tórshavn“

Tann 18. februar 2005 verður soljóðandi notat skrivað í málið:

„Á bólkafundi 15.02.05 varð gjørt av at játtað stuðul svarandi til tilboð uppá Citroen Berlingo. Tey ynskja tó at keypa ein dýrari bil, kanska ein VW Touran, sum eisini er egnaður. Treytin er, at bilurin er egnaður til teirra brúk, t.v.s pláss fyri 4 fólkum og 2 samanløgdum transportkoyristólum.“

Tann 2. mai 2005 verður soljóðandi skriv send umsøkjaranum:

„**Viðvíkjandi:** Endalig játtan av umsókn um avlamisbil
**Tilvísing:** Umsókn tygara, dagfest 22.11.04 um avlamisbil
Forsorgarlógin § 18, stk. 5.
Sagt skal verða frá, at málið varð viðgjørt á fundi í § 18 ráðnum tann 15.02.05 og er endalig støða tikin.

Avgjørt varð at játtað umsóknini og veita tygum stuðul eftir § 18, stk. 5, í forsørgarlógini til:

| | |
|---|---|
| 1. UMLÆTTINGARBIL | kr. 99.615,00 |

Stuðulin verður veittur á henda hátt:

| | |
|---|---|
| 1. RENTUFRÍTT LÁN | kr. 30.000,00 |
| 2. STUÐUL | kr. 30.000,00 |
| 3. SKRÁSETINGARGJALD | kr. 39.615,00 |

Lánið skal **afturgjaldast** yvir 72 mðr. við kr. 416,67 um mánaðin.
Stuðulin verður niðurskrivaður yvir 72 mðr. við kr. 416,67 um mánaðin.

Skrásetingargjaldið verður niðurskrivað yvir 72 mðr. við kr. 550,21 um mánaðin.

Viðvíkjandi stuðulstreytum, sluttseðli / sáttmála, útvegan av skelti til avlamisakfør og upplýsingum annars, sí vegleiðing.

Hjálagt er veðbræv í leysafæ og stuðulstreytir fyri avlamisbil. Veðbrævið verður tinglisið sum trygd fyri tí veitta stuðlinum.

> Tygum verða biðin um, saman við vitnum, at undirskriva veðbrævið, og senda tað aftur til Hjálpitólamiðstøðina saman við føði-/ navnabræv og vígslubrævi. Alt verður síðani sent til tinglýsingar.
>
> Aftaná, at veðbrævið er tinglýst, fáa tygum skriv higani, um at ávísing er send til bilseljara. Tá fylgir við makaskjal av tinglýsta veðbrævinum og stuðulstreytunum.“

Tann 3. mai 2005 móttekur Hjálpartólamiðstøðin skjal við stuðulstreytunum, ið mamman og eitt vitni hava undirskrivað.

Tann 3. mai 2005 móttekur Hjálpartólamiðstøðin „fráboðan til sýn og / ella skráseting av akførum“ frá Bileftirlitinum. Tann 4. mai 2005 móttekur Hjálpartólamiðstøðin skriv um skrásetingargjald frá Bileftirlitinum.

Tann 24. mai 2005 er fakturi uppá bilin sendur umsøkjaranum / Hjálpartólamiðstøðini.

Tann 11. mai 2005 hevur mamma umsøkjaranna undirskrivað veðbrævið saman við tveimum vitnum og sent tað aftur til Hjálpartólamiðstøðina. Avrit av føði- og dópsbrævi er eisini sent Hjálpartólamiðstøðini. Tann 12. mai 2005 verður veðbrævið tinglýst.

Einki útgjaldingarskjal liggur í málinum.

Tann 30. mai 2005 verður bræv sent Bileftirlitinum um at skráseta bilin. Tann 2. juni 2005 sendir Bileftirlitið Hjálpartólamiðstøðini váttan, um at avlamisbilurin er skrásettur.

Tann 30. mai 2005 verður áheitan send til Toll- og Skattstovu Føroya, um at hava veðbrævið í varðveitslu og um at innheinta lánsgjøldini, um hesi ikki verða goldin til ásettu tíð.

Tann 30. mai 2005 verður bræv sent Tryggingarfelagnum Føroyar, um at tryggja avlamisbilin og skráseta, at bilurin er skuldarbundin við undirveðhaldi. 13. juli 2005 sendir Tryggingarfelagið váttan, um at veðhavaralýsingarnar eru skrásettar hjá teimum.

Tann 30. mai 2005 er avrit av veðbrævinum eisini sent til umsøkjaran.

Mín viðmerking:
*Tað framgongur ikki av málinum, at Hjálpartólamiðstøðin hevur sent umsøkjaranum móttøkuváttan. Av tí, at tað kann væntast, at viðgerðin av slíkum málum kann taka longri tíð, átti móttøkuváttan sambært góðum fyrisitingarsiði at verið send umsøkjaranum, tá ið umsóknin varð móttikin.*

*Í hesum máli er talan um, at ein umsókn partvíst verður noktað. Einki er, sum bendir á, at avgerðin um at nokta oljufýring til bilin, er grundað á ávísar upplýsingar um støðuna hjá umsøkjarunum. Avgerðin tykist harafturímóti byggja á eina heildarmeting hjá Hjálpartólamiðstøðini um, hvat er besta loysnin fyri umsøkjararnar. Eg havi tí ikki viðmerkingar til, at partshoyring ikki er framd í hesum málinum.*

*Avgerðin um noktan av oljufýring til bilin skal grundgevast og kæruvegleiðing skal fylgja við skrivinum, jb. §§ 21 og 24 í fyrisitingarlógini. Eg meti grundgevingina í sýtanarskrivinum, dagfest 17. februar 2005, vera nøktandi. Í skrivinum verður boðað frá, at avgerðin kann kærast til Føroya Kærustovn. Avgerðin lýkur sostatt hesar treytirnar í fyrisitingarlógini.*

*Samlaða málsviðgerðartíðin í hesum máli er umleið 6 mánaðir. Fyribilsjáttan verður send umleið ein mánað eftir, at umsókn er móttikin. Hetta meti eg ikki verða langa málsviðgerðartíð í einum máli við so nógvum málsviðgerðarstigum. Tó kann sigast, at tað er í longra lagi, tá ið fráboðan um sýtan av umsókn um at fáa oljufýring í bilin verður send meira enn ein mánaða eftir, at málið hevur verið viðgjørt á § 18-ráðsfundi.*

<u>Mál nr. 5</u>

Tann 7. desember 2004 móttekur Hjálpartólamiðstøðin eina umsókn frá einum manni, ið er 30 ár. Maðurin arbeiðir í einum handli. Umsóknarblað til stuðul til avlamisbil hjá Hjálpartólamiðstøðini er útfylt og undirskrivað. Somuleiðis hevur umsøkjarin undirskrivað skjal við stuðulstreytum í samband við keyp av avlamisbili.

Á umsóknarblaðnum váttar umsøkjarin við undirskrivt, at givnu upplýsingarnir eru rættir, og at umsøkjarin er kunnaður um treytirnar fyri at fáa stuðul til avlamisbil, sum eru lýstar í vegleiðing, og treytir í sambandi við umsókn um fíggjarligan stuðul eftir § 18, stk. 5, til útvegan av einum avlamisbili. Eisini loyvir umsøkjarin Hjálpartólamiðstøðini at savna neyðugar upplýsingar til málsviðgerina.

Í umsóknarblaðnum stendur m.a.:

„**Upplýs egnu uppfatan av heilsuligu avmarkingunum, sum gera, at bilurin er neyðugur:**

Orki ikki so væl at ganga og eg má brúka bil tí arbeiðstíðirnar eru til út á náttina.

…

Viðmerkingar: Søkji um bil tí at eg havi muskelsvinn í báðum beinum og eg klári ikki at ganga so langt. Arbeiði um kvøldarnar frá kl. 18.00 til yvir midnátt og summar tíðir eisini um dagin so tað er nógv koyring aftur og fram.

Hjálagdar eru journalir frá speciallækna."

Í umsóknarblaðnum er ársinntøkan hjá umsøkjaranum upplýst.

Tann 7. desember 2004 móttekur Hjálpartólamiðstøðin somuleiðis eina læknaváttan, har m.a. soljóðandi er skrivað:

„Kan ikke holde balance ved stand, især ikke med lukkede øjne. Svage kræfter i fødder og ben, kan ikke gå på tæer eller hæle.“

„Lider av sygdom i nerver til musklerne, som gør at musklerne bliver svagere. Tilstanden bliver ikke bedre.“

Frágreiðingar / váttanir frá øðrum læknum liggja eisini í málinum umframt ein frágreiðing um ein fund sum var fyriskipaður millum umsøkjaran og Muskelsvindfonden.

Tað framgongur ikki av málinum, at ein móttøkuváttan er send umsøkjaranum.

Tann 24. januar verður soljóðandi fyribilsjáttan send umsøkjaranum:

„**Viðvíkjandi:** Fíggjarligum stuðli til keyp av umlættingarbili í sambandi við sjúku / brek tygara.

**Tilvísing:** Vísandi til umsókn tygara, dagfest 07.12.04

Forsorgarlógin § 18, stk. 5

Málið hevur verið fyri á fundi í § 18 ráðnum tann 12.01.05.

Avgjørt var at játta umsóknini og veita stuðul og lán eftir § 18, stk. 5 í forsorgarlógini, tí mett verður, at ein bilur sum hjálpitól er neyðugur í sambandi við arbeiði og/ella kann bøta um brekið.

Áðrenn støða kann takast til upphæddir um lán og stuðul, fer málsviðgeri / terapeutur tygara á Hjálpitólamiðstøðini at seta seg í samband við tygum og verða tygum til hjálpar við ráðum og vegleiðing fyri at finna tann best egnaða og bíligasta bilin, umframt at finna út av møguligum broytingum ella serligari innrættan av bilinum.

<u>Tað ber ikki til at keypa bilin áðrenn hetta er gjørt.</u>

Tá støða er tikin til val av bili og kostnaði, verður endalig játtan givin, samstundis fáa tygum boð um stuðulstreytirnar.

Eru ivamál, ber til at venda sær til Hjálpitólamiðstøðina, tlf. 358300 í avgreiðslutíðini mánadag – fríggjadag kl. 09.00-15.00.“

Tann 7. januar 2005 er soljóðandi notat skrivað í málið:

„Umsøkjarin hevur í dag verið á hjálpartólamiðstøðin í sambandi við at hann hevur søkt um avlamisbil.

Hann hevur vøddasjúku, … , og vit hava upplýsingar frá lækna og frá muskelfonden.

Umsøkjarin hevur vánaliga javnvág og veikar beinvøddar. Hann sigur, at beinini sovna, tá hann gongur nógv, t.v.s. aftaná fáar hundrað metrar. Hetta er verri, tá tað er kalt í veðrinum.

Hann hevur ikki serliga innrætting í bili sínum sum t.d. automatisk gear ella hondstýrda kobling/bremsu. Um vit skulu arbeiða víðari við hesum skal støða takast á § 18 fundi.

Umsøkjarin fekk saman við umsóknarblað frá hjálpartólamiðstøðini eisini vegleiðing frá hjálpartólamiðstøðini, sum nú væntandi verður broytt. Men hann fekk at vita, at umsóknin verður viðgjørd sbr. hesa vegleiðing."

Tann 27. januar 2005 var umsøkjarin á Hjálpartólamiðstøðini og tosaði við tey um krøvini til bilin. Notat varð skrivað í málið um hendan fund. Umsøkjarin vil fyrst sjálvur roynar ymiskar bilar, áðrenn royndarkoyring verður gjørd saman við Hjálpartólamiðstøðini. Umsøkjarin skal sjálvur venda sær til Hjálpartólamiðstøðina fyri at gera royndarkoyring við teimum.

Tann 3. mars 2005 er soljóðandi notat skrivað í málið:

„Umsøkjarin hugsar um at keypa ein Renault Megane. Gevur boð í komandi viku um avgerð. Hesin lýkur krøvini til bil, sum hjálpartólamiðstøðin setir, men hann fær stuðul svarandi til bíligasta nøktandi bil. Citroen Berlingo hevur góð mát, men finst ikki við aut. gearum."

Tann 9. mars 2005 móttekur Hjálpartólamiðstøðin tilboð uppá fleiri model av Renault bilum frá eini bilasølu. Tann 17. mars 2005 er tilboð uppá ein Suzuki Wagon R í hendi á Hjálpartólamiðstøðini.

Tann 18. mars 2005 er soljóðandi notat skrivað í málið:

„Á § 18-fundi 12.01.05 varð avgjørt av játta vinnubil við automatiskum gearum til umsøkjaran.

Tann bíligasti og best egnaði bilurin meti eg er Suzuki Wagon R. Hann hevur høg setur, høgur til ovara hurðakant, lága gátt og bagasjurúm í góðari hædd. Pláss er fyri familjuni, sum telur 3 fólk, og barnavognur fast inn í bilin, tá annað baksetrið verður lagt niður.

Umsøkjarin ynskir ein størri og dýrari bil, Renault Mégane. Eg meti, at hesin er eisini egnaður til umsøkjaran.

Hjálpartólamiðstøðin játtar stuðul svarandi til Suzuki Wagon R við automatiskum gearum sum serútgerð. Tó verður góðtikið, at umsøkjarin keypir ein Renault Mégane við automatiskum gearum sum serútgerð."

Tann 18. mars 2005 skrivar ergoterapeutur teldupost til ein starvsfelaga um at bíleggja tann bilin sum umsøkjarin ynskir. Starvsfelagin skal eisini skriva endaligu játtanina.

Tann 18. mars 2005 verður soljóðandi avgerð send umsøkjaranum:

„**Viðvíkjandi:** Endalig játtan av umsókn um avlamisbil

**Tilvísing:** Umsókn tygara, dagfest 07.12.04 um avlamisbil

Forsorgarlógin § 18, stk. 5.

Sagt skal verða frá, at málið varð viðgjørt á fundi í § 18 ráðnum tann 12.01.05 og er endalig støða tikin.

Avgjørt varð at játtað umsóknini og veita tygum stuðul eftir § 18, stk. 5, í forsorgarlógini til:

1. VINNUBIL

Stuðulin verður veittur á henda hátt:

| | |
|---|---|
| 1. RENTUFRÍTT LÁN | kr. 40.000,00 |
| 2. STUÐUL | kr. 20.000,00 |
| 3. STUÐUL TIL SERLIGA INNRÆTTAN ELLA BROYTING | kr. 20.000,00 |
| 4. SKRÁSETINGARGJALD | kr. 38.750,00 |

Lánið skal **afturgjaldast** yvir 72 mðr. við kr. 555,56 um mánaðin.

Stuðulin verður niðurskrivaður yvir 72 mðr. við kr. 277,78 um mánaðin.

Stuðulin til serinnrættan verður niðurskrivaður yvir 72 mðr. við kr. 277,78 um mánaðin.

Skrásetingargjaldið verður niðurskrivað yvir 72 mðr. við kr. 538,19 um mánaðin.

Viðvíkjandi stuðulstreytum, sluttseðli / sáttmála, útvegan av skelti til avlamisakfør og upplýsingum annars, sí vegleiðing.

Hjálagt er veðbræv í leysafæ. Veðbrævið verður tinglisið sum trygd fyri tí veitta stuðlinum.

Tygum verða biðin um, saman við vitnum, at undirskriva veðbrævið, og senda tað aftur til Hjálpitólamiðstøðina saman við føði-/navnabræv og vígslubrævi. Alt verður síðani sent til tinglýsingar.

> Aftaná, at veðbrævið er tinglýst, fáa tygum skriv higani, um at ávísing er send til bilseljara. Tá fylgir við makaskjal av tinglýsta veðbrævinum."

Tann 11. mai 2005 er notat skrivað, um at veðbrævið er sent umsøkjaranum til undirskrivingar.

Tann 13. mai 2005 undirskrivar umsøkjarin veðbrævið saman við vitnum og sendir tað aftur til Hjálpartólamiðstøðina. Føðingar- og dópsbræv hjá umsøkjaranum er hjálagt. Tann 20. mai 2005 er veðbrævið tinglýst.

Tann 6. juni 2005 móttekur Hjálpartólamiðstøðin fakturan uppá Renault bilin.

Tann 8. juni 2005 verður útgjaldingarsskjal skrivað.

Tann 18. mai 2005 sendir Bileftirlitið skriv um skrásetingjald til Hjálpartólamiðstøðina, sum tilsamans er 58.120,- kr. Tann 10. juni 2005 verður bræv sent Bileftirlitinum um at skráseta avlamisbilin. Tann 14. juni 2005 móttekur Hjálpartólamiðstøðin váttan frá Bileftirlitinum, um at avlamisbilurin er skrásettur.

Tann 10. juni 2005 er skriv sent til Toll og Skatt, um at varðveita veðbrævið og innheinta lánsgjøldini um hesi ikki verða goldin til ásettu tíð.

Tann 10. juni 2005 verður veðhavaralýsing send Tryggingarfelagnum. Tann 13. juli 2005 móttekur Hjálpartólamiðstøðin váttan frá Tryggingarfelagnum, um at veðhavaralýsing er skrásett hjá felagnum.

Tann 10. juni 2005 verður avrit av veðbrævi sent umsøkjaranum.

Mín viðmerking:
*Sambært góðum fyrisitingarsiði átti móttøkuváttan at verið send umsøkjaranum, tá ið Hjálpartólamiðstøðin móttók umsóknina. Hetta serliga tí, at málið kundi væntast at taka longri tíð at viðgera.*

*Samlaða málsviðgerðartíðin í hesum málinum var umleið 6 mánaðir. Frá tí at umsókn er móttikin, til fyribilsjáttan verður send umsøkjaranum, gongur umleið 1 1/2 mánaði. Hetta meti eg ikki verða langa málsviðgerðartíð viðvíkjandi einum slíkum máli, ið hevur nógv málsviðgerðarstig.*

**Samandráttur og niðurstøða**

*Í málum nr. 1, 4 og 5 sæst ikki, at Hjálpartólamiðstøðin hevur sent umsøkjaranum móttøkuváttan. Av tí, at tað kann væntast, at viðgerðin av*

*slíkum málum kann taka longri tíð, átti hetta sambært góðum fyrisitingarsiði at verið gjørt, tá ið umsóknin var móttikin.*

*Hjálpartólamiðstøðin hevur tilevnað standard umsóknarbløð viðvíkjandi stuðul til bilkeyp. Hesi tæna sum góð vegleiðing hjá brúkaranum.*

*Í hvørjum einstøkum máli útfyllir umsøkjarin eitt umsóknarblað, har hann gevur loyvi til, at Hjálpartólamiðstøðin savnar inn neyðugar upplýsingar til málsviðgerðina. Tær upplýsingar, sum Hjálpartólamiðstøðin hevur útvegað til hesi mál, eru sostatt fingnar til vega í tráð við § 27, stk. 2, nr. 1 í fyrisitingarlógini.*

*Í øllum 5 málum um stuðul til avlamisbil eru læknaváttanir og aðrar heilsuváttanir, soleiðis at tað er væl dokumenterað, hví umsøkjarunum tørvar avlamisbil. Eg havi tí onga viðmerking til dokumentatiónina í hesum málum. Harumframt hevur Hjálpartólamiðstøðin gjørt eitt nágreiniligt arbeiði fyri at finna besta og bíligasta bil til umsøkjaran.*

*Eins og við málunum um gangistativ v.m. og koyristólar v.m. meti eg ikki partshoyring hava verið viðkomandi í hesum málunum.*

*Í máli nr. 4 er talan um, at ein umsókn partvíst verður noktað. Avgerðin skal tí grundgevast og kæruvegleiðing skal fylgja við skrivinum, jb. §§ 21 og 24 í fyrisitingarlógini. Eg meti grundgevingina í sýtanarskrivinum, dagfest 17. februar 2005, vera nøktandi. Í skrivinum verður boðað frá, at avgerðin kann kærast til Føroya Kærustovn. Avgerðin lýkur sostatt treytirnar í fyrisitingarlógini.*

*Í máli nr. 3 verður fyribils játtan ikki send umsøkjaranum fyrr enn umleið fýra mánaðir eftir, at umsóknin er móttikin. Hetta hóast fundur varð hildin í § 18-ráðnum um málið umleið tveir mánaðir frammanundan. Hetta hevur longt málsviðgerðartíðina munandi. Burtursæð frá hesum havi eg ikki aðrar viðmerkingar til viðgerðartíðina í málunum um stuðul til avlamisbil.*

### e. 5 mál um umbyggingar

Stuðul til umbyggingar verður játtaður sambært § 18, stk. 5 í forsorgarlógini. Hjálpartólamiðstøðin hevur gjørt innanhýsis vegleiðingar um, hvussu slík mál skulu viðgerast, og hesar eru soljóðandi:

*HTM – Hjálpartólamiðstøðin 07-01,02,03 starvsfólkahandbók*

**Málsviðgerð: Avlamisbygging – Verkætlanir**

| Atgerð | Lýsing | Skjøl / viðmerkingar |
|---|---|---|
| **1. Umsókn** | Umsókn um íbúðarbroyting kemur til HTM um íbúðarbroyting.<br>Umsóknin verður journaliseraðog latin málsviðgera til víðari avgreiðslu.<br>Málsviðgerin fær til vega neyðugt tilfar so at málsviðgerðin kann halda áfram | Umsókn<br>Læknaváttan |
| **2. Tørvsmeting** | Málsviðgerin fer á heimavitjanog ger eina meting av umsøkjaranum fyri at staðfesta hvønntørv umsøkjarin hevur á bústaðarbroyting, so at hann kann virka innan fyri karmarnar av egnum heimi. | |
| **3. Lýsing av tørvinum** | Málsviðgerin ger eina skrivligatørvslýsing við tilmælum til bústaðarbroytingar, ið skululeggjast til grund fyri kanningav hvussu húsabroytingin kann verða framd | |
| **4. Gjaldsviðurskifti** | Kunning eigur at verða givin um gjaldsviðurskifti.<br>1. Eginfígging<br>2. Stuðul<br>3. Lán<br>4. Afturgjalding<br>5. Pant | Fyri hetta má skrivlig vegleiðing gerast. |
| **5. Verkleiðari** | Tá tørvurin er staðfestur, er neyðugt at seta ein at leiða verkætlanina | Húsalánsgrunnurin<br>Landsverkfrøðingurin<br>Annar? |

| | | |
|---|---|---|
| **6. Kanning av umstøðum** | Kanningin skal, grunda á tørvslýsingina, fáa greiðu á, í hvønn mun tað ber til at fremja tilmæltu bústaðarbroytingarnar. | |
| **7. Lýsing av umstøðunum** | Við støðið í kanningini av umstøðunum, skulu møguleikarnir fyri búðstaðarbroytingunum lýsast so greiddliga sum gjørligt, so § 18 ráðið kann taka støðu til um farast skal inn í máli og í hvussu stóran mun. | |
| **8. §18 Sýtur** | Sýtur<br>Grundgeving fyri sýting. | Sýtanarskriv.<br>Kæruvegleiðing |
| **9. Kæra** | Kæruummæli | |
| **10. Kæruavgerð** | 1. Staðfesting<br>2. Nýggj viðgerð<br>3. Viðhald | Málið endar.<br>Byrjar umaftur<br>Kærarin fær byggimáli framt |
| **11. § 18 Fyribils játtan** | Málið verður lagt fyri § 18 ráðið til støðutakan. | |
| **12. Verkætlan** | Tá §18 ráðið hevur játtað, verður farið í gongd við verkætlanina.<br>Tekningar og lýsinig av verkætlanini skulu gerðast – hetta er galdandi bæði fyri stórar- og smáar búðstaðarbroytingar.<br>Eitt ella fleiri uppskot verða gjørd so umsøkjarin hevur | |

| | | |
|---|---|---|
| | møguleika at verða við í avgerðini um hvussu broytingin skal gerast. Um gjørligt eigur ein tíðarætlan at verða gjørd. | |
| **13. Góðtøka** | Tá tekningar og lýsingar eru lidnar er umráðandi at umsøkjarin góðkennir verkætlanina, áðrenn hon verður sett í verk | Skrivlig góðkenning |
| **14. Kostnaðar-meting** | Áðrenn verkætlanin verður løgd fram á §18 til endaliga góðkenning eigur nágreinilig kostnaðarmeting at verða gjørd. | |
| **15. Heintan av tilboðum** | Tað verða heintaði í minsta lagi 2 tilboð uppá arbeiði. Mett verður um innkomnu tilboðini og tikið verður í høvuðsheitinum av lægsta boðnum. | |
| **16. §18 Endalig játtan** | Tá verkætlanin er greið, kostnaðarmetingin gjørd, tilboðini kannaði og tilmæli gjørt, verður málið lagt fyri § 18 ráðið til endaliga støðutakan | Møgulig gjaldslýsing eigur at verða greið áðrenn § 18 fund. |
| **17. Gjalds-viðurskifti** | Áðrenn arbeiði verður sett í gongd, skal skuldarabræv skrivast og verða undirskrivað av viðskiftafólkinum. | Krøv størri enn kr. 10.000,- eiga at verða tinglisin. |

| | | |
|---|---|---|
| **17. Ígongdseting av arbeiði** | Tá veðhavararættindini eru fingin uppá pláss og støða er tikin til hvør skal gera arbeiðið. Verður arbeiðstakarin kunnaður um hetta og biðin um at fara til verka sum skjótast. Tíðarætlanin skal fylgjast so neyvt sum gjørligt. | |
| **18. Eftirlit** | Tann sum er settur sum verkleiðari, hevur eftirlit við arbeiðinum, at tað verður framt sambært verkætlanini og at tíðarætlanin verður fylgd. Váttar arbeiði. | |
| **19. Avhandan** | Tá arbeiðið er liðugt og góðkent av verkleiðaranum og umsøkjaranum verður hetta skrivliga fráboðað og máli endar. | |
| **20. Onnur verkætlan** | 1. HTM – fer bert inn í bíligastunøktandi loysnina.<br><br>2. Ynskir viðskiftafólki aðra loysn sum HTM metir er nøktandi, men dýrari enn HTMs, verður viðskiftafólki sjálvt at gjalda munin millum egnu verkætlan og kostnaðarmetingina av verkætlan HTMs.<br><br>3. Ynskir viðskiftafólki aðra loysn sum HTM metir er ikki nøktandi, verður viðskiftafólki sjálvt at gjalda allan kostnaðin. | Tá viðskiftafólk ynskja aðrar loysnir enn HTM heilt ella partvís, verða tey sjálvi at skipa fyri at verkætlanin verður framd. HTM hevur eftirlit við at byggingin er avlamisvinarlig, og annars lýkur treytirnar fyri avlamisbygging. |

**Íbúðarbroytingar:**

**Vegleiðing í sambandi við umsókn um stuðul/lán til**

| Atgerð | Lýsing |
|---|---|
| **Vegleiðingin** | Henda vegleiðing inniheldur upplýsingar um mannagongdir og reglugerðir sum Hjálpartólamiðstøðin fylgir í sambandi við mál um íbúðarbroytingar. |
| **Stuðul** | Fíggjarligur stuðul verður í høvuðsheitinum veittur eftir § 18 stk. 5 í forsorgarlógini |
| **§ 18 stk. 5** | Til persónar við avlamni ella við varandi sjúku- ella aldurstreytaðum veikleika, kann stuðu veitast til hjálpartól, herundir meirútreiðslur til serlig klædnapløgg, sum<br>1. eru neyðug fyri at viðkomandi kann vera í vinnu<br>2. í avgerandi mun bøta um brekið<br>3. í avgerðandi mun lættir um dagligu tilveruna í heiminum |
| **Umsókn** | Tá ið Hjálpartólamiðstøðin hevur móttikið umsóknina, verður mett um, um neyðugt er at heinta fleiri upplýsingar í málinum, áðrenn avgerð verður tikin. |
| **Læknaváttan ella annar serkunnleiki,** | Hjálpartólamiðstøðin tryggjar sær rætt til at heinta upplýsingar frá lækna tygara ella øðrum sum hevur kunnleika til viðurskifti tygara. |
| **Stuðul / lán** | Tá stuðul verður játtaður, verður støða tikin til, um stuðulin skal veitast sum stuðul og/ella lán. |
| **Triðjapartshús** | Rentufrí lán verða veitt til børn og onnur, ið búgva í triðjaparts húsi. Láni verður at afturgjalda við |
| | áljóðandi av 20% av upphæddini svarandi til miðal avlamispensión, so leingi viðkomandi sjálvur býr í húsinum. Upphæddin er treytað av at viðkomandi sjálvur hevur inntøku, ið svarar til ella er hægri en miðal avlamispensión. |
| **Søla av húsi** | Rentu- og avdráttarfrí lán verða veitt soleiðis, at verður húsi selt ella á annan hátt skiftir eigara, fellur alt láni til afturgjaldingar beinanvegin. |

| | |
|---|---|
| **Skuldarabræv** | Um lánsparturin til samans ikki fer uppum kr. 10.000.- skal afturgjaldsváttan undirskrivast uppá lánspartin. |
| **Tinglýsing** | Um lánsparturin fer uppum kr. 10.000,- skal afturgjaldsváttan undirskrivast og skaðaloysisbræv tinglýsast í ognini. |
| **Eigaraviður-skifti** | Í sambandi við at tygum fáa játta lán, skulu tygum eftir áheitan frá Hjálpartólamiðstøðini upplýsa um eigaraviðurskiftini í ognini. Undirskirvaða skaða-loysisbrævið,undirskrivaðað afturgjaldsváttanin og senda Hjálpartólamiðstøðini skeyti til brúk í sambandi við tinglýsingina. |
| **Stuðulsveiting** | Í høvuðsheitinum verður stuðul / lán bert veittur til bíligastu nøktandi loysnina. |
| **Ósemjur** | Verður ósemja um ymisk viðurskifti viðvíkjandi málsviðgerðini, hevur Hjálpartólamiðstøðin / Almannastovan rætt til avgera hvussu haldast skal áfram við málinum. |
| Kæra | Tygum hava rætt til at kæra avgerðir sum ikki eru tygum til vildar.<br>Kærast skal til:<br>Føroya Kærustovnur<br>Postboks 45<br>110 Tórshavn |
| Málsviðgerð | Hjálagt er avrit av hvussu málsvið-gerðin fer fram í slíkum máli. |

Mál nr. 1
Tann 27. apríl 2005 móttekur Almannastovan eina umsókn um bygging av einari rampu til koyristól til ein mann, ið er 82 ára gamal. Umsøkjarin hevur útfylt eina standard umsókn um hjálpartól frá Hjálpartólamiðstøðini.

Umsøkjarin hevur undirskrivað umsóknina og samstundis givið HTM loyvi til at savna inn neyðugar upplýsingar til málsviðgerðina. Heimarøktin hevur hjálpt umsøkjaranum við umsóknini.

Í umsóknarblaðnum er lýsing av, hvat søkt verður um. Her verður soljóðandi skrivað:

„Søkt verður um at fáa gjørt tað soleiðis uttanfyri at komast kann til dyrnar við koyristóli.“

Trupulleikarnir, sjúkan ella brekið hjá umsøkjaranum verða í umsóknarblaðnum lýst soleiðis:

„Umsøkjarin fer hvørja viku inn á dagtilhaldi, tá kemur serflutningartænastan eftir honum. Sum nú er má umsøkjarin ganga út og oman trappurnar fyri síðani at seta seg í stólin, hetta er ov kravmikið fyri hann. Tí hevði verið gott, um ein lítil rampa varð gjørd fyri dyrnar og tað er hetta vit søkja um.“

Eingin læknaváttan fylgir við umsóknini.

Tann 28. apríl 2005 sendir Hjálpartólamiðstøðin eitt móttøkuskriv til umsøkjaranum.

Tann 3. juli 2005 skrivar fysioterapeutur soljóðandi notat í málið hjá Hjálpartólamiðstøðini:

„Viðmerkingar: Havi verið á heimavitjan hjá umsøkjaranum saman við … tann 10.05.2005. Talan er um ein 82 ára gamlan mann, sum vegna ellisbrek er illa gongdur. Hann hevur stóra fragd av at koma út millum fólk og er javnan í dagtilhaldi. Sum er, er trin í túninum og trappa/trin er til húsið. Trinið í húsinum ber til at útjavna og rampa kann gerast, soleiðis at koyrandi verður inn og út í koyristóli. Biði … um at seta arb. í gongd, sum varð játtað á grein 18 tann 25.05.2005.“

Hjálagt hesum notati er ein tekning av túninum hjá umsøkjaranum.

Tann 3. juli 2005 verður soljóðandi skriv sent umsøkjaranum:

„Almannastovan hevur tann 26.05.2005 viðgjørt umsókn tygara, og avgjørt varð at játtað umsóknini og veita stuðul til tað, ið søkt er um til láns.

Um ikki annað er avtalað, sendir HTM tygum hjálpartólini.“

Tann 3. juli 2005 skrivar fysioterapeutur á Hjálpartólamiðstøðini soljóðandi boðseðil:

„Arbeiðsviðmerkingar: hetta er gjørt.“

Tann 6. juli 2005 verður soljóðandi avgreiðsluseðil skrivaður:

„Boðseðilin hjá

…

Er avgreiddur.

Fakturi nr. … er ávístur.

Viðmerkingar: Gjørt rampu, javnað og asfaltera túnið.“

Mín viðmerking:
*Í hesum máli er eingin læknaváttan, men heilsustarvsfólk hevur hjálpt umsøkjaranum við umsóknini, og harumframt hevur fysioterapeutur frá Hjálpartólamiðstøðini verið á heimavitjan hjá umsøkjaranum. Eg meti tí, at tørvurin hjá umsøkjaranum fyri umbygging er nóg væl skjalprógvaður.*

*Samlaða viðgerðartíðin av hesum máli var 2 mánaðir og 9 dagar. Eg dugi ikki í málinum at síggja, at avgerð longu er tikin 26. mai, eins og Hjálpartólamiðstøðin vil vera við í skrivinum til umsøkjaran, dagfest 3. juli. Um so var, átti avgerðin onkursvegna at verið skjalfest í málinum, og fráboðan send umsøkjaranum.*

<u>Mál nr. 2</u>

Tann 24. juni 2005 móttekur Almannastovan eina umsókn um tillaging av atkomu til úthús til ein mann, ið er 50 ára gamal. Standard umsóknarblaðið um hjálpartól frá Hjálpartólamiðstøðini er útfylt.

Ein ergoterapeutur á Hjálpartólamiðstøðini hevur útfylt umsóknina. Umsøkjarin hevur ikki undirskrivað umsóknina.

Í umsóknarblaðnum er lýsing av, hvat søkt verður um. Her verður soljóðandi skrivað:

„Tillaging av atkomu til úthús / skúr.

Trupulleikarnir, sjúkan ella brekið hjá umsøkjaranum verða í umsóknarblaðnum lýst soleiðis:

„Minicrossari skal standa til uppglading í skúri frammanfyri íbúð. Høg gátt er nú har, sum kann lækkast 5 cm. Skrákíli kann annars gerast afturat og tørvur er á, at leggja nakrar flísar út í bøin til vendipláss.“

Tann 24. juni 2005 verður soljóðandi innanhýsis teldupostur skrivaður frá einum ergoterapeuti á HTM til ein starvsfelaga:

„Sum avtalað á heimavitjan hjá umsøkjaranum í dag, so bíleggi eg

tillaging av atkomu til skúrin fyri at fáa minicrossara inn – lækka gátt og gera skrákíla frá gáttini og leggja 8 flísar til vendipláss. Eisini skal krókur setast upp at halda hurðini opnari. Nýtt mál verður upprættað. Eg gevi tær boð aftur um málnr.“

Tann 3. juli 2005 verður soljóðandi notat skrivað:

„Undirritaða var á hv. saman við … at meta um møguleikar hjá umsøkjaranum at fáa minicrossara inn í úthús, ístaðin fyri sum nú, at hann koyrir hann inn í gongina. Har er ov trongligt at hava henda standandi, tá hann ikki er í brúk.

Høg gátt var inn í úthús og ov lítil vendiradius frammanfyri úthúsi. Avtalað var at útjavna gátt – lækkast nakrar cm, ájavnt við gólv í úthúsi, og rampu uttanfyri til útjavna restina. Framman fyri úthúsið skulu leggjast eykað flisar út í bøin, so hann kundi venda 90 gr. við minicrossara.

Arbeiði er gjørt og atkoman roynist væl.

Umsøkjarin eftirlýsir einum høkjuhaldara til minicrossara. Hesin verður játtaður og … er biðin um at montera ein.“

Tann 3. juli 2005 verður soljóðandi skriv sent umsøkjaranum:

„Almannastovan hevur á fundi tann 24.06.2005 viðgjørt umsókn tygara, og avgjørt varð at játta umsóknini og veita stuðul til tað, ið søkt varð um, og sum nú er gjørt.

Eisini verður játtaður høkjuhaldari til minicrossarin, sum tygum hava biðið um. HTM skipar fyri at hesin verður settur á.“

Tann 4. juli 2005 verður rokning send Hjálpartólamiðstøðini áljóðandi kr. 4.737,50 frá virkinum sum hevur gjørt arbeiðið, ið søkt varð um.

Tann 6. juli 2005 er boðseðilin hjá umsøkjaranum avgeiddur, við soljóðandi viðmerking:

„Boðseðil hjá

…

Er avgreiddur.

Fakturi nr. … er ávístur.

Viðmerkingar: Gjørt atkomu til minicrossara.“

Mín viðmerking:

*Í hesum máli er eingin læknaváttan, men ergoterapeutur á Hjálpartólamiðstøðini hevur útfylt umsóknina og verið á heimavitjan hjá umsøkjaranum fyri at gera tørvsmeting. Eg meti tí málið verða nøktandi upplýst sambært § 18, stk. 5 í forsorgarlógini.*

*Umsøkjarin hevur ikki skrivað undir umsóknarblaðið og harvið heldur ikki játtað HTM at savna fleiri upplýsingar til málið. Hetta hevur tó ongan týdning í hesum máli, tí HTM ikki hevur savnað upplýsingar um umsøkjaran.*

*Samlaða viðgerðartíðin í hesum málinum hevur verið 12 dagar, og havi eg onga viðmerking til hetta.*

<u>Mál nr. 3</u>

Tann 12. november 2004 sendir ein læknamiðstøð umsókn við telefaks til Hjálpartólsmiðstøðina um installatión af lyft/elevator millum tvær hæddir, arbeiðsstól, høkjir og el-koyristól til eina kvinnu, ið er 44 ára gomul. Standard umsóknarblaðið um hjálpartól frá Hjálpartólamiðstøðini er útfylt. Umsóknin er stemplað móttikin á Hjálpartólamiðstøðini tann 10. februar 2005.

Umsøkjarin hevur undirskrivað umsóknina og samstundis givið HTM loyvi til at savna neyðugar upplýsingar til málsviðgerðina. Kommunulækni hevur hjálpt umsøkjaranum við umsókníni.

Kommunulæknin hevur skriva soljóðandi stuttu lýsing av trupulleikunum hjá umsøkjaranum:

> „44-årig kvinde med dissimineret sclerose. Betydeligt forværret efter fødsel for ca. 1.5 år siden. Bruger 2 krykker når hun går og er tiltagende besværet af kraftesløshed i begge ben. Kan nærmest ikke mere gå på trapper."

Tann 12. desember 2004 hevur ein sosialráðgevi, sent skriv til m.a. Hjálpartólamiðstøðina við neyvari lýsing av viðurskiftum í heiminum hjá umsøkjaranum og eitt uppskot um hvørji hjálpartól kunnu lætta um gerandisdagin hjá umsøkjaranum. Skrivið stendur at verða móttikið á Hjálpartólamiðstøðini tann 10. februar 2005.

Tann 9. februar 2005 skrivar fysioterapeutur soljóðandi notat í málið á Hjálpartólamiðstøðini:

> „Mál nr.: 20041778 umfatar umsókn um: høkjir og arbeiðsstól; el-stól til innan- og uttandura nýtslu og eina lyft verður avgreitt soleiðis, at høkjir og arbeiðsstólur er ein umsókn. El-stólur / ar vera annulera í fyrstu syftu, av tí at umsøkjarin ikki hevur áhuga fyri at fáa el-stól í dag. Somuleiðis ynskir hon onga umfatandi broyting / tillaging gjørda í heiminum í dag, men vil síggja tíðina an. Og so fara vit inn nú og seta ein Wessex elevator upp millum kjallara- og stovuhædd. Hetta arbeiði byrjar nú og verður gjørt til eitt mál fyri seg."

Tann 9. februar 2005 verður ein lániseðil uppá elevatorin skrivaður og sendur umsøkjaranum.

Sama dag skrivar fysioterapeuturin eisini eitt annað notat í málið vísandi til heimavitjan 13. desember 2004 og 13. januar 2005. Notatið lýsir tørvin hjá umsøkjaranum til el-koyristól og innstallering av lyft. Samandrátturin og tilmæli í notatinum er soljóðandi:

„Samandráttur:

44 ára gomul kvinna við diag. Diss. Sclerose. Býr í sethúsum í 3 hæddum við manni og 1 1/2 ára gomlum soni. Ynskir ikki el-koyristól, sum eisini vil umfata at munandi broytingar mugu gerast í heiminum og uttandura inn til húsini. Meinar, og hetta verður undirbygt av einum kurstaði í Svøríki, har hon hevur verið í heyst, at um hon fær meira hjálp inn í heimið til barnið og aðrar praktiskar uppgávur, so hevur hon heldur ikki tørv á el-stóli nú.

…

Tilmæli:

At seta eina lyft upp millum kjallara- og stovuhædd. So kann umsøkjarin koma til klædnavask uttan at skulla nýta orku uppá trappur. Somuleiðis er so bert ein trappa eftir oman á vegin, har bilurin stendur.“

Tann 10. februar 2005 móttekur Hjálpartólamiðstøðin eina tekning av húsunum hjá umsøkjaranum.

Tann 10. februar 2005 verður umsóknin um lyft millum kjallara- og stovuhædd játtað. Soljóðandi skriv verður sent umsøkjaranum:

„Almannastovan hevur tann 15.12.2004 viðgjørt umsókn tygara, og avgjørt varð at játtað umsóknini og veita stuðul til tað, ið søkt er um til láns.

Um ikki annað er avtalað, sendir HTM tygum hjálpartólini.“

18. februar 2005 verður eitt kunningarskriv sent til økisdeildina. Kunningarskrivið er ein lýsing av støðuni hjá umsøkjaranum og familju hennara, og frágreiðing um heimavitjanina sum starvsfólk á Hjálpartólamiðstøðini vóru á.

Í skrivinum stendur at lyftin/elevatorin longu er settur upp millum kjallara og miðhædd. Harafturat verður mælt til, at veita umsøkjaranum meiri hjálp / stuðul inn í heimið.

22. februar 2005 er soljóðandi notat skrivað í málið á Hjálpartólamiðstøðini:

„Viðmerkingar: Havi 21.02.2005 verið á HV saman við … og m.a. hugt eftir lyftini, sum nú er uppsett. Harumframt havi eg gjørt eitt kunningar-

skriv / viðmæli um at umsøkjarin hevur tørv á at fáa meira hjálp/stuðul inn í heimið.

Umsøkjarin hevur fingið brævið, sum vit lósu í felag og hon hevur góðkent innihaldið. Eftir hetta havi eg, við hennara góðkenning, givið Almannastovuni … eitt eintak av skrivinum.

Málið endar við hesum frá okkara síðu."

Mín viðmerking:
*Tað undrar meg, at umsóknin í hesum málinum, sum er dagfest tann 12. november 2004, er stemplað móttikin á Hjálpartólamiðstøðini tann 10. februar 2005. Eisini eru onnur skriv í málinum, ið eru dagfest langt áðrenn tey eru stemplað sum móttikin á Hjálpartólamiðstøðini tann 10. februar 2005. Hesi skriv eru journaliserað tann 11. februar 2005.*

*Tað framgongur ikki av málinum, hvørt ein móttøkuváttan er send umsøkjaranum, eftir at umsóknin er móttikin á Hjálpartólamiðstøðini. Sambært góðum fyrisitingarsiði átti hetta at verið gjørt.*

*Tørvurin hjá umsøkjaranum sambært § 18, stk. 5 í forsorgarlógini er nøktandi skjalprógvaður við læknaváttan, notati frá fakfólki og notati frá heimavitjan.*

*Samlaða viðgerðartíðin av hesum máli hevur verið umleið 3 mánaðir.*

<u>Mál nr. 4</u>
Tann 20. apríl 2004 móttók Hjálpartólamiðstøðin eina umsókn m.a. um at seta upp eina transportabla brúsukabinu í heimunum hjá einari kvinnu, ið var 83 ár. Standard umsóknarblaðið um hjálpartól frá Hjálpartólamiðstøðini er útfylt.

Umsøkjarin hevur undirskrivað umsóknina og samstundis givið HTM loyvi til at savna neyðugar upplýsingar til málsviðgerðina. Ergoterapeutur á Landssjúkrahúsinum hevur hjálpt umsøkjaranum við umsóknini. Ein lækni hevur skrivað váttan á umsóknina.

Eitt notat frá heimavitjan, dagfest 16. apríl 2004, sum ergoterapeutur á landssjúkrahúsinum hevur skrivað, er hjálagt umsóknini. Notatið er soljóðandi:

„Almen lýsing:

83 ára gomul kona innløgd á b7 við … 10.03.04. Er komin seg væl, kann ganga við rollatori við tveimum hjólum – vi armur og bein hevur eitt

sindur av niðursettari kraft. Umsøkjarin klárar sjálv at vaska sær framman fyri vaskinum, men kann ikki fara í bað einsamøll – klárar eisini at lata seg í klæðini. Umsøkjarin gloymir illa – møguliga dement.

Búðstaður:

Umsøkjarin býr aleina í egnum húsum. Húsini eru í tveimum hæddum – kjallara og miðhædd. Í kjallaranum býr vinfólk hjá umsøkjaranum, ið eisini tekur sær av henni. Umsøkjarin býr í miðhæddini og hevur tað hon skal brúka á einari hædd. Í miðhæddini eru gongd, køkur, stova, wc við sitibaðikari, ið er ógvuliga høgt og tvey kømur. Innandura trappur eru niður í kjallarin. Trappur eru til inngongina – rekkverk í høgru síðu. Umsøkjarin bleiv leiddur upp í gjøgnum trappurnar og tað gekk rímuligt.

Umsøkjarin hevur klára seg sjálva til hon bleiv sjúk. Hon hevur fimm børn og búgva tey øll rundan um hana, og plaga tey at hjálpa henni.

Uppskot:

*At gáttirnar verða tiknar burtur, lítil rampa verður sett upp við úthurðina (25cm høgt trin)*

*At transportabul brúsukabina við baðistóli verður sett upp í kamarinum við síðuna av wcinum (sí hjáløgdu tekning)*

*At hon fær bækkenstól uttan hjól at hava inni á kamarinum at brúka um náttina.*

*At hon fær heimahjálp at koma til sín dagliga.*

*At hon fær mat frá Láargarði.*"

Bert brúsukabinan verður viðgjørd í hesum máli, hini hjálpartólini verða viðgjørd í einum øðrum máli á HTM.

Hjálagt umsóknini er eisini ein tekning av húsunum.

Hjálpartólamiðstøðin hevur tann 20. apríl 2004 sent soljóðandi móttøkuskriv til umsøkjaran:

„Viðvíkjandi: Móttøku av umsókn tygara um eina transportabla brúsukabinu

Til tygara kunleika skal verða sagt frá, at umsókn tygara er móttikin á HTM, og er skrásett undir málsnummarinum 20040600."

Tann 23. juni 2004 sendir Hjálpartólamiðstøðin soljóðandi bræv til umsøkjaran:

„I forbindelse med Deres udskrivning fra sygehuset blev der fra sygehusets terapeuter foreslået, at der blev installeret en brusekabine hos Dem.

Såfremt det stadig er Deres ønske, skal jeg bede Dem om at kontakte

> mig, så jeg kan komme hjem og se på huset sammen med en tekniker, hvis det kan lade sig gøre at installere denne.
>
> De bedes ringe og aftale en tid på telefon nr. 358313 eller 358300 og hvis De ikke er interesseret hører jeg også gerne fra dem“

Tann 18. mars 2005 móttekur Hjálpartólamiðstøðin soljóðandi teldupost frá soni umsøkjarans:

> „Undirritaði heitir hervið á tykkum um at taka uppaftur sakina viðvíkjandi brúsukabinu til umsøkjaran. Hetta tí at heimahjálpin ikki megnar at fáa umsøkjaran í baðikari longur.
>
> Henda áheitan er bert um brúsukabinu.
>
> Eg eri burturstaddur í gott tveir mánaðir frá í dag, um ivamál ring til systir mína.“

Tann 22. mars 2005 verður soljóðandi notat skrivað í málið á Hjálpartólamiðstøðini:

> „Hetta er eitt mál ið nú verður tikið fram aftur eftir áheitan frá soni umsøkjaran. Málið skal bert snúgva seg um brúsukabinu, og verður hetta sett í verk sum skjótast.“

Tann 22. mars 2005 verður soljóðandi boðseðil skrivaður í málið:

> „Hetta er eitt gamalt mál sum nú skal takast fram aftur, málið skal bert snúgva seg um eina brúsukabinu. Umsøkjarin vil ikki vita av broytingum, men sonurin eigur húsini og hevur heitt á okkum at taka málið uppaftur.
>
> Kunnu vit hyggja at málinum beint eftir páskir.
>
> Vænti at vit skulu á heimavitjan aftur, men kanst tú hyggja eftir tekningini sum liggur í málinum, og vita um hon kann brúkast.“

Tann 22. mars 2005 avger Almannastovan at játta umsóknini, og sama dag verður soljóðandi skriv sent umsøkjaranum:

> „Almannastovan hevur tann 22.03.2005 viðgjørt umsókn tygara, og avgjørt varð at játtað umsóknini og veita stuðul til tað, ið søkt er um til láns.
>
> Um ikki annað er avtalað, sendir HTM tygum hjálpartólini.“

Tann 31. mai 2005 er soljóðandi notat skrivað í málið:

> „Viðmerkingar: Er umbiðið hjá…“

Tann 23. juni 2005 verður soljóðandi boðseðil skrivaður í málið:

> „Boðseðilin hjá
>
> …
>
> Er avgreiddur.
>
> Fakturi nr. 11.06.2005 er ávístur.
>
> Viðmerkingar: Endurnýtt brúsa uppsett.“

Mín viðmerking:
*Í hesum málinum hevur ein lækni váttað umsóknina og ein ergoterapeutur hevur hjálpt umsøkjaranum við umsóknini, umframt verið á heimavitjan hjá umsøkjaranum fyri at gera eina tørvsmeting. Eg meti tí tørvin hjá umsøkjaranum vera nøktandi skjalprógvaðan.*

*Sum tað framgongur av notatum í málinum, verður málið ikki avgreitt beinanvegin, av tí at umsøkjarin „ikki vil vita av broytingum". Eg meti tí ikki, at Hjálpartólamiðstøðin kann lastast fyri, at málið ikki verður avgreitt í fyrstu atløgu.*

*Málið verður tikið uppaftur til viðgerðar, tá ið sonur umsøkjarans tann 18. mars vendir sær til HTM og biður um, at málið verður tikið uppaftur. Tað ganga bert fáir dagar frá tí, at málið verður tikið uppaftur til nýggja viðgerð, til avgerð er tikin. Tað ganga 3 mánaðir til málið verður avgreitt og brúsukabina verður uppsett hjá umsøkjaranum.*

<u>Mál nr. 5</u>

Tann 10. februar 2005 móttekur Hjálpartólamiðstøðin eina umsókn frá einari kvinnu, ið er 76 ár. Umsóknarblað um hjálpartól er útfylt.

Umsøkjarin hevur undirskrivað umsóknina og samstundis givið HTM loyvi til at savna neyðugar upplýsingar til málsviðgerðina. Ergoterapeutur á sjúkrahúsi hevur hjálpt umsøkjaranum við umsóknini. Ein lækni hevur skrivað váttan á umsóknina.

Á umsóknarblaðnum stendur, at søkt verður um:

> „Baði- og wc stól – elsong 4 deild – luftmadras – koyristól – lejringspútur 3 fastar og 3 bleytar – songjaborð."

Undir teiginum í umsóknarblaðnum: „lýs praktiskar trupulleikar, sjúku ella brek" er skrivað:

> „Málið hevur skund, av tí familjan vil hava sj heim sum skjótast.
> Umráðandi at hjálpitólini koma sum skjótast."

Eitt skriv, dagfest 10. februar 2005, ið lýsir trupulleikarnar hjá umsøkjaranum, er hjálagt umsóknini. Ein ergoterapeutur og ein fysioterapeutur hava skrivað skrivið, ið er soljóðandi:

> „Sj hevur havt Parkinson í mong ár og er hereftir rakt av demens í miðal grad. Sj datt í sept. 04 og breyt vinstru mjødn. Fekk tá skurðviðgerð har ein hálv protesa bleiv sett inn. Datt aftur fyri aðru ferð, har brotið bleiv reponerað. Fekk síðani infektión í skurðin sum endaði við eini Girdle Stone viðgerð.

Tann seinasta skurðviðgerðin miseydnaðist, partvís grundað á manglandi innlit í skurðviðgerð og restriktiónir orsakað av Demens.

Í dag er vinstra bein 4-5 cm styttri. Sj hevur onga gangfunktión. Einasta viðgerð sum Sj fær útyvir medicinska viðgerð er kontrakturprofylaksa. Sj er vorðin røktarsjúklingur.

Familjan vil fegin hava sj heim, men baðirúmið er á loftinum, tí er tað neyðugt at gera eitt nýtt á miðhæddini. Viðvíkjandi koyristóli so hevur sj roynt koyristólin hjá … sum býr á … Ellis- og røktarheimi. Stólurin nøktar tørvin hjá sj, men pútan (jay 2) virkar ov hørð. Sj er ógvuliga tunn, hevur tí tørv á einari bleytari pútu við „benspreder" av tí at vinstra bein adducerar og innatroterar."

Umframt hetta skriv er eisini ein tekning av baðirúminum hjáløgd umsókníni.

Tann 4. mars 2005 hevur ein fysioterapeutur skrivað soljóðandi notat í málið á Hjálpartólamiðstøðini:

„Viðmerkingar: 21.02.2005 fara undirritaða og … eftir áheitan (umsókn) frá … Sjúkrahús á heimavitjan hjá umsøkjaranum. T.v.s. at vit fara fyrst á Sjúkrahúsinum, tí at umsøkjarin er innløgd.

Talan er um eina 77 ára gamla kvinnu, fyrrv. sjs., sum hevur havt parkinson í nógv ár, og hereftir rakt av demens. Skurðviðgjørd eftir beinbrot fleiri ferðir, men op. eydnaðist ikki væl og umsøkjarin er tí røktarsjúklingur.

Eg fái ikki nakað samband við (kontakt) við hana, tá ið eg var inni hjá henni, men sambært ergoterap. …, so er hon klár inn ímillum og kennir síni nærmastu. Og familian er nógv um hana og tey vilja nú hava hana heim. Serliga maðurin og ein dóttir taka sær nógv av henni. Og tað er í hesum sambandi, at heitt verður á okkum um at koma á heimavitjan.

Núverðandi baðirúm er á loftinum. Og eftirsum at meiningin er, at umsøkjarin skal búleikast í miðhæddini, er ætlanin at gera bæðirúm her, stendur í umsókníni, sum er komin okkum (HTM) í hendi 10.02.2005.

21.02.2005 fara vit so á heimavitjan, og tað vísir seg tá, at tey hava klárgjørt $^1/_2$ av stovuni við at leggja vinylbelegning omaná núverandi (nýggja) gólvteppi og fingið røktarsong o.a. sum stendur klárt frá okkum. Vinylbelegningin vilja tey fegin hava endurgoldnan.

Við tað at tey hava lagt belegningin omaná teppi, er undirlagið bleytt, og sostatt verður tungari at koyra við koyristólinum. Hetta søgdu vit teimum, og um hetta er ein trupulleiki fyri tey, so verður teppið tikið burtur, fáa vit at vita.

Og baðirúmið/wc er nærum liðugt. (Sí skitsu sum … hevur gjørt)

Eftir tí, sum vit royna at leggja okkum eftir, er rúmið nakað smalt, tá vit hugsa um pláss til hjálpara, bert 125 cm breitt. Og atkoman er direkta frá køkinum. Kantur er á sjálvari gáttuni og gólvið í sjálvum rúminum er yvir køksgólvhædd.

Arbeiði annars kann ikki sigast annað enn at vera snøgt úr hondum greitt.

Umsókin kemur okkum í hendi tann 10.02.2005 frá … S.S. 21.02.2005 t.v.s 11 dagar seinni fara vit á HV. Talan er sostatt ikki um nakrað bíðitíð frá okkara síðu. Og hetta er spell, tí serliga at hæddarmunurin er á gólvinum og gáttin ger, at vit ikki uttan víðari kunnu siga gott fyri tí, sum gjørt er.“

Tann 7. mars 2005 er soljóðandi bræv móttikið á Hjálpartólamiðstøðini frá manni umsøkjarans. Skrivið er dagfest 3. februar 2005:

„Viðvíkjandi umbygging í samband við avlamni.

Í samband við at undirritaði, hevur gjørt neyðuga broyting í sethúsum okkara, verður hervið søkt um, at Almannastovan endurrindar goldnar rokningar í samband við broytingina.

Sí avrit av hjál. fakturaum og rokningum.

Sethúsini eru frá 1920-unum, og er umbygging gjørd soleiðis at umsøkjarin fær búleikast á miðhæddini, høvuðs-inngongdin er.

Sum sæst, ljóða rokningarnar í navninum hjá hjúnunum, umframt í navninum hjá timburmeistaranum. Hetta tí at hann fær upp í 25% í avsláttri frá fleiri av fyritøkunum, sum vit hava keypt tilfar frá (sí hjál. fakturair).

Grundin til at vit vóru noydd til at gera umbyggingina er tann, at umsøkjarin í síðsta summar kom illa fyri av mjadnabroti.

Mjadnabroti hevur ført við sær at umsøkjarin nú er vorðin 100% avlamin.

Hon hevur Parkinsonsjúkuna umframt.

Umsøkjarin verður nú útskrivað, eftir at hava ligið á sjúkrahúsi í 1/2 ár.“

Tann 8. mars 2005 móttekur Hjálpartólamiðstøðin kvittaninar fyri tilfarið til umbyggingina, tilsaman hava tey brúkt kr. 41.341,14.

Tann 8. mars 2005 er ein tekning av nýgjørda baðirúminum við viðmerkingum skrásett í málinum á Hjálpartólamiðstøðini. Sum skilst í notatinum frá 4. mars er tekningin gjørd í sambandi við heimavitjanina.

Tann 18. mai 2005 verður umsóknin játtað og soljóðandi skriv sent umsøkjaranum:

„Almannastovan hevur hin 18.05.2005 viðgjørt umsókn tygara um stuðul til bústaðarbroytingar. Avgjørt varð at ganga umsóknini á møti og verður stuðulin, sambært meting HTMs, játtaður soleiðis:

Stuðulspartur kr. 41.341,15

Stuðulsupphæddin er grundað á kvittanar frá tygum.

Arbeiðið er gjørt áðrenn HTM hevur havt møguleika at viðgera málið og at veita ráð og vegleiðing.

Mett verður at tygum hoyra til brúkaraskaran, ið kann fáa játtan til íbúðarbroyting sambært § 18, stk. 5 í forsorgarlógini.

HTM hevur verið á staðnum og eftirmett arbeiðið og mett verður at arbeiðið kann góðkennast.

Sigast skal frá, at arbeiðir av slíkum slag vanliga ikki eiga at verða sett í verk fyrr enn Almannastovan/HTM hevur havt møguleikan at viðgera umsóknina og játta at seta arbeiði í verk. Almannastovan hevur í hesum førinum mett at tygum lúka treytirnar fyri stuðli og hevur tí eftirmett málið og avgjørt at játtað.“

Tann 20. mai 2005 verður útgjaldingarskjal skrivað áljóðandi kr. 41.341,14. Sostatt fær umsøkjarin alt tilfarið endurgoldið.

Tey avvarðandi hjá umsøkjaranum hava gjørt íbúðarbroytingina, leikluturin hjá Hjálpartólamiðstøðini í hesum føri er tí at eftirmeta arbeiðið, soleiðis at umsøkjarin kann fáa útreiðslurnar endurgoldnar.

Mín viðmerking:

*Eg eri samdur við Hjálpartólamiðstøðini í, at tað átti at verið søkt um stuðul til íbúðarbroytingina, áðrenn arbeiðið var gjørt. Annars havi eg ikki viðmerkingar til málið.*

*Samlaða málsviðgerðartíðin í hesum máli var umleið 2 mánaðir og 10 dagar. Hetta kann sigast at vera í longra lagi, men av tí at talan er um eitt serligt mál, har umsøkjarin hevur bygt, áðrenn hann søkti um stuðul, og at málið tí kann hava verið trupult at avgreiða, havi eg onga viðmerking til hesa málsviðgerðartíð.*

***Samandráttur og niðurstøða***

*Tað framgongur ikki av málum nr. 2, 3 og 5, hvørt móttøkuváttan er send umsøkjarunum. Av tí, at tað kann væntast, at viðgerðin av slíkum málum kann taka longri tíð, hevði tað sambært góðum fyrisitingarsiði verið rættast at sent umsøkjaranum eina móttøkuváttan, tá ið umsóknin var móttikin.*

*Eisini í hesum málum hevur Hjálpartólamiðstøðin standard umsóknarbløð, ið tæna sum góð vegleiðing til brúkaran. Á umsóknarblaðnum gevur umsøkjarin Hjálpartólamiðstøðini loyvi til at savna neyðugar upplýsingar til málsviðgerðina. Tær upplýsingar, ið eru útvegaðar til hesi mál, eru sostatt fingnar til vega í tráð við § 27, stk. 2, nr. 1 í fyrisitingarlógini.*

*Í øllum 5 málunum um umbyggingar v.m. hava antin lækni ella onnur heilsustarvsfólk gjørt eina tørvsmeting í málinum. Eg havi tí onga viðmerking til dokumentatiónina í hesum málum.*

*Partshoyring er ikki viðkomandi í hesum málum, av tí at umsóknirnar í øllum førum eru játtaðar. Av tí at øll 5 málini um umbygging eru játtað, var ikki neyðugt at geva grundgeving og kæruvegleiðing sambært §§ 21 og 24 í fyrisitingarlógini. Eg havi tí onga viðmerking til hetta.*

## 5. Viðmerkingar

Tann 3. nov. 2005 var umboðsmaðurin liðugur við fyribils viðgerðina av hesum málum, og ein fyribils frágreiðing varð send Almannastovuni til ummælis. Við skrivi, dagfest 28. nov. 2005, hevur Almannastovan sent umboðsmanninum hesar viðmerkingar til fyribils frágreiðingina:

> **„Viðmerkingar til fyribilsálit viðvíkjandi kanning av 70 málum á Almannastovuni**
>
> **Ad. 2 Fyritíðarpensjónir**
>
> **Almennar viðmerkingar til málini og málsviðgerðina**
>
> Almannastovan metir, at tað er neyðugt fyrst – við støði í kanning tygara – at gera nakrar almennar viðmerkingar til málsviðgerð o.a. á fyritíðarpensjónsøkinum.
>
> **Um fyritíðarpensjón og viðgerðarhátt /-innihald**
>
> Grundstøðið undir viðgerðini av fyritíðarpensjónsmálum á Almannastovuni er grundsjónarmiðið, sum vit meta er undirliggjandi í lógini um almennapensjónir, nevniliga at fyritíðarpensjón ikki eigur at verða veitt fyrr enn allir aðrir møguleikar eru úttømdir. Undirliggjandi politiska

grundáskoðanin er, at menniskju hava best av at vera virkin í arbeiðs- og samfelagslívinum og vera fíggjarliga óheft av øðrum, herundir tí almenna.

Tað er tí ein treyt fyri at veita pensjón vegna niðursett arbeiðsføri, at allir aðrir møguleikar fyri at vera virkin arbeiðsliga og óheft/ur fíggjarliga eru royndir fyrst. § 5 í almannapensjónslógini sigur, at tað er ein treyt fyri at tilluta pensjón, at møguleikin fyri at seta í verk fyriskipanir, sum kunnu betra um arbeiðsførleikan ella møguleikin at útvega eitt – eftir viðurskiftunum hjá viðkomandi – hóskandi arbeiði, skal vera royndur fyrst.

Skerda arbeiðsførið skal, sum kunnugt, ikki einans grundast á læknaligar upplýsingar. Ein **sosialfaklig meting** skal til fyri at gera eina heildarmeting av skerdu arbeiðsevnunum og har skulu havast hesi atlit:

~ **inntøkuviðurskifti** – áður, nú og mett framyvir við skerdu arbeiðsevnunum; hetta við støði í meting av
~ **arbeiðsmøguleikum** við atliti til útbúgving og virksemi fyrr og til kreftir og førleikar nú, samanborið við onnur við samsvarandi útbúgving í sama øki
~ **aldur, lívsstarv, bústað** og líkindi fyri **betran ella versnan** av avlamninum / sjúkuni
~ onnur viðurskifti, ið mett verður, at dentur eigur at verða lagdur á í **heildarmetingini** av skerda arbeiðsførleikanum (§ 9 í almannapensjónslógini).

Læknaliga og sosiala metingin innganga í heildarmetingina av skerdu vinnuevnunum og møguleikunum fyri endurbúgving / hóskandi arbeiði og eru neyðug stig á leiðina fyri at gera eina tilráðing um pensjón.

Við støði í omanfyri standandi metir Almannastovan ikki, at ein avgerð um fyritíðarpensjón eigur at verða tikin í eini handavending.

Hetta forsvarar tó ikki, at viðgerðartíðin í fleiri av málunum, sum tygum hava kannað, er í so drúgv. Almannastovan er samd við tygum um hetta í fleiri av málunum. Heldur ikki halda vit okkum vera komin á mál, hvat viðgerðarháttinum og mannagongdum viðvíkur. Betringar eru neyðugar og hetta arbeiða vit við.

**Mannagongdin**

umsókn / læknaváttan

⇓

samrøða við umsøkjara

⇓

innheinta neyðugar upplýsingar

⇓
heildarmeting sosialráðgevans
⇓
tilráðing Almannastovunar
⇓
FUR

Fyrsta stigið í einum pensjónsmáli er umsóknin. Henda kann koma beinleiðis frá umsøkjaranum, umvegis lækna ella serlækna ella eftir ráðum frá Almannastovuni.

Síðan verða upplýsingar, sum skulu liggja til grund fyri støðutakanini til pensjón, útvegaðar. Hetta eru **læknaligu upplýsingarnar** um heilsuna (læknaváttan), um hesar ikki fyriliggja frammanundan. Heilsuupplýsingarnar skulu nýtast til læknaligu dømingina av skerjingini av arbeiðsførinum. Harumframt skulu upplýsingar útvegast, sum er neyðugar fyri at gera sosialfakligu metingina av skerda arbeiðsførinum – sí § 9 í lógini – umframt metingina av møguleikanum fyri at seta í verk endurbúgvingarfyriskipan ella finna hóskandi arbeiði – sí § 5. Undir møguleikum fyri at finna hóskandi arbeiði, kemur eisini vart starv, t.v.s. starv, har tað almenna rindar ávísan part av lønini.

Upplýsingarnar omanfyri koma í fyrstu atløgu frá umsøkjaranum sjálvum. Síðan vera upplýsingar, ið vanta innsavnaðar. Herundir møgulig serlæknaváttan, um mett verður av læknaráðgevanum hjá Almannastovuni, at kommunulæknaváttanin ikki er haldgott læknaligt grundarlag fyri at meta um skerdu arbeiðsevnini.

Almannastovan metir tað hava týdning, at umsøkjarin sjálvur kemur til orðanna. Og hetta á ein hátt, sum tað ikki er møguligt skrivligt í einum umsóknarblað. Tí hava vit vanliga eina samrøðu við umsøkjaran. Tað kann í nógvum førum lætta um fatanina av støðuni, serliga tá diagnosan/vinnuevnini eru ivasom, at tosa við ein umsøkjara og hoyra hvussu hann upplivir sína sjúku/brek og hvørjar møguleikar og forðingar, umsøkjarin sjálvur sær í mun til sína støðu. Samrøðan verður samstundis nýtt sum eitt høvi at útinna ráð og vegleiðingarskylduna sambært forsorgarlógini og at tryggja at umsøkjarin fær møguliga aðra almannaveiting, meðan umsóknin verður viðgjørd, herundir forsorgarveiting ella forskot uppá pensjón (sbr. § 33).

Viðmerkjast skal tó, at framyvir verður ikki innkallað til samrøðu, um læknaliga grundarlagið er púra klárt og tað samstundis verður mett, at umsóknin skal avgerast skjótast gjørligt. Tá tað kemur til pensjón vegna

einkjustøðu hevur Almannastovan innført ta mannagongd, at allir persónar við uppihaldsskyldu mótvegis børnum undir 18 ár, sum koma í einkjustøðu, fáa tilboð at koma til samrøðu, har vit kunnu veita ráð og vegleiðing um persónlig og fíggjarlig viðurskifti og upplýsing um rættindi sambært almannalóggávuna.

Vit hava omanfyri samstundis roynt at illustrerað, at Almannastovan ger tað arbeiði, sum eisini skal til fyri at útvega neyðuga grundarlagið fyri støðutakan Vanlukkutryggingarráðsins til umsóknina um pensjón. Tí má viðgerðartíðin á Almannastovuni vera longri. Tað kemur tó fyri, at Vanlukkutryggingarráðið metir, at læknaligu upplýsingarnar, sum Almannastovan hevur útvega sær, ikki eru nóg nágreiniligar og nóg gott grundarlag at meta um skerda arbeiðsførið. Tí útvegar Vanlukkutryggingarráðið sær eftirfylgjandi eina serlæknaváttan. Biðitíðin at fáa serlæknaváttanir er ofta long.

**Viðgerðartíðin**

Almannastovan hevur kannað viðgerðartíðina fyri fyritíðarpensjónsumsóknir í 2004, sí viðlagda yvirlit (**fylgiskjal 1**).

Viðgerðartíðir (miðal) 2004:

| | |
|---|---|
| Almannastovan: | **5,64 mán.** |
| Vanlukkutryggingarráðið: | **3,49 mán.** |

Stór spjaðing er tó í viðgerðartíðini hjá Almannastovuni – frá 7-10 dagar í einstøkum málum til í onkrum einstøkum máli 17,5 mán, men vanliga viðgerðartíðin liggur millum 2 og 6 mánaðir. Sama spjaðing sæst eisini í avgerðartíðunum hjá Vanlukkutryggingarráðnum.

Ein avgjørt leingjandi táttur í málsviðgerðini er serlæknaváttanin. Tað tekur, um vit rykkja ella ei, ofta sera langa tíð at fáa hesar tilvega. Siðvenjan hjá Almannastovuni hevur verið at rykkja aftaná 3 mánaðir, men kom ólag á hetta undir „kreppuni“, sum deildin var í heystið 2004 og várið 2005. Eisini kann bíðitíðin hjá ávísum kommunulæknum verða sera long.

**Støðan á Almannastovuni / deildini kannaða tíðarskeiðið**

Sum heild er føroyska sosiala umsitingin sera lítil, um vit samanbera okkum við samsvarandi umsitingar í okkara grannalondum. Hetta hóast støðan í so máta er batnað nakað seinnu árini. Mett verður við atliti at royndunum higartil og støddina á landinum, at hetta – hóast ávísur vøkstur er og fer at vera – er og verður ein partur av okkara „tilverugrundarlag“.

Almannastovan hevur lagt stóran dent á at menna stovnin við atliti at málsviðgerð og tænastu. Hetta gjøgnum undirvísing og upplæring, nýtslu av betri amboðum (m.a. elektroniska journalskipan, málsviðgerðarskipan á pensjónsøkinum, útgjaldsskipan), menning av innanhýsis rætningslinjum, oyðibløðum o.t., endurskoðan av mannagongdum o.s.fr. Menningin tekur tíð, serliga tá hugsað verður um umstøðurnar, men vit meta, at vit eru komin langt áleiðis, hóast als ikki nádd á mál.

Almannastovan hevur øll árini síðan ár 2000 uttan úrslit søkt um at fáa játtan á fíggjarlógini til at útbyggja edv-kervið. Í 1999 varð nýggja skipan innførd, sum skuldi lyfta edv-kervið upp á eitt tíðarhóskandi støði. Ætlanin varð frá byrjan, at hetta skuldi vera ein samanhangandi skipan fyri allar veitingar. Talan er um eina samanhangandi journal- og málsviðgeraskipan og útgjaldsskipan. Men útbyggingin steðgaði upp, áðrenn hon varð liðug. Málsviðgeraskipan var einans liðug fyri pensjónsøkið. Sostatt koyra írestandi veitingarnar antin við eini gamlari ótíðarhóskandi skipan (dagpeningaøkið) ella verða viðgjørdar manuelt (forsorgarveitingar, barnapeningur, vm).

Avgerandi fyritreytin fyri av álvara at kunna rationalisera og effektivisera umsitingina er ein nútímans edv-skipan. Tí eru avgerandi bætar í stóran mun treytaðir av politiska viljanum til at gera íløgur í eina nýggja edv-skipan.

Avmarkaða starvsfólkaorkan ger tað sera torført at liva upp til alsamt vaksandi krøvini frá borgaranum um dygdarbetri og størri tænastu, fyrisitingarrættarligu krøvini um grundgeving, notatskyldu, partshoyring o.a., krøv frá grannskoðan um betri fíggjarstýring o.s.fr. Nýggju eftirlitsstovnarnir, herundir Landsgrannskoðarin, Kærunevndin í Almannamálum, Skrásetingareftirlitið og Løgtingsins umboðsmaður, umframt alsamt størri krøv frá aðalráðnum um at vera við í útgreinandi arbeiði o.t. økja eisini arbeiðstrýstið á stovninum munandi. Samstundis heldur málstalið fram við at vaksa. Fleiri og fleiri borgarar hava samband við almannaverkið á ein ella annan hátt.

Starvsfólkaorkan, sum er tilførd stovninum seinnu árini stendur ikki mát við øktu fyrisitingarligu og tænastuligu krøvini og økta málstalið. Tað má síggjast aftur, kanska serliga í viðgerðartíðina, men eisini í neyðugari raðfesting, sum í roynd og veru gongur útyvir fyrisitingarrættarligu krøvini og idealini um eina dygdargóða málsviðgerð.

Almannastovan hevur havt serligar trupulleikar júst tað tíðarskeiðið, sum tygum hava kannað. Hetta sæst tíanverri aftur í viðgerðartíðini.

Miðal viðgerðartíðin í teimum málum, sum tygum hava kannað er 7 mánaðir (6,9). Sum sæst omanfyri er miðal viðgerðartíðin í 2004 sum heild 5,6 mánaðir.

Tað er okkara Arbeiðsmarknaðardeild (AMD), ið er mannað við 6 sosialráðgevum, ið viðgerð flestøll fyritíðarpensjónsmál (fólk undir 60 ár). Í mun til aðrar deildir á stovninum er AMD ikki lítil – heldur ikki í mun til uppgávurnar. Men ein deild, sum er so lítil í mun til málstalið (o.u. 250 pensjónsmál og o.u. 200 endurbúgvingarmál) er sera viðbrekin fyri broytingum og ávirkanum uttaneftir. Almannastovan var sum kunnugt á heysti 2004 fyri fleiri deyðsføllum millum starvsfólk. Ein málsviðgeri og 2 sosialráðgevar andaðust innan fyri 3 mánaðir. AMD hevur várið 2005 verið fyri langtíðarsjúka hjá einum málsviðgera aftaná brádligt deyðsfall hjá hjúnafelaganum, deildin flutti frá Jónas Broncksgøtu niðan á Smyrilsveg í jan-febr 2005 og deildin misti ein málsviðgera, tá Almannastovan á heysti 2004 mátti siga 6 fólkum úr starvi vegna skerjingar á fíggjarlógini. Harumframt var ein royndur sosialráðgevi á deildini í barnsburðarfarloyvi og ein ikki royndur sosialráðgevi kom í staðin.

**Niðurstøða viðvíkjandi fyritíðarpensjónsmálum**

Tygum koma í tygara niðurstøðu og samandrátti inn á hesi viðurskifti, sum tygum meta vera kritisabul ella eiga at verða endurskoðað:

~ leikluturin hjá læknaráðgevanum
~ mannagongdin viðvíkjandi innheintan og rykkjan eftir serlæknaváttanum o.ø. upplýsingum
~ samrøðan við umsøkjarar
~ innheintan av upplýsingum (møg. í stríð við fyrisitingarlógina),
~ nýtsla av oyðibløðum
~ leiklutin hjá Almannastovuni yvirhøvur og avleiðing av hesum fyri tilgongdina í fyritíðarpensjónsmálum (fløskuhálsur)

Tygum mæla til, at Almannastovan umhugsar broytingar í mannagongdum, herundir viðvíkjandi

~ læknaváttanum (áminning um at útvega á umsóknarblað, innheintan og áminning, nær framløga fyri læknaráðgeva, áheitan um serlæknaváttan)
~ nær mál verða send til Vanlukkutryggingarráðið
~ samrøðum (skilja ímillum endurbúgvingar- ella ikki endurbúgvingargrundarlag)
~ nýtslu av oyðibløðum (nær, hvørji)
~ innheintan og áminning um innheintan av upplýsingum sum heild

Almannastovan er samd vit tygum í, at mannagongdirnar skulu endurskoðast. Viðvíkjandi samrøðuni, sum so at siga hevur verið fastur táttur í nærum øllum málum, fara vit at meta um, nær henda er neyðug og nær ikki, so henda ikki seinkar málsgongdini óneyðugt.

Eisini fara vit at broyta umsóknarblaðið, soleiðis at áminning um, at læknaváttan skal útvegast og at dóps- ella navnabræv hjá børnum undir 18 ár skal viðleggjast kemur við á umsóknarblaðið.

Viðvíkjandi læknaupplýsingum í málinum fara vit at bera okkum skjótari at, tá ivi er um upplýsingarnar, bæði upplýsingar frá kommunulækna og serlækna. Hetta við at leggja fyri læknaráðgevan skjótari. Samstundis fara vit at stramma upp viðvíkjandi útsendan av rykkjarum, tá ov long tíð gongur.

Vit fara at endurskoða, hvussu læknaráðgevin verður brúktur, nær og nær ikki.

Annars fara vit at endurskoða oyðibløðini (A-E), um neyðugt er at broyta tey, hvussu tey skulu nýtast og hví.

Vit fara harumframt yvirfyri starvsfólkunum at innskerpa notatskylduna uppaftur meiri enn vit higartil hava gjørt – ikki bara fyri at liva upp til lógarkravið, men eisini fyri tryggja at øll gongdin í málinum er skjalfest, hóast viðurskiftini ikki beinleiðis innganga í sjálvt avgerðargrundarlagið. Hetta so vit ikki missa burtur ítøkiligu gongdina í málinum. Tað kundi sæð út til, at hetta er hent í nøkrum málum, tygum hava eftirkannað á pensjónsøkinum, har t.d. møguligt samskifti við umsøkjara ikki framgongur.

Stovnurin er byrjaður at broyta ávísar mannagongdir. Ætlanirnar eru annars at áseta hámark fyri viðgerðartíðini og uppraðfesta dygdarmenning, bæði við atliti at almannapensjónslógini, fyrisitingarlógini og arbeiðsháttinum, tá tað kemur til endurbúgvingar- og pensjónsmál.

Mett verður, at avgerðartíðin á Almannastovuni kann styttast við at broyta mannagongdirnar. Tó má hetta ikki ganga útyvir metingina av møguleikunum og royndirnar at hjálpa viðkomandi til størst møguligt fíggjarligt sjálvbjargni og arbeiðsligt virkni.

Sum tað gongur fram av okkara innleiðandi viðmerkingum, eru vit ikki samd við tygum í tí altavgerandi vektini, sum tygum sýnast tilleggja læknaligu upplýsingunum. Vit meta, at § 9 í alt ov lítlan mun verður tikin í álvara í metingini av skerdu vinnuevnunum. Eisini í viðgerðini av málunum á Almannastovuni. Hetta ætlar Almannastovan at taka til viðgerðar.

Almannastovan er heldur ikki samd við tygum í, hvør leikluturin hjá Almannastovuni er. Tygum meta, at við tað, at Almannastovan einans er fyrireikandi, átti viðgerðartíðin at verði minimal her. Almannastovan er av teirri fatan, at ein „tilráðing“ um avgerð forútsetir, at øll viðurskifti av týdningi fyri málið (§§ 5 og 9) eru lýst og meting og niðurstøða er gjørd, sum verður ein hornasteinur í avgerðargrundarlagnum hjá Vanlukkutryggingarráðnum.

Tað er Almannastovunar mál, at bøta munandi um tilráðingina, tí vit meta, at hon enn ikki er so góð, sum vit kundu ynskt.

**Tey 20 málini**

**Mál nr. 1**

Tygum meta, at tað er ikki nøktandi at tað ganga meira enn 4 mánaðir frá, at umsókn um fyritíðarpensión er móttikin ( 4.11.04) til serlæknaváttan verður umbiðin (14.3.05) og at tað gongur ein heilur mánaði, frá tí, at avgjørt er at biðja um serlæknaváttan, til hetta verður gjørt. Umboðsmaðurin metir at samlaða viðgerðartíðin, 7 1/2 mánaði, er alt ov long, tá havt verður í huga, at Almannastovan ikki skal taka avgerð, men bert gera tilmæli.

Málið er sent til Vanlukkutryggingarráðið tann 20.6.2005. Svar er enn ikki komið haðani.

Til hetta er at siga, at mannagongdin er tann, at avgerð um innheintan av serlæknaváttanum verður tikin á EP fundi. Vanliga verður ein serlæknaváttan innheintað stutt eftir at fundarfrágreiðing frá EP-fundi fyriliggur. At ein heilur mánaði gongur í hesum føri er óheppið og talan er helst um eitt eindømi.

**Mál nr. 2**

Tygum meta, at málið hevur tikið alt ov langa tíð. Tað er ikki nøktandi at umsóknin liggur og bíðar 2 1/2 mánaða, tí málsviðgerin ikki er til arbeiðis. Almannastovan hevur eftirfylgjandi biðið um føði-/dópsbræv uppá barnið. Almannastovan hevur noterað ogn og skuld. Tygum duga ikki at síggja, hví umsøkjari verður innkallaður til samrøðu og hví málið er sent til læknaráðgevan til ummælis.

Umsókn er innkomin tann 15.02.2005 og málið varð avgreitt 22.06. 2005.

Til hetta er at siga, at Almannastovan heldur ikki metir at tað er nøktandi, at eitt mál liggur og bíðar, tí sosialráðgevi ikki er til arbeiðis. Viðgerðartíðin er blivin ávirkað av støðuni á deildini um hetta mundi, sum greitt frá omanfyri. Harumframt kemur, at ivi var um viðkomandi

skuldi hava pensión (afturvirkandi) og bíðað varð eftir løgfrøðiligari niðurstøðu hesum viðvíkjandi.

Umsóknarbløðini eru broytt soleiðis, at tað framgongur at navna-/dópsbræv hjá børnum undir 18 ár skal latast inn, tá talan er um pensjonistar (staðfesta hvør hevur uppihalds-/gjaldsskyldu).

Upplýsingar um ogn verða ikki longur innheintaðar í øðrum førum, enn tá talan er um pensjón sambært § 8, stk. 1, nr. 2 (varandi tørv á hjálp til uppihalds). Blað E er broytt.

Almannastovan innkallar ikki longur umsøkjarar av einkjupensjón til samrøðu, men bjóðar øllum eftirsitandi við børnum undir 18 ár at venda sær til Almannastovuna í økinum, har tey kunnu fáa ráð og vegleiðing um persónlig og forsorgarlig viðurskifti og upplýsing um rættindi sambært almannalóggávuni, herundir møguliga einkjupensjón, barnagjald til einsamallar uppihaldarar, endurbúgvingarmøguleikar o.a. (sbr. § 1, stk. 2 og 3 í forsorgarlógini). Almannastovan fær allar deyðsváttanir frá Skiftirættinum, gjøgnumgongur hesar við atliti til steðgan ella broyting av veitingum og við atliti til omanfyristandandi tilboð um ráð og vegleiðing v.m.

Grundin til, at tað sær út sum um læknaráðgevin tekur avgerðir í málum um einkjupensjón er, at øll pensjónsmál koma upp á EP-fundi og skrá verður gjørd og øll mál verða margfaldað og send til fundarluttakararnar, herundir læknaráðgevan. Læknaráðgevin tekur ikki avgerðir, og er Almannastovan samd við tygum um, at læknaráðgevin ikki eigur at fáa fyrilagt mál um einkjupensión, men bert mál har heilsuligir upplýsingar eru.

**Mál nr. 3**

Tygum meta, at tað er í longra lagi, at meir enn 3 mánaðir ganga frá umsókn kemur inn, til málið verður latið til Vanlukkutryggingarráðið, at málið átti at verið avgreitt innan ein mánaða og at ongin grund var til at kallað umsøkjaran inn til samrøðu.

Almannastovan metir at ein viðgerðartíð uppá 3 mánaðir er nøktandi. Málið var sent til Vanlukkutryggingarráðið tann 20.6.2005 og avgerð er komin haðani tann 20.9.2005.

Almannastovan fer at taka spurningin upp í hvørjum føri umsøkjarar skulu kallast inn til samrøðu.

Almannastovan tekur ikki longur upplýsingar viðv. ogn og inntøkur hjá hjúnafelaga uttan tá talan er um umsóknir, ið vera viðgjørdar eftir § 8, nr. 2. Annars skal verða viðmerkt, at inntøka hjúnafelagans hevur týdn-

ing, um viðkomandi ynskir at fáa serliga viðbót (sonevnda brennistudningin).

**Mál nr. 4**

Tygum meta, at ein viðgerðartíð uppá 7 1/2 mánaða als ikki er nøktandi. Tað ganga meira enn 4 mánaðir frá, at læknaváttan er móttikin til málið kemur fyri á EP-fundi. Almannastovan kundi eisini havt biðið um læknaváttan heldur skjótari enn gjørt er (umsókn er komin 26.11.04, læknaváttan umbiðin 15.12.04) og kundi havt rykt eftir læknaváttan (er innkomin 10.02.05). Tygum duga ikki at síggja, hvat inntøku- og ognarupplýsingar hjá hjúnarfelaga skulu brúkast til.

Málið er sent til Vanlukkutryggingaráðið tann 20.06.2005, avgerð er komin haðani tann 20.9.2005.

Almannastovan metir at ein viðgerðartíð uppá 7 1/2 mánaða er í longra lagi og at ov long tíð er gingin frá tí læknaváttanin kom inn, til málið var lagt fyri á EP-fund.

Føst mannagongd hevur verið tann, at so skjótt umsókn um fyritíðarpensión kom inn, innheintaði málsviðgeri (skrivari) læknaváttan, umframt at rykkja eftir læknaváttanum. Í 2004 hevur talan verið um neyðuga raðfesting av uppgávum í mun til orkuna.

Viðvíkjandi innheintan av inntøku- og ognarupplýsingar – sí málið omanfyri.

**Mál nr. 5**

Tygum viðmerkja at hetta mál ikki verður sent Vanlukkutryggingarráðnum fyrr enn 2 ár eftir umsóknin er innkomin. (umsókn komin 3.7.2003, málið sent til Vanlukkutryggingarráðið 20.6.2005, svar enn ikki komið). Longu um umsóknarmundið átti Almannastovan at verið greið yvir, at heimild ikki var fyri hækkan úr miðal til hægstu fyritíðarpensión hjá umsøkjara, ið var 65 ára gomul. Tygum fara at geva Almannastovuni átalu fyri handfaringina av hesum máli.

Almannastovan er samd í tygara meting av handfaringin av hesum máli. Málið kundi verið avgreitt beinanvegin til Vanlukkutryggingarráðið vísandi til, at heimild ikki var fyri hækkan. Av misgáum var málið ikki viðgjørt fyrr enn ein málsviðgeri av tilvild verður varugur við, at málið ikki er endaliga avgreitt. Tað er ikki til at síggja aftaná heldur, hví uml. 6 mánaðir ganga frá, at málsviðgeri verður varugur við, at umsóknin ikki er viðgjørd til hon kemur fyri á EP-fund.

Umsøkjarin letur ikki hoyra frá sær. Tað kundi týtt uppá, at viðkomandi er kunnaður munnliga um vantandi møguleikan at fáa pen-

sjónina hækkaða aftaná 60 ára aldur, men hevur gloymt at avgreiða málið endaligt. Her er eisini vantandi yvirhaldan av notatskylduni møguliga ein trupulleiki.

Feilurin hevur tó ikki við sær djúptøknar avleiðingar fyri umsøkjaran – viðkomandi er t.d. ikki fyri fíggjarligum tapi.

**Mál nr. 6**

Tygum hava ikki gjørt viðmerkingar. Viðk. søkir tann 30.5.2005 um at fáa fyritíðarpensión galdandi frá 1.11.2005.

Málið er sent til Vanlukkutryggingarráðið tann 20.6.2005, avgerð er ikki komin.

**Mál nr. 7**

Tygum viðmerkja, at tað ganga næstan 10 mánaðir frá tí, at Almannastovan hevur fingið umsókn og læknaváttan til málið verður avgreitt til Vanlukkutryggingarráðið. Talan er um umsókn um hjálparviðbót.

Søkt er 13.8.2004 og málið er sent til Vanlukkutryggingarráðið 20.6. 2005. Avgerð er komin haðani 20.9.2005.

Almannastovan er samd í, at málið hevur tikið ov drúgva tíð.

**Mál nr. 8**

Tygum viðmerkja, at sambært lýsing til EP-fund skal viðkomandi hava søkt um røktarviðbót í nov. 2004, men ongin umsókn er at finna. Tygum spyrja, hvat var galið við hesi umsókn og hvat síðani er hent og hví nýggj umsóknin ikki kemur inn fyrr enn uml. 1/2 ár seinni.

Eftir at hava kanna nærri, vísir tað seg, at maður umsøkjarans hevur søkt um røktarviðbót (umsóknin er innkomin 24.11.2004 og skrásett í hansara fólkapensiónsmáli). Upprunaliga søkti viðkomandi samsýning fyri at ansa konu síni. Men av tí at konan var undir 67 ár, hevði hann ikki rætt til at fáa ansingarsamsýning. Ráðini hava so verið, at søkjast skuldi um røktarviðbót í staðin. Av uppriti dagf. 6.5.05 og ikki undirskrivað, framgongur soljóðandi: „NN hevur søkt um hjálpar/røktarviðbót í des. 2004. Eg havi dd. tosa við NN og vísir tað seg at tað er kona hansara sum skal søkja, tí hon er sera sjúk".

Almannastovan fer at taka hetta málið uppaftur og við tilvísing til misskiljing í málinum og umsóknina 24.11.2004 ráða Vanlukkutryggingarráðnum til at tilluta røktarviðbót frá 1.12.2004 at rokna.

**Mál nr. 9**

Søkt er 28.4.05 og er málið sent víðari til Vanlukkutryggingarráðið 20.6. 05. Svar er komið haðani 20.9.2005.

Tygum spyrja hví upplýsingar um ogn og skuld eru innheintaðir í hesum málið. Sí svar uppá sama spurning í øðrum máli.

**Mál nr. 10**

Tygum hava onga viðmerking til viðgerðartíðina og til at viðkomandi verður innkallaður til samrøðu, tí talan er ikki um eitt vanligt mál (brotpensión).

Tygum viðmerkja tó, at serlæknaváttan átti at verið innheintað beinanvegin, eftir at hava móttikið ta fyrstu læknaváttanina.

Víst verður til svar omanfyri viðvíkjandi møguligari broyting í mannagongdini viðv. innheintan av serlæknaváttanum.

**Mál nr. 11**

Tygum biðja Almannastovuna greiða frá, hví als onki hendir í málinum frá tí umsóknin kemur inn 8.10.2004 til 2.3.2005, tá umsøkjarin verður innkallaður til samrøðu. Grundað á metingina frá kommunulæknanum duga tygum ikki at síggja, hví umsøkjarin verður innkallaður til samrøðu.

Málið er sent til Vanlukkutryggingarráðið tann 20.6.05 og avgerð er komin 19.8.2005.

Tað er ikki nøktandi, at onki hendir í hesum málið í 5 mánaðir og kann einans forklárast við teim trupulleikum, sum deildin hevði um hetta mundi.

Almannastovan er samd við tygum í, at ongin orsøk var til at innkallað henda umsøkjara til samrøðu og fara vit sum sagt framyvir at gera gjøllari meting í tí einstaka førinum, um viðkomandi eigur at verða innkallaður til samrøðu.

**Mál nr. 12**

Tygum meta at viðgerðartíðin í hesum máli er átaluverd. Grundað á kommunu-læknaváttanina átti Almannastovan, um hon var í iva, beinanvegin at biðja um eina serlæknaváttan. Tað er átaluvert, at Almannastovn ikki biður um hesa váttan fyrr enn 5 mánaðir aftaná móttøkuna av umsóknini. Somuleiðis er tað átaluvert, at tað ganga 7 mðr., uttan at Almannastovan eina einastu ferð rykkir serlæknan eftir váttanini. Hetta átti longu at verði gjørt aftaná 1 ella 2 mðr. og síðani við jøvnum millumbilum.

Umsókn um hækkan av fyritíðarpensión er komin 21. mai 2004. Málið er sent til FUR 20.6.2005 og avgerð er komin 4.11.2005.

Almannastovan er samd í at málið í síni heild hevur tikið ov drúgva tíð. Vit kunnu einans vísa á tvørleikarnar á deildini seinna partin av heystinum 2004 og fyrra part av várinum 2005.

Almannastovan metir ikki, at ov long tíð gongur frá at kommunulæknaváttan kemur inn (10.6.04) til málið kemur fyri á EP-fundi fyrstu ferð (20.9.2004), tá havt verður í huga at summarfrítíðin hevur verið ímillum.

At 5 vikur ganga frá tí, at avgerð er tikin, til serlæknaváttan verður innheintað (frá 20.9 til 25.10.04) er ikki nøktandi. Júst um hetta mundi var málsviðgerin uppsagdur og uppgávur hansara umskipaðar.

**Mál nr. 13**

Tygum viðmerkja, at stívliga 6 mánaðir ganga frá tí, at umsókn og læknaváttan fyriliggja, til málið verður avgreitt. Hetta kann tykjast í so leingi, men hinvegin hevur verið talan um revalideringsatlit og tí hevur verið grund til at gera eitt sindur meira burtur úr hesum máli. Tygum duga ikki at síggja, hvat er hent í málinum frá 15. des. 2004 til 11. mai 2005. Tygum halda, at notat átti at verið gjørt í sambandi við, at avtalað var við umsøkjaran, at hesin skuldi fara undir arbeiðsuppvenjing. Tað sær út til, at avgerðin er grundað á úttalilsi frá arbeiðsgevaranum um, hvat umsøkjarin skal hava sagt um síni evni. Tygum meta at umsøkjarin helst átti at verið partshoyrdur um hetta, men duga ikki at síggja, at hetta er gjørt. Tygum duga ikki at síggja, hví so nógv er gjørt burturúr ognarviðurskiftunum hjá hjúnarfelaganum.

Almannastovan er samd við tygum um, at málið kundi verið avgreitt skjótari – víst verður til serligu støðuna á deildini um hetta mundi. Í tíðarskeiðinum des. 2004 til mai 2005 var umsøkjarin í arbeiðsuppvenjing, har Almannastovan rindaði lønina. Upplýsingar viðv. arbeiðsuppvenjingini annars eru at finna í forsorgarmálinum. Sambært upprit dagf. 24.11.2004 metir umsøkjarin sjálv, at hon ikki er før fyri at arbeiða meir enn 3 tímar um dagin. Tá tað soleiðis er samsvar millum hennara egnu og arbeiðsgevarans meting, verður ikki mett, at orsøk hevur verið at partshoyra. (upprit hjálagt sum fylgiskjal 2).

Avgerð um at mæla til lægstu fyritíðarpensión er grundað á eina samlaða meting av vinnuevnunum sæð í relatión til heilsustøðuna.

Søkt er um fyritíðarpensión 13.12.2004, málið er sent til Vanlukkutryggingarráðið 20.6.2005 og avgerð er komin haðani 20.9.2005.

Viðv. ognar- og inntøkuupplýsingunum hjá umsøkjara og hjúnarfelaga – sí frágreiðing omanfyri um broyting í hesi siðvenju.

Inntøkuupplýsingar hjá umsøkjara hava týdning, eisini tá søkt verður um fyritíðarpensión av heilsuligum ávum vísandi til § 9 í lógini og at pensjónsupphæddin er treytað av inntøkuni.

**Mál nr. 14**

Tygum meta, at viðgerðartíðin í hesum máli hevur verið ov drúgv. Grundað á læknaváttanin, átti beinanvegin at verið biðið um serlæknaváttan uttan at bíða eftir samrøðu við umsøkjaran. Tygum duga ikki at síggja nakað endamál við at innkalla umsøkjaran til samrøðu. Tað tók í so langa tíð at fáa serlæknaváttanina (4 mðr.), tað sær ikki út til, at nakar rykkjari er sendur og tí átti Almannastovan at hava rykt serlæknan. Umboðsmaðurin hevur onki at siga til viðgerðartíðina frá tí, at serlæknaváttan er fingin, til málið er avgreitt.

Umsókn er komin 22.10.2004, serlæknaváttan umbiðin 19.1.2005 og komin 18.5.2005, málið er sent til Vanlukkutryggingarráðið 20.6.05, avgerð móttikin 4.11.2005.

Viðvíkjandi innkallan til samrøðu, innheintan av serlæknaváttan – sí frágreiðing um broyting frammanfyri.

Sæð í mun til at serlæknaváttan ikki er innkomin fyrr enn 18.05.2005, metir Almannastovan at viðgerðartíðin hevur verið nøktandi.

**Mál nr. 15**

Tygum meta, at viðgerðin av hesum málið hevur tikið ov langa tíð. Almannastovan átti ikki at bíða við út við 2 mánaðir, áðrenn biðið varð um læknaváttan. Eisini átti Almannastovan at rykt læknan eftir váttanini. Tað átti heldur ikki at tikið 2 mðr. at avgreiða hetta málið, aftaná at læknaváttan var fingin til vega.

Almannastovan er samd við tygum um, at tað ikki eigur at bíðast í 2 mánaðir, áðrenn biðið verður um læknaváttan.

**Mál nr. 16**

Tygum meta, at viðgerðin av hesum máli hevur tikið alt ov langa tíð. Tað skal tó sigast, at spurningurin um endurbúgving hevur verið inni í myndini. Tað sær kortini ikki út til at nakað er hent í málinum millum 10. feb. og 3. juni 2005. Hetta er als ikki nøktandi.

Umsókn er móttikin 1.2.2005. Málið er sent til Vanlukkutryggingarráðið 20.6.2005. Avgerð er komin haðani 19.9.2005.

Almannastovan er samd í, at málið kundi verið avgreitt skjótari. Tó er ein partur av frágreiðingini, at umsøkjarin fekk fult útgjald frá ALS og tí hevur málið ikki hevur verið raðfest ovarliga. Tá pensjón er tillutað, dettur ALS-útgjaldið burtur.

**Mál nr. 17**

Tygum meta, at ein viðgerðartíð uppá uml. 9 mðr. er ov long, hetta hóast endurbúgvingaratlit eru inni í myndini og biðið verður um serlækna-

váttan. Almannastovan átti at borið skjótari at við at biðja um bæði læknaváttan og serlæknaváttan.

Umsókn er innkomin 24.9.2004. Læknaváttan er komin 30.11.2004. 14.3.05 er serlæknaváttan umbiðin sbr. avgerð á EP fundi 1.3.05. Serlæknaváttan er móttikin 2.6.2005 og er málið sent til Vanlukkutryggingarráðið tann 20.6.2005. Avgerð er komin frá Vanlukkutryggingarráðnum tann 4.11.2005.

Almannastovan biður um læknaváttan 19.10.2004, umleið 3 vikur eftir at umsóknin er komin inn. Hetta verður ikki mett at vera heilt út av lagi havandi í huga støðuna á deildini um hetta mundi. Umleið 6 vikur ganga, áðrenn kommunulæknaváttan kemur.

**Ad. 3 Sjúkradagpeningur**

Viðvíkjandi málsviðgerðini í dagpeningamálum skal verða sagt frá, at Almannastovan tekur til eftirtektar tygara viðmerkingar um nýtslu av standardskrivum og fer at gera neyðugar fyribils broytingar hesum viðvíkjandi.

Ikki minst umsitingin á dagpeningaøkinum, herundir útrokningar, útrokningargrundarlag og møguleikin at nýta differentieraði standardskriv o.a., kann gerast tryggari, rættari, skjótari og betri við eini tíðarhóskandi edv-skipan.

Skjøl, sum vantaðu í fyrstu atløgu og sum víst verður til undir viðmerkingum til einstøku málini verða løgd við sum fylgiskjal 3.

**Tey 20 málini**

**Mál nr. 1**

Tygum viðmerkja, at eingin kæruvegleiðing var givin í hesum máli, og hetta er ikki nøktandi.

Hetta má vera eitt mistak, tí sambært fyriliggjandi skjøl í málinum, so er kæruvegleiðing givin í hesum málinum. Viðlagt er avrit av skrivinum, sent til viðskiftafólkið.

**Mál nr. 2**

Tygum viðmerkja, at júst í hesum málinum er eitt gott dømi um, hvussu standardskriv ikki eiga at vera nýtt, tí hetta samsvarar als ikki við støðuna hjá umsøkjaranum.

Almannastovan er samd í niðurstøðu tygara, men skal gera vart við, at á dagpeningaøkinum er „massaframleiðsla" orsakað av teim nógvu málunum og verandi útgjaldsskipan er tíanverri ikki før fyri at skilja ímillum tvey ymisk sløg av standardskrivum. Henda trupulleika fer nýggja skipanin, sum er í umbúna, at loysa.

**Mál nr. 3**

Tygum viðmerkja, at bert tann eina læknaváttanin er til taks í málinum.

Hetta er ein feilur frá okkara síðu. Allar læknaváttaninar eru í málinum hjá Almannastovuni, men hava vit av misávum bert sent tygum ta einu.

Viðlagdar eru allar læknaváttaninar í málinum.

**Mál nr. 5**

Tygum spyrja, hví rokning eftir øllum at døma ikki varð send arbeiðsgevaranum í hesum førinum.

Almannastovan hevur kannað málið og skal boðað frá, at rokningin til arbeiðsgevaran bleiv send til Toll- og Skatt ultimo august 2005.

**Mál nr. 7**

Tygum siga, at skriv við fyrispurningi frá Almannastovuni til Arbeiðsloysisskipanina liggur ikki í málinum. Einki notat liggur heldur í málinum um, at fyrispurningurin er settur telefoniskt.

Vit skulu upplýsa, at mannagongdin millum Almannastovuna og ALS í dagpeningamálum er tann, at allir fyrispurningar til ALS viðv. inntøku verða avgreiddir við telduposti. Ein teldupostur verður sendur til ALS, har Almannastovan biður um eina 5 vikur-váttan um inntøku hjá aktuella løntakaranum. Fyrispurningurin verður síðani svaraður aftur av ALS við einum formligum skrivi. Hetta er skrivið, ið fyriliggur í málinum.

Eftirfylgjandi er umsitingin stramma upp, soleiðis at teldupostarnir verða journaliseraðir og lagdir í pappírsformi í málsmappuna.

**Mál nr. 9**

Tygum viðmerkja, at „… Hetta er ikki í tráð við § 23, stk. 2 í dagpeningalógini…“

Hetta er ein umsitingarligur feilur á Almannastovuni. Málsviðgerin átti at havt sent læknaváttanina aftur til læknan, so røttu upplýsingarnar vóru tøkar.

**Mál nr. 10**

Tygum viðmerkja, at umsøkjarin í hesum máli hevði ikki rætt til veiting frá vanlukkutryggingini, og at umsøkjarin tí átti at havt fingið dagpening upp til 40 vikur sambært dagpeningalógini. Tygum mæla tí til, at málið verður tikið uppaftur til viðgerðar.

Vit skulu siga frá, at tann 4. august 2005 hevur Almannastovan tikið málið upp til nýggja viðgerð og avgjørt at veita … dagpening við møguleika fyri veiting upp til 40 vikur.

Viðlagt er avrit av teimum skjølum, sum vísa, hvat síðani er hent í málinum.

**Mál nr. 15**

Tygum viðmerkja, at avgerð um at játta dagpening verður tikin 3. mai og rokning til arbeiðsgevaran verður útskrivað sama dag, men fráboðanin til umsøkjaran fyri hetta fyrsta tíðarskeiðið verður ikki send fyrr enn 3. august.

Viðmerkjast skal, at henda niðurstøða tygara ikki er røtt. Tann 3. mai verður dagpeningurin játtaður og peningurin sendur við koyringini sama dag. Sama dag verður játtanarskriv sent til viðskiftafólkið. Skipanin útskrivar játtanarskriv hvørja ferð umsókn verður játtað og hvørja ferð ein leinging verður framd av dagpening sambært læknaváttan.

Viðlagt er avrit av játtanarskrivinum, sum er sent til viðskiftafólki tann 3. mai 2005.

**Mál nr. 16**

Tygum spyrja Almannastovuna, hvat síðani er hent í málinum.

Sagt skal verða frá, at læknin tann 4. august 2005 hevur sent læknaváttanina aftur til Almannastovuni við tíðarskeiðnum fyri sjúkrameldingina. Umsóknin bleiv avgreidd tann 12. august 2005.

Viðlagt er avrit av læknaváttanini, játtanarskrivinum og uppritinum í málinum.

**Mál nr. 17**

Tygum siga, at tygum havi lagt til merkis, at Almannastovan í hesum málinum, hóast fult dult dagpeningaútgjald, einans hevur kravt arbeiðsgevaran eftir 1.350,80 kr. fyri 1. og 2. sjúkrafráverudag.

Almannastovan hevur kannað málið er komin til tað niðurstøðu, at ein skeiv inntøpping er gjørd. Rokningin skuldi at havt verið kr. 1.445,20 og hevur Almannastovan rættað henda feil og verður eitt krav sent fyri írestandi partin við komandi koyring til arbeiðsgevarar. Víst verður annars til viðmerkingarnar í máli nr. 15 viðv. játtanarskrivunum.

Viðlagt er játtunarskrivið, sum Almannastovan sendi til viðskiftafólkið tann 16. mars 2005.

**Mál nr. 18**

Tygum spyrja, hví øll skjølini ikki liggja í málinum, og biðja samstundis um at fáa øll skjølini í málinum.

Tað er ein feilur, at tygum ikki hava fingið skjølini. Øll skjølini eru til taks í málinum hjá Almannastovuni.

Viðløgd eru øll skjølini í málinum.

**Mál nr. 20**
Tygum biðja Almannastovuna um at upplýsa mær, hvussu samlaða gongdin í málinum hevur verið.
Samlaða gongdin í hesum málið er í stuttum henda:

Umsókn og læknaváttan koma inn á Almannastovuna tann 9. juni 2005.

Tann 18. juni 2005 er umsóknin avgreidd av málsviðgera og játtunarskriv er sent til viðskiftafólki tann 22. juni 2005.

Tann 5. juli innkemur ein nýggj læknaváttan til Almannastovuna, sum leingir sjúkraskeiði fram til 31. juli 2005. Henda læknaváttan verður send aftur til læknan fyri at fáa eina diagnosu uppá sjúkuna. Læknaváttanin kemur aftur til Almannastovuna tann 12. juli 2005 og dagpeningurin verður longdur av málsviðgeranum tann 19. juli 2005.

Tann 22. juli 2005 kemur nýggj læknaváttan inn til Almannastovuna, sum leingir sjúkaskeiði til 31. august 2005 og verður leingingin avgreidd av málsviðgera tann 3. august 2005.

Tann 22. august kontaktar viðskiftafólkið Almannastovuna og boðar frá at hann er farin til sjós aftur og er dagpeningurin steðgaður tann 20. august 2005.

Viðløgd eru øll skjølini í málinum (fylgiskjøl 3)

**Ad. 4 Hjálpartól**

**Alment um niðurstøðu av kanningini**

Tikið verður til eftirtektar at bøtt eigur at vera umsóknarblaðið.

Málsetningur HTMs er, at í øllum málum uttan teimum, sum verða skrásett sum SNAR og BRÁ, verður móttøkuskriv sent umsøkjaranum. Hetta er ikki farið fram. Vit taka viðmerkingar tygara vit til eftirtektar og arbeiða við at fáa móttøkuskrivini í rættlag.

Tikið verður til eftirtektar og arbeitt verður við at øll játtanar- og sýtanarskriv verða send viðskiftafólkunum sum skjótast eftir at avgerðir eru tiknar.

Neyðug skjøl, váttanir og notatir viðvíkjandi heilsustøðu umsøkjarans skulu verða í málinum. Neyðugt er at notatir verða skrivað, so málsgongdin gert gjøgnumskygd.

Vísandi til at stovnurin ikki hevur nøktandi tal av starvsfólkum og óbeinleiðis verður skorin við tað at lønarvøkstur ikki verður endurgoldin, má roknast við, hóast roynt verður at rationalisera og effektivisera, at tá ið málsviðgerðin verður raðfest, verða ávís mál at liggja og bíða eftir málsviðgerð og avgreiðslu.

**10 mál um Gangistativ v.m.**

**Mál nr. 1**

Almannastovan fer at fylgja tilmælinum frá tygum og broyta umsóknarbløðini soleiðis at starvsfólk í heilsuverkinum og heimarøktini vátta upplýsingarnar, tey geva í sambandi við umsóknir um hjálpartól.

**Mál nr. 4**

HTM tekur til eftirtektar, at eingin uttanhýsis váttan er um heilsustøðu umsøkjarans. Heldur ikki er gjørt notat í málið, um møguliga kontakt frá starvsfólki HTMs.

**Mál nr. 5**

Vanliga fáa vit postin frá Almannastovuni, beinanvegin Almannastovan hevur móttikið postin. Ofta verður hann eisini faksaður til HTM og síðan verða frumritini eftirsend. Vit taka hetta upp við journaldeildina á Almannastovuni, so hetta ikki hendir í framtíðini.

HTM stemplar allan post sama dag sum hann verður móttikin.

**10 mál um koyristólar**

**Mál nr. 2**

Kvinnan sum hetta málið snýr seg um, er vælkent viðskiftafólk á HTM og eisini vælkend av málsviðgeranum. Hóast tað ikki beinleiðis framgongur av málsviðgerðini, so hevur málsviðgeri HTMs verið í sambandi við viðkomandi og tikið mál til koyristólin. Í tí sambandinum hevur málsviðgerin eisini gjørt sínar metingar av tørvinum. Notat er ikki gjørt um hetta – men metast má út frá niðurstøðu málsviðgerans, at tørvurin er greiður.

**Mál nr. 6**

Henda umsóknin er komin frá heimarøktini. Umsóknir, sum koma frá heimarøktini, verða viðgjørdar sum SNAR ella BRÁ, tí gingið verður út frá, at tað er ein heimasjúkrarøktarfrøðingur sum hjálpir umsøkjaranum við umsóknini.

Viðmerkjast skal, at umsøkjarin er deyður minni enn ein mána eftir at HTM hevur móttikið umsóknina.

Víst verður eisini til viðmerking tygara um at broyta umsóknarblaðið, so heimarøktin váttar upplýsingarnar – í hesum føri verður brúkt annað umsóknarblað enn HTMs.

**Mál nr. 10**

Talan er í hesum føri um ein terminalan sjúkling, har vit í øðrum málið hava neyðugu upplýsingarnar um viðkomandi frá ergoterapiini á Landssjúkrahúsininum. Málsviðgerin er tí kunnugur við viðurskiftini. Fyrisit-

ingarliga átti notat at verið gjørt um hetta ella upplýsingarnar veri kopieraðar í málið.

**Niðurstøða**

Eftir okkara tykki eru fyrtreytirnar fyri játtanunum í teim 10 málunum frammanfyri í lagi. Fyrisingarliga eru manglar í mun til skjalprógvan og notatskyldu í einstøku málunum – og tað taka vit til eftirtektar.

**5 mál um stuðul til avlamisbil**

**Mál nr. 1**

Vit taka til eftirtektar at móttøkuváttan manglar í hesum máli.

**Mál nr. 3**

Vit taka til eftirtektar at ov long tíð gongur frá tí eitt mál verður játtað og til játtanarskriv verður sent. Miðað verður eftir at játtanir verða sendar sum skjótast eftir at avgerðin er tikin.

**Mál nr. 4**

Tikið verður til eftirtektar at móttøku váttan manglar.

Miðað verður eftir at sýtanir verða sendar sum skjótast eftir at avgerðin er tikin

**Mál 5.**

Tikið verður til eftirtektar at móttøku váttan manglar.

**Niðurstøða**

Tikið verður til eftirtektar at móttøku skriv ikki eru send í øllum málum. Tikið verður til eftirtektar og arbeitt verður við at øll játtanar og sýtanarskriv verða send viðskiftafólkunum sum skjótast eftir at avgerðir eru tiknar.

**5 mál um umbyggingar**

**Mál nr. 3**

Orsøkin til at fleiri skriv sum eru dagfest 12.11.2004 er móttøkustempla 10.02.2005 er eitt mistak. Skjølini eru kopierað úr máli nr. 20041778 og flutt í mál nr. 2005-22/0216. Hetta fór fram 10.02.2005 av praktiskum orsøkum. HTM skifti 01.01.2005 journalskipan og hevur valt at arbeiða víðari við nøkrum málum í gomlu skipanini og flyta onnur og longri varandi mál yvir í nýggju skipanina.

Tikið verður til eftirtektar at móttøkuváttan ikki er send.

Talan eru um eina íbúðarbroyting, sum inniber, at nógvir partar eru uppi í málinum. Tað skulu gerast metingar um, hvussu arbeiði skal fremjast á besta og bíligasta hátt. Avgerð um hetta skal fyriliggja. Handverkarar skulu bíleggjast at gera arbeiði, eins og elevator skal bíleggjast. Eftir okk-

ara tykki er ein málsviðgerðar- og avgreiðslutíð uppá 3 mánaðir í einum slíkum máli ikki long. Hinvegin meta vit at hon er stutt.

Niðanfyri er málsgongdin í DocuLiv málinum. (gomlu journalskipanini)

20041778, El- koyristólur – høkjur

07042005 (21): I JH Service Fakt. nr. 358 uppsett lyft

13042005 (20): I Inniv Rokning frá Gudmund Larsen el- installatørur.

16032005 (19): N_Timburtillagan til wessex, rokn. vátta./WJ

02022005 (18): X_Málið opna aftur

02032005 (17): N_Montørløn til Rokn. ávíst./wj

17022005 (16): X_Málið endar

17022005 (15): N_Rokn. uppá trimmara vátta./WJ

14022005 (14): N_Avgreitt

10022005 (13): U Inniv játtanarskriv

09022005 (12): U Inniv heimavitjanarskriv

09022005 (11): U Inniv notat

09022005 (10): U Inniv lániseðil

09022005 (9): U Inniv játtanarskriv

09022005 (8): N_LS. Wessex./WJ

09022005 (7): N_Trimmari til vessex sendur suður Hans Ole Mont. , og Wessex verður sendur í vikuni. og mont. í viku 7. /WJ

03022005 (6): N_Wessex er komin og rokning avg./WJ

14122004 (5): U Inniv heimavitjanarskriv

14122004 (4): U Inniv lániseðil

14122004 (3): U Inniv játtanarskriv

07122004 (2): U Inniv notat: 01.12.04 var málið á grein 18 og fyribilsjáttað. Fari á hv./ed

12112004 (1): I Inniv Søkt verður um el- koyristól. Innstalering av lyft (elevator) millum hæddirnar. (ED)

Omanfyri standandi vísir, at málið er játtað 01.12.04 og 14.12.04 er játtanarskriv, dagfest 10.12.04, sent. Tað framgongur ikki av málinum, men fram til 09.02.05 er elevatoror bílagdur og ymisk fyrireikingararbeiði gjørd.

Fleiri skrásetingar eru gjørdar í máli 20041778, sum átti at verði gjørdar í 2005-22/0216. Hetta skyldast yvirgangstrupulleikar frá gamlari til nýggja journalskipan. Hetta varnaðust vit ikki tá málið varð sent tygum.

Tikið verður eisini til eftirtektar, at ein neyvari notatførsla hevði givið eina munandi greiðari lýsing av málsgongdini.

**Niðurstøða**
Burtursæð frá viðmerkingunum til máli nr. 3 taka vit til eftirtektar, at móttøkuskriv ikki er sent og at notatskrivingin kundi verði betri."

Aftaná at eg hevði fingið hesar viðmerkingarnar, havi eg havt ein fund við Almannastovuna um kanning mína. Johnhard Klettheyggj, ráðgevi hevur gjørt hesa frágeiðing frá fundinum:

„Í kjalarvørrinum av fyribilsálitinum hjá umboðsmanninum, sum varð sent Almannastovuni til viðmerkingar, og svarskrivi Almannastovunnar, varð fundur avtalaður. Fundurin varð hildin á skrivstovuni hjá umboðsmanninum 5. des. 2005, kl. 10.30. Á fundinum luttóku:

| | |
|---|---|
| – vegna umboðsmannin: | Joen H. Andreassen, umboðsmaður |
| | Johnhard Klettheyggj, ráðgevi |
| – vegna Almannastovuna: | A, stjóri |
| | C, deildarstjóri |
| | B, deildarleiðari |
| | D |

JHA beyð vælkomin og boðaði frá, at talan var um ein meira ella minni óformellan fund, har hann ætlaði at umrøða kanningina og svarið frá Almannastovuni.

<u>Fyritíðarpensjón</u>

JHA byrjaði við at siga, at hann var samdur við Almannastovuni í teirra sjónarmiðum um §§ 5 og 9, at talan var um eitt blandað sosialt / medisinskt hugtak viðvíkjandi fyritíðarpensjónum, men at hann helt fast við, at tann medisinski parturin vigaði tungt. Hann vísti á, at innkalling til samrøðu var natúrlig, um revalideringsatlit vóru í málinum, men at hetta annars var óneyðugt. Hann segði, at samlaða myndin var, at málini taka ov langa tíð, og at hetta fyri honum at síggja lutvíst skyldaðist mannagongdunum hjá Almannastovuni.

A vísti á, at hetta er eitt økið, sum tekur eina ávísa tíð, og vísti til, at soleiðis er eisini í Danmark. Hon vísti á, at tað fyri borgaran var best at kanna allar aðrar møguleikar út í æsir, heldur enn at játta lægstu fyritíðarpensjón, tí at hendan er so lág.

JHA vísti á, at í teimum konkretu málunum vóru revalideringsatlitini ikki serliga aktuel. Hann helt „ósemjuna" millum seg og Almannastovuna liggja í, at Almannastovan eftir hansara fatan skal gera eina tilráðing til FUR, men annars ikki gera ov nógv burturúr málsviðgerðini. Hann vísti

á, at Almannastovan eigur at biðja um (ser-)læknaváttan skjótari enn gjørt verður, og at leggja málini fyri læknaráðgevan skjótast gjørligt.

A vísti á, at Almannastovan sær møti við umsøkjaran at vera viðkomandi, tí at hetta ofta gevur eina aðra fatan – serliga við atliti at ráðgevingar- og vegleiðingarskylduni hjá Almannastovuni.

JHA vísti á, at málini eiga at kunna viðgerast á skrivligum grundarlagi, men um tað er neyðugt at innkalla umsøkjaran, eigur hetta at vera gjørt skjótast gjørligt.

Tosað varð síðani um tey einstøku pensjónsmálini.

- JHA vísti á, at hann helt fast um, at viðgerðartíðin í máli nr. 3 var ov long.
- Almannastovan vísti á, at mál nr. 5 var ein svipsari.
- MB vísti á, at mál nr. 16 varð niðurraðfest grundað á støðuna á deildini um tað mundi og støðuna hjá umsøkjaranum, sum hevði annað inntøkugrundarlag.
- Almannastovan vísti á, at tey høvdu gjørt viðmerkingar til málini 18-20, men at hesar onkursvegna vóru dotnar burtur. Semja var um, at Almannastovan skuldi senda umboðsmanninum hesar viðmerkingar.

Sjúkradagpeningur

JHA vísti á, at viðgerðin av dagpeningamálunum var skjót og smidlig, men at tað ikki sá út til, at avgerðarskrivini vórðu journaliseraði. JK vísti á, hvat Landsgrannskoðarin hevði skrivað um journaliseringina í frágreiðing sínari frá mars 2005.

A vísti á, at journalskipanin var gomul, og ikki koyrdi saman við restini av journalini, men at Almannastovan hevði søkt um játtan til hetta.

JHA greiddi frá, at í máli nr. 1 varð hendur ein feilur frá hansara síðu, og at hesin verður rættaður.

Viðvíkjandi máli nr. 5 greiddi D frá, at rokningar til arbeiðsgevaran fyri 1. og 2. sjúkradag verða skrásettar uttanfyri skipanina.

Viðvíkjandi máli nr. 7 segði D, at teldubræv varð sent til ALS, men at hetta ikki varð skrásett í málinum. Hetta er síðani komið í rættlag, og skrivini verða nú skrásett.

JHA greiddi frá, at viðmerkingarnar til málini nr. 15 og 17 verða broyttar grundað á viðmerkingarnar frá Almannastovuni.

Hjálpartólamiðstøðin

JHA vísti á, at hann sum heild var væl nøgdur við viðgerðina hjá HTM, og at honum dámdi væl tað mannagongd, sum HTM nýtti við ikki at bíða eftir læknaváttanum, men at onnur heilsustarvsfólk váttaðu tørvin.

Samanumtikið
JHA vísti á, at burtursæð frá pensjónsøkinum, var bert talan um smávegis trupulleikar."

## *6. Niðurstøða*

*Henda frágreiðing er ein endurtøka av fyribilsfrágreiðing mínari, men nakrar smærri rættingar/broytingar eru gjørdar við grundarlagi í viðmerkingunum frá Almannastovuni, sum eru endurgivnar frammanfyri. Eg havi annars skilt viðmerkingarnar frá Almannastovuni soleiðis, at Almannastovan í stóran mun er samd og hevur tikið viðmerkingar mínar til eftirtektar. Tó eru onkur øki, har Almannastovan ikki er samd við mær, og skal eg tí gera nakrar viðmerkingar til hetta.*

*Fyritíðarpensjónir*

*Almannastovan sigur viðvíkjandi fyritíðarpensjónunum, at hon ikki er samd í teirri altavgerandi vektini, sum eg sýnist at hava tillagt lækna-ligu upplýsingunum. Eg eri fullgreiður yvir ásetingarnar í §§ 5 og 9 í almannapensjónslógini, men tað skerst ikki burtur, eins og eg havi víst á á bls. 29, at lækna-ligu upplýsingarnar eru ein sera týðandi og oftast avgerandi táttur í grundarlagnum undir avgerðini at játta ella nokta fyritíðarpensjón. Eg haldi tí ikki grundarlag vera fyri at broyta støðu mína hesum viðvíkjandi.*

*Almannastovan sigur víðari, at hon ikki er samd við mær, hvør leikluturin hjá henni er, og vísir í hesum sambandi á, at ein „tilráðing" um avgerð forútsetir, at øll viðurskifti av týdningi fyri málið (§§ 5 og 9) eru lýst og meting og niðurstøða gjørd, sum verður ein hornasteinur í avgerðargrundarlagnum hjá Vanlukkutryggingarráðnum. Eg eri samdur í, at Almannastovan skal kanna møguleikarnar fyri endurbúgving v.m., áðrenn málið sambært § 30, stk. 5 verður sent Vanlukkutryggingarráðnum, men hetta eigur ikki at seinka málinum í nógvar mánaðir. Í hesum sambandi er vert at nevna, at í teimum allarflestu málunum, sum eg havi kannað, hevur endurbúgving ikki verið aktuel, og tað er heldur ikki gjørt nógv við tann spurningin. Tí haldi eg fast við, at Almannastovan í flestu førum átti at havt sent málini til Vanlukkutryggingarráðið, skjótari enn gjørt er.*

*Viðv. máli nr. 3 metir Almannastovan, at ein viðgerðartíð uppá 3 mðr. er nøktandi. Hesum eri eg framvegis ikki samdur í, og skal vísa til viðmerkingar mínar um hetta mál.*

*Viðv. máli nr. 5 sigur Almannastovan, at okkurt kundi bent á, at umsøkjarin er kunnaður munnliga um, at heimild ikki var at ganga umsóknini á møti. Uttan mun til um hetta er so, átti málið kortini sum áður nevnt skjótast gjørligt at verið sent til Vanlukkutryggingarráðið við einum tilmæli um at sýta umsóknini vegna vantandi heimild.*

*Viðv. máli nr. 8 taki eg frágreiðingina frá Almannastovuni til eftirtektar um, at hetta er eitt mistak, og at hon fer at taka málið uppaftur og mæla til, at røktarviðbót verður veitt frá 1. des. 2004 at rokna.*

*Viðv. máli nr. 12 metir Almannastovan ikki, at ov long tíð gongur, frá tí at kommunulæknaváttanin kemur, til málið verður lagt fyri EP-fund, og vísir til, at summarfrítíð hevur verið. Hóast summarfrítíðina, so haldi eg, at 3 mðr. og 10 dagar er í so long tíð.*

*Viðvíkjandi máli nr. 13 vísir Almannastovan á, at upplýsingarnar um arbeiðsførleikan í 3 tímar um dagin eisini stava frá umsøkjaranum og eru tiknir úr forsorgarmáli hennara. Eg eri samdur í, at partshoyring tí helst ikki er neyðug, men hesir upplýsingar frá umsøkjaranum áttu samstundis onkursvegna at framgingið av pensjónsmálinum.*

*<u>Sjúkradagpeningur</u>*
*Viðv. máli nr. 1 hevur Almannastovan víst mær á eitt mistak í fyribils frágreiðing mínari, har kæruvegleiðing varð givin umsøkjaranum. Eg eri samdur í hesum og havi broytt viðmerkingar mínar samsvarandi.*

*Viðv. máli nr. 5 hevur Almannastovan greitt frá, at rokningin til arbeiðsgevaran fyri 1. og 2. sjúkradag er send ultimo august, og taki eg hetta til eftirtektar.*

*Viðv. máli nr. 7 hevur Almannastovan greitt frá, at fyrispurningar til ALS verða settir í telduposti, og at umsitingin er stammað upp, soleiðis at hesir nú verða journaliseraðir og lagdir í málið. Hesum kann eg bert taka undir við.*

*Viðv. máli nr. 15 hevur Almannastovan víst á, at játtanarskriv varð sent umsøkjaranum tann 3. mai 2005. Hetta er rætt, men skrivið lá ikki í málinum og framgekk ikki av journalyvirlitinum í málinum.*

*Viðv. máli nr. 16 greiðir Almannastovan frá, at kommunulæknin sendi læknaváttanina aftur til Almannastovuna 4. aug., og málið varð avgreitt 12. aug. Samlaða viðgerðartíðin var sostatt 3 1/2 viku, og havi eg ongar viðmerkingar til hetta.*

*Viðv. máli nr. 17 hevur Almannastovan víst á, at játtanarskriv varð*

*sent umsøkjaranum tann 16. mars 2005. Hetta er rætt, men skrivið lá ikki í málinum og framgekk heldur ikki av journalyvirlitinum í málinum.*

*Í sambandi við málini nr. 15 og 17 havi eg varnast, at avgerðarskrivini ikki verða journaliseraði. Í nøkrum málum er journalnummar skrivað við hond á skrivini, men hesi framganga ikki av journalyvirlitinum yvir málið. Hetta er ikki nøktandi. Sambært frágreiðingini frá Almannastovuni á fundi okkara 5. des. í ár er orsøkin, at journalskipanin á dagpeningaøkinum er gomul og ikki koyrir saman við restini av journalini, men at Almannastovan hevði søkt um pening til at fáa hetta í rættlag. Eg fari í hesum sambandi at mæla Almannastovuni til, at øll skjøl viðvíkjandi dagpeningamálunum verða skrásett á ein slíkan hátt, at hesi eru at finna á einum journalyvirliti.*

*Hjálpartól*

*Viðv. máli nr. 2 um koyristól hevur Almannastovan víst á, at talan var um eitt vælkent viðskiftafólk hjá Hjálpartólamiðstøðini, og at ein málsviðgeri hevur verið í samband við viðkomandi og tikið mál v.m. Eg havi ikki aðrar viðmerkingar til hetta, enn at eitt notat átti at verið gjørt um hetta málsviðgerðarstigið.*

*Viðv. máli nr. 10 um koyristól havi eg tikið frágreiðingina frá Almannastovuni til eftirtektar, men vil samstundis vísa á, at eitt notat átti at verið gjørt um hetta, soleiðis at tørvurin onkursvegna var skjalprógvaður í málinum.*

*Aftaná frágreiðingina frá Almannastovuni um mál nr. 3 viðvíkjandi umbyggingum, havi eg strikað viðmerkingar mínar um viðgerðartíðina.*

***Samandráttur***

*Eg haldi sum heild ikki, at viðgerðin av málunum um fyritíðarpensjón hevur verið nøktandi, serliga við atliti at viðgerðartíðini.*

*Eg havi hinvegin fingið ta fatan, at viðgerðin av sjúkradagpeningamálum gongur bæði smidliga og skjótt fyri seg. Tó eru ávísir trupulleikar við journaliseringini av avgerðarskrivum.*

*Eins og við dagpeningamálunum er heildarmyndin viðvíkjandi málunum um hjálpartól góð, og hóast onkrar smávegis trupulleikar, sum eg havi víst á, haldi eg viðgerðina av teimum málum, sum eg havi kannað, verða smidliga, skjóta og góða.*

# *VI. Skjøl*

## Skjal 1

**Løgtingslóg nr. 60 frá 10. mai 2000 um Løgtingsins umboðsmann**

**1. Partur**
**Umboðsmaðurin og Løgtingið**

**§ 1.** Løgtingið velur ein uttantingsmann fyri eitt 5 ára skeið at hava innlit við fyrisiting heimastýrisins.

*2. stk.* Doyr umboðsmaðurin í embætistíð síni ella er hann av øðrum orsøkum ikki førur fyri at røkja starv sítt, ger formansskapur Løgtingsins av, hvør skal røkja starvið, til Løgtingið velur ein nýggjan umboðsmann. Tað sama er galdandi, um umboðsmaðurin biður um at verða loystur úr starvi, ella um Løgtingið loysir hann úr starvi smb. stk. 3.

*3. stk.* Hevur Løgtingið ikki longur álit á umboðsmanninum, kunnu tveir triðingar av løgtingsmonnunum loysa hendan úr starvi.

**§ 2.** Umboðsmaðurin, ið ikki kann sita á Løgtingi ella í kommunustýri, skal so vítt gjørligt hava løgfrøðiliga útbúgving.

**§ 3.** Við løgtingslóg kunnu verða gjørdar almennar reglur fyri virksemi umboðsmansins. Annars er umboðsmaðurin í starvi sínum óheftur av Løgtinginum.

**2. Partur**
**Heimildir**

**§ 4.** Virksemið umboðsmansins fevnir um alla fyrisiting heimastýrisins (t.e. lands- og kommunalu).

*2. stk.* Lógin er eisini galdandi fyri feløg, stovnar, felagsskapir v.m., ið verða roknað við til almennu fyrisitingina sambært fyrisitingarlógini, lógini um alment innlit ella lógini um almennar skráir.

*3. stk.* Í meting sínari av kommunalari umsiting skal umboðsmaðurin vísa atlit til tær serligu umstøður, kommunufyrisiting virkar undir.

*4. stk.* Interkommunalir felagsskapir eru undirlagdir virksemi umboðsmansins.

*5. stk.* Virksemi umboðsmansins fevnir ikki um ríkismyndugleikar, Løgtingið og stovnar undir Løgtinginum.

**§ 5.** Umboðsmaðurin hevur eftirlit við, at tær í § 4 nevndu umsitingareindir ikki gera mistøk ella vanrøkja skyldur sínar, og at almenna umsitingin ikki fremur órætt móti einstaka borgaranum.

## 3. Partur
## Kærumál og egin mál

§ 6. Ein og hvør kann senda umboðsmanninum klagu um tær í § 4 nevndu umsitingareindir.

*2. stk.* Tann, ið klagar, skal navngeva seg í klaguni. Klagan skal vera umboðsmanninum í hendi í seinasta lagi eitt ár eftir, at tey viðurskifti, ið klagað verður um, áttu sær stað.

*3. stk.* Klaga um avgerðir, ið møguligur hægri umsitingarmyndugleiki kann broyta, kann ikki sendast umboðsmanninum, fyrr enn viðkomandi hægri myndugleiki hevur tikið avgerð í málinum. Freistin, ið er nevnd í 2. stk., skal í slíkum førum roknast frá tí degi, hægri myndugleikin tekur avgerð sína.

*4. stk.* Umboðsmaðurin tekur støðu til, um grundarlag er fyri víðari kanningum í máli, ið klagað verður um.

*5. stk.* Umboðsmaðurin kann sjálvur taka eitt mál til viðgerðar og fremja neyðugar kanningar í hesum sambandi.

## 4. Partur
## Kanningar

**§ 7.** Ger umboðsmaðurin av at taka eina kæru til viðgerðar, skal hann beinanvegin kunna viðkomandi umsiting um innihaldið í kæruni, um ikki vandi er fyri, at hetta kann darva kanningini. Harumframt skal umsitingin biðjast um ummæli í málinum, áðrenn umboðsmaðurin tekur avgerð um at gera vart við meting sína av málinum smb. § 10, stk. 2. Umboðsmaðurin kann áseta tíðarfreist til ummæli.

**§ 8.** Tær í § 4 nevndu umsitingar hava skyldu at geva umboðsmanninum tær upplýsingar og at leggja fram øll tey skjøl, sum hesin embætis vegna krevur at fáa fyrilagt.

*2. stk.* Umboðsmaðurin kann stevna fólki í rættin at vitna um viðurskifti, ið eru avgerandi í kanningararbeiðinum. Í slíkum førum eru reglurnar í rættargangslógini galdandi. Rættarfundirnir eru ikki almennir. Tann, ið klagan viðvíkur, hevur saman við hjáseta rætt at vera hjástaddur, meðan slík vitnisførsla fer fram.

*3. stk.* Umboðsmaðurin hevur rætt til at vitja støð, ið kannað verða, og hann hevur fría atgongd til at gera kanningar í øllum neyðugum hølum.

**§ 9.** Umboðsmaðurin hevur tagnarskyldu um tey viðurskifti, hann í virksemi sínum fær kunnleika til. Tagnarskyldan stendur við, eftir at umboðsmaðurin fer úr starvi, og fevnir eisini um starvsfólk á umboðsmansstovninum.

## 5. Partur
## Niðurstøður

**§ 10.** Kemur umboðsmaðurin til ta niðurstøðu, at álvarsligt mistak ella vansketni er framt av einum av teimum í § 4 nevndu umsitingum, skal umboðsmaðurin boða formansskapi Løgtingsins, løgmanni og viðkomandi landsstýrismanni og /ella kommunustýri frá hesum og koma við tilmæli til teirra.

*2. stk.* Umboðsmaðurin hevur rætt til alment at finnast at, koma við tilmælum,

og á annan hátt gera vart við meting sína av máli, hann hevur kannað.

*3. stk.* Umboðsmaðurin kann mæla viðkomandi myndugleikum til, at fríur rættargangur verður givin, smb. rættargangslógini §§ 330 –336c, í málum, sum hava verið viðgjørd eftir hesi lóg.

**§ 11.** Umboðsmaðurin letur Løgtinginum ársfrágreiðing um arbeiðið sítt. Frágreiðingin verður almannakunngjørd áðrenn 1. juli.

*2. stk.* Boðar umboðsmaðurin Løgtinginum, landstýrismanni ella kommunustýri frá einum máli, ella tekur hann eitt mál við í ársfrágreiðing sína, skal hann upplýsa um, hvat viðkomandi hevur ført fram til verju sína.

**§ 12.** Rakar umboðsmaðurin við lýti í galdandi lógum, fyriskipanum ella umsitingarligum avgerðum, skal umboðsmaðurin boða Løgtingi og viðkomandi landsstýrismanni frá hesum. Er talan um viðurskifti, ið viðvíkja kommunalari ella interkommunalari umsiting, skal umboðsmaðurin eisini boða viðkomandi kommunustýri frá.

**§ 13.** Um umboðsmaðurin krevur tað, kunnu dómstólarnir vísa frá sær privatmál móti umboðsmanninum vegna avgerðir, sum hann tekur við grundarlagið í hesi lóg.

**6. Partur**

**Lønar- og eftirlønarviðurskifti**

**§ 14.** Lønarviðurskifti umboðsmansins, herundir eisini spurningin um eftirløn og bíðipening, verða ásett við løgtingslóg.

*2. stk.* Umboðsmaðurin kann ikki, uttan við loyvi Løgtingsins, vera í starvi hjá almennum ella privatum fyritøkum, virkjum ella stovnum.

*3. stk.* Møguligur spurningur um ógegni umboðsmansins í ávísari søk verður lagdur fyri formansskap Løgtingsins, sum, um mett verður, at talan er um ógegnið, útnevnir annan at viðgera hetta ávísa mál.

**§ 15.** Umboðsmaðurin kann krevja at verða loystur úr starvi við seks mánaða freist at galda frá seinasta degi í einum mánaði.

**7. Partur**

**Fyrisiting**

**§ 16.** Umboðsmaðurin setir og loysir úr starvi starvsfólk síni.

**§ 17.** Tær útreiðslur, ið standast av umboðsmansstovninum, verða játtaðar á Løgtingsins fíggjarlóg.

*2. stk.* Umboðsmaðurin ger roknskap fyri virksemi stovnsins, hesin skal vera grannskoðaður av grannskoðara Løgtingsins.

**8. Partur**

**Ígildisreglur**

**§ 18.** Henda lóg kemur í gildi 1. januar ár 2001.

*2. stk.* Klagur um viðurskifti í tíðarskeiðinum 1. januar 2000 og til henda lóg kemur í gildi, kunnu kortini leggjast fyri umboðsmannin til viðgerðar.

## Skjal 2

### Vegleiðingin um Løgtingsins umboðsmann

**Hvønn og hvat kunnu tygum klaga um**
Umboðsmaðurin hevur eftirlit við allari fyrisitingini undir heimastýrinum, tvs. bæði lands-, kommunalu og interkommunalu myndugleikunum.

Umboðsmaðurin kann viðgera klagur um avgerðir hjá myndugleikunum, eins og viðferð teirra av borgarum og málum.

Tygum kunnu t.d. klaga um eina noktan av einari umsókn, um tann valda viðgerðarháttin, um ta tíðina, sum hetta hevur tikið og / ella framferðarháttin hjá embætisfólkunum.

Umboðsmaðurin hevur eftirlit við, at myndugleikarnir ikki gera mistøk ella vanrøkja skyldur sínar, og at almenna umsitingin ikki fremur órætt móti einstaka borgaranum.

Dómstólarnir, Løgtingið, feløg og privatir persónar eru ikki almennir fyrisitingarmyndugleikar. Tí kann umboðsmaðurin ikki viðgera klagur um hesi. Donsku myndugleikarnir, sum t.d. løgreglan hoyra ikki undir heimastýrið. Tí kann umboðsmaðurin heldur ikki viðgera klagur um hesar. Um tygum eru í iva um, hvørt tygum kunnu klaga til umboðsmannin um ein ávísan myndugleika, kunnu tygum altíð spyrja okkum.

**Hvussu kunnu tygum klaga**
Um tygum ynskja at klaga, skulu tygum skriva til umboðsmannin og greiða frá, hvønn og hvat tygum ynskja at klaga um. Um tygum hava latið onkran annan klaga tygara vegna, skulu tygum leggja eina undirskrivaða fulltrú við klaguni. Tað léttir um málsviðgerðina, um tygum senda møgulig viðkomandi skjøl (brøv frá tygum, svar frá myndugleikunum osv.) saman við klaguni. Á hendan hátt fáa tygum eisini ofta skjótari svar, tí umboðsmaðurin vanliga hevur tørv á at síggja hesi skjøl.

**Hvat kann umboðsmaðurin gera**
Um umboðsmaðurin eftir at hava kannað málið kemur til ta niðurstøðu, at hann gevur viðkomandi viðhald, kann hann finnast at tí myndugleikanum, sum klagan snýr seg um. Umboðsmaðurin kann eisini heita á myndugleikan um at umhugsa málið av nýggjum og taka eina aðra avgerð. Leggið til merkis, at umboðsmaðurin ikki sjálvur kann broyta eina avgerð. Uppgávan hjá umboðsmanninum er sostatt at greiða myndugleikanum frá, at hesin eftir hansara fatan hevur gjørt eitt mistak.

Í hesum sambandi skulu tygum hava í huga, at umboðsmaðurin hevur avmarkaðar møguleikar fyri at taka støðu til avgerðir, ið eru grundaðar á reinar metingar ella avgerðir, har tað krevst ein serligur førleiki (t.d. læknaligur).

**Hvat hendir, tá umboðsmaðurin fær eina klagu**

Umboðsmaðurin hevur 3 møguleikar at svara eini klagu:

1. Klagan verður kannað nærri.
2. Klagan verður avvíst, tí at umboðsmaðurin ikki kann viðgera hana.
3. Umboðsmaðurin velur ikki at kanna málið.

*1. Klagan verður kannað nærri.*

Heldur umboðsmaðurin, at ein klaga skal kannast nærri, sendir hann hana til viðkomandi myndugleika og biður um eina viðmerking. Samstundis biður hann eisini um at læna møgulig skjøl í málinum. Viðmerkingin frá myndugleikanum verður vanliga send viðkomandi, sum fær møguleika at gera sínar viðmerkingar.

Hann, ið hevur klagað, verður vanliga kunnaður um gongdina í málinum.

Tá myndugleikin og viðkomandi hava gjørt sínar viðmerkingar til málið, er hetta vanliga klárt til endaligu niðurstøðu umboðsmansins. Alt eftir, hvussu nógv mál eru til viðgerðar hjá umboðsmanninum samstundis, og hvussu skjótt myndugleikarnir svara umboðsmanninum, mugu tygum rokna við, at tað kann ganga umleið eitt hálvt ár, áðrenn málið er liðugt viðgjørt.

*2. Klagan verður avvíst.*

Løgtingið hevur í umboðsmanslógini (lóg nr. 60 frá 10. mai 2000) sett mark fyri, nær umboðsmaðurin kann viðgera eina klagu:

*„Klaga um avgerðir, ið møguligur hægri umsitingarmyndugleiki kann broyta, kann ikki sendast umboðsmanninum, fyrr enn viðkomandi hægri myndugleiki hevur tikið avgerð í málinum…“ (§ 6, stk. 3)*

Um tað er møguligt at kæra eina avgerð til ein annan fyrisitingarmyndugleika, skal hetta sostatt verða roynt, áðrenn umboðsmaðurin kann viðgera málið. Avgerðir, sum verða fráboðaðar skrivliga, skulu geva eina vegleiðing um møguligar kærumøguleikar, áðrenn farast kann til umboðsmannin. Eru tygum í iva, kunnu tygum venda tygum til myndugleikan, sum hevur tikið avgerðina, ella møguliga til skrivstovuna hjá umboðsmanninum.

„… Klagan skal vera umboðsmanninum í hendi í seinasta lagi eitt ár eftir, at tey viðurskifti, ið klagað verður um, áttu sær stað.“ (§ 6, stk. 2)

Orðingin „viðurskifti“ fevnir um alt, sum klagast kann um til umboðsmannin, t.d. viðgerðina av einum máli, málsviðgerðartíðina, avgerðina í málinum, atburðin o.s.v. Klaga tygum um eina avgerð, skal hendan sostatt verða tikin innanfyri tað seinasta árið.

Inniheldur klagan til umboðsmannin viðurskifti, sum myndugleikin ikki áður hevur tikið støðu til, sendir umboðsmaðurin næstan altíð klaguna víðari til myndugleikan og biður hendan taka støðu til hesi viðurskiftini. Samstundis verður viðkomandi kunnaður um hetta, og biðin um at bíða við at klaga til umboðsmannin til myndugleikin hevur tikið støðu í málinum. Kemur eingin nýggj

klaga, ger umboðsmaðurin ikki meira við málið.

*3. Umboðsmaðurin velur ikki at kanna málið.*

Í umboðsmanslógini stendur:

*„Umboðsmaðurin tekur støðu til, um grundarlag er fyri víðari kanningum í máli, ið klagað verður um.“ (§ 6, stk. 4)*

Umboðsmaðurin hevur sostatt ikki skyldu til at taka allar klagur upp til viðgerðar. Hann kann nokta at viðgera klaguna sum heild ella bert at viðgera ávís viðurskifti í hesari.

Umboðsmaðurin kannar altíð eina klagu gjølla, áðrenn hann tekur avgerð um at avvísa hana. Í tílíkum metingum verður vanliga hugt at, um tað eru útlit fyri, at umboðsmaðurin kann hjálpa viðkomandi.

Ofta skrivar ella ringir umboðsmaðurin til viðkomandi ella til myndugleikan, fyri at hava eitt trygt grundarlag fyri avgerð síni. T.d. kann hann biðja um skjølini í málinum.

Ein avvísing av at viðgera eina klagu kann sostatt vera úrslitið av einari víðfevndari málsviðgerð hjá umboðsmanninum.

**Umboðsmaðurin kann sjálvur taka eitt mál til viðgerðar**

Umboðsmaðurin kann eisini kanna eitt mál, uttan at tað finst nøkur klaga hesum viðvíkjandi. Umrøða í fjølmiðlunum kann t.d. hava við sær, at umboðsmaðurin gerst varur við eitt mál, sum hann ynskir at kanna nærri. Onkuntíð kunnu klagur vera orsøk til, at umboðsmaðurin fer at kanna viðurskifti, sum tað ikki er klagað um.

Umboðsmaðurin kann sambært §§ 6, stk. 5 og 8, stk. 3 kanna stovnar og tænastustøð v.m., ið hoyra til virkisøki hansara.

**Um umboðsmannin og embætið**

Løgtingið velur fimta hvørt ár ein Løgtingsins umboðsmann. Hevur Løgtingið ikki longur álit á umboðsmanninum kunnu $^{2}/_{3}$ av limunum loysa hann úr starvi.

Umboðsmaðurin setir og loysir úr starvi starvsfólk síni.

Tygum kunnu ringja á tlf. 35 85 00 ella venda tygum til skrivstovuna í Traðagøtu 43, Argir, um tygum hava spurningar.

# *Lógaryvirlit*

Niðanfyri er eitt yvirlit yvir ta lóggávuna, sum er umrødd / nevnd í álitunum frá umboðsmanninum. Yvirlitið fevnir bæði um hesa og tær undanfarnu ársfrágreiðingarnar. Yvirlitið vísir til einstøku málini, ið eru nevnd t.d. 02/23.2, og merkir hetta, at talan er um mál nr. 23.2 í ársfrágreiðingini fyri 2002.


**Lóggáva, kunngerð v.m.** **Mál:**

ALS-lógin (løgtingslóg nr. 113 frá 13.06.1997):
– § 1 .......... 03/10.1
– § 7 .......... 03/10.1
– § 14 .......... 05/28.4
– § 19 .......... 05/28.4
– § 26, stk. 1, 2. pkt .......... 03/10.1

Ábyrgd landsstýrismanna (løgtingslóg nr. 90 frá 04.06.1996):
– § 2 .......... 02/23.2
– § 4 .......... 02/23.2
– § 5 .......... 02/23.2

Barnaforsorgarlógin (Lb. Nr. 104 frá 02. 03.1988):
– § 32, stk. 1 .......... 04/11.2

Barsilsskipanarkunngerðin (kunngerð nr. 91 frá 31.05.2001):
– § 6 .......... 03/20.2

Barsilsskipanarlógin (løgtingslóg nr. 48 frá 03.04.2001):
– § 5 .......... 03/20.2
– § 12 .......... 03/20.2
– § 18 .......... 03/20.2
– § 25 .......... 03/20.2

Býarskipanarlógin (løgtingslóg nr. 13 frá 21.05.1954):
– § 5 .......... 04/21.2
– § 10 .......... 04/21.4
– § 10, stk.2 .......... 04/21.2
– § 12, stk. 1 .......... 02/21.1
– § 15 .......... 02/21.1
– § 17 .......... 02/21.1

Byggisamtyktin fyri Klaksvíkar kommunu
– § 9 .................... 04/21.2
– § 10 .................... 04/21.2
Byggisamtyktin fyri Tórshavnar kommunu kap. I.
– § 4 .................... 04/21.4
– § 7 nr. 1 og 2 .................... 04/21.4
– § 9, stk. 1 .................... 04/21.4
Byggisamtyktin fyri Tórshavnar kommunu kap. IV
– § 5, stk. 6 .................... 04/21.4
– § 25 nr. 5 og 6 .................... 04/21.4
Dagstovnalógin (løgtingslóg nr. 67 frá 10. mai 2000):
– § 8 .................... 05/28.3
– § 10 .................... 05/28.3
– § 11 .................... 05/28.3
Djórasjúkur (Løgtingslóg nr. 16 frá 23.02.2001):
– § 47 .................... 04/23.4
Djórainnflutningur (løgtingslóg nr. 58 frá 22. apríl 2003):
– § 1 .................... 05/29.1
Europeiski mannarættindasáttmálin
(kgl. fyriskipan nr. 136 frá 25.02.2000):
– art. 8 .................... 03/25.1
Fornminnissavnslógin (løgtingslóg nr. 32 frá 02.05.1952):
– § 3 .................... 03/28.3
Forsorgarlógin (lógarkunngerð nr. 100 frá 02.03.1988):
– § 9 .................... 03/20.1
– § 17 .................... 03/20.1
Fólkaskúlalógin (løgtingslóg nr. 125 frá 20.06.1997):
– § 26 .................... 02/27.1
– § 26, stk. 1 .................... 02/27.1
– § 29 .................... 02/27.1
– § 29, stk. 5 .................... 02/27.1
– § 40 .................... 02/27.1
– § 41, stk. 1 .................... 02/27.1
– § 41, stk. 2 .................... 02/27.1
– § 46 .................... 02/27.1
– § 47, stk. 1 .................... 02/27.1
– § 47, stk. 3 .................... 02/27.1

– § 57, stk. 7 .................... 02/27.1
– § 59 .................... 02/27.1
Fríðtíð við løn (Løgtingslóg nr. 30 frá 7.04.1986):
– § 21, stk. 4 .................... 04/10.3
Frítíðargrunnurin (K.nr. 101 frá 12.08.1988):
– § 3 .................... 04/10.3
Frítíðarkunngerðin (kunngerð nr. 14 frá 16.02.1987):
– § 3, stk.1, 1. pkt .................... 03/20.2
Frítíðarlógin (løgtingslóg nr. 30 frá 07.04.1986):
– § 1 .................... 03/20.2
– § 10 .................... 03/20.2
– § 12 .................... 03/20.2
Fyrisitingarlógin (løgtingslóg nr. 132 frá 10.06.1993):
– § 1 .................... 02/27.2
– § 1 .................... 02/27.4
– § 2 .................... 04/11.2
– § 2, stk. 1 .................... 04/21.5
– § 3, stk. 1, nr. 5 .................... 02/21.1
– § 7, stk. 1 .................... 02/27.3
– § 7, stk. 1 .................... 04/11.1
– § 7, stk. 2 .................... 04/11.4
– § 8 .................... 05/28.3
– § 9 .................... 02/28.2
– § 9 .................... 05/28.2
– § 10, stk. 2 .................... 02/28.2
– § 12, stk. 2 .................... 04/28.3
– § 16 .................... 04/23.2
– § 18 .................... 02/28.2
– § 18 .................... 04/10.1
– § 18 .................... 05/28.3
– § 18 .................... 05/29.1
– § 18, stk. 1 .................... 03/21.1
– § 18, stk. 1 .................... 03/28.3
– § 18, stk. 2, nr. 1 .................... 03/21.1
– § 18, stk. 2 .................... 04/21.2
– § 19 .................... 02/28.2
– § 20 .................... 02/28.2
– § 21 .................... 04/28.3

– § 21 ........ 01/11.2
– § 21 ........ 02/10.5
– § 21 ........ 02/11.1
– § 21 ........ 02/28.1
– § 21 ........ 02/28.2
– § 22 ........ 02/28.2
– § 23 ........ 04/28.3
– § 23 ........ 04/23.2
– § 23 ........ 01/11.2
– § 23 ........ 02/10.5
– § 23 ........ 02/28.1
– § 23 ........ 02/28.2
– § 23, stk. 1 ........ 01/11.2
– § 23, stk. 2 ........ 01/11.2
– § 24 ........ 02/28.2
– § 24 ........ 05/28.3
– § 25 ........ 02/28.2
Grundlógin:
– § 14, 2. pkt. ........ 01/28.1
– § 73 ........ 02/21.1
HF-kunngerðin (kunngerð nr. 103 frá 17.07.1996):
– § 20, stk. 2 ........ 02/28.2
HF-lógin (løgtingslóg nr. 107 frá 29.06.1995):
– § 15 ........ 02/28.2
– § 16 ........ 02/28.2
– § 16, stk. 1 ........ 02/28.2
– § 16, stk. 4 ........ 02/28.2
– § 20 ........ 02/28.2
Hýruvognskunngerð í Tórshavn
– § 2, stk. 4 ........ 04/10.2
– § 15, stk. 1 ........ 04/10.2
– § 15, stk. 2 ........ 04/10.2
Hýruvognsreglugerð í Tórshavn (K.nr. 90 frá 20.10.1987):
– § 1 ........ 04/10.2
Innlitslógin (løgtingslóg nr. 133 frá 10.06.1993):
– § 4, stk. 1 ........ 03/11.1
– § 4, stk. 1, 2. pkt. ........ 02/11.1
– § 4, stk. 2 ........ 04/11.2

– § 4, stk. 3 ........ 04/11.1
– § 4, stk. 3 ........ 01/11.2
– § 4, stk. 3 ........ 03/11.1
– § 5, stk. 1, nr. 2 ........ 01/11.1
– § 6 ........ 04/28.1
– § 6 ........ 04/23.3
– § 6 ........ 02/28.2
– § 6 ........ 03/10.2
– § 6 ........ 03/21.2
– § 6 ........ 04/21.1
– § 6, stk. 1 ........ 03/28.3
– § 7 ........ 02/11.1
– § 7 ........ 04/11.2
– § 8 ........ 04/11.2
– § 11 ........ 02/11.1
– § 12 ........ 04/11.5
– § 12, stk. 1 nr. 2 ........ 04/11.3
– § 13 ........ 04/11.5
– § 13, stk. 1 nr. 5 ........ 04/11.3
– § 13, stk. 1, nr. 6 ........ 02/11.1
– § 15 ........ 04/11.2
– § 15, stk. 1 ........ 04/11.4
– § 16 ........ 04/21.1
– § 16 ........ 04/11.5
– § 16, stk. 1 ........ 04/11.3
– § 16, stk. 1 ........ 01/11.1
– § 16, stk. 1 ........ 03/11.1
– § 16, stk. 2 ........ 04/11.1
– § 16, stk. 2 ........ 04/11.3
– § 16, stk. 3 ........ 01/11.1
– § 16, stk. 3 ........ 03/11.1
Kommunulógin (løgtingslóg nr. 45 frá 29.06.1972):
– § 4 ........ 02/27.1
– § 41 ........ 02/21.1
Kommunustýrislógin (løgtingslóg nr. 87 frá 17.05.2000):
– § 12 ........ 02/27.1
– § 12, stk. 1 ........ 02/27.1
– § 13, stk. 1 ........ 02/27.1

– § 13, stk. 2 ........................................ 02/27.1
– § 14 ........................................ 02/27.1
– § 27, stk. 2 ........................................ 02/27.1
– § 55 ........................................ 02/21.1
– § 55 ........................................ 02/27.1
– § 55, stk. 1 ........................................ 02/27.1
Kommunuvallógin (løgtingslóg nr. 44 frá 19.06.1972):
– § 3 ........................................ 02/27.1
Kringvarpslógin (løgtingslóg nr. 22 frá 20.02.1998):
– § 5 ........................................ 01/11.2
– § 5 ........................................ 02/27.4
– § 5, stk. 1 ........................................ 02/27.2
– § 6 ........................................ 02/27.4
– § 6, stk. 1 ........................................ 02/27.4
– § 6, stk. 2 ........................................ 02/27.2
– § 6, stk. 2 ........................................ 01/11.2
– § 13 ........................................ 01/11.2
– § 13 ........................................ 02/27.4
– § 13, stk. 1 ........................................ 01/11.2
– § 13, stk. 2 ........................................ 02/27.4
– § 15 ........................................ 02/27.4
– § 17 ........................................ 01/11.2
– § 18, stk. 2 ........................................ 01/11.2
– § 20, stk. 2 ........................................ 03/27.1
– § 25 ........................................ 01/11.2
– § 25, stk. 1 ........................................ 01/11.2
Kunngerð um gjøld fyri avrit og fotoavrit
(K.nr.199 frá 15.12.93) ........................................ 04/23.2
Landsvegalógin (løgtingslóg nr. 51 frá 25.07.1972):
– § 5 ........................................ 03/21.1
Lærararáðskunngerðin (kunngerð nr. 46 frá 09.05.1997):
– § 7, stk. 2 ........................................ 02/28.2
Læraraútbúgving (løgtingslóg nr. 69 frá 28. mai 1980):
– § 1 ........................................ 05/28.2
– § 16 ........................................ 05/28.2
Matrikuleringslógin (Løgtingslóg nr. 64 frá 11.12.1962):
– § 15 ........................................ 04/21.5
– § 16 ........................................ 04/21.5

– § 17 .......... 04/21.5
– § 18 .......... 04/21.5
– § 20 .......... 04/21.5
Matvørulógin (Løgtingslóg nr. 46 frá 21.06.1985):
– § 41, stk. 5 .......... 04/11.4
Meirvirðisgjaldsfrítøka
(kunngerð nr. 136 frá 17. juni 1993): .......... 02/22.1
Meirvirðisgjaldsfrítøka
(kunngerð nr. 166 frá 12. des. 1992): .......... 02/22.1
Meirvirðisgjaldslógin (løgtingslóg nr. 136 frá 08.09.1992):
– § 1 .......... 02/22.1
– § 2 .......... 02/22.1
– § 2, stk. 3 .......... 02/22.1
– § 2, stk. 5 .......... 02/22.1
– § 3 .......... 02/22.1
– § 4 .......... 02/22.1
– § 5 .......... 02/22.1
– § 12 .......... 02/22.1
Navnakunngerðin (kunngerð nr. 71 frá 29.06.2002):
– § 1-3 .......... 03/25.1
Navnalógin (løgtingslóg nr. 41 frá 26.03.2002):
– § 2, stk. 3 .......... 03/25.1
– § 2, stk. 4 .......... 03/25.1
Ognartøkulógin (lov nr. 69 frá 07.05.1881):
– § 2 .......... 03/21.1
Postgjøld (kunngerð nr. 134 frá 11.10.2001): .......... 02/27.4
Próvtøkukunngerðin (kunngerð nr. 65 frá 27.04.2001):
– § 52, stk. 3 .......... 02/27.3
– § 53 .......... 02/27.3
– § 67 .......... 02/27.3
Rúsdrekkalógin (Løgtingslóg nr. 20 frá 10.03.1992):
– § 1 .......... 04/23.7
– § 9 .......... 04/23.7
– § 10, stk. 1 .......... 04/23.7
– § 11 .......... 04/23.7
– § 13 .......... 04/23.7
Sjónvarpsgjaldskunngerðin (kunngerð nr. 103 frá 20.12.2002):
– § 1 .......... 03/27.1

Skattafyrisitingarlógin (løgtinglóg nr. 169 frá 30.12.1997):
– § 16 ........ 02/10.1
– § 17 ........ 02/10.1
– § 17, stk. 4 ........ 02/10.1
Skipaskráseting (løgtingslóg nr. 9 frá 05.03.1970):
– § 35 ........ 02/23.2
– § 35, stk. 1 ........ 02/23.2
– § 36 ........ 02/23.2
– § 36, stk. 1 ........ 02/23.2
– § 37 ........ 02/23.2
– § 37, stk. 2 ........ 02/23.2
– § 37, stk. 3 ........ 02/23.2
Starvsskipan fyri kommunalar skattakærunevndir
(kunngerð nr. 48 frá 15.04.1998):
– § 5 ........ 02/10.1
– § 8 ........ 02/10.1
– § 9 ........ 02/10.1
– § 11 ........ 02/10.1
– § 13, stk. 2 ........ 02/10.1
Sterkstreymsútbúnaður (Løgtingslóg nr. 134 frá 10.06.1993):
– § 2 ........ 04/29.1
– § 3 ........ 04/29.1
– § 6 ........ 04/29.1
Studentaskúlakunngerðin (kunngerð nr. 102 frá 17.06.1996):
– § 12 ........ 02/28.2
Studentaskúlakunngerðin (kunngerð nr. 102 frá 26.06.2001):
– § 20 ........ 02/27.3
– § 20, stk. 3 ........ 02/27.3
– § 20, stk. 4 ........ 02/27.3
– § 30 ........ 02/27.3
Studentaskúlalógin (løgtingslóg nr. 106 frá 29.06.1995):
– § 9 ........ 02/28.2
– § 10 ........ 02/28.2
– § 10, stk. 1 ........ 02/28.2
– § 10, stk. 4 ........ 02/28.2
– § 13 ........ 02/28.2
– § 13, stk. 1 ........ 02/28.2

– § 13, stk. 2 .......... 02/28.2
– § 13, stk. 3 .......... 02/28.2
Stýrisskipanarlógin (løgtingslóg nr. 103 frá 26.07.1994):
– § 29, stk. 2 .......... 03/28.3
– § 33, stk. 1 .......... 01/28.1
– § 33, stk. 3 .......... 03/28.3
– § 56 .......... 02/27.1
Tænastumannaeftirlønarlógin (løgtingslóg nr. 32 frá 05.07.1971):
– § 2 .......... 01/28.1
– § 10 .......... 01/28.1
Tænastumannalógin (løgtingslóg nr. 31 frá 05.07.1971):
– § 29 .......... 02/28.1
Tænastumannalógin
(løgtingslóg nr. 31 frá 12.07.1971) Kap. 5 .......... 04/28.1
Umboðsmanslógin (løgtingslóg nr. 60 frá 10.05.2000):
– § 4 .......... 02/27.2
– § 4 .......... 02/27.4
– § 4 .......... 03/10.1
– § 4 .......... 03/21.2
– § 4, stk. 2 .......... 01/11.2
– § 4, stk. 4 .......... 04/29.1
– § 4, stk. 4 .......... 04.21.1
– § 4, stk. 5 .......... 04/29.1
– § 5 .......... 02/27.4
– § 6 .......... 02/27.4
– § 6, stk. 1 .......... 03/21.2
– § 6, stk. 2 .......... 04/21.3
– § 6,stk.2 .......... 04/23.1
– § 6, stk. 2 .......... 03/21.2
– § 6, stk. 3 .......... 02/10.1
– § 6, stk. 3 .......... 04/10.1
– § 6, stk. 3 .......... 04/10.2
– § 6, stk. 3 .......... 04/11.2
– § 6, stk. 3 .......... 04/21.3
– § 6, stk. 4 .......... 03/28.3
– § 6, stk. 4 .......... 04/11.1
– § 6, stk. 4 .......... 04/21.3
– § 6, stk. 5 .......... 04/29.1

– § 10 .......... 04/10.3
– § 10 .......... 04/11.5
– § 10, stk. 1 .......... 04/21.1
– § 10, stk. 1 .......... 03/11.1
– § 12 .......... 04/23.3
– § 12 .......... 01/11.2
– § 12 .......... 02/27.2
– § 12 .......... 02/27.4
– § 12 .......... 03/20.1
– § 18 .......... 04/23.1
– § 18 .......... 04/10.3
– § 18 .......... 02/21.1
– § 18, stk. 2 .......... 02/23.1
Veterinert eftirlit (K.nr. 24 frá 16.03.2001):
– § 1 .......... 04/23.4
Veterinert eftirlit-gjøld (K.nr. 124 frá 28.08.2001):
– § 6 .......... 04/23.4
– § 7 .......... 04/23.4
Vinnuligur fiskiskapur (løgtingslóg nr. 28 frá 10.03.1994):
– § 5, stk.3 .......... 04/23.2
– § 5, stk. 3 .......... 04.23.1
– § 5, stk. 4 .......... 04/23.2
– § 5, stk. 4 .......... 04/23.1
– § 5, stk. 4 .......... 04/23.6
– § 7 .......... 04/23.2
– § 7 .......... 04/23.1
– § 7 .......... 02/23.2
– § 8 .......... 02/23.2
– § 8, stk. 4 .......... 02/23.2
– § 28 .......... 04/23.2
– § 31 .......... 04/23.2
– § 31 .......... 04/23.6
– § 31, stk. 2 .......... 04/23.3

# *Leitorð*

Niðanfyri er eitt yvirlit yvir nøkur leitorð, sum eru umrødd / nevnd í álitunum frá umboðsmanninum. Yvirlitið fevnir bæði um hesa og tær báðar undanfarnu ársfrágreiðingarnar. Yvirlitið vísir til einstøku málini, ið eru nevnd t.d. 02/27.1, og merkir hetta, at talan er um mál nr. 27.1 í ársfrágreiðingini fyri 2002.


| **Leitorð:** | **Mál:** |
|---|---|
| Afturtøka av avgerð | 02/27.1 |
| Akravegurin | 03/21.1 |
| Almanna- og heilsumálaráðið | 04/28.3 |
| – | 05/28.3 |
| Almannakunngerðing av kommunustýrisavgerðum | 02/27.1 |
| Almannastovan | 02/10.2 |
| – | 02/10.3 |
| – | 02/10.4 |
| – | 03/10.3 |
| – | 03/20.1 |
| Almennur stovnur | 02/27.2 |
| ALS | 03/10.1 |
| – | 05/28.4 |
| ALS-kærunevndin | 03/10.1 |
| – | 05/28.4 |
| Arbeiðsloysisstuðul | 05/28.4 |
| Álvarslig átala | 02/28.1 |
| – | 02/28.2 |
| – | 04/10.3 |
| – | 04/21.1 |
| – | 04/11.5 |
| – | 05/28.2 |
| – | 05/28.3 |
| Ársfundarætlan | 02/27.1 |
| Ársmet | 02/27.3 |

Átala .......... 01/11.1
– .......... 02/10.1
– .......... 02/10.2
– .......... 02/10.3
– .......... 02/10.4
– .......... 02/23.2
– .......... 02/27.1
– .......... 02/27.3
– .......... 02/28.1
– .......... 02/28.2
– .......... 03/10.1
– .......... 03/10.2
– .......... 03/10.3
– .......... 03/10.4
– .......... 03/11.1
– .......... 03/20.2
– .......... 03/21.2
– .......... 03/28.1
– .......... 03/28.2
– .......... 04/11.1
– .......... 04/10.1
– .......... 04/23.3
– .......... 04/28.2
– .......... 04/11.3
– .......... 04/21.3
– .......... 04/21.5
Ávaring (munnlig) .......... 05/28.1
Ávísingarsøla .......... 02/22.1
Avlamisbilur .......... 03/10.3
Avrit av skjølum .......... 01/11.1
Avtalubrot .......... 02/23.2
Bandaðar útvarpsupptøkur .......... 02/27.4
Barsilspeningur .......... 03/20.2
Barsilsskipanin .......... 03/20.2
BLF-sáttmálin .......... 01/28.1
– .......... 02/28.1
– .......... 02/28.3
Brekað barn .......... 03/20.1

Broyting av ársmetum ........ 02/27.3
Bygdamenning ........ 02/27.1
Byggiloyvi ........ 04/10.1
– ........ 04/21.2
Bygging ........ 04/21.4
Byggisamtyktin fyri Klaksvíkar kommunu ........ 04/21.2
Byggisamtyktin fyri Tórshavnar kommunu ........ 04/21.3
– ........ 04/21.4
Byggiætlan ........ 04/21.4
Bygnaðarbroytingar ........ 02/28.1
Deildarleiðari II ........ 02/28.3
Deildarleiðari I ........ 02/28.3
Diskretioner uppsøgn ........ 01/28.1
Djórainnflutningur ........ 05/29.1
Elnevndin ........ 04/29.1
Endursetan ........ 02/28.1
Fakfelagsbløð ........ 02/27.4
Fakkombinatiónir ........ 02/28.2
Fast starv ........ 05/28.2
FF-blaðið ........ 02/27.4
Fíggjarmálastýrið ........ 01/28.1
–........ 02/22.1
– ........ 02/28.1
– ........ 02/28.3
Fíggjarmáláráðið ........ 03/10.4
Fiskiloyvi ........ 02/23.1
– ........ 03/10.2
– ........ 04/23.1
– ........ 04/23.2
– ........ 04/23.3
– ........ 04/23.5
– ........ 04/23.6
– ........ 05/23.1
Fiskimálastýrið ........ 02/23.1
– ........ 02/23.2
Fiskimáláráðið ........ 03/10.2
– ........ 03/11.1
– ........ 04/23.1

– ........ 04/23.2
– ........ 04/23.3
– ........ 04/23.5
– ........ 04/23.6
– ........ 05/23.1
Fjølmiðlaábyrgdarlóg ........ 02/27.4
Fjølmiðlanevnd ........ 02/27.2
– ........ 02/27.4
Flokking ........ 02/28.3
Fólkaatkvøða um niðurlegging av skúla ........ 02/27.1
Fráboðan til umsøkjarar ........ 02/28.2
Fráboðan um lógarbrek ........ 02/27.2
Frávik frá byggisamtykt ........ 04/21.2
Frítíðargrunnurin ........ 04/10.3
Frítíðarløn ........ 03/20.2
Frítíðarskúli ........ 05/28.3
Fróðskaparsetur Føroya ........ 03/10.4
Fuglafjarðar kommuna ........ 04/10.1
Fyribils fráboðanarskriv ........ 02/28.2
Fyribils niðurstøða ........ 05/29.1
Fyrsti kommunustýrisfundur ........ 02/27.1
Føroya Barnaheim ........ 04/11.2
Føroya Jarðarráð ........ 04.11.1
Føroya Kommunufelag ........ 02/27.1
Føroya Kærustovnur ........ 02/10.1
– ........ 02/10.4
Føroya Landfúti ........ 04/11.4
Føroya Studentaskúli og HF-skeið í Hoydølum ........ 02/27.3
Garantiforskrift ........ 02/27.1
Góður fjølmiðlasiður ........ 02/27.2
– ........ 02/10.1
– ........ 02/28.1
– ........ 02/28.2
Gjøld fyri veterinerar kanningar ........ 04/23.4
Grannahoyring ........ 04/21.2
Grundgeving ........ 01/11.2
– ........ 02/10.5
– ........ 02/11.1

– .................... 02/28.1
– .................... 02/28.2
– .................... 04/21.3
– .................... 04/28.3
Heimild .................... 02/27.1
– .................... 02/28.2
Heilsufrøðiliga Starvsstovan .................... 04/23.4
– .................... 04/11.4
Heimild umboðsmansins mótvegis ÚF .................... 02/27.4
Hjálpartólamiðstøðin .................... 03/10.3
Hósvíkar kommuna .................... 02/21.1
Hoyringsskriv .................... 02/28.2
Hoyvíkar skúli .................... 04/28.1
Hýruvognsloyvi .................... 04/10.2
Hýruvognsnevndin .................... 04/10.2
ILA .................... 04/11.4
Innlendismálaráðið .................... 04/21.2
Innanhýsis arbeiðsskjal .................... 02/11.1
Innlit .................... 01/11.1
– .................... 02/11.1
– .................... 02/28.2
– .................... 03/10.2
– .................... 03/11.1
– .................... 04/11.1
– .................... 04/11.2
– .................... 04/11.3
– .................... 04/21.1
– .................... 04/21.3
– .................... 04/11.5
Innlit í journalkort .................... 01/11.1
– .................... 03/21.2
Innlit í tíðindahandrit .................... 01/11.2
Javnstilling av bløðum í ÚF .................... 02/27.4
Journalisering av teldubrøvum .................... 04/21.5
Journalistiska virksemið hjá ÚF .................... 02/27.4
Journalistiskar metingar .................... 02/27.4
Kappingaravlaðing .................... 02/22.1
Kappingarráðið .................... 02/22.1

Klaksvíkar kommuna .................... 04/21.2
Klaksvíkar Sjúkrahús .................... 04/28.3
Kommunala eftirlitið .................... 02/27.1
Kommunustýrisfundir .................... 02/27.1
Konsignatiónsgoymsla .................... 02/22.1
Konsignatiónsvørur .................... 02/22.1
Kærumyndugleiki .................... 02/27.1
Kærunevndin í almannamálum .................... 03/20.1
Kærurætt .................... 02/27.3
Landsfornfrøðingur .................... 03/28.3
Landsskattakærunevndin .................... 02/10.1
Landsrættardómur viðv. ALS .................... 02/27.4
Landsrættardómur viðv. FF .................... 02/27.4
Landsverkfrøðingurin .................... 02/28.1
–.................... 03/21.1
Loyvisnevndin .................... 04/23.7
Lærarar .................... 04/28.1
Løgmansskrivstovan .................... 02/21.1
– .................... 02/27.1
– .................... 02/28.1
– .................... 03/28.1
Løgmálaráðið .................... 03/25.1
Lønarflokking .................... 03/10.4
Lønar- og setanartreytir .................... 01/28.1
Løgreglan .................... 04/29.1
Magistarafelag Føroya .................... 03/28.3
Marknaeftirlit .................... 04/23.4
Marknagilsvegurin .................... 03/21.2
Matrikulstovan .................... 04/21.5
Málsviðgerðartíð .................... 02/10.1
– .................... 02/10.2
– .................... 02/10.3
– .................... 02/10.4
– .................... 02/10.5
– .................... 02/21.1
– .................... 03/10.1
– .................... 03/10.3
– .................... 03/10.4

– ........................................................ 03/20.2
– ........................................................ 04/10.1
– ........................................................ 04/23.3
– ........................................................ 04/10.3
– ........................................................ 04/21.1
Meirvirðisgjald av heimavirkaðum vørum ........................ 02/22.1
Menningarstovan ........................................... 02/22.1
Mentamálastýrið ........................................... 02/27.1
– ........................................................ 02/28.2
– ........................................................ 02/28.3
– ........................................................ 02/27.3
Mentamáláráðið ........................................... 03/10.4
– ........................................................ 03/27.1
– ........................................................ 03/28.3
– ........................................................ 04/28.1
– ........................................................ 05/28.2
Metingarkostnaður ......................................... 02/21.1
Metingarnevnd ............................................. 02/21.1
Mikladals kommuna ......................................... 02/27.1
Mismunur .................................................. 02/28.2
Morgunsendingar ........................................... 02/27.4
Mótrokning ................................................ 01/28.1
Munarløn .................................................. 01/28.1
Møna ...................................................... 04/21.4
Navnanevndin .............................................. 03/25.1
Navnauppkalling ........................................... 03/25.1
Námsfrøðingur ............................................. 05/28.3
Niðurlegging av skúlum .................................... 02/27.1
Norðuratlantsbólkurin ..................................... 02/27.2
Notatskylda ............................................... 03/10.2
– ........................................................ 03/28.3
– ........................................................ 04/23.3
– ........................................................ 04/21.1
Notatskylda, ikki-lógarfest ............................... 03/10.2
Nýggja stýrisskipanin ..................................... 02/28.1
Nývalt kommunustýri ....................................... 02/27.1

Oljumálaráðið ........ 04/21.2
– ........ 04/21.3
– ........ 04/21.4
Ognartøka ........ 02/21.1
– ........ 03/21.1
Ognartøkuendurgjald ........ 02/21.1
Ógegni ........ 02/21.1
Ógilding av kommunustýrisavgerðum ........ 02/27.1
Óheftur tíðindaflutningur ........ 02/27.4
Óhøviskur málburður ........ 02/27.4
Partshoyring ........ 02/28.2
– ........ 03/28.3
– ........ 05/28.3
– ........ 05/28.5
– ........ 05/29.1
Partsinnlit ........ 04/11.2
– ........ 05/28.2
Prísir fyri bond og fløgur frá ÚF og SVF ........ 01/11.2
Programmábyrgdin í ÚF ........ 02/27.4
Programmvirksemið hjá ÚF ........ 02/27.4
Programmvirksemið hjá ÚF og SVF ........ 01/11.2
Próvbyrða ........ 04/23.6
Próvtøkubók ........ 02/27.3
Redaktionel avgerð ........ 02/27.4
Rúsdrekka ........ 05/28.1
Ræðisavmarking ........ 02/23.2
Rætti myndugleiki ........ 02/28.2
Samanlegging av stovnum ........ 02/28.1
Samstarvsevni ........ 02/28.1
Samstarvstrupulleikar ........ 02/28.1
Setanar- og lønarviðurskifti ........ 02/28.3
Setanarbólkur ........ 02/28.1
– ........ 03/28.2
– ........ 04/28.3
Setanarbræv ........ 02/28.2
Setanarmyndugleiki ........ 02/28.2
Setanarpolitikkur ........ 02/28.1
– ........ 03/28.3

Setanarsamrøður ............ 03/28.3
– ............ 04/28.3
Setursskrivari ............ 03/10.4
SEV ............ 04/29.1
Siðvenja ............ 01/28.1
Sjálvsognarstovnar ............ 04/11.2
Sjónvarp Føroya ............ 01/11.2
– ............ 01/11.1
– ............ 03/27.1
Sjónvarpsgjald ............ 03/27.1
Skattakærunevnd ............ 02/10.1
Skattur og avgjøld ............ 02/10.1
– ............ 02/22.1
Skeinkiloyvi ............ 04/23.7
Skipaskrásetingin ............ 02/23.2
Skopunar skúli ............ 04/28.1
Skrivligar uppgávur ............ 02/27.3
Skrivligt svar ............ 03/10.2
Skúlamyndugleikar á staðnum ............ 02/27.1
Skúlanevnd ............ 02/27.1
Skúlaumdømi ............ 02/27.1
Skúlaøki ............ 02/27.1
Skúlin á Trøllanesi ............ 02/27.1
Starvsfólka- og arbeiðsmarknaðarmál ............ 01/28.1
Starvsfólka- og arbeiðsmarknaðarmál v.m. ............ 02/28.1
Starvsfólkapolitikkur ............ 02/28.1
Starvssetan ............ 02/28.1
– ............ 02/28.2
– ............ 05/28.2
– ............ 05/28.3
– ............ 05/28.5
Streymstuldur ............ 04/29.1
Studentaskúlin og HF- skeiðið í Hoydølum ............ 02/28.2
Subjektivur tíðindaflutningur ............ 02/27.4
Sundurbýting ............ 04/21.3
– ............ 04/21.5
Svartlisting ............ 02/27.4
Teldupostur ............ 02/11.1

Thorvald Stoltenberg ........................................................ 02/27.2
Tíðindabløð ........................................................ 02/27.4
Tíðindaflutningur ........................................................ 01/11.2
– ........................................................ 02/27.2
– ........................................................ 02/27.4
Tilmæli ........................................................ 01/11.2
– ........................................................ 01/28.1
– ........................................................ 02/21.1
– ........................................................ 02/27.3
– ........................................................ 03/21.2
– ........................................................ 03/25.1
– ........................................................ 04/23.3
– ........................................................ 04/23.5
– ........................................................ 04/11.2
– ........................................................ 04/23.6
– ........................................................ 04/21.2
Tilmæli um setan í starv ........................................................ 02/28.2
Toll- og Skattstova Føroya ........................................................ 02/10.1
– ........................................................ 02/22.1
Tórshavnar býráð ........................................................ 01/11.1
– ........................................................ 04/10.2
– ........................................................ 04/11.3
– ........................................................ 04/21.1
– ........................................................ 04/21.3
– ........................................................ 04/21.4
– ........................................................ 04/11.5
– ........................................................ 04/21.5
Tórshavnar kommuna ........................................................ 03/21.2
Tvøroyrar kommuna ........................................................ 05/28.3
Tænastumaður ........................................................ 01/28.1
Tænastumannaeftirløn ........................................................ 01/28.1
Umboðan ........................................................ 05/28.3
Ummæli ........................................................ 04/21.5
Undantaksloyvi viðv. Byggisamtykt ........................................................ 04/21.3
Undirvísing og gransking v.m. ........................................................ 02/27.1
Undirvísingarárslok ........................................................ 02/27.3
Undirvísingarhøli ........................................................ 02/27.1
Upplýsingarskylda-ikki lógarfest ........................................................ 04/10.2

Uppsøgn ........ 02/28.1
Útgravingarloyvi ........ 04/21.4
Útoyggjafulltrúi ........ 03/28.1
Útoyggjanevndin ........ 02/27.1
Uttanfyristandandi klagari ........ 02/28.1
Útvarp Føroya ........ 01/11.2
– ........ 02/27.2
– ........ 02/27.4
Útvarpsnevndin ........ 02/27.4
Vanbýti í tíðindaflutninginum hjá ÚF ........ 02/27.4
Vandamikil djór ........ 05/29.1
Vegleiðing um uppafturtøku ........ 02/27.3
Veiðuloyvi ........ 02/23.1
– ........ 04/23.1
Victoria ........ 03/25.1
Viðtøkuføri kommunustýrisins ........ 02/27.1
Vinnuframagrunnurin ........ 02/10.5
Vinnulívs- og Fiskivinnumál ........ 02/23.1
Vinnumálastýrið ........ 02/22.1
– ........ 02/28.1
Vinnumálaráðið ........ 03/20.2
– ........ 03/21.1
– ........ 04/10.2
– ........ 04/23.4
– ........ 04/11.4
– ........ 05/29.1
Virkandi skúli ........ 02/27.1